

RI



Na

Telephone: +47

# LØGTINGS
# TIDINDI

# 1985

Kirin Petersen

LØGTINGSTÍÐINDI 1985

# Løgtingstíðindi

# 1985

**Bind A**

Løgtingsmál

TÓRSHAVN 1989

Løgtingstíðindi 1985.
© Føroya Løgting.
Lagt til rættis: Esther Bech.
Lay out, fotosats, umbr.,
repro og prent: Einars Offsett.
Hefting: Helge Justinussen.

## LØGTINGSMÁL Í NUMMARRØÐ


| | | bls. |
|---|---|---|
| | Ólavsøkutingið 1985 | 1 |
| | Tingnevndir | 4 |
| | Farloyvi | 7 |
| | Frágreiðing frá løgmanni 1985 | 9 |
| 1. | Broyting í lógini um kleking av rognum og aling av fiski | 27 |
| 2. | Broyting í løgtingslóg um forboð móti innflutningi av livandi sílum og laksi | 29 |
| 3. | Uppskot um at seta tingnevnd at endurskoða heimastýrislógina | 31 |
| 4. | Skattligur stuðul til sjálvfiggjan av útbúgving | 33 |
| 5. | Broyting í løgtingslóg um apotek | 36 |
| 6. | Broyting í skattalógini | 38 |
| 7. | Broyting í løgtingslóg um cykainnflutningsgjald | 41 |
| 8. | Fíggjarløgtingslóg 1986 | 43 |
| 9. | Broyting í happadráttarlógini | 72 |
| 10. | Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar v. fl. | 75 |
| 11. | Lýsing av einum millumtjóða orkuprogrammi í Føroyum | 78 |
| 12. | Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya | 80 |
| 13. | Broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna | 81 |
| 14. | Yvirtøka av Føroya flúgvingini | 84 |
| 15. | Veðhald fyri láni til Nólsoyar kommunu | 88 |
| 16. | Broyting í fólkatingsvallógini | 89 |
| 17. | Setan av yvirlækna í ortopediskum sjúkum á landssjúkrahúsinum | 91 |
| 18. | Broyting í skattalógini | 94 |
| 19. | Ókeypis skúlabøkur til næmingar á studentaskúlum og HF-skeiðum | 95 |
| 20. | Broyting í lóg um ráfiskagrunn | 97 |
| 21. | Nýggj arvalóg | 100 |

22. Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir ..... 102
23. Heilsufrøðilig Starvsstova ..... 104
24. Grannskoðan av almennum roknskapum, 1 Húsalánsgrunnurin 106
24. Grannskoðan av almennum roknskapum, 2 Mcnningargrunnur Ídnaðarins ..... 109
24. Grannskoðan av almennum roknskapum, 3 Útvarp Føroya .... 110
25. Hjálp tíl stovnan av heimum ..... 111
26. Føroysk myntaframleiðslu sum arbeiðsskapandi virkseini ..... 113
27. Altjóða sáttmáli um, hvør lóg skal galda fyri sáttmálaskyldu v. m. 115
28. Broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving ..... 117
29. Broyting í útvarpslógini ..... 119
30. Broyting í lógini um bygdasøvn við mentunnarsøguligum virksemi ..... 122
31. Veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v. m. á goymslu ..... 125
32. Skipan millum Føroyar og EEC um sínamillum fiskirættindi í 1986 ..... 127
33. Partapeningur í P/F Norðís, Eiði ..... 139
34. Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v. m. ..... 142
35. Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1986 ..... 146
36. Nýggj brunalóg ..... 149
37. Berghol til Gásadals ..... 154
38. Broytingar í skattalógunum ..... 156
39. Umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag ..... 191
40. Skattur av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum ..... 200
41. Ríkislóg um almennar skráir ..... 205
42. Skipan millum Føroyar og Noreg um sinamillum fiskirættindi í 1986 ..... 207
43. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1986 ..... 214
44. Byggjan av hølum til Bileftirlitið ..... 224
45. Løgtingslóg um frítíð við løn ..... 230
46. Broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging ..... 249
47. Løgtingslóg um broyting í lóg um landbúnaðarins frama ..... 252
48. Broytingar í løgtingslóg um ferðslu ..... 254
49. Landsstýrismál 1983/84 (LM. 84/84) ..... 260
50. Løgtingsmál um Húsahjálpargrunn ..... 264
51. Broyting i løgtingslóg um húsalánsgrunn ..... 268
52. Landsstýrismál ..... 272
53. Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1986 ... 272
54. Løgtingslóg um dýping av Ytra Polli í Skopun ..... 275

55. Løgtingslóg um útbygging av Hests havn ..... 277
56. Løgtingslóg um studning til havnaviðkan og bygging av ferjuhavnum ..... 280
57. Løgtingslóg um studning til Viðareiðis/Hvannasunds o. a. kommunur til ávís arbeiðir í samband við bygging ella útbygging av ídnaðar- ella øðrum virkjum á havnarøki í avvarðandi kommunum ..... 289
58. Vegir og lendingar ..... 297
59. Veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins ..... 310
60. Veðhald fyri láni til Føroya Ídnaðargrunn ..... 312
61. Landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur ..... 313
62. Broyting í løgtingslóg um studning til veiðu av ídnaðarfiski ..... 316
63. Trygdargrunnur løntakaranna ..... 322
64. Endurgjald til familjur, ið vilja passa egin børn ..... 327
65. Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum ..... 332
66. Kanning av føroysku flogvallaviðurskiftunum ..... 336
67. Nýggj lóggáva og nýggjar reglur um trygging í Føroyum ..... 338
68. Um nýtsluna av m/tr. »Magnus Heinason« ..... 341
69. Um serskatting av hjúnafelaga ..... 342
70. Rættargangslógin ..... 344
71. Frádráttur í skattskyldugu inntøkuni av gávum til ávísar felagsskapir ..... 348
72. Broyting í revsilógini ..... 350
73. Keyp av rognum ..... 351
74. Veðhald fyri lánum til smærri idnaðarvirkir ..... 355
75. Broyting í løgtingslóg um Føroya Náttúrugripasavn ..... 357
76. Broytingar í borgarligu revsilógini ..... 360
77. Veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins ..... 362
78. Sølubúð við tollfrium vørum á flogvøllinum ..... 364
79. Setan av ríkislóg um grønlendska flaggið í Føroyum ..... 372
80. Regulering av føroyska fiskiskapinum í 1986 í kanadiskum sjógvi 372
81. Lán til keyp av húsum til Landsmiðstøð fyri undirvísingarambo 375
82. Stuðul til bygging av 2. byggistigi av Tekniska skúlanum í Klaksvík ..... 378
83. Stuðul til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali 380
84. Broyting í løgtingslóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum 383
85. Broyting í lógini um landsbanka ..... 385
86. Løgtingslóg um hvalaveiðu ..... 387
87. Broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v. m. ..... 390
88. Løgtingslóg um landsjørð ..... 392
89. Søla av parti av landssjúkrahúsins føstu ogn ..... 405

90. Broyting í løgtingslóg um vernd av dýrum ..... 409
91. Løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um fuglaveiðu v. m. .... 411
92. Sáttmálaskjal um Tingmannaráð útnorðurs ..... 419
93. Bygging í Tinganesi..... 422
94. Broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna ..... 425
95. Lán til Telefonverk Føroya Løgtings ..... 427
96. Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin ..... 434

100-
1. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi rutusigling inn á Skálafjørðin ..... 437
2. Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi fosturtøku í Føroyum ..... 438
3. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi lántøku hjá Tórshavnar kommunu ..... 442
4. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferjulegu í Kirkjubø ..... 446
5. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi frádrátti í pensjónum..... 447
6. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi telefonsambandinum til/frá og millum bygdir í Vágum ..... 451
7. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi byggisamtyktini í Kollafirði ..... 454
8. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi atløguviðurskiftunum hjá Strandfaraskipum Landsins í Havn ... 455
9. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi kommunalari barnaansing ..... 457
10. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferjuhavnini inni á Firði í Vestmanna..... 460
11. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi bygging av posthúsi á Tvøroyri..... 460
12. Fyrispurningur til løgmans viðvíkjandi uppsøgn av postmeistaranum ..... 461
13. Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrislim, viðvíkjandi vanlukkutrygging ..... 462
14. Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrislim, viðvíkjandi upplýsingum um skatt ..... 463
15. Fyrispurningur til Atla Dam, løgmann, viðvíkjandi fiskivinnuavtaluni Ísland-Føroyar ..... 465
16. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferðasambandinum til Mykines ..... 466

100-
17. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi nýggjum millumbylgjusendara ..... 468
18. Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, viðvíkjandi starvsfólkatørvinum á psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum ..... 470
19. Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, viðvíkjandi deild á Føroya Handilsskúla á Kambsdali og seinna byggistigi av Tekniska Skúla í Klaksvík ..... 472
20. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi bygging av ellis- og røktarheimi í Sandoy ..... 475
21. Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, viðvíkjandi bygging av høltum til Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy ..... 476
22. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi bygging av umlættingarheimi til brekað í Klaksvík, og hvat landsstýrið ætlar at gera fyri vinnurekandi, tá tey verða sjúk og gomul ..... 478
23. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferjulegu í Kirkjubø ..... 481
24. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferjulegu í Kirkjubø ..... 483
25. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi dálking av Sørvágs firði ..... 486

# INNIHALDSYVIRLIT

## ÓLAVSØKUTINGIÐ 1985


| Løgtings-mál nr. | | Bls. |
|---|---|---|
| | Frágreiðing frá løgmanni 1985 | 9 |
| | **Tingnevndir** | |
| | Tingnevndir 1985 | 4 |
| | **Almannamál** | |
| 10. | Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar v. fl. | 75 |
| 24-1. | Grannskoðan av almennum roknskapum, 1: Húsalánsgrunnurin | 106 |
| 25. | Hjálp til stovnan av heimum | 111 |
| 46. | Broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging | 249 |
| 50. | Løgtingslóg um Húsahjálpargrunn | 264 |
| 51. | Broytingar í løgtingslóg um húsalánsgrunn | 268 |
| 64. | Endurgjald til familjur, ið vilja passa egin børn | 327 |
| 96. | Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin | 434 |
| 100-5. | Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, frá Jógvani Sundstein viðvíkjandi frádrátti í pensjónum | 447 |
| 100-9. | Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, frá Jóannesi Dalsgaard og Karini Kjølbro viðvíkjandi kommunalari barnaansing | 457 |
| 100-20. | Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, frá Eyðuni Videro viðvíkjandi bygging av ellis- og røktarheimi í Sandoy | 475 |
| 100-22. | Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, frá Heina O. Heinesen viðvíkjandi bygging av umlættingarheimi til brekað í Klaksvík v. m. | 478 |
| | **Arbeiðaramál** | |
| 26. | Føroysk myntaframleiðslu sum arbeiðsskapandi virksemi | 113 |
| 45. | Løgtingslóg um fritíð við løn | 230 |
| 63. | Trygdargrunnur løntakaranna | 322 |
| | **Bergholsmál** | |
| 37. | Berghol til Gásadals | 154 |

**Dóms- og løgreglumál**

44. Byggjan av hølum til Bileftirlitið ..... 224
48. Broytingar í løgtingslóg um ferðslu ..... 254
91. Løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um fuglaveiðu v. m. 411
100-2. Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann, frá Tordi Niclasen viðvíkjandi fosturtøku í Føroyum ..... 438

**Fíggjarmál**

7. Broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald ..... 41
8. Fíggjarløgtingslóg 1986 ..... 43
9. Broyting í happadráttarlóginí ..... 72
33. Partapeningur í P/F Norðís, Eiði ..... 139
78. Sølubúð við tollfrium vørum á flogvøllinum ..... 364

**Fiskaaling**

1. Broyting í lóginí um kleking av rognum og aling av fiski .... 27
2. Broyting í løgtingslóg um forboð móti innflutningi av livandi sílum og laksi ..... 29

**Fiskivinnumál**

13. Broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna ..... 81
20. Broyting í lóg um ráfiskagrunn ..... 97
32. Skipan millum Føroyar og EEC um sínamillum fiskirættindi í 1986 ..... 127
35. Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1986 ..... 146
42. Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1986 ..... 207
43. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1986 ..... 214
53. Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1986 272
62. Broyting í løgtingslóg um studning til veiðu av iðnaðarfiski 316
68. Um nýtsluna av m/tr. »Magnus Heinason« ..... 341
80. Regulering av føroyska fiskiskapinum í 1986 í kanadiskum sjógvi ..... 372
84. Broyting í løgtingslóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum ..... 383
94. Broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna ..... 425
100-15. Fyrispurningur til Atla Dam, løgmann, frá Jógvani I. Olsen viðvíkjandi fiskivinnuavtaluni Ísland-Føroyar ..... 465

**Havnir, lendingar, vegir og berghol**

37. Berghol til Gásadals ..... 154

| | | |
|---|---|---|
| 54. | Løgtingslóg um dýping av Ytra Polli í Skopun | 275 |
| 55. | Løgtingslóg um útbygging av Hests havn | 277 |
| 56. | Løgtingslóg um studning til havnaviðkan og bygging av ferjuhavnum | 280 |
| 57. | Løgtingslóg um studning til Viðareiðis/Hvannasunds o.a. kommunur til ávís arbeiðir í samband við bygging ella útbygging av ídnaðar- ella øðrum virkjum á havnarøki í avvarðandi kommunum | 289 |
| 58. | Vegir og lendingar | 297 |
| 100-4. | Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Paula Elfefsen viðvíkjandi ferjulegu í Kirkjubø | 446 |
| 100-8. | Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Jákupi Lindenskov viðvíkjandi atløguviðurskiftunum hjá Strandfaraskipum Landsins í Havn | 455 |
| 100-10. | Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Olafi Olsen viðvíkjandi ferjuhavnini inni á Firði í Vestmanna | 460 |
| 100-23. | Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Jógvani Sundstein viðvíkjandi ferjulegu í Kirkjubø | 481 |
| 100-24. | Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Asbjørn Joensen viðvíkjandi ferjulegu í Kirkjubø | 483 |

**Heilsumál**

| | | |
|---|---|---|
| 5. | Broyting í løgtingslóg um apotek | 36 |
| 17. | Setan av yvirlækna í ortopediskum sjúkum á landssjúkrahúsinum | 91 |
| 23. | Heilsufrøðilig Starvsstova | 104 |
| 89. | Søla av parti av landssjúkrahúsins føstu ogn | 405 |
| 100-18. | Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, frá Tordi Niclasen viðvíkjandi starvsfólkatørvinum á psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum | 470 |

**Ídnaðarmál**

| | | |
|---|---|---|
| 22. | Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir | 102 |
| 24. | Grannskoðan av almennum roknskapum. 2: Menningargrunnur Ídnaðarins | 109 |
| 59. | Veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins | 310 |
| 60. | Veðhald fyri láni til Føroya Ídnaðargrunn | 312 |
| 73. | Keyp av rognum | 351 |

**Kommunumál**

| | | |
|---|---|---|
| 74. | Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir | 355 |
| 15. | Veðhald fyri láni til Nólsoyar kommunu | 88 |
| 61. | Landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur | 313 |

100-3. Fyrispurningur til N. P. Danielsen, landsstýrismann, frá P. Michelsen viðvíkjandi lántøku hjá Tórshavnar kommunu 442
100-7. Fyrispurningur til N. P. Danielsen, landsstýrismann, frá Øssuri av Steinum viðvíkjandi byggisamtyktini í Kollafirði 454

**Landbúnaður**

47. Løgtingslóg um broyting í lóg um landbúnaðarins frama ... 252
88. Løgtingslóg um landsjørð ..... 392
90. Broyting í løgtingslóg um vernd av dýrum ..... 409

**Landsbankin**

85 Broyting í lógini um landsbanka ..... 385

**Landsstýrið**

93. Bygging í Tinganesi ..... 422

**Landsstýrismál**

49. Landsstýrismál 1983/84 (LM. 84/84) ..... 260
52. Landsstýrismál 1984/85 ..... 272

**Lán og -ábyrgdir**

67. Nýggj lóggáva og nýggjar reglur um trygging í Føroyum .... 338
77. Veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins ..... 362
95. Lán til Telefonverk Føroya Løgtings ..... 427
96. Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin ..... 434

**Løgtingið**

3. Uppskot um at seta tingnevnd at endurskoða heimastýrislógina 31
92. Sáttmálaskjal um Tingmannaráð útnorðurs ..... 419

**Orkumál**

11. Lýsing av einum millumtjóða orkuprogrammi í Føroyum ... 78

**Ríkismál**

79. Setan av ríkislóg um grønlendska flaggið í Føroyum ..... 372

**Rættarmál**

12. Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya ..... 80
21. Nýggj arvalóg ..... 100
27. Altjóða sáttmáli um, hvør lóg skal galda fyri sáttmálaskyldu v.m. 115
36. Nýggj brunalóg ..... 149
41. Ríkislóg um almennar skráir ..... 205
70. Rættargangslógin ..... 344
72. Broyting í revsilógini ..... 350
76. Broytingar í borgarligu revsulógini ..... 360

**Samferðslumál**

14. Yvirtøka av Føroya flúgvingini ..... 84
66. Kanning av føroysku flogvallaviðurskiftunum ..... 336
100-1. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Jógvani I. Olsen viðv. rutusigling inn á Skálafjørðin ..... 437

| | | |
|---|---|---|
| 100-16. | Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Paula Ellefsen viðvíkjandi ferðasambandinum til Mykines ..... | 466 |
| | **Sjóvinnumál** | |
| 28. | Broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving ..... | 117 |
| 86. | Løgtingslóg um hvalaveiðu ..... | 387 |
| | **Skattamál** | |
| 4. | Skattligur stuðul til sjálvfiggjan av útbúgving ..... | 33 |
| 6. | Broyting í skattalógini ..... | 38 |
| 18. | Broyting í skattalógini ..... | 94 |
| 34. | Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v. m..... | 142 |
| 38. | Broytingar í skattalógunum ..... | 156 |
| 39. | Umskipan av persónliga ríknum vinnuvirki til partafelag ... | 191 |
| 40. | Skattur av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum .... | 200 |
| 69. | Um serskatting av hjúnafelaga ..... | 342 |
| 71. | Frádráttur í skattskyldugu inntøkuni av gávum til ávísar felagsskapir ..... | 348 |
| 87. | Broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v. m. ... | 390 |
| 100-14. | Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrislim, frá Olafi Olsen viðvíkjandi upplýsingum um skatt ..... | 463 |
| | **Skúla- og mentannarmál** | |
| 19. | Ókeypis skúlabøkur til næmingar á studentaskúlum og HF-skeiðum ..... | 95 |
| 30. | Broyting í lógini um bygdasøvn við mentunnarsøguligum virksemi | 122 |
| 75. | Broyting í løgtingslóg um Føroya Náttúrugripasavn ..... | 357 |
| 81. | Lán til keyp av húsum til Landsmiðstøð fyri undirvísingarambo | 375 |
| 82. | Stuðul til bygging av 2. byggistigi av Tekniska skúlanum í Klaksvík | 378 |
| 83. | Stuðul til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali | 380 |
| 100-19. | Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, frá Eilif Samuelsen viðvíkjandi deild Føroya Handilsskúla á Kambsdali og seinna byggistigi av Tekniska Skúla í Klaksvík | 472 |
| 100-21. | Fyrispurningur til J. Durhuus, landsstýrismann, frá Eilif Samuelsen viðv. bygging av hølum til Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy | 476 |
| | **Telefon- og postmál** | |
| 95. | Lán til Telefonverk Føroya Løgtings ..... | 427 |
| 100-6. | Fyrisp. til L. Klein, landsstýrismann, frá I. Johannesen og Sv. Aa. Ellefsen viðv. telefonsambandinum til/frá og millum bygdir í Vágum | 451 |
| 100-11. | Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Sverra Midjord viðvíkjandi bygging av posthúsi á Tvøroyri ..... | 460 |
| 100-12. | Fyrispurningur til løgmans frá Óla Breckmann viðvíkjandi uppsøgn av postmeistaranum ..... | 461 |
| | **Tollmál** | |
| 78. | Sølubúð við tollfrium vørum á flogvøllinum ..... | 364 |

**Tryggingarmál**

100-13. Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrislim, frá Olafi Olsen viðvíkjandi vanlukkutrygging ..... 462

**Umhvørvismál**

100-25. Fyrispurningur til Nicls Paula Danielsen, landsstýrismann, frá Svend Aage Ellefsen viðv. dálking av Sørvágs firði 486

**Útvarps- og sjónvarpsmál**

24-3. Grannskoðan av almennum roknskapum.
3: Útvarp Føroya ..... 110

29. Broyting í útvarpslógini ..... 119

65. Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum ..... 332

100-17. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, frá Tordi Niclasen viðvíkjandi nýggjum millumbylgjusendara ..... 468

**Valmál**

16. Broyting í fólkatingsvallógini ..... 89

# Ólavsøkutingið 1985

Ár 1985, ólavsøkudag kl. $13^{00}$ varð løgtingið sett. Løgtingsformaðurin frá seinastu tingsetu, Jógvan Sundstein, setti tingið sambært skriv, dagf. 11. juli 1985.

Tingmenninir eru:

*Norðoya valdømi:*
Anfinn Kallsberg, Viðareiði, ff.,
Vilhelm Johannesen, Klaksvík, jf.,
Asbjørn Joensen, Klaksvík, sj.,
Heini O. Heinesen, Kunoy, tf.

*Eysturoyar valdømi:*
Olaf Olsen, Fuglafirði, ff.,
Jógvan Olsen, Toftir, sb.,
Johs. Martin Olsen, Strendur, sb.,
Jørgen Thomsen, Skála, jf.,
Signar Hansen, Fuglafirði, tf.,
Adolf V. Hansen, ff. og kr. ff.

*Norðstreymoyar valdømi:*
Agnar Nielsen, Vestmanna, sb.,
Tummas Arabo, Signabøur, jf.,
Jógvan Durhuus, Vestmanna, tf.

*Suðurstreymoyar valdømi:*
Óli Breckmann, Tórshavn, ff.,
Poul Michelsen, Tórshavn, ff.,
Jógvan Sundstein, Tórshavn, lf.,
Pauli Ellefsen, Tórshavn, sb.,

Eilif Samuelsen, Tórshavn, sb.,
Jóannes Dalsgaard, Tórshavn, jf.,
Jákup Lindenskov, Tórshavn, jf.,
Karin Kjølbro, Argir, tf.,
Erlendur Patursson, Kirkjubø, tf.,
Tordur Niclasen, Eiði, ff. og kr. ff.

*Vága valdømi:*
Svend Åge Ellefsen, Sandavági, ff.,
Ivan Johannesen, Miðvági, sb.

*Sandoyar valdømi:*
Eyðun Viderø, Sandi, ff.,
Tórálvur Mohr Olsen, Sandi, jf.

*Suðuroyar valdømi:*
Flemming Mikkelsen, Vági, sb.,
Atli P. Dam, Tórshavn, jf.,
Henrik Old, Tórshavn, jf.,
Hergeir Nielsen, Leitið, Akrar, tf.

31. juli las formaðurin skriv frá løgmanni og landsstýrismonnunum Vilhelm Johannesen og Jógvan Durhuus, sum allir vegna stóra arbeiðsbyrðu í landsstýrinum biðja um, at næsti maður teirra fyribils fær pláss á tingi.

Eftir at valbrøvini vóru kannað, varð við 29 atkvøðum fyri, ongari ímóti, samtykt, at Sverre Midjord, Poul Jacob Olsen og Øssur av Steinum skuldu taka sæti á tingi fyri omanfyri nevndu.

30. januar 1986 boðsendi tingformaðurin floksformonnunum til fundar um spurningin viðvíkjandi at senda tingið heim, og nær framløgusteðgur skuldi vera.

Formaðurin segði, at hann umhugsaði at seta framløgusteðg um 20. februar og at lata tingið fara heim um Grækarismessutíð.

20. februar segði formaðurin frá, at tingmenn kundu koma við fyrispurningum næsta fund, 24. februar. Annars var freistin úti.

Sama dag boðaði formaðurin frá, at 2 uppskot skuldu koma frá Fólkaflokkinum og 28 uppskot frá landsstýrinum.

4. april las tingformaðurin skriv frá sjúkrahússtjóranum, sum boðaði frá, at Tordur Niclasen, løgtingsmaður, er valdur til formann fyri ráðleggingarnevndini fyri sjúkrahúsverkið.

17. apríl las formaðurin skriv frá Kristiliga Fólkaflokkinum, undirskrivað av landsformanni, tingformanni, landsstýrismanni og varatinglimi floksins, har teir siga, at Adolf V. Hansen ikki umboðar Kristiliga Fólkaflokkin longur á tingi. Teir vístu samstundis á, at Adolf V. Hansen sambært responsum frá Johan Djurhuus, skrivstovustjóra, er uttanflokka tingmaður.

Løgmaður endaði síðani tingsetuna.

# Tingnevndir

**Valdar 30. juli 1985**

FÍGGJARNEVNDIN

**Fastir limir:** Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Ivan Johannesen, Svend Aage Ellefsen, Anfinn Kallsberg.

**Tiltakslimir:** Jákup Lindenskov, Hergeir Nielsen, Hilmar Kass, Tórálvur Mohr Olsen, Johs. M. Olsen, Eyðun Viderø Poul Michelsen.

FISKIVINNUNEVNDIN

**Fastir limir:** Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Kass, Tordur Niclasen, Erlendur Patursson, Jógvan Olsen, Olaf Olsen, Anfinn Kallsberg.

**Tiltakslimir:** Henrik Old, Asbjørn Joensen, Heini O. Heinesen, Signar Hansen, Eilif Samuelsen, Svend Aage Ellefsen, Eyðun Viderø.

SAMFERÐSLUNEVNDIN

Tórálvur Mohr Olsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Heine O. Heinesen, Eyðun Viderø, Johs. M. Olsen, Agnar Nielsen.

RÆTTARNEVNDIN

Jóannes Dalsgaard, Jákup Lindenskov, Karin Kjølbro, Jógvan Sundstein, Eilif Samuelsen.

SKATTANEVNDIN

Tummas Arabo, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Agnar Nielsen.

ALMANNA- OG HEILSUNEVNDIN

Jákup Lindenskov, Tordur Niclasen, Karin Kjølbro, Jógvan Sundstein, Flemming Mikkelsen.

MENTA- OG SKÚLAMÁLANEVNDIN
Jóannes Dalsgaard, Asbjørn Joensen, Hergeir Nielsen, Óli Breckmann, Eilif Samuelsen.

LANDBÚNAÐARNEVNDIN
Henrik Old, Jógvan Durhuus, Signar Hansen, Eyðun Viderø, Jógvan Olsen.

ÍDNAÐARNEVNDIN
Jørgen Thomsen, Jákup Lindenskov, Heini O. Heinesen, Olaf Olsen, Eilif Samuelsen.

UMHVØRVISNEVNDIN
Jóannes Dalsgaard, Signar Hansen, Hilmar Kass, Jógvan Durhuus, Poul Michelsen, Johs. M. Olsen.

ARBEIÐARAMÁLANEVNDIN
Jógvan Durhuus, Atli Dam, Jørgen Thomsen, Ivan Johannesen, Jógvan Sundstein.

LANDSSTÝRISMÁLANEVNDIN
Hergeir Nielsen, Flemming Michelsen, Tummas Arabo.

31. juli vórðu umboð í NORÐURLANDARÁÐIÐ vald:
**Fastir limir:** Erlendur Patursson og Agnar Nielsen.
**Tiltakslimir:** Karin Kjølbro og Johs. M. Olsen.

1. aug. varð MARKNAÐARNEVNDIN vald:
**Fastir limir:** Henrik Old, Hilmar Kass, Signar Hansen, Hergeir Nielsen, Jógvan Sundstein, Pauli Ellefsen, Johs. M. Olsen.
**Tiltakslimir:** Tórálvur Mohr Olsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Erlendur Patursson, Anfinn Kallsberg, Jógvan Olsen, Agnar Nielsen.

SJÚKRAHÚSSTÝRISLIMIR Í SUÐUROY, valdir 1. august 1985:
**Fastir limir:** Hans H. Strøm, Tvøroyri, Ove Mikkelsen, Vági, Sverri Skaalum, Vági.
**Tiltakslimir:** Jónhild Kjærbo, Vági, Hjørleif Enni, Tvøroyri, Jógvan Midjord, Potkeri.

17. september boðaði Fólkaflokkurin frá, at Oddfríður Gregersen er valdur í LANDSSKATTANEVNDINA í staðin fyri Eyðun Viderø.

16. oktober 1985 vórðu hesir valdir sum limir í SAMFERÐSLURÁÐIÐ: Fyri Fólkaflokkin Sigfriður Vørðhamar og fyri Tjóðveldisflokkin Hergeir Nielsen.

11. december 1985 vóru hesir limir valdir í LØNARRÁÐIÐ:
Fyri Sambandsflokkin: Eilif Samuelsen og varamaður: Ivan Johannesen.
Fyri Fólkaflokkin: Jógvan Sundstein og varamaður: Poul Michelsen.
Fyri Javnaðarflokkin: Jørgen Thomsen og varamaður: Tummas Arabo.
Fyri Tjóðveldisflokkin: Heinc O. Heinesen og varamaður: Erlendur Patursson.

19. december 1985 vórðu hesir valdir sum limir í KIRKJUNEVND:
Jákup Lindenskov, Svend Aage Ellefsen, Ivan Johannesen, Poul Jacob Olsen og Hergeir Nielsen.

13. mars 1986 boðaði formaðurin frá, at SMYRIL-LINE hevur 5 nevndarlimir, ið skulu veljast av løgtinginum, hetta skuldi gerast áðrenn 20. mars, tá aðalfundur skuldi vera.

Valdir vórðu: Fyri Sambandsflokkin Eldbjørn Joensen, Oyrarbakka (afturval), fyri Fólkaflokkin Poul Michelsen, Tórshavn, fyri Tjóðveldisflokkin Heðin Samuelsen, Tórshavn, fyri Sjálvstýrisflokkin Asbjørn Joensen, Klaksvík, (afturval) og fyri Javnaðarflokkin Knút Nolsøe, Tórshavn.

# Farloyvi

17. september 1985 var við 22 0 atkvøðum samtykt, at Ólavur Heinesen, Elisar Arge og Jona Henriksen skuldu taka sæti á tingi fyri Jørgen Thomsen, Poul Michelsen og Jóannes Dalsgaard, sum í skrivum bóðu um farloyvi vegna burturferð.

16. oktober 1985 var við 22-0 atkvøðum samtykt, at Gisley Bonde skuldi taka sæti á tingi fyri Jóannes Dalsgaard, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð. Jona Henriksen, sum var næsti maður, boðaði í skrivi frá, at hon ikki kundi taka sæti á tingi hesa vikuna.

Samstundis var við 22-0 atkvøðum samtykt, at Hans J. Debes skuldi taka sæti á tingi fyri Erlend Patursson, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð.

5. november 1985 var við 18-0 atkvøðum samtykt, at Andrias Højgaard skuldi taka sæti á tingi fyri Thomas Arabo, sum bað um farloyvi vegna burturferð í almennum ørindum.

26. november 1985 var við 22-0 atkvøðum samtykt, at Hans J. Debes og Páll Josefsen skuldu taka sæti á tingi fyri Erlend Patursson og Asbjørn Joensen, sum í skrivi bóðu um farloyvi vegna uttanlandsferð.

28. november 1985 var við 18-0 atkvøðum samtykt, at Jona Henriksen og Jákup Lamhauge skuldu taka sæti á tingi fyri Jóannes Dalsgaard og Adolf V. Hansen, sum í skrivi bóðu um farloyvi vegna uttanlandsferð.

11. december 1985 var við 21-0 atkvøðum samtykt, at Hilmar Bech, Dánjal Larsen og Elisar Arge skuldu taka sæti á tingi fyri Henrik Old, Paula Ellefsen og Óla Breckmann, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

23. januar 1986 var við 18-0 atkvøðum samtykt, at Hans Jacob Debes skuldi taka sæti á tingi fyri Erlend Patursson, sum í skrivi bað um farloyvi vegna uttanlandsferð 27. januar – 3. februar.

28. januar 1986 var við 20-0 atkvøðum samtykt, at Jona Henriksen skuldi taka sæti á tingi fyri Jóannes Dalsgaard, sum í skrivi bað um farloyvi vegna burturferð í almennum ørindum.

29. januar 1986 var við 22-0 atkvøðum samtykt, at Sigfríður Vørðhamar skuldi taka sæti á tingi fyri Olaf Olsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna forfall í uml. 8 dagar.

4. februar 1986 var við 19-0 atkvøðum samtykt, at Martin Nielsen, Vatnsoyrar, skuldi taka sæti á tingi fyri Svend Åge Ellefsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna uttanlandsferð 3. – 14. februar.

27. februar varð samtykt, at Terji Davidsen tók sæti á tingi fyri Agnar Nielsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna fund í Norðurlanda Ráðnum.

Sama dag søkti cisini Tordur Niclasen um farloyvi vegna sjúku.

20. mars var við 23-0 atkvøðum samtykt, at Páll Josefsen og Andrias Højgaard skuldu taka sæti á tingi fyri ávikavist Asbjørn Joensen og Tummas Arabo, sum í skrivi bóðu um farloyvi.

24. mars var við 24-0 atkvøðum samtykt, at Elicsar Arge og Dánjal P. Danielsen skuldu taka sæti á tingi fyri Jógvan Sundstein og Óla Breckmann, sum skrivliga bóðu um farloyvi ávikavist vegna burturferð í privatum ørindum 24.–31. mars og fyri Óla Breckmann vegna almenna vitjan í Taiwan 24. mars – 7. apríl.

3. apríl var við 25-0 atkvøðum samtykt, at Sigfriður Vørðhamar og Dánjal Larsen skuldu taka sæti á tingi fyri Olaf Olsen og Eilif Samuelsen, sum í skrivi bóðu um farloyvi ávikavist vegna burturferð í eina viku, og at næsti maður á listanum í Sambandsflokkinum fær sæti á tingi.

4. apríl var við 25-0 atkvøðum samtykt, at Jógvan Hansusarson skuldi taka sæti á tingi fyri Øssur av Steinum, sum í skrivi bað um farloyvi 5.–12. apríl.

9. apríl var við 25-0 atkvøðum samtykt, at Jutta Midjord skuldi taka sæti á tingi fyri Paula Ellefsen, sum í skrivi bað um farloyvi vegna almenn ørindi 12. arpil og privat ørindir aftaná tann 12. apríl.

17. apríl var við 29-0 atkvøðum samtykt, at Jona Henriksen skuldi taka sæti á tingi fyri Jóannes Dalsgaard, løgtingsmann, sum í skrivi bað um farloyvi vegna tænastuørindi úti á bygd.

# Frágreiðing frá løgmanni 1985

Nýggj fýraflokkað samgonga tók við í januar 1985 eftir eitt valskeið og eitt valstríð, merkt nógv meira av kjaki um búskaparligu og fíggjarligu støðuna, enn vanligt var áður.

Serliga var tað trífaldingin av uttanlandsskuld okkara úr einari milliard upp í tríggjar, sum elvdi til nógv kjak. Kjak, ið goymdi íva ella bjartskygni, alt eftir kenslum, metingum og sjónarmiðum.

Tað er skilagott at økja uttanlandsskuldina, tí framleiðandi virði liggja aftanfyri, og kunnu hesi greiða sínar avdráttir og rentur, er alt í lagi, søgdu summir.

Tað er vandamikið at økja ov skjótt, tí rentu- og avdráttarbyrðan gerst ov tung, søgdu aðrir; ivin um innløgumøguleikarnar hjá vinnutólinum er ov stórur.

So selja vit við 20% vinningi burtur av vinnutólinum — skipunum søgdu summir.

Koma vit í ta støðu, at noyðast at selja, verður heldur talan um 30% miss, søgdu aðrir, og tá landskassin fyrstur skal missa, verður samfelagið valla at knógva hesum.

Hetta kjakið heldur á, men tað, sum stendur heilt greitt, er, at samfelagið hevur tungt við at halda javnvág, tí alt ov stórur partur av okkara vinnutólum vinna ikki til rentur ella fullar avdráttir. Harvið økist skuldin alsamt. Samstundis sum landskassin nærum hvønn dag má rinda effektiv veðhaldsútlegg.

Sitandi samgonga hevur nú í góðar seks mánaðir havt høvi til at meta nærri um búskaparligu útlit okkara, og ásannast má, at tað eftir føroyskum viðurskiftum eru heilt serlig tiltøk, sum mugu setast í verk fyri at nærkast eini javnvágsstøðu, har framleiðslan í minsta lagi stendur mát við nýtslu, íløgur, renting og avskrivingarkostnað.

Hesi tiltøk mugu fremjast samskipað fyri heilt nógv — ja, flestu — samfelagsøki.

Figgjarfrøðingar hava leingi vist á tann búskaparliga vandasjógv, vit hava sigit og koma at sigla, og serliga er tað ráðgevandi nevnd forsætismálaráðsins, sum beinleiðis og bersøgin hevur bent á tørvandi samsvarið millum okkara framleiðsluorku og nýtslu og íløguvirksemi.

Vit kunnu vera meira og minni samd við nevndina í niðurstøðu hennara um tær skerjingar, sum mugu gerast, ella tað evnalítla í framleiðsluøking, ella tann tørvandi føroyska viljan til at seta tiltøk í verk, sum økja arbeiðsloysið, men sjálva lýsingina av støðuni og av vøkstrinum í gjaldsjavnahallinum kunnu vit valla verða ósamd um.

Lat meg kortini draga fram munin imillum niðurstøðu nevndarinnar og landsstýrisins metingar.

Metingar okkara eru grundaðar á tær ætlanir, ið liggja fyri á ymsum økjum.

Har nevndin heldur, at so stórar avmarkingar mugu fremjast á øllum íløguøkjum, at eitt munandi arbeiðsloysi skal valda, soleiðis at nýtslumøguleikarnir verða skerdir so mikið, at innflutningurin als ikki veksur, men heldur minkar, so metir landsstýrið ikki arbeiðsloysi at verða hóskiligt stýringsamboð. Tað, sum tí ræður um, er at uppihalda so stórum virksemi, at ikki stórvegis varandi arbeiðsloysi spyrst burturúr, men hinvegin at ikki gerst so stórur eftirspurningur eftir arbeiðsmegi, at inflatiónin økist, kappingarførið minkar og nýtslumøguleikarnir viðvikjandi innfluttum vørum vaksa. Landsstýrisins ætlan um alment íløguvirksemi er tiskil at uppihalda slíkum íløgum, at ein jøvn og støðug lega er í arbeiðsmøguleikunum, uttan nakran risavøkstur ella eina brádligа avmarking.

Meðan nevndin heldur, at so smáir glottar eru í møguleikunum fyri øktari framleiðslu, virðisøking av hesi ella skapan av nýggjari framleiðslu úr ónýttum rávørutilfeingi, at hetta ikki munar, so meta vit, at neyðugt er at fáa hundraðir — ja, túsundir — av nýggjum milliónum burturúr, tí bert avmarkingar, sparingar og skerjingar loysa ikki uppgávuna. Vit mugu eisini framleiða okkum burtur úr trupulleikunum, soleiðis at tað er eitt samskipað tiltak, ið loysir okkum úr skuldarhøftunum.

Tá sagt verður, at politiskt dirvi ikki finst til at fremja so »ópopulerar« avgerðir, at hetta munar, noyðist ein at mótmæla og vísa á, at heldur er talan um tørvandi tóggávu og figgjarligar stýringsmøguleikar. Fyrsta takið er tí at fáa slíkar til vega. Summar av hesum fáa vit, tá landsbankin kemur at virka, aðrar mugu vit, ið hvussu so er, bráðfeingis fáa til vega í viljaðum og avtalaðum samarbeiði við peninga- og figgjarstovnar, kommunalar og hálvalmennar myndugleikar og privata vinnulívið.

**Búskaparliga gongdin — Búskaparlig stýring**

Í 1984 var gjaldsjavnahallið útvið 800 mió. kr. og verður væntandi lítið minni í 1985. Fyribils er hallið mett til 700 mió. kr. Hesi hall verða einans liggjað við uttanlandslántøkum, og verður nettoskuld okkara, sum í 1984 røkk upp á 3100 mió. kr., at liggja útvið 3.800 mió. kr. við árslok 1985.

Hetta er mett út frá væntaðum útflutningi upp 1900 mió. kr., innflutningi uppá 2800 og lántøkum av ymsum slag.

Tey tiltøk, sitandi samgonga hevur sett í verk ella ætlar at seta í verk, verða lítið at koma til sjóndar í búskapargongdini í 1985, nakað meira í 1986, men koma ikki veruliga at sýna úrslit fyrr enn í 1987, so tað, sum fært varð fram undir valstríðnum, um at uttanlandsskuldin fór at vaksa til 5-6 milliardir — ella sum lutfall av bruttotjóðarúrtøkumi til 75-80% — verður tíverri veruleiki.

Avgerðir tiknar av undanfarnu samgongu fáa vit ikki broytt munandi, og tær íløguætlanir, sitandi samgonga hevur gjørt sær, verða fyri eina tíð eisini at økja uttanlandsskuldina.

Vinnulívsparturin av hesum íløgum eigur at kasta av sær til fulla renting og avskriving beinanvegin, og hevur landsstýrið í metingum sínum av hesum íløgum havt sær hetta fyri eyga. Hóast hetta, er ongin borgan fyri, at so verður, tí valfrælsið á t.d. fiskivinnuøkinum er ógvuliga skert, nú so nógvir stovnar mugu metast fulltroyttir, meðan samstundis avmarkingar galda í stovnum uttan fyri okkara egna fiskiøki.

Tiltøk, sum longu eru framd til bøtan av búskaparligu støðuni eru:

a) Hækking av toll- og innflutningsgjøldum við 30 mió. kr. netto,
b) skatting av vinningi við sølu av virkisbygningum og rakstrargøgnum,
c) avmarkan av avskriving í aðrari inntøku enn henni frá rakstrargagni,
d) læsan av stuðlinum til fiskivinnuna innan karm uppá 300 mió. kr. árliga fyribils,
e) minkan av stuðulsláni við bygging í Føroyum tit 25%, veðhaldsprocentið við bygging uttanlands sett niður í 20%,
f) útsetan av nýggjari havnaætlan í tvey ár,
g) fastan karm fyri vega- og bergholsgerðir.

Mong eru kortini tiltøkini, ið enn mugu fremjast, áðrenn vit nærkast eini stýring, sum kann fáa tamarhald á nýtslu, íløgum og lántøku, og nú stendur væl øllum heilt greitt, at ein nevv stýring er neyðug. Í einum samfelag, ið er so heft av skipanum til umfordeiling av samfelagsorku, stuðulsskipanum, almennari ábyrgd av váða og halli og fullkomið ánarafrælsi til avgerðir og vinning, kunnu vanliga liberalu lærusetningar ikki greiða búskaparligu javnvágina.

Tí setti samgongan sær fyri sum skjótast at fáa skipað eina búskapardeild í umsitingini, og síðan ein landsbanka, so vit hava neyðugt amboð til hesa neyvu stýring.

Úrvalið av serfrøðingum til slíkt virksemi er ikki stórt, og frammanundan er almenna umsitingin nógv niðurslitin, og fyrireikingararbeiðið til slíka umlegging er hartil drúgt. Tí er ikki komið so langt áleiðis við hesum arbeiði, sum vit høvdu vónir um.

Landsstýrið er tí farið undir at fyrireika eitt samarbeiði við peningastovnar, kredittfeløg, kommunalar og felagskommunalar myndugleikar fyri at fáa eina felags stýring av peningaflutninginum ímillum Føroyar og umheimin. Herundir kemur sjálvandi ásetan av karminum um samlaða lánsvirksemið.

Hetta sjálvbodna samarbeiðið er eisini neyðugt, tí okkum tørvar lóggávu og í summum førum lógarheimild til neyðuga búskaparregulering.

So løgið tað ljóðar er framvegis lætt at læna til ítøkiligar íløguætlanir við føstum virðum, ið veð tekst í (ofta saman við landskassatrygd). Tí er útboðið av lánspeningi til Føroya — hóast tey 70%'ini í uttanlandsskuld — framvegis stórt, og samanlagt eru eisini so nógv føst virði í hesum landi og so munandi peningainnistøða, at var alt hetta tøkt til afturgjaldingina, so kom lángevarin ongantíð í tapsvanda. Men so er jú ikki, tey seinastu 30-40%'ini av hvørjari íløgu, sum eru eginpeningurin og almenna veðhaldið, hesi rúka fyrst, og tá almennu møguleikarnir til at senda rokningina víðari til fastognina og innistøðuna eru smáir, so vil einaferð tørna fyri.

Nýggjasta fyribrigdið eru tey ovurstóru kredittfelagsútlánini til byggifigging, umbygging, ískoytislán, kapitalvinning við eigaraskifti og vanliga sanering. Hetta fremur eina peningaríkiligheit, ið aftur økir innlutning og nýtslu, sum samantikið verða figgjað uttanlands.

Lága rentan og langa avdráttartíðin økir eftirspurningin eftir hesum lánum. Samstundis er høga føroyska rentan lokkandi fyri okkara bankar, sum læna út í Føroyum heldur enn at keypa donsk lánsbrøv.

Vit koma í ta bakvendu støðu, at vit skjótt ikki fáa ráð at troyta tey bíligu lánitilboðini uttanlands.

Her má tí ein regulering fremjast. Rentustøðið í Danmark er seinastu tvey árini lækkað úr 22% niður ímóti 10%. Í Føroyum hevur tað verið óbroytt 15-16%.

Samstundis hava føroyskir bankar lænt alla sína innistøðu út (undantikið lógarásettar tiltakstrygdir), og hartil útvegað viðskiftafólki hóp av bíligum uttanlandslánum, sum aftur økja bankanna likviditet.

Fingu vit eina javnstillan av renturi, kundu vit kanska í størri mun troytt

tann skilagóða partin av kredittfelagslánunum, meðan okkara hankar lækkaðu útlánsloft sítt og keyptu samsvarandi virðisbrøv uttanlands.

Hetta er sjálvandi treytað av, at vit frá almennari síðu stýra kredittfeløgunum so, at lán við eigaraskifti, ískoytislán og lán, har ikki veruligur figgingartørvur er, verða ikki veitt, meðan skilagóð umfigging av stuttfreistaðari skuld — t.d. hjá flakavirkjum — og nýíløgur fáa hesi lagaligu lán.

Tað almenna má so samstundis leggja lántøku til egnar stovnar og grunnar — (Húsaláns-, Menningar-, Ídnaðargrunn o.s.fr.) inn í samlaða lánskarmin so væl sum tær kommunalu lántøkurnar.

Sum kommunalt eftirlit hevur landsstýrið skyldu til at tryggja, at kommunal lántøka hóskar inn í samfelagsligu búskaparviðurskiftini, tað kann t.d. ikki metast skilagott, at kommunurnar við størstu sjálvfiggingarorkuni og lægsta skattaprocentinum fáa størsta fyrimunin av lánimøguleikunum.

Kommunurnar eru ánarar av tí felagsskapi, sum hevur einkarrætt og skyldu at útvega orku, lánitørvurin hjá hesum felagsskapi má tí sera nágreiniliga viðgerast, og metast má um, um ikki størri partur kann álíknast ánarunum sum eginpeningur heldur enn lán.

Hinvegin vita vit, at løgtingið hevur álagt kommununum luttøku í mongum samfelagsskyldum, sum geva teimum tungan rakstur, og ofta hevur verið mælt til at fremja umlætting her. Vit eiga tí eisini nágreiniliga at meta um slíkar møguleikar, herundir tørvin á kommunalari útjavning av beriorku.

Ein týðandi táttur av búskapinum er uppsparingin. Hon hevur altíð verið mett at vera stór í Føroyum, kortini sigur ráðgevandi nevndin, at hon í fjør var 800 mió. kr. ov lítil. Skal ikki meta um hetta, men vátta, at sitandi samgonga vil geva privatari uppsparing so frægar sømdir sum gjørligt, og tí ikki hevur ætlanir um stórvegis broyting í rentuskattingini.

Tó mugu vit ansa eftir, at endamálið í rentuskattaskipanini ikki verður misnýtt og harvið skattalógin niðurgingin, tí lagaligu lánsmøguleikarnir geva møguleika fyri rentufrádrátti av lánum, har rentan verður drigin frá við 42%, meðan lánini í veruleikanum annars standa inni til góða rentu, sum bert rindar ½% í skatti og sostatt gevur dupultan fyrimun.

Ætlanin við rentuskattingini var, at hon skuldi fevna nettorentuútreiðslu, og ikki geva dupultan fyrimun.

Afturat privatu uppsparingini metir landsstýrið, at tað í løtuni er neyðugt at fremja eina bundna uppsparing, har hægri inntøkurnar taka lut. Hetta er tekniskt trupult, tí ætlanin er, at eisini tey, sum við avskriving hava minkað inntøku sína niður um markið, skulu taka lut.

Aðrar búskaparligar atgerðir, sum líðandi minka tær almennu stuðuls- og umfordeilingsskipanirnar og aftur leggja størri fíggjarliga ábyrgd á tey, sum taka avgerðirnar í vinnulívinum, verða at fremja igjøgnum alt valskeiðið, og vónandi komandi skeið eisini. Hartil má tann stuðul, sum kortini verður veittur í nógv meira mun, nýtast til fremjan av kappingarførni, heldur enn at halda á lívi slíkum virksemi, sum ikki uppá longri sikt er liv lagað.

Sitandi samgonga metir, at vanligu lønarinntøkurnar bera nóg stóran part av samlaðu skattabyrðuni, men tað skerst ikki burtur, at bópur av møguleikum eru fyri at sleppa sær undan skatti av øllum nýtslumøguleikum, tað veri seg yvir partaleløg ella igjøgnum lóglig hol í skattalóggávuni. Hin meginarbeiði hjá landsstýrinum verður tí at fyriskipa slíkari lóggávu, at tingið kann typpa flestu av hesum.

T. d. sóu vit, nú vinningur við sølu av rakstrargøgntum skuldi skattast, at roynt verður at selja partabrøv ístaðin, soleiðis at rakstrargagnið fylgir við óskattað, helst gongur hetta ikki, men ger tað tað, so skal enn eitt berghol typpast.

Hetta er ótakksamt arbeiði, men neyðugt, tí so ella so skal peningurin útvegast til landskassans part av teirri privatu skuld, sum — nú alt størri og størri veðhald gerast effektiv — skal rindast.

Krøvini til landskassans fíggjarorku til hin vanliga samfelagsraksturin minka heldur ikki, og ber tí heldur ikki til at geva lyfti um eina minkandi fíggjarlóg. Hin vegin fer ikki at bera til framhaldandi at loyva sama fíggjarlógarvøkstri, vanligur hevur verið undanfarnu ár. Landsstýrið hevur tí álagt ymsu stovnunum at fremja eina nógv neyvari og meira afturhaldandi »busjettering« enn áður. Enn er kortini ov tíðliga at boða frá fíggjarlógartølunum, hóast hesi verða framløgt longu 15. september í staðin fyri 15. december.

**Fiskivinnuútlitið — Rakstur fiskiskipaflotans**

Hóast fleiri og fleiri avmarkingar á øllum leiðum, og nakað minkandi kvotum í annara sjógvi, tykjast fiskimenn okkara at gerast dugnaligari at troyta teir møguleikar sum enn eru, og at finna fram nýggjar, soleiðis at allur veiðiflotin framvegis er í vinnu.

Nú, skjótt 10 ár eru liðin síðan fiskimarksútflytingarnar, eru avtaluviðurskiftini landanna millum komin í fastari legu, soleiðis at kollveltandi broytingar í kvotuviðurskiftum ikki skuldu verið væntandi, heldur smærri javnføringar við eini ávisari niðurgongd í fiskabýti.

Tó kunnu politiskir spurningar gerast orsøk til stórbroytingar, og eru vit her verri fyri enn aðrir, ið ikki eru so fáir og smáir. T. d. hava vit merkt ein feril av hesum í laksa-, rækju- og lodnuspurningunum.

Við tí útliti, sum í løtuni er, skuldu vit kortini kunna havt álit á, at vit framvegis eiga nóg mikið til at halda flotanum gangandi, samstundis sum útvegað verður nýggjum førum aðrar møguleikar.

Veiðan fyrra hálvár í ár er umleið 191.000 tons mótvegis 167.000 tonsum fyrra hálvár 1984, og tað eru mest svartkjaftur og lodna, sum eiga vøksturin. Rækjuveiðan við Svalbard er eisini munandi vaksin, meðan veiðan í Norðsjónum, undir Íslandi og í Eystursjónum er nakað minni.

Á Føroyaleiðunum er veiðan av botnfiski stórt sæð hin sama sum í 1984, og merkir hetta, at vit sambært tilmæli fiskifrøðinganna framvegis ganga stovnum okkara sera nær. Tí so fiskiorkan er munandi økt og stuðulstørvurin framvegis er stórur, merkir hetta, at vit ikki sleppa undan nú at fremja ávísar reguleringar. Havi nýliga alment nortið við hesar spurningar og skal tí ikki endurtaka, men givið er, at skulu vit megna eina stovnsrøkt og kortini økja ártøkuna av Føroyaleiðunum, verður neyðugt at leggja størri dent á tey enn lítið troyttu fiskasløgini.

Tað er út frá hesum sjónarmiðum, at landsstýrið í íløguætlan síni fyri komandi trý árini einans loyvir íløgur til vanligu botnfiskastovnarnar, um onnur veiðuorka verður tikin burturúr, samstundis verður neyðugt at fáa royndirnar við svartkjaftti, gulllaksi og øðrum so langt fram, at vinnuligar íløgur kunnu fremjast til hesar veiður.

Sum eitt stig á leiðini er loyvi givið til tveir djúpvatn-frystitrolarar, meðan øll hini skipini í ætlanini verða bygd til leiðir uttan fyri Føroyaøkið.

Gjølla hevur verið greitt frá teim óheppnu avleiðingunum, sum stuðulsskipanirnar eisini hava borið í sær, eitt nú íløgur í ov dýr skip í treysti til økjandi studning, skipasølur bert tí kapitalvinningurin knappliga gjørdist so stórur, hækkan av útreiðslunum o.s.fr. Alt hetta noyddi okkum at leggja á annan bógv, og vil studningurin nú spakuliga minka — men sum vist á av so mongum, má hetta júst henda so líðandi, so vinnumi býðst høvi til at laga seg eftir broyttum treytum.

Fyri at vit kunnu gera henda politikk til veruleika, verður neyðugt at seta stór krøv til søluskiðuna, tí stuðulslækkingin skal endurgjaldast við hækkandi prísum.

Júst nú fingu vit eina ávisa prishækking, men hesa fingu aðrir longu tíðliga í vár, og bendir hetta á, at vit mugu útbyggja okkara sølusamskipanir nógv meira, so væl sum »spesialisera« tær munin meira.

Tað verður avgjørt neyðugt at fáa eini 50% meira burturúr, skal vinnulívið hava ein sunnan rakstur, men okkurt bendir á, at hetta er farað av teim avvarðandi.

Í fylgiskjølunum til hesa røðu eru uppsett meðaltøl fyri rakstrarúrslit í 1982, 83 og 84 hjá øllum pørtum av flota okkara. Nýggju studningarnir, sum komu í gildi í juli í ár, byggja á hetta tilfar, og er tað fatan lands-

stýrisins, at tað vil hepnast nýggju studningsnevndini skilagott at umsita heildarjáttanina til gagns fyri allar partar av føroyskari fiskivinnu.

**Ídnaðarmenning**

Samgongan setti sær fyri at skipa eina Menningarstovu fyri ídnað, handverk og tænastuvirksemi.

Arbeiðsbólkur við umboðum fyri ídnaðargrunnin, menningargrunnin, ídnaðarstovuna, idnaðarfelagið og landsstýrið fyrireika í løtuni stovningina, og kemur málið fyri løgtingið í vetrarsetuni. Menningarstovan kann fara til verka frá 1. januar komandi. Hon skal vera ráðgevandi hjá politisku myndugleikunum og teim grunnum, sum veita figging til ídnað, handverk og tænastuvirksemi, soleiðis at vit á tann hátt fáa ta neyðugu samskipingina og eina nevvari stýring av íløgunum á hesum økjum. Sjálvandi skal Menningarstovan eisini hjálpa og ráðgeva einstaklingum og fyritøkum, sum reka vinnu ella hava ætlan um at reka vinnu.

Almenna ídnaðarumsitingin kemur nú undir eitt og sama tak. Ídnaðargrunnurin hevur ognað sær bygning til endamálið, og ætlanin er at vaksa henda bygning, soleiðis at hann — umframt at hýsa ídnaðargrunninum — eisini kann hýsa menningargrunninum, aliráðnum, menningarstovuni og — um áhugi er fyri tí — Føroya Ídnaðarfelag. Í bygninginum hjá ídnaðargrunninum er eisini framsýnishøll, sum fyrstu ferð verður nýtt til ídnaðarframsýning nú á ólavsøku.

Ein partur av fiskiídnaðinum var í figgjarligari trongstøðu, tá landsstýrisskiftið fór fram. Fleiri flakavirkir høvdu søkt landsstýrið um veðhald fyri likviditetslánum. Landsstýrið setti beinanvegin serstaka nevnd at kanna støðuna hjá hesum virkjum. Henda nevnd av sakkønum hevur arbeitt saman við øðrum sakkønum á økinum og er nærum liðug við arbeiðið. Um heilt stutta tíð verða fundir millum landsstýrið, flakavirkisnevndina og umboð fyri avvarðandi virkir.

Fleiri áhugaverdar ætlanir eru í umbúna, bæði um fiskagóðskingarvirkir og onnur ídnaðarvirkir. Landsstýrið viðger hesa positivt og vil saman við almennu grunnunum stuðla, tá talan er um skilagóðar ætlanir.

Ein ídnaðargrein, sum vit seinastu 25 árini hava sett stórar vónir til, tó at hon ongantíð veruliga menti seg, er føroyskt skipasmið. Tað hevur verið sera trupult at gerast vinnuliga kappingarførir, tó at almenni stuðulin hevur verið ógvuliga stórur.

Arbeitt verður nú aftur við at tryggja føroyskum skipasmiðjum hampiligar sáttmálar, men mugu vit so enn einaferð taka hesi viðurskifti upp frá botni og loysa teir leiðslu-, planleggingar- og útbúgvingarspurningar, sum

helst eru orsøk til, at okkara sera góða handverk ikki fíggjarliga stendur mát, tá hetta er liður í vanligari ídnaðarframleiðslu.

Skulu vit útvega 250 nýggj arbeiðspláss árliga, kunnu vit hvørki missa hesa ídnaðargrein ella aðrar, sum hava havt trupulleikar at dragast við.

**Landbúnaðurin**

Henda samgongan hevur eins og allar tær undanfarnu broytingar í jarðarlóggávuni á skránni.

Hetta mál hevur víst seg viðbrekið í løgtinginum, og er ongantíð eydnast at fremja veruligar broytingar. Tí er ilt at siga, hvussu langt nýggjar royndir røkka.

Eftir undanfarnu samgongu liggur mál um prisjavningargrunn, ið ætlast fíggjaður við avgjøldum á innfluttum búnaðarvørum.

Eyðvitað er, at í summum førum kann slíkt verða hóskiligt, citt nú í samband við økjandi sjálvhjálpni í mjólkarvørum, men vit mugu ansa eftir, at slík skipan ikki leiðir okkum út í framleiðslur, sum ongantíð fáa náttúrligar fortreytir í okkara samfelag, tí tær byggja á innflutta rávøru og eina fløkjasliga studningsskipan. Búskaparliga kunnu vit missa meira fyri minni, tí brúkarin ikki fær fyrimunin av teim bíligari vørunum.

Samgongan ætlar positivt at viðgera hetta mál og leggja tilmæli fyri tingið.

Kjøtstudningurin er broyttur, og lættir hetta um hjá kjøtframleiðarunum á útoyggjum, ið fingu hækkingina. Somuleiðis tykist mjólkarstudningurin at ávirka eina javnari ársframleiðslu, sum samanumtikið gevur størstu samfelagsligu fyrimunirnar.

Royndarstøðin verður liðug í hesum árinum, og eru stjóri og hjálparmaður settir. Hesir fyrireika nú virksemið á nýggja stovninum.

Tíverri gjørdist henda bygging, ið var ætlað at kosta 22 mió. kr., nógv dýrari, og verður hetta fyrsta byggistig helst at kosta útvið 40 mió. kr.

Játtan er á fíggjarlógini til vakstrarhúsvirksemi og urtagarðsbrúk, og verður í samband við hesa arbeitt við at smíða reglugerð. Ein trupulleiki hjá hesi vinnu er teir høgu orkuprísirnir. Skipast má so fyri, at henni gevst høvi at troyta náttúrligar orkukeldur, har slíkar eru tøkar í áarløkunum, hitapumpum ella vindmyllum, og eisini at spillbiti frá orkuverkum og brennistøðum verður endurnýttur í slíkum gróðrarvirksemi.

**Fiskaalingin**

Umsitingin av alivinnuni er umskipað undir aliráði við umboðum fyri fiski-

rannsóknarstovuna, heilsufrøðiligu starvsstovuni, ídnaðargrunnin, menningargrunnin, tryggingarsambandið, landsverkfrøðingsstovnin og havbúnaðarfelagið, og er skrivari settur.

Ráðið er landsstýrinum tøkt í øllum spurningum, sum viðvikja fiskaaling, og skal m.a. ummæla allar umsóknir um loyvir til smoltframleiðslu og loyvir til fiskaaling. Tí er álagt beinanvegin

at gera uppskot til starvsreglugerð fyri virkið hjá ráðnum,
geva landsstýrinum tilmæli um, hvussu ein konsulenttænasta kann skipast undir aliráðnum,
tryggja dyggiligum heilsueftirliti við alibrúkum,
meta um, hvussu støðin hjá pf. Fiskaaling í størri mun kann virka sum royndarstøð og útbúgvingarstað,
og hvussu farast kann viðari innan aðrar tættir í alivinnuni.

Uppskot til starvsreglugerð fyri virkið hjá aliráðnum er gjørt, og tekur landsstýrið støðu til hetta á fyrstkomandi fundi. Tá tosað verður um at gera støðina hjá pf. Fiskaaling til útbúgvingarstað, verður hugsað um grundútbúgving fyri fiskaalarar og um eftirútbúgving við regluligum skeiðvirksemi.

Nýggj loyvi til fiskaaling verða ikki givin fyrr enn í september, og eru tvinnar orsøkir til hetta. Onnur orsøkin er, at vit ikki eru komin nóg langt við ymiskum kanningum so sum dálkingar-, streym- og veðurlagskanningum á ymiskum firðum og sundum. Hin, tann vánaliga smoltstøðan.

Í ár høvdu vit 1,2 mió. smolt, av hesum vórðu 60.000 sett út á havbit, meðan restin varð latin alarum. Tørvur er tí á at økja smoltframleiðsluna rættiliga munandi. Í fyrstu atløgu er málsetningurin at trífalda hesa framleiðslu. Við hesum fyri eyga fara aliráðið og landsstýrið í komandi mánað at taka støðu til innkomnu umsóknirnar um loyvi til smoltframleiðslu.

Ein skipanarbólkur við umboðum fyri heilsufrøðiligu starvsstovuna, fiskirannsóknarstovuna og náttúrugripasavnið, ið stendur fyri dálkingar- og streymkanningum, skal innan 1. september handa ráðnum eina frágreiðing um tann partin av kanningunum, sum higartil er gjørdur. Síðan fer aliráðið at meta um, um tað er ráðiligt at geva fleiri aliloyvi í løtuni.

**Ferðamannavinnan**

Ferðamannamiðstøðin er farin at virka. Á galdandi fíggjarlóg eru 1,5 mió. kr. játtaðar til endamálið. Ferðamannamiðstøðin er landsstovnur, ið skal leggja høvuðsdentin á at kunna útlendingar um Føroyar sum ferðamannaland, og at stýra og samskipa virksemið á hesum øki innanlands.

Landsstýrið hugsar sær, at lokalar kunningar- og ferðamannastovur í ávísan mun verða settar á stovn kring landið, og at hesar arbeiða í samráð við Ferðamannamiðstøðuna. Tann fyrsta lokala kunningar- og ferða-

mannastovan er sett á stovn og fór til verka um somu tíð sum ferðamannamiðstøðin.

Virksemið hjá hesi KF-stovu gevur ábending um, at tað er eitt ávist grundarlag fyri slíkum stovnum, og at vit mugu hava slíkar, skal ferðamannavinnan geva tað avkast, sum roknað varð við, tá lógin um Ferðamannamiðstøð Føroya varð framd.

**Farmasigling**

Vinna, sum skuldi átt náttúrligar fortreytir hjá okkum føroyingum, er farmasigling, og vit hava mett, at innan lleiri sokallaðar »nisjur« — serøki — skuldu vit verið kappingarførir.

Nógv er eisini lagt og bundið í hesa vinnu seinnu árini, og so nógv lænt uttanlands til hetta, at vit í nøkur ár nú hava eitt avmarkað virkisfrælsi.

Tíverri rendu vit okkum út á ein versnandi farmamarknað, og vinnur ti størsti parturin av hesum flota valla til rentur, tíansheldur til avdráttir, og er tí raksturin sera tungur, hóast flestu skipini hava avdráttarskáa í ávist áramál.

Vit mugu so kortini royna at laga tað so, at vit ikki missa hesi amboð av hondum, samfelagstapið verður ov stórt, um so verður. Hin vegin er marknaðurin innlendis fyri so stórum eindum ógvuliga avmarkaður, og eisini er avmarkað, hvat kann fáast til vega av nýggjum kapitali. Samstundis eru møguleikar hins almenna fyri at stuðla sera smáir. Tí er ivasamt, um vit varðveita øll skipini í landinum.

Politiska forsøgan, tá hitt almenna setti nýggjar hugsjónir fram á hesum øki um rationalisering og samskipan av almennari og privatari sigling og íløgum, ger tað trupult at koma afturumaftur.

Sjónarmiðið um privata fyriskipan — (tó við stórum almennum veðhaldum og studningum) — vann, og eru tí ikki møguleikar fyri í dag at stuðla hesa vinnu felag fyri felag, tað vildi einaferð enn sett borgararnar alt ov ólíka fyri lógini.

Tað, sum ein kundi havt vónir um, var, at vinnan sjálv framdi eina so fevnandi samskipan, at hon ikki bert nøktaði okkara tørv, men samstundis fór til verka á nýggjum økjum, soleiðis at tað gjørdist náttúrligt fyri hitt almenna at stuðla á breiðum grundarlag, tí givið er, at uppá longri sikt eiga vit møguleikar. Bæði hjá grannum okkara vestanfyri hav og fjarari eru slíkir at hóma.

Í ár er í fylgiskjølunum talva, sum sýnir búskaparliga iskoytið frá farmaskipavinnuni, tað var í 1984 til gjaldsjavnan 117 mió. kr.

Í 1985 eru farmainntøkurnar kortini falnar munandi, so tað skilst, at hendla milliardaíløga enn kastar ov lítið av sær.

Havi fyrr sagt, at vánaligasti útvegurin er, at vit spæla av við hesi

arbeiðspláss, tí somu møguleikar eru ikki í dag at fara í vinnu hjá øðrum, sum hava verið.

**Orkuútbygging**

Eitt hitt truplasta málið í samgongusamráðingunum var vatnorkuútbyggingin. Tær neyðsemjur, ið her máttu gerast, skerdu møguleikarnar fyri eini skynsamari og samfelagstillagaðari stýring av hesi útbygging.

Landsstýrið er ongantíð vorðið sannført um, at ætlaða útbygging SEV's gav mestu úrtøkuna av goymdu vatnmegini í Eysturoy, og stórur meiriluti av sóknarstýrislimum í Føroyum hevur sama iva, so sum atkvøðugreiðslan boðaði frá.

Landsstýrið fer tí framhaldandi at royna at útvega sær best møguligt støðutakanargrundarlag, soleiðis at tryggjað verður, at í byggingini verður ikki farið út um ta politisku neyðsemju, sum gjørd er.

Hetta er serliga neyðugt, nú karmur skal setast um alla lántøku, sum kemur at tyngja okkara gjaldsjavna.

Orkusparingartiltøk mugu framvegis setast í verk. Umborð á skipum okkara, so væl sum í samfelagnum annars.

Vindmegin má nú eisini takast upp í álvara og sleppa inn á okkara orkunet, tað má bera til at fáa hendur á neyðugum tøkni til stýringina.

**Almannamál — Familju- og trivnaðarmál**

Lógarbroytingar á sosiala økinum hava stórt sæð bert verið gjørdar í semju millum danir og føroyingar, tó at vit einsamallir hava framt onkrar batar.

Í felags sosialu nevndini hevur verið samráðst um javnføring av pensiónunum, um leingjan av farloyvistíðini við barnsburð og um broytan av avlamispensiónini, so inntøkan hjá hjúnarfelaga ikki skerjir pensiónsupphæddina.

Yvirtøka av serforsorgini, herundir Skúlanum á Trøðni og andveikraverndini sum so — tð er niðurløgd í Danmark — var eisini á skránni í sosialu nevndini, men í øllum hesum málum tekur tann trupulleiki seg upp — (eins og við útbyggingini av sjúkrahúsverkinum) — at danir eru lítið sinnaðir til at fremja ábøtur fyrr enn samráðingarnar um broytan av ríkisstuðlinum hava verið.

Hetta er eitt sjónarmið, vit ikki góðtaka, tí tær samráðingarnar kunnu lættliga gerast sera drúgvar.

Semja hevur verið um at fyribyrgja, at fleiri fólk undir andveikravernd noyðast til Danmarkar, tí eru nú hús og skúli fingin til vega inni á Skálafjørðinum, og fyri fyrstu ferð er hetta í 1985 á føroysku fíggjarlógini, so danir ikki longur rinda kostnaðin av allari andveikravernd í Føroyum.

Málsetningurin í framtíðar útbygging innan andveikravernd er smærri eindir kring landið.

Sinnisbati hevur útvegað sær hús til tey sinnisveiku, sum skulu fara av sjúkrahúsi og út aftur í lívið. Hesi roynd er stuðul settur til á fíggjarlógini í ár. Somuleiðis er lyfti givið um stuðul til rakstur av blindaheimi, sum Blindafelag Føroya byggir í Havn. Landsstýrið metir, at hetta er í samljóð við vilja løgtingsins.

Røktarheimsætlanin, ið løgd varð í sjeytiárunum, verður fullførd við árslok 1986, tá heimið í Tórshavn er liðugt. Samstundis verður arbeitt við byggjan av smærri heimum í Sandoy, Suðuroy og Eysturoy. Umlættingarheim og dagstovnur fyri evnaveik er undir fyrireikan í Klaksvík, og roynt verður at fáa gongd á aftur arbeiðið við vistarheimið inni á Bakka í Vági.

Frítíðarundirvísing og ansing av evnaveikum hava roynd verið við í skúlanum við Ósánna í Klaksvík, og eru ætlanir um aðrar royndir við Lorvíkar skúla.

Endurbúgvingin verður í alt meira mun at virka úti um landið og soleiðis, at flestu fólk kunnu finna sær náttúrliga vinnu, hóskandi til orku og evni.

Almannamálini eru kanska tey, sum hava størst týdning fyri familjuna og trivnaðin, tí tørvandi loysnir á hesum øki leggja byrðar á familjuna og seta hana verri fyri fíggjarliga, men familjupolitikkurin fevnir um so mong onnur øki, og verður tí familjupolitikkurin sum heild kannaður til tess at verja heimið og samanhaldið í familjuni. Farloyvistíðin við barnsburð, sum aðrastaðni eisini er galdandi mannin, er samstundis ein trivnaðarspurningur so væl sum tann í skattalógini ásetti barnafrádrátturin. Hesin hækkar sum kunnugt 1. januar úr 1.800 kr. upp í 2.200 kr.

Roynt verður at útbyggja dagrøktina og nøkta tørvin á dagstovnum, men eisini foreldur, ið ansa børnum sínum heima, mugu í størri mun stuðlast í hesum.

Í samljóð við samgonguskjalið varð longu í 1985 peningur avsettur til hjálpargrunn ímóti rúsdrekkamisnýtslu, og er ætlað at halda fram við øktum veitingum til henda grunn.

Yvir forsorgarlógina og heilsuverkið er stuðul veittur til viðgerð ímóti rúsdrekkamisnýtslu bæði í Íslandi og á Blákrossheiminum, og miðað verður ímóti at fáa sett á stovn viðgerðarheim í Føroyum.

**Kommunumál**

Hóast samgongunnar politikkur í samband við kommununnar miðar ímóti at fremja »desentralisering«, varð ein »sentraliseringsroynd« gjørd beinanvegin, landsstýrið tók við.

Heitt varð á IKF og Tórshavnar kommunu um at loysa brennistaðarmálið í felag við støð, ið t.d. kundi verið løgd sunnanfyri Glyvursnes, men

segði býráðið í Havn nei. Vit fáa nú ta órationellu loysnina, at ein støð verður bygd við Kaldbaksfjørð og ein sunnanvert Lorvík.

Landsstýrið hevur samtykt at hjálpa IRF burtur úr teim figgjarligu trupulleikunum, felagsskapurin er komin í av tørvandi byggiloyvum. Hetta verður gjørt í tann mun, arbeiðini eru náttúrligur liður i aðrari almennari vegabygging.

**Heilsuverkið**

Alt ov leingi hava útbyggingarætlanirnar innan heilsuverkið verið seinkaðar, og er tí ætlanin at royna at fáa semju við statin um eina skerda byggiætlan, sum yvir 10 ár kostar 225 mió. kr., harav bygt verður fyri 170 mió. kr. 6-ára skeiðið 1986-91. Henda byggiætlan fevnir útbygging av øllum trimum sjúkrahúsunum. Eisini í hesum føri tykist torført at fáa stjórnina í talu — (smb. vitjan innanríkisráðharrans) — men vit fara at royna.

**Arbeiðaramál**

Á arbeiðseftirlitinum verður hálvdags arbeiðsmedisinari settur, og landsstýrið hevur samtykt at seta eitt arbeiðsumhvørvisraið frá 1. januar 1986. Ætlanin er, at hetta ráð m. a. skal endurskoða galdandi lóg um arbeiðaravernd og geva landsstýrinum tilmæli um neyðugar broytingar.

Annars verður arbeiðseftirlitið í komandi árum útbygt eftir eini fastari ætlan. Endamálið við henni er at leggja smærri deildir av arbeiðseftirlitinum úti um landið, soleiðis at eini trý eftirlitsfólk koma at hava støð uttan fyri høvuðsstaðin, tá rokkið er á mál við hesi útbyggingarætlan.

Arbeiðsbólkur er settur at endurskoða lógina um fritið við løn. Endamálið er, at fritiðarlønin fyri framtíðina verður goldin frá arbeiðsgevara so hvørt og latin vinnufelagnum hjá avvarðandi løntakara i varðveitslu, og at fritíðarlønin annaðhvørt verður skattað so hvørt, ella skattað við árslok við miðaltrýstinum fyri árið. Ætlanin er eisini at broyta inntøkuárið, sum fritiðarlønin verður roknað av, til álmanakkaárið.

Sami arbeiðsbólkur hevur eisini fingið álagt at endurskoða lógina, um trygdargrunn veiðumanna. Endamálið við hesi endurskoðan er at kanna, um trygdargrunnur veiðumanna eisini kann umfata løntakarar á landi, soleiðis at talan verður um ein løntrygdargrunn. Hesin arbeiðsbólkur verður væntandi liðugur við endurskoðanina av lógini um fritíð við løn í so góðari tíð, at uppskot um lógarbroyting kann leggjast fyri tingið í heyst, soleiðis at nýskipanin kann fáa gildi frá 1. januar 1986.

**Skúli og undirvísing**

Flestu framkomnu samfeløg hava havt búskaparligar trupulleikar i stýr-

ingitni av vøkstrinum innan tey trý stóru tænastuøkini sosialverk, sjúkraverk og skúlaverk.

Vit seta eisini í okkara samfelag stór krøv til hesi øki og royna at ganga teim á møti, sum ráðini verða til.

Í løtuni er mett at vera stórur tørvur á útbygging innan undirvísingarverkið. Arbeitt verður við at fáa tiðarhóskandi undirvísingartilfar á føroyskum í øllum lærugreinum fólkaskúlans og í mest møguligan mun til framhaldslesnað við, her er longu økt um á figgjarlógini.

Ætlanin um landsmiðstøðir fyri undirvísingartilfar verður nú sett í verk, og lýst eftir leiðara og starvsfólki.

Fólkaskúlalógin og lógin um skúlafyrisiting verða at endurskoða í hesum valskeiði og lesiætlanararbeiðið at fáa í fastari karmar.

Fritíðarundirvísingin kom við nýggju fritíðarundirvisingarlógini í tryggari legu, og kemur lógin — herundir fritíðarvirksemið — at virka í meira mun frá komandi skúlaári.

Hóast enn eru ávísar fortreytir at uppfylla, áðrenn farast kann undir bygging, eru nú figgjarligir møguleikar fyri ávísari útbygging av handilsskúla og tekniskum skúlum, og ætlanin er at fremja útbygging av sjómansskúlanum frá 1986.

Broytingar viðvíkjandi stýrimannaprógvtøkuni standa fyri beinanvegin, og ætlanin er at leingja skiparaútbúgvingina til 15 mánaðir. Eisini verður kokkaútbúgvingin endurskoðað.

Álit um fiskivinnu- og fiskiíðnaðarútbúgving eru gjørd, og arbeitt verður við at bøta eftirútbúgvingarmøguleikarnar á øllum økjum. Álitið um útbúgving teirra 16-19 ára gomlu, sum leingi hevur verið í umbúnað, verður nú lagt fram í oktober mánaða.

Annars er ynskjandi at styrkja lærugreinina føroyskt í studentaskúlanum, HF-skeiðum og handilsskúlum og at fáa fleiri prógvtøkuuppgávur á føroyskum.

Í arbeiðssetningi samgongunnar er byggjan av sjóvinnuskúla og fiskivinnuskúlum, vónandi ber til at byrja á hesum øki longu komandi ár.

**Samgongumálini**

Undir hesi koma post-, tele- og telefontænasta, strandferðsla og tyrhuflúgving, vega-, tunnils- og brúgvagerð, bygdaleiðir, útvarps- og sjónvarpssendinet og annars tað, ið vanliga verður nevnt »kommunikatión«.

Á øllum hesum økjum fer áhaldandi útbygging fram og er partur av hesum — t. e. virki landsverkfrøðingsstovnsins — lýstur í fylgiskjølunum.

Strandferðslan er úthygd við nýggjum skipi og veitir nú eina bætta »servisu«. Bygdaleiðir virka skjótt á øllum økjum í landinum, og postverkið fær nú vónandi í samstarvi við ymsar kommunur greitt síni byggimál. Telefonverkið hevur støðuga tilgongd av feløgum og tænastum, ið krevja

munandi iløgur. NTM-fartelefonskipan, ið kann nýtast í øllum norðurlondum verður arbeitt við, og fyri danska televerkið verður fylgisveinastøð sett upp á Húsarcyni. Henda støð kann, um vit ynskja tað, nýtast í sjónvarpssambandi millum Føroyar og útheimin. Millumbylgjustøðin á Skúvanesi er liðug um tvey ár, og longu í ár verða flestu av teim FM- og sjónvarpsumsetarum, ið skulu tryggja øllum bygdum dygdargott telesamband, tiknir í nýtslu.

**Samvinnan við Danmark, Grønland og Norðurlond**

Sitandi samgonga virkar undir teirri fortreyt, at Føroyar framvegis eru í ríkisfelagsskapi við Danmark og Grønland. Bæði frá føroyskari og danskari síðu eru ynski frammi um broytingar í samskiftinum, útfyllan av karmunum í heimastýrisskipanini og størri sjálvsavgerðarrætt í ávisum týðandi spurningum.

Avtalað er, at tær samráðingar um broytingar í stuðulsskipanini, sum ynski var um bæði frá føroyskari og danskari síðu longu tiðliga í 70'unum, byrja nú til heystar.

Forsætismálaráðið setti longu í 1977 nevnd at fyrireika hesar samráðingar, og nevndin legði fram álit í 1979.

Niðurstøðan hjá hesi nevnd var, at fáast kundi til vega ein skipan, sum varðveitti ein part av stuðlinum sum endurgjald fyri veruligar útreiðslur (umleið 25%) og annan part (eisini umleið 25%) sum eitt sokallað »generelt« tilskot.

Tað er ongin loyna, at í samgonguni hava flokkarnir ymisk ynski. Summir vildu góðtikið slíka skipan, meðan aðrir fegnir gingu longur ímóti eini veruligari blokkstudningsskipan.

Hvørt danska stjórnin í dag vildi gingið við til eina skipan sum hana í 1979 tilmælti, ella hon í dag vil longri á blokkstudningsleið, ti kommunur og amtir í Danmark so væl sum Grønland hava slíka, er ikki vitað.

Flogmálið verður enn partvís eitt samráðingarmál millum stjórnina og landsstýrið, tó at har var komið so langt, at privatar samráðingar ímillum P/f Flogsamband og donsk flogfeløg er avgerandi fyri endaliga útspæl okkara.

Tað er framvegis landsstýrisins metan, at P/f Flogsamband er hin hóskiligasti partnarin í eini »fifty-fifty« samvinnu millum danir og føroyingar um flúgving.

Undirgrundarsamráðingarnar, sum eisini verða uppafturtiknar í heyst, eru sera týðandi. Semja er í Føroyum um ikki at góðtaka skipan, sum gevur Føroyum minni enn avgerðarrættin viðvíkjandi umsiting av egnari undirgrund.

Løgfrøðinganevndin, sum sett varð í fjør, hevur fyri fáum døgum síðani

latið álit úr hondum. Niðurstøða løgfrøðinganna stuðlar til fulnar sjónarmiðið um, at eingin løgfrøðilig forðing finst fyri at gera málsøkið Føroya Undirgrund til føroyskt sermál.

Spurningurin er tí í dag einans politiskur.

Nýggjur táttur í norðurlendskari samvinnu fer at virka til fulnar í september, tá íslendsk/grønlendsk/føroysk tingmannanevnd hevur fyrsta fundin, síðan grønlendingar valdu umboð sini.

Samvinnan við Grønland — herundir við Føroyingahavnini inni í myndini — má útbyggjast. Nú løgmaður vitjaði í Grønlandi, varð avtalað at seta fýramannanevnd at fyrireika slíka samvinnu.

**Undir trýsti**

Nevndi at byrja við, at ymsir viðbreknir fiskivinnuspurningar, so sum laksaveiða á føroyskum øki, lodnuveiða og rækjuveiða, goyma ikki bert fiskivinnupolitikk, men kunnu gerast orsøk til, at Føroyar verða lagdar undir annað politiskt trýst, ið nærum kann verða gíðslatøkukent.

Her mugu vit royna at standa saman og stríðast so manniliga, sum til ber.

Seinastu dagarnar er okkara aldargamli grindarakstur komin undir eitt sera vandamikið trýst.

Her á landi reika fólk, sum mugu skýrast brotsmenn, tí tey bróta føroyska lóg, bæði um grindadráp og forboðið ímóti at elva vinnufólki, sum reka lógliga vinnu við sølu av fyrsta floks vørum, trupulleikar við at mæla til »boykott« og onnur ólóglig tiltøk.

Hesi menniskju hava vit einki at svara til. Tey hava misnýtt okkara gestablidni, tey komu til okkara í seyðaskinni við ørindum øðrum enn teim, tey søgdu seg hava, tey vildu ófrið og hava borið ósannindi um okkum og skýrt okkum við málsins ljótastu orðum.

Hin vegin skulu vit altíð vera til reiðar at samvirka við altjóða felagsskapir um tey tiltøk, ið vit sum varða av grindahvalinum, meta sum tey skilabestu.

Grindareglugerðin og hvalvágir hava verið afturvendandi spurningar á tingi, og verða tað framvegis. So uttan mun til hóvastákið, hesi fólk hava orsakað, so skulu vit sjálvsagt laga hesi viðurskifti til ta nýggju djóraverndarlóg, tingið samtykti í vár.

**Hvat fyri eitt samfelag**

Altíð hevur verið mett demokratiskur rættur, at borgararnir eiga somu møguleikar til samfelagsins orku og tilboð.

Tað eru tó øki, har avmarkingar, tørvandi nøgd av tilboðum, ymsar

fortreytir í evnum o.a. gera, at samfelagið má velja út menniskju, sum samfelagsins vegna umsita møguleikarnar.

Hetta ger seg galdandi, tá tørvandi fiskanøgdir, avmarkað kapitalorka, ella smáir náttúrligir møguleikar noyða okkum til at játta summum fiskiloyvi, meðan aðrir ikki sleppa framat.

Hetta verður lagið í alingini, har ikki nóg mikið av plássi er til at nøkta allan eftirspurning o.s. fr.

Vita skulu tey, sum meta seg heppin, tí tey hava fingið stóra ogn at umsita, at samfelagið fer at seta teimum stór krøv.

Tit sum nú skulu umsita stór og dýr skip, og tit sum sleppa at uppbyggja alivinnuna, ella tit, sum eiga veðhald fyri stórum og dýrum serútgjørdum farmaskipum, eiga at vita, at samfelagið ikki ætlar at góðtaka ein »isoleraðan« dans um gullkálvin, men krevur, at tit umsita hetta til felags gagn, og krevur, at tit liva upp til avbjóðingina.

Vit finna okkum ikki í, at tann vælferð, vit við so ídnum arbeiði hava skapt, verður oyðiløgd, ella at tann sosiali solidaritetur, vit hava lagt okkum undir, verður burtursøpladur.

Vit eiga eitt gott samfelag, latið okkum í felag halda tí á kósini.

# 1. Broyting í lógini um kleking av rognum og aling av fiski

Ár 1985, týsdagin 30. juli legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

Uppskot

til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bygging, innrætting, nýskipan og víðkan av virkjum til kleking av rognum og til fiskaaling.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 24. mai 1974 um bygging, innrætting, nýskipan og víðkan av virkjum til kleking av rognum og til fiskaaling verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1 verður orðað soleiðis:
   »Til bygging, nýskipan, innrætting ella víðkan av virkjum til kleking og/ella aling av fiski og/ella skeljadjórum krevst loyvi frá landsstýrinum. Eisini krevst loyvi frá landsstýrinum at innflyta brúkta útgerð til nýtslu innan alivinnu.«
2. § 3 verður orðað soleiðis:
   »Brot móti reglunum í hesi lóg koma undir bót, og herafturat kann útgerð og fiskur koma undir konfiskatión.«

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om bygning, indretning, etablering og udvidelse af anlæg til udklækning af rogn og til opdræt af fisk.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 57 af 24. maj 1974 om bygning, indretning, etablering og udvidelse af anlæg til udklækning af rogn og til opdræt af fisk foretages følgende ændringer:

1. § 1 affattes således:
   »Til bygning, etablering, indretning eller udvidelse af anlæg til klækning og/eller opdræt af fisk og/eller skaldyr kræves landsstyrets tilladelse. Ligeledes kræves tilladelse fra landsstyret at indføre brugt materiale til brug ved opdrætning.«
2. § 3 affattes således:
   »Overtrædelse af bestemmelserne i denne lov straffes med bøde, hvorhos alt materiale kan konfiskeres.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1985.

§ 2.

Denne lov har gyldighed fra 1. januar 1985.

**Viðmerkingar:**

Aliráðið hevur í skrivi dagfest 25. juni 1985 mælt landsstýrinum til ymsar broytingar í løgtingslóg nr. 57 frá 24. mai 1974 um bygging, innrætting, nýskipan og víðkan av virkjum til kleking av rognum og til fiskaaling. Eisini mælir ráðið til broyting í løgtingslóg nr. 46 frá 23. juni 1970 um forboð móti innflutningi av livandi sílum og laksi.

Viðvíkjandi tí fyrru lógini verður mælt til, at lógin verður orðað soleiðis, at hon greitt og treytaleyst sigur, at loyvi frá landsstýrinum krevst at fara undir virki til kleking av rognum ella til aling av fiski og ikki, sum hon nú er orðað, at tað bert, tá vandi er fyri smittusjúku, dálking og framleiðslutrupulleikum, at landsstýrið kann nokta at geva loyvi. Mælt verður eisini til at taka skeljadýr við.

Tað eru eisini aðrir spurningar enn teir her nevndu, ið taka seg upp, í samband við henda nýggja vinnuveg, nøgd og stødd av smoltstøðum, figging v. m. Um ikki verður skynsamt atborið, kann vinnan ikki bert koma í trupulleikar sjálv, men føra trupulleikar við sær inn á onnur øki.

Fyri at øll virkini skulu koma undir somu reglur, at tey skulu hava loyvi frá landsstýrinum, verður skotið upp, at lógin fær afturvirkandi gildi.

Viðvíkjandi seinru lógini mælir Aliráðið til, at lógin verður broytt soleiðis, at innflutningsforboðið ikki bert er galdandi fyri innflutning av sílum og laksi og livandi yngli og rognum av hesum fiski, men fyri allan livandi fisk og skeljadjór og livandi yngli og rogn av hesum.

Vist verður til **løgtingsmál nr. 2/1985: Broyting í løgtingslóg um forboð móti innflutningi av livandi sílum og laksi.**

Lagt verður aftur at, at landsstýrið hevur í hyggju at endurskoða og samskipa tær báðar lógirnar.

1. viðgerð 31. juli. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 1. august legði fram soljóðandi:

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. juli 1985, og undir 1. viðgerð 31. í s. m. varð tað beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við fylgjandi broytingum:

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| 1) Í § 1 verður sett sum nýtt pkt. 2):<br>»Eingin kann fara undir aling og/ella kleking av fiski og skeljadjórum uttan at hava fingið loyvi frá landsstýrinum«. | 1) I § 1 indsættes som nyt pkt. 2):<br>»Ingen kan påbegynde opdræt og/eller klækning af fisk og skaldyr uden at have fået tilladelse fra landsstyret«. |
| 2) Pkt. 2 verður pkt. 3. | 2) Pkt. 2 bliver pkt. 3. |
| 3) Í § 2 verður »1. januar 1985« broytt til »framløgudegnum«. | 3) I § 2 ændres »1. januar 1985« til »forelæggelsesdagen«. |

2. viðgerð 1. august 1985. Uppskot landsstýrisins við broytingum frá Ídnaðarnevndini samtykt við 26-0 atkvøðum.

Millum 2. og 3. viðgerð setti ídnaðarnevndin fram soljóðandi:

**Broytingaruppskot**

Nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum ímillum 2. og 3. viðgerð og mælir til at broyta § 2 soleiðis:

| | |
|---|---|
| § 2.<br>Henda lóg fær gildi frá 1. august 1985. | § 2.<br>Denne lov har gyldighed fra 1. august 1985. |

3. viðgerð 1. august. Broytingaruppskotið samtykt við 27-0 atkvøðum. Málið soleiðis broytt, endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1509-3-7. Lóg nr. 60 frá 2. august 1985.

# 2. Broyting í løgtingslóg um forboð móti innflutningi av livandi sílum og laksi

Ár 1985, týsdagin 30. juli legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um forboð fyri innflutningi av livandi sílum og laksi.**

**§ 1.**

§ 1 í løgtingslóg nr. 46 frá 23. juni 1970 um forboð móti innflutningi av livandi sílum og laksi verður orðað soleiðis:

»Allur innflutningur av livandi fiski og skeljadjórum og livandi yngli og rogni av hesum er forboðin. Landsstýrið kann í serligum førum geva undantaksloyvi.«

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om forbud mod indførsel af levende ørreder og laks.**

§ 1.

§ 1 i lagtingslov nr. 46 af 23. juni 1970 om forbud mod indførsel af levende ørreder og laks affattes således:

»Al indførsel af levende fisk og skaldyr og levende yngel og rogn af disse er forbudt. Landsstyret kan i særlige tilfælde meddele dispensation.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Vist verður til løgtingsmál nr. 1/1985.

1. viðgerð 31. juli. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 1. august legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 30. juli 1985, og undir 1. viðgerð 31. í s. m. varð tað beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 1. august. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Málið varð endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

*F. L. j. nr. 1509-3-4. Lóg nr. 61 frá 21. august 1985.

# 3. Uppskot um at seta tingnevnd at endurskoða heimastýrislógina

Ár 1985, mikudagin 31. juli legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið setir eina nevnd (millumtinganevnd) við 6 tingmonnum — ein úr hvørjum flokki — til at endurskoða heimastýrislógina (lóg nr. 137 frá 23. mars 1948) og koma við møguligum uppskotum til broytingar.

Nevndin fær heimild til at útvega sær skrivarahjálp og aðra serkøna hjálp í sínum arbeiði. Kostnaðurin av nevndararbeiðinum verður goldin av landskassanum.

**Viðmerkingar:**

Tað eru nú meira enn 37 ár síðani heimastýrislógin kom í gildi. Metingarnar av hesi lóg eru ymiskar, men greitt er í øllum førum, at við tí útviklingi, sum bæði okkara samfelag og øll samfeløg uttan um okkum hava verið fyri, so er einki løgið í, at ein tílík lóggáva eigur at verða endurskoðað, um ikki fyri annað so fyri at verða gjørd meira tíðarhóskandi.

Um politiska meningin av okkara landi og tann praktiska útformingin av okkara stýrisskipan undir hesi lóggávu ger tað helst eisini ynskiligt, at hugt verður eftir lógartekstinum.

Seinru árini eru fleiri dømi um ivaspurningar viðvíkjandi løgtingsins lóggávuarbeiði sæð í mun til heimastýrislógina; nevnast kunnu til dømis spurningarnir um navnalóggávu, útvarpssendistøðir, lóg um skráir og onnur mál, sum ikki eru nevnd í lógini, og tí verða roknað fyri ikki at kunna yvirtakast.

Eisini hava aðrir stórir spurningar tikið seg upp í samband við tulkingar av heimastýrislógini so sum undirgrundarspurningurin og umskipan av refusiónsskipanini.

Í øllum førum metir Fólkaflokkurin, at tíðin er komin til, at Løgtingið sakliga viðger og endurskoðar alla heimastýrislógina. Undir hesi viðgerð kunnu so ymiskar ábøtur fremjast, bæði tær, sum útviklingurin krevur, og kanska eisini nakrar, sum eru meira politiskar og prinsipiellar.

1. viðgerð 22. oktober 1985. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 18. december legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er framlagt av Fólkaflokkinum hin 31. juli 1985 og aftaná 1. viðgerð 22. oktober 1985 beint í Rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Jóannes Dalsgaard og Jákup Lindenskov) vísir á, at núverandi landsstýri longu undir samgongusamráðingunum var varugt við ivamál og tvørleikar viðvíkjandi heimastýrislógini, og tí setti sær fyri at kanna hetta mál.

Av tí at arbeitt verður við hesum í løtuni, verður ikki hildið neyðugt at seta nakra serliga nevnd. Meirilutin setir tí einki uppskot fram.

Annar minnilutin (Eilif Samuelsen) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram.

Hin minnilutin (Jógvan Sundstein) hevur ta uppfatan, at tað verður meira og meira átrokandi at broyta heimastýrislógina. Hesin spurningur viðvíkur tí øllum flokkum og ikki bert eini ella aðrari tilvildarligari samgongu. Tað vísti seg eisini í seinasta valskeiði, at væl bar til at arbeiða í eini nevnd av øllum flokkum og arbeiða við stýrisskipanarlógini og tingskipanini. Minnilutin heitir tí á tingið um at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 16. januar 1986. Atkvøtt varð við navnakalli, 10 atkvøddu ja, 20 atkvøddu ikki, 2 vóru burturstaddir.

Atkvøtt varð solciðis:

Ja atkvøddu:
Óli Breckmann,
Anfinn Kallsberg,
Olaf Olsen,
Svend Aage Ellefsen,
Eyðun Videro,
Jógvan Sundstein,
Poul Michelsen,
Agnar Nielsen,
Jógvan Olsen,
Adolf V. Hansen.

Atkvøddu ikki:
Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Eilif Samuelsen,
Henrik Old,

Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jóannes Dalsgaard,
Jákup Lindenskov,
Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Tummas Arabo,
Asbjørn Joensen,
Hilmar Kass,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen,
Heini O. Heinesen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson,
Tordur Niclasen.

Burturstaddir vóru: Pauli Ellefsen,
Johannes Martin Olsen.

F. L. j. nr. 101-11.

# 4. Skattligur stuðul til sjálvfíggjan av útbúgving

Ár 1985, hósdagin 1. august legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at hækka skattafría inntøkuhámarkið hjá føroyingum í útbúgving uttanlands.

**Viðmerkingar:**
Uppskotið miðar ímóti at bøta møguleikarnar hjá føroyskum ungdómi í

útbúgving uttanlands at sjálvfiggja læruna við loyvi at vinna meiri inntøku í fritíðini, sum teim ikki tørvar at rinda skatt av.

Eitt lógaruppskot í tráð við hetta uppskot kann verða avmarkað til ta broyting í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1984 um landsskatt og kommunuskatt, § 33, nr. 11, har verandi mestaupphædd 15.000 kr. verður hækkað upp í t. d. 25 ella 30.000 kr. fyri árið.

Uppskotið er bert ætlað at veita føroyingum, og ikki útlendingum, í fritíðararbeiði í Føroyum bøttar skattafríar inntøkumøguleikar. Útlendingar eiga at rinda skatt av allari inntøkuni.

Tá nýggja skattainnkrevjingin fór at virka, vístu fleiri feløg hjá føroyingum í útbúgving á, at tann møguleiki, tey fyrr høvdu til at sjálvfiggja part av útbúgvingini við t. d. útsettum skatti, nú fall burtur.

Viðari varð mælt til — og eisini tikið undir við frá politiskari síðu, at henda nú skattlagda inntøka skuldi verða samsýnt á annan hátt frá almennari síðu.

Undanfarna samgonga hækkaði trifalt stuðulin á figgjarlógini til alla hægri útbúgving til tess at bøta um lestrarstuðuls- og lestrarlánsorku landskassans til ungar føroyingar.

Henda samgongan, sum tá vendi seg illa saman við feløgum teirra lesandi um versnaðu figgjannarmøguleikarnar undir fyrra landsstýri, hækkaði bert figgjarlógarupphæddina til hægri lestur við 50% og hevur ikki enn broytt skattleggingina av lestrarungdómi.

Eitt uppskot frá Fólkaflokkinum nú í vetrartingsetuni um at loyva øllum fólki, ið skulu undir læru, eina skattafría inntøku framman undan, varð felt av hesi samgongu.

Hetta uppskot hevði bøtt møguleikarnar hjá føroyingum at forvinna skattafrítt ein størri part av tí, ið ein og hvør lærutíð kostar. Tað er bæði hugaligari og persónliga meiri mennandi at sjálvfiggja sum mest av egnum læruútreiðslum.

Sambært upplýsingum frá Líkningarráðnum vóru knapt 600 føroyingar skrásettir sum lesandi ella undir útbúgving annars uttanlands í 1984, harav eini 20% høvdu inntøku undir 15.000 kr., sum er verandi fríkortsupphædd.

Stívliga 300 persónar høvdu inntøku millum 15.000 og 30.000 kr., og 70 persónar vóru skrásettir við inntøku omanfyri tær 30.000 kr.

Verður skattafría inntøkumarkið hækkað t. d. til 30.000 kr. sum í hesum uppskoti, fær tann lesandi, ið er førur fyri at forvinna hesa upphædd, ein eyka skattalætta í samlaðum landsskatti upp á einar 4.000 kr. (umframt kommunuskatt).

Út frá frammanfyri nevndu tølum kann samlaða inntøkutapið hjá tí almenna metast til einar 2 milj. kr. falt, harav landskassans partur er um 1,2 milj. kr. (kommununanna 800.000 kr.).

Skattanevndin hjá løgtinginum og landsstýrið — um uppskotið verður

samtykt — eiga at finna útvegir fyri at broyta skattaskrásetingina soleiðis, at uppskotið bert umfatar føroyingar í frítíðarvinnu í Føroyum og ikki útlendingar.

Skattanevndin eigur eisini at kanna, í hvønn mun henda frikorts-upphæddin bert skal galda fyri landsskattin, av tí at tað neyvan er rætt uttan víðari at áleggja kommunum í Føroyum cin inntøkumiss, hóast hann bert er nakrar fáar hundrað túsund tilsamans.

1. viðgerð 22. oktober. Málið varð beint í skattanevndina, sum 16. januar 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum 1. august 1985 og við 1. viðgerð 22. oktober varð tað beint í skattanevndina.

Uppskotið snýr seg um at bøta møguleikarnar hjá føroyskum ungdómi undir útbúgving uttanlands, soleiðis at skattafría inntøkumarkið verður hægri hjá føroyingum í útbúgving uttanlands.

Uppskotsstillarin skjýtur upp at hækka hámarkið frá kr. 15.000 til kr. 25.000-30.000.

Lagt verður aftrat, at uppskotið er bert ætlað til føroyingar og ikki til útlendingar.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í cin meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin í nevndini (Heini O. Heinesen, Hilmar Kass, Poul J. Olsen) kann ikki taka undir við uppskotinum, so sum tað liggur fyri, men er sinnaður til, at málið verður tikið til viðgerðar í teirri serligu nevnd, sum landsstýrið hevur sett at koma við tilmælum um broytingar í skattalógini og setir tí fram hetta

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri serligu skattanevndina spurningin um broyting av skattahámarkinum fyri lesandi.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskoti Fólkafloksins og mælir til at samtykkja tað. Í aðru syftu tekur minnilutin undir við meirilutanum.

Minnilutin (Agnar Nielsen) tekur ikki undir við uppskotinum, men fer Sambandsflokkurin at koma við sínum egna uppskoti.

2. viðgerð 29. januar 1986. Atkvøðugreiðslan varð útsett. Atkvøðugreiðsla 13. februar. Uppskot Fólkafloksins fall við 6-0 atkvøðum. Meirilutauppskotið, uppskot til samtyktar varð samtykt við 21-0 atkvøðum.

# 5. Broyting í løgtingslóg um apotek

Ár 1985, hósdagin 1. august legði Poul Michelsen, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um apotek.**

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 14 frá 28. mars 1949 verður § 4 soljóðandi:

»**§ 4.** Landsstýrið kann, tá bygda- og býráð yuskja tað, loyva, at stovnað verður handkeypssøla av medikamentum hjá fólki, sum kommunustýrið velur. Valið verður at góðkenna av landsstýrinum aftaná, at avvarðandi apotekari og landslækni hava givið ummæli. Um samtykt verður at stovna handkeypsúfsølu á bygd, har lækni býr, sum útflýggjar medisin, hevur hann rætt til at fáa søluna. Fyri at keypa medikament og selja medikament frá tílíkari sølu galda somu reglur sum fyri handkeypssølu í ríkinum. Landsstýrið avger, hvørt apotek skal hava loyvi og skyldu til í ti einstaka førinum at stovna handkeypssøluna. Um næsta apo-

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om apotek.**

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 14 af 28. marts 1949 formuleres § 4 følgende:

»**§ 4.** I enhver bygd kan landsstyret på begæring af bygde- og byråd tillade, at der oprettes et håndkøbsudsalg af medikamenter hos en af forstanderskabet udpeget forhandler, hvis valg skal godkendes af landsstyret, efter at vedkommende apotekər og landslægen er hørte. Såfremt det besluttes at oprette et håndkøbsudsalg i en bygd, hvor der bor en distribuerende læge, er denne berettiget til at overtage dette. For sådanne udsalgs forsyning med og udlevering af medikamenter gælder de samme regler som for håndkøbsudsalg i riget. Det afgøres af landsstyret, hvilket apotek der i det enkelte tilfælde skal være berettiget og for-

tek er so langt burtur, og tað er tørvur á, kunnu læknar rokna við at fáa landsstýrisins loyvi til at flýggja út medisin, sum verður keypt frá apoteki eftir landsstýrisins nærri ásetan.«

pligtet til at oprette håndkøbsudsalget. Læger kan, for så vidt afstanden fra nærmeste apotek gør det ønskeligt, forvente at erholde landsstyrets tilladelse til at distribuere medicin, som foreskrives fra et apotek, efter landsstyrets nærmere bestemmelser.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Lógin um apotek í Føroyum stavar frá 1913. Lógin skuldi tryggja øllum Føroya fólki medikament, og soleiðis økja um heilsutrygdina í landinum.

Lógin hevur enn somu ætlan, men har er soleiðis orðað, at hon m.a. í Tórshavn nú er ein forðan fyri øktari servicu til medikamentnýtaran.

Skotið verður tí upp at broyta lógina soleiðis, at landsstýrinum verður heimilað at seta á stovn handkeypsapotek, har hetta saman við kommunalu myndugleikunum heldur tað vera neyðugt.

1. viðgerð 5. november. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 20. mars 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Uppskotið er lagt á ting av Fólkaflokkinum 1. august 1985.

Málið snýr seg um, at tað skal vera heimilað landsstýrinum, at stovnað verður hondkeypssøla av medikamentum hjá fólki, sum kommunustýrið velur, um so er, at bygda- og býráð ynskja tað.

Málið varð aftaná fyrstu viðgerð hin 11. november 1985 beint í almanna- og heilsunevndina. Hjálagt málinum er skriv dagfest 27. november 1985 frá øllum seks kommunulæknunum í Eysturoynni. Teir heita á Føroya løgting um at gera tað møguligt, at apotek verður sett á stovn í Eysturoynni. Sum støðan er í dag, er bert apotek í Havn, Klaksvík og á Tvøroyri. Fólk uttanfyri hesi støð fáa heilivág sendandi frá apotekunum, og fyri stuttum er tað skipað fyri á lann hátt, at fólk ikki gjalda fyri postgjaldið fyri at fáa sendandi medicin.

Sum nevnt í uppskotinum stavar lógin um apotek í Føroyum frá 1913. Løgtingsins almanna- og heilsunevnd hevur lagt mátið fyri ráð-

leggingarnevndina fyri apoteksverkið í Føroyum. Landsapotekarin hevur gjørt vart við, at landsstýrið setti nevnd hin 3. mai 1984 við m. a. sum setningi at endurskoða lóggávuna og at koma við uppskoti hesum viðvíkjandi. Nevndin er liðug við arbeiði sítt, sum viðger apoteksviðurskifti og heilivág í Føroyum, og ætlanin er, at hetta mál verður lagt fyri tingið á ólavsøku. Í hesum áliti er eisini spurningurin viðvíkjandi hondkeypssølu og størri desentralisering viðgjørdur.

Meirilutin í nevndini (Karin Kjølbro, Jákup Lindenskov, Tordur Niclasen og Flemming Mikkelsen) mælir til at beina málið í landsstýrið, so tað kann verða viðgjørt samanum við álitinum frá ráðleggingarnevndini fyri apoteksverkið.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum.

2. viðgerð 3. apríl. Uppskot Fólkafloksins fall við 8-0 atkvøðum.

# 6. Broyting í skattalógini

Ár 1985, hósdagin 1. august legði Poul Michelsen, løgtingsmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í skattalógini.**

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 verður gjørd henda broyting:

§ 29, pkt. 12) verður orðað soljóðandi:

»12) Sømdar- og heiðurspeningur, sum veittur verður uttan umsókn, tó undantikmar fastar árligar veitingar. Studningur, sum tað almenna, kommunan ella góðkendir

**lagtingslov om ændring i skatteloven.**

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 foretages følgende ændring:

§ 29, pkt. 12) affattes således:

»12) Hædersgaver, som tildeles uden ansøgning, dog med undtagelse af faste årlige ydelser. Tilskud, som det offentlige, kommuneu eller godkendte legater

gávufægrunnar og aðrir grunnar lata pensjónistum, lesandi og lærlingum.«

og fonds yder pensionister, studerende og lærlinge.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Uppskotið gevur kommunum møguleika at gjalda pensjónistum studning, ið kann mótsvara heilt ella partvíst tann kommunuskatt, hesir gjalda.

Munur er á tí kostnaði, ið pensjónistur umframt skatt hava ymsa staðni í Føroyum. Ein slíkur stuðul kann minka um henda mun, og kann gera tað lættari hjá pensjónistum at liva á stórplássum, har so at siga alt skal rindast í reiðum peningi.

Tórshavnar kommuna hevur tvey fylgjandi ár havt pening avsettan til slíkau stuðul, men sambært úrskurð líkningarráðsins er slíkur stuðul í dag skattskyldugur. Verður uppskotið samtykt, kann kommunan rinda pensjónistunum stuðulin.

1. viðgerð 5. november. Málið varð beint í skattanevndina, sum 10. mars 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av Fólkaflokkinum 1. august 1985 og við 1. viðgerð beint í skattanevndina. Uppskotið gevur kommunum rætt til at gjalda pensjónistum studning, ið kann mótsvara heilt ella partvís tann kommunuskatt, hesi gjalda.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass, Agnar Nielsen) heldur tað ikki bera til at lóggeva upp á ein slíkan máta, sum hetta uppskotið er orðað, sum eisini varð framført undir 1. viðgerð.

Við at geva kommunum møguleika at gjalda pensjónistum studning, ið kann mótsvara heilt ella partvíst tann kommunuskatt, hesir gjalda.

Meirilutin metir, um hetta uppskot verður samtykt, verða ikki øll líka fyri lógini, og setir sostatt einki uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) mælir til, at uppskot Fólkafloksins verður samtykt.

2. viðgerð 11. mars. Uppskotið fall við 7 ja-atkvøðum, 21 atkvøddu ikki, 4 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Anfinn Kallsberg,<br>Olaf Olsen,<br>Martin Nielsen,<br>Eyðun Viderø,<br>Jógvan Sundstein,<br>Poul Michelsen,<br>Adolf V. Hansen. |
| Atkvøddu ikki: | Pauli Ellefsen,<br>Agnar Nielsen,<br>Jógvan Olsen,<br>Johs. Martin Olsen,<br>Henrik Old,<br>Sverre Midjord,<br>Tórálvur Mohr Olsen,<br>Jóannes Dalsgaard,<br>Jákup Lindenskov,<br>Poul J. Olsen,<br>Jørgen Thomsen,<br>Tumnas Arabo,<br>Asbjørn Joensen,<br>Hilmar Kass,<br>Signar Hansen,<br>Hergeir Nielsen,<br>Heini O. Heinesen,<br>Karin Kjølbro,<br>Øssur av Steinum,<br>Erlendur Patursson,<br>Juul Jacobsen. |
| Burturstaddir: | Óli Breckmann,<br>Ivan Johannesen,<br>Flemming Mikkelsen,<br>Eilif Samuelsen. |

# 7. Broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjald

Ár 1985, hósdagin 1. august legði Jógvan I. Olsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eykainnflutningsgjøld.**

§ 1.

Í grein 2 í løgtingslóg nr. 32 frá 19. mai 1979 við seinri broytingum um eykainnflutningsgjøld verður framman fyri orðini »skip yvir 20 br. reg. tons« sett orðini »gassolja og tungolja«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om ekstraindførselsafgift.**

§ 1.

I paragraf 2 i lagtingslov nr. 32 af 19. maj 1979 med senere ændringer om ekstraindførselsafgift bliver foran ordene »skibe over 20 br. reg. tons« tilføjet ordene »gasolie og tungolie«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Sambandsflokkurin leggur við hesum uppskot fram fyri løgtingið um at avtaka eykainnflutningsgjaldið uppá 5% uppá gassolju, dieselolju og tungolju.

Henda broyting merkir lækkandi útreiðslur fyri fiskivinnuna, fyri føroysku húsarhaldini, fyri SEV, og fyri vinnulívið annars.

Føroyska fiskivinnan hevur tey nógvu seinastu árini fingið munandi peningaligt endurgjald úr landskassanum, millum annað oljutilskot. Tað er eingin orsøk til, at landskassin heldur fram við at taka eykainnflutningsgjald uppá olju við aðrari hondini og samstundis veitir oljutilskot við hinari hondini. Serliga tá tað má metast rætt eisini at lætta um hjá bæði teimum føroysku húsarhaldunum, vinnulívinum annars og hjá SEV.

Sitandi samgonga hevur sett sær fyri, at minka munandi um endurgjaldið til fiskivinnuna úr landskassanum. Avtøkan av eykainnflutningsgjaldinum lættir um hjá fiskivinnuni undir komandi umstøðum.

Í dag er gassolja fyri teir allar flestu føroyingar ein neyðsynjarvøra, sum tyngir nógv um dagliga húsarhaldið. Tað hevði komið øllum, og serliga pensjónistum og øðrum lágløntum, sera væl við at sloppið undan hesum eykainnflutningsgjaldi.

Ein onnur neyðsynjarvøra, sum eisini tyngir munandi um, bæði hjá ti einstaka húsarhaldinum og hjá vinnuni, er el-orkan. Tann høgi el-prísurin er beinleiðis ávirkaður av oljuprísinum. Avtøkan av eykainnflutningsgjaldinum á olju hevði gjørt tað møguligt hjá SEV at lækka el-prísin og/ella spart pening til vatnorkuútbyggingina.

Samlaði føroyski innflutningurin av brennievni v.m. er umleið 440 miljónir krónur, og av hesum er gassolja, dieselolja og tungolja nógv tann størsti parturin. Fyriliggjandi broytingaruppskot merkir eina minniinntøku til landskassan uppá einar 20 miljónir krónur.

Sambandsflokkurin metir tað møguligt at spara peningin inn aftur á øðrum útreiðslustøðum, um vilji er til tað, og verður annars víst til, at skattainntøkan er nógv størri enn roknað varð við.

1. viðgerð 23. oktober 1985. Málið varð beint í skattanevndina, sum 16. januar 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av Sambandsflokkinum 1. august 1985 og varð undir 1. viðgerð 23. oktober 1985 beint í skattanevndina.

Uppskotsstillararnir mæla til at avtaka eykainnflutningsgjaldið á allari brenniolju og siga, at hetta førir við sær ein inntøkumiss fyri landskassan upp á 20 mió. kr.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Heini O. Heinesen, Poul J. Olsen og Jógvan Sundstein) kann ikki taka undir við uppskoti Sambandsfloksins, tí vit meta ikki dekning at vera á tí júst nú samtyktu fíggjarlóg fyri eini so stórari upphædd.

Meirilutin setir sostatt einki uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins.

2. viðgerð 22. januar 1986. Atkvøðugreiðsla 29. januar, uppskotið frá Sambandsflokkinum fall við 6-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 403-6-27.

# 8. Fíggjarløgtingslóg 1986

Ár 1985, leygardagin 31. august legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi uppskot til figgjarløgtingslóg fyri 1986:

Fíggjarlógaruppskotið og Fylgiskjøl, sí skjølini 3 A-F.

**Viðmerkingar:**
Sambært broyttu stýrisskipannarlógina fellur figgjarárið hereftir saman við álmanakkaárinum.

Hetta uppskot til figgjarløgtingslóg, sum í dag verður lagt fyri tingið, er fyri figgjarárið 1986.

Uppskot til figgjarløgtingslóg fyri figgjarárið 1986 javnvegar við 1.552.245.000 kr.

Um vit skulu sammeta figgjarlógaruppskotið fyri 1986 við undanfarin ár, er rímiligt at sammeta við tað figgjarlógaruppskot, fráfarna landsstýrið legði fyri tingið 14. december 1984 fyri figgjarárið 1985/86, hóast tíðarmunurin er meiri enn eitt ár.

Uppskotið til figgjarløgtingslóg, sum var lagt fyri tingið 14. december 1984 javnvegaði við 1.421.770.000 kr.

Tað vil siga, at í mun til tað uppskotið, er talan um ein vøkstur uppá 130.375.000 kr. ella 9%.

Hækkingarnar eru farnar til at leggja av til avdráttir av lánum, at leggja í veðhaldsgrunnin, og at leggja upp fyri lønarhækkingum.

Tað, sum dentur hevur verið lagdur á undir viðgerðini av hesum figgjarlógaruppskotinum er,

at landskassin hevur neyðugar inntøkur og neyðugan likviditet alt árið til at loysa samfelagsuppgávur sínar,

at taka hædd fyri lønarvøkstrinum,

at meta útreiðslurnar til fiskivinnuna so realistiskt sum gjørligt,

at seta neyðugan pening av til avdráttir av lánum,

at seta munandi større upphædd í grunnin til effektivar veðhaldsbindingar enn áður er gjørt og

at spara mest møguligt í vanliga rakstrinum.

Í mai mánað í ár var skriv sent øllum stovnum landsins, har stovnarnir vóru bidnir um at gera figgjarætlan fyri 1986 eftir leiðbeining landsstýrisins, sum í høvuðsheitum gekk út uppá, at lønarútreiðslurnar vóru roknaðar eftir lønini galdandi 1. apríl 1985 við teim aldursviðbótum, ið gera seg galdandi innan 31. december 1986.

Allar aðrar konti, uttan leiguútreiðslur, skuldu tilsamans verða settar til somu upphædd í 1986, sum samlaða nýtslan á hesum konti hevði verið í figgjarárinum 1984/85, tó ikki uppum játtanina fyri 1984/85.

Landsstýrið hevur mett tað neyðugt at hækka lønarútreiðslurnar, sum vóru roknaðar eftir lønini galdandi 1. apríl 1985 við 8%, um lønarútreiðslurnar í 1986 skuldu halda.

Karmarnir um virksemi stovnanna eru sostatt lagdir trengri enn vanligt hevur verið, men er hetta neyðugt, skulu inntøkurnar røkka, utlan at vanligi skatturin verður hækkaður.

Sum áður fráboðað, hevur landsstýrið ikki ætlanir um hetta, men kunnu javnføringar í tollingini koma uppá tal, eins og miðað verður ímóti neyvari skattaálíkning, fyri at fáa til vega inntøkur av enn óskattaðum vinningi.

Kortini heldur landsstýrið seg ikki kunna meta inntøkurnar hægri, enn gjørt er, men skuldi landskassin harvið kunna loyst tær uppgávur, sum liggja í figgjarlógini samfelagsrakstrinum viðvíkjandi.

Annað er so, um inntøkurnar og útreiðslurnar falla so ígjøgnum árið, at neyðugur peningur altið er tøkur. Her veldst um gongd í fiskiskapi og harvið útgjald av studningi, árstíðarheftum íløguútreiðslum, inngjøld av skatti o. s. fr., so ivasamt er, um vit kunnu klára okkum við verandi lánum til tryggjan av gjaldtørvinum.

Hin vegin er ongin beinleiðis lántøka ætlað í fyriliggjandi uppskoti; men eins og áður hevur verið, kann væntast nakað av lántøku til grunnarnar og stovnarnar uttanum figgjarlógina (Húsalánsgrunn, Menningargrunn o. a.).

Hvat fiskivinnuni viðvíkur, er mett, at við óbroyttum prísum og studningsupphæddum, skuldu 275 mió. kr. rokkið, men longu 1. oktober 1985 eru príshækkingar í ljósmála, og vanliga heldur henda gongd á eitt sindur enn.

Við 265 mió. kr. í stuðli til fiskivinnuna, skuldi tí verið møguligt at lagt nakað til viks at standa ímóti við framyvir. Seinru árini er rættiliga fjarað í eykagrunni ráfiskagrunsins.

Landsstýrið metir, at tað er avgjørt neyðugt so líðandi at minka stuðulin til fiskivinnuna, og geva henni høvi til at laga viðurskifti sín eftir veruligari kostnaðarlegu

Sum kunnugt veðheldur landskassin fyri milliarda lániupphæddum. Eftir stuttari tíð eru landskassaveðhaldini meira enn tvífaldað. Hetta ger tað neyðugt hjá landsstýrinum at vaksa um grunnin til at standa ímóti effektivum veðhaldum.

Harafturat eru tiverri í løtuni øll útlit til, at óvanliga stór veðhald gerast effektiv í verandi og komandi fíggjarári, soleiðis at stórur vøkstur verður í effektivum útgjaldingum og útleggum.

Búskaparviðurskiftini í heiminum eru ótrygg og umdømi okkara kanska nakað viknað í hesum samanhangi.

Ábyrgdir okkara eru stórar, so tøk mugu takast komandi til at byrgja fyri møguligum óløgum.

Hóast hetta, er tað fatan landsstýrisins, at hetta fíggjarlógaruppskotið er dømi um, at vit enn eiga munandi megi til at tryggja, at Føroyar enn eru eitt gott samfelag at liva í.

1. viðgerð 16. oktober 1985. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 11. december legði fram soljóðandi
(sí skjal 3C: viðmerkingar til álitið.)

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 31. august 1985 og undir 1. viðgerð tann 16. oktober 1985 beint í fíggjarnevndina.

Í framløguskrivi landsstýrisins varð tilskilað, at ein sammetan av fyriliggjandi fíggjarlógaruppskoti við undanfarin ár kann sammetast við tað fíggjarlógaruppskotið, undanfarna landsstýrið legði fyri tingið 14. december 1984 fyri fíggjarárið 1985/86, hóast tíðarmunurin er meiri enn eitt ár.

Fyriliggjandi fíggjarlógaruppskot fyri 1986 javnvigar við kr. 1.552.245.000,-.

Høvuðsorsøkin til hækkingarnar er avdráttir av lánum, lagt í veðhaldsgrunn og lagt upp fyri lønarhækkingum.

Landsstýrið hevur í viðgerð síni av uppskotinum serliga lagt dent á ávisar spurningar so sum nevðugar inntøkur og likviditet, hædd fyri lønarvøkstri, neyv og beinrakin meting um útreiðslurnar til fiskivinnuna, útreiðslur til lánsavdráttir, øking av grunni til effektivar veðhaldsbindingar og sparing í landshúsarhaldinum yvirhøvur.

Landsstýrið greiðir í framløguskrivinum frá, hvussu samstarvið við stovnar tess um uppskotið hevur verið, og skuldi hetta borið í sær, at karmarnir um virksemi stovnanna var trengri enn vanligt.

Landsstýrið sigur síðani, at ongar ætlanir eru um at økja um skattin. Miðað verður ímóti neyvari skattaálikning, fyri at fáa til vega inntøkur av óskattaðum vinningi.

Ymsu skyldurnar kunnu seta stór krøv til likviditet landskassans, men tað er ikki ætlanin at taka upp lán beinleiðis til landskassan í 1986.

Tann peninganøgd, ið er sett av til fiskivinnuna, væntar landsstýrið fer at røkka.

Tilskilað verður, at nevndi stuðul so líðandi má lagast eftir teirri veruligu kostnaðarleguni.

Veðhaldsskyldur landskassans eru stórar, og má landskassin tí taka stig til at greiða skyldur sínar um neyðugt. Á hesum øki sær landsstýrið ikki ljóst uppá viðurskiftini og ger vart við, at tøk mugu takast.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt lógaruppskotið.

Har tørvur hevur verið fyri at lýsa ávís viðurskifti, eru upplýsingar útvegaðar, og í nøkrum førum hava landsstýrismenn, stovnsleiðarar og aðrir verið á fundi at greiða frá og svara spurningum í tilknýti til avvarðandi greinir í figgjarlógaruppskotinum.

Harumframt hava verið fundir við peningastovnar, Búskaparráðið og Føroya Fiskasølu.

Figgjarnevndin er av teirri áskoðan, at orsøk er til at halda aftur í byggivirkseminum.

Verður hetta ikki tálmað, er vandi fyri búskapi okkara. Slíkt er komið fyri í Føroyum áður, og hevði tað figgjarligar avleiðingar.

Á tí almenna byggivirksemisøkinum kann verða neyðugt, at ein ávís prioritering fer fram, og má hetta eisini umfata kommunurnar.

Um figgjarstøðuna í síni heild kann sigast, at meirilutin í figgjarnevndini hevur ta fatan, at tørvur er fyri skjótast gjørligt at útvega neyðug stýringsamboð á hesum øki, so sum stovnsetan av landsbanka og tiltøk at binda pening í uppsparing, ið er fyriskipað av lóggávuni.

Viðvíkjandi útinningini av figgjarlógini verður víst til viðheftu leiðbeining viðvíkjandi uppseting av figgjarlógaruppskotinum fyri 1986. Um stk. 5 í nevndu leiðbeining hava landsstýrið og meirilutin í figgjarnevndini góðtikið, at § 6 og § 13 í figgjarlógini fyri 1986 koma ikki undir hesar reglur.

Undir viðgerðini hevur figgjarnevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar, og hevur meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) skotið upp hesar broytingar:

1. § 1: **Skattur**
1108 Vanligur landsskattur verður settur til **kr. 831.190.000,00.**

2. § 2: **Toll- og framleiðslugjøld**
2017 Tollgjøld verða sett til **kr. 657.000.000,00.**

3. § 6: **Landsstovnar**
6014 Strandfaraskip Landsins økt til **kr. 52.000,00.**

Viðvíkjandi tyrluni er íløgukostnaðurin ógreiður í løtuni.

4. § 11: **Landsfyrisitingin**
11554 Tolleftirlit. Avgreiðsla í Klaksvík.
Konto 233051: Innbúgv.
Sanitér innlegging: Játtað **kr. 50.000,00.**

5. § 12-12109: **Landssjúkrahúsið**
Játtað kr. 400.000,-.
Sjúkrabilar í Tórshavn og Sandoy.

6. § 12-12109: Frá konto § 12-303052 Blákrossstovan verður til Blákrossheimið undir § 12-12109 fluttar kr. 300.000,-.

7. § 12-303052: Blákrossstovan verður sett til 0. Til § 12-12109 flytast kr. 300.000,- (sí pkt. 4). Til § 19 nýggj konto undir Fráhaldsfeløg flytast kr. 150.000,-.

8. § 12-508: Læknar. Settur verður 1 kommunulækni aftrat í Sandoy í staðin fyri 1 amanuensis. Konto lækkað við kr. 286.000 til kr. 677.000.

9. § 12-373305: Landsstýrinum at ráða yvir. Í tilknýti til setan av 1 lækna aftrat í Sandoy — hækkað við 50.000 kr. til 150.000 kr.

10. § 13: **Samferðslumál**
Nýggj konto: Upphædd at lata IRF kr. 5 mió. at rinda yvir 3 ár, t.v.s. 1,7 mió. kr. í 1986.

11. § 14: **Skúlamál**
14414 Maskinmeistaraútbúgving
økt við **150.000 kr.** til 650.000 kr.

12. § 14: **Skúlamál**
Nýggj konto. Tekniskur skúli í Klaksvík.
Játtað **300.000 kr.**
(mask. útbúgving).

13. § 14-14554: **Húsarhaldsskúlar**
Hækkað við 141.000 kr. til 735.000 kr.

14. § 14: **Skúlamál**
Konto 14953-313455.
Ungmannafeløgini LFÚ og UF; FUR.
Teksturin verður broyttur soleiðis:
Ungmannafeløgini.

15. § 15: **Vísindi, bókmentir og list**
323149: Fornminnissavn í grunn
økt við 500.000 kr.

16. § 15: Sjónvarp í grunn. Nýggj konto kr. 3.000.000,-. Byggiheimildarlóg frá 1982 verður at broyta soleiðis, at heimildin er hjá landsstýrinum saman við figgjarnevndini.

17. § 15-323269: Broytt til
Føroyskt-grønlendskt-íslendskt
mentunarligt samstarv. Hækkað við 50.000 kr. til 100.000 kr.

18. § 18-109: Arbeiðseftirlit: konto 103143.
Játtað setan av 1 fólki kr. 200.000,-
Játtaðar verða 240.000 kr. til arkitekt at hava umsjón og eftirlit við landsins ognum. Arkitekturin skal í fyrsta umfari hava høli á Landsskrivstovuni í Tinganesi og eisini serliga hava málini viðvíkjandi skúlabygging.

19. § 18-18202: Bileftirlit
Konto 353075 Bileftirlitið í grunn.
Lækkað við 1.500.000 kr.

20. § 19-19752: Brennistudningur til pensjónistar:
Hækkað við 800.000 kr. til kr. 4.500.000,-.

21. § 19-19802: Samsýning fyri at ansa eldri, ólhjálpnum heima.
Hækkað við 1.250.000 kr. til 4.000.000 kr.

22. § **19-19904**-363628: Alv.
**Økt við 60.000 kr. til 360.000 kr.**

23. § 19-19904-363636: Fráhaldsfeløg:
**Økt við 75.000 kr. til 425.000 kr.**

24. § 19802: Fráhaldsfeløg. Nýggj konto.
Blákrossstovan kr. 150.000,-.

25. § **19-19904**-363819: Sinnisbati.
**Økt við 100.000 kr. til 600.000 kr.**

Viðheft er skriv frá Lassa Klein, landsstýrismanni, viðvikjandi býti av játtanum undir § 13 — Samferðslumál til vegir.

Við hesum viðmerkingum mælir meirilutin til at samtykkja uppskot landsstýrisins og setir fram hesi

**Broytingaruppskot**

1. § 1: **Skattur**
1108 Vanligur landsskattur verður settur til kr. **831.190.000,00.**

Greinin er sett til **kr. 867.690.000,00.**

2. § 2: **Toll- og framleiðslugjøld**
2017 Tollgjøld verða sett til **kr. 657.000.000,00.**

Greinin er sett til **kr. 678.000.000,00.**

3. § 6: **Landsstovnar**
6014 Strandfaraskip Landsins
**økt til kr. 52.000,00.**
Viðvikjandi tyrluni er íløgukostnaðurin ógreiður í løtuni.

Greinin er sett til **kr. 105.104.000,00.**

4. § 11: **Landsfyrisitingin**
11554 Tolleftirlit. Avgreiðsla í Klaksvík.
Konto 233051: Innbúgv
Saniter innlegging: Játtað **kr. 50.000,00.**

Greinin er sett til **kr. 102.689.000,00.**

5. § 12-12109: **Landssjúkrahúsið**
Játtað kr. 400.000,-.
Sjúkrabilar í Tórshavn og Sandoy.

6. § 12-12109: Frá konto § 12-303052 Blákrossstovan verður til Blákrossheimið undir § 12-12109 fluttar kr. 300.000.

7. § 12-303052: Blákrossstovan verður sett til kr. 0.
Til § 12-12109 flytast kr. 300.000,- (sí pkt. 4).
Til § 19 nýggj konto undir Fráhaldsfeløg flytast kr. 150.000,-.

8. § 12-508: Læknar. Settur verður 1 kommunulækni aftrat í Sandoy í staðin fyri í amanuensis. Konto hækkað við kr. 286.000 til kr. 677.000.

9. § 12-373305: Landsstýrinum at ráða yvir. Í tilknýti til setan av 1 lækna aftrat í Sandoy — hækkað við 50.000 kr. til 150.000 kr.

Greinin er sett til **kr. 114.926.000,00.**

10. § 13: **Samferðslumál**
Nýggj konto: Upphædd at lata IRF kr. 5.000.000 at rinda yvir 3 ár t. v. s. kr. 1.700.000,- í 1986.

Greinin er sett til **kr. 220.700,00.**

11. § 14: **Skúlamál**
14414 Maskinmeistaraútbúgving
økt við **150.000 kr.** til 650.000 kr.

12. § 14: **Skúlamál**
Nýggj konto. Tekniskur Skúli í Klaksvík.
Játtað **300.000 kr.**
(mask. útbúgving).

13. § 14-14554: **Húsarhaldsskúlar**
Hækkað við 141.000 kr. til 735.000 kr.

14. § 14: **Skúlamál**
Konto 14953-313555.
Ungmannafeløgini.
Teksturin verður broyttur soleiðis:
Ungmannafeløgini.

Greinin er sett til **kr. 136.787.000,00.**

15. § 15: **Vísindi, bókmentir og list**
323149: Fornminnissavn **í grunn**
økt við 500.000 kr.

16. § 15: Sjónvarp í grunn. Nýggj konto kr. 3.000.000,-. Byggiheimildarlóg frá 1982 verður at broyta soleiðis, at heimildin er hjá landsstýrinum saman við figgjarnevndini.

17. § 15-323269: Broytt til
Føroyskt - grønlendskt - íslendskt mentunarligt samstarv. Hækkað við 50.000 kr. til kr. 100.000.

Greinin er sett til **kr. 64.684.000,00.**

18. § 18-109: Arbeiðseftirlit: Konto 103143.
Játtað setan av 1 fólki kr. 200.000,-.
Játtaðar verða 240.000 kr. til arkitekt at hava umsjón og eftirlit við landsins ognum. Arkitekturin skal í fyrsta umfari hava høli á Landsskrivstovuni í Tinganesi og eisini serliga hava málini viðvíkjandi skúlabygging.

19. § 18-18202: Bileftirlit
Konto 353075.
Bileftirlitið í grunn.
Lækkað við 1.500.000 kr.

Greinin er sett til **kr. 35.197.000,00.**

20. § 19-19752: Brennistudningur til pensjónistar:
Hækkað við 800.000 kr. til. kr. 4.500.000,-.

21. § 19-19802: Samsýning fyri at ansa eldri, óhjálpnum heima.
Hækkað við 1.250.000 kr. til 4.000.000 kr.

22. § 19-19904-363628: Alv.
Økt við **60.000 kr.** til **360.000 kr.**

23. § 19-19904-363636: Fráhaldsfeløg:
Økt við **75.000 kr.** til **425.000 kr.**

24. § 19-19802: Fráhaldsfeløg. Nýggj konto.
Blákrossstovan kr. 150.000,-.

25. § 19-19904-363819: Sinnisbati.
Økt við **100.000 kr.** til **600.000 kr.**

Greinin er sett til **244.299.000,00.**

Meirilutin er av tí fatan, at um nærri samarbeiði millum Strandfaraskip Landsins og Bygdaleiðir í viðskiftarmálum mótvegis borgarunum fekst í lag, vildi tænastustøðið kunna verið betri og kortini ódýrari, og setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at bera so í band, at farið verður ikki upp um ta upphædd, ið her er skotin upp.

Meirilutin er varur við, at ikki eins reglur verða útintar viðvíkjandi flutningsstudningi til næmingar í framhaldsskúlum og setir fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at fyriskipa somu reglur at galda viðvíkjandi flutningsstudningi til næmingar í framhaldsskúlunum.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Sv. Åge Ellefsen) førir fram:

Tá ið hetta landsstýrið tók við fyrst í hesum árinum, varð nógv tosað um, at fremsti málsetningurin skuldi vera at fáa rættað uppá ta katastrofalu figgjarligu støðu, sum teir søgdu samfelag okkara at vera statt í.

Í staðin fyri at geva sær sjálvum heiti av einum landsstýri, nevndu teir seg eina »katastrofunevnd«, sum eftir 500 døgum skuldu fáa bilbukt við uttanlandsskuldini og gjaldsjavnahallinum.

Í framløguskrivinum til fyriliggjandi uppskot til figgjarløgtingslóg segði landsstýrið eisini, at uppskotið skuldi skiljast sum ein roynd at tálma útreiðsluvøkstri samfelagsins. Í fjølmiðlunum varð nógv gjørt burturúr. M. a. boðaði landsstýrismaðurin í figgjarmálum frá, at »vit hava langað bremsurnar í«.

Tá uppskotið var til I. viðgerð, boðaðu tingmenn fólkafloksins frá, at flokkurin í stórum metti, at tað í eitt stytri tíðarskeið kundi vera gjørligt og lutvíst gagnligt at liva við eini figgjarlóg, sum bar á brá til sparsemi og afturhald innan alment fløguvirksemi, og lagt var upp til, at fólkaflokkurin, sum so varð, at uppskotið borgaði fyri tí, ið sagt varð um tað, stórt sæð fór at taka undir.

Í viðmerkingum okkara í álitinum til uppskotið til inniverandi figgjarlóg varð funnist at tí váða nevndarviðgerð, tað uppskotið hevði fingið, og m. a. varð víst á, at meirilutin í figgjarnevndini uttan at blunka góðtók, at nýnormerað vóru cini fimti nýggj størv innan fyrisitingina og á ymsum almennum stovnum.

Hóast nógvir spurningar frá minnilutanum til landsstýrið og landsstýris meirilutan viðvíkjandi nýtsluni av fleiri týðandi upphæddum á figgjarlógini enn standa ósvaraðir — antin tað so er, tí at meirilutin ikki vil svara ella ikki er førur fyri tí, so skal kortini sigast um sjálva nevndarviðgerðina, at hon á hesum sinni hevur verið munin meira nágreinilig enn seinast.

Minniluttin ásannar í hvørt fall, at viðgerðin hevur verið nóg gjøllig til, at tað enn eina ferð kann prógvast, hvussu ómetaliga lítið samsvar mangan er ímillum tann politikk, henda samgongan ***sigur seg vilja*** reka, og tann hon ***ætlar*** sær at reka.

Sum nevnt omanfyri søgdu teir seg at vilja tálma uttanlandslántøkuni, men ongantíð áður nakrastaðni man hin politiski myndugleikin hava lagt upp til so stórar uttanlandslánstøkur uppá so stutta tíð, sum hesir hava.

Í hesum ¾ árinum, samgongan hevur sitið, eru innflutningsloyvir givin til skip fyri einar tvær milliardir krónur.

Hyggur ein seg í kring og ger sínar metingar um, hvørjar upphæddir, ið nýttar verða í almennar íløgur, herundir í S.E.V., í tunnlar og infrastrukturin annars, í almennar bygningar umframt tær íløgur, ið gjørdar eru innan kommunala og privata sektorin kring landið, ja, so er skilligt, at samlaða skuldarbyrðan hjá hesum samfelagnum er vorðin tvífaldað hetta stutta tíðarskeið.

Í so máta hava teir tosað um afturhald, meðan teirra játtanir og teirra politiska arbeiði annars gongur út uppá eina meirnýtslu sum ongantíð áður.

Tíanverri er alt, sum talar fyri, at fyriliggjandi uppskot til figgjarlóg gongur á sama borðið.

§ 1. **Skattir.**
§ 2. **Toll- og framleiðslugjøld.**
Tikið verður undir við uppskoti meirilutans.
§ 6. -6014 Meirjáttan 4,5 mió. kr. til tyrlutænastuna.

**Strandfaraskip Landsins** hevur í uppskoti sínum til rakstrarætlan boðað frá, at neyðugar verða 52 mió. kr. í 1986, um sama tænastustøði, sum undanfarin ár, skal varðveitast.

Á bls. 2 í fylgiskjølunum sigur landsstýrið, at upphæddin verður skorin niður til 48 mió. kr. vegna ætlaðar príshækkingar í ferðaseðlunum.

Hesar príshækkingar komu sum kunnugt í gildi 11. november.

Men í samband við vetrarferðaætlanina økti landsstýrið eftir kravi frá ávísum samgongutingmonnum túratalið hjá strandfaraskipunum so munandi, at meirkostnaðurin av hesum (sambært hjálagda skriv frá Lassa Klein til figgjarnevndina) verður 8,1 mió. kr. komandi ár. Henda meirútreiðsla er als ikki tikin við av meirilutanum, sum sostatt longu í dag er vitandi um eina komandi meirnýtslu uppá nevndu 8,1 mió. kr. Um ikki niðanfyri standandi uppskot til samtyktar frá minnilutanum verður samtykt.

Aftrat hesum kann leggjast, at meirilutin, eisini tá tað snýr seg um meirkostnaðin av tyrlurakstrinum, orsakað av óhappinum við »Snýpuni«, leggur upp til eitt yvirtrekk uppá hálva mió. kr. og samsvarandi upplýsingum frá

bygdaleiðum og sama skrivi frá Lassa Klein, koma Bygdaleiðir við galdandi ferðaætlan at kosta minst 2 mió. kr. meir enn tað, meirilutin hevur sett á uppskot sítt.

Samsvarandi frammanfyri standandi og samsvarandi hjáløgdu metingum kemur Strandferðslan/Tyrludeildin/Bygdaleiðir komandi fíggjarár at kosta skattgjaldarunum áttati mió. kr., um ikki tað finst ein ábyrgdarkendur meiriluti á tingi, sum kann taka undir við soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leggja nýggju vetrarferðaætlan fyri Strandfaraskipum Landsins og Bygdaleiðum, og í samband við hetta at hava fyri eygað, at játtanin til hesar stovnar ávikavist 52 mió. kr. og 17 mió. kr. verða hildnar.

Hvat Strandferðsluni/Bygdaleiðum viðvíkur, er tað sjónskt at *tos* meirilutans um sparing als ikki kemur at samsvara við veruligu nýtsluna.

§ 6-6306 **Útvarpið.**
Uppskot: Greinin setast til 0.

**Viðmerkingar:**
Minnilutin er av tí áskoðan, at Útvarpið sjálvt eigur at fíggja dagliga rakstrinum (undantikið rentur og avdráttir) við inntøkum av útvarpsgjaldi, kunngerðum o. ø. Sambært rakstrarætlan (fylgiskjøl bls. 14) letur hetta seg eisini væl gera.

Undir § 15-323331 Útvarp Føroya verður annars skotið upp at játta 5.100.000 kr. til rentur og avdráttir av lánum.

§ 6-634 Sjónvarp Føroya setast til kr. 0 (viðm. undir uppsk. um § 15).

§ 12-12109 Landssjúkrahúsið (D.A.H.).

Minnilutin tekur undir við at játta ávikavist kr. 400.000 til sjúkrabil Tórshavn/Sandoy og kr. 300.000 til Blákrossheimið og setur fram

**Uppskot**

**til**

**meirjáttan til Hotel Tórshavn kr. 265.000,00.**

**Viðmerkingar:**
Í skrivi til løgtingsins fíggjarnevnd dagfest 25. mars 1985 sigur sjúkrahússtjórin frá, at møguleiki nú er at leiga aftrat hotellinum.

Minnilutin er av tí áskoðan, at tiltakið »Hotel Tórshavn« hevur verið til ovurstóra hjálp frá føroyskum sjúklingum og avvarðandi teirra, tá neyðugt er at leita sær heilsubót í København.

Tað arbeiði, ið her verður gjørt, er fyrimyndarligt, og hóast tær serа trongligu umstøðurnar man mangur hava sannað tað gamla orðið, at har hjartarúmd er, fæst eisini húsrúmd.

Minnilutin er av tí áskoðan, at vit nú, tá møguleiki gevist, alt í einum ciga at leiga tey seks-átta rúmini, sum standa í boði, og skjýtur tí upp at játta samsvarandi.

§ 12-12508: Læknar (Sandoy).
§ 12-373305: Landsstýrinum at ráða yvir.
§ 13: Nýggj konto IRF.
Tikið verður undir við uppskoti meirilutans.

§ 13,1: Nýggir vegir og brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum.

Á bls. 76 í fylgiskjølunum hevur stovnurin hjá landsverkfrøðinginum sett upp eina kostnaðarætlan fyri tey øki, henda konda fevnir um.

Sum tað sæst niðanfyri, hevur landsstýrið fyri sín part skarvað av teim ymsu undirgreinunum (a, b, c, m, n).

Tað, at landsstýrið soleiðis skerjir nýtsluna, er als ikki óvanligt, og tekur minnilutin við onkrum undantaki eisini undir við hesum. Men tá landsstýrið eftir at hava skorið einstøku greinirnar niður frá tilsamans 171,4 mió. kr. til 141 mió. kr. uttan samstundis at broyta undirskjølini, ja, so er einki samanhang í. Hvørki landsverkfrøðingurin, landsstýrið, fíggjarnevndin ella løgtingið kunnu vita, til hvørji arbeiði á undirgreinunum, tann játtaði peningurin er játtaður til.

Minnilutin hevur ferð eftir ferð gjørt vart við hesi viðurskifti í fíggjarnevndini, men hevur ikki kunnað fingið annað tilfar enn hjáløgdu sundurgreinan av § 13,1a, sum sýnir, at ætlanin í hvørt fall er at nýta ta fullu upphæddina 61 mió. kr. á hesi konto.

Minnilutin heldur tí frægastu ráðini vera, at løgtingið við 2. viðgerð samtykkir hetta

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum til 3. viðgerð av uppskotinum til fíggjarløgtingslóg at leggja fram skjalatilfar, sum nágreiniliga vísir, hvussu samlaða játtanin til § 13,1 verður býtt út til tey ymsu arbeiðini, nevnd undir teimum ymsu undirgreinunum, nevniliga § 13,1a, 13,1b ... 13,1m og 13,1n.

§ 13,1b: Trygdartiltøks: Kontoin setast til 3,0 mió. kr.

**Viðmerkingar:**

Undir seinastu samgongu vóru á fíggjarlógaruppskotinum settar av munagóðar upphæddir til tiltøk, sum kundu fremja tryggleikar í ferðsluni á landsvegakervinum. M.a. fingu vit gjørt busshaldipláss, gongubreytir, gongutunnlar og -brúgvar.

Landsverkfrøðingurin hevur á uppskoti sínum sett 3,0 mió. kr. til kontoina, meðan landsstýrið hevur skorið upphæddina niður til 1,5 mió. kr.

Tað harmar minnilutan at síggja, at henda samgongan vil skerja á hesum øki, og seta vit tí omanfyri standandi uppskot fram.

Sambært fylgiskjølini bls. 77 er uppskot landsstýrisins at seta av til berghol í grunn 30 mió. kr.

Sambært viðheftu útgreinan yvir § 13,1 og 13,6 frá meirilutanum er upphæddin til berghol í grunn niðurskorin til 29,0 mió. kr.

Minnilutin tekur til eftirtektar, at samgongan í yvirlitinum yvir hvørji berghol — játtað verður til — ikki nevnir berghol til Gásadals.

Minnilutin setir tí uppskot fram **til nýggjan tekst:**

Áðrenn »Lopra-Sumba« at seta »Gásadalsbergholið« .....

Fært verður annars fram, eisini í hesum sambandi, hvussu lítið samsvar er ímillum veruleikan og tey tøl, sett verða á fíggjarlóg, og tað tos, samgongumenn hava fyri í fjølmiðlunum.

Einhvør tingmaður veit, at vit ikki kunnu bora trý berghol í senn, nevniliga bergholini til Sumbiar, á Kunoynni og Signabø-Kaldbak, og ikki nýta meira enn 29 mió. kr. árliga, um arbeitt verður alt árið. Verður arbeitt part av árinum, vita vit eisini, at nógv minni fæst fyri peningin, ið nýttur verður.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið uppskot um raðfesting við tíð og kostnaðarætlan av teim bergholsiløgum, ætlanin er at fremja í hesum valskeiðinum.

Í eini slíkari raðfesting setir minnilutin Gásadalsbergholið fremst.

§ 13,3: Lendingar í grunn. Uppskot, meirjáttan 3,0 mió. kr.
Greinin er sett til 25,0 mió. kr.

Á bls. 97 í fylgiskjølunum hevur landsverkfrøðingurin lýst figgjarstøðu lendingargrunsins.

Sagt verður frá, at um játtaðar verða 27,5 mió. kr. til grunnin, so kunnu játtast 6.000.000 kr. til nýggjar lendingar á komandi ári.

Landsstýrið hevur skorið upphæddina niður til 22 mió. kr., og merkir hetta sostatt, at at kalla eingin peningur verður til nýjáttanir í 1986.

Lendingargrunnurin var, tá undanfarna samgonga tók við, ikki væl fyri figgjarliga, orsakað av at játtaðar vóru ár um ár fleiri krónur úr grunninum enn til grunnin. Gjøgnum seinasta valskeiðið var so mikið hildið aftur, at grunnurin nú er komin á føtur.

Løgtingið eigur ikki at góðtaka, at søgan endurtekur seg á tann hátt, at grunnurin aftur kemur í afturhond.

Hin vegin eru tað serliga smáplássini, sum nýta gott av hesum peningi, og metir minnilutin tí, at nakað av peningi eigur at játtast undir hesi grein.

Skotið verður tí upp samsvarandi

§ 14-14953-313555

§ 15-323149

Tikið verður undir við uppskoti meirilutans.

§ 15-323157: Útvarpssendistøðir í grunn.

Seinastu figgjarárini undir undanfarnu samgongu vóru 8 mió. kr. settar av til grunnin, og var eisini so mikið á leið komið við tí praktiska fyrireikingararabeiðinum, at arbeiðið við at seta upp ein nýggjan útvarpssendara, sum tá varð kostnaðarmettur til umleið 9 mió. kr., ætlaðist at kunna byrja í 1985.

Síðani sitandi samgonga tók við, hevur bert verið játtaður studningur til grunnin av slíkari upphædd, at tilgongdin bert er at meta sum dýrtíðarreguleringar, og tað uttan at nakað røkist fyri, at farið verður undir hetta álvarsmálið.

Sum sagt, kann minnilutin taka undir við einum stórum parti av uppskoti landsstýrisins, men kann tó als ikki taka undir við uppbyggingini av fíggjarlógini.

Eisini kann vísast á, at meginregla landsstýrisins um ikki at loyva hækkan, hvørki í mun til játtan ella forbrúk í 1984/85, als ikki er gjøgnumført, so tað er ilt at fáa eyga á nakra sum helst rætningslinju viðvíkjandi sparsemi landsstýrisins og fastari stýring yvir fyri stovnunum.

Tað er frálíkt, at man sparir sum mest í almennu nýtsluni, men tann generella heimildin hjá stovnum at flyta ímillum konti, kemur als ikki at fremja nakra sparing. Hetta kemur at geva stovnunum møguleika at brúka hvørt oyra, sum avsett er, í nógv størri mun enn undir tí skipan, sum hevur verið galdandi til dagin í dag.

Interna grannskoðanin hevur á fundi í fíggjarnevndini boðað frá, at grannskoðaraarbeiðið hereftir verður sera trupult, í og við at setningurin við at hava eftirlit við teim einstøku játtanunum nú einki endamál hevur.

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum sum skjótast at finna útvegir fyri, at nýggjur útvarpssendari verður útvegaður.

§ 15-32331: Útvarp Føroya, tilskot til avdráttir av lánum.
Uppskot: Greinin nýtt heiti: Útvarp Føroya tilskot til avdráttir og rentur av lánum.
Nýggj játtan kr. 5.100.000.
Vist verður til viðmerkingar undir § 6-6306.

§ 15-323364: Sjónvarp Føroya.
Uppskot: Greinin strikast.

**Viðmerkingar:**
Minnilutin hevur somu áskoðan á raksturin á sjónvarpi og útvarpi, nevniliga at stovnarnir eiga at greiða vanligu rakstrarskyldur sínar uttan um fíggjarlógina. Eisini sigur S.V.F. (sí fylgiskjøl bls. 205), at ætlanin hjá S.V.F. er at fíggja nevnda hallið við einum tilsvarandi avlopi frá undanfarna fíggjarári, sum skyldast, at sjónvarpið ikki setti ávís starvfólk so tíðliga sum ætlað, og biður S.V.F. tiskil als ikki um at koma við á fíggjarlógina.

§ 15-323769: Tikið verður undir við meirilutanum.

§ 16-333025: Kontoin sett til 17.000.000.
Nýggj § 16-: Nýggj játtan kr. 5.000.000.
Til fiskiroyndir á fremmandum høvum og til royndir eftir fiskasløgum, sum enn ikki hava serligan búskaparligan týdning, men kunnu fáa tað — í grunn.

Undanfarna samgonga játtaði 29 mió. kr. yvir figgjarárini 1982/83, 83/84, 84/85 til hesar grunnar, sum við árslok 1984 høvdu eitt stovnsfæ uppá umleið 15 mió. kr.

Sitandi samgonga hevur játtað útvið 8 mió. kr. úr hesum grunnum uttan at játta pening til grunnarnar.

Havandi í huga tær ovurstóru íløgur, samgongan hevur játtað innan fiskiskipaflotan júst til veiðu eftir fiskasløgum, vit enn ikki troyta við hóskandi vinnuligum úrsliti, eitt nú gulllaksi, stinglaksi, langasporli, ocean-kongafiski og til veiðu eftir enn púra óroyndum fongi, sum jákupsskelja-veiða í Barentshavinum o. ø., heldur minnilutin tað ikki vera hóskandi, ikki at flyta pening til stovnsfæið hjá nevndu grunnum.

Tá útgreiningin av § 333017 ikki eins og árini frammanundan kemur til viðgerðar í løgtinginum sum uppskot til »løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna« — tað arbeiðið er nú latið upp í hendurnar á serligu studningsnevndini, og tá yvirlitið hjá løgmanni (viðlagt) ikki setir pening av til hetta endamál — setir minnilutin uppskot fram um nýggja grein á figgjarlógini, har peningur verður játtaður til hesar grunnar, sum við hesum verða lagdir saman.

§ 18-109: Arbeiðseftirlit.
Tikið verður undir við meirilutanum.
§ 18-18361: Menningarstova.
Uppskot: Greinin strikast.
§ 18-353026: Stuðul til ídnaðarfremjandi endamál, í grunn (viðm.).
Uppskot: meirjáttan kr. 2.000.000.
Greinin sett til kr. 7.000.000.

**Viðmerkingar:**
Enn fyriliggur einki lógaruppskot um Menningarstovu, men út frá tí, sum higartil er likið út, skilst at Menningarstovan meira skal vera eitt amboð hjá politikarum í tilrættisleggingi teirra av einum ídnaðarpolitikki og eini politiskari stýring av ídnaðinum, enn ein hjálparstovnur hjá ídnaðar-monnum.

Higartil hevur tann ídnaðarstovan, sum ætlandi verður niðurløgd, tá

Menningarstovan gerst veruleiki, lutvíst verið figgjað úr grunninum til ídnaðarfremjandi endamál, við játtan frá landsstýrinum og figgjarnevndini.

Í figgjarnevndini er minnilutin sinnaður positivt at viðgera tann framtíðartýdning ein møguligur landsins ráðgevarastovnur skal hava og herundir serliga, í hvønn mun orkan hjá einum slíkum stovni skal nýtast av landsins politiska myndugleika ella av landsins verandi og komandi ídnaðarfyritøkum.

§ 353042: Til Menningargrunn.
Uppskot: Meirjáttan 15.000.000.
Greinin sett til 25.000.000.

**Viðmerkingar:**

Í skrivi til landsstýrið 12. juli 1985 — (fylgiskjøl bls. 242) — ger nevndin fyri Menningargrunnin vart við, at neyðugt er í komandi figgjarári at játta grunninum 25. mió. kr. yvir figgjarlógina. Sagt verður frá, at seinasta ár hevði grunnurin fyri neyðini at lána uttanlands í fremmandum gjaldoyra til eitt mótsvarandi virði av 30 mió. kr., sum allar fóru til figging av alivinnuni. Sjálvt við eini játtan fyri 1986 uppá 25 mió. kr. verður neyðugt at lána uttanlands virðið av øðrum 40-45 mió. kr.

Men landsstýrið hevur aftur í ár skorið umbøn Menningargrunsins so munandi niður (úr 25 mió.) til 10 mió. kr., at vandi skjótt kann verða fyri, at Menningargrunnur Ídnaðarins kemur í eina líknandi støðu sum Telefonverk Føroya Løgtings leingi hevur verið í.

Uttanlandslántøka grunsins er nú í ferð við at gerast so stór, 200 mió. kr., at broytingar í kursvirðinum á altjóða gjaldoyrismarknaðinum kunnu fáa álvarsamar avleiðingar fyri grunnin. Minnilutin vil mæla landsstýrinum til at hava eitt vakið eyga við hesum viðurskiftum og skjýtur upp at játta 25 mió. kr. til Menningargrunnin.

Viðlagt er skjal frá Menningargrunninum viðvíkjandi grunsins figgjarstøðu og viðvíkjandi tí ætlaða fyritakseminum komandi árini.

Broytingaruppskot minnilutans eru hesi:

§ 21-21019: Greinin sett til kr. 35.000.000.
§ 23-383101: Greinin sett til kr. 0.
§ 24-24302: Greinin sett til kr. 32.003.000.

(sí skjal viðvíkjandi greinum við talbroytingum).

| | | |
|---|---|---|
| § 1: | Skattur ..... | 1.190 |
| § 2: | Tollur ..... | 10.000 |
| § 6-6014: | ..... | ÷ 4.500 |

| | | |
|---|---|---|
| 6306: | | ÷ 4.886 |
| 6311: | | ÷ 621 |
| § 11-534: | | 50 |
| § 12-12109: | | 400 |
| | | 300 |
| | | 265 |
| § 12-12508: | | ÷ 286 |
| § 12-373305: | | 50 |
| § 13,1: | (13,1b trygdartiltøk) | 1.500 |
| § 13,3: | Lendingar | 3.000 |
| § 13,12: | | 1.700 |
| § 14-14414: | | 150 |
| § 14-: | Nýggj konto | 300 |
| § 14-554: | | 141 |
| § 15-323149: | | 500 |
| § 15-323269: | | 50 |
| § 15-323331: | | 2.600 |
| § 15-323364: | | ÷ 621 |
| § 16-333025: | | ÷ 8.000 |
| § 16: | Nýggj konto | 5.000 |
| § 18-109: | | 200 |
| § 18-361: | | ÷ 1.800 |
| § 18-353026: | | 2.000 |
| § 18-353042: | | 15.000 |
| § 19-762: | | 800 |
| § 19-892: | | 1.250 |
| § 19-363628: | | 60 |
| § 19-363636: | | 75 |
| § 19-: | Nýggj konto | 150 |
| § 19-363819: | | 100 |
| § 21-21019: | | ÷ 15.000 |
| § 23-383102: | Útvarp | 4.886 |
| | Sjónvarp | 621 |
| § 24-24302: | | ÷ 11.014 |

Minnilutin (Ivan Johannesen) førir fram:

Landsstýrið legði 31. august 1985 fram sítt uppskot til figgjarlóg fyri 1986. Hetta uppskotið javnvigar við 1.552.245.000 kr. Talan er um eina vøkstur upp á meira enn 130 mió. kr. samanborið við uppskotið til figgjarlóg fyri 1985/86.

Tað er ikki meira enn rímiligt, at farið verður at kanna eftir, hvussu tær politisku atgerðir landsstýrisins avspegla seg í hesum uppskotinum, sum

landsstýrið hevur eina-ábyrgdina av. Undir viðgerðini av figgjarlógaruppskotinum fyri apríl-december 1985 skeyt landsstýrið seg undir og umber seg við, at tað uppskotið bygdi á tað hjá undanfarna landsstýri og var tiskil ikki fullgott prógv um politikkin hjá núsitandi landsstýri.

Løgmaður lat, tá ið hetta landsstýrið tók við, tey boð fara út um heimin, at Føroyar vóru um at fara á húsagang, og samanber stoðu okkara við hana í teimum mest illgrunaverdu og ringast á holdi komnu londunum í heiminum. Landsstýrismaðurin í figgjarmálum sigur í sínum viðmerkingum til uppskotið, at búskaparliga umdømi okkara í útheiminum er viknað, eyðvitað orsakað av PR-virksemi løgmans.

Í leitingini á figgjarlógini eftir tiltøkum at sleppa undan eini hóttandi kreppu, verður ein at arbeiða til fánýtis. Tú finnur ikki eina ta einastu ábending um, at hetta landsstýrið hevur í byggju at spara ella at tálma teimum almennu útreiðslunum. Tvørtur imóti hevur landsstýrið ætlað at geva stovnunum loyvi til fritt at flyta pening ímillum tær ymisku kontoirnar — burtursæð frá lønarkontoum, og er tað nakað, sum kann eggja til vøkstur í nýtsluni á stovnunum, so er tað ein tílík óbeinleiðis tilbending. Innanhýsis grannskoðari løgtingsins hevur eisini á fundi í figgjarnevndini ávarað móti eini slíkari skipan.

Sambandsflokkurin hevur altíð hildið tað verið umráðandi, at landsins figgjarmegi verður væl umsitin, og at gjølla verður ansað eftir, at landsins figgjarviðurskifti ikki koma í ólag. Eitt slíkt tiltak fær okkum at ivast stórliga í landsstýrisins evnum at fremja ein skilagóðan figgjarpolitkk, og flokkurin fer tí at seta fram eitt uppskot til samtyktar hesum viðvikjandi.

Bara á hesari figgjarlógini hevur landsstýrið givið loyvi til normering av yvir 30 nýggjum størvum í almennu umsitingini. M. a. er talan um at seta á stovn eina løgtingsskrivstovu. Síðani hetta landsstýrið tók við, hevur lítið og einki virksemi verið í tinginum. Bert onkur hissini tingfundur av og á, og flestu nevndirnar hava als ikki virkað. So fyribils er eingin meining í at seta fólk í starv til einki at gera, men einaferð verða vit av við hetta vanstýri aftur, og tá kundi verið hugsað um eina skilagóða samskipan av arbeiðsfólki við m. a. innanhýsis grannskoðanina og landsskrivstovuna.

Í samband við Líkningarráðið er ætlanin at seta 9 nýggj størv á deildarskrivstovur í Klaksvík og í Suðuroy. Vit taka undir við, at arbeiðið verður desentraliserð, men einki sæst til, at færri fólk vera á Líkningarráðnum í Havn.

Í viðmerkingum sínum sigur landsstýrismaðurin í figgjarmálum, at ongar lántøkur eru ætlaðar á figgjarlógini uttan í samband við tær vanligu hjá Húsalánsgrunninum og Menningargrunninum. Landsstýrið roynir at káva útyvir veruleikan á sama hátt sum tey undanfarnu sosialistisku landsstýrini. Av skjølunum framgongur, at Bileftirlitið, Sjómatnsskúlin og Fiskiramn-

sóknarstovan fara undir at byggja, og Royndarstøðin skal gjaldast, men nærum eingin peningur er settur av til hesi endamál.

Í vár fekk figgjarnevndin frá gjaldstovuni upplýst, at landskassin pr. 1. mars 1985 skyldaði landskassans grunnum 85 mió. kr. Tann 9. december í ár var skuldin 107 mió. kr.

1. mars var trekkið í danska tjóðbankanum 55 mió. kr., 9. december var trekkið 75 mió. kr.

Samanum tikið kann sigast, at gongdin í figgjarviðurskiftunum er tann skeiva vegin, og hetta landsstýrið hevur enn einaferð prógvað, at tað hvørki hevur vilja ella evni til at stýra tí føroyska húsarhaldinum.

Tað var kanska hetta, løgmaður hevði forútsæð, tá ið hann við sínum úttalilsum í vár setti tann svarta blettin á umdømi Føroya í útlondum.

Minnilutin hevur hesar viðmerkingar og setir fram hetta

## Broytingaruppskot

## til

## uppskot landsstýrisins

§ 1. **Skattur**

| | |
|---|---|
| 1108 Vanligur landsskattur lækkað til | 825.000.000 kr. |
| Greinin sett til | **861.500.000 kr.** |

§ 2. **Toll- og framleiðslugjøld**

| | |
|---|---|
| Greinin sett til | **774.000.000 kr.** |

§ 6. **Landsstovnar**

| | |
|---|---|
| 6014 Strandfaraskip Landsins | 50.000.000 kr. |
| Greinin sett til | **103.104.000 kr.** |

§ 11. **Landsfyrisitingin**

11015 Løgmaður og landsstýri.

Viðm. til konto 103023, seinasta pkt. Landsstýrismaður fær sama kostnaðarendurgjald, sum løgtingsmaður fær í tí øki, hann er búsitandi.

| | |
|---|---|
| 11053 Landsskrivstovan, økt við | 600.000 kr. |
| sett til | 8.950.000 kr. |

Peningurin verður nýttur til at styrkja um búskapardeildina á landsskrivstovuni.

11725 Stovnseting av búskapardeild, landsbanka v. m.
1.250.000 kr. verður strikað.

| | | |
|---|---|---|
| 11953 | Umsitingarhús í grunn, økt við | 500.000 kr. |
| | sett til | 1.000.000 kr. |
| | Greinin sett til | **102.489.000 kr.** |

§ 12. **Heilsumál**

| | | |
|---|---|---|
| 12109 | Landssjúkrahúsið | |
| | Hotel Tórshavn, økt | 525.000 kr. |
| | Sjúkrabil í Tórshavn og Sandoy, økt | 200.000 kr. |
| | Blákrossheimið, økt | 300.000 kr. |
| | Yvirlækni í ortopædi | 400.000 kr. |
| | Skrivari til yvirlækna | 120.000 kr. |
| | Kontoin sett til | 80.952.000 kr. |
| 12508 | Læknar, lækkað við | 288.000 kr. |
| | sett til | 675.000 kr. |
| 303052 | Blákrossstovan. Kontoin strikað. | |
| | Greinin sett til | **115.719.000 kr.** |

§ 13. **Samferðslumál**
Í fylgiskjalinum, bls. 77 aftan á
»Signabø-Kaldbaksbotn« verður sett: »Gásadalur«.

§ 14. **Skúlamál**

| | | |
|---|---|---|
| | Skúlabøkur til næmingar á studentaskúlum og HF-skeiðum. Nýggj konto. | 300.000 kr. |
| 14554 | Húsarhaldsskúlar, hækkað til | 735.000 kr. |
| 14953 | Nýggj konto: Studentaskúli í Eysturoy í grunn | 500.000 kr. |
| | Greinin sett til | **137.137.000 kr.** |

§ 15. **Vísindi, bókmentir og list**
15907-323331: Útvarp Føroya, tilskot til avdrátt av lánum. Kontoin strikast.
Viðm.: Útvarpið hevur higartil arbeitt sum sjálvfiggjandi stovnur og fær sínar inntøkur m. a. gjøgnum útvarpsgjaldið. Hildið verður rættast, at hetta verður gongdin framyvir.

15907-323364: Sjónvarp Føroya. Kontoin strikast.
Viðm.: Hildið eigur at vera fast við, at rakstrarútreiðslurnar av sjónvarpinum verða figgjaðar av hyggjaragjaldinum.

Greinin sett til **58.013.000 kr.**

§ 16. **Fiskivinna, sigling o.t.**
Til minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna hevur landsstýrið skotið upp at seta av 265.000.000 kr. Figgjarnevndin hevur frá nevndini til býti av stuðulinum fingið at vita, at nevndin ikki enn kann siga nakað um, hvussu skipanin virkar, og hvørjar upphæddir eru neyðugar. Út frá hesum hevur minnilutin einki sjálvstøðugt uppskot, men tekur undir við meirilutanum og er til reiðar at viðgera spurningin aftur, tá hetta verður neyðugt.

§ 18. **Handil, ídnaður o. t.**
18109 Arbeiðseftirlit.
Játtað eftirlitsfólk 200.000 kr.
18361 Menningarstova 1.800.000 kr.
Verður strikað.
Viðm.:
Ídnaðurin eigur sjálvur at reka og figgja hetta virksemi. Fyrstu árini kann ein minni studningur verða veittur av grunninum til ídnaðarfremjandi endamál.

Greinin sett til **34.897.999 kr.**

§ 19. **Almannamál**
19752 Brennistudningur til pensjónistar, hækkað til 4.500.000 kr.
19904-363636: Fráhaldsfeløg, økt til 425.000 kr.
19904- Nýggj konto: Fráhaldsfeløg 150.000 kr.
19904-363715: Føroyahús í Keypmannahavn.
Viðm.:
Sambandsflokkurin heldur tað vera skeivt at keypa hús til føroyska virksemið í Keypmannahavn, so

sum landsstýrið mælir til, men vit taka undir við, at leigað verða eini hóskandi rúmlig hús.
19904-363802 Andveikraverndin.
Viðm.:
Undanfarna landsstýrið byrjaði samráðingar við ríkisstýrið um loysn av spurninginum um Andveikraverndina. Minnilutin heldur, at hesar samráðingar eiga at verða førdar víðari, so ein loysn kann fáast á málið.

Greinin sett til **242.889.000 kr.**

§ 22. **Aðrar óvissar útreiðslur**
22104-253808 Studningur til politiska upplýsing, lækkað til 1.200.000 kr.

Greinin sett til **2.735.000 kr.**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum beinan vegin at leggja fyri figgjarnevndina sundurgreining yvir, hvussu Strandfaraskip Lands ins heldur seg innan fyri tær játtaðu 50 mió. kr. — ella tær 52 mió. kr., um uppskot meirilutans verður samtykt.

Sí skjølini 3 D, E og F.

2. viðgerð 12. december 1985. Atkvøðugreiðsla 16. december.

§ 1. Broytingaruppskot frá Sambandsflokkinum fall við 7-0. Broytingaruppskot frá meirilutanum í figgjarnevndini samtykt við 24-0. Við 25-0 atkvøðum varð samtykt, at meirilutans uppskot skuldi fara til 3. viðgerð.

§ 2. Broytingaruppskot frá Sambandsflokkinum fall við 8-0 atkvøðum. Broytingaruppskot meirilutans varð samtykt við 24-0. Uppskot landsstýrisins til § 2 varð samtykt við 25-0 atkvøðum. Samtykt, at § 2 skuldi fara solciðis broytt til 3. viðgerð.

§§ 3-5. Uppskot landsstýrisins samtykt við 32-0 atkvøðum.

§ 6. Uppskot Sambandsfloksins fall við 7-0 atkvøðum, og broytingaruppskot Fólkafloksins fall við 7-0 atkvøðum. Broytingaruppskot meirilutans samtykt við 25-0 atkvøðum. Soleiðis broytt varð § 6 við 18-0 samtykt at fara til 3. viðgerð.

§§ 7-8 og 10 í uppskoti landsstýrisins vórðu samtyktar við 30-0 atkvøðum.

§ 11. Broytingaruppskot Sambandsfloksins fullu: konto 103023 við 9-0, konto 11053 við 7-0, 11725 við 7-0, 11953 við 9-0. Broytingaruppskot meirilutans til § 11 varð samtykt við 25-0, § 11 í uppskoti landsstýrisins soleiðis broytt samtykt at fara til 3. viðgerð við 24-0 atkvøðum.

§ 12. Broytingaruppskot Sambandsfloksins til § 12 fall við 7-0. Yvirlækni í ortopædi fall við 14 ja-atkvøðum, 1 nei-atkvøðu, og 17 atkvøddu ikki.

Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Eliesar Arge,
Olaf Olsen,
Svend Aage Ellefsen,
Eyðun Viderø,
Jógvan Sundstein,
Poul Michelsen,
Dánjal Larsen,
Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Agnar Nielsen,
Jógvan Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Filif Samuelsen,
Adolf V. Hansen.

Nei atkvøddu: Asbjørn Joensen.

Atkvøddu ikki: Anfinn Kallsberg,
Hilmar Bech,
Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jóannes Dalsgaard,
Jákup Lindenskov,
Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Tunmas Arabo,
Hilmar Kass,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen.

Heini O. Heinesen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson,
Tordur Niclasen.

Broytingaruppskot fólkafloksins fall við 8-0. Broytingaruppskot meirilutans til § 12. 12109 samtykt við 25-0, konto 12.303052 samtykt við 27-0. Konto 508 samtykt við 25-0. Konto 373305 samtykt við 24-0. § 12 í uppskoti landsstýrisins soleiðis broytt, endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum og at fara til 3. viðgerð, samtykt við 25-0 atkvøðum.

§ 13. Broytingaruppskot Sambandsfloksins fall við 6-0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá Fólkaflokkinum fullu við 7-0. Í seinna málinum viðvíkjandi Gásadalsbergholinum vóru 2 ímóti. Broytingaruppskot Fólkafloksins § 13.3 fall við 8-0. Broytingaruppskot meirilutans til § 13 samtykt við 25 atkvøðum fyri og 2 ímóti. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 24-0. Við 24-0 atkvøðum varð málið samtykt at fara til 3. viðgerð.

§ 14. Sambandsflokkurin hevði 2 broytingaruppskot. Bæði fullu við 8-0 atkvøðum. Broytingaruppskot meirilutans til § 14 vórðu samtykt. 14414: Maskinmeistaraútbúgving við 25-0. Tekniskur skúli í Klaksvík 22-0. Húsarhaldsskúlar við 23-0. Ungmannafelagini við 23-0. Upprunauppskot landsstýrisins varð samtykt við 23-0 atkvøðum. At § 14 skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð, varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

§ 15. Broytingaruppskot Sambandsfloksins fullu. 323331 við 8-1 og 323364 við 14-2. Broytingaruppskot Fólkafloksins til § 15 fall við 7-0. Broytingaruppskot meirilutans til § 15, 323149 varð samtykt við 20-0, nýggj konto Sjónvarp í grunn varð samtykt við 17-0, konto nr. 323269 varð samtykt við 23-0. § 15 í uppskoti landsstýrisins samtykt við 24-0 atkvøðum. At § 15 skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð, varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

§ 16. Broytingaruppskot Fólkafloksins fullu. Konto 333025 við 8-0, nýggj konto: Fiskiroyndir á fremmandum høvum við 14-0. Uppskot landsstýrisins samtykt við 25-0 atkvøðum. At § 16 skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð, varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

§ 17. Uppskot landsstýrisins samtykt við 30-0 atkvøðum.

§ 18. Broytingaruppskot Sambandsfloksins fall við 15-0.
Broytingaruppskot Fólkafloksins fullu: konto 353026 við 8-0, konto 353042 við 8-0. Broytingaruppskot meirihutans samtykt við 20-0 og konto 353075 samtykt við 17-8. Uppskot landsstýrisins

solciðis broytt, samtykt við 19-0 atkvøðum. At fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt, varð samtykt við 19-0 atkvøðum.

§ 19. Broytingaruppskot Sambandsfloksins til konto 19904 fall við 6-0. Ein viðmerking til somu grein fall við 7-0. Broytingaruppskot Fólkafloksins fullu saman við meirilutans. Konto 19752 samtykt við 30-0, 19802 við 24-0, 19904/363628 við 23-0, 19904/363636 við 27-0. 19802: nýggj konto við 28-0, 363819 við 24-0. Uppskot laudsstýrisins § 19 soleiðis broytt, samtykt við 25-0. At fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt, varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

§ 20. Samtykt við 29-0.

§ 21. Broytingaruppskot Fólkafloksins til § 21 fall við 7-0. Uppskot landsstýrisins varð síðani samtykt við 28-0. At § 21 skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

§ 22. Broytingaruppskot Sambandsfloksins til § 22 fall við 7-0 atkvøðum. Broytingaruppskot Fólkafloksins fall við 7-0 atkvøðum. Landsstýrisins uppskot til § 22 varð samtykt við 24-0 atkvøðum. At § 22 skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð, varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

§ 23. Uppskot landsstýrisins samtykt við 28-0 atkvøðum. At § 23 skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð, varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

§§ 24, 25, 26 og 27 vórðu samtyktar við 31-0 atkvøðum.

§§ 30-46 vórðu samtyktar við 31-0 atkvøðum.

16. december løgdu tingmenninir Svend Aage Ellefsen og Ivan Johannesen fram soljóðandi

**I:**

**Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

at broyta tekst í fylgiskjølum, síða 33 niðast: ... »at seta sosialráðgeving at starvast á Almannastovuni og eisini at røkja arbeiðið í Norðurstreym og Vágum« til: »at seta sosialráðgevara at starvast í Vágum og Norðurstreym«.

Sama dag løgdu tingmenninir Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen fram soljóðandi

**II: Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

§ 13. § 13, 1 b). Trygdartiltøk. Hálkubreyt kr. 500.000,- verður strikað.

§ 18. § 18, konto 253881: Hálkubreyt verður økt við kr. 500.000,-.

Sama dag løgdu tingmenninir Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Jørgen Thomsen og Signar Hansen fram soljóðandi:

**III: Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

§ 14, konto 14414 »Maskinmeistaraútbúgving« verður broytt til:
»Føroya Maskinskúli«.

3. viðgerð 16. december 1985:

Broytingaruppskotið I frá Svend Aage Ellefsen og Ivan Johannesen fall við 4-0 atkvøðum.

Broytingaruppskotið II frá Asbjørn Joensen, Jørgen Thomsen, Tordur Niclasen og Signar Hansen varð samtykt við 19-0 atkvøðum.

Broytingaruppskotið III frá teim somu varð samtykt við 22-0 atkvøðum.

Uppskotini til samtyktar I frá meirilutanum fall við 11-0, frá Anfinn Kallsberg og Svend Aage Ellefsen samtykt við 17-0, III fall við 7-0, IV fall við 14-0, V fall við 8-0, VI fall við 15-0, VII frá Sambandsflokkinum fall við 7-0 atkvøðum.

Figgjarlógin var síðani við broytingum sum omanfyri tilskilað endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 400-39. Lóg nr. 90 frá 20. december 1985.

# 9. Broyting í happadráttarlógini.

Ár 1985, týsdagin 17. september legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, fram soljóðandi:

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um føroyskan happadrátt.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 15. juni 1950 um føroyskan happadrátt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, litra a, verður »12.000« broytt til: »18.000«.
2) Sum litra f) verður sett:
»Yvirskotið av happadráttinum fær Fróðskaparsetur Føroya«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1986.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om et færøsk klasselotteri.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 49 af 15. juni 1950 om et færøsk klasselotteri med senere ændringer, foretages følgende ændringer:

1) I § 1, litra a, ændres »12.000« til »18.000«.
2) Som litra f) tilføjes:
»Lotteriets overskud tilfalder Færøernes Akademi«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1986.

**Viðmerkingar:**

Í samband við kanning av roknskapunum fyri árið 1975-1980 umrøddu løgtingsgrannskoðararnir spurningin um at finna fram til aðrar møguleikar fyri nýtslu av avlopinum enn verandi, nú avlopið verður latið landskassanum. Í staðin mæltu teir landsstýrinum til at taka til umhugsunnar og viðgerðar, um avlopið kundi brúkast til eitthvørt nyttugt ella vælgerandi endamál.

Fróðskaparsetur Føroya hevur søkt um at yvirtaka happadráttin, bæði avlopið og fyrisitingina, táið núverandi leiðari leggur frá sær. Setrið vísir til, at eftir íslendskari lóg hevur Háskóli Íslands einkarrætt at skipa fyri happadrátti.

Landsstýrið hevur samtykt at skjóta upp at broyta lógina um happadráttin soleiðis, at Fróðskaparsetrið fær vinningin av happadráttinum og yvirtekur fyrisitingina, táið núverandi leiðari leggur frá.

Talið av lutaseðlum í lógini er sett til í mesta lagi 12.000. Hetta tal nøktar ikki tørvin og verður mett, at meirtørvurin í løtuni er umleið 3.000 seðlar. Fyri at leggja nakað upp fyri, er tí skotið upp at hækka talið av seðlum úr 12.000 upp í 18.000.

1. viðgerð 23. oktober. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 20. februar 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 17. september 1985 og undir 1. viðgerð tann 23. oktober 1985 beint í figgjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og viðvíkjandi broytingini av litra a í § 1, pkt. 1 í uppskoti landsstýrisins tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins.

Viðvíkjandi broytingini av litra f í § 1, pkt. 2 í uppskoti landsstýrisins, ið er skotin upp at ljóða: »Yvirskotið av happadráttinum fær Fróðskaparsetur Føroya«, hevur nevndin býtt seg í ein meirilluta og tríggjar minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men er av teirri áskoðan, at yvirskotið skal býtast soleiðis, at ⅓ fer til ÍSF, meðan ⅔ verða settir í grunn, ætlaður brekaðum.

Verandi umsitingarregla sbrt. § 2 í løgtingslóg nr. 49 frá 5. juni 1950 um føroyskan happadrátt verður sostatt at tillaga eftir omanfyri tilskilaða broytingaruppskoti til uppskot landsstýrisins, og skal hetta gerast við reglunum fyri danska Vanførefonden sum fyrimynd.

Tað er meirilutans áskoðan, at tey, ið fáa ágóðan eftir litra f í § 1, pkt. 2, sjálv skulu umsita skipanina í samráð við landsstýrið og verður vist til § 2 í upprunalógini um føroyskan happadrátt.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

til uppskot landsstýrisins viðvíkjandi litra f í § 1, pkt. 2:

| | |
|---|---|
| § 1, pkt. 2, litra f verður orðað soleiðis: | § 1, pkt. 2, litra formuleres således: |
| »Yvirskotið av happadráttinum verður býtt soleiðis, at ⅓ verður | »Lotteriets overskud fordeles således, at ⅓ tilfalder ÍSF, medens |

latin til Í.S.F., meðan ⅔ verða settir í grunn, ætlaður brekaðum.«

⅔ henlægges i fond, der er bestemt til anvendelse til fordel for de vanføre.«

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) hevur hesa viðmerking til § 1, pkt. 2 í uppskoti landsstýrisins:

Tikið verður ikki undir við uppskoti landsstýrisins sum orðað í litra f. Løgtingsgrannskoðaranevndin hevur vist á, at Føroya landsstýri eigur at taka til umhugsunnar, um verandi avlop hjá happadráttinum ikki eigur at verða latið til eitthvørt vælgerandi endamál. Undir 1. viðgerð av hesum uppskoti, vóru fleiri røðarar, sum vístu á, at peningurin eigur at verða latin teimum brekaðu í Føroyum. Nevndi minnilutin setir tí fram soljóðandi

**broytingaruppskot**

til uppskot landsstýrisins viðvíkjandi litra f i § 1, pkt. 2:

§ 1, pkt. 2, litra f verður orðað soleiðis:

»Yvirskotið av happadráttinum verður latið teimum brekaðu í Føroyum.«

§ 1, pkt. 2, litra f formuleres således:

»Lotteriets overskud tilfalder de vanføre på Færøerne.«

Minnilutin (Eyðun Videro) hevur hesa viðmerking:

Tikið verður ikki undir við uppskoti landsstýrisins sum orðað í § 1, pkt. 2, litra f, har Fróðskaparsetur Føroya skal fáa yvirskotið av Happadráttinum. Nevndi minniluti tilskilar, at hann tekur ikki undir við, at Fróðskaparsetur Føroya verður figgjað við spæli við peningi. Viðari viðmerkir nevndi minniluti, at lagnan hjá teimum brekaðu skal ikki verða treytað av, hvussu hugað fólk eru til at taka lut í figgjarligum spæli, men eigur teirra figgjarligi tørvur orsakað av ófullføri at verða nøktaður yvir figgjarlógina, eins og gjørt verður fyri onnur, ið vegna aldur, sjúku, avlamni v. m. verða tryggjað almenna figgjarliga trygd. Mælt verður tí til at lata alt yvirskotið av happadráttinum til ítróttin, har stórt friviljað arbeiði verður gjørt, eitt arbeiði, ið hevur allan stuðul uppiborman. Havast má í huga, at ítrótturin mest verður figgjaður við peningi, ið fólk av egnum huga lata hartil.

Um ikki løgtingið samtykkir niðanfyri standandi uppskot, at ítrótturin fær alt yvirskotið, og brekað sostatt verða viðurkend við teirra tørvi eins og onnur á almennu økinum, so tekur nevndi minniluti undir við samgongumeirilutanum.

Sostatt verður sett fram soljóðandi

**broytingarnppskot**

til uppskot landsstýrisins.

§ 1, pkt. 2, litra f verður orðað soleiðis:

»Yvirskotið av happadráttinum fær ÍSF.«

§ 1, pkt. 2, litra f formuleres således:

»Lotteriets overskud tilfalder ÍSF.«

Minnilutin (Ivan Johannesen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins sbrt. § 1, pkt. 2, litra f, við teirri grundgeving, at takast kann ikki undir við, at ágóðin av happadráttinum verður latin til ávísan stovn ella felagsskapir, tað skapar bert misnøgd og trupulleikar.

Nevndi minniluti mælir tí til, at ágóðin framyvir eins og nú fer í landskassan, og at ein rímilig veiting fer av figgjarlógini til teir, ið hava søkt um at fáa ágóðan av happadráttinum.

2. viðgerð 24. februar. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Anfinn Kallsberg) til § 1, pkt. 2, litra f fall við 4-0. Minnilutauppskot frá Eyðun Videro til somu grein fall við 6-0. Broytingaruppskot meirilutans til somu grein varð samtykt við 18-0. § 1 soleiðis broytt samtykt við 19-0, § 2 varð samtykt við 20-0. At málið soleiðis samtykt skuldi fara til 3. viðgerð, varð samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskotið endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 414-12-2. Lóg nr. 21 frá 14. mars 1986.

# 10. Løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar v. fl.

Ár 1985, týsdagin 17. september legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

# Uppskot

# til

## løgtingslóg um brennistudning til ávísar pensjónistar v. fl.

§ 1. Í figgjarárinum 1. apríl — 31. december 1985 verður úr landskassanum veittur ein brennistudningur til pensjónistar við kr. 1.200 til hvønn pensjónist.

§ 2. Brennistudningurin verður latin til fólk, ið áðrenn 1. oktober 1985 hava fingið játtað fólkapensjón ella einkjupensjón ella hava sent inn umsókn um slíka pensjón, tí rætturin til hana er uppnáddur, og seinri fáa pensjónina játtaða.

§ 3. Treytin fyri at fáa brennistudning er, at pensjónisturin við oktober útgjaldingina 1985 hevur rætt til pensjónsviðbót. Hjúnafelagar, sum bæði eru pensjónistar, eiga ein part í felag.

§ 4. Í figgjarárinum 1. apríl — 31. december 1985 verður úr landskassanum eisini veittur ein brennistudningur við kr. 1.200,- til fólk, sum tann 1. oktober 1985 fáa hjálp sambært § 13 í forsorgarlógini, undir somu treytum sum fyrisett í § 3 í hesi lóg.

§ 5. Brennistudningurin verður útgoldin av Føroya gjaldstovu.
**2. stk.** Annars hevur Almanna-

## lagtingslov om brændselstilskud til visse pensionister m. fl.

§ 1. I finansåret 1. april — 1. december 1985 ydes af landskassen et brændselstilskud til pensionister på kr. 1.200 til hver pensionist.

§ 2. Brændselstilskud ydes til personer, som inden den 1. oktober 1985 har fået bevilget folkepension, invalidepension eller enkepension har indsendt ansøgning om sådan pension, fordi retten til denne er opnået, og senere får pensionen bevilget.

§ 3. Betingelsen for at opnå brændselstilskud er, at pensionisten ved oktober udbetalingen 1985 er berettiget til pensionstillæg. Ægtepar, som begge er pensionister, får tilsammen en andel.

§ 4. I finansåret 1. april — 31. december 1985 ydes af landskassen også et brændselstilskud til personer, der den 1. oktober 1985 modtager hjælp efter forsorgslovens § 13, på samme betingelser som fastsat i § 3 i denne lov.

§ 5. Brændselstilskuddet udbetales af Føroya Gjaldstova.
**Stk. 2.** Iøvrigt varetager Al-

stovan fyrisitingina av brennistudninginum um hendi.
**3. stk.** Avgerðir, sum Almannastovan hevur tikið, kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri landsstýrið.

**§ 6.** Brennistudningurin er ikki skattskyldugur.

**§ 7.** Henda lóg fær gildi beinanvegin.

mannastovan administrationen af brændselstildskuddet.
**Stk. 3.** Afgørelser, som Almannastovan har truffet, kan inden for 4 uger indbringes for landsstyret.

**§ 6.** Brændselstilskuddet er ikke skattepligtigt.

**§ 7.** Denne lov får virkning straks.

**Viðmerkingar:**
Í fíggjarárinum 1980/81 varð brennistudningur veittur til ávísar pensjónistar við 900 kr. til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 1980 um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð brennistudningur veittur til ávísar pensjónistar við 1.200 kr. til hvønn pensjónist sambært løgtingslóg nr. 26 frá 5. mai 1981 um brennistudning til ávísar pensjónistar.

Í fíggjarárinum 1981/82 varð sambært løgtingslóg nr. 76 frá 11. december 1981 um brennistudning til stakar uppihaldarar brennistudningur eisini veittur støkum uppihaldarum við egnum húsarhaldi, sum fingu hjálp sambært § 22 í forsorgarlógini.

Í fíggjarárinum 1982/83, 1983/84 og 1984/85 varð sambært løgtingslógunum nr. 79 frá 21. mai 1982, nr. 52 frá 20. mai 1983 og nr. 63 frá 5. juni 1984 um brennistudning til ávísar pensjónistar og stakar uppihaldarar brennistudningur veittur við 1.200 kr. til hvønn í hvørjum fíggjarári.

Útreiðslurnar til brennistudningsskipanina vóru í fíggjarárunum

| | | |
|---|---|---|
| 1980/81 | 2.606.000 kr. | |
| 1981/82 | 3.596.000 kr. | |
| 1982/83 | 3.671.000 kr. | |
| 1983/84 | 3.650.000 kr. | |
| 1984/85 | 3.653.000 kr. | (fyribils tal). |

Á fíggjarløgtingslógini 1. apríl — 31. december 1985 eru játtaðar 2.775.000 kr., men er at viðmerkja, at øll útreiðslan (at kalla) verður útgoldin í oktober mánaði. Útreiðslan eftir uppskotinum verður mett til 3.700.000 kr.

Landsstýrið metir, at tørvur er á, at sami brennistudningur, sum er veittur ávísum pensjónistum og ávísum støkum uppihaldarum í fíggjarárinum 1984/85, verður veittur í fíggjarárinum 1. apríl — 31. december 1985.

1. viðgerð 24. oktober. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 28. november 1985 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum og aftaná 1. viðgerð beint í løgtingsins almanna- og heilsunevnd.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur ein samd nevnd undir við uppskotinum, men mælir tinginum til at heita á landsstýrið og figgjarnevndina um at bera so í bandi, at upphæddin verður hækkað til 1.500 kr. í komandi figgjarári.

Eisini verður mælt til, at treytirnar í § 3 verða endurskoðaðar, áðrenn uppskot um brennistudning verður framlagt næsta ár.

Ein samd nevnd setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir lógaruppskot landsstýrisins um brennistudning til ávísar pensjónistar v.fl., men mælir til, at treytirnar í § 3 verða endurskoðaðar, áðrenn uppskot um brennistudning verður framlagt næsta ár.

2. viðgerð 3. december 1985. §§ 1-7 vórðu samtyktar við 22-0. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 22-0.

3. viðgerð 4. december. Málið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1010-20-1. Lóg nr. 3 frá 9/1-86.

# 11. Lýsing av einum millumtjóða orkuprogrammi í Føroyum

Ár 1985, mikudagin 16. oktober legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir, at Uttanríkismálaráðsins kunngerð dagf. 7. apríl 1976 viðvíkjandi avtalu dagfest 18. november 1974 um eitt millumtjóða orkuprogramm verður lýst at galda í Føroyum.

**Viðmerkingar:**
Ríkisumboðið hevur spurt, um kunngerð frá uttanríkismálaráðnum, dagfest 7. apríl 1976 um avtalu dagfest 18. november 1974, um eitt millumtjóða orkuprogramm kann lýsast í Føroyum.

Orkuráðið hevur í skrivi dagfest 14. juli 1980 mælt til, at avtalan um millumtjóða orkuprogramm verður lýst Føroyum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri løgtingið við tilmæli um, at sáttmálin verður lýstur at galda í Føroyum.
**Sí skjal 4.**

1. viðgerð 24. oktober. Málið varð beint í ídnaðarnevndina, sum 17. apríl 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 16. oktober 1985 og undir 1. viðgerð 24. oktober beint í ídnaðarnevndina.

Ídnaðarnevndin hevur havt triggjar fundir um hetta mál, ein við orkuráðið og ein við landsverkfrøðingin. Nevndin er samd um at senda landsstýrinum málið aftur til nærri kanningar við úttalilsum frá orkuráðnum og landsverkfrøðinginum sum fylgiskjølum.

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Málið verður saman við úttalilsum frá Orkuráðnum og Landsverkfrøðinginum sent landsstýrinum til nærri kanningar.

2. viðgerð 17. apríl 1986. Uppskotið til samtyktar frá samdari nevnd varð samtykt við 30-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1127-4.

# 12. Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya

Ár 1985, mikudagin 16. oktober legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg umhappadráttarloyvi til Útvarp Føroya.**

§ 1. Í § 3 í løgtingslóg nr. 71 frá 20. november 1969 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya við seinni broytingum verða orðini »30. apríl 1986« broytt til »30. apríl 1989«.

§ 2. Henda lóg fær gildi frá 30. apríl 1986.

**lagtingslov om ændring af lagtingslov om lotteritilladelse til Útvarp Føroya.**

§ 1. I § 3 i lagtingslov nr. 71 af 20. november 1969 om lotteritilladelse til Útvarp Føroya med senere ændringer ændres ordene »30. april 1986« til »30. april 1989«.

§ 2. Denne lov træder i kraft den 30. april 1986.

**Viðmerkingar:**

Útvarp Føroya hevur søkt um, at lógin um happadráttarloyvi, ið gongur út 30. apríl 1986, verður endurnýggjað.

Í umsókn um endurnýgging av loyvinum hevur útvarpið upplýst fylgjandi:

Løgtingslóg nr. 45/1983 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya fer úr gildi 30. apríl 1986.

| | | |
|---|---|---|
| Til 611 dráttir er inngoldið | | 34,4 mió kr. |
| goldið í vinningum | 13,3 mió. kr. | |
| skattur til landskassan | 2,2 « « | |
| | 15,5 mió. kr. | |
| umsitingarútreiðslur | 1,4 « « | 16,9 « « |
| Útvarpsins partur | | 17,5 mió. kr. |

Landsstýrið loyvir sær at mæla til, at lógin verður framlongd, tá útvarpinum tørvar pening til raksturin, serstakliga til rentur og avdrátt av lánum í samband við nýggju útvarpshúsini.

1. viðgerð 24. oktober. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 21. januar 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. oktober 1985 og undir 1. viðgerð tann 24. í sama mánaði beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við uppskoti landsstýrisins.

Undir viðgerðini varð víst á spurningin um figgjarnartrupulleikarnar hjá ítróttinum yvirhøvur, og heitir figgjarnevndin á Útvarpið um at hava hesi nevndu viðurskifti í huga og at bera so í bandi, at Ítróttur og tilknýtt virksemi, t. d. ítróttarveddingin, verður nervað minst møguligt.

2. viðgerð 23. januar 1986. Atkvøðugreiðslan útsett eftir áheitan frá figgjarnevndarformanninum. Atkvøðugreiðsla 29. januar, §§ 1 og 2 samtyktar við 25-0, at fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

3. viðgerð 5. februar. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 512-90. Lóg nr. 22 frá 14. mars 1986.

# 13. Broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna

Ár 1985, mikudagin 16. oktober legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

# Uppskot

## til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 48 frá 28. mai 1984 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður gjørd henda broyting:

§ 3, 1. stk. verður orðað soleiðis:

**§ 3.** Minstaløn**in** er pr. 1. oktober 1985 kr. 11.000,00 um mánaðin, hvør veiðuferð verður roknað fyri seg. Minstaløn**in** verður hækkað við 105 kr. um mánaðin fyri hvørji 3 stig, prístalið er oman fyri 115 (1.1.1983 = 100). Fellur prístalið niður um 100, verður eingin prístalsviðgerð. Dýrtíðarviðgerðin fer fram hvønn ársfjórðing eftir prístalinum 1. í ársfjórðinginum.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 48 af 28. maj 1984 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændring:

§ 3, stk. 1 formuleres således:

§ 3. Mindstelønnen er pr. 1. oktober 1985 kr. 11.000,00 om måneden, hver fisketur beregnet for sig. Mindstelønnen reduceres ikke af mandskabstilskuddene i henhold til denne lov. Mindstelønnen forhøjes med 105 kr. om måneden for hver 3 point, pristallet overstiger pristallet 115 (1.1.1985 = 100). Falder pristallet under 100, finder ingen pristalsregulering sted. Dyrtidsreguleringen finder sted hvert kvartal efter pristallet den 1. i kvartalet.

§ 2.

Henda lóg kemur beinanvegin í gildi.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

**Viðmerkingar:**

Minstaløn**in** til fiskimenn varð seinast hækkað pr. 1. apríl 1985 til kr. 8.900,-.

Føroya Fiskimannafelag hevur við skrivi 20. august 1985 beitt á landsstýrið um at fáa minstuløn**ina** hækkaða, av ti at síðan minstaløn**in** varð regulerað seinast, er lønarlagið í samfelagnum annars hækkað.

Landsstýrið hevur avgjørt at hækka minstuløn**ina** til fiskimenn til 11.000 kr. við prístalinum pr. 1. juli 1985 sum grundarlag frá 1. oktober 1985.

Viðmerkjast skal, at næsta prísviðbót verður veitt, tá ið prístalið kemur upp á 118 (115 + 3) o. s. fr.

1. viðgerð 24. oktober 1985. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 4. december legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. oktober 1985 og undir 1. viðgerð tann 24. í sama mánaði beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Figgjarnevndin er samd um, at sama hækking, sum talan er um í uppskoti landsstýrisins, eigur at verða ásett viðvíkjandi minsta forvinningi, sum tilskilaður er í § 4 í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

Minstiforvinningurin pr. 1. oktober 1985 er kr. 778,10 fyri hvønn útróðrardagin.

Sostatt setir figgjarnevndin fram soljóðandi

## Broytingaruppskot

### til

### uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| Afturat § 1 verður sett soljóðandi: | Efter § 1 tilføjes: |
| »§ 4. Minstaløn á føroyskum deksfiskifari undir 100 br. skrásett tons á útróðri innanfyri 100 fjórðingar úr landi í Føroyum verður, um hon ikki er undir minstulønarskipan, tryggjað ein minstaforvinning, tó tá talan er um snelluveiddan fisk, bert hálvur minstiforvinningur. Minstiforvinningurin er pr. 1. oktober 1985 778,10 kr. til hvønn mannin fyri hvønn útróðrardagin.« | »§ 4. Der sikres mandskabet på færøsk dæksfiskefartøj under 100 br. reg. tons i hjemmefiskeri indenfor 100 sømil fra land af Færøerne, såfremt mandskabet ikke er under mindstelønsordning, en mindsteindtægt, dog når der er tale om fisk, der er fanget med snelle, kun halv mindste forvinding. Mindsteindtægten er pr. 1. oktober 1985 778,10 kr. til hver af mandskabet for hver fiskedag.« |

2. viðgerð 6. december. § 1 varð samtykt við 27 atkvøðum, § 4 við

broyting frá figgjarnevndini samtykt við 26-0 atkvøðum. At fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 29-0 atkvøðum.

3. viðgerð 12. december 1985. Málið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1539-2-I. Lóg nr. 6 frá 17/1 1986.

# 14. Yvirtøka av Føroya flúgvingini

Ár 1985, mikudagin 16. oktober legði Óli Breckmann, løgtingsmaður fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um hækking og innbjóðing til nýtekningar av partapeninginum í P/f Flogsamband.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at skjóta upp til 5 milj. kr. í nýggjum partapeningi í P/f Flogsamband, treytað av:

a) at 20 milj. kr. verða bodnar út til fría tekning í Føroyum við 1 ára tekningarfreist,
b) at landskassans partapeningur verður ikki meir enn 20% av samlaða partapeningi felagsins,
c) at fyri felagnum situr 7-mannanevnd, harav 3 umboða løgtingsins og 4 privata teknaða og inngoldna partapeningin,
d) at verandi nevnd í P/f Flogsamband kallar inn til aðal-

**lagtingslov om forhøjelse og indbydelse til nytegning af aktiekapital i P/f Flogsamband.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at tegne op til 5 milj. kr. i ny aktiekapital i P/f Flogsamband, betinget af:

a) at der indbydes offentligt til fri aktietegning for 20 milj. kr. på Færøerne,
b) at landskassens aktiekapital ikke overstiger 20% af selskabets samlede aktiekapital,
c) at der for selskabet sidder en bestyrelse på 7 medlemmer, hvoraf de 3 repræsenterer lagtinget og de 4 den privat tegnede og indbetalte aktiekapital,
d) at P/f Flogsambands nuværende bestyrelse indkalder til gene-

fund, tá treytirnar í hesi lóg eru uppfyltar, til tess at broyta felagsins viðtøkur í tráð við hesa lóg.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað í samráð við fíggjarnevndina at veðhalda fyri lánum, 40% av keypsvirðinum av tí parti av flúgviútbúnaði, sum krevst til at røkja føroyska partin av teirri flúgving, sum P/f Flogsamband fær ábyrgd av í komandi samstarvi við flogfeløg í teim grannalondum okkara, sum vera við í komandi flúgvisamstarvi, og at veðhalda fyri rakstrarláni upp til 15 milj. kr.

§ 3. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

ralforsamling, såsnart betingelserne i denne lov er opfyldt, med det formål at ændre aktieselskabets reglement ifølge denne lov.

§ 2. I samråd med finansudvalget bemyndiges landsstyret til at garantere for lån, 40% af købsværdien af den del af flymaterielet, der skønnes nødvendig for at drive den færøske del af flyvningen, som P/f Flogsamband får ansvar af i samarbejde med de flyselskaber i vore nabolande, som får del i dette flyvesamarbejde, og at garantere for driftslån på indtil 15 milj. kr.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Verandi flúgvikoncessión gongur út 1. oktober í 1985. Hetta uppskot miðar móti at fyrireika okkum sjálv til longu nú at yvirtaka flognálið sum málsøki fult og heilt frá dønum, samstundis sum tað er ætlað at leggja fíggjarliga og fyrisitingarliga grundstøðið undir so stóra føroyska luttøku í flúgvingini frá í heyst og stigvist at hava hesa um hendi sjálvi.

Á fólkatingi hevur danski flogferðsluráðharrin, Arne Melchior givið Óla Breckmann váttan fyri, at danir fyri sín part eru sinnaðir til at samráðast við landsstýrið um samstarv ella yvirtøku av Føroya-flúgvingini. Danskt lóggávuarbeiði á hesum øki hevur tikið hædd fyri føroyskari medábyrgd.

Yvirtøka av hesum málsøki undir løgtingið er náttúrligur liður í menningini av føroyska samfelagnum sum sjálvbjargin tjóð við mestu ábyrgd av egnum viðurskiftum.

Lógaruppskotið miðar móti at brúka tað fíggjarliga tilfeingi, Føroyar longu eiga í P/f Flogsamband, sum í víðkaða formi sínum kann keypa sín part av einum Boeing 737 flogfari. Eitt slíkt kostar um 10 milj. dollarar ella 100 milj. kr.

P/f Flogsamband skal við sínum flogfari í mest møguligan mun lúka altjóða lógir og viðtøkur um flúgving í samráð við danska Loftferðslu-

direktoratið. Danska loftferðslulógin gildir ikki sum er fyri Føroyar og Grønland.

Starvsfólkið hjá P/f Flogsamband skal í mest møguligan mun vera føroyskt, bæði á jørð og í luftini.

Fyrisiting, viðlíkahald, bíleggingar og uppatliggjandi tænasta skal í mest møguligan mun vera á føroyskum hondum.

Dagliga arbeiðið við avgreiðslu av flúgvingini er longu í Føroyum. Flogfelag Føroya hevur røkt sín part av hesum arbeiði fyrimyndarliga og eigur framvegis sjálvsagdan rætt til hetta arbeiðið og til ta ávirkan á Føroya-flúgvingina, sum felagið sær sær føri fyri. Samstarvið millum Flogfelagið og SAS við bíleggingarskipan hevur stóran týdning í tilrættaleggingini av Føroya-flúgvingini framvegis.

Tekniska viðlíkahaldið eigur at lúka øll trygdarkrøv og kann fara fram í samstarvi við erfarin felløg í grannalondum okkara.

Uttan at nakað ítøkiligt kann fáast at vita um rakstrarúrslitið av verandi flúgvingini millum Føroya og útheimin, meta kønir menn, at hon árliga gevur um 50 milj. kr. í avlopi brutto. Tað mátti verið lag á manni hjá føroyingum at tikið sær meiri ábyrgd av og fingið meiri ávirkan á flúgvingina, so vit sjálv kunnu avgera vavið, prislegu og virksemi hennara út frá okkara heldur enn annara tørvi og búskaparligu fyritreytum.

Til tess at tryggja málinum bestu og breiðastu viðgerð, verður sett fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við donsku loftferðslumyndugleikarnar og ríkisstjórnina um løgtingsins yvirtøku av málsøkinum flúgving upp á Føroyar, og saman við p/f Flogsamband at samráðast við Maersk Air, Icelandair, Grønlandsfly og við Flogfelag Føroya um eina felags ætlan fyri Føroya flúgvingina við mest møguligari føroyskari luttøku frá byrjan og stigvísari yvirtøku av allari flúgvingini skjótast til ber, og at leggja álit fyri løgtingið á ólavsøku.

1. viðgerð 30. oktober. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 9. apríl 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, tann 16. oktober 1985 og undir 1. viðgerð 30. í s. m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og hevur løgmaður á fundi í fíggjarnevndini upplýst, at landsstýrið arbeiðir við málinum.

Fíggjarnevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Juul Jacobsen, Signar Hansen og Ivan Johannesen) tekur ikki undir við málinum og setir eingi uppskot fram.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Eyðun Viderø) ger vart við, at tað er av stórum týdningi at loysa flogmálið á ein slíkan hátt, at føroyingar luttaka í rakstrinum og ognarviðurskiftunum viðvíkjandi flogferðslumi millum Føroyar og útheimin, serliga Danmarkarrutumi.

P/f Flogsamband hevur fyri um leið einum ári síðani sent landsstýrinum uppskot um skipan av einum føroysk-donskum felag, sum kannhava hesa flúgving um hendi. Biðið er um, at samráðingar verða tiknar upp um at fáa málið loyst.

Minnilutin setir tí fram hetta

### Uppskot

### til

### samtyktar

Landsstýrið verður biðið um uttan óneyðugan steðg saman við P/f Flogsamband at taka upp samráðingar við avvarðandi donsku myndugleikar og felløg um skipan av føroyskum/donskum flogfelag.

2. viðgerð 10. apríl 1986. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum í fíggjarnevndini fall við 5-0 atkvøðum. Lógaruppskotið § 1 frá Óla Breckmann fall við 0-1 atkvøðu, og uppskotið til samtyktar frá sama fall við 0-1 atkvøðu.

# 15. Veðhald fyri láni til Nólsoyar kommunu

Ár 1985, mikudagin 16. oktober legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til Nólsoyar kommunu.**

**§ 1.** Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til 1,5 mió. kr. til Nólsoyar kommunu.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi, tá hon verður kunngjørd.

**lagtingslov om garanti for lån til Nólsoy kommune.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån på indtil 1,5 mio. kr. til Nólsoy kommune.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft ved dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**
Við skriví dagfest 15. juli 1985 hevur Nólsoyar kommuna søkt um landskassaveðbald fyri einum láni upp á 1.500.000 kr. netto frá Kreditforeningen af kommuner i Danmark. Peningurin verður at nýta til rindan av tí arbeiði, ið er gjørt við havnalagið, at figgja kassakredittir í hesum sambandi og til annað arbeiði í kommununi.

1. viðgerð 24. oktober 1985. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 21. januar 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 16. oktober 1985 og undir 1. viðgerð 24. í s. m. beint í figgjarnevndina.

Undir viðgerðini í figgjarnevndini eru útvegaðar upplýsingar um láonskuldina hjá Nólsoyar kommunu v. m. Inntøkuviðurskiftini hjá kommununi eru lýst.

Ein samd figgjarnevnd mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Anfinn Kallsberg, Svend Aage Ellefsen og Ivan Johannesen mæla annars til, at landsstýrið ger eina heildarætlan fyri íløgutørvin hjá kommunum, serliga við atliti til spurningin um endurfiggjan, nú tað er møguligt at fáa ódýr lán.

2. viðgerð 23. januar 1986. § 1 varð samtykt við 20-0 atkvøðum og § 2 varð eisini samtykt við 20-0 atkvøðum.

3. viðgerð 29. januar 1986. Lógin varð endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 809-32-12. Lóg nr. 15 frá 13. februar 1986.

# 16. Broyting í fólkatingsvallógini

Ár 1985, mikudagin 16. oktober legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at fremja viðlagda uppskot frá innanríkisráðnum til broytingar í fólkatingsvallógini fyri Føroyar við hesum broytingum:

1) Í broyting 8, § 8, í uppskotinum ganga út orðini: »det centrale personregister på Færøerne«, og í staðin verður sett: »kommunens folkeregister«.
2) Í broyting 8, § 10, í uppskotinum ganga út orðini: »i de stedlige dagblade eller lokalaviser«, og í staðin verður sett: »på sædvanlig måde«.
3) Í broyting 10, § 18, stk. 1, í uppskotinum verður »årlig« broytt til: »for 4 år ad gangen«.
4) Í § 62, stk. 1 og 2 í lógini verður orðið »landskassen« í báðum stykkjum broytt til: »kommunen«.

**Viðmerkingar:**
Viðvíkjandi fólkatingsvali í Føroyum galda reglurnar í lógarkunngerð nr. 12 frá 12. januar 1977, tó soleiðis at við lóg nr. 483 frá 27. september 1928 varð valrættaraldurin lækkaður niður í 18 ár.

Síðan 1978 er lógin um fólkatingsval í Danmark broytt fleiri ferðir.

Tá lógirnar eiga at vera eins, har ikki serlig viðurskifti á staðnum gera seg galdandi, hevur innanríkisráðið gjørt hjálagda uppskot til broytingar í føroysku fólkatingsvallógini, so hon kemur at liggja so nær donsku fólkatingsvallógini sum gjørligt.

Høvuðsbroytingarnar í uppskotinum viðvíkja vallistunum og atkvøðugreiðsluni við brævi.

Eftir núgaldandi skipan skulu vallistarnir gerast hvørt ár í februar mánaði og síðani liggja frammi til alment eftirlit. Herumframt skulu gerast tilflytaralisti og eykalisti.

Eftir uppskotinum skulu vallistar bert gerast, tá ið val verður útskrivað.

Listin skal ikki sum nú leggjast fram til alment eftirlit, men skulu veljararnir í staðin fáa eitt valkort sendandi. Veljarar, ið ikki hava fingið nakað valkort, hava so møguleika fyri at venda sær til kommununa og fáa feilin rættaðan. Rættingar í vallistunum kunnu gerast fram til sjálvan valdagin.

Tær størru kommunurnar hava teldutól, sum kunnu skriva vallistarnar og valkortini og aðrar kommunur kunnu, um tær ynskja hetta, fáa vallistarnar skrivaðar av landsfólkayvirlitinum.

Føroya Kommunufelag, ið hevur havt uppskotið til ummælis, mælir til framvegis at nýta núverandi skipan við framløgu av vallistunum, og at tað verður frivilligt hjá kommununum at nýta valkort ella ikki.

Tá skipanin við at kanna eftir, um ein er komin at standa á framlagda vallistanum, so at siga ikki verður nýtt, metir landsstýrið tað rættast at sleppa hesari skipan og í staðin fyri at nýta valkort, sum gevur veljaranum trygd fyri, at ein er komin á vallistan, umframt at hetta er ein lætti fyri avgreiðsluna av valinum. Meirarbeiðið av at skriva valkortini verður uppvegað av sparda arbeiðinum við at sleppa undan at skriva vallista hvørt ár.

**Sí skjøl 5 A, B og C.**

1. viðgerð 30. oktober 1985. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 30. januar 1986 legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av landsstýrinum hin 14. oktober 1985 og aftaná 1. viðgerð hin 30. oktober 1985 beint í Rættarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 5. februar 1986. Málið varð aftur beint í rættarnevndina vegna tekniskt brek.

Framhaldandi 2. viðgerð og atkvøðugreiðsla 6. mars. Uppskot landsstýrisins samtykt við 26-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 701-8-2.

# 17. Setan av yvirlækna í ortopediskum sjúkum á landssjúkrahúsinum

Ár 1985, mikudagin 16. oktober legði Eliesar Arge, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtinginum verður mælt til at áleggja landsstýrinum beinanvegin at seta yvirlækna í ortopediskum sjúkum á Landssjúkrahúsið.

**Viðmerkingar:**

Flestu ferðsluvanlukkur henda, har ferðslan er mest, og har flest fólk búgva.

Oftа eru tey skaddu illa meiðslað og treingja eisini til aðra viðgerð enn ta reint ortopedisku.

Somuleiðis eru fleiri og fleiri, sum treingja til ortopediska viðgerð fyri pínu í mjadnum og knøum.

Bíðitíðin er long, um 2 ár, hjá hesum liðandi fólkum til at sleppa til viðgerðar á Ríkishospitalinum.

Helst er rikiligt av arbeiði í Føroyum til tveir ortopedar.

1. viðgerð 23. oktober 1986. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 11. apríl 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Eliesari Arge hin 16. oktober 1985 og aftaná 1. viðgerð beint í almanna- og heilsunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Allir limir í nevndini taka undir við, at tørvur er á einum ortopedkirurgi á landssjúkrahúsinum.

Meirilutin í almanna- og heilsunevndini, (Jákup Lindenskov, Karin Kjølbro og Juul Jacobsen), vísir tó á, at sum heild tørvar landssjúkrahúsinum ábøtur á nógvum ymiskum økjum. Tað kann tí ikki vera rætt at taka eitt einstakt evni út og viðgera tað fyri seg. Meirilutin vísir tí á tað álitið, sum ráðleggingarnevndin fyri sjúkrahúsverkið kom við í 1980.

Meirilutin mælir tí til at beina málið út í landsstýrið, ið verður biðið um at koma við eini samlaðari ætlan um, hvussu landssjúkrahúsið skal verða útbygt, og í hvørjari raðfylgju henda útbygging skal fara fram.

Meirilutin setir tí fram hetta

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið áleggur landsstýrinum at koma við eini samlaðari loysn um, hvussu sjúkrahúsverkið í Føroyum skal verða útbygt.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum hjá Eliesar Arge og mælir til at samtykkja tað.

Ein annar minniluti (Flemming Mikkelsen) førir fram:

Nú er eitt hálvt ár síðan, E. Arge legði hetta uppskot fyri tingið.

So vítt eg veit, hevur nevndin ongan fund havt um málið, álitið er framkomið við »munn til munn« metoduni í tingsalinum.

Eg kann í hesum sambandi vísa á, at Sambandsflokkurin hevði í álitinum til liggjarlógina uppskot um, at peningur varð settur av til yvirlækna í ortopedi á landssjúkrahúsinum.

Eftir álitinum at døma eru allir nevndarlimirnir samdir um, at neyðugt er við einum vælútbúnum ortopedlækna á landssjúkrahúsinum, men meiri-

lutin, samgonguflokkarnir, bera seg undan at taka støðu og kasta bóltin frá sær, soleiðis at tey, sum hava tað svárt, framvegis verða giðslar í politiska samgonguspælinum.

Av tí rúgvumikla tilfari, sum fram er komið um hetta mál, eri eg sannførdur um, at hetta er eitt gott uppskot. Verður uppskotið samtykt, og verður ortopedur settur, lættir hetta og styttir um manga pínufulla sjúkralegu hjá mongum av okkara medmenniskjum, sum harvið aftur kundu komið at liva eina menniskjaverda tilveru.

Eg fari tí at mæla løgtinginum til, at lata alt politiskt smásinni fara og taka undir við uppskotinum.

2. viðgerð 17. april. Uppskotið fall við 14 ja atkvøðum, 4 nei-atkvøðum, 14 atkvøddu ikki. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Olaf Olsen,
Svend Aage Ellefsen,
Fyðun Viderø,
Jógvan Sundstein,
Poul Michelsen,
Jutta Midjord,
Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Agnar Nielsen,
Jógvan Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Dánjal Larsen,
Jona Henriksen,
Adolf V. Hansen.

Nei atkvøddu: Anfinn Kallsberg,
Henrik Old,
Heini O. Heinesen,
Asbjørn Joensen.

Atkvøddu ikki: Óli Breckmann,
Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jákup Lindenskov,
Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Tummas Arabo,
Hilmar Kass,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen,
Karin Kjølbro,

Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson,
Tordur Niclasen.

Uppskot til samtyktar frá meirilutanum í rættarnevndini varð samtykt við 22-0 atkvøðum.

# 18. Broyting í skattalógini

Ár 1986, týsdagin 21. januar legði Eilif Samuelsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt verður »15.000 kr.« í § 33, nr. 11 broytt til »20.000 kr.«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat ændres »15.000 kr.« i § 33, nr. 11 til »20.000 kr.«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Endamálið við hesi lógarbroyting er at lætta um skattin hjá persónum í útbúgving, sum søkja sær arbeiði her í Føroyum í stytri tíðarskeiðum, t. d. í summarfrítíðini. Serstakliga er hugsað um okkara egnu ungfólk í útbúgving, sum vegna sera lagaliga skatting í Danmark vera fyri vanbýti, tá skattað verður í Føroyum.

Talan er her um eina ajourføring av tí upphædd, sum hevur verið galdandi tey seinastu 4-5 árini.

1. viðgerð 29. januar 1986. Málið varð beint í skattanevndina, sum 11. februar legði fram soljóðandi

Álit

Málið var framlagt 21. januar 1986 og varð við 1. viðgerð beint í skattanevndina.

Nevndin hevur havt fund um málið.

Í viðmerkingunum verður sagt, at endamálið við hesi lógarbroyting er at lætta um skattin hjá persónum í útbúgving, sum søkja sær arbeiði her í Føroyum í stytri tíðarskeiðum, t. d. í summarfrítíðini.

Við tað at eitt mál, ið snýr seg nettupp um tað sama, sum júst nú er viðgjørt í skattanevndini, kann meirilutin ikki taka undir við hesum máli.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Hilmar Kass, Poul J. Olsen og Jógvan Sundstein) vísir til álit sínt í løgtingsmáli nr. 4/1985: Skattligur stuðul til sjálvfíggjan av útbúgving.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskot Sambandsfloksins óbroytt.

2. viðgerð 13. februar 1986. Uppskot Sambandsfloksins falt við 12-0 atkvøðum.

# 19. Ókeypis skúlabøkur til næmingar á studentaskúlum og HF-skeiðum

Ár 1985, týsdagin 22. oktober legði Eilif Samuelsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið um at skipa fyri, at næmingar á studentaskúlum og HF-skeiðum fáa ókeypis skúlabøkur frá komandi skúlaári at rokna.

**Viðmerkingar:**
Sambært fólkaskúlalógini skulu tey undirvísingarambоð, ið neyðug eru, ókeypis latast næmingunum til nýtslu.

Á lærlingaskúlunum verða undirvísingarambоðini somuleiðis latin ókeypis.

Til tess at geva næmingunum á studentaskúlum og HF-skeiðum nøkulunda somu kor, verður hetta uppskot sett fram.

1. viðgerð 31. oktober 1985. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 16. apríl 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av Sambandsflokkinum 22. oktober 1985 og varð eftir 1. viðgerð tann 31. oktober 1985 beint í mentamála- og skúlanevndina.

Málið snýr seg um at áleggja landsstýrinum at skipa fyri, at studenta- og HF-næmingar fáa ókeypis skúlabøkur.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fundir við umboð fyri yrkisfelagið hjá studentaskúla- og HF-lærarum og fyri LFÚ.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Hergeir Nielsen, Asbjørn Joensen, Jóannes Dalsgaard) ger vart við, at lærubøkurnar eru ein tung byrða hjá nevndu næmingum og teirra foreldrum ella verjum. Meirilutin vísir á, at spurningurin júst av hesi orsøk varð tikin við í samgonguskjalið, og at landsstýrið arbeiðir við málinum, ið kann loysast uttan nakað uppskot til samtyktar.

Víst varð eisini á, at nevndu skúlar hava møguleika fyri at útvega klassasett av lærubókum yvir teirra rakstrarætlanir longu í verandi fíggjarári, og gongur meirilutin út frá, at skúlarnir nýta hesar møguleikar.

Sostatt setir meirilutin einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Óli Breckmann) førir fram, at uppskotið kann í tess leysligu orðing í ávisan mun verða gingið á møti við galdandi lóg, og kann játtanin til endamálið verða hækkað eftir politiskum tykki á fíggjarlógini. Skúlabøkur verða lutfalsliga biligari við tíðini, og bókakostnaðurin forðar neyvan nøkrum næmingi í at fáa sína HF- ella studentaskúlaútbúgving.

Ein møguleiki er, at lestrarstudningurin verður broyttur, so at hædd verður tikin fyri tí útreiðslu, einar 2.000 kr. árliga, sum skúlabøkur kosta.

Fólkaflokkurin setir tí einki uppskot fram, men tekur støðu í tingsalinum.

Ein annar minniluti (Dánjal Larsen) tekur undir við uppskoti sambandsfloksins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað óbroytt.

2. viðgerð 17. apríl 1986. Uppskot Sambandsfloksins fall við 9-0 atkvøðum.

# 20. Broyting í lóg um ráfiskagrunn

Ár 1985, hósdagin 24. oktober legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, fram soljóðandi

Uppskot

til

**løgtingslóg um broyting í lóg um ráfiskagrunn.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 15 frá 5. mai 1975, broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 18. juli 1983, verður gjørd henda broyting:

Sum nýggj § 1, 4. stk. verður sett:

»Tó skal daggamal fiskur, t. v. s. fiskur, ið er avreiddur innan 24 tímar eftir at fiskifarið fór úr føroyskari havn, ongantíð lata avgjald til ráfiskagrunnin.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændringer i lov om råfiskefond.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 15 af 5. maj 1975, ændret med lagtingslov nr. 73 af 18. juli 1983, foretages følgende ændring:

Som ny § 1, 4. stk. tilføjes

»Dog skal daggammel fisk, d. v. s. fisk, som er indhandlet senest 24 timer efter at fiskefartøjet forlod færøsk havn, aldrig betale afgift til råfiskefonden.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Í løgtingsmáli nr. 133/1983 varð gjørd ein roynd at fáa tann veruligu prisin galdandi fyri útróðrarfisk, sí viðmerkingar landsstýrisins til punkt nr. 16.

Í løgtingsmáli nr. 28/1984 avtekur ein samd figgjarnevnd tað, sum varð samtykt í løgtingsmáli nr. 133/1983.

Norðoya tingmenninir løgdu síðani undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 28/1984 fram uppskot til samtyktar, sum er soljóðandi: »Fyri daggamlan fyrstafloks fisk má avreiðingarprisurin ongantíð fara niður um avrokningarprisin.« Hetta uppskotið fekk 17-0 atkvøður og varð sostatt samtykt. Ráfiskagrunnurin vildi ikki fylgja hesi løgtingssamtykt, og er stoðan í dag

hon, at útróðrarfiskur fyri ein stóran part rindar úti við 2 kr. inn í Ráfiskagrunnin. Hetta hevur fingið »Útróðrarfelagið Eystan Múla« at kalla norðoyatingmenninar saman til fundar, har teir hava ynskt, at vit skuldu leggja frammanfyristandandi uppskot við fylgjandi viðmerkingum fyri løgtingið.

Tá ráfiskagrunnurin varð settur á stovn 1975, mundi fáur útróðrarmaður gruna, at hann skuldi gerast tann lykkjan, ið fór at kyrkja útróðurin.

Í dag letur vanligur útróðrarfiskur umleið 2,00 kr./kg inn í grunnin, meðan upsi, blálonga og kongafiskur fáa umleið 2,00 kr./kg úr grunninum. Útróðrarmenn meta hetta vera høpisleyst, at teir skulu fíggja hin partin av flotanum.

Tað er óivað rætt at gjalda fyri at fáa djúpavatnsfisk upp á land, men peningurin má takast onkra aðrastaðni frá enn frá útróðrarmonnum.

Niðurstøðan — tann vinnan, ið kundi klára seg, skal lata til hinar, so eingin klárar seg — er bæði ósunn og ómoralsk.

Útróðrarmenn ynskja rættan prís heldur enn stuðul.

1. viðgerð 30. oktober 1985. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. apríl legði fram soljóðandi

## Álit 1

Málið varð framlagt av Anfinni Kallsberg, løgtingsmanni, tann 24. oktober 1985 og undir 1. viðgerð tann 30. í s. m. beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið, og er nevndin samd um einki uppskot at seta fram nú, men vil arbeiða víðari við málinum.

2. viðgerð 8. apríl 1986. Málið varð afturbeint í fiskivinnunevndina, sum 14. apríl legði fram soljóðandi

## Álit II

Málið varð framlagt av Anfinni Kallsberg, løgtingsmanni, 24. oktober 1985 og undir 1. viðgerð 30. í s. m. beint í fiskivinnunevndina, sum 4. apríl 1986 legði fram álit.

Undir 2. viðgerð 8. apríl 1986 varð málið aftur beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur aftur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Kass, Erlendur Patursson, Sigfríður Vørðhamar) er samdur um einki uppskot at seta fram nú, men vil arbeiða víðari við málinum, her í millum at fáa eina meting frá ráfiska-

grunninum og stuðulsnevndini, um hvussu nógv hann samanlagt fær útgoldið.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg) tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen) førir fram, at tað er ein veruleiki, at Føroya Løgting hevur latið alla ávirkan frá sær viðvíkjandi umbýti av fiskaprísum og studningi til fiskivinnuna, við løgtingslógini um ráfiskagrunn frá 1975 og løgtingslógini um studning til fiskivinnuna frá 1985.

Hesar heimildirnar eru komnar út úr løgtinginum, meðan teir sosialistisku flokkarnar hava havt meirilutan í samgongunum, nevniliga Javnaðar- og Tjóðveldisflokkurin.

Tað einasta, sum løgtingið nú tekur støðu til árliga, er hvussu nógv skal setast á liggjarlógina til nevndina fyri studningi til fiskivinnuna og nevndina fyri ráfiskagrunnin at húsast við. Núverandi samgonga hevur skorið hesa upphædd niður, og klárt sagt frá, at hon skal yvirhaldast, sjálvt um teir eru greiðir yvir, at tað førir við sær, at skip og bátar fara á húsagang.

Hetta uppskotið frá Anfinni Kallsberg snýr seg um at broyta lógina frá Ráfiskagrunninum soleiðis, at daggamal fiskur ikki skal lata avgjald inn í grunnin.

Hetta var roynt í 1983, men hetta vóru útróðrarmenn tá sera misnøgdir við, orsakað av at teir so samtíðis mistu annan studning, sum ávirkaði úrtøkuna hjá teimum tann skeiva vegin.

Hetta uppskotið er heldur eingin borgan fyri, at útróðrarmenn ikki missa studningin, tá teir vera undantiknir at gjalda inn í ráfiskagrunnin.

Sum tað framgongur av viðgerðini í fiskivinnunevndini, so hevur uppskotið hjá Anfinni Kallsberg ongan møguleika at verða samtykt, tá sjálvt hansara partamaður í fiskivinnunevndini ikki tekur undir við uppskotinum.

Ásannandi hesar veruleikar skjýtur minnilutin tí upp at senda málið til nevndina fyri Ráfiskagrunnin og nevndina fyri studningi til fiskivinnuna og setir fram fylgjandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Málið verður sent nevndini fyri ráfiskagrunnin og nevndini fyri studning til fiskivinnuna við umbøn um, at teir náðiliga síggja til kor útróðrarmanna, soleiðis at minni verður tikið inn í ráfiskagrunnin, uttan at minkað verður um studningin annars.

2. viðgerð 14. apríl 1986. Lógaruppskotið § 1 fall við 4-0 og broytingaruppskotið frá Sambandsflokkinum fall við 10-0 atkvøðum.

# 21. Nýggj arvalóg

Ár 1985, mikudagin 30. oktober legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir hjálagda uppskot til kongaliga fyriskipan um at seta arvalóg nr. 215 frá 31. mars 1963, sum broytt við lóg nr. 222 frá 8. juni 1966 í gildi í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Tann í Føroyum galdandi lóggáva um arv er kongalig fyriskipan frá 21. mai 1845, sum varð sett í gildi her við lóg frá 4. januar 1854.

Umframt hjúnafelagar eru hesir legalir arvingar:

1. børn og eftirkomarar teirra,
2. um eingir eftirkomarar eru, eru næstu arvingar foreldur, systkin og avkom teirra,
3. síðani arva abbar, ommur og avkom teirra, og um heldur eingin er í hesum arvaklassa, arva
4. langabbar og langommur og avkom teirra,
5. oldurabbar og oldurommur og avkom teirra.

Við lóg nr. 66 frá 17. mars 1954 varð minkað um arvaklassarnar, soleiðis at arvur ikki fór longur enn til abbar og ommur og avkom teirra, tó ikki longur niður enn til systkinabørn frá arvalataranum. Í 1958 varð lagt inn á ting uppskot um at seta hesa lóg í gildi í Føroyum, men uppskotið fall.

1. apríl 1964 kom í gildi lóg nr. 215 frá 31. mai 1963 »Arvelov«. Í hesi lóg er aftur minkað um arvingarnar, soleiðis at systkinabørn heldur ikki arva.

Annars eru størstu broytingarnar:

§ 6 hareftir hjúnafelagi arvar ⅓ ímóti ¼ eftir gomlu skipanini,

§ 7 hareftir hjúnafelagin arvar alt, um eingir lívsarvingar eru,

§ 19 hareftir arvur eftir fyrr deyða av hjúnum, tá hitt situr í óskiftum búgvi ikki fellur, fyrr enn tað seinna doyr ella skifti verður kravt,

§ 25 hareftir arvaluturin hjá hjúnafelaga og lívsarvingum við testamenti kann minkast við ½ í staðin fyri ⅓ eftir gomlu skipanini.

Harafturat er skipanini viðvikjandi testamentum broytt.

Tað hendir ikki oftani, at arvingar í 3.-5. klassa koma upp á tal, við tað at oftast eru nærri arvingar. Um ein persónur, sum ikki hevur nakrar arvingar eftir hesi nýggju arvalóginj, ynskir, at onkur longur út í ættini skal arva hann, kann hann skriva testamenti.

Eftir viðlagda uppskoti til kgl. fyriskipan fyri Føroyar koma arvingar í 3. klassa at arva, tó ikki longur niður enn til systkinabørn.

Eru eingir arvingar eftir lógini og eingi testamenti fyriliggur, fer arvurin í landskassan.

Við lóg nr. 222 frá 8. juni 1966 er § 61, stk. 1 broytt viðvikjandi bandleggjan av arvi.

Ein ommur broyting er hend við lóg nr. 258 frá 4. juni 1969, men tá henda broyting er orsakað av nýggju lógini um hjúnaband v. m., má henda broyting bíða her, so leingi nýggja lógin um hjúnaband ikki er sett í gildi.

Víst verður eisini til hjálagda ummæli sorinskrivarans frá 2. januar 1964.

**Sí skjal 6.**

1. viðgerð 5. november 1985. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 19. december 1985 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fyri tingið av landsstýrinum hin 28. oktober 1985 og við 1. viðgerð 5. november 1985 beint í Rættarnevndina.

Galdandi arvalóg í Føroyum er frá 1845 og varð sett í gildi her frá 4. januar 1854.

Rættarnevndin hevur viðgjørt uppskotið, og ein samd nevnd setir fram soljóðandi

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið góðkennir uppskotið um at seta nýggja arvalóg nr. 215 frá 31. mars 1963, sum broytt við lóg nr. 222 frá 8. juni 1966, í gildi í Føroyum.

2. viðgerð 21. januar 1986. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 25 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

F. L. j. nr. 613-1.

# 22. Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir

Ár 1985, týsdagin 26. november legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir v. m.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað saman við figgjarnevndini landskassans vegna í figgjarárinum 1986 at veðhalda fyri lánum til fiskiskip, fiskavirkir og smolt- og alibrúk, sum eru komin í figgjarliga trongstøðu. Hin samlaða veðhaldsupphæddin má ikki fara upp um 25 mió. kr.

§ 2. Treytirnar, fyri at veðhald kann verða veitt, eru hesar:

1. At líkindi eru til, at raksturin framyvir eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum fer at bera seg.

2a. Har talan er um fiskavirkir ella smolt- og alibrúk, at eginpeningurin verður hækkaður

**lagtingslov om garanti for lån til fiskeskibe og fiskerivirksomheder m. v.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget på landskassens vegne i finansåret 1986 at garantere for lån til fiskeskibe, fiskerivirksomheder og smolt- og fiskeopdrætsanlæg, der er kommet i drifts vanskeligheder. De samlede garantibeløb må ikke overstige 25 mio. kr.

§ 2. Betingelserne, for at garanti ydes, er disse:

1. At der er udsigt til, at driften fremover efter alle foreliggende oplysninger bliver rentabel.

2a. Hvor det drejer sig om fiskerivirksomheder eller smolt- og fiskeopdrætningsanlæg, at egen

við í minsta lagi 10% av veðhildna láninum, og at fingin verða onnur lán, sum í minsta lagi eru 15% av tí peningi, ið neyðugur er til framhald av rakstrinum, og sum ikki kunnu krevjast afturgoldin yvir stytri áramál enn áramálið fyri tey lán, landskassin veðheldur fyri. Landsstýrinum er í serligum førum, har talan er um fiskavirki á smáplássi, heimilað at víkja frá regluni um 15% kravið.

kapitalen forhøjes med mindst 10% af det garanterede lån, og at andre lån tilvejebringes for mindst 15% af det beløb, der er nødvendigt til fortsættelse af driften, og som ikke kan kræves tilbagebetalt over et kortere åremål end åremålet for de lån, for hvilke landskassen garanterer i henhold til denne lov. Hvor der er tale om fiskerivirksomhed på småpladser bemyndiges landsstyret til under særlige omstændigheder at fravige kravet om 15%.

**2b.** Har talan er um fiskiskip, har partafelag er ognari, at eginpeningurin verður hækkaður við í minsta lagi 10% av veðhildna láninum.

**2b.** Hvor der er tale om fiskeskibe, der tilhører et aktieselskab, at egenkapitalen forhøjes med mindst 10% af det garanterede lån.

**2c.** Har talan er um fiskiskip, har einstaklingur, partsreiðarar ella líknandi eru ognarar, at inngoldið er í minsta lagi út yvir kravda eginpeningin spardur skattur, sum stavar frá avskriving upp á skipið skattaárini 1982/83, 1983/84, 1984 og 1985, og at inngoldin verða 10% av veðhildna láninum.

**2c.** Hvor der er tale om fiskeskibe, hvor enkeltpersoner, partsredere eller lignende er ejere, at der er indbetalt ud over den krævede egenkapital mindst sparet skat, som stammer fra afskrivning på skibet skatteårene 1982/83, 1983/84, 1984 og 1985, og at nyindbetalt bliver 10% af det garanterede lån.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1986.

§ 3. Denne lov træder i kraft den 1. januar 1986.

**Viðmerkingar:**

Eftir løgtingslóg nr. 20 frá 9. mai 1985 um veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir, tey sonevndu kreppulánini, jbr. løgtingsmál nr. 87/1985, er lógin galdandi í figgjarárinum 1. apríl til 31. december 1985.

Í lógini nr. 20 frá 9. mai 1985 var upphæddin sett til 19 mió. kr. svarandi til ¾ av eini ársjáttan upp á 25 mió. kr.

Tilsagnir eftir lóg nr. 20 frá 1985 eru givnar fyri um 3 mió. kr.

1. viðgerð 28. november 1985. Málið varð uttan orðaskifti beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 4. december 1985. Uppskotið varð samtykt við 26-0 atkvøðum. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 6. december 1985. Málið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1413-5-1. Lóg nr. 4 frá 9/1 1986.

# 23. Heilsufrøðilig Starvsstova

Ár 1985, týsdagin 26. november legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um Heilsufrøðiliga Starvsstovu.**

§ 1. Heilsufrøðiliga Starvsstovan er stovnur undir landsstýrinum.
2. stk. Landsstýrið setir við kunngerð reglur fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, har eitt nú eru ásetingar um arbeiðsøki, samskipannarviðurskifti, starvsfólkaviðurskifti og um í hvønn mun gjaldast skal fyri tænastur, gjørdar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

§ 2. Løgtingslóg kemur í gildi 1. apríl 1986.

**lagtingslov om Heilsufrøðiliga Starvsstovu.**

§ 1. Heilsufrøðiliga Starvsstova er en institution under landsstyret.
Stk. 2. Landsstyret fastsætter ved kundgørelse regler for Heilsufrøðiliga Starvsstova, bl.a. bestemmelsen om arbejdsområde, organisationsforhold, personaleforhold og om i hvilke tilfælde, der skal betales for tjenesteydelser, der er ydet af Heilsufrøðiliga Starvsstovan.

§ 2. Lagtingsloven træder i kraft 1. april 1986.

**2. stk.** Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 18 frá 6. mai 1975 um almenna starvsstovu.

**2. stk.** Samtidig ophæves lagtingslov nr. 18 af 6. maj 1975 om offentligt godkendt laboratorium.

**Viðmerkingar:**

Við løgtingslóg nr. 18 frá 6. mai 1975 varð landsstýrinum heimilað at seta á stovn Heilsufrøðiliga Starvsstovu. Í løgtingslógini er eisini nevnt, hvat endamál starvsstovan skal hava, og um ymisk organisatorisk viðurskifti.

Vanligt er, at stovnar undir landsstýrinum ikki eru skipaðir við løgtingslóg, men at hesir virka sambært reglugerð, sum er skrivað ella góðtikin av landsstýrinum. Hetta kemst av,

— at hesar reglur ikki hava rættarligt innihald fyri borgaran, men bert eru um, hvussu stovnurin er skipaður,
— at neyðugt er, at hesir stovnar í sínum arbeiði skjótt kunnu laga seg eftir broyttum umstøðum.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan er sambært núgaldandi løgtingslóg stovnur undir landsdjóralæknaembætinum. Ætlanin er nú at seta sjálvstøðugan stjóra fyri stovnin, nú arbeiðið og arbeiðsøkið er so nógv økt árini, víst verður m.a. til nýggju matvørulógina, har ein stórur partur av eftirlitinum er lagdur til starvsstovuna.

Landsstýrið skjýtur tí upp, at viðurskiftini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni verða skipað við kunngerð frá landsstýrinum og út frá teirri til eina og hvørja tíð av løgtinginum givnu fíggjarligu játtanum. Ætlanin er, at arbeiðsøki starvsstovunnar verður tilskilað, eins og tað er eftir § 2 í galdandi lóg.

Dagurin løgtingslógin kemur í gildi er settur til 1. apríl 1986, fyri at stundir skulu vera hjá fyrisitingini at gera nýggja reglugerð.

***Serprent*** *av løgtingslóg nr. 18 frá 6. mai 1975 um almenna starvsstovu* ***er lagt við.***

1. viðgerð 3. december 1985. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 11. februar 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum og varð undir 1. viðgerð beint í almanna- og heilsunevndina, sum síðani við formansins loyvi hevur beint málið í menta- og skúlanevndina.

Endamálið við lógarbroytingini er at skipa Heilsufrøðiligu Starvsstovuna á Debesartrøð sum sjálvstøðugan stovn.

Higartil hevur starvsstovan verið skipað sum stovnur undir landsdjóralæknaembætinum.

Tey seinastu árini eru uppgávurnar hjá starvsstovuni so nógv vaksnar og vorðnar so fjølbroyttar, at alt bendir á, at tað er beint at skilja stovnin frá landsdjóralæknaembætinum og skipa Heilsufrøðiligu Starvsstovuna við sjálvstøðugum stjóra.

Nevndin hevur havt fund við umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, sum mælir til ta broyting, sum lógaruppskotið tilætlar.

Umboðini fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna gjørdi vart við, at arbeiðsøkið hjá starvsstovuni fór at vera munandi økt í næstu framtíð serstakliga í sambond við alivinnuna og við at umsita nýggju matvørulógina.

Nevndin hevur eisini havt fund við umboð fyri landsstýrið, sum upplýsti, at tað møguliga var neyðugt at seta ein stjóra burturav fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna umframt teir triggjar deildarleiðarar, sum nú virka á stovuni.

Sum tað framgongur av lógaruppskotinum, er ætlanin í framtíðini at skipa Heilsufrøðiligu Starvsstovuna við reglugerð í staðin fyri við lóg. Hetta er tað, sum vanliga er galdandi fyri landsstovnar.

Ein samd nevnd mælir út frá hesum løgtinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum óbroytt.

2. viðgerð 13. februar 1986. § 1 samtykt við 25-0 atkvøðum, § 2 við 26-0 atkvøðum. Við 25-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt.

3. viðgerð 24. februar 1986. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 2235-16-5. Lóg nr. 23 frá 13. mars 1986.

# 24. Grannskoðan av almennum roknskapum

## 1 Húsalánsgrunnurin

Ár 1985, hósdagin 31. oktober løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

# Uppskot

# til

# samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá Húsalánsgrunninum saman við viðmerkingunum frá løgtingsgrannskoðarunum.
Húsalánsgrunnurin 1983/84 og 1984/85.
Íbúðargrunnurin 1983/84 og 1984/85.
Bjálvingarstuðulsgrunnurin 1983/84 og 1984/85.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum**
Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá omanfyri nevndu grunnum fyri figgjarárini 1983/84 og 1984/85 og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá grunnunum eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið vissu fyri, at roknskapir og tann figgjarliga støða hjá øllum grunnunum eru í lagi.

**Viðv. Húsalánsgrunninum**
Løgtingsgrannskoðararnir eru nøgdir við, at lánipolitikkur Húsalánsgrunnsins hevur ført við sær, at støddin á teimum einstøku húsunum er minni enn hon hevur verið. Grannskoðararnir halda tó, at tað skuldu verið møguleikar í reglum Húsalánsgrunnsins, at gjørt undantaksreglur, har talan er um t. d. avlamisfólk, ið møguliga nýtast øðrvísi innrætting og/ella fleiri fermetrar enn teir 120, ið er ovara markið fyri at fáa biligastu og størstu lánini.

Grannskoðanarnevndin er vitandi um, at núverandi leigumál hjá Húsalánsgrunninum, í teimum hølum teir eru í nú, gongur út í 1987. Grannskoðanarnevndin heldur, at tað eigur at áleggjast stovninum at seta seg í samband við aðrar landsstovnar um at fara undir eina bygging av egnum hølum, ið verða samskipað við virksemi hjá øðrum stovnum, soleiðis at størsti landsbúskaparligi fyrimunur fæst.

Kurs-tapið hjá Húsalánsgrunninum tykist ógvuliga stórt, men eftir at hava kannað málið vísir tað seg, at 5 mill. kr. í tapi er eitt kurs-tap, sum er yvir 10 ár.

**Viðv. Bjálvingarstuðulsgrunninum**
Løgtingsgrannskoðararnir halda, at maksimal-upphæddin, sum er kr. 25.000,- munar ógvuliga lítið, um tað skal verða talan um veruliga bjálving av húsum, herundir útskiftan av vindeygum o. t. Tí meinar Grannskoð-

anarnevndin, at upphæddin kr. 25.000,- eigur at verða munandi økt, soleiðis at hesin grunnur kann koma at virka í tráð við ætlanirnar í lógini, hann arbeiðir eftir.

**Viðv. Íbúðargrunninum**
Løgtingsgrannskoðararnir halda, at lógin er ógreið at arbeiða eftir (serliga grein 4 og grein 14), og mælir nevndin til at reglugerð verður gjørd, og at lógin um neyðugt verður endurskoðað soleiðis, at Íbúðargrunnurin kann koma at virka í tráð við tær ætlanir, sum lógu aftanfyri stovnsetanina av hesum grunni.

**Viðv. figgjar- og lániviðurskiftum hjá øllum grunnum**
Grannskoðanarnevndin er av teirri áskoðan, at miðað má verða ímóti, at játtanir á figgjarlógini eru so mikið stórar, at lánini framhaldandi kunnu verða so bílig sum tey eru í dag, og at lániupphæddirnar til hús, ciga at kunna fylgja prístalsvøkstrinum.

Viðv. uttanlandslánum, sum grunnurin tekur, halda løgtingsgrannskoðararnir, at tað er ongantíð ov skjótt, at hesar lántøkur verða samskipaðar í tí ætlaða búskapardeildini hjá landsstýrinum, soleiðis at lánini kunnu verða so bílig og kurs-trygg sum gjørligt.

Ásannandi at vanlig hús fyri uttan grundøki, í dag kosta umleið kr. 700.000,- at byggja, og tey lagaligu lánini í Húsalánsgrunninum bert eru kr. 140.000,-, er nevndin av teirri áskoðan, at grunnurin eigur at fáa meiri pening at arbeiða við av figgjarlógini.

I. viðgerð 26. november 1985. Ein løgtingsmaður mælti til, at málið fór í rættarnevndina, men hetta fekk bert eina atkvøðu. Málið varð so aftur beint í grannskoðanarnevndina.

4. december løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram

**Álit II**

Nevndin hevur aftur viðgjørt málið og leggur sostatt soljóðandi broytingaruppskot til samtyktar:

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir hjá:
Húsalánsgrunninum 1983/84 og 1984/85.
Íbúðargrunninum 1983/84 og 1984/85.
Bjálvingarstuðulsgrunninum 1983/84 og 1984/85.

6. december varð uppskotið til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum samtykt við 29-0 atkvøðum.

# 24. Grannskoðan av almennum roknskapum
# 2 Menningargrunnur Ídnaðarins

Ár 1985, mikudagin 4. december løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri fíggjarárini 1983/84 og 1984/85.

**Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum**

Løgtingsgrannskoðararnir hava gjøgnumgingið roknskapirnar hjá Menningargrunninum fyri fíggjarárini 1983/84 og 1984/85 og fingið trygd fyri, at peningaviðurskifti og skjalatilfar hjá grunninum eru kannað, og at roknskapargrannskoðarin hevur fingið vissu fyri, at roknskapir og tann fíggjarliga støða hjá grunninum eru í lagi.

Lántørvurin hjá Menningargrunninum er alsamt vaksandi. Roknskapurin hesi bæði seinastu árini vísir, at ískoytið frá Landskassanum minkar lutfallsliga í ti samlaða kapitaltørvinum, ið grunnurin hevur.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at hetta er óheppið. Menningargrunnurin hevur seinastu árini sett nógvan pening av móti tapsvanda av lánum og veðhaldum. Í 1984/85 er hetta tal komið upp á 9,7 mill. kr.

Menningargrunnurin hevur eisini tey seinastu árini havt stór einsløk tap. T. d. Alginatvirkið við umleið 4 mill. kr. og Hazy við uml. 6,4 mill. kr. Hetta er tó ikki endaliga uppgjørt enn.

Viðvíkjandi likvidatiónini av Hazy hava løgtingsgrannskoðararnir m. a. kannað, hvussu sølan av goymsluni fór fram. Goymslan var boðin út til ávísar handlar í Havn, og síðan seld einum einstaklingi.

Viðvíkjandi innkrevjing av peningi verður gjørt vart við, at tað gongur ógvuliga long tíð, frá tí at Menningargrunnurin ger útlegg í einum virki, til málið kemur til rættarviðgerð.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla Løgtinginum til at biðja Landsstýrið kanna, um ikki stytt kann verða um hesa biðitíð.

Arbeiðsøkið hjá Menningargrunninum er økt og vorðið meira fjøllbroytt tey seinastu árini.

Grannskoðanarnevndin er av teirri hugsan, at nevndin í Menningargrunninum eigur at verða víðkað, so hon telur 5 limir.

Eisini verður hildið, at samstarv Menningargrunnsins við aðrar grunnar hevði verið høgligari, um ein loysn varð funnin á hølisviðurskiftunum í samstarvi við t. d. Menningarstovu, Ídnaðargrunn og Aliráð.

21. januar varð uppskotið til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum samtykt við 29-0 atkvøðum.

# 24. Grannskoðan av almennum roknskapum
# 3 Útvarp Føroya

Ár 1986, týsdagin 14. januar løgdu løgtingsgrannskoðararnir fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at góðkenna roknskapirnar hjá Útvarpi Føroya fyri fíggjarárini 1983/84 og 1984/85.

**Frágreiðing frá Løgtingsgrannskoðarunum viðvíkjandi roknskapinum hjá Útvarpi Føroya**

Løgtingsgrannskoðararnir hava grannskoðað roknskapirnar hjá Útvarpi Føroya fyri omanfyri nevndu ár og ásannað, at roknskapargrannskoðanin á stovninum er farin fram samsvarandi reglunum.

Virksemi hjá Útvarpinum er nógv broytt. Útreiðslur og inntøkur eru sostatt eisini øktar.

Viðvíkjandi V4-loyvinum hjá Útvarpinum, so heldur Grannskoðanarnevndin, at tað er rætt, at Útvarpið framhaldandi skipar fyri V4-spæli.

Útvarpið bevur nú játtanir á løgtingsfíggjarlógini. Løgtingið eigur nú at

taka eina principiella støðu um, hvussu stór henda upphæddin skal verða. Løgtingsgrannskoðararnir meina, at upphæddin eigur at verða ájavnt við rentur og avdráttir. Miðað verður á henda hátt ímóti, at raksturin annars kann hvíla í sær sjálvum. Flemming Mikkelsen førir fram, at miðað verður ímóti, at stovnurin Útvarp Føroya kemur at hvíla í sær sjálvum. Í fleiri ár hava løgtingsgrannskoðararnir viðmerkt, at millumrokningin, sum Útvarpið hevur við Telefonverkið, vísir ein mun uppá kr. 72.364,-. Hesin munur stavar frá einari rokning frá 1975. Grannskoðararnir átala álvarsliga, at hetta mál ikki er avgreitt.

Løgtingsgrannskoðararnir halda, at um Landsstýrið ikki ger okkurt fyri at fáa enda á hesum, so má umhugsast at leggja uppskot fyri Løgtingið til samtyktar, sum áleggur Landsstýrinum at fáa greiðu á hesum máli.

21. januar 1986 varð uppskotið til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum samtykt við 24-0 atkvøðum.

# 25. Hjálp til stovnan av heimum

Ár 1985, hósdagin 31. oktober legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at koma við uppskoti til broytingar í skattalógini, sum geva nýgiftum ein skattalætta, ið ger tað lættari hjá teimum at stovna heim.

**Viðmerkingar:**

Tað er kostnaðarmikið hjá ungum nýgiftum at seta búgv. Hetta serstakliga nú skatturin seinnu árini er farin við munandi parti av inntøkuni.

Fyri at lætta um og skjótari at gera tað møguligt fyri nýgift at kunna seta føtur undir egið borð, verður skotið upp at geva hvørjum einstøkum, tá hesin giftist á fyrsta sinni, ein skattalætta.

Fyri at øll skulu vera líka fyri lógini, og lógin líka fyri øll, verður skotið

upp, at geva hvørjum hjúnafelaga sær ein skattalætta í beinleiðis skattinum uppá kr. 50.000,-, soleiðis at tær fyrstu kr. 50.000,-, ið álíknaðar eru viðkomandi, eftir at hjúnabandið er stovnsett, ikki skulu gjaldast.

Sambært uppskotinum skal vera loyvt hjúnafelagnum at skifta upphæddina sínamillum heilt ella partvíst, soleiðis at um bert annað teirra er sett í inntøkuskatt, kann hin hjúnafelagin fáa upp til 100.000,- í skattalætta.

. Skattalættin verður bert givin fyrstu ferð ein giftist. Hevur annar hjúnafelagin verið giftur áður, verður bert givið hinum felaganum skattalætta. Hesi kunnu tó framvegis skifta skattalættan sínamillum.

Flytir viðkomandi, og skattaskyldan her á landi heldur uppat, verður tann parturin av skattalættanum, ið yngri er enn 5 ár, at afturgjalda landskassanum yvir rímiligt tíðarskeið, uttan so at landsstýrið hevur fritikið viðkomandi frá hesi skyldu.

Mett verður, at lógaruppskotið kemur at kosta um 20 til 30 mill. krónur um árið.

1. viðgerð 5. november 1985. Málið varð beint í skattanevndina, sum 16. januar 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt 30. oktober 1985 av Adolf V. Hansen, løgtingsmanni, og varð beint í skattanevndina undir 1. viðgerð.

Uppskotsstillarin mælir til, at landsstýrinum verður álagt at koma við uppskoti um broytingar í skattalógini, sum geva nýgiftum ein skattalætta, so tað verður lættari at seta seg í búgv.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Hilmar Kass, Poul J. Olsen og Agnar Nielsen) tekur ikki undir við uppskotinum, men vísir á, at í samgonguskjalinum hjá landsstýrisflokkunum er niðurfelt, at førast skal ein familjupolitikkur. Nevndin setir einki uppskot fram í málinum, men væntar at landsstýrið fer at koma við uppskoti, sum eisini er í tráð við tankarnar í uppskotinum.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) kann taka undir við hugsanunum um at styrkja møguleikarnar at stovna familju.

Fyri at skunda undir arbeiðið hjá landsstýrinum um familjumál setir minnilutin fram hetta

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at koma við uppskoti um broytingar í skattalógini, sum miða ímóti at gera tað skattliga lættari hjá nýstovnaðum familjum og at likastilla mann og konu í hjúnafelagnum skattliga, við at tey verða skattað hvør sær.

2. viðgerð 22. januar 1986. Atkvøðugreiðsla 23. januar 1986. Uppskotið frá Adolfi V. Hansen, løgtingsmanni, fall við 3-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 430-12-45-1.

# 26. Føroysk myntaframleiðsla sum arbeiðsskapandi virksemi

Ár 1985, hósdagin 31. oktober legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at gera fyrireikingar og koma við uppskoti til lógir um framleiðslu av føroyskum myntum í støddunum 20, 10, 5, og 1 krónum, 50, 10 og 5 oyrum. Henda framleiðslan av føroyskum myntum skal, umframt framleiðsluna svarandi myntaumfarið, fremjast á hvørjum ári við eini upphædd, sum svarar til tvífalt árssvinnið pluss nýtsluvøksturin.

Tann eini helmingurin skal verða nýttur at selja í góðkendum føroyskum rammum við einum eintaki av hvørjari mynt svarandi til kr. 36,90 ella margfaldið av hesi upphædd, í hvørji rammu.

Arbeiðið at samla myntirnar í rammur, verður latið brekaðum upp í hendi gjøgnum endurútbúgvingarstovnin Alv.

Myntsamlingarnar verða at selja fyri navnavirði á myntunum fyri tann hátt at verja fyri møguligum kappingum.

Landsstýrið fyriskipar søluna av myntsamlingum gjøgnum peningastovnarnar. Avlopið av søluni fer í grunn hvørs endamál er, at skapa nýggj arbeiðspláss fyri brekað.

**Viðmerkingar:**

Tá postverkið varð yvirtikið miðskeiðis í sjeytiárinum, uppbygdi endurútbúgvingarstovnurin Alv eina sokallaða frímerkjadeild, hvørs endamál tað var at skapa sjálvfiggjandi arbeiðspláss til tey okkara, ið hava eitthvørt brek eins og til einkjur.

Seinni yvirtók postverkið deildina, og nú standa mong brekað í teirri støðu, einki arbeiði at hava. Brekað fólk hava somu trongd sum tey, ið hava sítt fulla føri, at vilja hava eitthvørt arbeiði, sum ger, at tey gerast so sjálvbjargin sum gjørligt.

Myntir og annar peningur er, á sama hátt sum frímerkir, vorðin áhugaemni hjá samlarum um allan heim. Mett verður, at handil við myntsamlingum kann gerast inntøka — størri enn frímerkjahandilin.

Fremjing av hesum uppskoti

1) førir til, at Føroyar gerast enn meiri kendar í útheiminum til frama fyri okkara útflutning, okkara handilslív og okkara ferðamannavinnugrein,
2) skapar arbeiði til eitt stórt tal av hondum millum brekað og onnur líkastillað,
3) veksur um útflutningin uttan samsvarandi vøkstur í innflutninginum,
4) bøtir um handilsjavnan,
5) gevur teimum, sum koma at starvast innan hesa vinnu eina kenslu av at vera við til at skapa inntøkur til landið,
6) minkar um samlaða kostnaðin av almennaveitingum uttan at minka um einstakaupphæddirnar,
7) ger bæði einstaklingin og landið meira sjálvbjargið.

Í byrjanini eigur at farast varisliga fram, soleiðis at fyrsta árið eigur navnavirðið á tí, ið selt verður til samlarar, ikki at fara nógv uppum 1 mill. krónur, og eigur hetta tal síðan spakuliga at fara uppeftir. Tó ongantíð so høgt, at marknaðurin verður mettaður.

Munurin millum søluvirðið (navnavirðið) og framleiðsluvirðið verður so mikið stórur, at peningur kemur at loypa av at seta í grunn.

1. viðgerð 5. november 1985. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 27. februar 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Adolfi V. Hansen, løgtingsmanni, 31. oktober 1985 og undir 1. viðgerð 5. november beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og varð útvegað ávíst skjalatilfar, ið lýsti fíggjarligar og ríkisrættarligar spurningar í samband við føroyska myntaframleiðslu, eitt mál, ið undanfarna landsstýrið hevur arbeitt við og havt samráðingar við danskar myndugleikar um.

Semja er í fíggjarnevndini um, at áðrenn støða kann takast til fyriliggjandi uppskot til samtyktar, er neyðugt at fáa lógarheimildina greidda.

Áhugi er í nevndini fyri, at lógargrundarlagið verður kannað og fyrireikað, og setir ein samd fíggjarnevnd fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Málið verður sent landsstýrinum við áheitan um, at tað arbeiðir viðari við málinum, serliga við atliti til spurningin um tað neyðuga lógargrundarlagið.

2. viðgerð 6. mars 1986. Uppskotið frá Adolfi V. Hansen fall við 5-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá samdari fíggjarnevnd varð samtykt við 22-0 atkvøðum.

# 27. Altjóða sáttmáli um, hvør lóg skal galda fyri sáttmálaskyldu v. m.

Ár 1985, týsdagin 5. november legði Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at mæla ríkisstýrinum til, at hjálagda uppskot til

»Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om gennemførelse af konvention om, hvilken lov der skal anvendes på kontraktlige forpligtelser, m. v.« verður sett í gildi í Føroyum.

**Viðmerkingar:**
Frá løgmálaráðnum hevur landsstýrið fingið uppskot til kongaliga fyriskipan um at seta lóg nr. 188 frá 9. mai 1984 »om gennemførelse af konvention om, hvilken lov der skal anvendes på kontraktlige forpligtelser, m. v.« í gildi í Føroyum.

Altjóða sáttmálin frá 9. juni 1980 um, hvør lóg skal galda fyri avtalur, sum hava tilknýti til fleiri lond, er komin í lag sum ein partur í samarbeiðinum millum EF-londini. Sáttmálin er tó ikki ein partur av felagsskaparreglunum og hevur einki við EF at gera.

Altjóða sáttmálin hevur til endamál at áseta fastar reglur fyri valið av lógarreglunum innan sáttmálarættin, t.v.s. reglur um lógarreglurnar hjá hvørjum landi skulu nýtast, tá ið avgerðir skulu takast í ósemjum viðvíkjandi sáttmálaskyldum, har partarnir hava tilknýti til fleiri lond.

Tílíkir spurningar um val av lógarreglum taka seg serstakliga upp, har ein sáttmáli hevur altjóða sermerki, t.d. heimstaði partanna, undirskrivingarstað, útinningarstað ella onnur viðurskifti við tilknýti til fleiri lond.

Av serstøkum áhuga fyri Føroyar eru eisini reglurnar í § 2 í lógini (§ 19 í altjóðasáttmálanum), har ásett verður, at reglurnar í sáttmálanum verða at nýta í tann mun, tað eru galdandi ymsar lógarreglur í ymsum pørtum av danska ríkinum. Tá tað í ein ávísan mun kunnu galda ymsar reglur um sáttmálaviðurskifti í Føroyum, Grønlandi og Danmark, kunnu eisini innanríkis stinga seg upp spurningar, um lógarreglurnar hjá hvørjum ríkisparti skulu nýtast.

Viðmerkjast skal, at lógin er sett í gildi í Grønlandi við tilmæli frá heimastýrinum (Anordning nr. 413 frá 13. september 1985), aftaná at landið er farið úr EF.

Landsstýrið loyvir sær at mæla til, at lógin verður sett í gildi í Føroyum, tá hetta vil skapa greiðari rættarstøðu í hesum øki, sum nú ikki er lógarskipað.

1. viðgerð 26. november 1985, men eftir áheitan frá tingmanni varð tinggerðin útsett.

3. december var viðgerðin uppafturtikin og málið varð beint í rættarnevndina, sum 19. december 1985 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 5. november 1985 og við 1. viðgerð tann 25. í s.m. beint í rættarnevndina.

Eftir sáttmálanum verða ásettar fastar reglur fyri val av lógarreglum, um ein sáttmáli hevur tilknýti til partar, ið ikki búgva í sama landi og partarnir ikki frammanundan hava avtalað, hvørjar lógarreglur skulu nýtast. Reglurnar í sáttmálanum verða eisini at nýta, um tað í einum ríki galda ymsar lógarreglur í einstøkum pørtum av ríkinum.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 16. januar 1986. Uppskot landsstýrisins samtykt við 28-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 630-1.

# 28. Broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving

Ár 1985, týsdagin 26. november legði Jógvan Dutlhuus, landsstýrismaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómansútbúgving.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 65 frá 5. juni 1984 um sjómansútbúgving verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2 gongur pkt. 4) út, og pkt. 5)—7) verða til pkt. 4)—6).
2. § 5 verður orðað soleiðis:
   »Skiparaprógv kann bert takast av persóni, ið hevur staðið heimaskiparaprógv.«
3. § 6 verður orða soleiðis:
   »Tann, sum hevur staðið skips-

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om sømandsuddannelse.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 65 af 5. juni 1984 om søfartsuddannelse foretages følgende ændringer:

1. I § 2 udgår pkt. 4), og pkt. 5)—7) ændres til pkt. 4)—6).
2. § 5 affattes således:
   »Skippereksamen kan kun aflægges af personer, der har bestået kystskippereksamen.«
3. § 6 affattes således:
   »Den, som har bestået skibs-

føraraprógv, verður mettur at hava staðið heimaskipara- og skiparaprógv.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1986.

førereksamen, anses for at have bestået kystskipper- og skippereksamen.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1986.

**Viðmerkingar:**

Við lóg frá 241 frá 6. juni 1985 um broyting í lóg um sjómansútbúgving varð í Danmark sjómansútbúgvingin broytt solciðis, at við gildi frá 1. januar 1986 fellur stýrimansprógvtøkan burtur har.

Hetta førir við sær, at um útbúgvingin av skipsførarum í Føroyum (3 ár) skal verða javnmett við donsku útbúgvingina solciðis, sum tað altíð hevur verið, og um føroyskir navigatørar framvegis skulu hava møguleika at sigla við donskum skipum, og harvið fáa tey vinnubrøv, sum krevjast, verður neyðugt at broyta løgtingslóg um sjómansútbúgving nr. 65 frá 5. juni 1984 solciðis, at stýrimansprógvtøkan fellur burtur við gildi frá 1. januar 1986.

Táið fyrireikingararbeiðið varð gjørt viðvíkjandi uppskotinum til løgtingslóg um manning av skipum nr. 104 frá 6. november 1984, sum eisini hevur ásetingar um vinnubrøv, varð í viðmerkingunum frá arbeiðsbólkinum fyri navigatørar sagt frá, at eingin broyting átti at verða fraind, fyrrenn avvarðandi lógir vórðu broyttar í Danmark og øðrum londum við, og STCW-sáttmálin, tað er alheimssáttmálin frá 1978 um útbúgving av sjófólki, um manningarbrøv og um vaktarhald á skipum, fekk gildi fyri Føroyar.

Tann 12. september 1984 samtykti løgtingið, at STCW-sáttmálin skuldi vera lýstur at galda í Føroyum, og landsstýrið hevur samtykt at seta ein arbeiðsbólk at endurskoða løgtingslógina um manning av skipum og sjómansløgtingslógina, fyri at hesa báðar lógirnar kunnu samsvara STCW-sáttmálan. Eisini hava umboð fyri landsstýrið og landsskúlafyrisitingina havt fund við ídnaðarmálaráðið um hesi mál 21. august 1985. Somuleiðis hevur landsstýrið samtykt, at umsitingin av sjóvinnubrøvum skal flytast til landsskúlafyrisitingina.

Landsskúlafyrisitingin hevur viðgjørt hetta mál í samráð við Føroya Sjómansskúla, og skriv er sent ábugafeløgum í Føroyum. Somuleiðis hevur landsskúlafyrisitingin samband við leiðslu og lærarum frá skúlanum verið við til at viðgera tímabýti og undirvísingina annars á lærararáðstevnu í Danmark í døgunum 3.-5. september 1985.

1. viðgerð 3. december 1985. Málið varð beint í skúlanevndina, sum 16. december 1985 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum og varð eftir 1. viðgerð 3. december 1985 beint í skúla- og mentamálanevndina.

Endamálið við broytingini er at ájourføra sjómansútbúgvingina, og verður hetta gjørt við, at sjálv stýrimansprógvtøkan fellur burtur frá 1. januar í 1986.

Broytingin umfatar bert teir næmingar, sum byrja skúlagongdina aftaná 1. januar 1986.

Broytingin nervar ikki teir, sum frammanundan bert hava stýrimansprógv.

Broytingin er ein treyt fyri, at føroyska skipsføraraútbúgvingin skal kunna verða javnmett við t.d. ta donsku. Nevndin hevur eisini fingið at vita, at nevnda broyting er ein treyt fyri, at føroyskir navigatørar kunnu fáa tey vinnubrøv, sum krevjast.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur boðað frá, at felagið tekur undir við uppskotinum.

Skúla- og mentamálanevndin hevur viðgjørt málið, og nevndin er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

2. viðgerð 18. december 1985. § 1 varð samtykt við 23-0. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 23-0 atkvøðum.

3. viðgerð 19. december 1985. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 22-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1629-1-3. Lóg nr. 2 frá 9. januar 1986.

# 29. Broyting í útvarpslógini

Ár 1985, týsdagin 14. januar tegði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

| | |
|---|---|
| **løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um útvarp.** | **lagtingslov om ændring i lagtingslov om radio.** |

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp verður § 3, 1. stk. orðað soljóðandi:

»Til útvarpið skal hvørt húsarhald rinda gjald fyri eitt radiomóttakara. Sama er galdandi fyri virkir, skip, handlar, skrivstovur o.t. Fyri móttakarar í bilum og bátum undir 5 br. reg. tons verður einki gjald at rinda.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1986.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 28. marts 1956 om radio affattes § 3, stk. 1 således:

»Til radioen skal hver husholdning svare afgift for een radiomodtager. Det samme er gældende for virksomheder, skibe, forretninger, kontorer o.l. For modtagere i biler og både under 5 br. reg. tons svares ingen afgift.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1986.

**Viðmerkingar:**

Lógaruppskotið hevur til endamáls at beina burtur skeivleikar í verandi lóg um útvarpsgjald, sum ikki verður fylgd.

Sum tíðindamonopol hevur Útvarp Føroya m.a. frammíhjárætt (eins og Sjónvarp Føroya), at lógin heimilar stovninum at krevja og panta eftir lurtaragjaldi av hvørjum einasta radiotóli í landinum.

Radiohandlar hava skyldu at boða Útvarpi Føroya frá, hvørja ferð eitt móttøkutól verður selt. Í øllum landinum munnu finnast tiggjutúsundtals radiotól, sum eftir galdandi lóg øll eiga at bera hvør sítt lurtaragjald.

Neyvan ger Útvarp Føroya brúk av politi- og dómsvaldi, uttan so at onkur heilt sýtir at gjalda sítt eina útvarpsgjald. Sostatt gongur Útvarp Føroya ikki eftir bókstavinum í lógini, og túsundtals radiotól sleppa undan at bera lurtaragjald.

Útvarp Føroya hevur farnu 10 árini fingið um helming av samlaðu inntøkum stovnsins frá lurtaragjaldinum (t.d. 1,6 av tilsamans 3,4 mió. kr. í 1976/77 og 8,3 av tilsamans 14,2 mió. kr. í 1984/85). Helst verður hvørki býti broytt ella samlaða inntøka tíðindamonopolsins skerd av hesum uppskoti.

Lurtaragjaldsinntøka Útvarpsins í fjør lá um 8,3 mió. kr., svarandi til um 15.000 radiotól á 550 kr. í gjaldi hvørt. Í Føroyum eru eini 14.000 húsarhald og einar 1300 krambúðir, virki og skrivstovur, sum Útvarp Føroya fær inntøku frá gjøgnum lurtaragjaldið.

Nógv eru tó tey, sum fáa bæði tvey og trý uppkrøv, so antin sleppa summi sær undan at gjalda fyri tað eina, og/ella gjalda onnur fyri meira enn eitt radiotól.

Hetta lógaruppskot miðar móti at broyta verandi lóg um útvarpsgjald, so lógin samsvarar betur veruleikanum, nevniliga at hvørt húski rindar eitt lurtaragjald í staðin fyri at verða kravt eftir einum gjaldi fyri hvørt radiotól, leyst og fast, stórt og lítið, við hús ella í bilinum.

Við hesum uppskoti høvdu vit sloppið undan tí mannamuni, at summi húsarhald sleppa undan at rinda, meðan onnur rinda upp í fleiri.

Harnæst sluppu vit undan tí skeivleika, sum liggur í, at lógir hvørki virka eftir ættan ella verða fylgdar.

1. viðgerð 28. januar 1986. Málið varð beint í mentannarmálanevndina, sum 10. apríl 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av Óla Breckmann, løgtingsmanni, 14. januar 1986 og varð eftir 1. viðgerð 28. í s. m. beint í mentannar- og skúlanevndina.

Uppskotið snýr seg um at broyta útvarpslógina soleiðis, at brúkarin bert letur gjald fyri eitt radiotól, hóast hann hevur fleiri.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í triggjar minnilutar.

Ein minniluti (Jóannes Dalsgaard og Hergeir Nielsen) vísir til, at landsstýrið arbeiðir við spurninginum um útvarpsgjald og setir tí einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Jógvan Sundstein og Páll Josefsen) tekur undir við uppskotinum, tó við teirri broyting, at í § 1, síðsta punktum verður orðið »einki« broytt til »eisini« og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi:

## Broytingaruppskot

| | |
|---|---|
| Í § 1, síðsta punktum verður orðið »einki« broytt til »eisini«. | I § 1, sidste punktum ændres ordet »ingen« til »også«. |

Ein annar minniluti (Dánjal Larsen) førir fram, at málið er so illa undirbygt og setir tí einki uppskot fram.

2. viðgerð 14. apríl 1986. Broytingaruppskotið til lógaruppskotið fall við 6-0 atkvøðum. Upprunaliga lógaruppskotið fall við 12-0. Málið sostatt burturdottið.

# 30. Broyting í lógini um bygdasøvn við mentunnarsøguligum virksemi

Ár 1985, týsdagin 26. november legði Lasse Klein, landsstýrismaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bygdasøvn við mentunnarsøguligum virksemi.**

§ 1.

Í § 4, 1. stk. í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunnarsøguligum virksemi verður »40%« broytt til »50%«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1986.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om kulturhistoriske lokalmuseer.**

§ 1.

I § 4, stk. 1 i lagtingslov af 9. maj 1972 om kulturhistoriske lokalmuseer ændres »40%« til »50%«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1986.

**Viðmerkingar:**

Tá uppskotið til lóg um bygdasøvn í 1972 varð lagt fyri tingið, varð hetta við lógini um fólkabókasøvn sum fyrimynd. Eftir hesi lóg veitir landið fólkabókasøvnum 60% í rakstrarstudningi, meðan søvnini sjálvi fáa 40% til vega. Hesin stuðul hevur havt alstóran týdning fyri menningina av fólkabókasøvnum.

Undir viðgerðini av bygdasavnslógini varð ætlaði studningurin lækkaður úr 60% niður í 40%, og hava tey góðkendu bygdasøvnini tí verið munandi verri fyri enn fólkabókasøvnini. Ásannast má eisini, at bygdasøvn við einstøkum undantøkum — ikki hava fingið tann týdning fyri siðsøguliga upplýsingararbeiðið kring landið, sum miðað var ímóti við bygdasavnslógini. Skal lógin fáa tann stimbrandi týdning fyri mentunnarlívið, sum ætlanin við henni var, má tað metast neyðugt at vaksa um stuðulin.

1. viðgerð 3. december 1985. Málið varð beint í mentamálanevndina, sum 21. mars 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum 26. november 1985 og skjýtur landsstýrið upp at hækka landskassastuðulin til bygdasøvn úr 40% upp í 50% av rakstrarútreiðslunum.

Av viðmerkingum landsstýrisins og undir nevndarviðgerðini er tað komið fram, at upprunaliga fyrimyndin fyri lógini um bygdasøvn við mentannarsøguligum virksemi var lógin um fólkabókasøvn.

Eftir lógini um fólkabókasøvn veitir landið fólkabókasøvnum 60% í rakstrarstudningi, meðan søvnini sjálvi fáa 40% til vega.

Av einihvørji ørsøk broytti løgtingið uppskot landsstýrisins frá 1972 soleiðis, at landskassastuðulin til bygdasøvn við mentannarsøguligum virksemi gjørdist 40%.

Sostatt gjørdist útreiðslubýtið tað øvugta av tí, sum upprunaliga varð ætlað.

Ein fylgjan av hesum varð tann, at bygdasøvn ikki fingu tann mentannarliga týdning, sum ein hevði vónað, tá lógin um bygdasøvn varð løgd fyri løgtingið á fyrsta sinni.

Tó eru undantøk, og dømi eru um, at nøkur heilt fá bygdasøvn virka væl, hóast tann lítla almenna stuðul, tey fáa.

Ein samd nevnd heldur tað vera spell, at fleiri bygdasøvn ikki verða stovnsett eftir savnslógini.

Tað er royndur lutur, at vaksandi áhugi er fyri ættar- og bygdasøgu. Bygdasøvnini kundu verið ein meira týðandi táttur í bygdamenningini og ein stuðul hjá teimum, sum arbeiða við lokalsøgu.

Eisini kundu hesi søvn, um tey fingust at virka úti um landið, økt um áhugan millum manna fyri søgu og siðsøgu.

Hvat sjálvum stuðulinum viðvíkur, heldur nevndin tað ikki vera nóg munagott við 50% í landskassastuðuli, sum skotið er upp av landsstýrinum. Nevndin mælir tí til, at landskassastuðulin verður settur til 60% av rakstrarútreiðslunum.

Undir nevndarviðgerðini er tað eisini vorðið greitt, at tað er eitt ógvuliga tungt fíggjarligt tak at seta eitt bygdasavn á stovn. Hetta kemur av, at stovnsetingarútreiðslurnar eftir galdandi reglum koma ikki undir landskassastuðul. Sambært teim reglum, sum galda í dag, tekur studningurin ikki við, fyrr enn bygdasavnið er alment góðkent.

Nevndin skal vísa á, at tað frammanundan stovnsetingini av einum bygdasavni fer fram eitt stórt kostnaðarmikið fyrireikingararbeiði — eitt arbeiði, sum ofta hevur gingið yvir longri tíð.

Nevndin heldur tað vera rímiligt, at tær útreiðslur, sum standast av fyrireikingararbeiðinum, eisini koma undir landskassastuðul.

Nevndin heldur tað eisini vera rímiligt, at bygdasøvn fáa loyvi at savna

inn annað siðsøguligt tilfar enn fornlutir. Tað verður tí skotið upp, at broyta løgtingslógina um bygdasøvn soleiðis, at søvnini eisini kunnu savna inn og varðveita skjøl, myndir og annað av siðsøguligum týdningi fyri bygdasamfelagið. Út frá hesum setir ein samd nevnd fram í staðin fyri uppskot landsstýrisins

## Uppskot

## til

**løgtingslóg um broyting í lóg um bygdasøvn við mentunnarsøguligum virksemi.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 17 frá 19. mai 1972 um bygdasøvn við mentannarsøguligum virksemi verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 verður sett sum nýtt 2. stk. soljóðandi:
   »Bygdasøvn, sum virka eftir hesi lóg, kunnu átaka sær innsavnan og varðveitslu av skjølum, myndum, ljóð- og myndabondum og øðrum tilfari av bygdasøguligum týdningi«.
2) Í § 1 verður verandi 2. stk. til 3. stk.
3) Í § 3 verður sett sum nýtt 5. stk. soljóðandi:
   »Innsavnan og varðveitsla av skjølum, bondum o. t. eftir § 1, 2. stk. í hesi lóg, sum bygdasøvn átaka sær, krevja góðkenning av landsskjalavørðinum, og veitir hesin bygdasøvnunum hjálp og leiðbeining. Hann hevur eftirlit við søvnunum í tann mun, tey virka sum skjalasavn.«

**lagtingslov om ændring i lov om lokalmuseer med kulturhistorisk virksomhed.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 17 af 19. maj 1972 om lokalmuseer med kulturhistorisk virksomhed foretages følgende ændringer:

1) I § 1 indsættes som ny stk. 2 sålydende:
   »Lokalmuseer, som virker efter denne lov, kan påtage sig indsamling og varetagelse af dokumenter, billeder, lyd- og billedbånd samt andet af lokalhistorisk betydning«.
2) I § 1 bliver nuværende stk. 2 til stk. 3.
3) I § 3 indsættes som nyt stk. 5 sålydende:
   »Indsamling og varetagelse af dokumenter, bånd m. m. efter § 1. stk. 1 i denne lov, som lokalmuseer påtager sig, kræver godkendelse af landsantikvaren, og giver denne lokalmuseerne hjælp og rådgivning. Han har tilsyn med museerne i den grad, de fungerer som arkiv.«

4) Í § 4. verður »40%« broytt til »60%«.

5) Í § 4 verður sett sum nýtt 5. stk. soljóðandi:
»Dokumenteraðar útreiðslur í samband við fyritreikingar til stovnseting av bygdasøvnum kunnu verða tiknar við sum studningsgrundarlag í fyrsta roknskaparári hjá einum bygdasavni ella einum lokalum fornminnisfelag.«.

4) I § 4 ændres »40%« til »60%«.

5) I § 4 sættes som nyt stk. 5 sålydende:
»Dokumenterede udgifter i forbindelse med forberedelse til etablering af lokalmuseer kan tages med som tilskudsgrundlag det første regnskabsår hos et lokalmuseum eller en lokal museumsforening.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1986.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1986.

2. viðgerð 3. apríl 1986. Broytingaruppskot frá samdari mentamálanevnd til § 1 samtykt við 28-0, § 2 samtykt við 25-0. Við 27-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 7. apríl 1986. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 2204-14-3.

# 31. Veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v. m. á goymslu

Ár 1985, týsdagin 26. november legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til fiskamjøl og lýsi v. m. á goymslu.**

**lagtingslov om garanti for lån til fiskemel og animalsk olie m. v. på**

§ 1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1986 at veita vanligt veðhald fyri lánum til fiskamjøl, lýsi, matsild, úrdráttir av svartkjafti og agn á goymslu. Eisini verða møguleikar fyri at veðhalda vanligt fyri goymslulánum, bæði fyri rávørur og fyri lidna framleiðslu, til niðursjóðingarvirki og til fiskaroykivirki í Føroyum. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70% av lánsvirðinum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1986 at kautionere med simpel kaution for lån til fiskemel, animalsk olie, konsumsild, produkter af blåhvilling og agn på lager. Også bliver det muligt at garantere simpelt for lagerlån, både for råvarer og for færdigproduktion, til konserveringsvirksomheder og til fiskerygningsvirksomheder på Færøerne. Garantien ydes for lån, der ikke må overstige 70% af låneværdien.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Uppskotið er samsvarandi løgtingslóg nr. 8 frá 14. mars 1985, sum fer úr gildi 31. december 1985, sí løgtingsmál nr. 46/1984.

Tó er eftir uppskotinum bert heimild fyri at veita vanligt veðhald, og merkir hetta, at kreditor ikki kann krevja skuldina goldna av landskassanum, fyrr enn hann við úrslitaleysum rættarmáli móti upprunaliga skuldaranum hevur ásannað, at peningurin ikki verður goldin.

Víst verður til viðmerkingar frá landsstýrinum í løgtingsmáli nr. 54/1975, løgtingstíðindi 1975, bls. 231.

Í fíggjarárinum 1985 vórðu veitt hesi veðhald:

| | |
|---|---|
| Giljanes | 6 mió. kr. |
| Havsbrún | 10 mió. kr. |
| Tórshavnar Roykivirki | 5,6 mió. kr. |

1. viðgerð 28. november. Málið varð uttan orðaskifti beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 4. december. § 1 samtykt við 24-0, § 2 við 25-0. Við 25-0 atkvøðum var samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 6. december 1985. Málið endaliga samtykt við 25-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1408-5-2. Lóg nr. 5 frá 9/1 1986.

# 32. Skipan millum Føroyar og EEC um sínamillum fiskirættindi í 1986

Ár 1985, týsdagin 26. november legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu skipan, dagf. 13. november 1985, um sínamillum fiskirættindi í 1986 millum Føroyar og EEC.

**Viðmerkingar:**

1. Tann 26. november 1985 byrjaðu samráðingar millum umboð fyri Føroya Landsstýri og EEC-nevndina í Tórshavn um sínamillum fiskirættindi í 1986 millum Føroyar og EEC. Hetta fundarumfar varð úrslitaleyst, men samráðingarnar vórðu uppafturtiknar í Bruxelles 12. november og úrslitið av samráðingunum er viðlagda skipan, undirritað í Brüssel 13. november 1985.

2. Sáttmálin fyri 1986 javnvigar í toskavirði við sáttmálan fyri 1985.

EEC hevur síðani 1982 sett sum treyt fyri eini avtalu, at føroyingar átaka sær at avmarka laksaveiðuna, vísandi til, at ein munandi partur av tí laksi, ið verður fiskaður við Føroyar stavar frá áum í EEC-londum, tí er eins og undanfarin ár ein váttað frásøgn um laks tengd upp í avtaluna.

Frásøgnin sigur, at partarnir eru av teirri áskoðan, at spurningurin um ásetan av eini laksakvotu fyri veiðuskeiðið 1986/87 eigur at verða loystur innan NASCO, og at partarnir vilja samarbeiða fyri at gera sítt til at røkka endamálið við NASCO-sáttmálanum.

Føroyska sendinevndin váttaði, at um einki reguleringartiltak spurdist burtur úr ársfundinum hjá NASCO á vári 1986, so vildu føroysku myndugleikarnir avmarka samlaðu veiðuna í veiðuskeiðinum frá 1. oktober 1986 til 31. mai 1987 til 550 tons, veidd við føroyskum skipum.

3. Heldur ikki í ár eydnaðist at fáa lyfti frá EEC um sildakvotu í Norðsjónum (ICES-øki IV).

4. Loyvdu veiðunøgdirnar í 1986 av ósløgdum fiski eru hesar:

**Hjá EEC-skipum á landleiðini:**
Samlaða nøgdin av botnfiski, svartkjafti og makreli verður í 1986:

500 tons av toski og hýsu,
2.400 tons av upsa,
7.000 tons av kongafiski,
3.300 tons av blálongu og longu,
1.300 tons av flatfiski (svartkalvi iroknaður),
500 tons av ymiskum fiskasløgum,
25.000 tons av svartkjafti,
5.000 tons av makreli.

**Hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi:**

(a) 800 tons tilsamans av longu, brosmu og blálongu á Rock All-leiðini. Eisini er loyvt at veiða 750 tons av ymsum botnfiski sum hjáveiðu í ídnaðarfiskiskapi; í 1985 vóru nøgdirnar tilsamans 800, 400 tons av longu, 400 brosmu. Eisini er loyvt at veiða 1.000 tons av blálongu á havleiðunum vestan fyri Skotlandi (í 1985: sama nøgd).
(b) 6.000 tons av ti vestara makrelstovninum; í 1985 var loyvt at veiða 7.500 tons.
(c) 6.750 tons av rossamakreli, (í 1985 6.000 tons).
(d) 18.000 tons av hvítingsbróður, 10.000 tons av nebbasild og 3.000 tons av brislingi; 1985-tølini vóru ávikavist 20.000 tons, 10.000 tons og 3.000 tons. Fiskast kunnu tó eyka 10.000 tons av hvítingsbróður og nebbasild (íroknað hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan), treytað av at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 31.000 tons, (í 1985 31.500).
(e) 650 tons av sild vestan fyri Skotland, (í 1985 700 tons).
(f) 48.000 tons av svartkjafti (í 1985 45.000 tons).
(g) 500 tons av sild í Skagerak; sama nøgd sum í 1985.
(h) 150 tons av hemara í øllum EEC-sjógvi. Tó ikki í NAFO 3PS (St. Pierre og Miquelon) (í 1985 var nøgdin tann sama).

**Hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi (smb. § 1 (3) í fiskisáttmálanum millum EEC og Grønland:**

(i) 475 tons av rækjum í Vesturgrønlandi í NAFO-øki 1; (í 1985 sama

nøgd). 675 tons av rækjum í Eysturgrønlandi í ICES-øki XIV (í 1985 675 tons).

(j) 150 tons av svartkalva undir Vesturgrønlandi og 150 tons undir Eysturgrønlandi. Í 1985 vóru nøgdirnar tær somu.

(k) Eisini verður loyvt at veiða 500 tons av kongafiski í ICES-øki XIV (Eysturgrønlandi) (í 1985 var nøgdin tann sama).

(l) Loyvt er í 1986 at veiða 10.000 tons av lodnu við Eysturgrønland (í 1985 sama nøgd).

# AGREED RECORD OF CONCLUSIONS OF FISHERY CONSULTATIONS BETWEEN THE EUROPEAN ECONOMIC COMMUNITY AND THE FAROE ISLANDS — BRUSSELS, 13. NOVEMBER 1985

I

A delegation representing the Home Government of the Faroe Islands headed by Mr. Atli Dam and a delegation representing the European Economic Community headed by Mr. John Pearson met in Brussels on 12th - 13th November 1985 for consultations on mutual fisheries relations in 1986. The meeting was a confirmation of an earlier meeting held in Tórshavn.

II

The delegations agreed to recommend to their respective authorities that the allocations for 1986 set out in the Annex should be made to vessels of either party fishing in the waters of the other party.

III

The delegations agreed that a party intending to introduce or to amend fishery regulations applicable to vessels of the other party shall inform the latter of such intentions with a notice of at least two weeks. Consultations shall be held if so requested by either party.

IV

The delegations agreed that the licensing system in force in 1986 shall be in accordance with the attached Agreed Record of 13th November 1985 on licences.

V

The delegations agreed that each party shall supply the other with

monthly and where deemed necessary by either party; weekly catch statistics of fishing by vessels of the other party in its zone.

Brussels, 13th November 1985.

| | |
|---|---|
| ***Atli P. Dam*** | ***John Pearson*** |
| Delegation of the Faroe Islands | Community Delegation |



## QUOTAS

1. Each Party shall open the catch quotas indicated hereunder for other in its fishery zone:

1.1. Quotas for Community vessels fishing in the Faroese zone

| SPECIES | ICES-division | Quantity (tonnes) |
|---|---|---|
| Cod and Haddock | Vb | 500 |
| Saithe | Vb | 2.400 |
| Redfish | Vb | 7.000 |
| Blue Ling and Ling | Vb | 3.300 |
| Flatfish | Vb | 1.300 (1) |
| Blue whiting | Vb | 25.000 |
| Mackerel | Vb | 5.000 |
| Other species | Vb | 500 |

(1) including Greenland Halibut

1.2 Quotas for Faroese vessels fishing in the Community zone.

| SPECIES | Fishing zones ICES-division or NAFO zone | Quantity (tonnes) |
|---|---|---|
| Ling, Tusk and Blue Ling | VIa, (2), VIb | 800 (1) |
| Blue Ling | VIa (2), VIb | 1.100 (7) |
| Mackerel | VIa (2), VIIe, f, h | 6.000 |
| Herring | VIa (2) | 650 |
| Horse mackerel | IV, VIa (2), VIIe, f, h | 6.750 |
| Norway pout | IV, VI (2) | 18.000 (3) (4) (8) |
| Sprat | IV, VI (2) | 3.000 |
| Sandeel | IV | 10.000 (3) (8) |
| Blue whiting | VIa (2), VIb, VII (5) | 48.000 |
| Other white fish (by catches only) | IV, VIa (2) | 750 |
| Herring | IIIaN (Skagerak) (6) | 500 |
| Porbeagle | Entire Cty zone exc. NAFO 3 PS | 150 (1) |

(1) To be fished by long-liners.
(2) North of 56°30' N.
(3) Each of these quotas may be exceeded by a maximum of 10.000 t provided that the total catches of Norway pout (including blue whiting), sandeel and sprat do not exceeded 31.000 t.
(4) Of which maximum 6.000 t may be fished in ICES VIa north of 56°30'N subject to the provision on request by the EEC of details of the quantity and composition of any by-catch taken.
(5) West of 12°W.
(6) Limited in the west by a line drawn from the Lighthouse of Hanstholm to the Lighthouse of Lindesnes and in the south by a line drawn from Skagen Lighthouse to the Lighthouse of Tistlarna and fram there to the nearest coast of Sweden.
(7) To be fished by trawl.
(8) Catches of Norway pout and sandeel may include unavoidable by-catches of blue whiting.

1.2. P. M. Quotas for Faroese vessels fishing in Greenland waters (cf. Article 1 (3) of EEC/Greenland Fisheries Protocol)

| Species | Fishing Zones: ICES Division OR NAFO Zone | Quantity (Tonnes) |
|---|---|---|
| Northern deepwater Prawn | NAFO 1 (1) | 475 |
| (Pandalus borealis) | XIV | 675 |
| Greenland halibut | NAFO 1 | 150 |
| | XIV | 150 |
| Redfish | XIV | 500 |
| Capelin | XIV | 10.000 |

(1) South of 68°N.

## AGREED RECORD OF COSULTATION CONCERNING SALOMON FISHING BETWEEN THE EUROPEAN ECONOMIC COMMUNITY AND THE FAROE ISLANDS — ON 13TH NOVEMBER 1985

A delegation representing the Home Government of the Faroe Islands headed by Mr. Atli Dam and a delegation of the European Economic Community headed by Mr. John Pearson held consultations in Brussels on 12, and 13, November 1985 concerning the fishery of salmon in Faroese waters.

The delegations were of the opinion that the question of fixing a quota for the fishing of salmon in Faroese waters for the 1986/7 season ought to find a solution within the framework of the North Atlantic Salmon Convention (NASCO).

The Faroese delegation confirmed that the Faroese authorities would co-operate with the Community and other interested parties in NASCO with a view to agreeing at the next annual meeting of NASCO, as a contribution to obtaining the objectives of the Convention, a regulatory measure fixing a

quota for their catches in their area of fisheries jurisdiction for the 1986/7 season.

The Faroese delegation stated that if no such regulatory measure were agreed at the NASCO annual meeting in question, the Faroese authorities would limit total catches of salmon in the Faroese fisheries zone for the fishery season from 1, October 1986 to 31, May 1987 to 550 tonnes, to be fished exclusively by vessels registered in the Faroe Islands.

| | |
|---|---|
| ***Atli P. Dam*** | ***John Pearson*** |
| For the Home Government of the Faroe Islands | For the Community Delegation |

J. nr. 1500-1-11-2.

## UMSETING

### Váttað frásøgn um samráðingar um fiskiskap millum EEC og Føroyar í Bruxelles 13. november 1985.

1. Ein sendinevnd, umboðandi Føroya Landsstýri við harra Atla Dam sum formanni, og ein sendinevnd, umboðandi felagsskapin við harra J. Pearson sum formanni, hittust í Bruxelles 12. og 13. november 1985 til samráðingar um sínamillum fiskiskap í 1986. Fundurin var framhald av fundi hildin í Tórshavn.

2. Sendinevndirnar samdust um at viðmæla myndugleikum teirra, at tær kvotur fyri 1986, ið eru upproknaðar í hjálagda skjali, skulu galda fyri skip hjá einum av pørtunum, sum fiska í sjógvi hjá hinum partinum.

3. Sendinevndirnar samdust um, at um annar parturin ætlar at innføra ella broyta fiskireglur, ið koma at galda fyri fiskifør hjá hinum partinum, skal hann boða hinum partinum frá slíkum ætlanum við minst 14 daga ávaring. Samráðingar skulu verða, um annar parturin ynskir tað.

4. Partarnir samdust um, at loyvisreglurnar, sum skulu galda fyri 1985, skulu vera samsvarandi frásøgn dagfest 13. november 1985 viðvíkjandi loyvum.

Samráðingarnevndirnar samdust um, at hvør partur skal geva mánaðarhagtøl, og tá tað sýnist neyðugt, vikuhagtøl fyri veiðu hjá skipum hansara á sínum fiskiøki.

Bruxelles, 13. november 1985.

| | |
|---|---|
| ***Atli P. Dam*** | ***John Pearson*** |
| Føroyska sendinevndin | EEC-sendinevndin |

**Skjal I (síða 1)**

**Kvotur**

1. Hvør partur skal lata kvotur, sum nevndar eru niðanfyri, til hin partin á sjóøki sínum:

1.1. Kvotur hjá EEC-skipum á føroyskum sjóøki.

| Fiskasløg | Øki | Nøgd (tons) |
|---|---|---|
| Toskur og hýsa | Vb | 500 |
| Upsi | Vb | 2.400 |
| Kongafiskur | Vb | 7.000 |
| Blálonga og longa | Vb | 3.300 |
| Flatfiskur | Vb | 1.300 (1) |
| Svartkjaftur | Vb | 25.000 |
| Makrelur | Vb | 5.000 |
| Onnur fiskasløg | Vb | 500 |

(1) íroknað svartkalva

**Skjal I (síða 2)**

1.2. Kvotur hjá føroyskum skipum í EEC-sjógvi.

| **Fiskasløg** | **Fiskiøki ICES-øki ella NAFO-øki** | **Nøgd (tons)** |
|---|---|---|
| Longa, brosma og blálonga | VIa, (2), VIb | 800 (1) |
| Blálonga | VIa (2), VIb | 1.100 (7) |
| Makrelur | VIa (2), VIIe, f, h (vestari st.) | 6.000 |
| Sild | VIa (2) | 650 |
| Hestamakrelur | IV, VIa (2), VIIe, f, h | 6.750 |
| Hvítingsbróðir | IV, VIa (2) | 18.000 (3) (4) (8) |
| Brislingur | IV, VIa (2) | 3.000 |
| Nebbasild | IV | 10.000 (3) (8) |
| Svartkjaftur | VIa (2), VIb, VII (5) | 48.000 |
| Annar botnfiskur (bert hjáveiða) | IV, VIa (2) | 750 |
| Sild | IIIaN (Skagerak) (6) | 500 |
| Hemari | Alt EEC-økið (undantikið NAFO 3 PS) | 150 (1) |

(1) Veiðast við línu.
(2) Norðan fyri 56°30' N.
(3) Hvør av hesum kvotunum kann yvirfiskast við í mesta lagi 10.000 tonsum, treytað av at samlaða veiðunøgdin fyri hvítingsbróður (íroknað svartkjaft), nebbasild og brisling ikki fer upp um 31.000 tons.
(4) Av hesum kunnu í mesta lagi 6.000 tons fiskast í ICES-økinum VIa norðan fyri 56°30'N, treytað av at EEC eftir áheitan fær gjølligar upplýsingar um veiðunøgd og samansetting av hjáveiðu.
(5) Vestanfyri 12°V.
(6) Avmarkað vestureftir av einari linju frá Hanstholm-vita til Lindesnesvita, suðureftir av einari linju frá Skagen-vita til vita í Tistlarna og haðani til nærmastu strond í Svøríki.
(7) Veiðast við troli.
(8) Veiðan av hvítingsbróður og nebbasild kann hava í sær hjáveiðu av svartkjafti, sum ikki slepst undan.

**Skjal 1 (síða 4)**

1.3. P. M. Kvotur hjá føroyskum skipum í grønlendskum sjógvi, smb. § 1, 3. stk. í fiskiveiðusáttmála millum EEC og Grønland.

| Fiskasløg | Fiskiøki: ICES-øki ella NAFO-øki | Nøgd (tons) |
|---|---|---|
| Rækjur | NAFO 1 (1) | 475 |
| Rækjur | XIV | 675 |
| Svartkalvi | NAFO 1 | 150 |
| | XIV | 150 |
| Kongafiskur | XIV | 500 |
| Lodna | XIV | 10.000 |

(1) Sunnan fyri 68°N.

J. nr. 1500-1-11-2.

## UMSETING

## VÁTTAÐ FRÁSØGN UM SAMRÁÐINGAR VIÐVÍKJANDI LAKSAFISKISKAPI MILLUM EEC OG FØROYAR — TANN 13. NOVEMBER 1985

Ein sendinevnd umboðandi Føroya Landsstýri við harra Atla Dam sum formanni og ein sendinevnd, umboðandi felagsskapin við harra John Pearson sum formanni, hittust í Bruxelles 12. og 13. november 1985 til samráðingar um laksafiskiskapin í føroyskum sjógvi.

Sendinevndirnar eru av teirri áskoðan, at spurningurin um ásetan av eini kvotu fyri laksafiskiskapin í føroyskum sjógvi, fyri veiðuskeiðið 1986/87 eigur at verða loystur innan fyri karmin av laksasáttmálanum fyri Norður-atlantshav (NASCO).

Føroyska sendinevndin váttaði, at føroysku myndugleikarnir vilja samarbeiða við EEC og aðrar áhugaðar partar í NASCO við tí í hyggju á næsta fundi í NASCO, fyri at gera sítt til at náa endamálunum við sáttmálanum, at semjast um eitt reguleringartiltak, ið ásetir eina kvotu fyri veiðu teirra á

tí øki, har teir hava yvirvaldsrætt fiskiskapi viðvíkjandi, fyri veiðuskeiðið 1986/87.

Føroyska sendinevndin váttaði, at um ikki regulcringartiltøk spurdust burturúr tí ársfundinum hjá NASCO, vildu føroysku myndugleikarnir avmarka samlaðu veiðuna av laksi í føroyskum sjógvi í veiðuskeiðinum frá 1. oktober 1986 til 31. mai 1987 til 550 tons, veidd bert við skipum heimahoyrandi í Føroyum.

| | |
|---|---|
| ***Atli P. Dam*** | ***John Pearson*** |
| Føroya Landsstýri | EEC |

1. viðgerð 28. november. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 11. december 1985 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 26. november 1985 og eftir 1. viðgerð 28. í s. m. beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi sama dag og hevur býtt seg í cin meiriluta og ein minniluta.

Meiriłutin (Henrik Old, Hilmar Kass, Signar Hansen, Hergeir Nielsen og Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Jógvan Olsen og Pauli Ellefsen) hevur hesar viðmerkingar:

Út frá tí, sum umboð Javnaðarfloksins og umboð Tjóðveldisfloksins tey seinastu 4 árini hava ført fram í álitum frá marknaðarnevndini um fiskivinnusáttmálarnar fyri undanfarin ár, kann tað ikki annað enn undra, at hesir somu flokkar nú leggja fyri løgtingið ein sáttmála, sum í allar mátar er verri enn sáttmálarnir fyri undanfarin ár.

Minnilutin harmast um ta stóru niðurgongd í makrelkvotuni, sum landsstýrið hevur góðtikið. Eisini er tað at harmast um, at sildakvotan vestanfyri er minkað. Hesar minkingar gera tað sera trupult hjá nótaskipunum, serliga teimum smáu.

Minnilutin heldur eisini, at marknaðarnevndin hevur fingið alt ov lítið tilfar um tær avtalaðu teknisku reglurnar aftan fyri avtaluna. Eisini hevði tað verið ynskiligt at frætt meira um royndirnar hjá landsstýrinum at fáa uppaftur tiknan fiskiskapin eftir sild í Norðsjónum.

Í heila tikið saknar minnilutin upplýsingar um ein virknan politikk, tá talan er um at skapa okkum størri fiskiveiðumøguleikar í fremmandum sjógvi.

Sambandsflokkurin hevur í politiskum samráðingum skotið upp, og fleiri ferðir á løgtingi heitt á samgonguna um at virka fyri, at roynt verður at útvega okkum møguleikar fyri skeljafiskiskapi uttan fyri okkara egna sjóøki. Fyri tað fyrsta kunnu vit royna á Svalbardsøkinum, har onkrar royndir eru gjørdar. Í hesum sambandi verður landsstýrið mint á ikki at góðtaka kvotur frá øðrum á økinum, eins og gjørt var seinast í sjeytiárunum fyri tosk og annan botnfisk. Alt bendir á, at stórir møguleikar eru fyri skeljafiskiskapi ymsa staðni í Norðuratlantshavinum. Tá tað í stóran mun er talan um enn ikki royndar møguleikar, skuldi tað verið lætt hjá okkum at fingið avtalur í lag, sum eru báðum pørtum at gagni.

Út frá hesum setir minnilutin fram hetta:

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at taka upp samráðingar, ella taka við í komandi samráðingum, við Kanada, Grønland, Ísland, Noreg og Sovjetsamveldið um loyvi hjá føroyingum at fiska skeljar í teirra sjóøki.

2. viðgerð 19. december 1985. Uppskot til samtyktar frá minnilutanum í marknaðarnevndini fall við 7-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Eliesar Arge,
Anfinn Kallsberg,
Svend Aage Ellefsen,
Eyðun Viderø,
Jógvan Sundstein,
Pauli Ellefsen,
Ivan Johannesen,
Agnar Nielsen,
Jógvan Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Eilif Samuelsen,
Henrik Old,
Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jóannes Dalsgaard,
Jákup Lindenskov,

Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Tummas Arabo,
Asbjørn Joensen,
Hilmar Kass,
Signar Hansen,
Heini O. Heinesen,
Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson,
Adolf V. Hansen,
Tordur Niclasen.

Burturstaddir: Olaf Olsen,
Poul Michelsen,
Flemming Mikkelsen,
Hergeir Nielsen,
Karin Kjølbro.

F. L. j. nr. 1500-1-11-2

# 33. Partapeningur í P/F Norðís, Eiði.

Ár 1985, mikudagin 4. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um partapening í P/f Norðís, Eiði.**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 210.000 kr. í partapeningi í P/F Norðís, Eiði, og at leggja út peningin úr landskassanum.

**lagtingslov om aktiekapital i P/f Norðís, Eiði.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til at tegne op til 210.000 kr. i aktiekapital i P/f Norðís, Eiði, og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ 2. Einki av ti í § 1 nevnda partapeningi verður teknað ella útgoldið, fyrrenn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi, tá hon verður kunngjørd.

§ 2. Ingen del af det i § 1 nævnte aktiebeløb kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret måtte stille, er opfyldt.

§ 3. Denne lov træder i kraft ved dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

Fyri at tryggja arbeiði til allar hendur og fyri at fremja bygdamenning, hevur tað almenna tey seinastu nógvu árini, eftir umsókn sett 20% av partapeninginum í fleiri virkir kring landið. Talan hevur serliga verið um fiskavirkir, har kommunur, feløg og fólk á plássinum hava tikið seg saman fyri at seta arbeiðsskapandi tiltøk á stovn.

P/f Norðís verður nú útbygt. Virkið varð upprunaliga bygt afturat eini útróðrarmiðstøð og ætlað til móttøku av 1.000 tonsum av ráfiski. Árliga ráfiskanøgdin liggur nú um 5.000. Arbeiðsgongdin á virkinum er nakað órationel, og hetta kann ikki umskipast við verandi gólvvídd.

Útbyggingin umfatar í høvuðsheitum:

Víðkan av framleiðslu- og rávøruhøllini við 470 fermetrum.
Niðurtøka av gomlum og nýbygging av frystihøli upp á 290 fermetrar.
Maskiniløgur, sum umfata m. a. Aic skiljimaskinu.
12 nýggj reinskeriborð og 2 pakkilinjur.

Kostnaðurin er mettur soleiðis:

| | |
|---|---|
| Bygningur incl. frystigoymslu | 8.640.000,00 |
| Maskiniløgur | 2.000.000,00 |
| Ialt | 10.640.000,00. |

Í sambandi við hesa útbygging hevur felagið samtykt at hækka partapeningin við 1.050.000 kr. úr 760.000 kr. upp í 1.810.000 kr. Landsstýrið hevur samtykt at mæla løgtinginum til, at landskassin setir 20% av kr. 1.050.000 í felagið.

1. viðgerð 6. december 1985. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 20. februar legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 4. december 1985 og undir 1. viðgerð 6. í s. m. beint í figgjarnevndina.

Ein samd figgjarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men

hava nevndarlimirnir Anfinn Kallsberg, Eyðun Viderø og Ivan Johannesen hesar serligu viðmerkingar í málinum:

Fyriliggjandi uppskot er í tráð við ta mannagongd, sum hevur verið galdandi, tá tað almenna setir partapening í vinnuvirkir. Vit taka tí undir við fyriliggjandi uppskoti, men vit átala, at tann praksis ikki er galdandi altíð, tá partapeningur verður settur í vinnuvirkir.

Føroya Útróðrarvirki søkir um 20% partapening, og játtaði landsstýrið tann 20. december 1984 fyri sín part hesum, men tá nýtt landsstýri tók við tann 10. januar 1985, varð málið tikið aftur. Úrslitið gerst, at landsstýrið í staðin samtykkir at veita Klaksvíkar Útróðrarfelag og Sølumiðstøð Útróðrarmanna kr. 100.000 í part sum studning av konto «til ídnaðarfremjandi endamál». Henda játtan skal góðkennast av figgjarnevndini, men umboðini fyri samgonguna samtyktu í staðin, at Føroya Útróðrarvirki sjálvt skal fáa stuðningin.

Anfinn Kallsberg, Eyðun Viderø og Ivan Johannesen ivast, um heimild er at játta partapening av játtanini «til ídnaðarfremjandi endamál», og hava tí biðið um at fáa eitt juridiskt responsum um hesa heimild. Síðani er komið fram, at landsstýrið ikki kann lata studning sum partapening, tí onkur skal standa fyri hesum partabrøvum.

Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin Vilhelm Johannesen verið á fundi í figgjarnevndini og hevur greitt frá hesum trupulleika.

Vit fingu har møguleika at spyrja landsstýrismannin, hvat nú var galdandi, tá tað almenna setir partapening í vinnufeløg.

Landsstýrismaðurin kom við hesi niðurstøðu:

Um kommunan sjálv setir partapening í vinnufelag, so ger landsstýrið tað sama. Men um kommunan ikki er við í partafelagnum, so gevur landsstýrið «partapening» sum studning av konto «til ídnaðarfremjandi endamál» til yrkisfeløgini, sum eru partaeigarar frammanundan. Hetta er ein nýggj mannagongd, sum møguliga Eiðis Útróðrarfelag og Eiðis Arbeiðsmannafelag kundu brúkt í fyriliggjandi uppskoti til løgtingslóg, um teir høvdu kunnleika til henda nýggja studningsmøguleika.

Anfinn Kallsberg, Eyðun Viderø og Ivan Johannesen kunnu ikki taka undir við hesum forminum fyri almennan partapening í vinnufeløg.

2. viðgerð 10. mars 1986. §§ 1, 2 og 3 samtyktar við ávikavist 26-0, 23-0 og 27-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 11. mars 1986. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1413-1-49. Lóg nr. 29 frá 3. apríl 1986.

# 34. Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v. m.

Ár 1985, týsdagin 11. december legði Jógvan Sundstein, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v. m.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v. m. við broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3, 5. stk. verður «50.000 kr.» broytt til «80.000 kr.»
2) Í § 5 verður sett sum nýtt 4. stk.:
   «Uppafturrættan av saldoini kann eisini verða gjørd á tann hátt, at negativa upphæddin verður nýtt sum forskotsavskriving viðvíkjandi skipum eftir 3. kapitli ella bygningum eftir 4. kapitli i hesi lóg.»
3) Í § 12 verður sett sum nýtt 3. stk.:
   «Um saldovirðið sambært 2. stk. verður negativt, kann tað rættast upp aftur við útvegan av førum v. m. eftir hesum kapitli, rakstrargøgnum eftir 1. kapitli ella bygningum eftir 4. kapitli. Eisini kann upphæddin heilt

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger m. m.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m. m. med ændringer:

1) I § 3, stk. 5, ændres «50.000 kr.» til «80.000 kr.»
2) I § 5 indsættes som nyt stk. 4:
   «Udligning af saldoen kan også foretages på den måde, at det negative beløb bliver anvendt som forskudsafskrivning på skibe efter 3. kapitel eller byninger eter 4. kapitel i denne lov.»
3) I § 12 indsættes som nyt stk. 3:
   «Hvis saldoværdien ifølge stk. 2 bliver negativ, kan den udlignes ved anskaffelse af fartøjer m. m. ifølge dette kapitel, driftsmidler ifølge 1. kapitel eller bygninger ifølge 4. kapitel. Beløbet kan også helt eller delvis overføres

ella partvíst flytast til virðiskonti eftir 1. ella 4. kapitli. Um fleiri skip eru umfatað av saldovirðiskontoini, kann vinningur við sølu av hvørjum skipi sær flytast av hesi konto, antin til rakstrarroknskapin ella til konti eftir 1. kapitli ella 4. kapitli.»

4) Í § 17, 1. stk. litra a verður aftan á orðið «goymsluhøli» sett: «og bygdir alihyljar».

5) § 25 verður broytt til soljóðandi:

«Selur ella avhendir hin skattskyldugi fasta ogn, sum hevur verið avskrivað, skal vinningur ella tap uppgerast á henda hátt:

Frá sølupeninginum verður frádrigið niðurskrivaða virðið av ognini. Verður úrslitið negativt, kann hallið dragast frá við uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni. Verður úrslitið positivt, kann harumframt dragast frá 7% av útveganarvirðinum fyri hvørt árið frá og við 1. árinum aftan á útveganina til og við søluárið. Tó kann ikki roknast longur aftur enn til 1945. Tann møguligi vinningur, sum so er eftir, verður antin at taka við í skattskyldugu inntøkuni í seinasta lagi árið eftir søluárið ella í seinasta lagið árið eftir søluárið at nýta til útvegan av øðrum bygningi eftir hesum kapitli, rakstrargøgnum eftir 1. kapitli ella fari v. m. eftir 3. kapitli.

**2. stk.** Tryggingar- ella endurgjaldspeningur fær somu við-

til værdikonti ifølge 1. eller 4. kapitel. Hvis saldoværdikontoen omfatter flere skibe, kan avancen ved salg af hvert skib for sig overføres fra denne konto enten til driftsregnskabet eller til konti ifølge 1. eller 4. kapitel.»

4) I § 17, stk. 1, litra a, indsættes efter ordet «lagerlokaler»: «og opbyggede opdrætsdamme».

5) § 25 ændres til sålydende:

«Sælger eller afhænder den skattepligtige fast ejendom, som har været undergivet afskrivning, skal avance eller tab opgøres således:
Fra salgssummen skal fradrages ejendommens nedskrevne værdi. Hvis resultatet er negativt, kan underskuddet fradrages ved opgørelsen af den skattepligtige indtægt. Hvis resultatet er positivt kan desuden fradrages 7% af anskaffelsesprisen for hvert år fra og med 1. år efter anskaffelsen til og med salgsåret. Dog kan ikke medregnes længere tilbage end 1945. Den mulige avance, som derefter fremkommer, skal enten medregnes i den skattepligtige indkomst senest året efter salgsåret eller kan benyttes senest året efter salgsåret til anskaffelse af anden bygning efter dette kapitel, driftsmidler efter 1. kapitel eller fartøj m. m. efter 3. kapitel.

**Stk. 2.** Forsikrings- eller erstatningssummen behandles på

gerð sum upphæddir, sum verða vunnar við sølu av avvarðandi ognarluti.

6) Í § 26 verður sett sum nýtt 8. stk.:
«Ásetanirnar í 1.-7. stk. skulu síggjast í samanhangi við § 25».

7) Sum nýggj § 27A verður sett:
«Útvegannarpeningurin fyri bygningar til vinnuliga nýtslu skal í seinasta lagi í inntøkuárinum, sum endar í 1985 gerast upp sum ein samantald upphædd av útvegannarpeningi fyri bygning og fyri innleggingar og innrættingar í viðkomandi bygningi.

**2. stk.** Skattliga bókførda virðið av viðkomandi bygningi verður uppgjørt sum tað í 1. stk. nevnda virði við samlaðu gjørdu avskrivingunum upp á bygning og innleggingar og innrættingar frádrignum.

**3. stk.** Framhaldandi ávskrivingar verða gjørdar av virðinum sambært 1. stk. eftir tí áramáli, sum avskrivað er upp á bygningin. Fyri skrivstovubygningar verður fyrstu ferð avskrivað eftir hesum reglum í tí inntøkuári, sum endar í 1985.»

8) Sum nýggj § 27B verður sett:
«Skattgjaldari kann velja ikki at avskriva upp á ein bygning til vinnuliga nýtslu. Í slíkum førum kemur hesin bygningur ikki undir reglurnar um sølu v.m. eftir hesum kapitli.

**2. stk.** Bygningur, íroknað

samme måde, som beløb, der indvindes ved salg af det pågældende formuegode.

6) I § 26 indsættes som nyt stk. 8:

«Bestemmelserne i stk. 1-7 skal ses i sammenhæng med § 25.»

7) Som ny § 27A indsættes:
«Anskaffelsesprisen for bygninger til erhvervsmæssig benyttelse skal senest i det indkomstår, som slutter i 1985 opgøres som et sammenlagt beløb af anskaffelsesprisen for bygning og for installationer og indretninger i den pågældende bygning.

**Stk. 2.** Den skattemæssige bogførte værdi af den pågældende bygning skal opgøres som den i stk. 1 nævnte værdi med fradrag af de samlede foretagne afskrivninger på bygning og installationer og indretninger.

**Stk. 3.** Den fortsatte afskrivning skal foretages af værdien ifølge stk. 1 i henhold til det åremål, der er afskrevet på bygningen. På kontorbygninger skal der første gang afskrives efter disse regler i det indkomstår, som slutter i 1985.»

8) Som ny § 27B indsættes:
«Skatteydere kan vælge ikke at afskrive på en bygning til erhvervsmæssig benyttelse. I disse tilfælde kommer en sådan bygning ikke under bestemmelserne om salg m.v. i henhold til dette kapitel.

**Stk. 2.** En bygning, inclusive

innleggingar og innrættingar, sum higartil er avskrivað uppá, kann roknast sum hoyrandi undir 1. stk., um allar higartil gjørdar avskrivingar verða inntøkuførdar aftur í inntøkuárunum, sum enda í 1985, 1986 ella 1987.»

installationer og indretninger, som der hidtil er afskrevet på, kan henføres under stk. 1, hvis alla de hidtil foretagne afskrivninger bliver indtægtsført i de indkomstår, som slutter i 1985, 1986 eller 1987.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Í vár varð skattalógin broytt, soleiðis at konjunkturvinningur við sølu av skipum og bygningum nú verður skattaður. Hóast hesa herðing av skattingini varð tað ikki gjørt møguligt hjá vinnulívinum at endurinvesterað vunnan pening í onnur sløg av vinnutólum enn tey, sum seld vóru, og í samband við sølu av bygningum var møguleikin fyri endurinvestering als ikki til staðar.

Fyri at møguligur søluvinningur ikki skal hvørva úr vinnuni og bert fara yvir í alment og privat forbrúk, setir Fólkaflokkurin hervið fram uppskot um, at søluvinninur kann nýtast til avskriving av einum hvørjum vinnutóli, tað veri seg skip, rakstrargøgn ella bygningar, hjá viðkomandi virki.

Eisini er skotið upp, at bygdir alihyljar, antin sum stoyptir brunnar ella byrgingar koma undir avskriving.

Harafturat verður skotið upp, at søluvinningurin av bygningum bert verður skattaður í tann mun, hann fer upp um útvegannarprísin við einum indexuppískoyti upp á 7% árliga av útvegannarvirðinum.

Víðari er eisini skotið upp, at vinnurekandi kunnu velja ikki at avskriva ein vinnuligan bygning, og so heldur ikki koma at skatta av cinum møguligum søluvinningi til sína tíð.

Í stóran mun líkist hetta uppskot tí, sum Fólkaflokkurin legði fram í skattanevndini í vár í tingmáli nr. 82/1984, og verður eisini víst til tær viðmerkingarnar.

1. viðgerð 14. januar 1986. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmálunum 39: Umskipan av persónuliga riknum vinnuvirki til partafelag, 40: Skattur av vinningi í sambandi við sølu av virðisbrøvum og 34: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar, og vórðu tey øll beind í skattanevndina, sum 4. februar 1986 legði fram felagsálit, sí løgtingsmál nr. 38: Broytingar í skattalógunum.

2. viðgerð 13. februar 1986, § 1 fall við 12-0, pkt. 2, 3, 5, 6, 7 og 8 fullu við 8-0, pkt. 4 fall við 13-0. Uppskotið burturdottið.

# 35. Regulering av fiskiskapinum á NAFO-økinum í 1986

Ár 1985, mikudagin 11. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið tekur til eftirtektar samtyktina á NAFO-ársfundinum í september 1985 um regulering av fiskiskapinum á konventiónsøkinum í 1986.

**Viðmerkingar:**

Á 7. regluliga ársfundi í NAFO, hildin í Havana, Cuba, 9.-14. september 1985 var tilráðingin aftur í ár frá vísindaliga ráðnum, at stovnurin av toski á Flemish Cap framvegis var ov lítil, og mælt varð tí frá at fiska av honum í 1986.

Eins og undanfarin ár kundu tey limalond, ið veiða á økinum, harímillum Føroyar, ikki taka undir við einum toskabanni á hesum øki.

Sett varð tí fram uppskot um at halda fram við somu skipan sum í 1985. Semja var um hetta uppskotið, tó so at Spania, Portugal og EEC tóku fyrivarni. Í 1984 mótmælti Spania eisini og ásetti egna kvotu, ið tað metti, samsvaraði við veiðu tess har undanfarin ár.

Føroyska toskakvotan fyri 1986 á Flemish Cap, NAFO-øki 3 M verður sostatt 2.900 tons eins og í 1985.

Føroyingar veiddu eisini árliga nakað av toski á øki 3 NO. Eingin kvota verður her serstakliga tillutað føroyingum, men vit hava seinastu árini veitt av hesi kvotu, tillutað øðrum («others»).

Toskakvotan til «others» í 3 NO verð í 1986 eins og í 1985 sett til 700 tons.

./. Víst verður til hjálagda skjal 1.

1. viðgerð 19. december 1985. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 14. januar 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram 11. december 1985 av landsstýrinum, og undir 1. viðgerð varð tað beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tintinum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 16. januar 1986. Uppskot landsstýrisins samtykt við 26-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1519-20.

Skjal 1.

# SCHEDULE 1

## Quota Table[1] for Year 1986[5]

| Column 1 | II | III | IV | V | VI | VII | VIII | IX | X | XI |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Contracting Party | Cod | Cod | Redfish | Redfish | American plaice | American plaice | Yellow-tail | Witch | Capelin | Squid *(Illex)* |
| | Div. 3M | Div. 3NO | Div. 3M | Div. 3LN | Div. 3M | Div.3LNO | Div.3LNO | Div. 3NO | Div. 3NO | Subareas 3+4[3] & [4] |
| 1. Bulgaria | - | - | 300 | - | - | - | — | - | - | 500 |
| 2. Canada | 100 | 15.955 | 500 | 10.650 | 150 | 54.200 | 14.630 | 3.000 | - | N.S.[6] |
| 3. Cuba | 480 | - | 1.750 | 2.450 | | | | | | 2.250 |
| 4. EEC | 2.405 | 250 | 1.200 | - | - | 700 | 300 | - | - | N.S.[6] |
| 5. Faroe Islands (Denmark) | 2.900 | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 6. GDR | - | - | - | 850 | - | - | - | - | - | - |
| 7. Iceland | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 8. Japan | - | - | 400 | - | - | - | - | - | - | 2.250 |
| 9. Norway | 1.200 | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 10. Poland | 500 | - | - | - | - | - | - | - | - | 1.000 |
| 11. Portugal | 3.500 | 1.315 | 1.900 | - | 350 | - | - | - | - | 500 |
| 12. Romania | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 500 |
| 13. Spain | 560 | 10.780 | - | - | - | - | - | - | - | 2.250 |
| 14. USSR | 1.270 | 4.000 | 13.850 | 10.900 | 1.000 | - | - | 1.950 | - | 5.000 |
| 15. Others | 50 | 700 | 100 | 150 | 500 | 100 | 70 | 50 | - | - |
| 16. Special Reservation[2] | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| 17. Total Allowable Catch | 12.965[5] | 33.000 | 20.000 | 25.000 | 2.000 | 55.000 | 15.000 | 5.000 | 0 | 150.000[7] |

[1] Quotas are in metric tons.

[2] There are no Special Reservations for 1986.

[3] The opening date for the squid *(Illex)* fishery is 1 July.

[4] Any quota listed for squid may be increased by a transfer from any "coastal state" as defined in Article 1, para. 3 of the NAFO Convention, provided that the TAC for squid is not exceeded. Transfers made to Contracting Parties conducting fisheries for squid in the Regulatory Area shall be reported to the Executive Secretary, and the report shall be made as promtly as possible.

[5] The TAC for Cod in Div. 3M will not be increased beyond 12.965 mt until the Scientific Council advises that the age 3+ mean biomass has reached a level approximately equal to one-half the mean age 3+ equilibrium biomass associated with fishing at F max and assuming long term average recruitment levels.

[6] Not Specified because the allocations to these Contracting Parties are as yet undetermined, although their sum shall not exceed the difference between the total of allocations to other Contracting Parties and TAC.

[7] Reference will be made to Scientific Council for 1987 re: distribution of squid stocks in Canadian jurisdiction and the NAFO Regulatory Area.

# 36. Nýggj brunalóg

Ár 1985, mikudagin 11. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja tað í viðlagda áliti framsetta uppskot (s. 30-44) til løgtingslóg um eldsbruna o.a. við hesum broytingum:

1. Í § 1, 2. stk. gongur seinasta pkt. út.
2. Í § 1 verður sett sum nýtt:
   «**4. stk.** Landsstýrið setir Brunaráð við 5 limum, ið verða valdir fyri 4 ár. 2 av limunum verða valdir eftir uppskoti frá kommununum og 1 eftir uppskoti frá løgregluni. Ráðið er ráðgevandi hjá myndugleikum og øðrum brunaspurningum viðvikjandi. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur fyri Brunaráðið.»
3. § 2, 1. stk. verður orðað soljóðandi:
   «Fyrisitingin hjá brunaumsjónini verður løgd undir ein landsstovn eftir landsstýrisins avgerð.»

1. I § 1, stk. 2 udgår sidste pkt.
2. I § 1 tilføjes som nyt:
   «**Stk. 4.** Landsstyret udnævner et brandråd med 5 medlemmer, der vælges for 4 år. 2 af medlemmerne vælges efter forslag fra kommunerne og 1 efter forslag fra politiet. Rådet er rådgivende for myndigheder og andre i spørgsmål vedrørende brandvæsenet. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere bestemmelser for brandrådet.»
3. § 2, stk. 1 affattes således:
   «Brandinspektionens forvaltning henlægges under en landsinstitution efter landsstyrets nærmere afgørelse.»

**Viðmerkingar:**
Galdandi reglur um skipanina av eldsløkkingarliðinum í Tórshavn finnast í lóg frá 28. januar 1856 «Angaaende Brandvæsenet i Thorshavn paa Færøerne» sum broytt við lóg nr. 71 frá 7. mai 1881 og kunngerð nr. 21 frá 22. mars 1974 og í kongaligari fyriskipan nr. 103 frá 13. august 1866 «indeholdende Tillæg til Lov angaaende Brandvæsenet i Thorshavn paa Færøerne af 28. Januar 1856», sum broytt við kunngerð nr. 21 frá 22. mars 1974, smbr. skjal 1-2 í viðlagda áliti.

Tær galdandi reglurnar um skipanina av sløkkiliðunum uttan fyri Tórshavn finnast í kongaligari fyriskipan nr. 84 frá 16. juni 1882 «om Bygnings- og Brandvæsenet i de færøske Landkommuner», smbr. skjal 3 í álitinum.

Landsstýrið setti í 1980 eina nevnd at endurskoða brunalóggávuna við fylgjandi limum:
Eli Davidsen, maskinmeistari, arbeiðseftirlitið,
Eilif Lindberg, maskinmeistri, arbeiðseftirlitið,
Mogens Nepper Christensen, landfúti,
Arnstein Niclasen, verkfrøðingur, landsverkfrøðingsstovnurin,
Petur Olsen, byggifrøðingur, landsverkfrøðingsstovnurin.

Nevndin skipaði seg við Mogens Nepper Christensen, landfúta, sum formanni og Arnstein Niclasen sum skrivara. Eftir gjøgnumgongd av galdandi lóg í Danmark, Grønlandi og Noregi tilevnaði nevndin eitt uppskot til eina brunalóg yvir Føroyar.

Nevndin læt 12. mars 1984 landsstýrinum álit við uppskoti til nýggja lóg við tilhoyrandi viðmerkingum.

Eftir uppskotinum skal hvør kommuna hava sløkkilið, sum í mun til støddd, bygging v. m. er fært fyri at inna bjargingar- og sløkkingararbeiði, tá ið eldur er í, og veita hjálp, tá ið óhapp stendst av vandamiklum evnum. Kommunurnar skulu sum higartil bera kostnaðin av sløkkiliðinum.

Til at stýra teimum kommunalu sløkkiliðunum verður eftir uppskotinum sett á stovn ein miðstøðubrunaumsjón, ið verður løgd undir landsverkfrøðingsstovnin. Landsstýrið kann eftir § 1, stk. 3, í lógaruppskotinum leggja aðrar uppgávur undir brunaumsjón landsins, og t. d. skjýtur nevndin upp, at skipað verður ein katastrofuhjálparætlan, sum verður fyrisitin av brunaumsjónini.

Landsstýrið tekur undir við uppskotinum frá nevndini, tó við teimum broytingum, at stovnað verður eitt ráðgevandi brunaráð, og at tað ikki kemur at standa í lógini, at brunaumsjón skal leggjast undir landsverkfrøðingsstovnin, men at landsstýrið skal kunna avgera, undir hvønn stovn brandumsjónin skal leggjast, ella um talan skal verða um ein sjálvstøðugan stovn. Brunaráðið skal verða ráðgevandi og virka sum eitt tilbúningarráð (katastrofunevnd). Fyri at kommunurnar skulu hava ávirkan á brunaráðgevingina er skotið upp, at kommunurnar fáa tveir limir í ráðið, og tá løgreglan stendur fyri bjargingartænastuni á landi, er somuleiðis skotið upp, at løgreglan fær umboð í ráðið.

Kostnaðurin av brunaumsjónini og brunaráðnum verður mettur til umleið 700.000 kr. árliga.

Nevndarálitið hevur verið til umrøðis hjá Tórshavnar kommunu, sjúkrahússtjóranum, Statens Luftfartsvæsen, Føroya Kommunufelag, Vaktar- og Bjargingartænastuni, landslæknanum, Færøernes Kommando og lands-

verkfrøðingsstovninum, og eru hesi ummæli hjáløgd málinum saman við álitinum.

**Sí skjølini 7 A-J.**

1. viðgerð 4. februar 1986. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 9. apríl 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er framlagt av landsstýrinum 11. december 1985 og aftaná 1. viðgerð beint í rættarnevndina.

Sum nevnt í viðmerkingunum til uppskotið, eru reglurnar um skipan av eldsløkkingarliðum í Føroyum elligamlar. Av hesi orsøk setti landsstýrið í 1980 eina nevnd at endurskoða brunalóggávuna. Í hesi nevnd vóru umboð fyri arbeiðseftirlitið, Føroya landfúti og landsverkfrøðingsstovuna. Henda nevnd hevur tilevnað eitt uppskot til nýggja brunalóg fyri Føroyar. Í hesum arbeiði hava teir stýðjað seg til galdandi lógir í Danmark, Grønlandi og Noregi.

Setningurin var bert at koma við nýggjari brunalóg og á hvønn hátt, hon skuldi umsitast. Umframt at taka sær av hesum spurningi hevur nevndin eisini viðgjørt og komið við uppskoti viðvíkjandi útbúnaði, fyribyrgjandi tiltøkum móti eldi og bjargingum á landi í sambandi við t.d. óhapp av vandamiklum evnum og lagt henda spurning undir brunaverkið.

Orsøkin fyri hesum er, at hesin spurningur ikki hoyrir undir nakran myndugleika í landinum, og at brunaverkið eins og í øðrum londum má haldast at vera væl egnað til at taka sær av hesum spurningi.

Óhapp við vandamiklum evni skal skiljast sum einhvør dálking av luft ella lendi t.d. við, at ein olju- ella bensinstangabilur koppar, ella at eldur kemur í eitt pakkhús, har eitt nú kunsttøð eru á goymslu (elvir til eiturgass), og hetta hevur vanda við sær ella hevur óhepnar avleiðingar við sær fyri umhvørvi, heilsu og ferðslu.

Brunaverkið er, tá talan er um bjargingar á landi:

1) Alarmering,
2) Tilkalling av servandum fólki,
3) Útrykningur við serligum amboðum frá nærmastu stød,
4) Møgulig tilkalling av cykahjálp,
5) Avsperring av økum o.s.fr.

Eisini hevur nevndin í viðmerkingunum nágreiniliga viðgjørt støðuna, um ræðuligar vanlukkur (katastrofur) henda í Føroyum, hvør hevur ábyrgdina av bjargingararbeiðinum og á hvønn hátt, tað skal fara fram. Her vísir tað

seg, at tað ikki er nøkur verulig lóggáva ella fyrisitingarligar reglur, sum nágreiniliga siga frá, hvør ið hevur leiðsluna í sambandi við bjargingararbeiðinum, tá stórvanlukkur henda. Hvørjar reglur, ið eru, og hvussu tær virka í løtuni, er eisini greidliga umrøtt í viðmerkingunum til uppskotið.

Í viðmerkingunum til uppskotið um nýggja brunalóg er tí eisini lagt upp til, at farið verður undir at skipa fyri eini veruligari bjargingartænastu í sambandi við stórvanlukkum.

Í álitinum ger nevndin vart við, at ymisku bjargingarfeløgini í Føroyum gera stórt ólønt og sjálvboðið arbeiði, ið er hesum feløgum til miklan sóma. Var tað ikki so, hevði mangan staðið illa til. Men sum nú er, kunnu feløg verða stovnað, og tey kunnu doyggja burtur ella liggja óvirkin, um tey ongan góðan eiga.

Gjørt verður tó vart við, at hesi feløg sum sjálvbodnir hjálparstovnar ikki hava beinleiðis ábyrgd fyri tí arbeiði, ið gerast skal í sambandi við ræðuligar vanlukkur. Nevndin kemur beinleiðis við hesum tilmælum:

1) at landið veitir studning til kommunalu sløkkiliðini, soleiðis at stovnað verður ein tilbúgving á staðnum við meira útbúnaði enn nevndin skjýtur upp sum minstamark, og vil hetta tryggja, at sløkkiliðini kunnu vera ein týðandi partur í eini katastrofustøðu,
2) at landið veitir størri stuðul til L.F.B.,
3) at umhugsað verður at útbyggja Brunaumsjón landsins soleiðis, at hon kann taka lut í eini katastrofustøðu, og kann her viðmerkjast, at landsverkfrøðingsstovnurin, sum Brunaumsjón landsins skal leggjast undir, longu nú verður mett at hava fólk og útgerð v. m., sum kann verða ein partur av tilbúnaðinum,
4) at avgerð verður tikin um leiðsluna av tí teknisku hjálpini á skaðastaðnum, smbr. pctti 5-34,
5) at greiða verður fingin á, hvør hevur ábyrgdina av, at nóg nógvir sjúkraflutningsbilar eru tøkir,
6) at gjørdar verða tilbúgvingarætlanir fyri øll sjúkrahús, og
7) at umhugsað verður at seta eitt tilbúgvingarráð, sum hevur til endamáls at meta tørvin á eini tilbúgving og at gera tilmæli til játtandi myndugleikarnar. Ráðið kann møguliga verða mannað soleiðis:
   1 limur valdur av landsstýrinum, 1 av Kommunufelagnum, 1 av Tórshavnar býráð, 1 av LBF, leiðarin av Brunaumsjón landsins, landslæknin og landfútin. Um so er, at civilverjustýrið tekur lut í uppbyggingini av katastrofutilbúgvingini, eigur civilverjustýrið helst at verða umboðað í ráðnum.

Nevndin leggur dent á, at tað er sera týdningarmikið, at gjørd verður landsbyggireglugerð, soleiðis at trygd verður fyri, at allar kommunur hava somu hóskandi reglugerð, eisini í sambandi við fyribyrging av eldsvanda.

Í hesum sambandi vísir nevndin á, at landsverkfrøðingsstovnurin í 1975 gjørdi eitt uppskot til eina landsbyggireglugerð til vanlig sethús.

Í uppskotinum um brunalóg er serligur dentur lagdur á, at brunatrygdarligar byggireglur verða gjørdar til tess at tryggja fólk í húsum, har nógv fólk eru samankomin.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið, ið er rúgvumikið og rættiliga trupult at handfara, tá hugsað verður um viðmerkingar frá teimum stovnum, ið hava havt málið til umrøðu.

Samanumtikið er nevndin samd um, at teir trupulleikar, ið vístir eru á, kunnu og eiga at avgreiðast við samráðingum millum landsstýrið og kommunurnar. Serliga eru tað peningaligu útreiðslurnar hjá kommunum, ið kunnu tykjast tungar, men lógaruppskotið er ikki ætlað at tyngja kommunurnar út um eitt ávíst minstamark meiri enn tær sjálvar vilja. Her er vert at umhugsa, um ikki tryggingin fyri ein part kann vera við til at tryggja íløgurnar. Víst verður annars til tilmæli frá nevndini.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum frá landsstýrinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Ein samd rættarnevnd setir eisini fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til 3, 4, 5, 6 og 7 í tilmælinum frá nevndini, ið hevur endurskoðað brunalóggávuna, áleggur løgtingið landsstýrinum at seta hesi tiltøk í verk.

2. viðgerð 10. apríl 1986. §§ 1 og 2 vórðu við broytingum samtyktar við 26-0, §§ 3-13 við 26-0, §§ 14-20 við 26-0, §§ 21-22 við 26-0, § 23 við 27-0, § 24 við 27-0, § 25 við 27-0, §§ 26, 27, 28 við 27-0. Við 27-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 11. apríl 1986. Lógin endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 816-9. Lóg nr. 78 frá 12. juni 1986.

# 37. Berghol til Gásadals

Ár 1985, mikudagin 11. december legði Ivan Johannesen, løgtingsmaður, vegna Svend Åge Ellefsen og seg sjálvan fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at leiga ella keypa tunnilsboriútgerðina, ið S. E. V. eigur, og bora bergholið til Gásadals.

**Viðmerkingar:**

Nú hevur leingi verið tosað um at gera berghol til Gásadals, og vóru tað flest øll í Føroyum, sum væntaðu, at tá komið var ígjøgnum til Trøllanes, varð byrjað til Gásadals, men hetta varð ikki so.

Í Dimmalætting 30. november 1985 upplýsir Lasse Klein, samferðslumálaráðharri, at vegurin Biggjarmegin til, har bergholið skal byrja til Gásadals, er gjørdur, og at alt er klárt; nú bíða teir bert eftir boriútgerð.

Í heyst keypti S. E. V. boriútgerð at bora tvey stytri berghol, henda boriútgerð kostaði 2,5 mió. kr. Í apríl ella mai 1986 er hetta arbeiðið líðugt, og skal S. E. V. ikki nýta hesa boriútgerð meir.

Fyri at útnytta hesa boriútgerð og tað servanda fólk, ið arbeiðir við hesi maskinu, verður mælt til at leiga/keypa hesa boriútgerð. Bergholið til Gásadals er 1.700 m, og vanliga verður borað 60-70 m hvørja viku, so tað tekur millum 24 og 28 vikur, til komið er ígjøgnum til Gásadals; t. v. s. at um byrjað verður í mai 1986, kann verða skotið ígjøgnum í oktober ella november 1986.

1. viðgerð 21. januar 1986. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 13. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fyri løgtingið tann 11. december 1985 og varð við 1. viðgerð 21. januar 1986 beint í samferðslunevndina.

Málið snýr seg um at áleggja landsstýrinum at leiga ella keypa tunnilsútgerðina, ið S. E. V. eigur, og bora berghol til Gásadals.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Tórálvur Mohr Olsen, Juul Jacobsen, Asbjørn Joensen) vísir á, at politisk semja er í samgonguni til at fremja hesar bergholsgerðir:

Kaldbaksbotn/Signabø,
Sumbiar bergholið,
Kunoyar bergholið,
Gásadals bergholið.

Annars metir sami meiriluti, at tað ikki er ein spurningur um tunnilsboriútgerð, tí landið eigur tvinnanda tunnilsborivognar, har annar stendur stillur í løtuni, hetta mál snýr seg meira um figgjarliga styrki enn um borivognar, tað, at vit koma at bora við meira enn tveimum borivognum í senn, er lítið trúligt.

Meirilutin í nevndini kann sostatt ikki taka undir við uppskotinum.

Ein minniluti (Johs. M. Olsen og Terje Davidsen úr Sambandsflokkinum) ger hesar viðmerkingar.

Málið er lagt fram av Ivani Johannesen úr Sambandsflokkinum sjálvum øðrum.

Sambandsflokkurin hevur hildið og heldur, at ein eigur at fara varliga fram, tá talan er um óproduktivar almennar íløgur, her undir íløgur í sekundér berghol.

Hin vegin hevur sitandi samgonga lagt eina stóra og dýra bergholsætlan, sum meiriluti er fyri, og sum setir Gásadal alt ov aftarliga, sammett við onnur berghol.

Út frá hesum hevur ein lætt við at skilja uppskotið frá tingmonnunum úr Vágum.

Minnilutin er við til at leggja málið fyri løgtingið til avgerðar.

Hin minnilutin (Eyðun Viderø) tekur undir við málinum og mælir til at samtykkja tað.

2. og 3. viðgerð 3. apríl 1986. Uppskotið frá Svend Aage Ellefsen, løgtingsmanni, fall við 12 ja-atkvøðum, 16 atkvøddu ikki, 4 vóru burturstaddir, atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu:
Óli Breckmann,
Dánjal Pauli Danielsen,
Anfinn Kallsberg,
Sigfríður Vørðhamar,
Svend Aage Ellefsen,
Eyðun Viderø,
Pauli Ellefsen,
Ivan Johannesen,

Agnar Nielsen,
Jógvan Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Dánjal Larsen.

Atkvøddu ikki: Henrik Old,
Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jákup Lindenskov,
Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Andrias Højgaard,
Hilmar Kass,
Hergeir Nielsen,
Heini O. Heinesen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson,
Adolf V. Hansen,
Juul Jacobsen,
Flemming Mikkelsen.

Burturstaddir vóru: Poul Michelsen,
Jóannes Dalsgaard,
Páll Josephsen,
Signar Hansen.

# 38. Broytingar í skattalógunum.

Ár 1985, mánadagin 16. december legði lóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.**

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinri broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður sett sum nýtt nr. 15:
»15) Íløgufeløg, í tann mun tey hava inntøku av vinnu, her uppi í vinning við keyp og sølu av virðisbrøvum, rentutilskriving, v.m.«

2. Í § 2, stk. 1, verður sett sum litra g):
»g) fáa vinningsbýti úr Føroyum.«

3. Í § 21 verður 4. stk. orðað soleiðis:
»**4. stk.** Partafelag skal yvirtaka ognir frá verandi virki til handilsvirði. Persónliga rikið vinnuvirki kann tó umskipast til nýstovnað partafelag eftir reglunum ásettar í løgtingslóg um umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag.«

4. Í § 29 verður sett sum nýtt nr. 15:
»15) Rentutilskriving av innilæstum dýrtíðarviðbótum, sambært lóg nr. 7 frá 9. januar 1980 um lønmodtagernes dyrtidsfond.«

5. § 31, d) verður broytt soleiðis:
»d) Peningur, sum í útgerðarstarvi á sjónum verður lagdur niðurfyri til klassingar og umvælingar av skipi. Hesar avsetingar til-

§ 1.

I lagtingslov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 1 indsættes som nyt nr. 15:
»15) Investeringsforeninger, i det omfang, de har indtægter af erhverv, herunder fortjeneste ved køb og salg af værdipapirer, rentetilskrivning m.v.«

2. I § 2, stk. 1 indsættes som litra g):
»g) får udbytte fra Færøerne.«

3. § 21, stk. 4 affattes således:

»**Stk. 4.** Et aktieselskab skal overtage aktiver fra eksisterende virksomheder til handelsværdien. Personligt drevet virksomhed kan dog omdannes til et nystiftet aktieselskab efter bestemmelserne fastsat i lagtingslov om omdannelse af personligt drevne erhvervsvirksomheder til aktieselskaber.«

4. I § 29 sættes som nr. 15:

»15) Rentetilskrivning af indefrosne dyrtidsportioner, jfr. lov nr. 7 af 9. januar 1980 om lønmodtagernes dyrtidsfond.«

5. § 31, litra d, affattes således:
»d) Beløb, som ved rederi eller fangstvirksomhed på havet henlægges til klassifikation og vedligeholdelse af skibe. Disse henlæggel-

samans kunnu í mesta lagi verða 10% av tí fyrstu 1.000.000 kr. av útveganarvirðinum og 5% av útveganarvirðinum omanfyri 1.000.000 kr. og kunnu bert verða gjørdar undir einum av vinningi í rakstri skipsins áðrenn gjørdar avskrivingar. Avselingarnar skulu inntøkuførast aftur í seinasta lagi 4. inntøkuár aftaná avsetingarárið ella tað árið, skipið verður latið av hondum.

ser kan ialt højst andrage 10% af de første 1.000.000 kr. af anskaffelsesværdien og 5% af anskaffelsesværdien over 1.000.000 kr. og kan kun foretages samlet af overskud ved skibets drift før foretagne afskrivninger. Henlæggelserne skal indkomstføres igen senest 4. indkomstår efter hensættelsesåret eller det år, skibet bliver afhændet.«

**6.** Í § 33, nr. 7) verður »1. oktober« broytt til: »1. juli«.

6. I § 33, nr. 7, ændres »1. oktober« til »1. juli«.

**7.** § 33, nr. 8 g) verður orðað soleiðis:

»g) Tær føstu upphæddirnar, ið nevndar eru í a) til f) verða ásettar av Líkningarráðnum í seinasta lagi 1. juli galdandi fyri komandi inntøkuár.«

7. § 33, nr. 8, litra g, affattes således:

»g) De i a) til f) omtalte faste beløb fastsættes af Ligningsrådet senest 1. juli, som gældende for det kommende indkomstår.«

**8.** Í § 41, 4. stk., detta burtur orðini: »Í ivamálum hevur landsstýrið ta endaligu avgerðina.«

8. I § 41, stk. 4, udgår ordene: »I tvivlstilfælde træffer landsstyret den endelige afgørelse.«

**9.** Í § 41, 5. stk. detta burtur orðini: »Í ivamálum hevur landsstýrið ta endaligu avgerðina.«

9. I § 41, stk. 5, udgår ordene: »I tvivlstilfælde træffer landsstyret den endelige afgørelse.«

**10.** Í § 41 verður sett sum nýtt stk. 7:

»Líkningarráð Føroya hevur í ivamálum um skattligt tilhald ta endaligu avgerðina, og kann við kunngerð ásetta nærri reglur hesum viðvíkjandi.«

10. I § 41 sættes som stk. 7:

»**Stk. 7.** Færøernes Ligningsråd har i tvivlstilfælde den endelige afgørelse vedrørende skattemæssigt ophold og kan i bekendtgørelse fastsætte nærmere bestemmelser desangående.«

**11.** Í § 62, 1. stk. verður skoytt uppí:
»Fyri inntøku, sum sambært avgerð líkningarráðsins ikki er A-inntøka, verður upplýsingarskyldan sambært § 118 varðveitt.«

**12.** Í § 147, nr. 2 ganga út orðini: »avgerðir eftir 60. gr., 3. og 4. stk., 63. gr., 4. stk., 68. gr., 80. gr. ella 82 gr.« og í staðin verður sett: »avgerðir eftir § 68, § 69, § 72, 1. stk. og § 73.«

**§ 2.**
Henda lóg fær gildi frá og við 16. december 1985.

**11.** I § 62, stk. 1, tilføjes: »For indtægt, der i henhold til Ligningsrådets afgørelse ikke er A-indtægt, opretholdes oplysningspligten i henhold til § 118.«

**12.** I § 147, nr. 2, udgår ordene: »afgørelser efter prg. 60, stk. 3 og 4, prg. 63, stk. 4, prg. 68, prg. 80 eller prg 82«, og i stedet indsættes: »afgørelser efter § 68, § 69, § 72, stk. 1 og § 73.«

**§ 2.**
Denne lov træder i kraft fra og med 16. december 1985.

## Il Uppskot

## til

**løgtingslóg um broytingar i løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.**

**§ 1.**
Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður § 5 orðað soleiðis:

»Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 8 til 15 í somu lóg, og teimum í § 2 nevndu felagum v.m., sum eru undir avmarkaðari skattskyldu, ásettur til 49% av inntækunum til landskassa og kommunur. Skattur-

**lagtingslov om ændringer i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.**

**§ 1.**
I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer affattes § 5 således:

»Under henvisning til § 54 i kildeskatteloven udskrives skatten for dem, der er omhandlet i nævnte lov § 1, nr. 8-15 og for de i § 2 nævnte selskaber m.v., der er undergivet begrænset skattepligt, til 49% af indtægten til landskasse og kommune. Skatten fordeles

in verður býttur við 30% sum kommunuskattur og 70% sum landsskattur.«

med 30% som kommuneskat og 70% som landsskat.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við 16. december 1985.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med 16. december 1985.

## III Uppskot

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.**

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om investeringsfond.**

§ 1.

Í § 3, 2. stk. í løgtingslóg nr. 50 frá 23. december 1971 um íløgugrunnar við seinni broytingum verður »1.200 kr.« broytt til »4.000 kr.«

§ 1.

I § 3, stk. 2 i lagtingslov nr. 50 af 23. december 1971 om investeringsfond med senere ændringer ændres »1.200 kr.« til »4.000 kr.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við 11. apríl 1985.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med 11. april 1985.

## IV Uppskot

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.**

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger m.v.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinni broyt-

§ 1.

I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. med senere

ingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 12 verður sett sum nýtt 3. stk.:
   »Er saldoin vorðin negativ av tí at sølpeningurin v.m. skal dragast frá í avskrivingargrundarlagnum, og er saldoin ikki rættað upp aftur í seinasta lagi næsta inntøkuár, antin við útveganum av skipum eftir hesum kapitli ella rakstrargøgnum sambært kap. 1, skal saldoin rættast upp aftur soleiðis, at upphæddin verður roknað uppi við uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni fyri síðstnevnda inntøkuár.«
2. § 25, stk. 1 verður orðað soleiðis:
   »Selur ella avhendir hin skattskyldugi bygning ella byggigrund, har bygningur stendur ella hevur staðið, sum kundi verið avskrivaður sambært § 17, 1. stk., sbr. § 20, so skal vinningurin verða roknaður upp í skattskyldugu inntøkuna søluárinum. Møguligt hall kann ikki verða drigið frá í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni. Undantikin hesi reglu eru bygningar og byggigrund, útvegað áðrenn 1. januar 1950.«
3. § 25, 2. stk. fellur burtur, og núverandi 3.stk. verður 2. stk.
4. § 27 verður orðað soleiðis:
   »Útreiðslur til byggigrund kunnu ikki verða roknaðar upp í avskrivingarpeningin ella útreiðslur til umbøtur v.m.«

ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 12 sættes som nyt stk. 3:

   »Er saldoen blevet negativ på grund af at salgssummer m.v. skal fradrages i afskrivningsgrundlaget, og er saldoen ikke udlignet senest i det næste indkomstår, enten ved anskaffelse af skibe efter dette kapitel eller driftsmateriel efter kapitel 1, skal saldoen udlignes igen således, at beløbet medregnes ved opgørelsen af indkomsten for sidste indkomstår.«

2. § 25, stk. 1, affattes således:

   »Sælger eller afhænder den skattepligtige bygning eller byggegrund, hvor der står eller har stået bygning, der kunne være afskrevet efter § 17, stk. 1, jfr. § 20, skal avancen medregnes i den skattepligtige indkomst i salgsåret. Eventuelt tab kan ikke fradrages ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst. Undtaget fra denne lovbestemmelse er bygning og byggegrund, anskaffet før 1. januar 1950.«

3. § 25, stk. 2 ophæves, og nuværende stk. 3 bliver stk. 2.
4. § 27 affattes således:
   »Udgifter til byggegrund kan ikke medregnes i den akskrivningsmæssige anskaffelsessum eller udgifter til istandsættelser m.v.«

5. Í § 27 A, síðsta pkt. verður skoytt uppí:
»og verður útvegannarpeningurin prístalsviðgjørdur fram til seinasta ásetta prístal undan søludegnum.«

6. Sum nýggj § 27 A, 3. stk. verður sett:
»**3. stk.** Útvegannarpeningurin fyri byggigrund verður at prístalsviðgera samsvarandi fyrimælinum í 1. stk. fram til seinast ásetta prístal undan søludegnum, sbr. § 25, 1. stk.«

7. Sum nýggj § 27 B verður sett:
»**§ 27 B.** Viðvíkjandi bygningum, sum eru tiknir í vinnuliga nýtslu áðrenn tað roknskaparárið, sum endaði í 1983, verður roknað útvegannarpeningurin prístalsviðgjørdur fram til seinast ásetta prístal undan søludegnum, sambært tær prístalsásetingar, ið galdandi hava verið síðani 1. januar 1950.
**2. stk.** Útvegannarpeningurin fyri byggigrund verður at prístalsviðgera samsvarandi fyrimælunum í 1. stk. fram til seinast ásetta prístal undan søludegnum, sbr. § 25, 1. stk.«

8. Í § 31, 1. stk. verða orðini: »kapittul 1« broytt til: »kapittul 1-4«.

9. § 31, 2. stk. fellur burtur og sum nýtt § 31, 2. stk. verður sett:
»**2. stk.** Flytur skattskyldugur maskinur, innbúgv, skip, bygningar og líkar ognarlutir til eginnýtslu burturav annað-

5. Til § 27 A, sidste pkt. tilføjes:
»og bliver anskaffelsessummen pristalsreguleret frem til senest fastsatte pristal før salgsdagen.«

6. I § 27 A, sættes som nyt stk. 3:
»**Stk. 3.** Anskaffelsessummen for byggegrund bliver at pristalsregulere i overensstemmelse med bestemmelsen i stk. 1 frem til senest fastsatte pristal før salgsdagen, jfr. § 25, stk. 1.«

7. Som ny § 27 B indsættes:
»**§ 27 B.** Vedrørende bygninger, som er taget i brug før det regnskabsår, som sluttede i 1983, skal den beregnede anskaffelsessum pristalsreguleres frem til senest fastsatte pristal før salgsdagen efter de pristalsfastsættelser, der har været gældende siden 1. januar 1950.

**Stk. 2.** Anskaffelsessummen for byggegrund bliver at pristalsregulere i overensstemmelse med bestemmelsen i stk. 1 frem til senest fastsatte pristal før salgsdagen, jfr. § 25, stk. 1.«

8. I § 31, stk. 1, ændres »afsnit 1« til: »afsnit 1-4«.

9. § 31, stk. 2 ophæves og som nyt stk. 2 indsættes:

»**Stk. 2.** Overfører en skattepligtig maskiner, inventar, skibe, bygninger og lignende formuegoder fra udelukkende

hvørt til vinnuliga nýtslu burturav ella til eginnýtslu og nýtslu í vinnu, verða slíkir flutningar í hesi lóg javnsettir við keyp av somu ognarlutum.«

**10.** § 31, 3. stk. fer úr gildi og núverandi 4. stk. verður 3. stk.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við 16. december 1985.

privat benyttelse enten til udelukkende erhvervsmæssig benyttelse eller til benyttelse til både erhvervsmæssige og private formål, sidestilles sådanne overførelser i denne lov med køv af de pågældende formuegoder.«

**10.** § 31, stk. 3, ophæves og nuværende stk. 4 bliver stk. 3.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med 16. december 1985.

## V Uppskot

## til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 21 frá 9. mai 1985 um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m. verður § 2 soljóðandi:

»Frammanfyristandandi reglur um skattseting av søluvinningi fáa ikki gildi fyri tær sølur og avhendingar, sum farnar eru fram fyri 11. apríl 1985. Fyri partafeløg er henda regla treytað av, at partafelagið er latið inn til skráseting innan 11. apríl 1985.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við 16. december 1985.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger m.m.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 21 af 9. mai 1985 om ændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger m.m. affattes § 2 således:

»Foranstående bestemmelser om beskatning af salgsfortjeneste får ikke gyldighed for salg og afhændelser, der er foregået forud for 11. april 1985. For aktieselskaber er denne bestemmelse betinget af, at selskabet er indsendt til registrering før 11. april 1985.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med 16. december 1985.

**Viðmerkingar:**

Verandi uppskot landsstýrisins til broytingar í galdandi skattalóggávu er eitt natúrligt framhald av teimum broytingum, sum settar vóru í gildi á vári 1985.

Í uppskotinum um broytingar í samtíðarskattalógini verður í fyrstu syftu miðað ímóti at útbyggja og javnstilla lóggávuna, soleiðis at hon betur samsvarar teimum krøvum og loysir teir praktisku trupulleikar, sum støðugt taka seg upp innan hetta vittfevnandi og torgreidda lóggávuøki.

Í aðru syftu verður miðað ímóti at gera greiniligari og meira fullfiggjaðar reglur, soleiðis at sleppast kann undan misskiljingum og trupulleikum í samband við tulkingina og útinnanina av teimum einstøku lógarreglunum.

Tey sokallaðu íløgufcløgini, hvørs endamál einahelst hevur verið at útvega limunum ein skattafrían vinning við m.a. keyp og sølu av virðisbrøvum v.m., verða sambært uppskotinum til fulnar at skatta av staðfestum vinningi í samband við hetta virksemi. Ein onnur avgerðandi broyting í uppskotinum í mun til galdandi skattalóg er, at partafelag nú skal yvirtaka verandi vinnuvirki til handilsvirði, og ikki sum áður til bókført ella annað rímuligt virðismett virði. Hervið verður ein umskipan av virki til partafelag javnstillað við eina og hvørja avhending ella sølu í fríum handli. Uppgerðin verður tískil at fremja samsvarandi teimum reglum, ið galda fyri sølu millum óvildugar persónar við tí úrsliti, at skattligu avleiðingarnar av eini tílíkari umskipan verða tær somu, sum fyri eina møguliga sølu til vanligt marknaðarvirði.

Broytingarnar í avskrivingarlógini hava til endamáls at útbyggja reglurnar um skatt av vinningi í samband við sølu av bygningum. Skotið verður upp, at bygningur og grundøki verða gjørd upp undir einum. Henda broyting er einahelst grundað á ta sannroynd, at tað mest sum er ógjørligt í hvørjum einstøkum føri at skyna millum virði av ávikavist bygningi og grundøki. Ein onnur týðandi broyting í mun til verandi lóggávu er tann, at staðfestur vinningur í samband við sølu av bygningi ella grundøki nú verður at rokna sum vanlig skattskyldug inntøka. Hetta ber í sær, at uppgerð í samband við serstakt avgjald við sølu av bygningi ikki longur nýtist at verða útvegað. Hereftir verður tílík inntøka at geva upp á sjálvuppgávuni eins og vanlig skattskyldug inntøka.

Fyri at gera skipanina í samband við skatting av vinningi við sølu av vinnuligum bygningum meira rúmliga og samsvarandi einum veruliga staðfestum vinningi, verður skotið upp at regulera útveganarpeningin fyri bygningin ájavnt prístalinum. Hetta letur seg í royndum væl gera samsvarandi teimum pristalsásetingum, ið galdandi hava verið síðan 1. juli 1939.

Ásannandi, at tað føroyska vinnulívið er ov einstáttað, og at íløgurnar í stóran mun verða miðsavnaðar innan ávís vinnuøki, verður mett, at ein

ítøkiligur tørvur er á at fáa broytt reglurnar í avskrivingarlógini soleiðis, at reglurnar um flyting verða gjørdar smidligari og meira tíðarhóskandi. Fyri ikki framhaldandi at kroysta menn at seta pening í skip, og sostatt avmarka óneyðugar íløgur í fiskiflotan, verður skotið upp, at javning av negativari saldo hereftir eisini kann verða gjørd við útveganum av teimum í 1. kap. nevndu rakstrargøguum til vinnuliga nýtslu burturav. Hetta ber í sær, at peningur, sum áður var bundin í fiskivinnuni, nú kann verða nýttur til t.d. vinnuskapandi íløgur á landi. Mett verður, at nevndu broytingar í avskrivingarlógini fara at gagna føroyska vinnulívinum. Tað verður ein størri spjaðing í íløgunum, og verður hetta sjálvsagt ein óbeinleiðis eggjan til at gera føroyska vinnulívið meira fjølbroytt enn higartil.

*Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:*

1) **Løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt.**

§ 1, nr. 15. Tað verður nú positivt staðfest, at íløgufeløg eru fult skattskyldug av inntøku stavandi frá keypi og sølu av virðisbrøvum, umframt av staðfestum rentuvunningi, kursvinningi v.m. Undir regluna koma øll feløg, antin hesi heilt ella bert partvís reka tílíkt virksemi. Um felagið hevur annað heiti ella endamál enn frammanfyri tilskilað er uttan týdning, tá ið tað er veruliga virksemið, ið er avgerandi fyri antin skattseting skal fara fram ella ikki.

§ 2, 1. stk. verður broyy soleiðis, at nýtt litra g) kemur aftrat verandi reglum. Her verður ásett, at persónar undir avmarkaðari skattskyldu verða at skatta av vinningsbýti úr Føroyum. Frammanundan var ikki greidliga tilskilað, antin bæði fult og avmarkað skattskyldugir persónar ella einans fult skattskyldugir persónar skuldu skattast av vinningsbýti úr Føroyum, sbr. § 30. Hesin ivi verður nú beindur av vegnum við eini beinleiðis staðfesting av, at eisini avmarkað skattskyldugir persónar skulu svara skatt av vinningsbýti úr Føroyum.

§ 21, 4. stk. verður broytt soleiðis, at partafelag nú skal yvirtaka ognir frá verandi virki til handilsvirði, t.v.s. veruliga marknaðarvirði. Tann áður galdandi reglan um, at nýstovnað felag kundi yvirtaka ognir frá verandi virki til handilsvirði, t.v.s. veruliga marknaðarvirði. Tann áður galdandi reglan um, at nýstovnað felag kundi yvirtaka ognir frá verandi virki til skattliga bókført virði ella annað rímuligt virðismett virði fellur hervið burtur. Tá ið tað hereftir verður sanna handilsvirðið, sum skal mynda grundarlag undir uppgerðini, komst undan teimtum trupulleikum,

sum standast av at áseta og meta um eina upphædd svarandi til eitt sonevnt annað rimuligt virðismett virði.

Umskipan av verandi virki til partafelag kann tó fara fram uttan skattliga avleiðingar eftir teimum serligu fyriskipanunum í løgtingslóg um umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag. Eru fortreytirnar í nevndu lóg loknar, kann ein umskipan verða framd uttan at hetta ber í sær skattligar avleiðingar fyri stovnaran.

§ 29, nr. 15. Undantiknar skattskyldu í Føroyum verða hereftir sentutilskrivingar av innilæstum dýrtíðarviðbótum sambært serstaka danska lóg, sum fyrisetur, at nevndu viðbøtur eru undandrignar ræði ánarans til hesin hevur rokkið pensiónsaldur, verður avlamin, flytur endaliga burtur v.m.

Í § 31, d) er gjørd tann broyting, at partreiðarar og aðrir, sum á ein ella annan hátt eiga lut í skipi, galdandi frá 1. januar 1986, ikki einsæris kunnu draga frá og leggja niður fyri til klassingargrunn. Við orðingini í lógini um at hetta bert kann fara fram undir einum, verður tann regla staðfest, at ein slík avseting einans kann verða gjørd av sjálvum felagnum ella reiðarinum. Henda avseting kann somuleiðis einans verða framd í vinningi av skiparakstri áðrenn gjørdar avskrivingar. Harvið kann ikki økjast um eitt frammanundan ásannað hall orsakað av umrøddu avsetingum í klassingargrunn. Sambært ásetingunum í lógini, skal klassingargrunnurin inntøkuførast í samband við, at skipið verður latið av hondum. Í hesum sambandi er tað ikki nóg mikið til tess at reglan fær gildi, at partreiðari ella annar lutaeigari í skipi selur sín part til annan uttanfyristandandi keypara. Klassingargrunnurin hoyrir sambært omanfyri standandi til sjálvt skipið, og skal tískil bert inntøkuførast í teimum førum, talan er um heilt nýggj eigaraviðurskifti. Nýggju eigararnir koma sambært nevndu reglu til fulnar í stað gomlu eigaranna (succedera) og verður sostatt ikki talan um eina lutfalsliga inntøkuføring av klassingargrunni í samband við eina avhending frá einum partreiðara til annan. Klassingargrunnurin verður í samband við sáttmálan um keyp av skipi yvirtikin av nýggja eigaranum í tí lutfalli, hesin er eigari í skipinum. Hesin tekur sostatt við einum ávisum ágóða umframt eini sokallaðari »latentari« skattabyrðu, sum fellur til gjaldingar, tá ið áður umrøddu treytir um avhending ella 4. árs freistin í lógini eru loknar. Ein uppgerð og inntøkuføring av parti í klassingargrunni í sambund við sølu av pørtum í skipi, nýtist sostatt ikki at verða framd sambært hesum reglum.

Í § 33, nr. 7) verða ongar stórvegis broytingar gjørdar uttan bert at

framskunda útrokningina av løntakarafrádráttinum, soleiðis at útrokningin av løntakarafrádráttinum, soleiðis at útrokningin hereftir verður grundað á juli prístalið í staðin fyri prístalið pr. 1. oktober. Henda broyting er einahelst gjørd av praktiskum orsøkum, nevniliga vegna tess, at tann prístalsásetta reguleringin í løntakarafrádráttinum helst skal verða tøk í hampuligari tíð innan ásetanina av fyribilsskattaskránni sambært reglunum í § 67 til § 76.

Broytingarnar í § 33, nr. 8, g) eru somuleiðis grundaðar á tey viðurskifti, sum umrødd eru undir viðmerkingunum til § 33, nr. 7, nevniliga, at teir prístalsútroknaðu frádráttirnir helst skulu verða tøkir, tá ið fyribilsskattaskráin verður avgreidd pr. 1. oktober í hvørjum ári undan skattaárinum.

§ 41. Grundarlagið fyri broytingunum í § 41 er einahelst eitt ynski um, at umsitingin við tí inniliti og teimum royndum, sum eru grundaðar á eina loypandi málsviðgerð, verður heimilað at áseta meira greiniligar og fullfiggjaðar reglur á einum øki, sum støðugt hevur elvt til tvídrátt millum tær ymsu kommununrnar.

Likningarráð Føroya verður við hesum heimilað at taka avgerð í ivamálum um skattligt tilhald, og somuleiðis við kunngerð at áseta nærri reglur fyri hvørji sjónarmið, ið innan fyri lógarinnar karmar, skulu leggjast til grund og vera avgerandi fyri skattligum tilhaldi.

§ 62, 1. stk. Uppskotið um at varðveita upplýsingarskyldu arbeiðsgevarans hóast ein ávís inntøka eftir avgerð likningarráðsins verður staðfest sum ikki verandi A inntøka, er grundað á ein ítøkiligan tørv hjá arbeiðsgevaraeftirlitinum at varðveita eftirlitið við teimum her nevndu útgjaldingum, sum nú fara uttan um alturhaldsskipanina. Fyri at lætta um avgerð likningarráðsins í sambandi við ein møguligan tørv, at fáa umskipað A inntøku til B inntøku verður tí skotið upp at upplýsingarskyldan verður varðveitt.

§ 147, nr. 2. Broytingarnar í hesi lógarreglu eru einans reguleringar, ið eru liður í eini ætlan um at javnstilla og fáa betur samljóð millum tær einstøku lógarreglurnar innan skattalóggávuna.

2) **Løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan.**

§ 5, 1. pkt. Henda regla verður nú broytt soleiðis, at tað nú skilliga

verður niðurfelt í lóggávuna, at tað einans eru tey feløg, stovnar v.m., sum antin eru undir fullari ella avmarkaðari skattskyldu sambært § 1 og § 2 í samtíðarskattalógini, ið skulu svara skatt eftir teimum í hesi grein ásettu stigum og reglum.

**3) Løgtingslóg nr. 50 frá 23. desember 1971 um íløgugrunnar.**

§ 3, 2. stk. Broytingarnar í hesi reglu eru somuleiðis at meta sum ein javnstilling av lógarreglunum, soleiðis at samljóð fæst millum nýggju fyriskipanirnar í avskrivingarlógini og lóg um íløgugrunnar.

**4) Løgtingslóg nr. 52 frá 29. desember 1971 um skattligar avskrivingar v.m.**

§ 12, 3. stk. Her verður gjørd tann broyting, at javning av negativari saldo ikki sum frammanundan einans kann verða framd við nýútvegan av skipum, men eisini við nýútveganum av rakstrargøgnum til vinnulig endamál burturav sambært 1. kap. í avskrivingarlógini. Saldoin skal verða rættað upp aftur á henda hátt í seinasta lagi inntøkuárið eftir, at sølan er farin fram. Er hetta ikki gjært innan ásetta tíð, verður upphæddin roknað uppí uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni fyri avvarðandi inntøkuár. Annars eru meginreglurnar í kap. í galdandi fyri kap. 3, m.a. kann landsstýrið samsvarandi fyrimælunum í § 5, 4. stk. loyva at freistin fyri javning av negativari saldo verður longd treytað av, at trygd fæst fyri skattgjaldingina.

§ 25. Broytingarnar, ið ætlanin er at fremja í nevndu grein miðja ímóti at skattseta staðfestan vinning í samband við sølu av bygningi við tilhoyrandi grundøki. Reglan er avmarkað at galda fyri bygningar, ið antin verða ella kunnu avskrivast sambært fyrimælini í § 17 í avskrivingarlógini. Sethús og aðrir ikki vinnuligir bygningar koma sostatt ikki undir nevndu fyriskipanir. Verður vinnuligur bygningur tikin í nýtslu til íbúð ella annað privat endamál, kemur hesin undir fyrimælini í § 31, 1. stk. í avskrivingarlógini, har ein slíkur flutningur verður javnsettur við sølu og keyp av sama ognarluti. Eftir at skattliga uppgerðin er framd, verður bygningurin framyvir at javnmeta við sethús og aðrar ikki vinnuligar bygningar. Sostatt verður ein tílíkur fyrrverandi vinnuligur bygningur undantikin reglunum í hesi grein um skattseting av møguligum sølu-vinningi. Vinningur í samband við sølu av grundøki, har vinnuligur bygningur áður hevur staðið, antin hesin er burturbeindur ella á annan hátt farin fyri skeyti, t.d. brendur, niðurdottin v.m., skal somuleiðis

skattast sambært nevndu reglum. Í førum, har tað eru fleiri eigarar av ávikavist bygningi og grundøki, verður vinningurin lutfalsliga at áleggja teimum einstøku eigarunum. Eru ognarviðurskiftini fløkt, m.a. orsakað av, at eigararnir av bygninginum og grundøkinum bert partvís eru teir somu, verður gjørt eitt uppbýti av vinningi av ávikavist grundøki og bygningi sær. Skattingin verður síðan framd, grundað á eitt lutfalsligt uppbýti alt eftir ognarviðurskiftunum í hvørjum einstøkum føri.

§ 27. Her verður gjørd tann broyting, at útreiðslur til byggigrund ikki verða roknaðar uppí avskrivingarbæra útveganarpeningin, men sum partur av útveganarpeninginum, sum ikki kann avskrivast.

§ 27 A, 1. stk. Í hesi grein verður gjørd tann broyting, at útveganarpeningurin loypandi verður prístalsviðgjørdur sambært galdandi prístali. Hetta ber í sær, at tann roknaði útveganarpeningurin støðugt verður stillaður ájavnt við prísgongdina í samfelagnum, við tí úrsliti, skattseting bert verður áløgd tí parti av søluvirðinum, sum liggur omanfyri tann prístalsviðgjørda útveganarpeningin. Í samband við sølu av bygningi ella grundøki, verður tað altíð seinast kunngjørda prístalið í einum fjórðingsári, ið myndar grundarlag undir frammanfyri umrøddu søluuppgerð. Er farið inn um eitt nýtt fjórðingsár, og bersk á, at onki nýtt prístal enn er ásett, verður tað undanfarna prístalið, ið myndar grundarlag undir søluuppgerðini.

§ 27 B. Her verður somuleiðis útveganarpeningurin fyri bygningar útvegaðir innan 1983 prístalsviðgjørdur ájavnt við alment galdandi prístalið roknað á 1. juli 1939. Metingarvirðið verður síðan at prístalviðgera fram til søludagin, og verður munurin millum prístalsviðgjørda útveganarpeningin og sølupeningin at mynda grundarlag undir skattsetingini á sama hátt sum fyri yngri bygningar.

§ 31. Gjørd verður tann broyting, at flyting av vinnuligum skipum ella bygningum til privata nýtslu verður javnsett við sølu/keyp av somu rakstrargøgnum. Metingarvirði á ognunum verður lagt til grund fyri uppgerðina, sum er endalig á tann hátt, at rakstrargagnið broytir skattligu støðu sína frá at vera vinnuligt til privat. Á henda hátt verður m.a. tryggjað, at sethús ótarnað og uttan skattligar avleiðingar kunnu avhendast, óheft av, um tey áður hava verið roknað undir vinnuligar bygningar. Miðað verður nevniliga ímóti, at gjørt verður endaliga upp hvønn vegin bygningurin verður tikin í nýtslu til annað endamál enn tað, hann áður hevur verið nýttur til. Soleiðis verður forðað fyri, at ein møgulig skattbyrða framhaldandi skal áliggja bygninginum, tá ið nýtsla

og endamál verður grundleggjandi broytt. Tá ið nevnt verður, at bygningurin heilt ella lutvíst verður tikin í nýtslu til privat endamál, so merkir hetta, at meir enn 25% av bygninginum skal takast í nýtslu til íbúð v.m., um bygningurin skal broyta skattligu støðu sína frá vinnuligum til privatan bygning, sbr. § 17 í avskrivingarlógini.

1. viðgerð 14. januar 1986. Málið varð viðgjørt saman við málunum løgtingsmálunum nr. 39: Umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag, 40: Skattur av vinningi í sambandi við sølu av virðisbrøvum, og 34: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar, og vórðu tey øll beind í skattanevndina sum 4. februar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málini nr. 38: Broytingar í skattalógunum, 39: Umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag og 40: Skattur av vinningi í sambandi við sølu av virðisbrøvum vórðu løgd fram av landsstýrinum tann 16. december 1985, meðan løgtingsmál nr. 34: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar varð lagt fram av Fólkaflokkinum 11. december 1985.

Øll 4 málini vórðu viðgjørd undir einum 14. januar 1986 og vórðu eftir 1. viðgerð beind í skattanevndina.

Skattanevndin hevur viðgjørt málini og hevur by-tt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Heini O. heinesen, Hilmar Kass og Poul Jacob Olsen) metir, at samráðingarnar í skattanevndini góvu tað úrslitm at meirilutin tekur undir við uppskotum landsstýrisins, men setir tó fram fylgjandi broytingaruppskot í løgtingsmáli nr. 38: Broytingar í skattalógunum.

**Broytingaruppskot**

**til I**

Í § 1 verður sett sum nýtt pkt. 11, og verða pkt. 11 og 12 til 12 og 13:

»11) § 43, 1. stk. verður soleiðis orðað:
»Bygda(r)ráðið kann, um tað ikki heldur, at skattakomm-

I § 1 indsættes som nyt pkt. 11, punkterne 11 og 12 bliver 12 og 13:

»11) § 43, stk. 1 formuleres således:
»Kommunalbestyrelsen i en kommune, der mener, at den

unan hjá einum skattskyldugum 1. oktober er tann rætta jvb. § 41, 2.-6. stk., kæra um hetta áðrenn 1. mai árið eftir. Um hin skattskyldugi er settur í skatt sambært 2. stk., er kærufreistin 5 mánaðir aftan á, at skattskyldan hevur tikið við. Skattaborgarin kann kæra um avgerðina innan 3 mánaðir aftan á, at hann hevur fingið fráboðanina um, til hvørja kommunu, hann er tilhaldsskattskyldugur. Um kommunurnar ikki eru samdar um, til hvørja kommunu ein persónur er kommunuskattskyldugur, ella semja ikki kann fást við ein persón um hetta, kann spurningurin leggjast fyri líkningarráðið. Tó kann skattaborgarin innan 4 vikur aftan á, at hann hevur fingið boð um úrskurð líkningarráðsins kæra avgerðina til landsstýrið.«

for en skatteyder udpegede skattekommune pr. 1. oktober ikke er den rette, jfr. § 41, stk. 2-6, kan inden 1. maj året efter rejse indsigelse herimod. Hvis skatteyderen er ansat til skat efter stk. 2, kan indsigelse rejses indtil 5 måneder efter sattepligtens indtræden. En skatteyder kan rejse tilsvarende indsigelse indtil 3 måneder efter, at der er givet ham underretning om, til hvilken kommune, han er skattepligtig. Såfremt der ikke kan opnås enighed mellem kommunerne eller med skatteyderen om, hvilken kommune der skal anses for skattekommune, kan spørgsmålet forelægges ligningsrådet til afgørelse. Dog kan skatteyderen, inden der er gået 4 uger fra ligningsrådets afgørelse er meddelt ham, anke afgørelsen til landsstyret.«

## Broytingaruppskot

## til II

§ 2 í uppskoti landsstýrisins II verður soljóðandi:

§ 2.

Henda lóg fær gildi fyri skattir, sum verða líknaðir á inntøkum í tí roknskaparárinum, sum endar í álmanakkaárinum 1986 ella seinni.

§ 2.

Denne lov træder i kraft for skatter, som pålignes på indtægter i det regnskabsår, som slutter i almanakkåret eller senere.

## Broytingaruppskot

### til IV

1) § 2, 1. stk., 1. pkt. verður orðað soleiðis:
»Skattlig avskriving verður gjørd undir einum fyri allar maskinur, innleggingar og innrættingar í bygningum, tiknir í vinnuliga nýtslu áðrenn 1. januar 1983, innbúgv og tílík rakstrargøgn bert nýtt vinnuliga, sum hoyra til vinnuvirki hins skattskylduga, samanber tó § 11, 2. stk.«

1) § 2, stk. 1, 1. pkt. formuleres således:
»Skattemæssig afskrivning foretages under ét for samtlige de til en skattepligtig erhvervsvirksomhed hørende maskiner, installationer og indretninger i bygninger taget i erhvervsmæssig brug før 1. januar 1983, inventar og lignende driftsmidler, der udelukkende benyttes erhvervsmæssigt, jvnf. dog § 11, stk. 2.«

2) § 5, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Er saldoin vorðin negativ av tí, at sølupeningur v.m. skal dragast frá í avskrivingargrundarlagnum, og er saldoin ikki rættað upp aftur á tann hátt, sum tilskilað er í 2. stk. ella við útveganum sambært hesum kapitli ella bygningum sambært § 17, 1. stk., litra a) í seinasta lagi næsta inntøkuár, skal saldoin rættast upp aftur soleiðis, at upphæddin verður roknað uppí við uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni fyri síðstnevnda inntøkuár.«

2) »§ 5, stk. 1 formuleres således:
»Er der som følge af, at salgssummen m.v. skal fradrages i afskrivningsgrundlaget, fremkommet en negativ saldo, og er denne ikke udlignet på den i stk. 2 anførte måde eller ved anskaffelser i henhold til dette kapitel eller bygninger i henhold til dette kapitel eller bygninger i henhold til § 17, stk. 1, litra a) foretaget senest i løbet af det følgende indkomstår, skal saldoen udlignes helt derved, at beløbet medregnes ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst for sidstnævnte indkomstår.«

3) § 12, 3. stk. verður orðað soleiðis:
»Er saldoin vorðin negativ av tí at sølupeningurin v.m. skal dragast frá í avskrivingargrundarlagnum, og er saldoin

3) § 12, stk. 3 formuleres således:
»Er der som følge af, at salgssummen m.v. skal fradrages i afskrivningsgrundlaget, fremkommet en negativ saldo, og er

ikki rættað upp aftur í seinasta lagi næsta inntøkuár, antin við útveganum av skipum eftir hesum kapitli, rakstrargøgnum sambært 1. kap., ella vinnuligum bygningum sambært § 17, 1. stk., litra a), skal saldoin rættast upp aftur solciðis, at upphæddin verður roknað upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni fyri síðstnevnda inntøkuár.«

denne ikke udlignet senest i det følgende indkomstår enten ved anskaffelse af skibe i henhold til dette kapitel, driftsmidler i henhold til kapitel 1 eller erhvervsmæssige bygninger i henhold til § 17, stk. 1, litra a), skal saldoen udlignes helt derved, at beløbet medregnes ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst for sidstnævnte indkomstår.«

4) § 17 verður orðað soleiðis:
»Skattlig avskriving eftir reglunum í § 20 kann verða gjørd fyri niðanfyri nevndu bygningar, sum verða nýttir vinnuliga:
a. Bygningar, sum verða nýttir til handaverk og ídnað.

b. Gistingarhús burturav, ella bygningar til útleiging við minst 10 íbúðum, her íroknað neyðug skrivstova og goymsluhøli.
c. Aðrir bygningar, herundir skrivstovu- og goymslubygningar, har minst 75% av gólvviddini verða nýtt vinnuliga, her íroknað neyðug goymsluhøli.«

4) § 17 formuleres således:
»Skattemæssige afskrivninger efter reglerne i § 20 kan foretages på følgende bygninger, der benyttes erhvervsmæssigt.
a. Bygninger som udelukkende anvendes til håndværk og industri.
b. Hotel eller bygninger til udlejning med mindst 10 lejligheder, herunder medregnet nødvendige kontor- og lagerlokaler.
c. Andre bygninger, herunder medregnet kontor- og lagerbygninger, hvor mindst 75% af etagearealet anvendes erhvervsmæssigt, herunder medregnet nødvendige lagerlokaler.«

5) § 20, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Fyri bygningar nevndir í § 17, 1. stk. litra a) og b), kann útvegannarárið og 9 næstkomandi inntøkuár verða gjørd skattlig avskriving við upp til 7% av útvegannarpeninginum. Hvørt av fylgjandi inntøkuárum kann

5) § 20, stk. 1 formuleres således:
»På de i § 17, stk. 1, litra a) og b) nævnte bygninger kan der i anskaffelsesåret og hvert af de nærmest følgende 9 indkomstår foretages skattemæssig afskrivning med indtil 7% af anskaffelsessummen. I hvert af de

skattlig avskriving verða gjørd við upp til 2% av útvegannarpeninginum. Útvegannarárið er tað inntøkuár, ið bygningurin verður fingin í hendur ella fullgjørdur og tikin í nýtslu til endamál, sum heimilar skattliga avskriving.

**2. stk.** Fyri bygningar, nevndir í § 17, 1. stk., litra c), kann útvegannarárið og 9 næstkomandi inntøkuár verða gjørd skattlig avskriving við upp til 4% av útvegannarpeninginum. Hvørt av fylgjandi inntøkuárum kann skattlig avskriving verða gjørd við upp til 1% av útvegannarpeninginum.«

6) § 25, 1. stk. verður orðað soleiðis:

»Selur ella avhendar hin skattskyldugi bygning ella byggigrund, har bygningur stendur ella hevur staðið, sum kundi verið avskrivaður sambært § 17, 1. stk., sbr. § 20, so skal vinningurin verða roknaður upp í skattskyldugu inntøkuna, um hann ikki verður nýttur til endurútvegan av teimum í 1. kap. tilskilaðu rakstrargøgnum ella teimum í § 17, 1. stk. litra a) tilskilaðu bygningum í seinasta lagi næsta inntøkuárið eftir søluárið. Møguligt hall kann ikki verða frádrigið í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni. Undantikin hesi reglu eru bygningur og byggigrund útvegað áðrenn 1. januar 1950.«

derefter følgende indkomstår kan skattemæssig afskrivning foretages med indtil 2% af anskaffelsessummen. Ved anskaffelsesåret forstås det indkomstår, hvori bygningen erhverves eller fuldføres og tages i brug til et formål, der berettiger til skattemæssig afskrivning.

**Stk. 2.** På de i § 17. stk. 1, litra c), nævnte bygninger kan der i anskaffelsesåret og hvert af de nærmest følgende 9 indkomstår foretages skatmæssig afskrivning med indtil 4% af anskaffelsessummen. I hvert af de derefter følgende indkomstår kan skattemæssig afskrivning foretages med indtil 1% af anskaffelsessummen.«

6) § 25, stk. 1 formuleres således:

»Sælger eller afhænder den skattepligtige bygning eller byggegrund, hvor der står eller har stået bygning, der kunne være afskrevet efter § 17, stk. 1, jfr. § 20, skal avancen medregnes i den skattepligtige indkomst, hvis den ikke anvendes til anskaffelse af de i kapitel 1 omhandlede driftsmidler eller de i § 17, stk. 1, litra a) omhandlede bygninger, senest i indkomståret, der efterfølger salgsåret. Eventuelt tab kan ikke fradrages ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst. Undtaget fra denne lovbestemmelse er bygning og byggegrund, anskaffet før 1. januar 1950.«

**Minnilutin (Jógvan Sundstein) hevur hesar viðmerkingar:**

Aftaná at lóggáva í apríl 1985 varð framd um at skatta kapitalvinning (incl. inflatiónsvinning) av skipum og bygningum, hevur tað verið alsamt meira neyðugt at skipa eina lóggávu, sum ger tað møguligt alternativt at nýta hesar vinningsupphæddir óskattaðar í vinnulívinum. Hetta kann gerast við, at slíkar upphæddir kunnu endurinvesterast og nýtast sum forskotsavskriving í onnur tól enn tey seldu. Fyri at hendan skipanin kann virka og vera neutral mótvegis vinnuni, eigur tað at vera fritt at velja hvørji gøgn, ein selur, og hvørji ein keypir. Tað má vera viðurskiftini hjá tí einstaka virkinum, sum avgera hetta.

Tí legði Fólkaflokkurin fram lógaruppskot í tingmáli nr. 34/1985 um at broyta avskrivingarlógina eftir hesum sjónarmiðum. Sama uppskotið legði flokkurin eisini fram í apríl 1985 í tingmáli nr. 81/1984, men tá varð tað felt.

Í landsstýrisuppskotinum í tingmáli nr. 38/1985 er bert gingið tað lítla stigið framá, at søluvinningur frá skipum kann nýtast til íløgu í maskinur og tól. Hetta er alt ov lítið sæð í einum heildarljósi, og er hetta heldur ikki neutralt mótvegis frium vinnuvali. Aftaná 1. viðgerð og orðaskifti annars um málið, sær tað tó út til, at ein ávísur bati er á veg. Landsstýrisflokkarnir í skattanevndini hava sett fram uppskot um, at søluvinningur frá skipum eisini skal kunna nýtast til vinnuligar bygningar. Hetta er sum sagt ein bati, sjálvt um samgongan enn er komin alt ov stutt á hesum øki.

Tað er tí av allarstørsta týdningi fyri framhaldandi vinnulívsútbygging í Føroyum við størst møguligari eginfiggjan, at uppskotið frá Fólkaflokkinum, **tingmál nr. 34/1985,** verður samtykt.

Í tingmáli nr. 38/1985 hevur samgongan eisini uppskot um, at um persónur ella persónar skipa egið vinnuvirki um til partafelag, skulu virðini yvirdragast til handilsvirði. Hetta skapar stórar trupulleikar fyri vinnuna, av tí at slíkt í fleiri førum útloysir ein stóran skatt, sum minkar um eginfiggjanina og møguleikarnar fyri framhaldandi rakstri. Har afturat gevur tað stórar praktiskar trupulleikar at finna handilsvirðið.

Fólkaflokkurin gongur tí ímóti hesum uppskoti. Um uppskotið kortini verður samtykt, er **tingmál nr. 39/1985,** ein neyðloysn, sum tó helst má endurskoðast aftur heilt skjótt.

Hækkingin av partafelagsskattinum **(tingmál nr. 38/1985)** upp til 59% fyri alla skattskyldugu inntøku kann heldur ikki góðtakast undir verandi umstøðum og als ikki, tá ikki vinningsbýtisskatturin samstundis verður lækkaður. Her verður jú talan um økta dupultskatting.

**Tingmál nr. 40/1985,** skatting av vinningi av virðisbrøvum, er, sjálvt um talan bert er um virðisbrøv, ein hevur havt styttri enn 3 ár, størsti ágangur í langa tíð á íløguhugin í føroyskt vinnulív, og má siggjast sum byrjanin til

skatting av uppsparing. Hetta er nakað nýtt í føroyskari skattalóggávu. Kanska vísa avleiðingarnar seg ikki fyrrenn um nøkur ár, men tann búskaparliga støða, land okkara er í, krevur tað øvugta av tí førda politikkinum, nevniliga at skundað verður undir større uppsparing og større eginkapital í vinnuvirkjum okkara.

Samanumtikið mælir minnilutin (Jógvan Sundstein) til at samtykkja tingmál nr. 34/1985 (Fólkaflokksuppskotið) og til ikki at atkvøða fyri landsstýrisuppskotunum, burtursæð frá einstøkum pørtum, sum undir verandi umstøðum kunnu vera til ein vissan bata.

Ein annar minniluti (Pauli Ellefsen úr Sambandsflokkinum) kann sum heild ikki taka undir við uppskotum landsstýrisins og uppskoti Fólkafloksins um broytingar í skattalógunum.

Tó kann beinanvegin viðmerkjast, at okkurt er innihildið í hesum lógaruppskotum, sum minnilutin kann atkvøða fyri.

Umrøddu uppskotini koma, verða tey samtykt, sum frá líður at gera tað munandi trongari og truplari hjá okkara vinnulívi at virka. Skattliga sjónarmið Sambandsfloksins er væl kent. Í undanfarna valskeiði eydnaðist tað Sambandsflokkinum at taka nøkur fá og smá stig fram móti einari rímiligari og rættvísari skattaskipan, sum ber í sær, at vinnan sjálv sleppur rimiliga lætt, skattliga séð, meðan tað samstundis verður tryggjað, at teir, sum vinnuna eiga, gjalda skatt av tí, teir fáa út úr vinnuni, bæði sum løn og sum avkast.

Um tey einstøku lógaruppskotini er at siga:

**Løgtingsmál nr. 38/1985:** Broytingar í skattalógunum. Hetta uppskot inniheldur broytingar um fleiri ymisk viðurskifti. Nevnast kann broytingin í § 21, 4. stk. í skattalógini um nýstovnan av partafeløgum. Hesum uppskoti tekur minnilutin ikki undir við. Minnilutin átalar harðliga, at sitandi samgonga hækkar skattin hjá partafeløgum. Hækkingin kemur at raka tey smáu feløgini, spírarnar í okkara vinnulívi, og seinka hesum í at mennast til frama fyri samfelagið. Í staðin átti landsstýrið at gingið víðari fram eftir tí leið, sum undanfarna landsstýri gekk. Minnilutin setir fram broytingaruppskot landsstýrisins. Har aftur ímóti kann minnilutin taka undir við teimum ájourføringum í lóg um íløgugrunnar, sum landsstýrið hevur uppskot um (at hækka kr. 1.200,- upp í kr. 4.000,-), og í avskrivingarlógini, sum Fólkaflokkurin hevur uppskot um (at hækka kr. 50.000 til kr. 80.000). Minnilutin kann ikki taka undir við uppskoti landsstýrisins, og heldur ikki við uppskoti Fólkafloksins, um skatting av vinningi í samband við sølu av bygningum. Minnilutin tekur tó undir við tí broyting, at ein negativ saldo frá skipum eisini kann nýtast til avskriving upp á rakstrargøgn uppi á landi eins til ávísar bygningar, eins og negativ saldo frá rakstrargøgnum eisini kann nýtast til avskrivingar upp á ávísar bygningar.

**Løgtingsmál nr. 39/1985:** Umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag.

Í staðin fyri at samtykt eina langa serstaka lóg um hesi viðurskifti, so kundi spurningurin verið loystur við einari minni broyting av § 21, 4. stk. í skattalógini. Tær einstøku reglurnar í fyriliggjandi lógaruppskoti gera tað nakað truplari fyri vinnuni at umskipa virkir til partafeløg, uttan at hetta í serligan mun gagnar tí almenna ella heildini annars.

**Løgtingsmál nr. 40/1985:** Skattur av vinningi í sambandi við sølu av virðisbrøvum.

Minnilutin metir hetta uppskot vera púra óneyðugt. Tá talan er um spekulatión í sambandi við nýstovnan av partafeløgum, sum í ein ávísan mun ivaleyst hevur funnið stað, er nóg mikið at gera eina lítla broyting í verandi lógarreglu. Sambandsflokkurin skjýtur upp, at galdandi 2 ára regla verður broytt soleiðis, at vinningur við sølu av partabrøvum, har partafelagið er minni enn tvey ára gamalt, verður skattskyldugur. Henda reglan loysir sjálvan spurningin, men gevur annars ikki smáum og støtri partaeigarum teir praktisku trupulleikar, sum landsstýrisuppskotið kemur at geva.

**Løgtingsmál nr. 34/1985:** Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v. m.

Í uppskotinum leggur Fólkaflokkurin upp til eina prinsippbroyting í okkara skattalóggávu, sum minnilutin metir sera vandamikla. Eftir uppskoti Fólkafloksins skal ein vinnulívsmaður sleppa at avgera, um hann rekur skattliga ella ikki skattliga vinnu. Tá ein bygningur verður keyptur, skal keyparin siga frá, um hann ynskir at avskriva og gjalda skatt við sølu av bygninginum, ella um hann ikki ynskir at avskriva og fáa skattafrían vinning burturúr søluni av bygninginum.

Fyri tað fyrsta kann minnilutin ikki medvirka til skatting av vinningi upp á vinnulívsbygningar. Fyri tað næsta vil minnilutin ávara løgtingið ímóti yvirhøvur at koma inn á eina sovorðna lóggávu. Hvat hevði tað næsta uppskotið blivið. Ivaleyst at ein ikki skal skatta av yvirskoti, um ein letur vera við at draga rakstrarútreiðslurnar frá.

Út frá hesum viðmerkingum setir minnilutin fram soljóðandi

## Broytingaruppskot

til uppskot landsstýrisins:

| | |
|---|---|
| Í II, § 1 verður í staðin fyri: | I II, § 1 indsættes i stedet for |
| »49% av inntøkuni« sett: | »49% af indtægten«: |
| »25% av teimum fyrstu kr. 100.000, | »25% af de første kr. 100.000, 35% |
| 35% av teimum næstu kr. 200.000, | af de næste kr. 200.000, 45% af de |

45% av teimum næstu kr. 200.000 og 49% av inntøkuni oman fyri kr. 500.000.«

næste kr. 200.000 og 49% af indtægten over kr. 500.000.«

Í løgtingslóg nr. 86 um landsskatt og kommunuskatt verður skoytt uppí í § 27:

»Verður partabræv selt áðrenn 2 ár aftan á stovnanina av viðkomandi partafelag, er ágóði við søluni at rokna sum skattskyldug inntøka.«

»Hvis en aktie sælges, førend 2 år efter etableringen af vedkommende aktieselskab, er fortjeneste ved salg at regne som skattepligtig indtægt.«

2. viðgerð 13. februar 1986. Viðgerðin var felags fyri málini 38, 39, 40 og 34. Uppskot I: §§ 1 og 2 til pkt. 10 vórðu samtyktar við 17-1 atkvøðum, pkt. 11 og 12 vórðu samtykt við 17-1, § 2 varð samtykt við 17-8. Uppskot II: § 1 varð samtykt við 17-7. § 2 varð samtykt við 17-9, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð, varð samtykt við 17-9 atkvøðum. Uppskot III: § 1 varð samtykt við 29-0, § 2 varð samtykt við 17-5, at málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt, varð samtykt við 17-1. Uppskot IV: § 1 varð samtykt við 17-1.

Málið varð aftur beint í skattanevndina, sum 20. mars 1986 legði fram soljóðandi:

**Álit II**

Undir viðgerðini tann 13. í hesum varð samtykt at beina málið aftur í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen og Hilmar Kass) setir í staðin fyri uppskotið frá landsstýrinum og uppskotið í fyrra álitinum fram fylgjandi:

**I**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.**

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. sep-

**lagtingslov om ændringer i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.**

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 86 af 1. septem-

tember 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinri broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður sett sum nýtt nr. 15:
»15) Íløgufeløg, í tann mun tey hava inntøku av vinnu, her uppií vinning við keyp og sølu av virðisbrøvum, rentutilskriving, v. m.«

2. Í § 2, stk. 1, verður sett sum litra g):
»g) fáa vinningsbýti úr Føroyum.«

3. Í § 21, verður 4. stk. orðað soleiðis:
**4. stk.** Partafelag skal yvirtaka ognir frá verandi virki til handilsvirði. Persónliga rikið vinnuvirki kann tó umskipast til nýstovnað partafelag eftir reglunum ásettar í løgtingslóg um umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag.«

4. Í § 27, 2. punktum ganga orðini »skip eins og« út.

5. Í § 29 verður sett nýtt nr. 15:
»15) Rentutilskriving av innilæstum dýrtíðarviðbótum, sambært lóg nr. 7 frá 9. januar 1980 um »lønmodtagernes dyrtidsfond.«

6. § 31, d) verður broytt soleiðis:
»d) Peningur, sum í útgerðarstarvi á sjónum verður lagdur niðurfyri til

ber 1983 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 1 indsættes som nyt nr. 15:
»15) Investeringsforekomster, i det omfang, de har indtægter af erhverv, herunder fortjeneste ved køb og salg af værdipapirer, rentetilskrivning m. v.«

2. I § 2, stk. 1 indsættes som litra g):
»g) får udbytte fra Færøerne.«

3. § 21, stk. 4 affattes således:
»**Stk. 4.** Et aktieselskab skal overtage aktiver fra eksisterende virksomheder til handelsværdien. Personligt ejet virksomhed kan dog omdannes til et nystiftet aktieselskab efter bestemmelserne fastsat i lagtingslov om omdannelse af personligt ejet erhvervsvirksomhed til aktieselskab.«

4. I § 27, 2. punktum udgår ordene »skibe samt«.

5. I § 29 sættes som nr. 15:
»15) Rentetilskrivning af indefrosne dyrtidsportioner, jfr. lov nr. 7 af 9. januar 1980 om lønmodtagernes dyrtidsfond.«

6. § 31, litra d, affattes således:
»d) beløb, som ved rederi eller fangstvirksomhed på havet henlægges til klassi-

klassingar og umvælingar av skipi. Hesar avsetingar tilsamans kunnu í nesta lagi verða 10% av tí fyrstu 1.000.000 kr. av útvegannarvirðinum og 5% av útvegannarvirðinum omanfyri 1.000.000 kr. og kunnu bert verða gjørdar undir einum av vinningi í rakstri skipsins áðrenn gjørdar avskrivingar. Avsetingarnar skulu inntøkuførast aftur í seinasta lagi 4. inntøkuár aftaná avsetingarárið ella tað árið, skipið verður latið av hondum.

fikation og vedligeholdelse af skibe. Disse henlæggelser kan ialt højst andrage 10% af de første 1.000.000 kr. af anskaffelsesværdien og 5% af anskaffelsesværdien over 1.000.000 kr. og kan kun foretages samlet af overskud ved skibets drift før foretagne afskrivninger. Henlæggelserne skal indkomstføres igen senest 4. indkomstår efter hensættelsesåret eller det år, skibet bliver afhændet.«

7. Í § 33, nr. 7) verður »1. oktober« broytt til: »1. juli«.

7. I § 33, nr. 7, ændres »1. oktober« til: »1. juli«.

8. § 33, nr. 8 g) verður orðað soleiðis:

»g) Tær føstu upphæddir, ið nevndar eru í a) til f) verða ásettar av Likningarráðnum í seinasta lagi 1. juli galdandi fyri komandi inntøkuár.«

8. § 33, nr. 8, litra g, affattes således:

»g) De i a) til f) omtalte faste beløb fastsættes af Ligningsrådet senest 1. juli, som gældende for det kommende indkomstår.«

9. Sum nýggj § 35 a) verður sett:

»Tá í skattskyldug inntøka verður gjørd upp, verður søluppeningurin fyri »goodwill« tikin við sum skattskyldug inntøka søluárið.

**2. stk.** Keypspeningurin fyri »goodwill« sambært 2. stk. kann dragast frá í skattskyldugu inntøkuni við eins stórum upphæddum keypsárið og 9 næstkomandi ár.

**3. stk.** Ikki avskrivað »goodwill« sambært 2. stk. kann

9. Som ny § 35 a) indsættes:

»Ved opgørelse af den skattepligtige indkomst medregnes salgssummen for »goodwill« for det pågældende salgsår.

**Stk. 2.** Købesummen for »goodwill« ifølge stk. 1 kan fratrækkes i den skattepligtige indkomst med lige store beløb anskaffelsesåret og de efterfølgende 9 år.

**Stk. 3.** Den del af »goodwill«, der ikke er afskrevet

dragast frá í sølupeningi av »goodwill« ella dragast frá tað árið, virkið heldur uppat.«

10. Í § 62, 1. stk. verður skoytt uppí:
»Fyri inntøku, sum sambært avgerð líkningarráðsins ikki er A-inntøka, verður upplýsingarskyldan sambært § 118 varðveitt.«

11. Í § 110 verður sum nýtt 2. stk. sett:
»Líkningarraðnum er heimilað at kunna kommunalu líkningarvaldini um ognaruppgerðirnar.« Núverandi 2. og 3. stk. verða broytt til ávikavist 3. og 4. stk.«

12. Í § 147, nr. 2 ganga út orðini: »avgerðir eftir 60. gr., 3. og 4. stk., 63. gr., 4. stk., 68. gr., 80. gr. ella 82. gr.,« og í staðin verður sett: »avgerðir eftir § 62, 1. og 2. stk., § 68, § 69, § 72, 1. stk. og § 73.«

§ 2.

Reglurnar í § 35a fáa eisini gildi fyri sølu ella avhending av »goodwill« til partafeløg, sum eru innsend til skrásetingar 16. december 1985 ella seinni.

§ 3.

Lógin fær gildi frá og við 16. december 1985. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 23 frá 9. mai 1985 um broytingar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt úr gildi.

ifølge stk. 2, kan fratrækkes i salgssummen af »goodwill« eller fratrækkes det år virksomheden ophører.«

10. I § 62, stk. 1, tilføjes:

»For indtægt, der i henhold til Ligningsrådets afgørelse ikke er A-indtægt, opretholdes oplysningspligten i henhold til § 118.«

11. I § 110 indsættes som nyt stk. 2:
»Ligningfsrådet har hjemmel til at informere de kommunale ligningsmyndigheder om formueopgørelserne.« Nuværende stk. 2 og 3 ændres til henholdsvis 3. og 4. stk.

12. I § 147, nr. 2, udgår ordene »afgørelser efter prg. 60, stk. 3 og 4, prg. 63, stk. 4, prg. 68, prg. 80 eller prg. 82,« og i stedet indsættes: »afgørelser efter § 62, stk. 1 og 2, § 68, § 69, § 72, stk. 1 og § 73.«

§ 2.

Reglerne i § 35a træder også i kraft for salg eller afhændelse af »goodwill« til aktieselskaber, som er indsendt til registrering den 16. december 1985 eller senere.

§ 3.

Denne lov træder i kraft fra og med 16. december 1985. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 23 af 9. maj 1985 om ændringer i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

## II Uppskot

## til

**løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan við seinni broytingum verður § 5 orðað soleiðis:

»Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið nevnd eru í § 1, nr. 8 til 15 í somu lóg, og teimum í § 2 nevndu feløgum v.m., sum eru undir avmarkaðari skattskyldu, ásettur til 49% av inntøkunum til landskassa og kommunur. Skaturin verður býttur við 30% sum kommunuskattur og 70% sum landsskattur.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi fyri skattir, sum verða líknaðir á inntøkur í tí roknskaparárinum, sum endar í álmanakkaárinum 1986 ella seinni.

**lagtingslov om ændringer i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om fastsættelse af skat til landskassen med senere ændringer affattes således:

»Under henvisning til § 54 i kildeskatteloven udskrives skatten for dem, der er omhandlet i nævnte lov § 1, nr. 8-15 og for de i § 2 nævnte selskaber m.v., der er undergivet begrænset skattepligt, til 49% af indtægten til landskasse og kommune. Skatten fordeles med 30% som kommuneskat og 70% som landsskat.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft for skatter, som pålignes pä indtægter i det regnskabsår, som slutter i kalenderåret 1986 eller senere.

## III Uppskot

## til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um íløgugrunnar.**

§ 1.

Í § 3, 2. stk. í løgtingslóg nr. 50 frá 23. december 1971 um íløgugrunnar við seinni broytingum

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om investeringsfond.**

§ 1.

I § 3, stk. 2 i lagtingslov nr. 50 af 23. december 1971 om investeringsfond med senere ændringer

verður »1.200 kr.« broytt til: »4.000 kr.«

ændres »1.200 kr.« til »4.000 kr.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við 11. apríl 1985.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med 11. april 1985.

## IV Uppskot

## til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.**

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger m.v.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattligar avskrivingar v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2, 1. stk., 1. pkt. verður orðað soleiðis:
   »Skattlig avskriving verður gjørd undir einum fyri allar innleggingar og innrættingar í bygningum, tiknir í vinnuliga nýtslu áðrenn 1. januar 1983, og av maskinum, innbúgvi og tílíkum rakstrargøgnum, sum bert verða nýtt vinnuliga, og sum hoyra til vinnuvirki hins skattskylduga, samanber tó § 11, 2. stk.«
2. Í § 3, 1. stk. verður »1.200 krónum« broytt til »4.000 krónur.«
3. § 5, 1. stk. verður orðað soleiðis:
   »Er saldoin vorðin negativ av ti, atsølupeningur v.m. skal

§ 1.

I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. § 2, stk. 1, 1. pkt. formuleres således:
   »Skattemæssig afskrivning foretages under ét for samtlige de til en skattepligtig erhvervsvirksomhed hørende installationer og indretninger i bygninger taget i erhvervsmæssig brug før 1. januar 1983, og af maskiner, inventar og lignende driftsmidler, der udelukkende benyttes erhvervsmæssigt, jvnf. dog § 11, stk. 2.«
2. I § 3, stk. 1, ændres »1.200 kroner« til »4.000 kroner.«
3. § 5, stk. 1 formuleres således:

   »Er der som følge af, at salgssummen m.v. skal fradrages i

dragast frá í avskrivingargrundarlagnum, og er saldoin ikki rættað upp aftur á tann hátt, sum tilskilað er í 2. stk. ella við útveganum sambært hesum kapitli ella bygningum sambært § 17, 1. stk., litra a), í seinasta lagi næsta inntøkuár, skal saldoin rættast upp aftur soleiðis, at upphæddin verður roknað upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni fyri síðstnevnda inntøkuár.«

4. Í § 12, 2. stk., 1. punktum gongur út: »tó hægst tann upphædd, farið v.m. er útvegað fyri.«

5. § 12, 3. stk. verður orðað soleiðis:

»Er saldoin vorðin negativ av tí, at sølupeningurin m.v. skal dragast frá í avskrivingargrundarlagnum, og er saldoin ikki rættað upp aftur á tann hátt sum tilskilað er í § 5, 2. stk. ella við útveganum av skipum eftir hesum kapitli, rakstrargøgnum sambært 1. kap., ella vinnuligum bygningum sambært § 17, 1. stk., litrea a) í seinasta lagi næsta inntøkuár, skal saldoin rættast upp aftur soleiðis, at upphæddin verður roknað upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni fyri síðstnevnda inntøkuár.«

6. § 16b, 1. stk., pkr. 1) 2. punktum, verður orðað soleiðis:

»Harumframt kann avskrivast upp til 15% av avskrivingar-

afskrivningsgrundlaget, fremkommet en negativ saldo, og er denne ikke udlignet på den i stk. 2 anførte måde eller ved anskaffelser i henhold til dette kapitel eller erhvervsmæssige bygninger i henhold til § 17, stk. 1, litra a), senest i det næstfølgende indkomstår, skal saldoen udlignes helt derved, at beløbet medregnes ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst for sidstnævnte indkomstår.«

4. I § 12, stk. 2, 1. punktum udgår: »dog højst det beløb, fartøjet m.v. er anskaffet for.«

5. § 12, stk. 3 formuleres således:

»Er der som følge af, at salgssummen m.v. skal fradrages i afskrivningsgrundlaget, fremkommet en negativ saldo, og er denne ikke udlignet efter bestemmelserne i § 5, stk. 2, eller ved anskaffelse af skibe i henhold til dette kapitel, driftsmidler i henhold til kapitel 4 eller erhvervsmæssige bygninger i henhold til § 17, stk. 1, litra a) senest i det næstfølgende indkomstår, skal saldoen udlignes helt derved, at beløbet medregnes ved opgørelsen af den skattepligtige for sidstnævnte indkomstår.«

6. § 16b, stk. 1, pkt. 1, 2. punktum affattes således:

»Endvidere kan afskrives op til 15% af den avskrivningsberet-

bæra saldovirðinum, tó í mesta lagi 15% av aðrari inntøku við øllum frádráttum.«

7. Sum § 16c verður sett:
»Persónur, hvørs fulla skattskylda í Føroyum heldur uppat, og sum hevur avskrivaðav ognum, sum hann eigur uttanlands, skal rokna allar gjørdar avskrivingar upp í skattskyldugu inntøkuna í Føroyum, tað árið skattskyldan í Føroyum heldur uppat.

8. § 17 verður orðað soleiðis:
»skattlig avskriving eftir reglunum í § 20 kann verða gjørd fyri niðanfyri nevndu bygningar, sum verða nýttir vinnuliga:
a. Bygningar, sum verða nýttir til handverk og ídnað.

b. Gistingarhús burturav, ella bygningar til útleiging við minst 10 íbúðum, her íroknað neyðug skrivstova og goymsluhøli.
c. Aðrir bygningar, herundir skrivstovu- og goymslubygningar, har minst 75% av gólvviddini verða nýtt vinnuliga, her íroknað neyðug goymsluhøli.«

9. § 20, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Fyri bygningar nevndir í § 17, 1. stk. litra a) og b), kann útvegsmarárið og 9 næstkomandi inntøkuár verða gjørd skattlig avskriving við upp til 7% av útvegsmarpeninginum. Hvørt av fylgjandi inntøkuár-

tigede saldoværdi, dog højst 15% af anden indtægt med alle fradrag.«

7. Som § 16c sættes:
»Person, hvis skattepligt på Færøerne ophører, og som har afskrevet på aktiver, som han ejer i udlandet, skal i det år, skattepligten til Færøerne ophører, til den skattepligtige indkomst på Færøerne medregne de foretagne afskrivninger.

8. § 17 formuleres således:
»Skattemæssige afskrivninger efter reglerne i § 20 kan foretages på følgende bygninger, der benyttes erhvervsmæssigt.
a. Bygninger som udelukkende anvendes til håndværk og industri.
b. Hotel eller bygninger til udlejning med mindst 10 lejligheder, herunder medregnet nødvendige kontor og lagerlokaler.
c. Andre bygninger, herunder medregnet kontor- og lagerbygninger, hvor mindst 75% af etagearealet anvendes erhvervsmæssigt, herunder medregnet nødvendige lagerlokaler.«

9. § 20, stk. 1 formuleres således:

»På de i § 17, stk. 1, litra a) og b) nævnte bygningerkan der i anskaffelsesåret og hvert adf de nærmest følgende indkomstår foretages skattemæssig afskrivning med indtil 7% af anskaffelsessummen. I hvert

um kann skattlig avskriving verða gjørd upp við upp til 2% av útvegannarpeninginum. Útvegannarárið er tað inntøkuár, ið bygningurin verður fingin í hendur ella fullgjørdur og tikin í nýtslu til endamál, sum heimilar skattliga avskriving.

**2. stk.** Fyri bygningar, nevndir í § 17, 1. stk., litra c), kann útvegannarárið og 9 næstkomandi inntøkuár verða gjørd skattlig avskriving við upp til 4% av útvegannarpeninginum. Hvørt av fylgjandi inntøkuárum kann skattlig avskriving verða gjørd við upp til 1% av útvegannarpeninginum.

af de derefter følgende indkomstår kan skatemæssig afskrivning foretages med indtil 2% af anskaffelsessummen. Ved anskaffelsesåret forstås det indkomstår, hvori bygningen erhverves eller fuldføres og tages i brug til et formål, der berettiger til skattemæssig afskrivning.

**Stk. 2.** På de i § 17, stk. 1, litra c), nævnte bygninger, kan der i anskaffelsesåret og hvert af de nærmest følgende 9 indkomstår foretages skattemæssig afskrivning med indtil 4% af anskaffelsessummen. I hvert af de derefter følgende indkomstår kan skattemæssig afskrivning foretages med indtil 1% af anskaffelsessummen.

**10.** Sum nýtt 3. stk. verður sett:
»Somu reglur, sum nevndar eru í 1. og 2. stk., eru galdandi fyri bygningar, har útvegannarpeningurin er gjørdur upp eftir reglunum í § 27 A.«

**10.** Som nyt stk. 3 indsættes:
»Samme regler, som anført i stk. 1 og 2, er gældende for bygninger, hvis anskaffelsessum er opgjort efter reglerne i § 27 A.«

**11.** § 25, 1. stk. verður orðað soleiðis:
»Selur ella avhendar hin skattskyldugi bygning ella byggigrund, har bygningur stendur ella hevur staðið, sum kundi verið avskrivaður sambært § 17, 1. stk., litra a, sbr. § 20, so skal vinningurin verða roknaður upp í skattskyldugu inntøkuna, um hann ikki verður nýttur til endurútvegan av teimum í 1. kap. tilskilaðu rakstrargøgnum ella teimum í § 17, 1. stk., litra a) tilskilaðu

**11.** § 25, stk. 1 formuleres således:
»Sælger eller afhænder den skattepligtige bygning eller byggegrund, hvor der står eller hvorpå der har stået bygning, der afskrevet efter § 17, stk. 1, litra a), jfr. § 20, skal avancen medregnes i den skattepligtige indkomst, hvis den ikke anvendes til anskaffelse af de i kapitel 1 omhandlede driftsmidler eller de i § 17, stk. 1, litra a) omhandlede bygninger, senest i indkomståret, der

bygningum í seinasta lagi næsta inntøkuárið eftir søluárið. Møguligt hall kann ikki verða frádrigið í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni. Undantikin hesi reglu eru bygningur og byggigrund útvegað áðrenn 1. januar 1950.«

**12.** Sum nýtt 2. stk. í § 25 verður sett:

»Selur ella avhendir hin skattskyldugi bygning ella byggigrund, har bygningur stendur ella hevur staðið, sum kundi verið avskrivaður sambært § 17, 1. stk., litra b og c, sbr. § 20, so skal vinningurin verða roknaður upp í skattskyldugu inntøkuna í søluárinum. Møguligt hall kann ikki verða drigið frá í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni. Undantikin hesi reglu eru bygningar og byggigrund, útvegað áðrenn 1. januar 1950.«

2. stk. verður broytt til 4. stk.

**13.** Sum nýtt 3. stk. verður sett:

»Útvegannarpeningurin fyri teir í 1. og 2. stk. nevndu bygningar og byggigrundir skal prístalsviðgerast fram til seinasta ásetta prístal undan søludegnum sambært tær prístalsásetingar, ið galdandi hava verið síðani 1. januar 1950.«

**14.** § 27 verður orðað soleiðis:

»Útreiðslur til útvegan av byggigrund, byggibúning av sjálvari grundini og økinum uttanum, kunnu ikki verða roknaðar upp í útvegannarpeningin ella útreiðslur til

efterfølger salgsåret. Eventuelt tab kan ikke fradrages ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst. Undtaget fra denne lovbestemmelse er bygning og byggegrund, anskaffet før 1. januar 1950.«

**12.** Som nyt stk. 2 i § 25 indsættes:

»Sælger eller afhænder den skattepligtige bygning eller byggegrund, hvor der står eller har stået bygning, der kunne være afskrevet efter § 17, stk. 1, litra b og c, jfr. § 20, skal avancen medregnes i den skattepligtige indkomst i salgsåret. Eventuelt tab kan ikke fradrages ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst. Undtaget fra denne lovbestemmelse er bygning og byggegrund, anskaffet før 1. januar 1950.«

Stk. 2 ændres til stk. 4.

**13.** Som nyt stk. 3 indsættes:

»Anskaffelsessummen for de i stk. 1 og stk. 2 nævnte bygninger og byggegrunde skal pristalsreguleres frem til senest fastsatte pristal før salgsdagen efter de pristalsafsættelser, der har været gældende siden 1. januar 1950.«

**14.** § 27 affattes således:

»Udgifter til erhvervelse af byggegrund, byggemodning af grunden og det omkringliggende areal, kan ikke henregnes til anskaffelsessummen eller til forbedringsudgifter

ábøtur v.m. av avskrivingarbæra bygninginum.«

**15.** Sum § 27 A verður sett:

»Viðvíkjandi bygningum, sum eru tiknir í vinnuliga nýtslu 1. januar 1983 ella seinri, skal tann fulla upphæddin av innleggingum og avskrivingar leggjast afturat útvegannarpeninginum av bygningum og tann avskrivaði parturin av innleggingum og innrættingum, sum er avskrivaður sambært 1. kap. dragast frá. Tann soleiðis útroknaða upphæddin er tann avskrivingarbæri útvegannarpeningurin fyri bygningin í tí roknskaparári, sum endaði í 1985.

**2. stk.** Somu reglur sum í 1. stk. verða at galda fyri umbyggingar ella ábøtur, sum eru gjørdar í. januar 1983 ella seinni.«

**16.** Í § 31, stk. 1, verða orðini: »kapittul 1« broytt til: »kapittul 1-4«.

**17.** § 31, 2. stk. fellur burtur, og sum nýtt stk. verður sett:

»**2. stk.** Flytur skattskyldugur maskinur, innbúgv, skip, bygningar og líkar ognarlutir til eginnýtslu burturav annaðhvørt til vinnuliga nýtslu burturav ella til eginnýtslu og nýtslu í vinnu, verða slíkir flutningar í hesi lóg javnsettir við keyp av somu ognarlutum.«

**18.** § 31, 3. stk. fer úr gildi, og núverandi 4. stk. verður 3. stk.

m.v. af den afskrivningsberettigede bygning.«

**15.** Som § 27 A indsættes:

»Vedrørende bygninger, som er taget i brug 1. januar 1983 eller senere, skal det samlede beløb for installationer og indretninger før afskrivninger lægges til bygningens anskaffelsessum, og den del af installationer og indretninger, der er afskrevet iflg. kap. 1 fradrages. Det således udregnede beløb er bygningens anskaffelsessum i det regnskabsår, som sluttede i 1985.

**Stk. 2.** Samme regler som i stk. 1 er også gældende for ombygninger og forbedringer, som er foretaget 1. januar 1983 eller senere.«

**16.** I § 31, stk. 1, ændres »afsnit 1« til: »afsnit 1-4«.

**17.** § 31, stk. 2 ophæves, og som nyt stk. 2 indsættes:

»**Stk. 2.** Overfører en skattepligtig maskiner, inventar, skibe, bygninger og lignende formuegoder fra udelukkende privat benyttelse enten til udelukkende erhvervsmæssig benyttelse til både erhvervsmæssige og private formål, sidestilles sådanne overførelser i denne lov med køb af de pågældende formuegoder.«

**18.** § 31, stk. 3, ophæves, og nuværende stk. 4 bliver stk. 3.

§ 2.

Vinningur í samband við sølu ella avhending av ognarlutum til partafeløg, sum eru innsend til skrásetingar 16. december 1985 ella seinni, verður skattaður sambært ásetingunum í hesi lóg.

§ 3.

Lógin fær gildi frá og við 16. december 1985, tó fær broyting nr. 2) til § 3, 1. stk., gildi frá 11. apríl 1985 og broyting nr. 6) til 16b gildi frá 1. jannar 1985. Samstundis fer løgtingslóg nr. 21 frá 9. mai 1985 um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m. úr gildi.

§ 2.

Fortjeneste i forbindelse med salg eller afhændelse af aktiver til aktieselskaber, som er indsendt til registrering den 16. december 1985 eller senere, beskattes i henhold til bestemmelserne i denne lov.

§ 3.

Denne lov har gyldighed fra og med 16. december 1985, dog får ændring nr. 2) til § 3, stk. 1, gyldighed fra 11. april 1985 og nændring nr. 6) til 16b gyldighed fra den 1. januar 1985. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 21 af 9. maj 1985 om ændring i lagtingslov om skatlige afskrivninger m. v.

Minnilutin (Jógvan Sundstein og Agnar Nielsen) vísir til tað, sum hann hevur ført fram í fyrra álitinum.

Framhaldandi 2. viðgerð 21. mars. Í staðin fyri uppskot landsstýrisins og uppskotið í áliti I við broytingum, kom álit II til viðgerðar:

**Uppskot I:**
§ 1 til stk. 10 varð samtykt við 17-0, § 1, 11. stk. samtykt við 17-1, § 1, stk. 12 varð samtykt við 17-0. § 2 samtykt við 17-5, § 3 varð samtykt við 17-6.

**Uppskot II:**
§ 1 varð samtykt við 17-0, § 2 samtykt við 17-0. II varð við 17-0 atkvøðum samtykt at fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

**Uppskot III:**
§ 1 varð samtykt við 20-0, § 2 varð samtykt við 17-0. III varð við 19-0 samtykt at fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

**Uppskot IV:**
§ 1, 1. stk. varð samtykt við 17-0 atkvøðum, 2. stk. samtykt við 25-0 atkvøðum. § 1, stk. 3-18 vórðu samtykt við 17-0. §§ 2 og 3 vórðu ávikavist við 17-4 og 17-3 samtyktar. Soleiðis samtykt varð uppskot IV samtykt at fara til 3. viðgerð.

3. viðgerð 17. apríl. Uppskot I varð samtykt við 17-0, II við 17-1 og III við 17-0. Uppskot IV varð samtykt við 17 ja-atkvøðum, 1 nei-atkvøðu, 13 atkvøddu ikki, ein var burturstaddur.

Atkvøtt varð við navnakalli solciðis:

| | |
|---|---|
| Ja atkvøddu: | Henrik Old,<br>Sverre Midjord,<br>Tórálvur M. Olsen,<br>Jona Henriksen,<br>Jákup Lindenskov,<br>Poul J. Olsen,<br>Jørgen Thomsen,<br>Tummas Arabo,<br>Asbjørn Joensen,<br>Hilmar Kass,<br>Signar Hansen,<br>Hergeir Nielsen,<br>Heine O. Heinesen,<br>Karin Kjølbro,<br>Øssur av Steinum,<br>Erlendur Patursson,<br>Tordur Niclasen. |
| Nei atkvøddi: | Eyðun Viderø. |
| Atkvøddu ikki: | Óli Breckmann,<br>Olaf Olsen,<br>Svend Aage Ellefsen,<br>Jógvan Sundstein,<br>Poul Michelsen,<br>Jutta Midjord,<br>Ivan Johannesen,<br>Flemming Mikkelsen,<br>Agnar Nielsen,<br>Jógvan Olsen,<br>Johs. M. Olsen,<br>Dánjal Larsen,<br>Adolf V. Hansen. |
| Burturstaddur: | Anfinn Kallsberg. |

F. L. j. nr. 430-12-45-16. Lógirnar nr. 74, 75, 76 og 77 frá 12. juni 1986.

# 39. Umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag

Ár 1985, mánadagin 16. december legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag.**

§ 1. Tá eitt persónliga rikið vinnuvirki verður umskipað til eitt partafelag, sum verður skrásett í Føroyum, hevur ánarin (ánararnir) rætt til at nýta reglurnar í hesari lóg ístaðin fyri tær vanligu reglurnar í skattalóggávuni.

§ 2. Treytirnar fyri at nýta reglurnar í hesari lóg eru, at

a) ánarin hevur fulla skattskyldu sambært § 1 í lóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt,
b) minst 75% av samsýningini fyri vinnuvirkið verða latin sum partabrøv,
c) áljóðandi virðið av teimum partabrøvunum, ið verða veitt sum samsýning fyri vinnuvirkið, skal svara til samlaða partapeningin,
d) umskipanin fer fram í seinasta lagi 6 mánaðir aftan á tann í § 3 tilskilaða dag.

**lagtingslov om omdannelse af personligt ejet virksomhed til aktieselskab.**

§ 1. Når en personligt ejet virksomheds omdannelse til et aktieselskab, der indregistreres på Færøerne, har ejeren (ejerne) ret til at benytte bestemmelserne i denne lov i stedet for de almindelige bestemmelser i skattelovgivningen.

§ 2. Betingelserne for at benytte bestemmelserne i denne lov er, at

a) ejeren har fuld skattepligt efter § 1 i lov nr. 86 af 1. september 1983 om landsskat og kommuneskat,
b) mindst 75% af vederlaget for virksomheden erlægges som aktier,
c) den pålydende værdi af de aktier, der ydes som vederlag for virksomheden, skal svare til den samlede aktiekapital,
d) omdannelsen finder sted senest 6 måneder efter den i § 3 angivne dag.

**2. stk.** Eiga fleiri persónar í felag eitt persónliga rikið vinnuvirki, eru treytirnar fyri at nýta reglurnar í hesari lóg -harumframt, at allir ánararnir

a) nýta reglurnar í hesari lóg,

b) hava nýtt sama roknskaparskeið, jbr. § 3,

c) í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni hava nýtt sama rakstrarroknskap og figgjarstøðu fyri vinnuvirkið við felags avskrivingum,

d) fáa samsýning í mun til teirra ognarlut í persónliga rikna vinnuvirkinum.

**3. stk.** Í samband við eina umskipan kunnu ein ella um neyðugt tveir nýggir partaeigarar seta pening í nýstovnaða partafelagið við í mesta lagi 1.000 kr. hvør.

**§ 3.** Dagfestingin av byrjannarfiggjarstøðuni, ið verður gjørd í sambandi við umskipanina, verður at rokna sum skattligi umskipannardagurin. Umskipannardagurin er tann dagurin, ið kemur eftir dagfestingina av figgjarstøðuni fyri síðsta árroknskapin hjá persónliga rikna vinnuvirkinum.

**2. stk.** Fyrsta roknskaparskeiðið hjá felagnum gongur frá umskipannardegnum og skal vera 12 mánaðir.

**§ 4.** Nýtir ánarin reglurnar í hesari lóg, verður vinningur ella tap í samband við umskipanina ikki tikið við í inntøkuuppgerðina hjá hinum skattskylduga.

**Stk. 2.** Ejer flere personer i forening en personlig drevet virksomhed, er betingelserne for at benytte bestemmelserne i denne lov desuden, at alle ejerne

a) benytter bestemmelserne i denne lov,

b) har benyttet samme regnskabsperiode jfr. § 3,

c) i den skattepligtige opgørelse af indkomsten har benyttet samme driftsregnskab og status for virksomheden med fælles afskrivninger,

d) får vederlag i forhold til deres andel — den personligt drevne erhvervsvirksomhed.

**Stk. 3.** I forbindelse med en omlægning kan en eller om nødvendigt to nye aktionærer indskyde et beløb i det nystiftede aktieselskab med højst 1.000 kr. hver.

**§ 3.** Dateringen af åbningsstatus, der bliver gjort i forbindelse med omdannelsen, anses som den skattemæssige omdannelsesdag. Omdannelsesdagen er den dag, der følger efter statusdagen for sidste årsregnskab i den personligt drevne virksomhed.

**Stk. 2.** Selskabets første regnskabsperiode løber fra omdannelsesdagen og skal være på 12 måneder.

**§ 4.** Benytter ejeren bestemmelserne i denne lov, medregnes fortjeneste eller tab i forbindelse med omdannelsen ikke i indtægtsopgørelsen hos den skattepligtige.

**2. stk.** Partabrøv, sum ánarin fær við umskipanina, verða virðissett til eina upphædd, ið svarar til tað skattligu virði av ognum og skuld virkisins á umskipannardegnum. Fær ánarin útistandandi skuld, jbr. § 5, 1. stk., góðskrivaða, tá umskipanin fer fram, verður áljóðandi upphæddin av hesari skuld ikki íroknað upphæddini, sum er nevnd í 1. pkt.

**3. stk.** Skattligu virðið á ognum og skuld virkisins verður uppgjørd til ta upphædd í reiðum peningi, ein vanlig søla av virkinum hevði givið (handilsvirðið) við frádrátti av skattskyldugum vinningi, sum hevði verið staðfestur, um selt varð til triðja persón. Líkningarráðið kann áseta nærri reglur fyri uppgerðina av skattligu virðinum á vinnuvirkinum.

**4. stk.** Við sjálvuppgávuni, ið verður latin inn fyri tað inntøkuárið, umskipanin fer fram, skal ánarin skrivliga boða líkningarvaldinum frá umskipanini og leggja við avrit av byrjannarfiggjarstøðuni og einari uppgerð, sambært 2. og 3. stk. fyri útvegannarvirðið á partabrøvunum. Líkningarvaldið ansar eftir, at treytirnar fyri at nýta reglurnar í hesari lógini eru loknar og ásetir útvegannarvirðið.

**5. stk.** Tær vanligu reglurnar í skattalóggávuni viðvíkjandi sjálvuppgávu, álíkning, kæru og grannskoðan o.a.m. eru eisini galdandi fyri avgerðir og álíkning líkningarvaldsins eftir hesari lóg.

**Stk. 2.** Aktier, som ejeren erhverver ved omdannelsen, vurderes til et beløb, der svarer til den skattemæssige værdi af virksomhedens aktiver og passiver på omdannelsesdagen. Modtager ejeren et tilgodehavende, jfr. § 5, stk. 1, da omdannelsen finder sted, fragår pålydendet af dette tilgodehavende dog i det i 1. pkt. anførte beløb.

**Stk. 3.** Den skattemæssige værdi af virksomhedens aktiver og passiver opgøres til det beløb i kontante penge, som et sædvanligt salg af virksomheden ville give (handelsværdien) med fradrag af skattepligtig fortjeneste, der ville være konstateret, hvis salget skete til tredie person. Ligningsrådet kan fastsætte nærmere bestemmelser for opgørelsen af den skattemæssige værdi af virksomheden.

**Stk. 4.** Med selvangivelsen, der indleveres for det indkomstår, omdannelsen finder sted, skal ejeren give skriftlig meddelelse til ligningsmyndigheden om omdannelsen bilagt kopi af åbningsstatus og en opgørelse for anskaffelsessummen for aktierne opgjort efter stk. 2 og stk. 3. Ligningsmyndigheden påser, at betingelserne for at benytte bestemmelserne i denne lov er opfyld og ansætter anskaffelsessummen.

**Stk. 5.** De almindelige bestemmelser i skattelovgivnigen vedrørende selvangivelse, påligning, kære og revision m.m. gælder også for ligningsmyndighedens afgørelser og påligning efter denne lov.

§ 5. Fær ánarin góðskrivað útistandandi skuld í felagnum í samband við umskipanina, skal áljóðandi virðið svara til tann partin av samsýningini, jbr. § 2, 1. stk., litra b, ið ikki verður veittur sum partabrøv.

**2. stk.** Verða upphæddir, ið stava frá hækkan av útistandandi skuld í felagnum vegna prístalshækking ella liknandi, útgoldnar til ánaran av umskipaða vinnuvirkinum ella til hjúnafelaga hansara, verða tær taldar við í uppgerðini av skattskyldugu inntøku móttakarans.

§ 6. Tá skattskylduga inntøka felagsins verður uppgjørd, skulu ognarlutir, ið felagið tók við, tá umskipanin fór fram, roknast sum útvegaðir av felagnum til somu tíðir og fyri somu útvegannarvirðir, teir verunliga vórðu útvegaðir fyri av fyrrverandi ánara. Skattligar avskrivingar og niðurskrivingar, ið fyrrverandi ánari hevur fram, skulu roknast sum framdar av felagnum í viðkomandi inntøkuári.

**2. stk.** Hevur fyrrverandi ánarin av vinnuvirkinum keypt ognarlut fyri at selja hann aftur við ágóða, ella søla av slíkum ognum fellur undir vinnu hansara, verður felagið, tá tað selur ognarlutin, skattað eftir teimum reglum, ið galda fyri tílík keyp.

**3. stk.** Hevur fyrrverandi ánarin í samband við upppgerðina av skattskyldugu inntøku sínari tíðarfest allar rentuinntøkur og rentu-

§ 5. Modtager ejeren et tilgodehavende i selskabet i forbindelse med omdannelsen, skal pålydendet svare til den andel af vederlaget, jfr. § 2, stk. 1, litra b, der ikke erlægges som aktier.

**Stk. 2.** Udbetales beløb, der stammer fra opskrivningen af tilgodehavendet som følge af prístalsforhøjelse eller lignende til ejeren af den omdannede virksomhed eller til dennes ægtefælle, skal de medregnes i opgørelsen af modtagerens skattepligtige indkomst.

§ 6. Ved opgørelsen af selskabets skattepligtige indkomst, skal formuegoder, som selskabet overtog, da omdannelsen fandt sted, regnes som anskaffet af selskabet på de samme tidspunkter og for samme anskaffelsesværdier, de faktisk blev anskaffet for af den hidtidige ejer. Skattemæssige afskrivninger, som den hidtidige ejer har foretaget, skal regnes som foretaget af selskabet i de pågældende indkomstår.

**Stk. 2.** Har den hidtidige ejer af virksomheden erhvervet et af virksomhedens formuegoder i spekulationshensigt eller som led i næring, beskattes selskabet ved afståelse af formuegodet efter de regler, der gælder, når erhvervelsen er sket på den nævnte måde.

**Stk. 3.** Har den hidtidige ejer i forbindelse med opgørelsen af sin skattepligtige indkomst periodiseret alle renteindtægter og rente-

útreiðslur, skal skattskylduga inntøka felagsins uppgerast á sama hátt.

**4. stk.** Vinningur ella tap av sølu ella innloysan av virðisbrøvum, ið felagið tekur við eftir fyrrverandi ánaraan í samband við umskipanina, verður viðgjørt eftir somu reglum, sum høvdu verið nýttar, um vinningurin ella tapið stóðst hjá fyrrverandi ánaranum.

§ 7. Ónýttar avsetingar til íløgugrunnar og tey tilhoyrandi innskot, sum framd eru av ánaranum, kunnu flytast fult ella partvist í felagið. Um einans ein partur av avsetingunum verður fluttur, verða tær fyrstu avsetingarnar at rokna sum fluttar felagnum.

**2. stk.** Tær fluttu avsetingarnar verða roknaðar at vera avsettar av felagnum í teimum árunum, avsetingarnar eru gjørdar. Um eftirskatting sambært § 10, 1. og 2. stk. í lóg um íløgugrunnar verður gjørd fyri inntøkuár, ið liggja fyri stovning felagsins, skulu tær fluttu avsetingarnar inntøkuførast í fyrsta roknskaparári felagsins.

§ 8. Vísir roknskapurin sambært figgjarstøðuna í seinasta roknskaparárinum eitt hall, kann tað ikki dragast frá í uppgerðini av skattskyldugu inntøku felagsins.

§ 9. Lógin fær gildi frá 1. januar 1986. Lógin fær gildi fyri umskipanir, ið fara fram við gildi frá

udgifter, skal selskabets skattepligtige indkomst opgøres på samme måde.

**Stk. 4.** Fortjeneste eller tab ved afhændelse eller indfrielse af værdipapirer, som selskabet overtager efter den hidtidige ejer i forbindelse med omdannelsen, behandles efter samme bestemmelser, der ville være anvendt, såfremt fortjenesten eller tabet var opstået hos de hidtidige ejere.

§ 7. Ubenyttede henlæggelser til investeringsfonds og de tilhørende indskud, der er foretaget af ejeren, kan overføres helt eller delvis til selskabet. Overføres kun en del af henlæggelserne, regnes de første henlæggelser som overført til selskabet.

**Stk. 2.** De overførte henlæggelser betegnes som om de var foretaget af selskabet i henlæggelsesårene. Såfremt efterbeskatning efter § 10, stk. 1 og 2 i lagtingslov om investeringsfonds, foretages for indkomstår, der ligger før selskabets stiftelse, skal de overførte henlæggelser indkomstføres i selskabets første regnskabsperiode.

§ 8. Foreligger der på statusdagen fra sidste årsregnskab et underskud, kan dette ikke bruges til fradrag ved opgørelsen af selskabets skattepligtige indkomst.

§ 9. Denne lov træder i kraft den 1. januar 1986 og får gyldighed for omdannelser, der finder sted med

| | |
|---|---|
| árslok av inntøkuárinum 1985 ella seinni. | udgangen af indkomståret 1985 eller senere. |

**Viðmerkingar:**

Lagt er fram lógaruppskot um broyting í § 21, 4. stk. í samtíðarskattalógini, sum er ein serregla fyri partafeløg.

Sambært nevnda broytingaruppskot skal eitt partafelag — nýstovnað eins og verandi partafelag — yvirtaka ognir í verandi vinnuvirki til handilsvirðið.

Er talan hin vegin um eitt nýstovnað partafelag, kann tað velja at yvirtaka ognirnar frá einum persónliga riknum vinnuvirki til skattliga bókført virði, treytað av at reglurnar í hesum lógaruppskotinum verða fylgdar.

Við teimum broytingunum í skattalóggávuni, ið samtyktar vórðu á tingi í vár, verður staðfestur kapitalvinningur við sølu av rakstrargøgnum, skipum og bygningum til vinnulig endamál skattaður sum vanlig inntøka. Eisini varð tá ásett, at sølupeningur fyri »goodwill« verður skattaður sum vanlig inntøka. Umframt umrødda kapitalvinningsskatt kann skattur av afturvunnum avskrivingum eisini koma upp á tal, tá selt verður.

Hesar júst nevndu skattareglur verða eisini galdandi, um ognirnar skulu yvirtakast til handilsvirðið, tá ein persónur umskipar persónliga rikna vinnuvirki sítt til eitt partafelag, hann sjálvur gerst høvuðspartaeigari í.

Landsstýrið heldur tað vera rimiligt, at møguleiki er til staðar í ávísum førum, at persónliga rikin vinnuvirki kunnu umskipast til nýstovnað partafeløg, uttan at ánarin verður skattaður av hesi orsøk.

Tørvur kann t. d. vera á hesum møgulcika, tá generatiónsskifti fer fram, tá tað mangan er lættari at avhenda eitt virki í partafelagsformi til næstu generatión, uttan at raksturin verður ávirkaður í alt ov stóran mun.

Sambært fyriliggjandi lógaruppskot kann eitt persónliga rikið vinnuvirki umskipast til eitt nýstovnað partafelag, uttan at umskipanin fær skattligar fylgjur fyri fyrrverandi ánaran. Skipanin er grundað á eina sokallaða »successións-reglu«, ið merkir, at felagið í øllum lutum tekur við skattligu viðurskiftum fyrrverandi ánarans, hvat virkinum viðvíkur. Hetta merkir, at umskipanin ikki førir skattlegging við sær. Virkið heldur sostatt áfram, uttan at umskipanin fær skattligt árin. Tað einasta, ið hendir, er, at virkið broytir rættarsnið, og at fyrrverandi ánarin nú rekur virkið sum eitt partafelag mótvegis áður sum eitt persónliga rikið virki.

Hin vegin skal felagið gjalda skatt, um vinningur verður staðfestur, afturvunnar avskrivingar íroknaðar, tá felagið seinni selur ein av ognarlutunum ella virkið alt. Somuleiðis kann talan vera um at gjalda skatt, um fyrrverandi ánarin selur partabrøvini við vinningi, hann eigur í felagnum.

Reglurnar í hesum lógaruppskoti kunnu eisini nýtast, tá fleiri persónar í

felag eiga eitt persónliga rikið vinnuvirki. Í hesum førum eru neyvari treytir ásettar.

Tá hetta lógaruppskotið verður samtykt, er sum áður nevnt framvegis møguligt at umskipa eitt persónliga rikið vinnuvirki eftir teimum vanligu reglunum í skattalóggávuni, jbr. 1. pkt. í § 21, 4. stk. í samtíðarskattalógini. Í hesum føri skal vinningur ella tap, uppgjørt við handilsvirðinum sum grundarlag, teljast við í skattskyldugu inntøkuna hjá fyrrverandi ánaranum, meðan felagið hinvegin útvegar ognirnar til samsvarandi virði.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinarnar.**

**Til § 1:**

Tað er ein treyt, at vinnuvirkið verður umskipað til eitt partafelag, sum verður skrásett í Føroyum.

Ánarin kann velja at umskipa vinnuvirkið til eitt partafelag sambært teimum vanligu galdandi reglunum í skattalóggávuni, tá avhendað verður til triðja persón, t.m. avhending til handilsvirðini. Ánarin kann vera áhugaður fyri, at tap, ið kann dragast frá, verður staðfest, tá avhendingin fer fram, ella at felagið útvegar teir einstøku ognarlutirnar fyri eitt høgt virði. Í hesum førum kann útvegannarpeningurin fyri partabrøvini eisini vera hægri. Tað ber ikki til at nýta reglurnar í hesum lógaruppskotinum til ávísar ognarlutir, meðan tær vanligu skattalógarreglurnar verða nýttar til aðrar ognarlutir í virkinum.

**Til § 2:**

Reglan ásetir fleiri treytir, ið lúkast skulu, tá umskipað verður eftir hesum lógaruppskoti.

Ein treytin er, at fyrrverandi ánarin hevur fulla skattskyldu sambært § 1 í samtíðarskattalógini. Sostatt kemur ikki persónur, ið hevur avmarkaða skattskyldu ella ikki hevur skattskyldu í Føroyum, undir reglurnar í lógaruppskotinum.

Ein onnur treyt fyri at umskipa eftir hesum reglunum er, at talan er um eitt verandi vinnuvirki. Tá støða skal takast til spurningin, hvørt talan er um at yvirtaka eitt verandi virki, ella einans ein ella ávísar ognarlutir, skulu umstøðurnar í tí einstaka førinum vera avgerandi.

Í minsta lagi 75% av samsýningini fyri vinnuvirkið skulu latast sum partabrøv í felagnum.

Tey partabrøvini, ið verða veitt sum samsýning fyri vinnuvirkið, skulu svara til tann samlaða partapeningin í felagnum. Sostatt kunnu ikki aðrir enn fyrrverandi ánarin gerast partaeigarar í nýstovnaða partafelagnum. Hetta kemst av, at áðurnevnda successiónsreglan ber í sær, at tann lutfalsligi ognarluturin í partafelagnum verður hin sami, sum í persónliga rikna virkinum.

Møgulciki er fyri at umskipa virkið við afturvirkandi gildi. Sambært uppskotinum kann umskipanin fara fram í seinasta lagi 6 mánaðir aftaná umskipannardagin. Hesin er sambært § 3 tann dagurin, ið kemur eftir dagfestingina av figgjarstøðuni fyri síðsta ársroknskapin hjá persónliga rikna vinnuvirkinum.

Reglurnar í hesum lógaruppskotinum kunnu eisini nýtast, tá fleiri persónar í felag eiga eitt persónliga rikið vinnuvirki. Í hesum førum verða tær treytir lagdar afturat, at allir ánararnir nýta reglurnar í hesum uppskotinum, at teir hava nýtt sama roknskaparskeið og -grundarlag og harvið gjørt lutfalsliga eins stórar avskrivingar.

Harumframt skulu teir samsýnast í mun til teirra ognarlut í persónliga rikna vinnuvirkinum.

Í galdandi partafelagslóg — rikislóg nr. 123 frá 15. apríl 1930 — er ásett, at minst triggir persónar skulu til at stovna eitt partafelag, og at somu persónar skulu tekna í minsta lagi ein part og í minsta lagi fyri 500 kr. Eisini fyriskipar partafelagslógin, at meginreglan er, at ikki færri enn triggir partaeigarar skulu eiga eitt partafelag.

Fyri ikki at bera ímóti nevndu ásetingum í partafelagslógini er í hesum lógaruppskoti neyðugt at fyriskipa regluna, sum ásett er í 3. stk. í § 2. Í teimum førum talan er um at umskipa einstaklingavirki, ella tá tveir persónar eiga eitt vinnuvirki í felag, verður sostatt, sambært krøvunum í partafelagslógini neyðugt at lata tveir ávikavist ein persón afturat gerast partaeigarar, tó í mesta lagi við einum partabrævi við áljóðandi virði upp á 1.000 kr.

Reglan er einans ásett fyri at lúka krøvini í partafelagslógini og hevur tískil ikki annað endamál í samband við eina umskipan av einum persónliga riknum vinnuvirki eftir hesum lógaruppskoti. Nevndu persónar kunnu einans taka lut við einum parti upp á 500 kr. og broyta sostatt ikki tey upprunaligu ognarviðurskiftini.

**Til § 3:**

Dagurin fyri byrjannarfiggjarstøðuna hjá felagnum er dagurin eftir dagfestingina av figgjarstøðuni fyri síðsta ársroknskapin hjá persónliga rikna virkinum og nevnist umskipannardagurin. Fyrsta roknskaparskeiðið hjá felagnum gongur frá umskipannardegnum og skal vera 12 mánaðir.

Fellur inntøkuárið saman við álmanakkaárinum, er umskipannardagurin sostatt 1. januar og umskipanin, t. e. stovnanin av felagnum, skal fara fram fyri 1. juli í hesum árinum.

**Til § 4:**

Tá fyrrverandi ánarin umskipar virkið sítt eftir reglunum í hesum lógar-

uppskotinum, verður vinningur ella tap í samband við umskipanina ikki tikið við í inntøkuppgerðina hjá hinum skattskylduga.

Fyrrverandi ánarin skal í staðin, um hann avhendar partabrøvini innan 3 ár, gjalda skatt av vinninginum, afturvunnar avskrivingar íroknaðar, ið annars hevði verið skattlagdur við vanligari avhending, tá umskipanin fór fram.

Tílík skattlegging skal fremjast við, at tað skattliga útvegannarvirðið á partabrøvunum verður uppgjørt sum tað skattliga virði á ognum og skuld virkisins. Tað skattliga virðið svarar til tað kontanta virðið á ognum og skuld virkisins við frádrátti av skattskyldugum vinningi, sum hevði verið staðfestur, um virkið varð selt kontant. Nevndi háttur at gera virðini upp, svarar í flestu førum til tað skattliga bókaða virðið.

Verða avsetingar til iløgugrunnar yvirtiknar, skal øll avsetingar-upphæddin ganga inn sum skuld. Henda upphæddin verður roknað at svara til handilsvirðið.

**Til § 5:**

Fyrrverandi ánarin hevur møguleika fyri at fáa cin part av frivirðinum í virkinum samsýndan sum útistandandi skuld í felagnum. Skotið verður upp, at umrødda skuld í mesta lagi kann vera 25% av teirri samlaðu samsýningini (skattligu virðunum).

Tann útistandandi skuldin skal hava navnvirði (pari), sum ber í sær, at áljóðandi virðið skal svara til tann lutfallsliga partin av skattligu virðunum. Hetta er galdandi, uttan mun til, hvørjar treytir annars verða avtalaðar í samband við ta útistandandi skuldina. Sostatt ber ikki til at niðurskriva gangvirðið (kursin) á einum tílíkum skuldarbrævi. Er avtala gjørd um prisjavning av útistandandi skuldini, verða upphæddir, ið stava frá hesum hækkingum av skuldini, skattaðar sum vanlig inntøka, tá tær verða útgoldnar til fyrrverandi ánaran ella hjúnafelaga hansara.

**Til § 6:**

Í hesari greinini er nærri ásett, hvussu skattskylduga inntøka felagsins skal gerast upp samsvarandi framman fyri umrøddu »successións-reglu«.

**Til § 7:**

Her er at viðmerkja, at tær fluttu avsetingarnar verða roknaðar at vera avsettar av felagnum til somu tíðir, sum tann fyrrverandi ánarin setti tær av, hóast felagið ikki var stovnað, tá avsetingarnar vórðu framdar. Eftirskatting av avsetingunum fyri avsetingarárini fer fram, um so er, at felagið fer á húsagang ella avhendir virkið.

**Til § 8:**
Skattligt hall, ið ikki er frádrigið, kann ikki yvirtakast av felagnum. Hetta kemst av, at tað í monguin førum er ómøguligt at gera upp, hvørt hallið stavar frá tí umskipaða virkinum ella frá øðrum virksemi hjá skattgjaldaranum, t.d. virksemi, ið ikki kemur undir vinnu hansara, m.a. rentuútreiðslur av privatari skuld.

**Til § 9:**
Skotið er upp, at lógin fær gildi fyri umskipanir, ið fara fram við gildi frá árslok av inntøkuárinum 1985 ella seinni. Ein umskipan kann einans fara fram, tá eitt inntøkuár endar. Hevur fyrrverandi ánarin nýtt álmanakkaárið sum inntøkuár, kann ein umskipan sostatt fara fram við gildi frá árslok av álmanakkaárinum 1985. Fyrsta roknskaparár felagsins skal tí fella saman við álmanakkaárinum 1986. Umskipanin (stovnanin av nýggja felagnum) skal fara fram áðrenn 6 mánaðir aftaná umskipannardagin, jbr. § 3, t.m. fyri 1. juli 1986.

1. viðgerð 14. januar 1986. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmálunum 39: Umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag, 40: Skattur av vinningi í sambandi við sølu av virðisbrøvum og 34: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar, og vórðu tey øll beind í skattanevndina, sum 4. februar legði fram felagsálit, sí løgtingsmál nr. 38: Broytigar í skattalógunum.

2. viðgerð 13. februar 1986. § 1 og §§ 2-9 vórðu samtyktar við 17-1 atkvøðum. Eisini varð við 17-1 atkvøðum samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 24. februar 1986. Atkvøðugreiðsla 21. mars. Málið endaliga samtykt við 17-1 atkvøðum.

F. L. j. nr. 430-12-45-16. Lóg nr. 47 frá 2. mai 1986.

# 40. Skattur av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum.

Ár 1985, mánadagin 16. december, legði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, fram soljóðandi

# Uppskot

## til

**løgtingslóg um skatt av vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum.**

§ 1.

Reglurnar í hesi lóg um virðisbrøv fevna um partabrøv, pantibrøv, lánsbrøv og lutaprógv v.m.

**2. stk.** Vinningur ella tap í samband við avhending og sølu av virðisbrøvum verður roknað uppí í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni sambært reglunum í hesi lóg. Sama er galdandi fyri vinning ella tap, ið stendst av at siga frá sær ella avhenda serstøk tilknýti til virðisbrævið.

**3. stk.** Ásannaður vinningur ella tap við útluting, ið stendur í samband við avtøku asv virki, verður í tí álmanakkaári, felagið endaliga er tikið av, viðgjørt skattliga eftir reglunum í hesi lóg.

**4. stk.** Skattskyldan áliggur øllum teimum persónum, feløgum, stovnanum, deyðsbúgvum og grunnum v.m., sum í tí løtu, tey hava ásannað vinning ella tap við sølu av virðisbrøvum, eru undir fullari skattskyldu í Føroyum.

§ 2.

Vinningur í samband við sølu av virðisbrøvum verður roknaður upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni, tá ið hin skattskyldugi hevur útvegað virðisbrøvini minni

**lagtingslov om skat af fortjeneste i forbindelse med salg af værdipapirer.**

§ 1.

Bestemmelserne i denne lov omfatter aktier, pantebreve, gældsbreve og andelsbeviser m.v.

**Stk. 2.** Fortjeneste eller tab i forbindelse med afståelse og salg af værdipapirer medregnes i opgørelsen af den skattepligtige indtægt efter bestemmelserne i denne lov. Det samme er gældende for fortjeneste eller tab, der opstår i forbindelse med afkald på eller afhændelser af særlige rettigheder, der har tilknytning til værdipapiret.

**Stk. 3.** Konstateret fortjeneste eller tab ved udlodning, der har forbindelse med likvidation af virksomhed, skal, i det kalenderår, selskabet bliver opløst, beskattes efter bestemmelserne i denne lov.

**Stk. 4.** Skattepligten påhviler alle de personer, selskaber, institutioner, dødsboer og fonds m.v., som på det tidspunkt man har konstateret fortjeneste eller tab ved salg af værdipapirer, er undergivet fuld skattepligt på Færøerne.

§ 2.

Fortjeneste i forbindelse med salg af værdipapirer medregnes ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst, hvis den skattepligtige har erhvervet værdipapirerne

enn 3 ár frammanundan, at sølan er farin fram.

**2. stk.** Tap við sølu av virðisbrøvum, sum eru útvegað minni enn 3 ár frammanundan at sølan er farin fram, kann bert dragast frá í staðfestum vinningi av virðisbrøvum. Tapið kann dragast frá 3 tey næstu árini. Í hesum tíðarskeiði kann tapið einans flytast til frádrátt fyri eitt seinni inntøkuár, treytað av, at tað ikki rúmast innan fyri ein møguligan nettovinning í samband við sølu av virðisbrøvum í einum inntøkuári frammanundan.

**3. stk.** Vinningur ella tap í samband við sølu av virðisbrøvum verður gjørt upp ájavnt við munin millum útvegannarupphædd og søluupphædd fyri avvarðandi virðisbrøv. Virðisbrøv í grunnum, umframt serstøk rættindi, sum hava tilknýti til tílík virðisbrøv, verða roknað fyri at verða útvegað fyri 0 kr.

§ 3.

Vinningur ella tap í samband við sølu av virðisbrøvum, sum eru útvegað sum liður í vinnuliga virksemi skattgjaldarans, verður roknað upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni.

§ 4.

Vinningur ella tap í samband við sølu av virðirbrøvum, sum er staðfest meira enn 3 ár eftir, at virðisbrøvini eru útvegað, verður ikki roknað upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni, sbr. tó § 3.

mindre end 3 år, før salget er sket.

**Stk. 2.** Tab ved salg af værdipapirer, der er erhvervet mindre end 3 år, før salget er sket, kan kun fradrages i konstateret fortjeneste af værdipapirer. Tabet kan fradrages i de næste 3 år. I dette tidsrum kan tabet kun overføres til fradrag for et senere indkomstår på betingelse af, at det ikke kan rummes i en mulig nettogevinst i forbindelse med salg af værdipapirer i et foregående indkomstår.

**Stk. 3.** Fortjeneste eller tab i forbindelse med salg af værdipapirer opgøres lig med forskellen mellen anskaffelsesummen og salgssummen for det pågældende værdipapir. Værdipapirer, der tilhører fonds, foruden særlige rettigheder, der er tilknyttet sådanne værdipapirer, regnes som anskaffet for 0 kr.

§ 3.

Fortjeneste eller tab i forbindelse med salg af værdipapirer, som er anskaffet i forbindelse med skatteyderens erhvervsvirksomhed, medregnes ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst.

§ 4.

Fortjeneste eller tab i forbindelse med salg af værdipapirer, som er anskaffet i forbindelse med skatteyderens erhvervsvirksomhed, medregnes ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst, jfr. dog § 3.

§ 5.

Tá ið vinningur ella tap í samband við útlutan av virðisbrøvum úr einum deyðbúgvi til hjúnafelaga, arvingar og legatarar, verður uppgjørt, verður ásannaður vinningur og ásannað tap ikki roknað upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni hjá búnum.

**2. stk.** Tá ið virðisbrøv verða útlutað úr einum deyðbúgvi, kemur móttakarin av útlutingini í skattligu støðuna hjá tí deyða.

**3. stk.** Við teimum avmarkingum, sum tilskilaðar eru í 1. og 2. stk., verða reglurnar um skattseting í samband við deyða í samtíðarskattalógini at nýta í samband við sølu av virðisbrøvum.

§ 6.

Henda lóg fær gildi frá og við 16. december 1985.

§ 5.

Ved opgørelse af fortjeneste eller tab i forbindelse med udlodning af værdipapirer fra et dødsbo til ægtefælle, arvinger og legatarer, medregnes konstateret fortjeneste og konstateret tab ikke ved opgørelsen af boets skattepligtige indkomst.

**Stk. 2.** Ved udlodning af værdipapirer fra et dødsbo, indtræder modtageren af udlodningen i afdødes skattemæssige stilling.

**Stk. 3.** Med de begrænsninger, der er angivet i stk. 1 og 2 bliver bestemmelserne i kildeskatteloven om skatteansættelse i forbindelse med død at anvende ved salg af værdipapirer.

§ 6.

Denne lov træder i kraft fra og med 16. december 1985.

**Viðmerkingar:**

Ætlanin við uppskotinum um skatt av vinningi við sølu av virðisbrøvum er at broyta lóggávuna soleiðis, at staðfestur kursvinningur av virðisbrøvum, sum áður hevur verið skattafríur, nú verður at skatta eins og onnur inntøka.

Frammanundan hevur galdandi lóggáva einans heimilað skattseting av vinningi við sølu av virðisbrøvum, í teimum serstøku førum, har tað við vissu kundi staðfestast, at hetta virksemið hevði eitt beinleiðis vinnuligt endamál (spekulatión).

Til tess at gera reglurnar um skatting av vinningi við sølu av virðisbrøvum munadyggari og meira fullfiggjaðar, verður tískil skotið upp, at tílíkur vinningur verður at skatta í fyrsta lagi í øllum teimum førum, har talan er um vinnuligt virksemi, í øðrum lagi, tá ið skattgjaldarin selur virðisbrævið áður enn 3 ár eftir at virðisbrævið er útvegað.

Miðað verður somuleiðis ímóti at byrgja upp fyri einum framferðarhátti, sum hevur vundið upp á seg, síðan skattur av kapitalvinningi varð settur í

verk, nevniliga at ganga uttan um reglurnar um skattseting av vinningi við sølu av bygningi, skipi v.m. við at selja partabrøv í staðin fyri sjálvan bygningin, skipið v.m.

Sjálvt lógaruppskotið fevnir ikki einans um partabrøv, men øll virðisbrøv, tað veri seg pantibrøv, lánsbrøv (obligatiónir), lutaprógv v.m. Eisini verður vinningur, ið stavar frá at siga frá sær ella avhenda serstøk rættindi, skattaður samsvarandi fyrimælunum í lógini.

**Viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:**

**Ad § 1.** Lógin fevnir um øll virðisbrøv, partabrøv, pantibrøv, lánsbrøv, lutaprógv v.m., antin virðisbrævið gongur undir øðrum heiti ella ei. Staðfestur vinningur av virðisbrøvum verður uppgjørdur sambært reglunum í hesi lóg, t.v.s. uppgerð sambært aðrari lóggávu skal ikki verða nýtt í hesum sambandi.

Skattskyldan sambært hesi lóg áliggur øllum teimum persónum, felǿgum v.m., sum sambært § 1 í skatalógini eru undir fullari skattskyldu í Føroyum, hesi avvarðandi persónar, felǿg, stovnanir, deyðsbúgv v.m. beinleiðis ella ikki.

**Ad § 2.** Vinningur av virðirbrøvum, ið seld verða áður enn 3 ár eru liðin, síðan útveganin fór fram, skal til fulnar takast við í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni sambært reglunum í hesi lóg. Tap kann hinvegin bert dragast frá í ásannaðum vinningi í samband við sølu av virðisbrøvum, t.v.s. ikki í aðrari inntøku enn júst eini nettoinntøku stavandi frá sølu av virðisbrøvum. Tapið kann eins og hall sambært § 33, nr. 6 í samtíðarskattalógini einans dragast frá innan fyri tey 3 næstu árini, soleiðis at frádráttarmøguleikin fellur burtur, tá ásetta tíðin er umliðin. Somuleiðis kann frádráttur ikki flytast til eitt seinni inntøkuár, um møguleiki er fyri at draga tapið frá í inntøku av virðisbrøvum í einum ári frammanundan, sbr. § 2, 2. stk. Vinningur við sølu av virðisbrøvum verður uppgjørdur ájavnt við munin millum útveganir og søluupphædd, og verður henda nettoupphædd at mynda grundarlag undir skattsetingini sambært lógini. Er talan um virðisbrøv í grunnum, verður útveganarpeningurin áltíð roknaður til 0 kr., soleiðis at skattsetingin verður framd í fullari søluupphædd.

**Ad § 3.** Her verður tann høvuðsregla staðfest, at vinningur ella tap við sølu av virðisbrøvum til fulnar verður roknað upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni, tá ið sølan fellur undir hugtakið vinnu í tí týdningi, hetta verður nýtt, sambært galdandi siðvenju, sbr. høvuðsregluna í § 27 í samtíðarskattalógini.

**Ad § 4.** Vinningur ella tap, sum er ásannað meiri enn 3 ár eftir at útveganin er farin fram, verður ikki roknað upp í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni. Undantikin eru tey føri, tá ið talan er um vinnuligt virksemi, sbr. § 3.

**Ad § 5.** Frammanfyri galdandi reglur um skatting av vinningi við sølu og avhending av virðisbrøvum, verður sambært § 5 ikki tikin við í uppgerðina hjá deyðdbúgvum. Í staðin kemur hjúnafelagin, arvingurin ella legataturin til fulnar í stað hind deyða, og tekur við øllum teimum rættindum og skyldum, sum hava tilknýti til avvarðandi virðisbræv. T.v.s. virðisbrævið verður framhaldandi roknað fyri at verða útvegað fyri ta upphædd og til ta tíð, sum tá ið hin deyði hevði tað á hondum. Selur hjúnafelagi, arvingurin ella legatarurin, verður tað útvegannarvirðið og útvegannarmundið hjá tí deyða, ið verður avgerandi fyri skattsetingini sambært reglunum í hesi lóg.

1. viðgerð 14. januar 1986. Málið varð viðgjørt saman við løgtingsmálunum 39: Umskipan av persónliga riknum vinnuvirki til partafelag, 40: Skattur av vinningi í sambandi við sølu av virðisbrøvum og 34: Broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar, og vórðu tey øll beind í skattanevndina, sum 4. februar legði fram felagsálit, sí løgtingsmál nr. 38: Broytingar í skattalógunum.

2. viðgerð 13. februar. §§ 1-6 samtyktar við 17-7 atkvøðum. At málið skuldi fara til 3. viðgerð soleiðis samtykt varð samtykt við 17-3.
Broytingaruppskot til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 frá Sambandsflokkinum fall við 8-8 atkvøðum.

3. viðgerð 24. februar. Atkvøðugreiðslan 21. mars. Uppskotið endaliga samtykt við 17-6 atkvøðum.

F.L. j. nr. 430-12-45-16. Lóg nr. 40 frá 17. apríl 1986.

# 41. Ríkislóg um almennar skráir

Ár 1985, mánadagin 16. december, legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at fremja viðlagda uppskot til kgl. fyriskipan um at seta lóg nr. 294 frá 8. juni 1978 »om offentlige myndigheders registre« í gildi í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Tann 1. apríl 1984 kom í gildi løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um skráir hjá almennum myndugleikum. Lógin fevnir bert um eftirlitið við edv-skrásetingini hjá stovnum undir landinum og kommunum, meðan tilsvarandi danska lógin kann setast í gildi her fyri edv-skráir hjá ríkismyndugleikunum.

Skrásetingareftirlitið eftir § 23 í løgtingslógini um almennar skráir kemur eisini at hava eftirlit við skráum, sum verða førdar fyri ríkismyndugleikar, men verður eftirlitið í tílíkum málum víðkað við einum limi, sum ríkisumboðsmaðurin tilnevnir.

Eftir viðlagda uppskoti til kgl. fyriskipan verður lógin sett í gildi við ymsum broytingum, so hon samsvarar við føroysku lógina um almennar skráir, t.d. fyri samkoyring, nýtslu av persóntali v.m.

Vísandi til tað, ið her er ført fram, verður hetta uppskot lagt fyri løgtingið.

**Sí SKJAL 8**

1. viðgerð 15. januar 1986. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 11. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Landsstýrið hevur hin 16. december 1985 mælt til, at uppskot til kgl. fyriskipan um lóg nr. 294 frá 8. juni 1978 »om offentlige myndigheders registre« verður sett í gildi í Føroyum.

Málið varð aftaná 1. viðgerð 15. januar 1986 beint í rættarnevndina.

Løgtingslóg nr. 62 frá 5. juni 1984 um skráir hjá almennum myndugleikum kom í gildi 1. apríl 1984.

Henda lóg fevnir bert um eftirlit við edv-skráseting hjá stovnum undir landinum og kommunum.

Tilsvarandi danska lógin kann setast í gildi í Føroyum fyri EDV-skráir hjá ríkismyndugleikunum.

Føroyska skrásetingareftirlitið sbr. § 23 í løgtingslógini kemur eisini at hava eftirlit við teim stovnum, sum ríkismyndugleikin førir í Føroyum.

Eftir uppskotinum verður skrásetingareftirlitið víðkað við einum limi, sum ríkisumboðsmaðurin tilnevnir.

Eftir hesum uppskoti til kgl. fyriskipan verður lógin sett í gildi við ymiskum broytingum, solciðis at hon samsvarar føroysku lógina um almennar stovnar, t.d. tá talan er um samkoyring og nýtslu av persóntali.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at taka undir við uppskotinum frá landsstýrinum.

2. viðgerð 13. mars 1986. Uppskotið samtykt við 25-0 atkvøðum.

F.L j. nr. 535-1.

# 42. Skipan millum Føroyar og Noreg um sínamillum fiskirættindi í 1986.

Ár 1985, mikudagin 18. december, legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 18. december 1985 millum Føroyar og Noreg um sinamillum fiskirættindi í 1986.

**Viðmerkingar:**

Sambært skipanini millum Føroyar og Noreg um høvuðsreglurnar fyri sinamillum fiskirættindi dagfest 7. februar 1979 (løgtingsmál nr. 49/1976) skulu partarnir fyri eitt ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingarnar vóru í Bergen tann 12. og 13. december 1985. Partarnir samdust um viðløgdu skipan.

Fyri veiðuna av vanligum matfiski ber skipanin fyri 1986 í sær, at føroysk skip á norskum fiskiøki norðanfyri 62°n. br. íroknað »gráa økið« fáa loyvi at veiða 4.600 tons, harav toskur 3.000 tons, hýsa 800 tons og annar fiskur 800 tons (í 1985 tilsamans 3.400 tons, harav ávikavist 1.900 tons av toski, 500 tons av hýsu og 1.000 tons av øðrum). Av »øðrum« (kongafiskur, upsi, svartkalvi) er bert loyvt at veiða 500 tons av hvørjum slagi, og umfatar kvotan eisini hjáveiðuna í øðrum fiskiskapi. Harumframt er semja um, at føroysk skip í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard kunnu veiða 500 tons av toski og 200 tons av øðrum botnfiski (sama nøgd sum í 1985).

Umframt norsku toskakvotuna í Barentshavinum er avtalað, at 4.000 tons av tí kvotu, ið føroyingar kunnu veiða sambært fiskiveiðisáttmálanum við Sovjetsamveldið kunnu veiðast í norskum sjógvi (í 1985 5.000 tons).

Sostatt kunnu veiðast tilsamans 8.300 tons av toski og hýsu á norska økinum og í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard, mótvegis 7.900 tons í 1985.

Sambært sáttmálanum í ár kunnu sostatt veiðast tilsamans 7.000 tons av matfiski mótvegis 5.800 tons í 1985.

Norsk skip fáa í føroyskum sjógvi loyvi at veiða við línu og garnum 6.000 tons av botnfiski (í 1985 7.000 tons). Upsaveiðan má ikki fara upp um 1.150 tons (í 1985 sama nøgd). Í loyvdu veiðuni er íroknað hjáveiða upp til 1.200 tons; av hvørjum fiskaslagi má hjáveiðan fyri hvønn túr ikki fara upp um 35%.

Viðvíkjandi sínamillum fiskiskapi av iðnaðarfiski ber skipanin í sær, at føroysk skip fáa loyvi at veiða 20.000 tons (í 1985 22.000) av hvítingsbróðri, nebbasild, svartkjafti og brislingi sunnan fyri 62°N. Av hesum 20.000 tonsunum má veiðan av brislingi í mesta lagi verða 2.000 tons (sum í 1985). Kvotan umfatar eisini hjáveiðu av øðrum fiskasløgum, upsi og síld undantikin. Norðan fyri 62°N er loyvt føroyskum skipum í royndarfiskiskapi at veiða upp til 5.000 tons av svartkjafti (sama nøgd sum í 1985).

Sunnan fyri 62°N er loyvt føroyingum at veiða upp til 1.700 tons av upsa (í 1985 sama nøgd) og 1.500 tons av síld (eingin kvota í 1985).

Eftir at Noreg í 1980 setti 200 fjórðinga fiskimark rundan um Jan Mayen, ynsktu føroyingar at fáa kvotur á hesum fiskiøki, ið kundu loyva framhaldandi veiðu har. Sambært avtaluni kunnu føroyingar í 1986 veiða 5.000 tons av svartkjafti við Jan Mayen (sama nøgd sum í 1985). Vegna støðuna hjá lodnustovninum vildu norðmenn ikki bjóða nakra kvotu fyri 1986 (onga kvotu síðani 1981, tá var hon 2.500 tons), men søgdu teir seg til reiðar at umhugsa spurningin av nýggjum, um nettokvota var ásett fyri norskari veiðu í 1986.

Fyri 1986 er avtalað ein sínamillum veiða av makreli innanfyri eina kvotu

upp á 7.000 tons til hvønn partin (í 1985 sama skipan, 5.700 tons til Føroyar og 1.500 tons til Noreg).

Norsk skip fáa loyvi at veiða 65.000 tons av svartkjafti (í 1985 40.000 tons), 55 skip fáa loyvi at veiða við troli ella nót, (50 skip í 1985). Av skipunum mugu bert 20 trolskip (16 í 1985) verða á fiskileið ísenn, umframt 10 (sum í 1985), ið hava loyvi til at leita eftir svartkjafti uttanfyri eina av vaktar- og bjargingartænastuni til eina og hvørja tíð ásetta høvuðsfiskileið.

Í 1986 verður norska brugduveiðan undir Føroyum 100 tons av livur (í 1985 150 tons).

Sum í 1985 umfatar sáttmálin við Noreg føroyska rækjuveiðu við Svalbard. Frá norskari síðu varð avtalan treytað av, at føroysku myndugleikarnir átóku sær at avmarka føroysku rækjuveiðuna við Svalbard til 11 skip. í meðal kunnu 7 skip fiska í senn (í 1985 ávikavist 9 tilsamans og 5 í senn).

Eitt yvirlit yvir tey skip, ið ætla at taka lut í sínamillum fiskiskapinum í 1986 skal verða avvarðandi føroysku og norsku myndugleikunum í hendi innan 1. februar 1986.

## PROTOKOLL

**fra**

## DRØFTELSER MELLEM NORSKE OG FÆRØSKE MYNDIGHEDER I KØBENHAVN DEN 12. - 13. DECEMBER 1985 OM GENSIDIGE FISKERIRETTIGHEDER I 1986.

Den 12. og 13. december 1985 drøftet en norsk delegation ledet af Fiskeridirektør Hallstein Rasmussen og en færøysk delegation ledet af lagmann Atli P. Dam, færøysk fiske i Norges fiskerisoner og norsk fiske i færøysk fiskerisone i 1986. Drøftelsene var baseret på avtalen om gjensidige fiskerettigheder undertegnet 7. februar 1979.

De to parters delegationer fremgår af bilag 1.

Parterne blev enige om:

### 1 FÆRØSK FISKE I NORGES FISKERISONER.

#### A. I den økonomiske sone nord for 62°n.br.

1. 3.000 tonn torsk.
2. 4.000 tonn torsk overført fra den færøske kvote i USSR's fiskerisone.

3. 800 tonn hyse (kuller) som bifangst.
4. 800 tonn andre arter uer (rødfisk), sei, blåkveite (hellefisk).
   Det er kun tilladt at tage indtil 500 tons af hver art. Kvoten skal også omfatte bifangster av andre arter.
5. 7.000 tonn makrell.
6. 5.000 tonn kolmule (blåhvilling) som forsøksfiske i et nærmere avgrænset område.
   Vinterlodde.

50% av de enkelte færøyske torskefangster i det tilstøtende område i Barentshavet, som grenser opp til Norges og USSR's fastlandskyster, skal avregnes på de færøyske kvoter tildelt av Norge.

På grunn av den særdeles lave totalkvote i 1986 for lodde i Barentshavet kunne man fra norsk side ikke gi Færøyene noen loddekvote. Dette vil ikke prejudisere spørsmålet om en tildeling til Færøyene af en loddekvote i senere år.

Det forudsettes at et eventuelt færøysk loddefiske i Barentshavet i 1986 holdes indenfor de kvoter som måtte bli tildelt Færøyene fra kyststatene.

B. **I fiskerværnsonen ved Svalbard.**

1. 500 tonn torsk.
2. 200 tonn andre arter [vesentligst uer (rødfisk) og blåkveite (hellefisk)].

De færøske myndigheder påtager sig at begrænse der færøyske rejefiskeri i fiskerværnsonen ved Svalbard til 11 fartøj, gennomsnittlig 7 fartøjer i fisket samtidig.

Den norske part kan på kort varsel etablere områder i fiskeværnsonen ved Svalbard, hvor det af hensyn til bevaring av yngel skal være forbudt at trawlfiske.

C. **I Norges økonomiske sone syd for 62°n.br.**

1. 20.000 tonn øyepål (sperling), tobis, kolmule (blåhvilling) og brisling, hvorav inntil 2.000 tonn brisling. Kvoten omfatter også bifangster af andre arter, dog ikke af sild.
2. 1.700 tonn sei, incl. bifangster i annet fiske.
3. 1.500 tonn sild, inklusive bifangster i annet fiske.

På grund af den særdeles lave totalkvote i 1986 for makrell i Nordsøen, kunne man fra norsk side ikke gi Færøerne nogen makrellkvote. Dette vil ikke præjudicere spørgsmålet om tildeling til Færøerne af en makrellkvote i senere år.

Dersom tobisfiske i henhold til anbefaling fra ACFM av bestandsmessige hensyn begrænses for norsk fiske, skal samme begrænsning også gælde for færøskt fiske.

D. **I fiskerizonen ved Jan Mayen.**

1. 5.000 tons kolmule (blåhvilling).

Dersom Norge fastsetter en nettokvote for norsk fiskeri i 1986, vil man fra norsk side nærmere vurdere spørgsmålet og en eventuel loddekvote til Færøerne. Overfiskeriet i 1981 vil blive lukket fra en eventuel kvote i 1986.

## II NORSK FISKERI I FÆRØSK ZONE.

1. 6.000 tons bunnfisk (lange, brosme, sei, blålange).
   Inden for denne kvote må sejfangsterne ikke overstige 1.150 tons. Kvoten omfatter også bifangst af andre bunnfiskearter op til 1.200 tons tilsammen. Heraf må bifangst på en enkelt fangstrejse ikke overstige 35%. Fiskeriet forudsættes drevet med henholdsvis sejgarn og bankline.
2. 7.000 tons makrel.
3. 65.000 tons kolmule (blåhvilling).
   Kolmulen kan fiskes med trawl eller not. Antal fartøjer med licens til trawlfiskeri: 55. Antal trawlfartøjer samtidig: 20, desuden 10 på forsøgsfiskeri (fiskeleting) utenfor det hovedfelt, som til enhver tid defineres av den færøske fiskeriinspeksjon.
4. 100 tons brugdelever.

## III LISENSSPØRGSMÅL.

Parterne blev enige om innen 1. februar 1986 at sende hverandre liste over de fartøyer, som ønsker at delta i fisket i den annen parts sone. Det vil være muligt at efteranmelde fartøjer.

Fartøjer, som har haft tillatelse til at fiske i hverandres soner i 1985, kan benytte samme tilladelse inntil videre i 1986

## IV ANDRE SPØRGSMÅL.

Kolmule (blåhvilling).

Parterne var enige om behovet for fastsættelse af en TAC for denne bestand i lys af videnskabelig rådgivning.

Bergen, den 18. december 1985.

***Atli P. Dam*** (sign.) ***Hallstein Rasmussen*** (sign.)

1. viðgerð 19. december. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 21. januar 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum 19. december 1985 og undir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Heini O. Heinesen, Signar Hansen og Henrik Old) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Ein minniluti (Jógvan Olsen og Pauli Ellefsen úr Sambandsflokkinum) tekur undir við sáttmálanum við Noreg og við Sovjetsamveldið við hesum viðmerkingum:

Fyri tað fyrsta er at siga, at báðir hesir sáttmálar vísa, eins og sáttmálin við EEC, at teir báðir stóru samgonguflokkarnir hava kúvent hvat fiskivinnupolitikki viðvíkur. Og tað er ein broyting til tað betra.

Báðir sáttmálarnir eru ávirkaðir av, at toskurin er komin fyri seg í Barentshavinum. Tí lá væl fyri at økja um sáttmálastøði bæði yvirfyri Noregi og Sovjetsamveldinum.

Eisini er sildastovnurin í Norðsjónum vaksin. Tíverri eydnaðist tað okkara sendinevnd ikki at fáa nakra sildakvotu í Norðsjónum frá EEC, og hóast ein veldugan sildafiskiskap nú, fekkst bert ein lítil kvota frá Noregi.

Við lodnukvotu hevur gingið okkara samráðingarmonnum stak illa. Minnilutin tekur sum sagt undir við, at landsstýrið hevur roynt at økt um okkara fiskiveiðumøgulcikar í norskum og russiskum sjógvi, istaðin fyri, sum ætlað, at minka um teir.

Hinvegin kann minnilutin ikki annað enn finnast at tí gjaldi, sum landsstýrið hevur bjóðað norðmonnum og russum aftur fyri hesar sáttmálar, bæði tá talan er um svartkjaftakvoturnar í okkara sjógvi og um ta øktu veiðuorku, sum sáttmálapartarnir fáa loyvi at nýta á okkara leiðum. Nevnast kann, at russar hava fingioð høvið til at seta 5 skip eyka inn í svartkjaftaveiðu í juni, juli og august, um teir ikki eru nøgdir við royndarveiðuna eftir makreli og høgguslokki. Okkara samráðingarmenn hava eftir øllum at døma undirmett tann áhuga sum bæði norðmenn og russar nú veruliga hava fyri at fiska svartkjaft í okkara sjógvi.

Minnilutin heldur tað vera eitt fyrimun at avtalað er við norðmenn, at 11 rekjuskip royna á Svalbardsøkinum í senn í staðin fyri 9, hóast framstigið í ár ikki er so stórt sum í fjør, tá skipatalið vaks frá 5 upp í 9.

Minnilutin finnist at, at einki er nevnt um skeljaveiðu, hvørki í sáttmálanum við Noreg ella við Sovjetsamveldið. Í hesum sambandi leggur Sambandsflokkurin fram eitt uppskot til samtyktar um skeljaveiðu við Svalbard, og mælir til, at landsstýrið tekur spurningin um skeljaveiðu í norskum og russiskum øki upp við sáttmálapartarnar sum skjótast.

**Viðmerkingar:**

Í 1985 høvdu Føroyar 1 skip á royndarveiðu eftir skeljum á Svalbardøkinum.

Fjølmiðlarnir hava sagt frá, at føroyingar hava gjørt sáttmála um at byggja skeljatrolara til hesa veiðu. Hesin trolari kemur tó neyvan til fiskiskap fyrrenn í 1987.

Tað frættist, at norðmenn bæði umbyggja og nýbyggja skip til hetta endamálið, og at fleiri av hesum skipum koma til fiskiskap longu í 1986.

Um hetta verður ein lønandi vinna, sum seinri verður roynd avmarkað av norðmonnum, er tað umráðandi hjá okkum ikki at detta niður ímillum.

Sambandsflokkurin metir, at vit eiga at hava minst 2 skip til skeljafiskiskap á Svalbardøkinum í 1986.

Skipini skulu hava frystiorku umborð og kann framleiðslan fara fram við hond.

Hetta vil geva okkum kunnleika um veiðumøgulcikarnar um sjálva framleiðsluna av hesum skeljum og vil tryggja okkum ein rímiligan møguleika at halda fram innan hesa vinnu.

Vit meta, at smá rekjuskip, ella tey størstu laksaskipini, eru egnaði til hesar royndir, og seta út frá hesum viðmerkingum soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at leiga í minsta lagi 2 skip til veiðu eftir skeljum á Svalbardøkinum í 1986.

2. viðgerð 23. januar. Uppskot landsstýrisins samtykt við 23-0 atkvøðum. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum í marknaðarnevndini fall við 4-0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1500-1-11-5.

# 43. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1986

Ár 1985, mikudagin 18. december legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir viðløgdu skipan frá 6. december 1985 millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínamillum fiskirættindi í 1986.

**Viðmerkingar:**

Sambært skipanina millum Føroyar og Sovjetsamveldið um høvuðsreglurnar fyri sínamillum fiskiskap (tingmál nr. 18/1977) skulu partarnir fyri hvørt ár í senn avtala nøgdir og fiskasløg, sum loyvt verður pørtunum at fiska á sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Samráðingarnar um eina slíka avtalu fyri sínamillum fiskiskap í 1986 vóru í Moskva í døgunum 2. til 6. desember 1985, og samdust partarnir um viðløgdu skipan.

Sambært avtaluni fáa føroysk skip loyvi til á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti uttan fyri 12 fjórðingar at veiða 21.500 tons av toski, íroknað hjáveiðu av hýsu og øðrum botnfiski. Av nevndu 21.500 tonsum av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu kunnu 12.000 tons veiðast í felagsøkinum í Barentshavinum, 5.500 í Eystrasalti, og hini 4.000 tonsini av kvotuni kunnu tó veiðast í norska partinum av Barentshavinum, treytað av góðkenning frá norsku myndugleikunum, sum er fingin sambært løgtingsmál nr. 42/1985.

Viðvíkjandi møgulcikunum hjá føroyskum skipum at veiða 20.000 tons av lodnu í búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum skulu nærri samráðingar vera millum partarnar pr. telex.

Eisini er loyvt føroyskum skipum at veiða 2.500 tons av rækjum á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum uttanfyri 12 fjórðingar.

Afturfyri verður loyvt russiskum skipum at veiða á sjóøki Føroya tilsamans 145.000 tons av svartkjafti til matna í 1986. Av hesari nøgd kann fiskiskapurin av 125.000 tonsum byrja 1. januar 1986. Um veiðuna av teimum írestandi 20.000 tonsunum av svartkjafti skulu samráðingar vera pr. telex ímillum partarnar.

Frá sovjetiskari síðu verður eingin avmarking ásett fyri talið av føroyskum fiskiførum.

Frá føroyskari síðu verður talið av sovjetiskum fiskiførum í svartkjaftaveiðuni avmarkað til 17 í tíðarskeiðinum januar-september og 13 í tíðarskeiðinum oktober-desember.

Partarnir samdust um í 1986 at halda fram við sínamillum royndarfiskiskapinum.

5 sovjetisk skip kunnu fáa loyvi at gera royndarfiskiskap í føroyskum sjógvi, djúpri enn 700 m, 3 kunnu fáa loyvi samstundis. Loyvt verður einum av fyrrnevndu 3 skipum at reka djúpvatnsroyndarfiskiskap íroknað dýpið millum 500-700 metrar rundan um Ytra Bailey Banka, tó so at samlaða veiðan av botnfiski hægst skal vera 200 tons.

Royndarfiskiskapur skal fremjast sambært fiskiætlan, sum partarnir skulu siga hvørjum øðrum frá pr. teles frammanundan.

Áhugi var fyri nærri vísindaligum samstarvi, og í hesum sambandi luttøku í millumlanda samstarvi viðvíkjandi svartkjafti og síld.

Loyvt verður 5 sovjetiskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir makreli og høgguslokki á føroyskum sjóøki á teimum leiðum, har sovjetisk skip hava loyvi at veiða svartkjaft. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar umborð. Samlaða veiðan av makreli má ikki fara upp um 5.000 tons og av høgguslokki 2.000 tons.

Fyri allan royndarfiskiskapin á føroyskum øki er galdandi, at føroyingar kunnu seta sínar serfrøðingar umborð á sovjetisku skipini.

## VÁTTAÐ FRÁSØGN

### frá níggjunda fundinum í føroysk-sovjetisku felagsnevndini um sínamillum fiskivinnumál

I Eftir innbjóðing frá stjórn Sovjetsamveldisins og sambært sáttmálan frá 27. november 1977 ímillum stjórn Sovjetsamveldisins øðrumegin og stjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri hinumegin um sínamillum fiskirættindi Føroyar-Sovjetsamveldið varð níggjundi fundurin í føroysk-sovjetisku felagsnevndini hildin í Moskva í døgunum 2.-6. december 1985.

II Sum umboð fyri sáttmálapartarnar luttóku í 9. fundi í felagsnevndini:

1) Fyri Sovjetsamveldið:

V. K. Zilanov, umboð fyri Sovjetsamveldið í felagsnevndini.

2) Fyri Føroyar í felagsnevndini:

Árni Olafsson, umboð fyri Føroyar í felagsnevndini.
Hjalti í Jákupsstovu, tiltaksumboð fyri Føroyar í felagsnevndini.

Á níggjunda fundinum í felagsnevndini luttóku tær í skjali 1 nevndu samráðingarnevndir fyri Sovjetsamveldið og fyri Føroyar.

III Felagsnevndin samtykti hesa dagsskrá:

1. Fundarseta.
2. Samtykt av dagsskrá.
3. Frágreiðing um sínamillum fiskiveiðu partanna í farna partinum av 1985.
4. Frágreiðing um sínamillum royndarfiskiskap og fiskiroyndir partanna í farna partinum av 1985.
5. Ásetan av kvotum fyri sínamillum fiskiveiðu í 1986.
6. Ásetan av tali av loyvum fyri 1986.
7. Reglur viðvíkjandi loyvum fyri sínamillum fiskiveiðu í 1986.

Fráboðan frá fiskiskapi í sovjetiskum sjóøki og í føroyskum sjóøki og lúkan av treytum fyri fiskiskapi.

8. Umrøða av felagsætlanini viðvíkjandi royndarfiskiskapi og fiskirannsóknarligum arbeiði í 1986.
9. Ymist.
10. Fundarslit.

IV Viðvíkjandi máli 3 á dagsskránni góvu partarnir hvørjum øðrum upplýsingar um fyribils úrslitini í 1985 av ávikavist sovjetisku veiðuni á fiskiveiðuøki Føroya og føroysku veiðuni á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti. Báðir partar tóku hesar upplýsingar til eftirtektar.

V Í sambandi við mál 4 á dagsskránni góvu partarnir hvørjum øðrum upplýsingar um úrslitini av sínamillum rannsóknum og royndarfiskiskapi í 1985.

VI Viðvíkjandi máli 5 á dagsskránni komu partarnir ásamt um at geva hvørjum øðrum hesar sínamillum veiðumøguleikar í 1986:

a. Føroysku myndugleikarnir loyva sovjetiskum skipum at fiska upp til 145.000 tons av svartkjafti til matna í føroyskum fiskiøki. Av hesi nøgd kann fiskiskapurin av 125.000 tonsum byrja 1. januar 1986. Um veiðuna av teimum frestandi 20.000 tonsunum av svartkjafti skulu samráðingar vera pr. telex imillum partarnar.

b. Sovjetisku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum at veiða 21.500 tons av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu av øðrum fiskasløgum og 2.500 tons av rækjum í búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti, uttan fyri 12 fjórðingar. Av nevndu 21.500 tonsum av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu, kunnu 11.000 tons veiðast í felagsøkinum í Barentshavinum og 5.500 tons í Eystrasalti, og økið, har loyvt er at fiska frestandi 5.000 tonsini av toski og hýsu, íroknað hjáveiðu, verður kunngjørt føroyskum myndugleikum seinni.

Eitt og hvørt av nevndu tølum verður eftir avtalu partanna millum hækkað, um so er, at eitt ella tvey av hinum tølunum verða lægri.

Viðvíkjandi møguleikunum hjá føroyskum skipum at veiða 20.000 tons av lodnu í búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum skulu nærri samráðingar vera millum partarnar pr. telex.

VII Viðvíkjandi máli 6 á dagsskránni komu partarnir ásamt um hetta:

a. Sovjetisku myndugleikarnir loyva føroyskum skipum alt árið 1986 at veiða tosk, hýsu, lodnu og rækjur á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og Eystrasalti.

b. Føroysku myndugleikarnir geva 17 sovjetiskum skipum loyvi at veiða svartkjaft í tíðarskeiðinum januar til september og 13 sovjetiskum skipum í tíðarskeiðinum oktober til december 1986 á føroyskum fiskiøki.

VIII Viðvíkjandi máli 7 á dagsskránni varð hetta nevnt:

a. Báðir partar gjørdu hvønn annan kunnugan við tær reglur, ið galda fyri fiskiskap ávikavist á búskaparøki Sovjetsamveldisins í Barentshavinum og í Eystrasalti og á føroyskum fiskiøki.

b. Hvør partur ansar eftir, at skip hansara halda tær lógir og reglur, ið galda fyri fiskiskap á økjum, ið eru undir lóggávu hjá hinum partinum. Serligar reglur kunnu setast í verk í tíðarskeiðinum mars til og við juni viðvikjandi svartkjaftaveiðuni á føroyskum fiskiøki fyri at sleppa undan troðkan, meðan fiskiskapurin fer fram á einum lutfalsliga avmarkaðum øki.

c. Viðvíkjandi mannagongdini at geva loyvi til fiskifør til sínamillum fiskiskap á økjum undir sovjetiskari og føroyskari lóggávu komu partarnir ásamt um, at teir fyri árið 1986, ikki seinni enn 15 dagar áðrenn fiskiskapurin skal byrja, skulu senda yvirlit yvir tey skip, talan verður um.

d. Partarnir komu ásamt um, at neyðug umbøn um umskiftan av loyvum til skip skal fara fram pr. telex, sum verður sent til Murmansk, Riga ella Tórshavn, áðrenn fiskiskapurin byrjar, sum undanfarin ár.

e. Báðir partar skulu nýta telex til loysn av øllum operativum spurningum í sambandi við sínamillum fiskiskapin.

f. Partarnir vóru samdir um, at skipini í sambandi við loyvisspurningar helst skulu nýta Murmansk, Riga ella Tórshavn sum atløguhavn.

IX Viðvíkjandi máli 8 á dagsskránni komu partarnir ásamt um fylgjandi:

Føroysku myndugleikarnir geva 5 sovjetiskum skipum loyvi til royndarfiskiskap á føroyskum fiskiøki djúpri enn 700 m. Upp til 3 skip kunnu fáa loyvi samstundis.

Frá føroyskari síðu verður loyvt einum av teimum trimum omanfyri nevndu skipum at reka djúphavsroyndarfiskiskap á Outer Bailey Banka, írokuað á dýpi ímillum 500 og 700 m, tó soleiðis at har í mesta lagi verða veidd 200 tons av botnfiski.

Føroysku myndugleikarnir loyva 5 sovjetiskum skipum at reka royndarfiskiskap eftir makreli og høgguslokki á føroyskum fiskiøki á teimum leiðum, har tað er loyvt sovjetiskum skipum at veiða svartkjaft. Við hesum skipum kunnu vera upp til 4 føroyskir serfrøðingar. Samlaða veiðan av makreli má ikki fara uppum 5.000 tons og av høgguslokki 2.000 tons.

Báðir partar skulu í góðari tíð frammanundan gjøgnum telex geva hvørjum øðrum boð um ætlanir fyri royndarfiskiskap, um slíkur verður. Um so er, at fiskaloysi verður av makreli og høgguslokki, kunnu nevndu skip í juni-august veiða av samlaðu svartkjaftakvotuni, sum sovjetisk skip hava á búskaparøki Føroya. Tá lagt verður um til annan fiskiskap, skal skiparin á bátinum í góðari tíð boða avvarðandi føroysku myndugleikum frá hesum.

X Í sambandi við mál 9 á dagsskránni, ynist, søgdu partarnir frá, at teir mettu eina útbygging av vísindaliga samstarvinum at vera ynskiliga, harimillum luttøku í millumlanda vísindaligum samstarvi viðvíkjandi stovnsmeting av svartkjafti og síld millum annað við tí í hyggju at áseta TAC fyri hesa veiðu.

Viðvíkjandi atlanto-skandisku sildini eru partarnir samdir um at boða frá einum og hvørjum tilburði av veiðu av hesum fiskaslagi undir fiskiskapi, royndarfiskiskapi ella havrannsóknum á fiskiøkjunum hjá hvørjum øðrum.

Partarnir løgdu dent á tey góðu úrslitini av royndunum at fáa í lag onnur sløg av samstarvi á fiskivinnuøkinum og søgdu frá áhuga í at halda fram við hesum samstarvi.

XI Partarnir samdust um, at tiggjundi fundurin í felagsnevndini skuldi haldast í Tórshavn í 2. helvt av 1986.

Dagsskráin fyri tíggjunda fundin í felagsnevndini verður løgd til rættis ígjøgnum stjórnarumboð.

Henda frásøgn er skrivað í Moskva tann 6. december 1985 á føroyskum, donskum, og russiskum. Allir tekstir hava sama gildi.

Umboð fyri Føroyar
í felagsnevndini:

*Árni Olufsson*

Umboð fyri stjórnina í
Samveldinum av sosialistiskum
Sovjetríkjum í felagsnevndini:

***V. K. Zilanov***

**Umboð fyri Sovjetsamveldið**
**í Felagsnevndini**

Háttvirdi harra Olafsson.

Vísandi til samráðingar, sum hava verið í Moskva í tíðarskeiðinum 2.-6. december 1985 váttar undirritaði avtaluna um møguleikar hjá føroyskum fiskiskipum í december 1985 at veiða 1.000 tons av toski og hýsu íroknað hjáveiðu í búskaparøki Sovjetsamveldisins og í felagsøkinum í Barentshavinum. Henda nøgdin skal fara av kvotuni fyri 1986.

*V. K. Zilanov*
umboð fyri Sovjetsamveldið
í felagsnevndini

**Umboð fyri Føroyar**
**í Felagsnevndini**

Háttvirdi harra Zilanov.

Vísandi til samráðingar um fiskiskap, sum hava verið í Moskva í tíðarskeiðinum 2.-6. december 1985 váttar undirritaði avtaluna um, at føroyskir myndugleikar loyva sovjetiskum fiskiskipum í december 1985 at veiða 5.000 tons av svartkjafti í búskaparøki Føroya. Henda nøgdin skal fara av kvotuni fyri 1986.

Moskva, tann 6. december 1985.
***Árni Olafsson***
umboð fyri Føroyar
í felagsnevndini

Skjal 1.

**Føroyska sendinevndin:**

1. Árni Olafsson, serfrøðingur,
   Uttanríkismálaráðið,
   Umboð fyri Føroyar í felagsnevndini.

2. Hjalti í Jákupsstovu, fiskifrøðingur,
   Fiskirannsóknarstovan,
   Umboð fyri Føroyar í felagsnevndini.

3. Mortan Johannesen, skipari.

**Sovjetiska sendinevndin:**

1. V. K. Zilanov, umboð fyri Sovjetsamveldið í sovjetisku-føroysku felagsnevndini, stjóri í deildini fyri uttanlandsmál og leveransur.

2. S. I. Bogdanov, skrivari í deildini fyri uttanlandsmál og leveransur.

3. V. I. Tsukalov, deildarleiðari, (Veiðudeildin í »Sevryba«).

4. S. M. Trojanovski, varadeildarleiðari í flotanum fyri vísindaligar rannsóknir.

5. J. A. Kolesnikov, medarbeiðari í Norrønu deildini í uttanríkisráðnum.

6. V. P. Simbirev, serfrøðingur í sovjetisku-norsku felagsnevndini fyri fiskivinnu.

7. N. N. Melnikov, yvirverkfrøðingur, «Glavribooda«.

8. V. B. Savinon, yvirverkfrøðingur, »Sevryba«.

9. V. M. Borisnov, leiðari av »Uniro« rannsóknarstovuni.

10. N. A. Isajev, yvirgranskari, VNIRO.

11. O. V. Pankratova, umsjónarmaður í protokoldeildini í deildini fyri uttanríkishandil og leveransur.

12. T. I. Tchagina, vísindaligur medarbeiðari í »Zniiteirx«.

13. A. M. Tchurchikov, serfrøðingur í sovjetisku-norsku felagsnevndini fyri fiskivinnu.

**Skjal 2.**

## Felagsætlan viðvíkjandi vísindaligum samstarvi ímillum Føroyar og Sovjetsamveldið

Í 1985 hava sovjetisk vísindalig rannsóknar- og leitingarskip hildið fram við kanningunum av fiskastovnunum og av teimum serstøku viðurskiftunum, ið eru galdandi fyri fiskastovnarnar svartkjaft, makrel og høgguslokk á føroyskum fiskiøki. Harumframt vórðu gjørdar ekkómetingar av svartkjaftastovninum í opnu økjunum í Norska-havinum, á norskum og føroyskum havøki. Kanningar av atlanto-skandiskari sild eru farnar fram á gýtingarøkjunum.

Partarnir tosaðu um úrslitini av felags rannsóknunum og løgdu serligan dent á nyttuna av einum neyvum samstarvi og á týdningin av lívfrøðiligum tilfari fyri at loysa praktiskar spurningar viðvíkjandi havfiskiskapinum.

Partarnir komu ásamt um fylgjandi ætlan fyri rannsóknarsamstarvið í 1986.

### 1. Ramsóknarferðir fyri at meta um svartkjaftastovnin og savnan av havrannsóknarligum og lívfrøðiligum tilfari

Í 1986 (mars-juni) er ætlanin at fara undir metingararbeiði viðvíkjandi svartkjaftastovninum á gýtingarøkjunum, millumtjóða akustiska kanning av svartkjaftastovninum í vakstrartíðini (august, við luttøku av skipum úr Noregi, Íslandi og DDR). Arbeiðið við at betra aldursgreiningarnar av svartkjafti verður ført víðari samsvarandi tilráðing frá svartkjaftaarbeiðsbólkinum í ICES.

### 2. Rannsóknarferð til kanning og meting av makrel- og høgguslokkastovnunum og savnan av havrannsóknarligum og lívfrøðiligum tilfari

Í 1986 er ætlanin at halda áfram felagsarbeiði til meting av makrel- og høgguslokkastovnunum á føroyskum sjóøki. Rannsóknirnar skulu gerast av einum sovjetiskum havrannsóknarskipi við luttøku av føroyskum serfrøðingum.

3. **Kanning av útbreiðslu og gýtingareffektiviteti hjá atlanto-skandiskari síld**

Báðir partar skulu seta í verk kanningar av síldaeindum sambært ætlanirnar hjá viðkomandi fiskirannsóknarstovum.

Í hesum sambandi kunnu føroyskir serfrøðingar vera umborð. Partarnir senda hvørjum øðrum úrslitini av kanningunum við posti.

4. **Havrannsóknir til kanning av livfrøðiligum ríkidømi av ráevni á dýpdum størri enn 500-700 m**

Á vetri og vári 1986 heldur eitt sovjetiskt havrannsóknarskip fram við kanningunum av djúphavsfiskastovnum á føroyskum sjóøki. Við Outer Bailey Banka halda áfram kanningar av fiskasløgum, ið liva á markinum ímillum grunt og djúpt vatn (500-2000 m), fyri at meta um fiskastovnarnar og veiðimøguleikarnar har.

Partarnir geva hvørjum øðrum upplýsingar um úrslitini av hesum fiskirannsóknum á næsta regluliga fundi í føroysk-sovjetisku felagsnevndini.

5. **Samstarv um kunngerð av rannsóknarúrslitum**

Teir sovjetisku og føroysku serfrøðingarnir fara at skriva greinir um svartkjaft, djúphavsfisk og oceanografi á sjóøki Føroya við tí í hyggju at kunngera greinirnar í vísindaligum tíðarritum.

Umbýti av havfrøðisligum tilfari, sum er innsavnað á fiskiveiðiøkjum partanna, verður gjørt á fylgjandi fundi í blandaðu føroysk-sovjetisku felagsnevndini.

1. viðgerð 19. december 1985. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 21. januar 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum 19. december 1985 og undir 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Heini Olsen, Signar Hansen

og Henrik Old) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

Minnilutin (Pauli Ellefsen og Jógvan I. Olsen) tekur undir við sáttmálanum við Sovjetsamveldið og vísir til viðmerkingarnar í álitinum nr. 42.

2. viðgerð 23. januar 1986. Uppskot landsstýrisins samtykt við 23-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1500-I-11-2.

# 44. Byggjan av hølum til Bileftirlitið

Ár 1986, hósdagin 30. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bygging av hølum til Bileftirlitið.**

§ 1.

Í § 1 í løgtingslóg nr. 36 frá 29. mai 1985 um bygging av hølum til Bileftirlitið verður »6 mió. kr.« broytt til: »14 mió. kr.«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerðing.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om bygning af lokaler til Biltilsynet.**

§ 1.

I § 1 i lagtingslov nr. 36 af 29. maj 1985 om bygning af lokaler til Biltilsynet ændres »6 mio. kr.« til: »14 mio. kr.«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Við løgtingslóg nr. 36 frá 29. mai 1985 fekk landsstýrið heimild til at læna 6 mió. kr. til bygging av hølum til Bileftirlitið.

Kostnaðurin varð av projekterandi felagnum mettur til 9,5 mió. kr. (1983-prísir).

Við príshækkingum v.m. var samlaði kostnaðurin í uppskoti landsstýrisins til lógarheimild til byggingina mettur til 11 mió. kr. og tørvandi lántøka til 6 mió. kr., við tað at 5 mió. kr. vóru tøkar til byggingina.

Projekterandi felagið hevur nú gjørt nýggja kostnaðarmeting, og verður byggikostnaðurin nú mettur til 16,5 mió. kr., fyrituttan grundøki, byggibúgving, útgerð og amboð til eftirlitshøllina, prís- og lønarhækkingar í byggitíðini, tryggingar og rentur í byggitíðini.

Endaligi kostnaðurin av byggingini verður sostatt mettur til fylgjandi:

| | |
|---|---|
| Kostnaðarmeting (december 1985) | 16.500.000 kr. |
| Grundøki + byggibúgving | 900.000 kr. |
| Amboð, útgerð og innbúgv | 600.000 kr. |
| Prís- og lønarhækkingar í byggitíðini | 1.000.000 kr. |
| Samlaður byggikostnaður | 19.000.000 kr. |

Meirkostnaðurin av samlaðu byggingini verður sostatt (19 mió. kr. ÷ 11 mió kr.) 8 mió. kr. hægri enn mett í vár. Lánstørvurin verður sostatt 14 mió. kr. í staðin fyri 6 mió. kr.

Um orsøkina til, at byggikostnaðurin ikki kom at halda, kann m.a. upplýsast,

at í fyrru kostnaðarmetingini var grundøki og byggibúgving tilsamans 900.000 kr. ikki viðroknað,

at skitsuprojektið var undirmett við umleið 10-15%, og

at tað nógv økta byggivirksemið seinastu tíðina hevur gjørt, at tilboðini liggja hægri enn kostnaðarmetingin.

Á figgjarlógaruppskotinum fyri 1986 vóru avsettar 3.099.000 kr. til Bileftirlitið, har 1.500.000 kr. fara í grunn til bygging av høllum og 1 mió. kr. í grunn til hálkubreyt. Játtanin upp á 1,5 mió. kr. var tó ikki samtykt. Annars er at viðmerkja, at tað verður neyðugt framhaldandi at seta pening av til sýnshølir, eisini aftaná at hølini í Havn eru liðug, tí tørvur á egnum høllum eru átrokandi í fleiri støðum, og serstakliga í Eysturoynni og Suðuroynni.

Inntøkurnar hjá Bileftirlitinum í komandi figgjarári verða mettar til 3 mió. kr., aftaná at avgjørt er at hækka gjøldini fyri koyriroyndir og sýn og frá ávikavist 1. januar og 1. apríl 1986 at rokna. Ætlanin er eisini at hækka onnur gjøld, og kemur Bileftirlitið tá figgjarliga at hvíla í sær sjálvum, t.v.s. uttan nakra játtan úr landskassanum, sjálvt um peningur framhaldandi verður settur av til bygging av sýnshølum á fleiri plássum.

1. viðgerð 12. februar 1986. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 21. mars 1986 legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 30. januar 1986 og undir 1. viðgerð tann 12. februar 1986 beint í figgjarnevndina.

Spurningurin um bygging av hølum til Bileftirlitið var lagdur fyri tingið í løgtingsmáli nr. 63/1984. Í tí málinum legði figgjarnevndin fram álit tann 30. apríl 1985, og í mun til uppskot landsstýrisins varð sett fram og samtykt broytingaruppskot frá somu nevnd um, at lántøkan skuldi avmarkast til í mesta lagi 6 mió. kr. Tá varð mett, at samlaði byggikostnaðurin ikki fór upp um 11 mió. kr. Landsstýrið hevði í uppskoti sínum biðið um heimild til at taka upp neyðug lán, men varð hetta sostatt avmarkað til 6. mió. kr. sambært løgtingslóg nr. 36 frá 29. mai 1985.

Í fyriliggjandi løgtingsmáli nr. 84/1985, sum er eitt broytingaruppskot til nevndu løgtingslóg, verður frá landsstýrinum skotið upp, at áður tilskilaða og avmarkaða lánsupphædd verður hækkað frá 6 mió. kr. upp til 14 mió. kr.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið greiðir landsstýrið soleiðis frá:

»Projekterandi felagið hevur nú gjørt nýggja kostnaðarmeting, og verður byggikostnaðurin nú mettur til 16,5 mió. kr., umframt grundøki, byggibúgving, útgerð og amboð til eftirlitshøllina, prís- og lønarhækkingar í byggitíðini, tryggingar og rentur í byggitíðini.

Endaligi kostnaðurin av byggingini verður sostatt mettur til fylgjandi:

| | |
|---|---|
| Kostnaðarmeting (december 1985) | 16.500.000 kr. |
| Grundøki + byggibúgving | 900.000 kr. |
| Amboð, útgerð og innbúgv | 600.000 kr. |
| Prís- og lønarhækkingar í byggitíðini | 1.000.000 kr. |
| Samlaður byggikostnaður | 19.000.000 kr. |

Meirkostnaðurin av samlaðu byggingini verður sostatt (19 mió. kr. ÷ 11 mió. kr.) 8 mió. kr. hægri enn mett í vár. Lánstørvurin verður sostatt 14 mió. í staðin fyri 6 mió. kr.

Um orsøkina til, at byggikostnaðurin ikki kom at halda, kann upplýsast,

at í fyrru kostnaðarmetingini var grundøki og byggibúgving tilsamans 900.000 kr. ikki viðroknað,

at skitsuprojektið var undirmett við umleið 10-15%, og

at tað nógv økta byggivirksemið seinastu tíðina hevur gjørt, at tilboðini liggja hægri enn kostnaðarmetingin.«

Tá tilskilað var í álitinum frá figgjarnevndini, dagfest 30. apríl 1985 í løgtingsmáli nr. 63/1984, at lógin skuldi siga, hvussu mikið skuldi takast í láni, so var hetta orsakað av, at tað hevði vist seg, at ávísar almennar byggingar vóru farnar langt út um tað, ið tingið hevði játtað, í ávísum føri nærum tvífaldað.

Her er kortini í hvørjum føri talan um játtanir, ið eru grundaðar á tilmæli og útrokningar frá serkunnleikanum.

Tað eru hesi viðurskifti, ið figgjarnevndin er ónøgd við og vil álala.

Figgjarnevndin harmast um, at heldur ikki í hesum føri varð tikið til eftirtektar, at byggingin átti at fara fram innan fyri ta heimild, ið løgtingið hevði givið.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin í figgjarnevndini (Jørgen Thomsen, Signar Hansen, Hilmar Kass, Juul Jacobsen) førir fram:

Tað má haldast at vera burturvið, at undanfarna landsstýrið góðtekur eitt skitsuprojekt til bygging av hølum til bileftirlitið, har kostnaðurin var mettur til 9,5 mió. kr., uttan at haldgóð trygd er útvegað fyri, at tølini halda innan fyri rímiligt mark.

Tað má eisini haldast at vera burturvið, at nú sitandi landsstýrið gevur loyvi at detailprojektera áðurnevndu bygging og fara undir byggingina uttan at geva boð um, at projekteringin ikki má fara upp um tær loyvdu 11 mió. kr.

Meirilutin er av teirri fatan, at tað er átrokandi neyðugt í hvørjum føri, tá talan er um almenna byggingar, at landsstýrið tryggjar sær neyvar kostnaðarmetingar og neyvari eftirlit frá byrjan til enda, soleiðis at teir játtandi myndugleikarnir ikki verða drignir til at játta eitt mikið dýrari projekt. Fyrst við eini ódýrari játtan, fyri síðani at noyðast at játta risaupphæddir.

Feskasta dømi um hesi viðurskifti er Royndarstøðin í Kollafirði.

Landsstýrið eigur tí at umhugsa tað rímiliga í at skilja projekt og eftirlit sundur.

Landsstýrið vísir á, at í framtíðini verður neyðugt framhaldandi at seta pening av til sýnshøli, eisini aftan á at húsini í Havn eru liðug, tí at tørur á egnum hølum er átrokandi á fleiri støðum.

Meirilutin hevur ta áskoðan, at tá tað nú er útlit til, at stovnurin Bileftirlitið kemur at hvíla í sær sjálvum, eigur løgtingsfiggjarlógin ikki at tyngjast við játtanum til nevnda stovn. Heldur eigur at berast so í band og leggjast soleiðis til rættis, at lán, sum stovnurin ber ábyrgdina av, verða tikin fyri at byggja út stovnin, eisini í framtíðini.

Meirilutin í figgjarnevndini er varugur við, at Bileftirlitið í tænastuvirksemi sínum má taka sær skyldur til verkligu eftirlit av serliga stórum og tekniskt arbeiðskrevjandi vinnuakførum, og er tað ikki rætt, at slíkir ánarar ikki rinda eitt lutfalsliga størri gjald, t.d. ánarar av vanligum persónvognum.

Eisini kann sigast, at meirilutin í figgjarnevndini hevur tikið til eftirtektar tað, sum landsstýrismaðurin segði undir framløguni í fyriliggjandi máli, at

landsstýrið hevði umhugsað møguleikarnar fyri, at aðrir stovnar fáa lut í nýtsluni av húsinum.

Vísast kann á tað, sum rættarnevndin sigur í løgtingsmáli nr. 48: Broytingar í løgtingslóg um ferðslu, har skilað verður til soleiðis:
»Dentur verður lagdur á at seta størri krøv til teirra, ið skulu taka koyrikort, eins og størri krøv verða sett til koyrilærarayrkið. Umframt størri førleika í frálæruni verður mælt til, at loyvisbræv skal verða treyt fyri at starvast sum koyrilærari. Í tráð við hetta verður heimilað landsstýrinum at skipa fyri serligum fyriskipanum á hesum frálæruøki, eins og mælt verður til at umhugsað at leggja koyrifrálæruna undir Landsskúlafyrisitingina.«

Talan er um almenna byggiætlan, har fermetraprísurin er góðar 15.000 kr., tól og innbúgv ikki íroknað.

Av tí at meirilutin í fíggjarnevndini hevur víst á, at landsstýrið eigur at tryggja sær neyvar kostnaðarmetingar og neyvt eftirlit í byggitíðini, er orsøk til at vænta, at ítøkilig úrslit hesum viðvíkjandi fáast burturúr, soleiðis at ávísir kostnaðartættir verða ódýrari. Afturat hesum kann roknast við, at útreiðslan til amboð v. m. kann minkast, tá stovnurin longu eigur slík tøk.

Út frá hesum setir meirilutin fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

til uppskot landsstýrisins:

| | |
|---|---|
| Í § 1 verður sett í staðin fyri | I § 1 indsættes i stedet for |
| »14 mió. kr.«: | »14 mio. kr.«: |
| »12 mió. kr.«. | »12 mio. kr.«. |

Ein minniluti (Anfinn Kallsberg og Eyðun Videro) førir fram:

Spurningurin um bygging av hølum til Bileftirlitið varð reistur longu í 1980, og fyrstu tíðina varð arbeitt við at útvega grundøki.

Fyrst í 1984 søkir Bileftirlitið Landsstýrið um loyvi til at fara undir detailprojektering út frá einum skitsuprojekti við einari kostnaðarmeting upp á 9,5 mió. kr.

Í oktober 1984 játtaði Landsstýrið Bileftirlitinum at fara í gongd við detailprojektið.

Í mars 1985 leggur Landsstýrið fyri Løgtingið uppskot til løgtingslóg til bygging av hølum til Bileftirlitið (løgtingsmál nr. 63/1984), har skotið verður upp at heimila landsstýrinum í samráð við fíggjarnevndina at taka upp neyðug lán til byggingina.

Landsstýrið ger sostatt ongar avmarkingar í lántøkuni, men nýtir framvegis kostnaðarætlanina frá 20. oktober 1983 sum útgangspunkt.

Figgjarnevndin avmarkar lániheimildina til 6 mió. kr., soleiðis at samlaði kostnaðurin ikki fer upp um 11 mió. kr.

Tá detailprojektið og nýggj kostnaðarmeting fyriliggja í oktober 1985, vísir tað seg, at kostnaðurin fer at vera 15,7 mió. kr. umframt grundøki, útgerð og amboð til eftirlitshøllina, prís- og lønarhækkingar, tryggingar og rentur í byggitíðini.

Henda nýggja støða førdi við sær, at Landsstýrið setti eina 4-mannanevnd til at kanna projektið.

Nevndin gevur Landsstýrinum frágreiðing við skrivi dagfest 21. januar 1986.

Tá minnilutin metir, at henda frágreiðing setir nógv av teimum tingunum upp á pláss, ið ikki eru lýst í meirilutaálitinum, loyva vit okkum at leggja hesa frágreiðing við sum skjal.

Tað er ein royndur lutur, at figgjarnevndin í hesum eins og í fleiri øðrum byggimálum, har tað almenna er eigari, má ásanna, at hesi arbeiði verða nógv dýrari enn upprunaliga mett, og tí eigur nevndin at taka hetta til eftirtektar og framyvir gera tær neyðugu nágreiniligu kanningarnar um kostnaðin, áðrenn nevndin gevur sítt tilmæli.

Í fyriliggjandi máli er talan um munandi hækking av kostnaðinum, men tá politisku myndugleikarnir hava góðkent at fremja hesa bygging í samband við tað arbeiðið, ið stovnurin skal gera, so metir minnilutin ikki, at tað er rætt nú at forða landsstýrinum í at fullføra byggingina.

Eisini er upplýst, at landsstýrismaðurin hevur undirskrivað høvuðsentreprisuna, so her er ilt at venda aftur.

Vísandi til omanfyristandandi mælir minnilutin til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein annar minniluti (Ivan Johannesen) tekur undir við, at Bileftirlitið fær hóskandi høli at virka í. 29. mai 1985 var kostnaðurin til Bileftirlitið í Tórshavn 11 mió. kr., og fekk landsstýrið heimild at læna 6 mió. kr. til nevndu byggiætlan, og vóru í grunni 5 mió. kr.

Byggiætlanin, ið nú fyriliggur, kostar 19 mió. kr. ella ein prisvøkstur upp á 8 mió. kr. í umleið 10 mánaðir.

Minnilutin tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins.

**Sí skjal 9.**

2. viðgerð 24. mars. Broytingaruppskot til § 1 frá meirilutanum varð samtykt við 18-0. § 1 varð soleiðis broytt samtykt við 19-0, § 2 samtykt við 18-0. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 18-0 atkvøðum.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskotið endaliga samtykt við 21-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 514-10-11. Lóg nr. 38 frá 10. apríl 1986.

# 45. Løgtingslóg um frítíð við løn

Ár 1985, hósdagin 19. december legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um frítíð við løn.**

Kapittul 1.
**Lógarøki.**
**§ 1.**

Løntakarar í almennum ella privatum starvi hava rætt til frítíð og frítíðarløn, sum fyrisett í hesari lóg.

**§ 2.**

Undir lógina koma tó ikki

1) tænastumenn landsins, ríkisins, fólkakirkjunnar og fólkaskúlans.
2) fiskimenn, undir starvsviðurskiftum, ið ikki áseta reglur um frítíð við løn.

**§ 3.**

Henda lóg viðvíkir ikki løntakara í almennum starvi, sum av landi, ríki, løgtingi ella kommunu

**lagtingslov om ferie med løn.**

Kapitel 1.
**Lovens område.**
**§ 1.**

Lønmodtagere i offentlig eller privat tjeneste har ret til ferie og feriegodtgørelse efter reglerne i denne lov.

**§ 2.**

Loven gælder dog ikke for

1) landets, rigets, folkekirkens og folkeskolens tjenestemænd.
2) fiskere, i ansættelsesforhold, der ikke omfatter ferie med løn.

**§ 3.**

Denne lov gælder ikke for lønmodtager i offentlig tjeneste, der af landet, riget eller kommunerne er

hevur fingið vissað frítíð við løn, um so er, at landsstýrið metir viðkomandi skipan at veita løntakarum ikki verri kor, enn fyriskipanirnar í hesi lóg tryggja.

**2. stk.** Landsstýrið kann fyriseta, at lógin verður ikki at galda starv ella starvsøki, har við sáttmála ella fyriskipan er vissað løntakaranum frítíð við løn eftir reglum, sum bjóða ikki verri kor, enn fyriskipanirnar í hesi lóg.

**3. stk.** Henda lóg minkar einki um víðari fevnandi frítíðarrætt, sambært aðrari lóg ella fyriskipan eftir semju millum arbeiðsgevara og løntakara ella eftir gerðarrættardómi ella vanligum siði.

§ 4.

Landsstýrið tekur avgerð í ivaspurningum, um persónur kemur undir hesa lóg.

Kapittul 2.

**Innvinningarár og talið á fríðøgum**

§ 5.

Frítíðin er 26 dagar fyri fulla starvstíð í tíðarskeiðinum 1. apríl til 31. mars (innvinningarárið). Innvinningarárið kann í staðin vera álmanakkaárið, um hetta er ásett í sáttmála millum avvarðandi partar. Er starvstíðin stytri enn fult innvinningarár, verður frítíðin sett í mun til starvstíðina.

**2. stk.** Burturvera frá arbeiðinum sikret ferie med løn, hvis landsstyret skønner, at pågældende ordning ikke stiller lønmodtager værre, end bestemmelserne i denne lov tilsikrer.

**Stk. 2.** Landsstyret kan bestemme, at loven ikke kommer til anvendelse indenfor fag eller faglige områder, hvor der ved overenskomst eller regulativ er sikret lønmodtageren ferie med løn efter regler, der ikke stiller ham ringere end de i nærværende lov indeholdte bestemmelser.

**Stk. 3.** Denne lov medfører ingen indskrænkninger i videregående ferieret, der måtte være hjemlet ved andre love og bestemmelser, ved overenskomst mellem arbejdsgiver og lønmodtager eller ved voldgiftskendelse eller sædvane.

§ 4.

Landsstyret afgør i tvivlstilfælde, om en person henhører under denne lov.

Kapitel 2.

**Optjeningsår og feriens længde.**

§ 5.

Ferien udgør 26 dage for beskæftigelse i hele perioden 1. april til 31. marts (optjeningsåret). Optjeningsåret kan i stedet være kalenderåret, hvis dette er fastsat i overenskomst mellem vedkommende parter. Hvis beskæftigelsesperioden er kortere end et fuldt optjeningsår, sættes ferien i forhold til beskæftigelsesperioden.

**Stk. 2.** Fravær fra arbejdet, som

vegna sjúku, vanlukku, fyribils arbeiðssteðg av rakstrarligum ávum ella frítíð eftir hesari lóg, eins og burturvera vegna barnsburð skal ikki verða frádrigin við uppgerðini av starvstíðini, sum gevur rætt til fritíð.

**3. stk.** Frítíðarrætturin verður at rokna uttan mun til, um viðkomandi virki ella skip skiftir eigara í starvstíðini.

skyldes sygdom, ulykkestilfælde, midlertidig arbejdsstandsning af driftsmæssige årsager eller ferie i medfør af denne lov samt fravær i anledning af fødsel skal ikke fratrækkes i den beskæftigelsesperiode, der berettiger til ferie.

**Stk. 3.** Det er uden betydning for ferierettens beregning, om vedkommende virksomhed eller skib skifter ejer i beskæftigelsesperioden.

§ 6.

Løntakari, ið ikki hevur vunnið rætt til frítíð við løn ella fritíðarløn í 26 dagar, hevur tó rætt til at taka frí uttan løn ella frítíðarløn í upp til 26 dagar í einum frítíðarári.

§ 6.

Lønmodtager, der ikke er berettiget til ferie med løn eller feriegodtgørelse i 26 dage, har dog ret til at holde ferie uden løn eller feriegodtgørelser i op til 26 dage i et ferieår.

Kapittul 3.
**Frítíðarár og frítíðarskeið.**

Kapitel 3.
**Ferieår og ferieperiode.**

§ 7.

Frítíðin skal verða tikin í tíðarskeiðinum 2. mai til 1. mai (frítíðarárið).

**2. stk.** Frítíð eftir § 5 verður tikin áðrenn frítíð eftir § 6.

§ 7.

Ferien skal holdes i perioden 2. maj til 1. maj (ferieåret).

**Stk. 2.** Ferie efter § 5 skal holdes forud for ferie efter § 6.

§ 8.

Minst 18 dagar av frítíðini skulu gevast samanhangandi í tíðini 2. mai til 30. september (frítíðarskeiðið). Er løntakari uppsagdur, má tó uppsagnarfreistin í ongum føri skerjast við, at frítíðin verður løgd innan fyri uppsagnarfreistina.

**2. stk.** Frítíð út yvir teir 18 dag-

§ 8.

Mindst 18 dage af ferien skal gives i sammenhæng i tiden mellem den 2. maj og den 30. september (ferieperioden). Hvis lønmodtageren er opsagt, må dog opsigelsesfristen under ingen omstændigheder beskæres ved, at fritiden falder inden for opsigelsesfristen.

**Stk. 2.** Ferie ud over de 18 dage

arnar kann verða givin uttan fyri frítíðarskeiðið, tó seinast 1. mai árið eftir.

**3. stk.** Fyri fólk, sum starvast á skipi, kann frítíðin, tá viðurskiftini gera tað neyðugt, tó verða givin aðra tíð av árinum. Frítíðin skal falla, so skjótt skipsstarvið loyvir tað, og taka við á tí degi, sum báðir partar semjast um. Um ikki annað verður avrátt, skal frítíðin verða givin, tá ið skipið kemur til eina av hesum føroysku havnunum:

a. havnina, har skipið er skrásett,
b. havnina, har frítíðartakarin verður mynstraður,
c. havnina, har skipið endar ferð sína.

kan gives uden for ferieperioden, dog ikke senere end 1. maj året efter.

**Stk. 3.** For personer, der er ansat på skibe, kan ferien, hvor forholdene gør det påkrævet, dog henlægges til andre tidsrum af året. Ferien skal gives så snart, hensynet til skibstjenesten tillader det, og da fra det tidspunkt, hvorom gensidig aftale træffes. Med mindre andet aftales, skal ferien gives, når skibet anløber en af følgende færøske havne:

a. den havn, i hvilken skibet er hjemmehørende,
b. den havn, i hvilken den feriberettigede blev forhyret,
c. den havn, hvor skibets rejse slutter.

§ 9.

Arbeiðsgevarin ásetir í samráð við løntakaran, nær frítíðin skal takast og boðar honum frá hesum við rímiligari freist.

§ 9.

Arbejdsgiveren fastsætter efter forhandling med lønmodtageren, hvornår ferien skal holdes og giver ham meddelelse herom med en rimelig frist.

## Kapittul 4.
## Frítíðarløn og frítíð við løn.

§ 10.

Arbeiðsgevarin veitir løntakaranum frítíðarløn, ið er 10¼% av vunnari løn.

**2. stk.** Frítíðarlønin fellur til gjaldingar samstundis við lønini og verður goldin viðkomandi løntakarafelag ella, um einki umboðandi løntakarafelag finst, Frítíðargrunninum í varðveitslu, til frítíðin skal haldast, jbr. § 7.

## Kapitel 4.
## Feriegodtgørelse og ferie med løn.

§ 10.

Arbejdsgiveren yder lønmodtageren feriegodtgørelse med 10¼% af indtjent løn.

**Stk. 2.** Feriegodtgørelsen forfalder til betaling samtidig med lønnen og udbetales til vedkommende lønmodtagerforbund, hvor et sådant ikke forefindes, til feriefonden til opbevaring, til ferien skal holdes, jfr. § 7. Landsstyret

Landsstýrinum er heimilað at fyriseta nærri reglur fyri skipanina.

§ 11.

Mánaðarløntir løntakarar hava rætt til frítíð við løn. Veitt verður harafturat frítíðariskoyti, ið er 1½% av vunnari løn í undanfarna innvinningarári.

**2. stk.** Fer mánaðarløntur løntakari úr starvi, verður veitt honum frítíðarløn eftir § 10 fyri alla ta frítíð, hann eigur á. Samstundis sum hann fer úr starvinum, verður upphæddin goldin viðkomandi løntakarafelag ella, um einki umboðandi løntakarafelag finst, Frítíðargrunninum í varðveitslu, til frítíðin skal haldast, jbr. § 7.

§ 12.

Við útrokning av frítíðarløn og frítíðariskoyti verður ikki tald við løn, sum er útgoldin í frítíðini, veitt frítíðarløn ella útgoldið frítíðariskoyti.

§ 13.

Við útrokning av frítíðarløn og frítíðariskoyti teljast við allar skattskyldugar lønarveitingar.

**2. stk.** Fyri fiskimenn verður frítíðarlønin útroknað og útgoldin sambært galdandi sáttmála.

**3. stk.** Um so er, at lønin fult ella partvíst er kostur og innivist ella aðrir frír ágóðar, verður virðið av hesum at seta av landsstýrinum ella øðrum heimilaðum myndugleika. Hava partarnir avtalað eitt hægri virði, er hetta tó galdandi.

kan fastsætte nærmere regler for ordningen.

§ 11.

Månedslønnede lønmodtagere har ret til ferie med løn. Endvidere ydes et ferietillæg på 1½% af den løn, der er indtjent i det foregående optjeningsår.

**Stk. 2.** Hvis en månedslønnet lønmodtager fratræder stillingen, får han feriegodtgørelse efter § 10 for den ferie, han har tilgode. Samtidig med at han fratræder stillingen, udbetales beløbet til vedkommende lønmodtagerforbund eller, hvis et sådant ikke forefindes, til Feriefonden til opbevaring, indtil ferien skal holdes, jfr. § 7.

§ 12.

Ved beregning af feriegodtgørelse og ferietillæg ses der bort fra løn, der er udbetalt under ferien, ydet feriegodtgørelse eller udbetalt ferietillæg.

§ 13.

Ved beregning af feriegodtgørelse og ferietillæg medregnes al skattepligtig løn.

**Stk. 2.** For fiskere beregnes og udbetales feriegodtgørelsen i henhold til gældende overenskomst.

**Stk. 3.** Består lønnen helt eller delvis af kost og logi eller andre frie goder, beregnes værdien heraf af landsstyret eller anden bemyndiget myndighed. Har parterne aftalt en højere værdi, er denne dog gældende.

§ 14.

Í ti føri, at eitt virki verður steðgað í frítíðini, kann løntakari har, sum ikki eigur rætt til frítíð allar dagarnar, virkið er steðgað, ikki av steðginum krevja endurgjald út um ta frítíðarløn, sum viðkomandi eigur á eftir ásetingunum í hesari lóg.

§ 14.

Holdes en virksomhed lukket under ferie, kan lønmodtager, der ikke er berettiget til ferie i alle de dage, i hvilke virksomheden holdes lukket, ikke i anledning af lukningen kræve godtgørelse ud over den feriegodtgørelse, der tilkommer ham efter bestemmelserne i denne lov.

§ 15.

Viðvíkjandi løntakarum á skipi eigur landsstýrið heimild at gera tey avvik frá fyrisetanunum í hesari lóg, sum kunna vera neyðug og rímilig undir teim serligu viðurskiftum, sum elvast á sjónum; t.d. kunna eftir samráð við viðkomandi løntakarafeløg setast reglur, soleiðis at tann árliga frítíðin kann verða býtt ella samanløgd við komandi frítíð, og undir viðurskiftum, har okkurt serligt verður til hindurs fyri ti lógfyrisettu frítíð, frammíhjá løn og kostpeningur verða givin sum frítíðarendurgjald.

§ 15.

Landsstyret er bemyndiget til for så vidt angår lønmodtagere på skibe at gøre sådanne afvigelser fra lovens bestemmelser, som findes nødvendige og hensigtsmæssige som følge af de for søfarende gældende særlige forhold; der kan herunder efter forhandling med de pågældende lønmodtagerorganisationer fastsættes regler, hvorefter den årlige ferie kan deles eller sammenlægges med en efterfølgende ferie og efter omstændighederne i tilfælde, hvor særlige forhold træder hindrende i vejen for den foreskrevne ferie, kan ekstra løn og kostpenge gives som erstatning for ferien.

§ 16.

Verður frítíðarløn ikki goldin rættstundis, skal gjaldast 1,5% í rentum fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum.

§ 16.

Ved forsinket betaling af feriegodtgørelse betales renter heraf med 1½% for hver påbegyndt måned fra forfaldsdato.

Kapittul 5.

**Vanligar reglur.**

§ 17.

Rætturin til frítíðarløn, løn í frítíðini ella frítíðariskoyti fyrnast,

Kapitel 5.

**Almindelige bestemmelser.**

§ 17.

Krav på feriegodtgørelse, løn under ferie eller ferietillæg for-

um krav til rættin ikki verður fráboðað arbeiðsgevaranum fyri 1. apríl í frítíðarárinum, frítíðin skal takast.

**2. stk.** Ger arbeiðsgevarin ikki eftir kravinum, fyrnast tað, um ikki løntakarin uttan óneyðugt dvøl letur kravið fremja.

**3. stk.** Er kravið fyrnað, fer upphæddin í Frítíðargrunnin.

ældes, hvis det ikke rejses over for arbejdsgiveren inden den 1. april i det ferieår, i hvilket ferien skal holdes.

**Stk. 2.** Efterkommer arbejdsgiveren ikke kravet, forældes det, såfremt lønmodtageren ikke uden ugrundet ophold søger kravet gennemført.

**Stk. 3.** Er kravet forældet, tilfalder beløbet Feriefonden.

## § 18.

Frítíðarløn, ið ikki er tikin út í frítíðarárinum, sum frítíðin skuldi verið tikin í, fer í Frítíðargrunnin.

**2. stk.** Landsstýrið kann, tá serligar umstøður fyriliggja, loyva útgjalding av frítíðarløn til løntakara aftan á, at frítíðarárið er endað.

## § 18.

Feriegodtgørelse, der ikke er hævet inden udløbet af det ferieår, inden for hvilket ferien skulle have været holdt, tilfalder Feriefonden.

**Stk. 2.** Landsstyret kan, når særlige omstændigheder foreligger, tillade udbetaling af fericlønnen til lønmodtageren efter ferieårets udløb.

## § 19.

Avtala um at siga frá sær rætt til frítíð, frítíðarløn, frítíð við løn ella frítíðariskoyti er ógildug.

**2. stk.** Loyvt er ikki at fata øðrum rættin til vunna frítíðarløn, eins og hesin rættur ikki kann verða fyri rættarsókn.

## § 19.

Aftale, hvorved der gives afkald på ferie, feriegodtgørelse, løn under ferie eller ferietillæg er ugyldig

**Stk. 2.** Aftale om overdragelse af kravet på indtjent feriegodtgørelse er ugyldig, ligesom kravet ikke kan gøres til genstand for retsforfølgning.

## § 20.

Avgerð í ósemju arbeiðsgevara og løntakara millum um rættin til frítíð ella frítíðarløn verður tikin av Føroya Rætti.

## § 20.

Ved tvist mellem arbejdsgiver og lønmodtager om retten til ferie eller ferieløn træffes afgørelsen af Færøernes Ret.

Kapittul 6.
**Frítíðargrunnur.**
**§ 21.**

Frítíðargrunnurin er grunnur undir landsstýrinum.

**2. stk.** Frítíðargrunnurin tekur ímóti frítíðarløn í varðveitslu og syrgir fyri útgjalding, tá hon sambært hesa lóg kann útgjaldast viðkomandi løntakara.

**3. stk.** Fæ grunsins fer til at figgja tiltøk, ið útvega løntakarum frítíðarmøguleikar.

**4. stk.** Landsstýrið ásetir nærri reglur fyri virki grunsins og fyrisiting av grunninum.

Kapitel 6.
**Feriefond.**
**§ 21.**

Feriefonden er fond under landsstyret.

**Stk. 2.** Feriefonden modtager ferieløn til opbevaring og sørger for udbetaling, når den i henhold til denne lov kan udbetales til vedkommende lønmodtager.

**Stk. 3.** Fondens midler anvendes til financiering af formål, der tilvejebringer feriemuligheder for lønmodtagere.

**Stk. 4.** Landsstyret fastsætter nærmere regler for fondens virksomhed og administration.

Kapittul 7.
**Revsireglur.**
**§ 22.**

Revsaður við sekt verður

1. arbeiðsgevari, sum uttan ímiliga orsøk letur vera við at gjalda vunna frítíðarløn, løn í frítíðini ella frítíðariskoyti, hóast hann verður kravdur,
2. arbeiðsgevari, sum ger avtalu um at siga frá sær skylduna til at veita frítíð, frítíðarløn, løn í frítíðini ella frítíðariskoyti,
3. persónur, sum ger avtalu um avhending av rætti til vunna frítíðarløn.

**2. stk.** Í fyriskipanum givnar í heimild í hesari lóg kann áleggjast revsing við sekt fyri brot á reglurnar í nevndu fyriskipanum.

**3. stk.** Verður brot útint av partafelag, lutafelag ella líknandi,

Kapitel 7.
**Straffebestemmelsen.**
**§ 22.**

Med bøde straffes

1. arbejdsgiver, der trods påkrav uden rimelig grund undlader at yde skyldig feriegodtgørelse, løn under ferie eller ferietillæg,
2. arbejdsgiver, der indgår aftale om afkald på ret til ferie, feriegodtgørelse, løn under ferie eller ferietillæg,
3. den, der indgår aftale om overdragelse af kravet på indtjent feriegodtgørelse.

**Stk. 2.** I forskrifter, der udstedes i henhold til denne lov, kan der fastsættes straf af bøde for overtrædelse af bestemmelser i forskrifterne.

**Stk. 3.** For overtrædelse, der begås af et aktieselskab, andels-

kann áleggjast felagnum sektarábyrgd.

Kapittul 8.
**Leinging av frítíðini.**
**§ 23.**

Talið á fridøgum nevnt í § 5, 1. stk. verður broytt soleiðis:

Í innvinningarárinum 1987/88 28. Í innvinningarárinum 1988/89 og framyvir 30.

**2. stk.** Prosentið nevnt í § 10, 1. stk. verður broytt soleiðis:

Í innvinningarárinum 1987/88 11. Í innvinningarárinum 1988/89 og framyvir 12.

**3. stk.** Dagatalið nevnt í § 6 verður broytt soleiðis:

Í frítíðarárinum 1989/90 og framyvir 30.

**4. stk.** Tað í § 8, 1. og 2. stk. nevnda dagatalið verður í frítíðarárinum 1989/90 og framyvir broytt til 24.

Kapittul 9.
**Gildisfyriskipanir.**
**§ 24.**

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1986, og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 31 frá 19. mars 1951 um frítíð við løn við seinri broytingum og § 4, 4. stk. og 5. stk. í løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlingaviðurskifti við seinri broytingum.

selskab eller lignende, kan der pålægges selskabet som sådant bødeansvar.

Kapitel 8.
**Forlængelse af ferien.**
**§ 23.**

Antallet af fridage nævnt i § 5, stk. 1 ændres således:

1 optjeningsåret 1987/88 28. 1 optjeningsåret 1988/89 og fremover 30.

**Stk. 2.** Procentsatsen nævnt i § 10, stk. 1 ændres således:

1 optjeningsåret 1987/88 11. 1 optjeningsåret 1988/89 og fremover 12.

**Stk. 3.** Antallet af dage nævnt i § 6 ændres således:

1 ferieåret 1988/89 28. I ferieåret 1989/90 og fremover 30.

**Stk. 4.** Antallet af dage nævnt i § 8, stk. 1 og 2 ændres i ferieåret 1989/90 og fremover til 24.

Kapitel 9.
**Ikrafttrædelsesbestemmelser.**
**§ 24.**

Denne lov træder i kraft 1. april 1986, og samtidig ophæves lagtingslov nr. 31 af 19. marts 1951 om ferie med løn med senere ændringer og § 4, stk. 4 og 5 i lagtingslov nr. 29 af 12. oktober 1954 om lærlingeforhold med senere ændringer.

**Viðmerkingar:**

Síðan samtíðarskattaskipanin fór at virka, hevur tann vansin víst seg, at skattatrekkið av útgoldnari frítíðarløn til tímalønt er munandi hægri, enn tað meðalprosentið, tey tímaløntu annars rinda í skatti av ársinntøkuni.

Fakfeløgini hjá teimum tímaløntu hava gjørt vart við hesi viðurskifti og ynskt broyting gjørda, so skatttir av frítíðarløninni ikki verður hægri enn av løninni annars.

Tá hetta landsstýrið kom til, ásannaði tað, at her var ein vansi, ið átti at loysast.

Landsstýrið gjørdi tí av at seta nøkur umboð fyri fakfeløgini saman við einum løgfrøðingi fyri at finna út av, hvussu sleppast kundi undan hesum skattatrekkinum.

Tey komu við einum uppskoti um, hvussu hesin vansin kundi loysast. Í hesum sambandi kom landsstýrið til ta ásannan, at verandi lóg er gomul og trongdi til ábøtur.

Landsstýrið hevur tí valt at endurskoða lógina og loyvt sær at skotið upp at leingja frítíðina úr 4 til 5 vikur, so frítíðin hjá okkum fær somu longd sum í okkara grannalondum. Samstundis er neyðugt at hækka frítíðarlønarløn arprosentið úr 9½ til 12.

Orsakað av teimum búskaparligu viðurskiftunum í samfelagnum og við teirri ásannan, at ein slík broyting vil altíð leggja upp í eitt sáttmálaskeið, hevur landsstýrið valt at lata hækkingina fara fram í trimum stigum.

Tí verður skotið upp, at frítíðin verður økt við 2 døgum í frítíðarárinum 1987/88, við 2 døgum í frítíðarárinum 1988/89 og við 2 døgum í frítíðarárinum 1989/90.

Skotið verður upp, at frítíðarlønin hækkar við ¾% fyrsta og annað árið og við 1% triðja árið.

Í mun til verandi lóg viðførir uppskotið hesar høvuðsbroytingar og nýskapanir:

1. Fiskimenn undir sáttmála og lærlingar koma eisini undir lógina.
2. Frítíðarlønin fellur til gjaldingar samstundis við løninni so hvørt, hon er vunnin og verður latin avvarðandi løntakarafelag ella í øðrum lagi Frítíðargrunninum í varðveitslu, til frítíðin skal takast.
3. Rentur verða tilskrivaðar frítíðarløninni, um arbeiðsgevarin ikki rindar hana rættstundis.
4. Frítíðarlønin hækkar 1. apríl til 10¼% og eftir 3 árum stigvíst til 12%, og frítíðin verður somuleiðis stigvíst longd við 6 døgum eftir trimum árum.
5. Mánaðarløntir løntakarar fáa frítíð við løn og eitt frítíðarískoyti upp á 1½%.
6. Arbeiðsgevarin skal í samráð við løntakaran áseta, nær frítíðin skal takast.
7. Avtalur um at siga frá sær rætt til frítíð, frítíðarløn, frítíð við løn ella frítíðarískoyti eru ógildugar.
8. Fyrnað krøv upp á frítíðarløn v. m. og frítíðarløn, ið ikki er tikin út í frítíðarárinum, fara í Frítíðargrunnin.

9. Fæ Frítíðargrunsins fer til at figgja tiltøk, ið útvega løntakarum frítíðarmøguleikar.
10. Revsing við sekt kann áleggjast arbeiðsgevara, um hann sýtir fyri at gjalda frítíðarløn v. m. ella ger avtalu við løntakara um at siga frá sær frítíð, frítíðarløn ella aðrar veitingar eftir lógaruppskotinum.

    Partafeløg, lutafeløg ella líknandi feløg kunna eisini revsast fyri nevndu lógarbrot.

Uppskotið førir við sær, at verandi frítíðarmerkjaskipan, ið er ásett við kunngerð nr. 33 frá 30. mars 1951, fer úr gildi.

**Viðmerkingar til einstøku kapitlarnar.**

**1. kapittul.**

Burtursæð frá regluni í § 4 eru hinar regluruaf óbroyttar í mun til galdandi lóg.

Reglan í § 2 er tó broytt í tann mun, at tað nú einans eru tænastumenn hjá landinum, statinum, fólkakirkjuni og fólkaskúlanum, ið ikki koma undir lógina, meðan starvandi á skipi, fiskimenn íroknaðir og lærlingar, koma undir hetta lógaruppskot.

Avgerandi fyri, um persónur kemur undir lógina, er, at viðkomandi er løntakari, t. d. at talan skal vera um lønandi vinnu hjá arbeiðsgevara. Rindar arbeiðsgevarin ikki løn fyri tað arbeiði, ið útint verður, kemur viðkomandi ikki undir lógina.

Ein persónur verður ikki roknaður sum løntakari, tá talan er um:

— samsýning fyri stakar veitingar, t. d. av listarligum slagi, fyrilestrar, blaðgreinar o. l.,
— álitisstarv, sum viðkomandi er valdur í, t. d. løgtingslimur, kommunustýrislimur v. m.,
— nevndarlim í partafelag v. m.,
— álitisstarv sum t. d. stjóra í skrásettum partafelag,
— persón, ið fær fólkapensjón, avlamispensjón ella aðrar almannaveitingar.

Til regluna í § 4 er at siga, at landsstýrið skal samráðast við avvarðandi partar, áðrenn avgerðir í hesum ivaspurningum verða tiknar.

Avgerð landsstýrisins kann skjótast inn fyri Føroya Rætt, og hesir ivaspurningar kunna latast Føroya Rætti til avgerðar, sjálvt um landsstýrið ikki hevur tikið avgerð í teimum.

**2. kapittul.**

Í § 5 er ásett, at frítlðin er 26 dagar fyri fulla starvstið í innvinningarárinum, ið er tíðarskeiðið frá 1. apríl til 31. mars.

Við fulla starvstíð skilst setannartíðarskeiðið hjá viðkomandi arbeiðsgevara. Tað hevur sostatt ongan týdning, um viðkomandi løntakari í hesum tíðarskeiði hevur arbeitt niðursetta tíð, t.d. aðru hvørja viku ella 2 ella 3 dagar um vikuna. Hin vegin vinnur løntakari, sum samstundis arbeiðir hjá fleiri arbeiðsgevarum, ikki rætt til eyka frítíð, men einans rætt til frítíðarløn ella løn.

Innvinningarárið kann ístaðin vera álmanakkaárið, um tað er ásett í sáttmála millum partar á arbeiðsmarknaðinum. Henda regla ber eisini í sær, at partar framyvir kunnu avtala at broyta hetta tíðarskeiðið at fylgja álmanakkaárinum, um løntakarin annars ikki verður verri fyri, hvat rætti til frítíð, frítíðarløn v.m. viðvíkur.

Hóast orðið innvinningarár ikki verður nýtt í galdandi lóg, fyriliggur við hesum uppskoti eingin verulig broyting. Tann rættur til frítíð, ið vunnin verður í hesum tíðarskeiði, skal takast í eftirkomandi fritíðarári, ið byrjar 2. mai sama ár og endar 1. mai árið eftir.

Reglurnar í 2. og 3. stk. eru óbroyttar í mun til galdandi lóg.

Reglan í § 6 gevur løntakarunum rætt til at taka frí uttan løn ella frítíðarløn í upp til 26 dagar í einum frítíðarári, hóast viðkomandi ikki hevur vunnið henda rættin í undanfarna innvinningarári. Arbeiðsgevararnir hava hin vegin eina samsvarandi skyldu til at lata løntakara taka hesa frítíð. Undir hesa regtu koma t.d. ungfólk, ið júst eru byrjað at arbeiða aftan á lokna skúlagongd, og fólk, sum av einari ella aðrari orsøk hava ikki verið í arbeiði í undanfarna innvinningarári.

**3. kapittul.**

§ 7, 1. stk. ásetir, at frítiðin skal takast í fritiðarárinum, ið gongur frá 2. mai til 1. mai. Í § 8, 1. stk. verður ásett, at minst 3 vikur av frítíðini skulu gevast samanhangandi í frítíðarskeiðinum, ið gongur frá 2. mai til 30. september, meðan tað í 2. stk. er ásett, at frítíð út yvir tær 3 vikurnar kann gevast uttan fyri frítíðarskeiðið, frá 1. oktober til 1. mai árið eftir.

Í mun til galdandi lóg fyriliggur her tann broyting, at nú er ásett eitt frítíðarár, og at frítíð uttan fyri frítíðarskeiðið kann gevast í seinasta lagi 1. mai, mótvegis 31. mars, sambært galdandi lóg.

Broytingin førir við sær, at frítíðarárið 1986/87 fevnir um tíðarskeiðið 2. mai 1986 til 1. mai 1987.

§ 8, 1. stk. er ásett, at ein uppsagnarfreist má ikki skerjast við, at frítíðin verður løgd innan fyri uppsagnarfreistina, um løntakarin verður uppsagdur. Hetta er galdandi, bæði tá frítíðin verður ásett, aftan á uppsøgn er givin, og tá frítíðin er ásett, áðrenn viðkomandi verður uppsagdur.

Reglan í § 8, 3. stk. er óbroytt í mun til galdandi lóg.

Í § 9 er fyrisett, at arbeiðsgevarin ásetir í samráð við løntakaran, nær frítíðin skal takast og boðar honum frá hesum við rímiligari freist.

Í galdandi lóg er ásett, at arbeiðsgevarin ger av, nær frítíðin skal vera. Í uppskotinum liggur sostatt tann broyting, at frítíðin nú skal ásetast eftir samráðing millum arbeiðsgevaran og løntakaran. Harumframt skal ásetingin av frítíðini fráboðast við rímiligari freist. Tað ber neyvan til alment at siga, hvussu langt tíðarskeið «rímilig freist» fevnir um, tað veldst um tær ítøkiligu umstøðurnar, men eitt tíðarskeið stytri enn 1 mánaði vil aloftast ikki lúka hesa freist.

**4. kapittul.**

Í § 10, 1. stk. verður ásett, at frítíðarløntin er 10¼% av vunnari løn, og í § 11, 1. stk. er ásett, at mánaðarløntir løntakarar hava rætt til frítíð við løn, umframt eitt frítíðariskoyti upp á 1½% av vunnari løn í undanfarna innvinningarári.

Fleiri mánaðarløntir løntakarabólkar á arbeiðsmarknaðinum hava rætt til nevnda frítíðariskoyti sambært sáttmála. Tey ásettu prosenttølini eru sett fyri at javnstilla tímalønt og mánaðarlønt hvat viðvíkir frítíðarløn.

Um útrokningargrundarlagið av frítíðarløn og frítíðariskoyti verður vist til §§ 12 og 13 í uppskotinum.

Reglan í § 10, 2. stk. ásetir eina skipan fyri útgjalding av frítíðarløninni. Her er talan um eina broyting í mun til galdandi lóg.

Skipanin tryggjar, at arbeiðsgevarin rindar frítíðarlønina saman við løninni so hvørt, hon verður útgoldin, meðan løntakarin hin vegin ikki fær frítíðarlønina útgoldna, fyrr enn hann, sambært reglurnar í hesum uppskoti, hevur rætt til at taka frítíðina.

Sambært skipanina er meginreglan tann, at arbeiðsgevarin skal gjalda frítíðarlønina til løntakarafelagið hjá viðkomandi løntakara, sum hevur peningin í varðveitslu vegna løntakaran, til frítíðin verður tikin. Tað eru sostatt tey einstøku løntakarafeløgini, sum hava skyldu til at útgjalda ta varðveittu frítíðarlønina til løntakaran.

Tá trygd neyvan fæst fyri, at allir løntakarar, ið koma undir skipanina, hava eitt umboðandi løntakarafelag aftan fyri seg, skal frítíðarlønin í hesum serstøku førum rindast í Frítíðargrunnin, sum verður umsitin av landsstýrinum. Frítíðargrunnurin hevur tá somu skyldur sum løntakarafeløgini hvat móttiknu frítíðarlønini viðvíkir.

Frítíðariskoytið, sambært § 11, 1. stk., skal ikki gjaldast løntakarafeløgunum ávikavist Frítíðargrunninum, men rindast løntakaranum beinleiðis, tá hann tekur frítíðina.

At enda í 2. stk. er ásett, at landsstýrinum er heimilað at fyriseta nærri reglur fyri skipanina. Hetta kemst av, at neyðugt verður við nágreiniligum fyrisetingum viðvíkjandi uppgávu løntakarafelaganna og arbeiðsgevaranna fyri at fáa skipanina at virka eftir ætlan. Eisini verður neyðugt at áseta nærri reglur um skattingina av frítíðarløninni, sum líkningarráðið hevur

heimild til at áseta við kunngerð sambært § 28, 4. stk. í samtíðarskattalógini.

Í § 11, 2. stk. er ásett, at um mánaðarløntur løntakari fer úr starvi, skal arbeiðsgevarin rinda honum frítíðarløn fyri alla ta frítíð, hann eigur á eftir frammanfyri nevndu skipan, ið er galdandi fyri tímalønt, t.v.s. 10¼% av vunnari løn.

Grundarlagið fyri útrokningina av frítíðarløn og frítíðariskoyti er ásett í § 12 og § 13.

Í § 13, 1. stk. er ásett, at útrokningargrundarlagið eru allar skattskyldugar lønarveitingar. Við hesum verður víst til tær lønarinntøkur, sum sambært samtíðarskattalógina verða roknaðar sum A-inntøka, nevniliga alt, sum er lagt inn í peningi fyri persónligt arbeiði í tænastu fyri onnur, herundir løn, samsýningar, tantiéme, provisjón og aðrar líkar samsýningar.

Við í útrokningargrundarlagnum er ikki t.d. gáva frá arbeiðsgevara til løntakara í samband við jubilæum ella skattskyldugar almannaveitingar, eitt nú dagpeningur og stuðul undir arbeiðsloysi.

Í 2. stk. er ásett, at útrokningargrundarlagið fyri fiskimenn og útgjaldingin skal fylgja galdandi sáttmála. Her verður sipað til sáttmálan millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag, ið áseitir, at frítíðarløn til manningina (skiparin undantikin) skal roknast av *einum* fiskimannaparti.

Í 3. stk. er ásett, at um partarnir ikki hava avtalað eitt hægri virði av kosti og innivist ella øðrum fríum ágóðum, verður tað at áseta av landsstýrinum ella øðrum heimilaðum myndugleika. Annar heimilaður myndugleiki kann í hesum føri vera Líkningarráð Føroya, sum á hvørjum ári ásetir virðið av fríum ágóðum við heimild í samtíðarskattalógini.

Reglurnar í §§ 14 og 15 eru óbroyttar í mun til galdandi lóg.

Reglan í § 16, sum áleggur arbeiðsgevaranum at gjalda 1½% í rentu, um frítíðarlønin ikki verður goldin rættstundis, er nýggj í mun til galdandi lóg. Rentuupphæddin skal góðskrivast løntakaranum.

**5. kapittul.**

Reglurnar í §§ 17-19 eru nýggjar, meðan reglan í § 20 er óbroytt í mun til galdandi lóg.

Til § 17, 1. stk. er at siga, at kravið skal fráboðast fyri 1. apríl í frítíðarárinum, frítíðin skal takast. Frítíðarløn, løn í frítíðini ella frítíðariskoyti, sum er innvunnið í innvinningarárinum 1986/87 (1. apríl 1986 - 31. mars 1987) fyrnast sostatt, um krav til hesi rættindi ikki verður fráboðað arbeiðsgevaranum fyri 1. apríl 1988.

Í 2. stk. er ásett, at tað er ikki nóg mikið, at løntakarin fráboðar arbeiðsgevaranum rættstundis. Um arbeiðsgevarin ikki letur við seg koma, skal løntakarin uttan óneyðugt dvøl lata kravið fremja, sambært vanliga manna-

gongd í innheintingarmálum. Tað áliggur eisini viðkomandi løntakarafelag ella Frítíðargrunninum uttan óneyðugt dvøl at lata kravið fremja, til málið møguliga verður latið rættinum.

Í 3. stk. er ásett, at fyrnað krøv sambært 1. og 2. stk. fara í Frítíðargrunnin. Sostatt kemur tað ikki arbeiðsgevaranum til góðar, at kravið er ikki fráboðað rættstundis og latið framt uttan óneyðugt dvøl.

Frítíðargrunnurin skal krevja og innheinta fyrnaðar upphæddir hjá arbeiðsgevarunum.

Kravið hjá Frítíðargrunninum er umfatað av 5-ára fyrningarfreistini. Freistin gongur frá 1. mai aftan á at frítíðarárið, frítíðin skuldi verið tikin í, er endað.

Reglan í § 18, 1. stk. er ein avleiðing av, at fritiðin skal takast í fritíðarárinum, jbr. § 7. Sostatt skal frítíðarløn, sum er vunnin í innvinningarárinum 1986/87 (1. apríl 1986 - 31. mars 1987), takast út í seinasta lagi 1. mai 1988, annars skal upphæddin gjaldast Frítíðargrunninum.

Undantaksloyvi til útgjalding sambært 2. stk. kann gevast, t.d. tá løntakarin vegna sjúku, barnsburð og tilhald uttanlands hevur ikki havt møguleika fyri at tikið frítíðina. Eisini kann loyvi gevast, tá løntakarin hevur tikið ta frítíð, ið svarar til vunnu fritíðarlønina. Undantaksloyvi til løntakarar á skipi verða givin, tá tey metast neyðug og rímilig undir teimum serligu viðurskiftum, sum elvast á sjónum.

Reglan í § 19, 1. stk. merkir, at ein løntakari, sum hevur sagt frá sær rætt til frítíð, frítíðarløn, frítíð við løn ella frítíðariskoyti kann gera hetta krav galdandi mótvegis arbeiðsgevaranum, hóast hann áður hevur sagt frá sær rættin.

T.d. er avtala um, at frítíðarlønin er íroknað lønini ógildug. Løntakarin kann sostatt krevja frítíðarløn, hóast ein tílík avtala er gjørd.

Beinleiðis avrokning av frítíðarløn til løntakaran er ikki í tráð við ásetingarnar í § 10, 2. stk. Hetta er galdandi, hóast løntakarin hevur góðtikið henda framferðarháttin. Hóast løntakarin hevur fingið frítíðarlønina goldna í hondin, kann hann sostatt eftir § 10, 2. stk. krevja, at arbeiðsgevarin rindar frítíðarlønina til tað umboðandi løntakarafelagið ávikavist Frítíðargrunnin.

Arbeiðsgevarin hevur vanliga ikki rætt til at mótrokna í frítíðarløn v.m. — frítíðarlønin skal vera til taks, tá fritíðin verður tikin.

Hvat skattaeftirstøðum viðvíkir, kann skattur verða hildin aftur í frítíðarløn v.m., sum verður útgoldin, meðan frítíðin verður tikin.

Í 2. stk. er ásett, at avhending av rætti til vunna frítíðarløn ikki er loyvd. Hetta er eisini galdandi fyri veðseting. Rætturin kann heldur ikki verða fyri rættarsókn, t.d. figgjarúttøku, eins og hesin rættur ikki gongur inn í trotabúgv løntakarans.

**6. kapittul.**
Sum ávist frammanfyri, fær Frítíðargrunnurin í cinstøkum førum somu uppgávur sum løntakarafeløgini í samband við varðveitslu og útgjalding av frítíðarløn hjá løntakarum, ið ikki hava umboðandi løntakarafelag aftan fyri seg.

Harumframt fara tær fyrnaðu frítíðarløna rupphæddirnar í grunnin, og grunnurin hevur í hesum sambandi skyldu til at innheinta upphæddirnar hjá viðkomandi arbeiðsgevara.

Tað er ásett, at fæ grunsins skal nýtast til at fíggja tiltøk, ið útvega løntakarum frítíðarmøguleikar. Landsstýrið ásetir nærri reglur um hesi viðurskifti.

**7. kapittul.**
Reglur viðvíkjandi revsing eru nakað víðkaðar í mun til revsireglurnar í galdandi lóg.

Til § 22, 1. stk. er at viðmerkja, at einans arbeiðsgevarin verður revsaður, um avtala við løntakaran verður gjørd um at siga frá sær rætt til frítíð, frítíðarløn v. m.

Viðvíkjandi krav løntakarans til frítíðarløn v. m. verður vist til viðmerkingarnar til § 17, 1. stk. frammanfyri.

Ikki einans hann, ið avhendar rætt til vunna frítíðarløn, kann revsast, men eisini hann, ið móttekur henda rætt.

Í 3. stk. er heimilað eisini at revsa juridiskar persónar fyri brot á reglurnar í uppskotinum.

**8. kapittul.**
Talið av frídøgum verður hækkað stigvíst 2 dagar um árið, soleiðis at frítíðin í frítíðarárinum 1989/90 verður 30 dagar ella 5 vikur.

Samsvarandi verður frítíðarløn in hækkað stigvíst til 12%.

Í 3. stk. verður rætturin at halda frí uttan løn ella frítíðarløn hækkaður samsvarandi.

Viðvíkjandi 4. stk. er at siga, at teir 18 dagarnir nevndir í § 8, ið skulu gevast samanhangandi, ikki verða hækkaðir stigvíst, men í einum til 24 dagar í 1989/90 og framyvir.

1. viðgerð 23. januar 1986. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 20. mars 1986 legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 19. december 1985 og undir 1. viðgerð tann 23. januar 1986 beint í arbeiðaramálanevndina.

Arbeiðaramálanevndin hevur viðgjørt málið. Undir viðgerðini hevur nevndin hildið fundir við Føroya skipara- og navigatørfelag, Føroya reiðarafelag fyri fiskiskip og Føroya arbeiðsgevarafelag eftir áheitan frá nevndu feløgum. Nevndin hevur eisini viðgjørt brøv frá Starvsmannafelagnum, dagfest ávikavist 4. og 7. februar 1986.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Øssur av Steinum, Jørgen Thomsen og Sverre Midjord) kann eftir viðgerðina taka undir við uppskoti landsstýrisins, men mælir til nakrar broytingar, m. a. í løgtingslóg um studning til fiskivinnuna og løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna fyri at fáa samljóð millum lóg um frítíð við løn og aðra lóggávu.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

1. § 8, 3. stk. verður orðað soljóðandi:
   »Fyri fólk, sum starvast á skipi, kann frítíðin, tá viðurskiftini gera tað neyðugt, tó verða givin aðra tíð av árinum. Frítíðin skal falla, so skjótt skipsstarvið loyvir tað, og taka við á tí degi, sum báðir partar semjast um.«
2. Sum nýggj § 25 verður sett:
   »Samstundis sum henda lóg fær gildi, verður § 6 í løgtingslóg nr. 22 frá 18. mars 1980 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna við seinni broytingum orðað soljóðandi:
   »Tá fiskimenn sambært sáttmála eiga frítíðarløn av fiskiparti og minstuløn, rindar lønjavningargrunnurin frítíðarlønina av minstulønini sambært løgtingslóg um fritíð við løn.« «
3. Í løgtingslóg nr. 31 frá 29. mai

1. § 8, stk. 3 affattes således:
   »For personer, der er ansat på skibe, kan ferien, hvor forholdene gør det påkrævet, dog henlægges til andre tidsrum af året. Ferien skal gives, så snart hensynet til skibstjenesten tillader det, og da fra det tidspunkt, hvorom gensidig aftale træffes.«
2. Som ny § 25 indsættes:
   »Samtidig som denne lov træder i kraft, affattes § 6 i lagtingslov nr. 22 af 18. marts 1980 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet med senere ændringer således:
   »Såfremt fiskere i henhold til overenskomst har ret til feriegodtgørelse af fangstandel og mindsteløn, yder lønregulceringsfonden feriegodtgørelse af mindstelønnen efter reglerne i lagtingslov om ferie med løn.« «
3. § 7 i lagtingslov nr. 31 af 29.

1985 um studning til fiskivinnuna verður § 7 orðað soljóðandi:

»Tá fiskimenn sambært sáttmála ciga frítíðarløn av fiskiparti og prísviðbót, rindar lønjavningargrunnurin frítíðarlønina av manningarstudningi og prísískoyti sambært løgtingslóg um frítíð við løn.«

maj 1985 om støtte til fiskerierhvervet affattes således:

»Såfremt fiskere i henhold til overenskomst har ret til feriegodtgørelse af fangstandel og pristilskud, yder lønreguleringsfonden feriegodtgørelse af mandskabstilskud og pristillæg efter reglerne i lagtingslov om ferie med løn.«

**4.** Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verða soljóðandi broytingar til 4. kapittul:

Fjórtandi petti verður orðað soljóðandi:

»Í 2. stk. er ásett, at útrokningargrundarlagið fyri fiskimenn, og útgjaldingin skal fylgja tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála.«

Síðsta petti verður orðað soljóðandi:

»Reglan í § 16, sum áleggur arbeiðsgevaranum at gjalda 1½% í rentu, um frítíðarlønin verður ikki goldin rættstundis, er nýggj í mun til galdandi lóg.«

Minnilutin (Jógvan Sundstein og Ivan Johannesen) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins uttan so, at § 10, 2. stk. verður broytt og setir tí fram soljóðandi

## Broytingaruppskot

**5.** § 10, 2. stk. verður orðað soljóðandi:

»Frítíðarlønin fellur til gjaldingar samstundis við lønini og verður goldin viðkomandi løntakara á bundna konto, til fritiðin skal haldast, jbr. § 7. Tó kann frítíðarlønin eisini gjaldast Fritiðargrunninum í varðveitslu, til frítíðin skal haldast, jbr. § 7. Landsstýrinum er heimilað at fyriseta nærri reglur fyri skipanini. Skipanin

**5.** § 10, stk. 2 affattes således:

»Feriegodtgørelsen forfalder til betaling samtidig med lønnen og udbetales til vedkommende lønmodtager på bunden konto, til ferien skal holdes, jfr. § 7. Dog kan feriegodtgørelsen udbetales til Ferielonden til opbevaring, til ferien skal holdes, jfr. § 7. Landsstyret kan fastsætte nærmere regler for ordningen. Ordningen skal godken-

skal góðkennast av løgtingsins figgjarnevnd.«

des af lagtingets finansudvalg.«

2. viðgerð 24. mars 1986. Broytingaruppskotið frá meirilutanum í arbeiðaramálanevndini, pkt. 1 varð samtykt við 18-0, pkt. 2-4 vóru samtykt 17-0. Broytingaruppskotið frá minnilutanum fall við 8-0 atkvøðum. § 1 samtykt við 18-0, §§ 2-12 samtyktar við 18-0, § 13, 1. stk. samtykt við 18-0, § 13, 2. stk. samtykt við 17-0, § 13, 3. stk. samtykt við 18-0, §§ 14-21 samtykt við 18-0, § 22 samtykt við 17-0, §§ 23-24 samtyktar við 18-0. Við 18-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

24. mars 1986 løgdu tingmenninir Øssur av Steinum, Sverre Midjord, Jørgen Thomsen, Ivan Johannesen og Dánjal P. Danielsen fram soljóðandi:

**Ískoytisálit**

**til**

**álit**

Meirilutin (Øssur av Steinum, Jørgen Thomsen og Sverre Midjord) er samdur um, at feløgini hvørt sær eiga at lata limirnar taka støðu til á aðalfundi, um felagið ella teir einstøku løntakararnir skulu hava rentuna av frítíðarløninni fyri ta tíð, hon stendur á konto hjá løntakarafeløgunum.

Áðrenn 3. viðgerð á seinni fundi sama dag legði Adolf Hansen fram hesa útgreining til løgtingsmál nr. 45/1985:

Nýtt navn á tingmáli nr. 45/1985:

løgtingsmál nr. 45/1985:
- I Løgtingslóg um frítíð við løn.
- II Løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.
- III Løgtingslóg um studning til fiskivinnuna.

3. viðgerð sama dag. Uppskotið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1302-5-4.
Lóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn.
Lóg nr. 58 frá 14. mai 1986 um broyting í løgtingslóg um studning til fiskivinnuna.

Lóg nr. 59 frá 14. mai 1986 um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.

# 46. Broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging

Ár 1986, hósdagin 16. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentustudning til samansparing til húsabygging.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 85 frá 24. oktober 1978, sum broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 21. mars 1982 um rentustudning til samansparing til húsabygging, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 3, 2. stk. verður »20.000 kr.« broytt til: »30.000 kr.« og »100.000 kr.« til: »300.000 kr.«
2. Í § 4 verður »100.000 kr.« broytt til: »300.000 kr.« og »2% p. a.« til: »3% p. a.«.
3. Í § 5, 4. stk. verður »12 ár« broytt til: »8 ár«.
4. Í § 5 verður nýtt 5. stk. orðað soleiðis:

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om rentetilskud til opsparing til boligbyggeri.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 85 af 24. oktober 1978, som ændret med lagtingslov nr. 80 af 21. maj 1982 om rentetilskud til opsparing til boligbyggeri, foretages følgende ændringer:

1. I § 3, stk. 2, ændres »20.000 kr.« til: »30.000 kr.« og »100.000 kr.« til: »300.000 kr.«
2. I § 4 ændres »100.000 kr.« til: »300.000 kr.« og »2% p. a. til: »3% p. a.«.
3. I § 5, stk. 4 ændres »12 år« til: 8 år«.
4. I § 5 affattes nyt stk. 5 således:

»5. stk. Landsstýrið kann í serligum førum eftir umsókn frá kontoeigara geva samansparing leysa, hóast treytirnar í 2., 3. og 4. stk. ikki eru loknar.«

5. 5. stk. verður 6. stk., sum verður orðað soleiðis:

6. stk. Verður samansparingin øll ella partur av henni givin leys eftir 2., 3., 4. ella 5. stk., skal rentustudningurin til ta peningaupphædd, ið givin verður leys, og renta av rentustudninginum gjaldast landskassanum aftur.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

»**Stk. 5.** Landsstyret kan, når særlige omstændigheder foreligger efter ansøgning fra kontohaveren, frigive opsparingen, selvom betingelserne i stk. 2, 3 og 4 ikke er opfyldt.«

5. Stk. 5 bliver til stk. 6, som affattes således:

»**Stk. 6.** Hvis opsparingen frigives helt eller delvis efter stk. 2, 3, 4 og 5, skal rentetilskuddet til det frigivne beløb og renterne af tilskuddet tilbagebetales landskassen.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Lógin um rentustudning til samansparing til húsabygging er frá 1978, sí løgtingstíðindi 1977 A, bls. 393 ff og 1978 A, bls. 33 ff. Lógin kom samstundis sum nýggja lógin um húsalánsgrunnin og lógin um íbúðagrunnin.

Tað vísti seg skjótt aftaná, at lógin var komin í gildi, at fólk ikki gjørdu brúk av henni í tann mun, ætlanin hevði verið, og vóru ymiskar hugsanir um, hvar orsøkin var til hetta. Í 1982 kom uppskot fyri tingið um at broyta lógina við tí í hyggju, at fleiri fóru at brúka møgulcikarnar eftir lógini. Mett varð, sí løgtingstíðindi 1981, bls. 435 ff., at ein av høvuðsgrundunum fyri, at lógin var so lítið nýtt, var, at lógin ikki heimilaði uppsparing til keyp av húsum/íbúð ella grundstykki, men bert til bygging av sethúsum, og tí varð samtykt at útvega heimild fyri hesum eisini. Eisini varð samtykt, at upphæddirnar, bæði tann árliga og samlaða uppsparingin við rentustudningi, vórðu hækkaðar.

Uppskotið til broyting av lógini varð samtykt á løgtingi 23. apríl 1982 við 31 atkvøðum fyri.

Hóast hesa broyting, so eru tað framvegis færri enn væntað, sum spara upp við rentustudningi. Húsalánsgrunnurin, sum umsitur skipanina, upplýsir, at fram til ultimo november 1985 er støðan henda: Samlað innlán

499. Saldo ultimo november: 12.630.942,99 kr. Rentustudningur: 400.524,00 kr.

Mett verður, at høvuðsorsøkin, fyri at fólk aftra seg við at fara undir slika uppsparing, er tann, at um ikki verður farið undir húsabygging, keyp av íbúð ella grundstykki, so skulu sbrt. treytunum í lógini ganga 12 ár, áðrenn peningurin kann verða frígivin, um ikki ein av teimum serligu umstøðunum, sum eru nevndar í lógini, fyriliggja.

Landsstýrið skjýtur tí upp, at 12 ára skeiðið verður lækkað til 8 ár, og at landsstýrið í serstøkum førum fær heimild at frígeva samansparingina, t. d. um kontoeigarin fer undir eina útbúgving ella tílíkt.

Samstundis verður skotið upp, at hægsta árliga innskotið verður hækkað til 30.000 kr. og samlaði innskotspeningurin til 300.000 kr. Eisini verður rentustudningurin hækkaður úr 2% til 3%. Hetta seinasta er ein fylgja av, at innlánsrentan í peningastovnunum seinastu tíðina er fallin við 2%.

1. viðgerð 22. januar 1986. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 20. februar legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 16. januar 1986 og undir 1. viðgerð 22. í s. m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd fíggjarnevnd undir við uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 25. februar 1986. Atkvøðugreiðsla 6. mars. Uppskot landsstýrisins samtykt við 23-0 atkvøðum.

10. mars 1986 legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

## Broytingaruppskot

til uppskot landsstýrisins:

| | |
|---|---|
| § 2 verður orðað soljóðandi: | § 2 formuleres således: |
| »Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1986.« | »Denne lov har gyldighed fra 1. januar 1986.« |

3. viðgerð 10. mars 1986. Broytingaruppskotið frá figgjarnevndini varð samtykt við 27-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1426-12-1. Lóg nr. 28 frá 3. apríl 1986.

# 47. Løgtingslóg um broyting í lóg um landbúnaðarins frama

Ár 1986, mikudagin 29. januar legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í lóg um landbúnaðarins frama.**

§ 1. Í § 40 í lóg nr. 174 frá 24. mai 1937 um landbúnaðarins frama, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 25. apríl 1960, verður sett sum nýtt punkt:

»10) Samtøkur búnaðarmanna sum hava til endamáls at skipa fyri viðgerð av framleiðslu, og annars fyri keypi og sølu.«

§ 2. Løgtingslógin kemur í gildi vikudagin eftir, at hon er kunngjørd.

**lagtingslov om ændring i lov om jordbrugets fremme.**

§ 1. I § 40 i lov nr. 174 af 24. maj 1937 om jordbrugets fremme, som ændret ved lagtingslov nr. 24 af 25. april 1960, indsættes som nyt pkt.

»10) Sammenslutning af landbrugere som har til formål at organisere forarbejdning af produkter, og iøvrigt køb og salg.«

§ 2. Lagtingsloven træder i kraft ugedagen efter, at den er kundgjort.

**Viðmerkingar:**

Tað er ein vaksandi tørvur á samskipan av virksemi búnaðarmanna, bæði til felagskeyp av framleiðslugøgnum og felagssølu av framleiðsluni.

Sum er, hevur Jarðargrunnurin heimild til at læna til mjólkarvirki, og miðar hetta uppskotið ímóti, at lánheimildin eisini umfatar felags tiltøk innan aðra búnaðarframleiðslu og til keyp av framleiðslugøgnum.

Í fjør varð sama uppskot lagt fyri tingið, men fall tá burtur, við tað at uppskotið ikki fekk endaliga viðgerð, áðrenn tingið fór heim.

Nú hevur landsstýrið fingið áheitanir frá nøkrum feløgum av nýggjum, sum eru hjálagdar í avriti, og hevur avgjørt at leggja uppskotið fram av nýggjum við ískoyti um, at møguleiki eisini er fyri at veita lán fyri felags tiltøk til viðgerð av framleiðslu, eitt nú sláturhús.

+ **skjøl!** (avrit av skrivi 14. dec. 1985 og 7. januar 1986, j. nr. 1701-21[6] og [7]).
**Sí skjølini 10 A og B!**

1. viðgerð 4. februar 1986. Málið varð beint í búnaðarnevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 29. januar 1986 og við 1. viðgerð 4. februar beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og heldur, at heimildin í uppskotinum er ov víttgangandi. Eftir tí, sum fyriliggur upplýst, er talan um at nýta heimildina til lánveiting til eitt nýtt sláturvirki og til umfigging av einari fóðurmiðstøð.

Vísandi til frammanfyri standandi setir nevndin fram fylgjandi

## Broytingaruppskot

Nr. 10) í uppskoti landsstýrisins verður orðað soleiðis:

| | |
|---|---|
| »10) Samtøkur búnaðarmanna til íløgur í sláturvirki og fóðurvirki. Heimildin fevnir ikki um rakstrarlán.« | »10) Sammenslutninger af landbrugere til investeringer i slagterier og fodervirksomheder. Bemyndigelsen omfatter ikke driftslån.« |

2. viðgerð 20. mars 1986. Atkvøðugreiðsla 3. apríl. Broytingaruppskotið frá búnaðarnevndini varð samtykt við 18-0 atkvøðum. § 1 soleiðis broytt varð samtykt við 18-0 og § 2 samtykt við 18-0. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 18-0 atkvøðum.

3. viðgerð 7. apríl 1986. Málið endaliga samtykt við 17-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1700-1. Lóg nr. 63 frá 23. mai 1986.

# 48. Broytingar í løgtingslóg um ferðslu

Ár 1986, mikudagin 12. februar legði rættarnevndin fram soljóðandi

**Uppskot**

Løgtigið samtykkir hjálagda uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um ferðslu.

**Viðmerkingar:**

Hin 14. januar 1985 løgdu 6 tingmenn fram uppskot nr. 41/1984 um at seta nevnd av serkønum við tí setningi at koma við uppskotum um tiltøk til tess at minka um talið av ferðsludrápum og ferðsluvanlukkum í Føroyum. Málið varð aftaná 1. viðgerð beint í rættarnevndina.

Hin 1. mars 1985 var vegna Landsstýrið lagt fram uppskot nr. 56/1984 um Serstakar ferðslureglur. Hetta mál var aftaná fyrstu viðgerð eisini beint í rættarnevndina.

Rættarnevndin viðgjørdi málini og kom til ta niðurstøðu, at heita á serligu ferðslunevndina undir landsstýrinum um at koma við uppskoti um broytingar í ferðslulógini og saman við løgtingsins rættarnevnd at arbeiða víðari við ferðslulógarmálinum.

Í serligu ferðslunevndina undir landsstýrinum eru hesir stovnar umboðaðir: Føroya Landfúti, Ráðið fyri ferðslutrygd, Bileftirlitið, Landsverkfrøðingurin og Føroya Landsstýri.

Rættarnevndin hevur viðgjørt álitið frá hesi nevnd og er samd um at leggja tað fyri tingið í óbroyttum liki.

Broytingarnar eru 31 í tali. Rættarnevndin ger vart við nakrar broytingar, men visir annars til viðmerkingar í hjálagda áliti.

**Koyrifrálæran**

Dentur verður lagdur á at seta størri krøv til teirra, ið skulu taka koyrikort, eins og størri krøv verða sett til koyrilærarayrkið. Umframt størri førleika í frálæruni verður mælt til, at loyvisbræv skal verða treyt fyri at starvast sum

koyrilærari. Í tráð við hetta verður heimilað landsstýrinum at skipa fyri serligum fyriskipanum á hesum frálæruøki, eins og mælt verður til at umhugsa at leggja koyrifrálæruna undir Landsskúlafyrisitingina.

Eisini verður heimilað landsstýrinum at gera reglur fyri, at koyrikort til bil og motorsúklu fyrstu ferð bert er galdandi í 2 ár. Áðrenn 2 ár eru liðin, skal tann, ið tikið hevur koyrikort, til eykaundirvísing og eykaroynd í serligum koyriførleika sum fyri at fáa rætt til vanligt koyrikort.

Sum er hevur Føroya Landfúti umsitingina av koyrikortum til bilar og motorsúklur, meðan Bileftirlitið umsitur koyrikort til prutl. Eftir uppskotinum kann umsitingin hjá Føroya Landfúta flytast til annan almennan stovn t. d. Bileftirlitið.

**Trygdarbeltið**

Løgtingið hevur áður samtykt at áleggja landsstýrinum at kanna spurningin um trygdarbelti í bili og at seta reglur fyri tvungnari nýtslu í verk (tingmál nr. 50/1983). Eftir uppskotinum hava øll yvir 15 ár skyldu at nýta trygdarbelti í bili (undantøk eru t. d. í samband við hýruvognskoyring). Við kunngerð frá Føroya Landsstýri nr. 6, 25. februar 1985 um útgerð í bilum skulu allir bilar, ið verða skrásettir aftaná 25. februar 1985, hava trygdarbelti.

**Rúsdrekkakoyring**

Sambært viðmerkingunum til álitið frá serligu ferðslunevndini er cyðsýnt, at talið av fólki, ið koyra við kenning, er støðugt vaksandi. Iligartil hevur revsingin verið, at fólk við alkoholpromillu í blóðinum millum 0,81 - 1,20 verða dømd til bót og frákenning av koyrikortinum í 1 ár. Eru tyngjandi umstøður, er dómurin 10 daga hefti og 1½ ára frákenning av koyrikortinum. Alkoholpromilla í blóðinum yvir 1,20 verður altið sektað við hefti ella fongsul umframt frákenning av koyrikortinum.

Stóra talið av fólki, ið dømd eru at sita vegna rúsdrekkakoyring, hevur ført við sær, at bíðitíðin til at koma inn at sita í mongum førum hevur verið upp til 2 ár.

1. juli í ár bíðaðu 280 fólk eftir at sleppa inn at sita.

Flestøll eru á einum máli um, at tann revsing, ið veruliga tyngir hjá einstaklinginum, ið hevur koyrt við kenning, er frákenning av koyrikortinum.

Í uppskotinum verður mælt til ta broyting, at fólk, ið koyra við kenning, og sum hava eina alkoholpromillu í blóðinum ikki yvir 2,0, verða sektað við bót og í longri tíð frákenning av koyrikortinum enn eftir verandi lóg (sí s. 105 í viðmerkingunum). Bótin verður eisini størri enn eftir verandi skipan. Mælt verður til, at hon verður 1000 kr. fyri hvørjar 25.000 kr., ið

bilførarin hevur í bruttoinntøku. Fólk, ið koyra við rúsdrekkapromillu yvir 2,0, verða eisini í framtíðini sektað við fongsulsrevsing eins og frákenning av koyrikorti. Um hesar broytingar í revsireglunum verða settar í verk, verður rímiligari samband ímillum ta hending, ið sektast skal, og tað mundið, sjálvt lógarbrotið hendi.

**6 tíma reglan**

Í uppskotinum verður mælt til, at fólk, ið drukkið hava upp til 6 tímar aftaná eitt ferðsluóhapp ella ferðsluvanlukku í ávísum førum, verða sektað, sum um tey høvdu drukkið áðrenn hendingina. Í verandi ferðslulóg er henda heimild bert til staðar, um bilførarin er orsøk í ferðslu- ella mansskaða.

Í uppskotinum verður mælt til, at 6 tíma reglan verður galdandi, tá bilførari er partur í einum ferðsluóhappi, uttan mun til um hann sjálvur er orsøk til hendingina ella ikki, ella um hann hevur verið eltur av løgregluni. Henda regla er eisini galdandi, um bilførarin er einsamallur um óhappið.

Ætlanin við 6 tíma regluni hevur verið at fyribyrgja og at gera tað lættari at prógva rúsdrekka- og promillukoyring. Soleiðis, sum lógin er orðað í dag, hevur ongantíð verið møguligt hjá ákæruvaldinum at gera nýtslu av 6 tíma regluni, tí stórt tal av bilførarum, ið eru ákærdir fyri at hava koyrt við kenning, siga seg at hava drukkið aftaná hendingina, ið var orsøk til ákæruna um at hava koyrt við kenning (sí s. 66, 67 og 68 í viðmerkingunum til uppskotið).

6 tíma reglan er galdandi í Svøríki og í Noregi. Í Noregi er hon galdandi, um bilførarin yvirhøvur hevur smakkað sær á aftan á hending, ið kemur undir 6 tíma regluna. Eftir hjálagda uppskoti kann 6 tíma reglan bert koma upp á tal, um promillan fer upp um 0,80. Hetta er sama mark, ið talan er um, tá tú hevur drukkið, áðrenn tú setir teg at koyra.

Spurningurin um at revsa fólk fyri at hava drukkið aftaná eitt óhappp í ferðsluni er torførur og eigur millum annað at vera sett í samband við ferðslumentan okkara, har rættiliga ofta kemur fyri, at fólk brúka bilin at stytta sær stundir við og hava rúsdrekka hjá sær.

**Ábyrgdarleys koyring**

Eftir uppskotinum skal koyrikortið eisini frákennast fólki, ið koyra við ov miklari ferð, ella tá tey við koyring slni elva fólki ella luti skaða (sí s. 109 í álitinum). Bøturnar fyri at koyra við ov miklari ferð verða størri enn eftir verandi skipan.

**Avgerðir uttanum Rættin**

Uppskotið heimilar møguleikum at avgera brot á ferðslulógina uttanum Rættin, tá talan er um at koyra við kenning. Hetta er, tá talan um rús-

drekkapromillu ikki er yvir 2,0. Tað merkir, at revsikarmurin er bót og frákenning av koyrikortinum. Sostatt er í hesum førum ikki talan um heftiella fongsulsrevsing.

Slík skipan hevur virkað í Danmørk síðan 1984. Royndirnar eru góðar. Um 80% av málum, ið kunnu avgerast við bót og frákenning av koyrikortinum í tráð við lógina, eru avgreidd á henda hátt eftir ynski teirra, ið hava verið ákært. Hetta hevur lætt almikið um arbeiðsbyrðina hjá dómsvaldi og ákærumyndugleika. Treytin, fyri at mál kunnu avgerast á henda hátt, er, at hin ákærdi viðurkennir seg sekan og játtar, at málið verður avgreitt uttanum rættin (sí s. 107 í viðmerkingunum).

**Broyting í rættargangslógini**

Fyri at skipanin við bót uttan rættarviðgerð kann setast í verk, er neyðugt at gera broyting í rættargangslógini. Sum er, kunnu bert bøtur upp til 2.000 kr. avgreiðast uttan rættarviðgerð. Tí er hesin spurningur tikin við í tí endurskoðan av rættargangslógini fyri Føroyar, sum í næstum verður løgd fyri tingið.

**Trygd**

Í uppskotinum verður dentur lagdur á at styrkja um trygdina hjá børnum í ferðsluni. Mælt verður til, at løgregla og vegamyndugleikar saman við skúlamyndugleikum hava ábyrgd av, at tiltøk verða sett í verk, ið verja børnini á veg í og úr skúla (sí s. 115 í viðmerkingunum). Í verandi lóg verður bert víst til viðurskiftini uttanum skúlan. Eftir uppskotinum verður hugsað um alt vegakervið í nánd av skúlanum. Við trygd hjá børnum verður her eisini hugsað um næmingar á tekniskum skúlum, handilsskúlum og studentaskúlum.

Í uppskotinum verður eisini mælt til serligt fyrilit í samband við bussstøðg, bæði tá fólk fara inn, og tá fólk koma úr einum bussi. Til tess at fyribyrgja, at ferðslulógin gerst ov torskild, tá broytingarnar eru samtyktar, mælir serliga ferðslunevndin til, at landsstýrið fær í lag eina samskipan og samskriving av verandi lóg og broytingunum í samband við kunngerðina.

**Sí skjal 11.**

1. viðgerð 12. februar 1986. Málið varð beint aftur í rættarnevndina, sum 4. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram hin 30. januar 1986 av løgtingsins rættarnevnd og aftaná 1. viðgerð hin 12. februar 1986 beint í rættarnevndina.

Sjálvt uppskotið er gjørt av serligu ferðslunevndini undir landsstýrinum saman við løgtingsins rættarnevnd. Tað var ein samd rættarnevnd, ið legði uppskotið fram, og gjørt varð vart við í viðmerkingunum, at miðað varð ímóti, at uppskotið varð samtykt í heilum líki.

Málið fekk drúgva viðgerð undir 1. viðgerð, og nógv góð hugskot vóru havd frammi. 6 tíma reglan hevði serligan áhuga. Vist varð á vandan fyri, at ósek fólk kundu verða dømd í slíkum føri. Serlig óvissa var um spurningin at verða eltur av løgregluni. Fór hetta at føra við sær, at løgreglumenn fingu serligar møguleikar fyri at jagstra fólk? Spurningurin um at verða eltur av løgregluni skal skiljast soleiðis: Ingin verður eltur av løgregluni, uttan hann sjálvur veit av tí, og at løgreglan hevur gjørt tekin, ið førarin eigur at hava skilt. Vist verður til § 24, 2. stk. í verandi ferðslulóg, ið er orðað soleiðis:

»**Stk. 2.** Vegfarandi skulu gera eftir ávísingum, sum politivaldið gevur at halda skil á ferðsluni, og steðga, tá ið politimaður báknar.«

»**Stk. 2.** Vejfarende skal efterkomme de anvisninger, politiet giver til regulering af færdslen, og standse, når politiet giver tegn dertil.«

Hetta skal skiljast soleiðis, at eingin kann verða eltur av løgregluni, uttan sjálvur at vita av tí. Hesin spurningur hevur eisini verið lagdur fyri Føroya politistafelag, ið ger vart við, at teir á ongan hátt hava áhuga fyri at hava møguleika fyri at jagstra fólk uttan heimild. Fyri at fyribyrgja slíkum hava teir sjálvir kannað spurningin nágreiniliga og eru komnir til ta niðurstøðu, at soleiðis sum lógin er orðað, er hesin møguleiki ikki til staðar. Tí taka teir undir við hesari orðing.

Koyrilærarafelagið hevur eisini verið á fundi við rættarnevndini og tekur undir við lógaruppskotinum.

Landsstýrismaðurin Vilhelm Johannesen, ið hevur hetta málsøki í landsstýrinum, tekur eisini undir við uppskotinum. Aftaná 1. viðgerðina á tingi og tær samrøður, ið nevndin hevur havt við ymiskar stovnar, er nógv tilfar komið fram, sum bendir á, at enn liggur nógv á láni viðvíkjandi ferðsluspurninginum í Føroyum, og er rættarnevndin tí samd um at halda fram við at arbeiða við hesum máli.

Eisini er rættarnevndin samd um, at lógin verður samskrivað við verandi lóg, soleiðis at orðingin er hin sama. Ein samd rættarnevnd mælir tí til, at tá hetta arbeiðið er lokið, verður gjørt eitt smárit, ið er lætt fatiligt, og sum við tekningum vísir á týdningarmestu spurningar í ferðslulógini, og at hetta smárit verður sent hvørjum húski í landinum.

Ein spurningur, ið tykist at hava havt stóran áhuga, og sum er vístur á frá nógvum síðum, er hetta, at tað bert skal verða loyvt einum at sita á

prutli. Tað merkir, at bert førarin kann sita á prutli, og hvørki barn ella vaksin kann vera við aftanat.

Rættarnevndin er komin til ta niðurstøðu at arbeiða viðari við hesum spurningi, men ikki at lata hetta pettið vera við í uppskotinum. Ein samd rættarnevnd setir tí fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

1. § 42 a, stk. 1, verður orðað soleiðis:
   »Førari av tvíhjólaðari motorsúklu ella av motorsúklu við siðuvogni og av prutli og øll ferðandi, sum fylt eru 15 ár, skulu undir akstrinum nýta fastspentan fallhjálm.«
2. § 44, stk. 6, verður orðað soleiðis:
   »Ferðandi á prutli skal sita á baksetrinum við einum beini hvørjumegin á prutlinum.«
3. § 44, stk. 7, verður orðað soleiðis:
   »Á prutli mugu ikki vera fleiri persónar enn tað er ætlað til.« Núverandi stk. 7 verður stk. 8.

1. § 42 a, stk. 1, affattes således:
   »Føreren af en tohjulet motorcykel eller af en motorcykel med sidevogn samt af en knallert og enhver passager, som er fyldt 15 år, skal under kørslen anvende fastspændt styrthjelm.«
2. § 44, stk. 6 affattes således:
   »En passager på en knallert skal sidde på bagsædet med et ben på hver side af knallerten.«
3. § 44, stk. 7 affattes således:
   »På knallert må ikke befordres flere personer end den er beregnet til.« Stk. 7 bliver herefter stk. 8.

Ein samd nevnd tekur annars undir við uppskotinum.

2. viðgerð 7. apríl. Broytingaruppskotið varð samtykt við 20-0 atkvøðum. § 1 samtykt við 18-0 og § 2 samtykt við 19-0, og við 20-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 8. apríl 1986. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

Lóg nr. 67 frá 5. juni 1986.

# 49. Landsstýrismál 1983/84 (LM. 84/84)

Málið, løgtingsmál nr. 84/1984: Landsstýrismál, varð lagt fram av landsstýrinum 16. apríl 1985, men varð ikki viðgjørt í tingsetuni 1984.

28. januar 1986 legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrismálanevndin hevur býtt seg í ein meiriluta (Hergeir Nielsen og Tummas Arabo), sum ger hesar viðmerkingar:

Landsstýrið hevur sent løgtinginum útskriftir úr gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið frá 4. august 1983 til 26. juli 1984.

Skilliga sæst, at tilvildin hevur valdað innan landsins stýrið hetta skeiðið. Heilt nógv mál hava fingið misjavna undirtøku við gerðabókaførdum serstøðum, og skilst av hesum, at undanfarna landsstýrið ikki á nakran hátt hevur verið ført fyri at virka sum ein eind.

Tað er serliga innan fiskivinnuøkið, at trupulleikarnir vóru skumpaðir upp í rúgvur til aðrar at taka sær av. Ótaldar umsóknir um nýggj skip fingu onga veruliga viðgerð, og eingin umsøkjari fekk nei til nýtt skip. Hetta tørvandi stýrislag váttar fyri nútíðin, at undanfarna landsstýrið á ongan hátt var ført fyri, ella átti neyðugt dirvi, til at loysa hetta, fyri samfelagið so týdningarmikla mál.

Avleiðingarnar av hesum tørvandi stýrislag vóru sum kunnugt tær, at samfelagsmekanismurnar stýrdu sær sjálvum, og vit fingu m.a. skrúvað prisin á gomlum ónýtiligum skipum upp í loft. Fleiri av hesum gjørdust eins ónýtilig, men enn dýrari at forrenta, eftir kostnaðarmiklar umbyggingar, har landskassin hvørja ferð luttók í kostnaðinum við stuðulslánum, kurstapslánum og veðhaldum.

Ein stórur partur av málunum er fjaldur fyri teimum, ið koma aftaná út í Tinganes, og sostatt eisini fyri landsstýrismálanevndir, við tað at einki journalnummar er sett á tey. Sum kunnugt skrivaðu landsstýrismenn tá í tíðini brøv út til høgru og vinstru á landsstýrisins brævpappír og uttan journalnummar.

Sum serligt spell fyri nútíðina kann solciðis nevnast málið um innkallan av einum samgongumanni til landsstýrisfund, har hesin skuldi tyktast fyri at hava verið ov atfinningrsamur móti sama landsstýri. Hetta er eindømi síðan heimastýrislógina. Málið varð ikki journaliserað, og sæst sostatt ikki í gerðabók landsstýrisins, hvussu stór revsingin var fyri hetta misbrot.

Stýrislagið undir seinastu samgongu hevur verið rættiliga flákrandi og týðiliga merkt av, at tað so týdningarmikla handalagið er fokið til fyrimuns fyri politiskt tilvildarligum avgerðum. Landskassin er soleiðis skuldbundin at heilt stórum byggi- og leigumálum, sum, uttan at hava verið fyri á landsstýrisfundi, eru sett í verk í høpisloysi og við ovurstórum fíggjarligum avleiðingum fyri landskassan; t. d. royndarstøðin við einum byggimáli og postverkið við einum leigumáli.

Millum mangar marghættligar avgerðir kann nevnast ein, ið rættiliga týðiliga og sera ódámliga gongur teimum múgvandi í samfelagnum á møti. Skattgjaldari í leiðandi starvi og við ovurstórari inntøku helt umleið 400.000 kr. uttanfyri uppgerðina á sjálvuppgávuni, umframt at sami skattgjaldari fekk gjald frá privatum viðskiftafelag í arbeiði sínum.

Sambært galdandi siðvenju stóð hesin til eina revsing upp á 200.000 kr. í skatti + 3 ferðir skattin í bót, ella til eina samlaða bót upp á 800.000 kr.

Hesum álvarsliga virksemi við almennum peningi helt undanfarna landsstýri tvørtur ímóti allari siðvenju hondina yvir, og kravdi einans tann pening, ið hildin varð uttan fyri sjálvuppgávuna afturgoldnan í landskassan og avvarðandi kommunukassa. Síðan kundi sami maður halda fram í leiðandi starvi sínum, meðan týdningamiklir, og innan skattarætt serkønir, samgongumenn, umsitandi starv hansara og umsitandi landsins leiðslu á tingi og í landsstýri vaskaðu hendur, og als ongar nærri kanningar settu í verk fyri at lýsa málið nærri.

Moralurin í hesi søgu bleiv so tann, at snýtur tú smávegis í skatti, so rindar tú skattin og 3 ferðir skattin í bót. Snýtur tú við stórum tølum, so rindar tú skattin og eina ferð skattin í bót.

Umrødda gerðabókaførda tíðarskeið fevndi yvir 80 fundir, og 220 ferðir vóru mál útsett.

Meirilutin heldur, vísandi til frammanfyri nevnda arbeiðslag hjá undanfarna landsstýri, at tær avgerðir hetta stýrið hevur tikið eru so skeivar, at tingið ikki kann góðtaka gerðabókina og setur tí einki uppskot fram.

Ein minniluti (Flemming Mikkelsen) førir fram: Landsstýrið hevur sent løgtinginum gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 4. august 1983 til 26. juli 1984, t. v. s. 1½ til 2½ ár aftur í tíðina.

Nevnda gerðabók fevnir sostatt um ein part av tíðarskeiðinum hjá undanfarna landsstýri.

Málið verður beint til viðgerðar í landsstýrismálanevndini.

Eins og árini frammanundan sæst, at ein hópur av málum hava verið til viðgerðar hetta tíðarskeiðið, onkur spurningur kundi verið settur og onkur viðmerkingin gjørd, men stórt sæð tekur minnilutin (Fl. Mikkelsen) undir við avgerðum landsstýrisins hetta tíðarskeiðið og setir fram soljóðandi:

# Uppskot

# til

# samtyktar

Løgtingið góðtekur tær avgerðir, sum landsstýrið, sambært gerðabókina fyri tíðarskeiðið 4. august 1983 til 26. juli 1984 hevur tikið.

1. viðgerð 11. februar 1986. Undir viðgerðini sleit formaðurin fundin í 10 minuttir. Tá fundurin var uppafturtikin, segði formaðurin, at skriv, sum vórðu løgd fyri tingið, máttu verða almannakunnug, tí gjørdi hann av at beina málið aftur í samferðslunevndina.

## Ískoytisálit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 5. februar 1986 og við 1. viðgerð 1986 beint í landsstýrismálanevndina.

Landsstýrismálanevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hergeir Nielsen, Tummas Arabo) ger hesar viðmerkingar:

Álit í løgtingsmáli nr. 49/1985: Landsstýrismál 1983/84 varð lagt fram 28. januar 1986 av landsstýrismálanevndini.

Undir viðgerðini av hesum máli tann 11. februar varð ført fram av undanfarna løgmanni, at beinleiðis ósatt varð sagt frá í álitinum, har tað snúði seg um gjald frá privatum viðskiftafelag, tí at einki fanst um hetta í umrødda máli.

Eftir hetta kom nýtt tilfar fram, og málið varð beint aftur í landsstýrismálanevndina.

Nevndin hevur kannað málið av nýggjum, og kann meirilutin enn eina ferð sláa fast, at tað í málinum eru upplýsingar um gjald frá privatum viðskiftafelag. Hetta verður upplýst í fleiri skjølum í málinum.

P/f Grannskoðarastovan Pauli Ellefsen umrøður málið og sigur tann 13. mai 1983 í skrivi til nevndina fyri avvarðandi stovn um umrødda gjald, at tað eftir teirra metan er óvanlig mannagongd. Somuleiðis verður upplýst, at ongar aðrar kanningar útyvir vanliga grannskoðan eru gjørdar í málinum.

Líkningarnevndin hjá Tórshavnar Býráð hevur í frágreiðing frá fundi tann 7. juni 1983 gjølliga umrøðu av hesum máli og liggur hetta skjal somuleiðis í málinum.

Frágreiðingin frá undanfarna løgmanni um, at hesi viðurskifti **ikki** vóru nevnd í málinum, er sostatt burturdottin.

Tá hesi viðurskifti ikki vóru kannað víðari av undanfarna landsstýri, metir meirilutin í landsstýrismálanevndini framvegis, at tað er átaluvert, at

grovt skattasvik saman við gjaldi frá privatum viðskiftafelag, sum ikki varð kannað til lítar, varð viðgjørt sum vanligt skattamál.

Meirilutin í landsstýrismálanevndini sigur í álitinum, at skattgjaldarin stóð til eina revsing upp á skattin og 3 ferðir skattin í bót. Hetta er tó smb. § 75 í skattalógini bert galdandi, um talan er um stórt gáloysi frá skattgjaldarans síðu. Er talan um svikalystir, er revsingin skattin og upp í 5 ferðir skattin í bót.

Umrøddi skattgjaldari fekk skattin og eina ferð skattin í bót, so sum vanligt er í vanligum skattamáluin, og verður hetta av likningarráðnum sagt at vera vanligt. Umsitingin í Tinganesi upplýsir einum í sama máli, at har talan hevur verið um beinleiðis skattasvik og talan hevur verið um smærri upphæddir, hevur, umframt eftirgjaldan av skatti, ein sekt upp á 3 ferðir hesa verið áløgd. Sjónni kundi umsitingin í Tinganesi og Likningarráð Føroya semjast um eina bót upp á 1 ferð skattin.

Vísandi til frammanfyri nevnda, metir meirilutin í landsstýrismálanevndini framvegis, at tað var skeivt at viðgera eitt óvanligt skattamál sum eitt vanligt, og at tað var skeivt ikki at kanna tær sera álvarsomu skuldsetingar um pening frá viðskiftafelag til sama persón, sum hevði framt umfatandi skattasvik, so at ein fullfíggjað mynd kundi verið fingin, áðrenn støða til møguliga revsing kundi verða tikin.

Vísandi til álitið og frammanfyristandandi við meirilutin í landsstýrismálanevndini framvegis heira á løgtingið um ikki at góðkenna gerðabók landsstýrisins fyri tíðarskeiðið 4. august 1983 – 26. juli 1984.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) ger hesa viðmerking:

Eftir at málið varð komið aftur í nevnd, bað minnilutin um at fáa onkran spurning svaraðan skrivliga frá landsskrivstovustjóranum.

1. Hvørji mál undanfarna samgouga hevði fjalt fyri teimum, ið komu aftaná út í Tinganes?
2. Eru skattgjaldarar í somu støðu, sum tann í meirilutaálitinum umrøddi, viðgjørdir ymist?

Spurningarnir vóru settir, tí meirilutin heldur fast um, at mál vóru fjald og skattgjaldarar vóru viðgjørdir ymist av landsstýrinum.

Tað varð m.a. ført fram, at millum mangar margháttligar avgerðir, kann ein avgerð verða nevnd, ið rættiliga týðiliga og sera ódámligа gongur teimum múgvandi á møti. Skattgjaldari í leiðandi starvi og við ovurstórari inntøku helt umleið 400.000,- kr. uttanfyri uppgerðina á sjálvuppgávuni, umframt gjald frá privatum viðskiftafelag í arbeiði sínum. Sambært galdandi siðvenju stóð hesin til eina revsing uppá 200.000,- kr. í skatti + 3 ferðir skattin í bót.

Í tesum álvarsliga virksemi við almennum peningi helt undanfarna lands-

stýri tvørtur ímóti allari siðvenju hondini yvir, og kravdi einans tann pening, ið hildin var uttanfyri sjálvuppgávuna, afturgoldnan.

Viðari verður ført fram, at moralurin í hesi søgu bleiv so hann, at snýtir tú smávegis í skatti, so rindar tú skattin og 3 ferðir skattin í bót. Snýtir tú við stórum tølum, so rindar tú skattin og eina ferð skattin í bót.

Spurningarnar fekk eg ikki skrivliga svaraðar vegna sjúku, men hósdagin 10. í hesum fekk eg eitt ummæli frá skirvstovustjóranum, har hann segði seg ikki kenna til, at nøkur mál vóru fjald fyri nøkrum í landsstýrinum. Viðvíkjandi viðgerðini av skattamálum í landsstýrinum, segði hann, at mannagongdin hesi seinastu 10 til 15 árini hevði verið tann, at allar skattasakir vóru sektaðar eina t.v.s. skattin og einaferð skattin í bót, uttan mun til inntøkuupphæddirnar, ið hildnar vóru uttanfyri sjálvuppgávuna, sostatt kann pástandurin frá meirilutanum, um at landsstýrið ímóti allari siðvenju hevur hildið hondina yvir ávísum skattgjaldara, ikki verða góðtikin.

Minnilutin heldur tí fast við, at tað er onki, sum bendir á, at nakað óregluligt er farið fram í landsstýrismálum í tíðarskeiðinum frá 4. august 1983 og fram til 26. juli 1984.

Minuilutin mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið til samtyktar í upprunaálitinum.

2. viðgerð 15. apríl. Málið varð samtykt við 17-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 204-1.

# 50. Løgtingsmál um Húsahjálpargrunn

Árið 1986, hósdagin 30. januar legði Adolf V. Hansen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um Húsahjálpargrunn.**

§ 1.

Stovnaður verður grunnur at hjálpa fólki í figgjarligari trongstøðu at rinda rentur og avdráttir

**lagtingslov om Hushjælpefond.**

§ 1.

Der oprettes en fond til at hjælpe folk i økonomiske vanskeligheder med betaling af renter og afdrag af

av setlúsalánum. Hjálpin verður veitt sum lagaligt lán.

§ 2.
Landskassin játtar grunninum árliga 5 mió. kr. á figgjarløgtingslógini. Grunnurin fær eisini heimild til við góðkenning figgjarnevndarinnar at upptaka neyðug lán, um stovnsfæið ikki rækkur til.

§ 3.
Grunnurin verður stýrdur av nevnd við 5 limum, ið verða valdir fyri 4 ár. Løgtingið velur 2 limir, landsstýrið 1 og kommunufelagið tveir limir. Fyri hvønn av nevndarlimunum verða valdir tiltakslimir.

§ 4.
Roknskaparár grunsins er figgjarárið, og roknskapur grunsins verður grannskoðaður og góðkendur eftir somu reglum sum roknskapur landskassans.

§ 5.
Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um virki grunsins.

§ 6.
Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1987.

lån i beboelseshuse. Hjælpen ydes som gunstigt lån.

§ 2.
Landskassen bevilger fonden årlig 5 mio. kr. på lagtingsfinansloven. Fonden er også bemyndiget til med finansudvalgets godkendelse at optage nødvendige lån, hvor grundkapitalen ikke er tilstrækkelig.

§ 3.
Fonden bestyres af et udvalg med 5 medlemmer, der vælges for 4 år. Lagtinget vælger 2 medlemmer, landsstyret 1 og kommuneforeningen 2 medlemmer. For hvert medlem vælges en stedfortræder.

§ 4.
Fondens regnskabsår er finansåret, og fondens regnskab revideres og decideres efter samme bestemmelser som landets regnskab.

§ 5.
Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere bestemmelser om fondens virksomhed.

§ 6.
Denne lov træder i kraft 1. januar 1987.

**Viðmerkingar:**
Seinastu 30 árini eru samfelagsins uppgávur alsamt vaksnar, og hevur hetta ført við sær støðugt vaksandi byrðar á meiniga mannin. Hendir okkurt óvæntað hjá einum húski, eitt nú sjúka, deyðsfall, hjúnaskilnaður, figgjarligt bakkast, arbeiðsloysi ella annað hóttafall, vil, sum vera man, vera ilt at klára hvørjum sítt.

Til fyri kortum hevur skatturin kunnað verið nýttur sum harmonika. Eftir at skattaskipanin varð umløgd til acontoskatt, er hesin møguleikin ikki til staðar. Heldur ikki vil hann vera til staðar, um vit í framtíðini gera eina sokallaða kelduskattaskipan. So nú eru tað aðrar av húskisins útreiðslum, sum verða nýttar sum harmonika. Og tað má so væl vera. Royndirnar sýna, at í stóran mun eru tað húsaútreiðslurnar, sum megu bíða. Sum skilst, hava teir stovnar, sum hava við húsaútreiðslur at gera, verið stak lagaligir. Møguleikarnir hjá teimum eru ikki soleiðis, at teir altíð kunnu vera lagaligir. Teir eru sum kunnugt bundnir av lógum og reglugerðum.

Her hjá okkum er tað ein treyt fyri at kunna yvirliva, at ein hevur tak yvir høvdið. Seinastu tíðirnar hevur ein sæð alt fleiri og fleiri lýsingar í almenna lýsingarblaðnum um tvangssølur av privatum sethúsum.

Mangan hendir tað, at roynt verður at bøta um eitt av omanfyri nevndu bakkøstum við at taka upp lán, sum skulu gjaldast aftur yvir eitt styttri áramál og síðuloypandi við verandi útreiðslur. Hetta kann í summum førum eydnast, men er talan um fólk við stórum lánum, so kann vera og er mangan trupult at klára at koma uppundan aftur. Og tí er tað, at alt fleiri privat sethús eru um at fara undir hamarin. Áður hevur dýrtíðin hjálpt til við at koma uppundan aftur, men nú hon bæði her hjá okkum og í okkara grannalondum er vorðin so lág, er tann hjálpin burtur.

Tað er tí neyðugt, frá almennari síðu, at gera nakað munagott, so sleppast kann undan, at fólk verður tvungið at rýma úr heimi sínum. Vit hava skyldu at gera nakað, tí hugsað eigur ikki bert at vera um tey, ið av eini hvørji orsøk eru komin afturút við skyldum sínum, men eisini um hini húsfólkini, tað verí seg børn, eldri fólk ella onnur. At vera tvungin úr heimi sínum er onki minni enn ein ræðulig vanlukka.

Fyri fáum árum síðan gjørdist ein ung kvinna, ið var búsitandi í lítlari bygd, einkja. Hon og maðurin høvdu bygt sær eitt heim í egnum sethúsum. Tá maðurin nakað óvæntað doyði, var ikki annað fyri hjá einkjuni enn at lata húsini frá sær, tí byrðan gjørdist ov tung fyri bert eitt fólk. Kvinnan var barnlcys.

Hetta dømið er tikið, tí tað lýsir, hvussu ein kvinna, sum heilt óvæntað missir mann sín, eisini verður tvungin at lata frá sær tað minni, tey vóru felags um at byggja.

Eitt av motto Føroya Løgtings eigur at vera, at eingin skal vera tvungin úr heimi sínum av sjúku, deyðsfalli, hjúnaskilnaði, figgjarligum bakkøstum, arbeiðsloysi ella øðrum hóttaføllum.

Út frá tí, ið omanfyri er nevnt, setir undirritaði fram uppskot um stovnsetan av húsalhjálpargrunni.

1. viðgerð 5. februar. Málið varð beint í almanna- og heilsunevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Uppskotið er lagt fram av Adolf V. Hansen, løgtingsmanni, hin 29. januar 1986.

Aftan á 1. viðgerð 5. februar 1986 varð málið beint í løgtingsins almanna- og heilsunevnd. Í uppskotinum verður mælt til, at stovnaður verður grunnur at hjálpa fólki í fíggjarligari trongstøðu at rinda rentu og avdráttir av sethúsalánum. Hjálpin skal verða veitt sum lagalig lán. Í viðmerkingunum verður sagt, at Føroya Løgting eigur at tryggja, at eingin verður tvungin úr heimi sínum vegna sjúku, deyðsfall, hjúnaskilnað, fíggjarlig bakkøst, arbeiðsloysi ella øðrum hóttaføllum. Tað verður ikki nærri tilskilað í uppskotinum, hvussu samlaða støðan annars skal vera hjá tí fólki, ið skal hava møgulcikar fyri at læna úr slíkum grunni.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er av teirri sannføring, at tá socialar vanlukkur henda, eru heimildir til eftir øðrum lógum at tryggja, at hin eftirsitandi ikki missir hús og heim. Hugsað verður um hjálp eftir forsorgarlógini eins og hjálp til endurbúgving. Meginreglan má vera, at tann, sum ikki er førur fyri at lívbjarga sær og sínum fær hjálp til sjálvhjálp. Ráð og vegleiðing í samband við slíkar spurningar fáast frá almannastovuni.

Ein samd nevnd tekur ikki undir við uppskotinum og setir eingi uppskot fram.

2. viðgerð 3. apríl. Uppskotið fall við 1-0 atkvøðu.

**Adolf V. Hansen,**
**løgtingsmaður.**

**SKJAL 1.**

### Løgtingsmál nr. 50/1985: Løgtingslóg um Húsahjálpargrunn.

Orsakað av, at lógaruppskotið ikki klárt sigur frá øllum ætlanunum við grunninum, verður við hesum framlagt tann dispositión, ið umsitingin fekk at útforma lógina eftir. Henda sigur greitt, hvussu uppskotið skal skiljast:

Grunnurin skal virka á tann hátt, at honum verður heimilað at gjalda rentur og avdrøg av privatum sethúsum, har eigarin vegna fíggjarliga trongstøðu ikki er førur fyri tí. Tað, sum grunnurin leggur út, skal skuldskrivast húsaeigaranum og skal forrentast við eini rímiligari rentu, sum nevnd grunsins ásetir eftir góðkenning landsstýrisins. Afturgjaldingin eigur at byrja, tá tey lán, lagt er út fyri, eru fult goldin. Nevndini skal vera loyvt at útseta afturgjaldingina, til øll lán í húsunum eru afturgoldin. Afturgjaldingin skal vera yvir eitt fyri húsaeigaran rímiligt áramál. Húsahjálpargrunnurin skal tryggja tað, ið útlagt er, so væl sum gjørligt við veð í tí húsi, lagt er

út fyri. Veð Húsahjálpargrunnsins skulu vera upprykkjandi, men nevndini skal vera loyvt í serligum førum at respektera nýggjari lán. Nevndin telur 5 limir, sum allir verða valdir fyri 4 ár í senn: Løgtingið velur 2 limir, landsstýrið 1 og kommunufelagið 2 limir. Tiltakslimir verða valdir fyri sama tíðarskeið.

Húsahjálpargrunnurin fær árliga 5 mió. kr. um fíggjarlógina, sum stovnsfæ. Nevndin fær løgtinginum heimild at upptaka neyðug lán og/ella geva út brævalán, um stovnsfæið ikki rækkur til. Lógin kemur í gildi 1. januar 1987.

# 51. Broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn

Árið 1986, hósdagin 30. januar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um húsalánsgrunn.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 97 frá 1. november 1978 um húsalánsgrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 65 frá 11. mai 1982 verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður sett aftan á »íbúðabygging«: »og keyp«.
2. Í § 7 verður nýtt pkt. 4 soleiðis orðað:
   »Veðskuldalán til keyp av sethúsum ella íbúðum«. Pkt. 4 verður pkt. 5.
3. Í § 8, 1. stk. verður aftan á »nýbygging« sett: »og keyp«.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om boligfond.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 97 fra 1. november 1978 om boligfond, som ændret ved lagtingslov nr. 65 af 11. maj 1982 foretages følgende ændringer:

1. I § 1 indsættes efter »opførelse«: »og køb«.
2. I § 7 affattes nyt pkt. 4 således:
   »Prioritetslån til køb af beboelseshuse og boligejendomme«. Pkt. 4 bliver pkt. 5.
3. I § 8, stk. 1 indsættes efter »opførelse«: »og køb«.

4. Í § 8 verður nýtt 2. stk. soleiðis orðað:
   »Stýrið kann, har serligar umstøður gera seg galdandi, víkja frá ásetingini í 1. stk., 1. pkt.«
5. § 8, 2. stk. verður til § 8, 3. stk.
6. Í § 10 verður frammanfyri »veðrætti« sett: »upprykkjandi«.
7. Í § 12 verður orðið »nýggj« strikað.

4. I § 8 affattes nyt stk. 2 således:
   »Bestyrelsen kan, når særlige omstændigheder foreligger, fravige bestemmelsen i stk. 1, 1. pkt.«
5. § 8, stk. 2 bliver § 8, stk. 3.
6. § 10 affattes således:
   »Fondens lån skal sikres i bygninger og byggegrunde med oprykkende prioritet indenfor 90% av vurderingen.«
7. I § 12 udgår ordet »nye«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Lógin um húsalánsgrunnin varð endurskoðað í 1978, og varð nýggja lógin broytt nakað í 1982. Landsstýrið skjýtur nú aftur upp at broyta lógina fyri at bøta um nakrar vansar, sum eru við galdandi lóg, ella kanska rættari at fáa til vega nakrar møguleikar, sum heimild ikki er fyri við núgaldandi lóg.

MBF — Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum — hevur vent sær til Húsalánsgrunnin við áheitan um at gera frávik í galdandi reglum, so markið fyri hægstu lánsupphædd ikki nýtist at vera so ófrávikiligt, soleiðis at skilja, at tá farið verður undir bygging, har rørslubrekað skulu verða í húsinum, at møguleiki kann vera fyri at fara nakað út um 120m², uttan at rætturin til at fáa hægstu lánsupphædd verður mistur.

Húsalánsgrunnurin metir seg ikki at hava heimild at ganga hesi umsókn á møti, soleiðis sum lógin er orðað.

Landsstýrisins meting er tann, at møguleiki eigur at vera fyri einum slíkum undantaki og skjýtur tí upp, at stýrið, har serligar umstøður gera seg galdandi, kann gera undantak frá regluni í § 8, 1. stk., 1. pkt. Ætlanin er eisini at broyta reglugerðina fyri Húsalánsgrunnin soleiðis, at heilt greiðar reglur verða gjørdar fyri, nær undantak kann gerast, og eigur tað at vera, tá lánsumsøkjari, hjúnafelagi ella børn teirra eru varandi rørslutarnað í ein slíkan mun, at plásskrevjandi hjálparamboð eru neyðug.

Sum er kann Húsalánsgrunnurin bert veita lán, tá tað snýr seg um bygging av sethúsum og íbúðum, men ikki til keyp.

Um hetta ikki verður broytt, er vandi fyri, at um ikki so nógv ár verða fleiri eldri sethús at standa tóm. Tað er ein stórur áhugi at merkja, tá talan

er um keyp av gomlum sethúsum. Sum er, er tað torført at fáa figgjað keyp av eldri sethúsum, meðan tað liggur betri fyri til bygging av sethúsum.

Tað er tí ikki óhugsandi, at um figgingin til keyp av eldri sethúsum varð lagaligari, at eftirspurningurin eftir nýggjum sethúsum slakaði. Tað verður hildið at verða ein landsbúskaparligur fyrimunur, um í góðari tíð verður fyribyrgt, at sethús koma at standa tóm, kanska serliga á bygdunum, tá stórur áhugi er at keypa hesi hús, um figging kann fáast til tess.

Landsstýrið skjýtur tí upp, at Húsalánsgrunnurin eisini fær heimild at veita lán til keyp av sethúsum og íbúðum eftir somu reglum sum til nýbygging.

Umframt hesar broytingar verður ásett í lógini, at lán úr Húsalánsgrunninum fáa upprykkjandi veðrætt. Hetta hevur verið galdandi mannagongd alla tíðina, og verður mannagongdin nú lógarfest.

1. viðgerð 5. februar. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 17. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum hin 30. januar 1986 og eftir 1. viðgerð hin 5. februar 1986 beint í figgjarnevndina.

Landsstýrið hevur í framløguskrivi sínum m.a. skotið upp, at Húsalánsgrunnurin fær upprykkjandi veðrætt. Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og eisini havt fund við stjóran fyri Húsalánsgrunnimum og stjóran fyri Føroya Sparikassa.

Á hesum fundi varð spurningurin um, at Húsalánsgrunnurin fær upprykkjandi veðrætt, serliga viðgjørdur. Av tí, at ógreiða var um, hvørjar avleiðingar, ið kunnu standast av hesi broyting, samdist nevndin um at heita á landsstýrið, um at viðgera spurningin av nýggjum.

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi

## Uppskot

## til

## samtyktar

Heitt verður á landsstýrið um at arbeiða víðari við spurninginum um upprykkjandi veðrætt fyri Húsalánsgrunnin.

Nevndin hevur síðan býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.
Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Tordur Niclasen, Signar

Hansen, Anfinn Kallsberg og Eyðun Viderø) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesi broyting, og setir fram soljóðandi

## Broytingaruppskot

### til

### uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| Í § 1 verður stk. 6 strikað og stk. 7 verður stk. 6. | I § 1 annuleres stk. 6 og stk. 7 bliver stk. 6. |

Tá ið spurningurin um, at Húsalánsgrunnurin eisini fær heimild at figgja eldri hús varð viðgjørdur í figgjarnevndini, varð vist á fyrimunir og vansar.

Meirilutin er samdur við landsstýrið um, at tað er beint at siga, at tað verður hildið verða ein landsbúskaparligur fyrimunur, um í góðari tíð verður fyribyrgt, at sethús koma at standa tóm, kanska serliga á bygdunum, tá stórur áhugi er at keypa hesi hús, um figging fæst til tess.

Undir orðaskiftinum varð nomið við vandan fyri, at spekulatión kann koma í keyp og sølu av eldri húsum.

Her eigur ti at verða ansað eftir, at prísirnir verða hildnir á rímiligum støði.

Minnilutin (Ivan Johannesen) tekur undir við at strika pkt. 6 og tekur undir við landsstýrinum pkt. 4.

**Ad pkt. 2, 3 og 7:**

Sum er, kann Húsalánsgrunnurin veita lán, tá tað snýr seg um bygging av sethúsum og íbúðum, eisini til umbygging og bjálving.

Víst verður til, at Húsalansgrunnurin hevur heimild at veita lán upp til 90% av metingarvirðinum til nýbygging av sethúsum og íbúðum.

Grunnurin hevur ikki pening til at røkja hesa uppgávu, men til hús undir 120m², ið kosta 6-700.000 kr. og bert kann læna 120.000 kr.

Skal Húsalánsgrunnurin nú til at veita lán til keyp av sethúsum og íbúðum, gerst tað figgjarliga grundarlagið bert uppaftur veikari.

Eisini er hugsandi, at um Húsalánsgrunnurin skal til at veita lagaligt lán til keyp av sethúsum og íbúðum, førir hetta við sær, at prísurin á brúktum sethúsum fer upp, so tað bert verður seljarin, ið fær fyrimun av einum lagaligum láni frá Húsalánsgrunninum.

Grundað á tað, ið er framført, kann ikki takast undir við hesum broytingum.

2. viðgerð 17. apríl. Uppskotið til samtyktar frá samdari nevnd varð samtykt við 31-0 atkvøðum. Broytingaruppskot frá meirilutanum til § 1 varð samtykt við 30-0 atkvøðum. § 1, pkt. 1 varð samtykt við 18-0, pkt. 2 við 19-0, pkt. 4 við 26-0, pkt. 5-7 samtykt við 19-0. § 2 varð samtykt við 19-0. Við 30-0 varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L. j. nr. 1426-5-1. Lóg nr. 44 frá 2. mai 1986.

# 52. Landsstýrismál

Árið 1986, mikudagin 5. februar varð gerðabók landsstýrisins 1984-85 framløgd og býtt út, eitt eintak til hvønn flokkin.

# 53. Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya í 1986

Árið 1986, týsdagin 4. februar legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Vísandi til § 1 í løgtingslóg nr. 9 frá 29. mars 1978 um fiskiavtalur við fremmand lond góðkennir løgtingið viðløgdu semju dagf. 22. januar 1986 um sínamillum fiskirættindi í 1986 millum Føroyar og Týska Demokratiska Lýðveldið (DDR)

**Viðmerkingar:**

Heilt síðan at fiskimarkið varð flutt út á 200 fjóðringar í 1977, hevur Týska Demokratiska Lýðveldið biðið um og fingið loyvi til at reka svartkjaftaveiði í føroyskum sjógvi.

Í 1980 byrjaði føroyskur toskafiskiskapur í Eystrasalti, og varð tá sett sum treyt fyri fiskiskapin hjá skipum úr Týska Demokratiska Lyðveldinum undir Føroyum, at føroyingar fingu eina toskakvotu á teirra havøki.

Í 1980 fingu føroyingar eina kvotu uppá 400 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 2.800 tons av svartkjafti undir Føroyum.

Í 1981 fingu føroyingar eina kvotu upp á 800 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 6.600 tons av svartkjafti undir Føroyum. Loyvda skipatalið hjá DDR varð samstundis hækkað úr 2 í 3. Samstundis varð skipatalið hjá føroyingum hækkað úr 3 í 5. Av kvotuni uppá 800 tons av toski kundu 400 tons av toski verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t. d. upp í 600 tons av síld.

Í 1982 fingu føroyingar eina kvotu uppá 975 tons av toski á landleiðini hjá DDR og DDR fekk eina kvotu uppá 8.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av tí hækkaðu kvotuni kundu 500 tons av toski verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t. e. upp í 750 tons av síld. Talið av føroyskum skipum varð samstundis hækkað úr 5 í 7.

Í 1983 fingu føroyingar eina kvotu uppá 1.300 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av toskakvotuni kundu 650 tons verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t.e. upp í 975 tons av síld. Føroyska skipatalið varð samstundis hækkað úr 7 í 10.

Í 1984 og 1985 fingu føroyingar eina kvotu uppá 1.300 tons av toski á landleiðini hjá DDR, og DDR fekk eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti undir Føroyum. Av toskakvotuni kundu 650 tons verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t. e. upp í 975 tons av síld. Føroyska skipatalið varð tó í 1985 hækkað úr 10 í 15.

Á fundi í Keypmannahavn tann 22. januar 1986 ímillum umboð fyri Føroya landsstýri og danska uttanríkismálaráðið øðrumegin og umboð fyri fiskivinnumyndugleikarnar hjá DDR hinumegin varð funnið fram til hjáløgdu semju um sínamillum fiskiskap millum Føroyar og DDR fyri 1986.

Sambært hesi semju verður kvotan av svartkjafti til DDR tann sama sum í 1984 og 85, nevniliga 10.000 tons. Loyvda skipatalið verður eisini óbroytt, 4 før.

Føroyska toskakvotan verður eisini tann sama sum í 1984 og 85, nevniliga 1.300 tons. Av hesi kvotu kunnu 650 tons av toski verða skift um við síld í lutfallinum 2-3, t. e. upp í 975 tons av síld. Talið av føroyskum skipum verður óbroytt, 15 før. Av hesum førum hava í mesta lagi 12 loyvi

at fiska samstundis á landleiðini hjá DDR, meðan hetta talið var 10 í 1985.

Partarnir vilja royna at gjøgnumføra notuskifti áðrenn 15. februar 1986.

Í samband við samráðingarnar um sínamillum fiskiskap fyri 1986 hildu samráðingarnevndirnar tað vera hóskandi at fáa í lag ítøkiligar samráðingar við tí í hyggju at gera ein rammusáttmála um fiskiskap í scinasta lagi 31. mai 1986 í Føroyum.

**Skjal 1.**

## PROTOKOLL

**millum umboð fyri danskar og føroyskar myndugleikar øðrumegin og umboð fyri ráðharrastovuna DDR fyri økisstýrdan ídnað og matvøruidnað hinumegin um fiskiskap í árinum 1986.**

Sendinevndirnar eru komnar ásamt um at leggja niðanfyri standandi uppskot fram fyri myndugleikar teirra til góðkenningar.

1. VEB Fischkombinat Rostock fær í árinum 1986 eina kvotu uppá 10.000 tons av svartkjafti á fiskiøki Føroya.

2. Føroyar fáa á fiskiøki DDR's í 1986 eina kvotu uppá 1.300 tons av toski. Av hesum kunnu í staðin fyri upp til 650 tons av hesi toskakvotu veiðast upp til 975 tons av sild.

3. Talið av skipum, sum kunnu veiða hesa kvotu á fiskiøki Føroya, er avmarkað til fýra før.
   Føroyar kunnu til veiðu av kvotuni á fiskiøki DDR's nýta fimtan før. Av hesum førum kunnu tó í mesta lagi tólv fiska samstundis á fiskiøki DDR's.

4. Føroysk fiskifør, sum í 1986 hava fingið loyvi frá fiskieftirliti DDR's til at fiska á fiskiøki DDR's, hava samstundis loyvi at fiska á einum øki innan fyri sjóøki DDR's.
   Hetta øki og treytirnar í hesum sambandi eru upproknað í hjálagda skjali: »Serligar treytir fyri fiskiskapi við útlendskum fiskiførum á sjóøki Týska Demokratiska Lýðveldisins.«

5. Partarnir royna at fáa í lag notuskifti til váttan av sáttmálunum um fiskiskap í 1986 áðrenn 15. februar 1986. Partarnir eru samdir um, at sínamillum fiskiskapurin kann byrjast tann 1. januar 1986.

6. Partarnir halda tað vera hóskandi at fáa í lag ítøkiligar samráðingar

við tí í hyggju at gera ein rammusáttmála um fiskiskap í seinasta lagi 31. mai 1986 í Føroyum.

Keypmannahavn, tann 22. januar 1986.

***Peter-Michael Köster*** ***Árni Olafsson***

***Tryggvi Johansen***

1. viðgerð 11. februar 1986. Málið varð uttan orðaskifti beint í marknaðarnevndina, sum 12. februar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 5. februar 1986 og undir 1. viðgerð tann 11. februar 1986 beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur á fundi tann 11. februar 1986 viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 13. februar. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 27-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1500-1-11-3.

# 54. Løgtingslóg um dýping av Ytra Polli í Skopun.

Ár 1986, mikudagin 5. februar legði Lasse Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

til

| | |
|---|---|
| **løgtingslóg um dýping av Ytra Polli í Skopun.** | **lagtingslov om uddybning af Ytra Polli i Skopun.** |
| **§ 1.** Landsstýrinum verður heim- | **§ 1.** Landsstyret bemyndiges til |

ilað landskassans vegna at lata dýpa Ytra Poll í Skopun.

§ 2. Heimilað verður eisini landsstýrinum landskassans vegna at læna upp til 20 mill. kr. í sambandi við fremjingina av teimum í § 1 nevndu arbeiðum.

§ 3. Ognanin av tí lendi og teim ognum annars, sum neyðugt er at hava til taks í sambandi við fremjingina av nevndu arbeiðum, er uppgáva hjá Skopunar kommunu, og ber hon allan kostnað av hesum.

§ 4. Tá ið útbyggingin er framd, verður økið vanligur partur av Skopunar havn við teim rættindum og skyldum fyri kommunu og havn, sum lógir og aðrar fyriskipanir viðvíkjandi kommunalum havnum tilskila.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

på landskassens vegne at lade uddybe Ytra Poll i Skopun.

§ 2. Landsstyret bemyndiges ligeledes til på landskassens vegne at låne indtil 20 mill. kr. i forbindelse med realiseringen af de i § 1 nævnte arbejder.

§ 3. Erhvervelsen af grundarealer og ejendomme, som det er nødvendigt at disponere over i forbindelse med uførelsen af omhandlede arbejder, er Skopunar kommunes opgave og bekostes alene af denne.

§ 4. Når udbygningen er fuldført, indgår området som et normalt led i Skopunar havn med de rettigheder og forpligtelser for kommunen og havnen, som love og andre forskrifter vedrørende kommunale havne tilsiger.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Tey seinastu arbeiðini í Skopunar havn, portrið og leingingin av skerinum á Bergi, hava gjørt tað møguligt at liggja trygt í havnini og bøtt eitt sindur um ókyrruna frá vestanalduni.

Siglingarviðurskiftini eru tó enn ikki í lagi, hvørki hvat viðvíkur rúmd ella kyrru á Pollinum. Serliga trupult er við vetrarsigling við Tróndi ella tílíkum ferjum.

Einasta gongda leið fyri at bøta munandi um hesi viðurskifti er at økja um Pollin, dýpa hann og samstundis leggja grótkast framvið norðursíðuni á Ytra Polli. Eisini er tað ein treyt frá skipasýninum, at hetta arbeiðið verður framt, um Tróndur skal fáa siglingarloyvi til vetrarsigling á Skopunar havn.

Eitt projekt, nakað minni enn V 1,5, er mett at kosta o. u. 20 mió. kr. í dagsins prísum.

Tað er torført at gera álítandi metingar av slíkum arbeiðum, men undir

øllum umstøðum røkkur upphæddin eini tvey ár, til ein nýggj havnarætlan væntandi verður sett í gildi.

1. viðgerð 11. februar 1986. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 13. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 5. februar 1986 og undir 1. viðgerð 11. februar beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið, og tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 20. mars. Uppskotið varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 24. mars. Uppskotið endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

Lóg nr. 39 frá 16. apríl 1986.

# 55. Løgtingslóg um útbygging av Hests havn.

Ár 1986, týsdagin 4. februar legði Lasse Klein, landsstýrismaður fram soljóðandi

**Uppskot**

til

**Løgtingslóg**

**um**

**útbygging av Hests havn.**

§ 1. Úr landskassanum verður veittur studningur til útbyggingar av havnarlagnum í Hests komm-

**Lagtingslov**

**om**

**udbygning af Hests havn.**

§ 1. Af landskassen ydes tilskud til udbygning af havnen i Hests kommune, således at tilskudet

unu, soleiðis at studningurin verður til støddar 75% av byggipeninginum, tó í mesta lagi 75% av kr. 14.000.000 (jvbr. § 2) og rindaður við eins stórum ársgjøldum í 5 fylgjandi fíggjarárum frá og við fíggjarárinum 1986 at rokna.

andrager 75% af anlægsudgifterne, dog højst 75% af kr. 14.000.000 (jvfr. dog § 2), og udredes med lige store årsrater i 5 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1986 at regne.

§ 2. Tann parturin av játtanini, sum ikki er arbeitt fyri, tá ið fíggjarár er komið at enda, verður við uppískoytisjáttan á løgtingsfíggjarlógini fyri fylgjandi ár javnaður samsvarandi broytingunum í indeksinum fyri havnabyggingar, sum gjørt er til útrokningar av føroysku tjóðarrokningskapunum við føstum prísum sum grundarlag.

§ 2. Den del af tilskudet, for hvilket der ikke er præsteret arbejde ved finansårets slutning, reguleres ved tillægsbevilling på lagtingsfinansloven for det følgende år i overensstemmelse med ændringerne i indekset for havnebygning, der er udarbejdet til fastprisberegning af det færøske nationalregnskab.

§ 3. Eingin studningur verður goldin ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi sett í sambandi við góðkenning av byggiætlan, eru loknar.

§ 3. Intet tilskud bliver udbetalt eller stillet som sikkerhed, førend samtlige betingelser, landsstyret måtte stille i forbindelse med en godkendelse af udbygningsplanen, er opfyldt.

§ 4. Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri lánum, kommunurnar mega taka í sambandi við fremjing av útbyggingunum sambært hesi løgtingslóg.

§ 4. Landsstyret bemyndiges til at garantere for de lån, kommunerne måtte optage i forbindelse med udbygningerne i henhold til denne lagtingslov.

§ 5. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 5. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Allar bygdir á teim størru oyggjunum hava nú ella fáa skjótt havn ella atgongd til eina tílíka, har dekksfør kunnu leggja at og liggja, so útróður við slíkum fari kann verða ríkin.

Av teim smærru oyggjunum, sum eru fleiri í tali enn tær størru oyggj-

arnar og samanteggjaðu oyggjabólkarnir, hevur enn bert Nólsoyggin fingið havn; men aðrar troka tó á, og ímillum hesar er Hestur.

Neyvar kanningar eru gjørdar av møguleikunum at bøta um havnaumstøðurnar. Modelroyndir eru síðan gjørdar á Dansk Hydraulisk Institut.

Royndirnar vístu, at ein brimgarður norðan fyri pierin í Hesti og ein minni brimgarður sunnanfyri sama pier, gera tað møguligt at hava rættiliga stórt skip liggjandi við verandi pier, og at nýtt virkisøki við bryggju kann gerast norður ímóti tí norðara brimgarðinum. Kostnaðarmetingar vísa, at brimgarðarnir og virkisøkið koma at kosta o. u. 14 mió. kr.

1. viðgerð 11. februar 1986. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fyri løgtingið tann 5. februar 1986 av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð 11. februar 1986 beint í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt uppskot landsstýrisins. Nevndin ger hesar viðmerkingar út frá teimum upplýsingum, sum nevndin hevur fingið sær til vega um inntøkugrundarlagið í Hests kommunu, og er hon tann, at kommunan er ikki før fyri at gjalda 25% av byggikostnaðinum av einum so stórum projekti. Út frá hesum fer nevndin at loyva sær at skjóta upp at broyta uppskot landsstýrisins frá 75% til 85% av byggikostnaðinum við hesum viðmerkingum.

Málið varð lagt fram av samferðslunevndini 11. mars 1986 og undir 1. viðgerð 4. apríl beint aftur í samferðslunevndina.

Samferðslunevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum, nevndin er samd um ikki at broyta fyriliggjandi uppskot.

2. viðgerð 16. apríl. Atkvøðugreiðsla 17. apríl. Uppskot I varð samtykt við 31-0, II varð samtykt við 32-0. Uppskot A samtykt við 31-0, B, I og II varð við navnakalli samtykt við 27 ja-atkvøðum, 1 nei-atkvøðu, 4 atkvøddu ikki.

Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Óli Breckmann,
Anfinn Kallsberg,
Svend Aage Ellefsen,
Jógvan Sundstein,

Agnar Nielsen,
Jógvan Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Eilif Samuelsen,
Henrik Old,
Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jona Henriksen,
Jákup Lindenskov,
Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Tummas Arabo,
Asbjørn Joensen,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen,
Heini O. Heinesen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson,
Adolf V. Hansen,
Tordur Niclasen,
Jutta Midjord,
Ivan Johannesen.

Nei atkvøddi: Hilmar Kass.

Atkvøddu ikki: Eyðun Viderø,
Poul Michelsen,
Flemming Mikkelsen,
Olaf Olsen.

# 59. Veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins

Ár 1986, týsdagin 11. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til Meuningargrunn Ídnaðarins.**

**lagtingslov om garanti for lån til Menningargrunnur Ídnaðarins.**

§ 1. Menningargrunni Ídnaðarins verður loyvt umframt hansara árligu lánsheimild sambært § 6 í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973, sum broytt við løgtingslóg nr. 89 frá 18. september 1980, at upptaka lán við landskassaveðhaldi upp á mótvirðið av 20,8 mió. norskum krónum í donskum krónum.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 1. Menningargrunnur Ídnaðarins får tilladelse til, udover den årlige lånhjemmel i henhold til § 6 i lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973, som ændret ved lagtingslov nr. 89 af 18. september 1980 at optage lån med garanti fra landskassen på modværdien af 20,8 mio. norske kroner i danske kroner.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Krøvini til Menningargrunnin um figging av ídnaðarvirkjum er alsamt vaksandi, eina helst av ti útbygging innan fiskaaling, sum farin fram er seinastu árini. Eisini er tørvurin á rakstrarlánum/veðhaldum vaksin í stórt mál. Tað hevur víst seg, at hesar nýggju vinnur eru serliga peningkrevjandi, og hava tær tikið ein lutfalsliga stóran part av figgjarorkuni hjá Menningargrunninum. Ífetta hevur so verið orsøk til, at ídnaðurin á landi hevur verið fyri vanbýti í ávísan mun.

Viðvíkjandi láninum er talan um mótvirðið av 20,8 mió. n. kr. í donskum kr. til eina rentu upp á 10⅛% í 5 ár. Tá tey 5 árini eru liðin, verður nýggj avtala gjørd um rentustøðið. Viðvíkjandi avdráttum kann upplýsast, at avdráttarfrælsi er útvegað fyri tey fyrstu 5 árini, og verður síðani alt lánið at rinda aftur yvir 10 ár við hálvárligum terningjaldingum.

1. viðgerð 13. februar. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 6. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 11. februar 1986 og undir 1. viðgerð tann 13. í sama mánaði beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið, og er til viðgerðina útvegað yvirlit frá Menningargrunninum fyri árini 1985, 1986, 1987 og 1988 í tilknýti til figgjarætlanirnar og eisini roknskapur grunsins fyri 1984/85.

Í skrivi frá 21. februar 1986 hevur Menningargrunnurin latið figgjarnevndini viðmerkingar, frágreiðingar og metingar viðvíkjandi umrøddu figgjarætlanum.

Undir viðgerðini í figgjarnevndini er víst á vandan við, at grunnurin lænir

út pening til rentu, ið er 2-3% lægri enn tann, ið grunnurin sjálvur rindar fyri upptikin lán og vandin við, at játtanin yvir fíggjarlógina ikki verður økt. Tølini vísa, at forrentingin av eginognini í 1983 og í 1984 var ov lág, og soliditeturin verður hættisliga veikur. Verða hesi viðurskifti óbroytt, fær grunnurin skjótt negativt rakstraravlop.

Eisini varð undir viðgerðini víst á, at almennu lántøkurnar eiga at samskipast til tess at útvega longri og bíligari lán og betri treytir annars. Um so verður gjørt, verður ein heppin fylgja, at útlánsrentustøðið í Føroyum lækkar.

Ein samd fíggjarnevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 10. mars §§ 1 og 2 vórðu samtyktar við 27-0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. mars. Málið endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1212-14-1. Lóg nr. 24. frá 12. mars 1986.

# 60. Veðhald fyri láni til Føroya Ídnaðargrunn

Ár 1986, týsdagin 11. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til Føroya Ídnaðargrunn.**

**§ 1.** Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri uttanlandsláni til Føroya Ídnaðargrunn upp á mótvirðið av 31,5 mió. norskum krónum í donskum krónum.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til Føroya Ídnaðargrunn.**

**§ 1.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for udenlandslån til Føroya Ídnaðargrunn på modværdien af 31,5 mio. norske kroner i danske kroner.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Tørvurin fyri figgjan av íløgum til smoltframleiðslu og til alibrúk er støðugt vaksandi.

Møguleiki er nú at fáa til láns úr Nordiske Investeringsbanken, Helsinki, eitt lán upp á mótvirðið av 31,5 mió. norskum krónum. Lánið er yvir 15 ár, tey fyrstu 5 eru avdráttarfrí.

Lánið verður í donskum krónum, sum eftir dagsins kursi verður umleið kr. 37,5 mió.

Rentan verður 10 ⅛% í 5 ár. Síðani verður nýggj avtala gjørd um rentustøðið.

1. viðgerð 13. februar. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 27. februar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 11. februar 1986 og undir 1. viðgerð 13. í s. m. beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið, og var til taks alt neyðugt taltilfar við gjølligum útgreiningum.

Semja var eisini um, at almennu lántøkurnar eiga at samskipast, og verður víst til álitið í løgtingsmáli nr. 59/1985.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 6. mars. §§ 1 og 2 vórðu samtyktar við 23-0 atkvøðum. At beina málið til 3. viðgerð varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. mars. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 27-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1212-3. Lóg nr. 25. frá 11. mars 1986.

# 61. Landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur

Ár 1986, hósdagin 13. februar legði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

# Uppskot

# til

**løgtingslóg um landskassaveðhald fyri lánum frá »Kreditforeningen af kommuner i Danmark« til føroyskar kommunur.**

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at veita mótveðhald sum sjálvskuldari fyri veðhaldum, sum statskassin sambært lóg nr. 172 frá 24. mai 1955 § 1 veitir »Kreditforeningen af kommuner i Danmark«, tá felagið veitir lán til kommunur.

**2. stk.** Eisini er landsstýrinum heimilað at veðhalda sum sjálvskuldari beinleiðis landskassans vegna fyri lán, sum felagið veitir kommunum.

§ 2.

Løgtingslógin kemur í gildi 1. apríl 1986 og er galdandi til og við 31. december 1986.

**lagtingslov om landskassegaranti for lån fra Kreditforeningen af kommuner i Danmark til færøske kommuner.**

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at kontrakautionere som selvskyldner for kautioner, som statskassen jfr. lov nr. 172 af 24. maj 1955 § 1 yder Kreditforeningen af kommuner i Danmark, når foreninger yder lån til kommuner.

**Stk. 2.** Endvidere er landsstyret landskassens vegne bemyndiget at kautionere som selvskyldnere direkte for lån, som foreninger yder kommuner.

§ 2.

Lagtingslov træder i kraft 1. april 1986 og er i kraft til og med 31. december 1986.

**Viðmerkingar:**

»Kreditforeningen af kommuner i Danmark« veitti í tíðini undan seinra heimsbardaga lán til føroyskar kommunur. Men táið sambandið millum Danmark og Føroyar slitnaði undir krígnum, komu trupulleikar við inngjaldingunum, sum góvu felagnum eitt rentutap, ið gjørdi, at lánsveitingarnar til føroyskar kommunur steðgaðu eftir kríggið.

Mitt í 50'unum avgjørdi kommunukredittfelagið at taka virksemið upp aftur í Føroyum, men setti felagið sum treyt, at staturin veðhelt fyri hesum lánum í ávísan mun. Hetta var av tveimum orsøkum, partvíst orsakað av teim tungu figgjarligu viðurskiftunum í Føroyum í 50'unum, og partvíst ti, at lántakararnir í kommunukredittfelagnum hefta solidariskt. Eisini tók kommunukredittfelagið fyrivarni um at krevja beinleiðis landskassaveðhald fyri hesum lánum.

Fólkatingið veitti við lóg nr. 172 frá 24. mai 1955 danska fíggjarmálaráðharranum heimild til at veðhalda fyri hesum lánum, men skuldu hesi veðhald smb. § 3 verða treytað av mótveðhaldi frá landskassanum.

Mannagongdin higartil hevur verið, at hvørja ferð, ið kommuna í Føroyum hevur tikið lán í kommunukredittfelagnum, hevur málið um veðhald frá landskassanum verið lagt tinginum til støðutøku við lóg í hvørjum einstøkum føri.

Henda mannagongd hevur verið nakað tung, serliga seinastu tíðina, tá ið rentan hjá kredittfeløgunum í Danmark er fallin, og kommunur í Føroyum hava umprioriterað til hesi lán.

Landsstýrið skjýtur tí upp, at heimilað verður landsstýrinum landskassans vegna at veita mótveðhald yvir fyri statskassanum og beinleiðis veðhald yvir fyri kommunukredittfelagnum fyri tílíkum lánum.

Orsøkin, fyri at lógin bert er galdandi fyri árið í ár, er, at landsstýrið enn ikki hevur fingið tilvegað yvirlit yvir lántøkurnar hjá kommununi, og tí kemur við nýggjum lógaruppskoti, tá hetta yvirlit fyriliggur.

Annars er ætlanin at fara undir samráðingar við kommunukredittfelagið um møguleikarnar at sleppa kravinum um stats- og landskassaveðhaldi.

Hjálagt er

1) Lóg nr. 172 frá 24. mai 1955 við teim viðmerkingum, sum fylgdi við, tá lógin kom fyri fólkatingið, og álitið frá fólkatingsnevndini, sum viðgjørdi málið.
2) Skjøl frá kommunukredittfelagnum um lánmøguleikarnar 1986.
3) Yvirlit yvir veðhaldsskyldur landskassans í dag viðvíkjandi lánum veitt av »Kreditforeningen af kommuner«.

Skjølini eru til skjals á landsskrivstovuni.

1. viðgerð 20. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 24. februar legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 13. februar 1986 og undir 1. viðgerð tann 20. í sama mánaði beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur undir við málinum, men er av teirri áskoðan, at landsstýrið og Fíggjarnevnd Løgtingsins saman skulu eiga ta í lógini tilskilaðu veðhaldsheimild.

Samsvarandi hesum setir ein samd fíggjarnevnd fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

Í § 1, 1. stk. verður í staðin fyri »Landsstýrinum verður heimilað« sett: »Landsstýrinum verður heimilað saman við fíggjarnevndini.

Í § 1, 2. stk. verður í staðin fyri »Landsstýrinum heimilað« sett: »landsstýrinum heimilað saman við fíggjarnevndini«.

I § 1, stk. 1 indsættes i stedet for »Landsstyret bemyndiges til« følgende: »Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget«.

I § 1, stk. 2 indsættes i stedet for »landsstyret landskassens vegne bemyndiget« følgende: »landskassens vegne sammen med finansudvalget bemyndiget«.

**Anfinn Kallsberg** og **Eyðun Viderø** mæla annars til, at landsstýrið ger eina heildarætlan fyri íløgutørvin hjá kommununum, serliga við atliti til spurningin um endurfígging, nú tað er møguligt at fáa ódýr lán, og verður víst til viðmerkingar fólkafloksins í løgtingsmáli nr. 15/1985: Veðhald fyri láni til Nólsoyar kommunu.

2. viðgerð 6. mars. Broytingaruppskot frá fíggjarnevndini § 1, 1. og 2. stk. samtykt við 24-0 atkvøðum. Við 24-0 atkvøðum varð samtykt, at málið soleiðis broytt skuldi fara til 3. viðgerð.

3. viðgerð 10. mars. Málið endaliga samtykt við 19-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 809-52-9. Lóg nr. 36 frá 10. apríl 1986.

# 62. Broyting í løgtingslóg um studning til veiðu av ídnaðarfiski

Ár 1986, hósdagin 13. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um studning til veiðu av idnaðarfiski.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 14 frá 5. mai 1975 um studning til veiðu av idnaðarfiski við broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 4 verður orðað soleiðis:

»At fylgja við og hava eftirlit við ásetanini av avreiðingarprísinum á fiski til idnað verður sett 6-mannanevnd vald soleiðis:

1) Felagið Nótaskip velur 1 lim og 1 varamann.
2) Felagið Idnaðarskip velur 1 lim og 1 varamann.
3) Føroya Fiskimannafelag velur 1 lim og 1 varamann.
4) Fiskiidnaðarvirkini velja 1 lim og 1 varamann.
5) Landsstýrið tilnevnir 1 lim, ið skal vera formaður fyri nevndini, og 1 varamann. Báðir limirnir óheftir av fiskiídnaðinum.«

2. § 5 verður orðað soleiðis:

»Fylgjandi persónar kunnu krevja seg fritiknar fyri starvið sum limur ella varamaður fyri ein lim í nevndini:

1) Limir av landsstýri, løgtingi og fólkatingi.
2) Persónar, sum fylt hava 60 ár.
3) Persónar, sum vegna heilsu ella vinnulig viðurskifti ikki uttan

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om tilskud til fangst af industrifisk.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 14 af 5. maj 1975 om tilskud til fangst af industrifisk med ændringer gennemføres følgende ændringer:

1. § 4 formuleres således:

»Til at følge og at have tilsyn med fastsættelsen af indhandlingspriser for fisk til industri nedsættes et 6-mands udvalg således sammensat:

1) Foreningen Nótaskip vælger 1 medlem og 1 suppleant.
2) Foreningen Idnaðarskip vælger 1 medlem og 1 suppleant.
3) Føroya Fiskimannafelag vælger 1 medlem og 1 suppleant.
4) Fiskeindustrivirksomhederne vælger 1 medlem og 1 suppleant.
5) Landsstyret udpeger 1 medlem, som skal være formand for udvalget, og 1 suppleant. Begge medlemmer uafhængige af fiskeindustrien.«

2. § 5 formuleres således:

»Følgende personer kan begære sig fritaget for hvervet som medlem eller suppleant for et medlem af udvalget:

1) Landsstyrets, lagtingets og folketingets medlemmer.
2) Personer, der er fyldt 60 år.
3) Personer, som på grund af deres helbredstilstand eller

vanda fyri vælferð kunnu røkja starvið.

4) Persónar, sum ikki búgva í Føroyum.
5) Persónar, ið starvast undir vrakarastovninum.

**2. stk.** Eisini kann hann, sum í 5 ár hevur verið formaður í nevndini krevja at sleppa undan formansstarvinum.

**3. stk.** Sorinskrivarin ger endaliga av, um tær í stk. 1-3 nevndu grundir til at verða frítikin ella avskorin frá nevndarstarvi fyriliggja.«

**3.** § 6 verður orðað soleiðis:

»Øll val og útnevningar eru galdandi fyri 3 ár í senn. Verður limur frítikin ella avskorin frá at virka í starvstíðini, ella hann vegna sjúku, burturferð ella øðrum lógligum forfalli ikki fyribils kann røkja starvið, tekur varamaðurin við. Er varamaðurin eisini forðaður í at røkja starvið, verður varamaður valdur ella uppnevndur fyri hønda.

**2. stk.** Nevndin ásetir nærri reglur fyri virki sínum. Hesar reglur skulu góðkennast av landsstýrinum aftaná ummæli frá sorinskrivaranum.«

**4.** § 7 verður orðað soleiðis:

»Allir, sum hava við framleiðslu og útflytan av fiskaolíu og fiskamjøli úr Føroyum at gera, hava eftir kravi frá nevndini skyldu til at geva allar upplýsingar prísviðurskiftunum, útflutningsvørum og framleiðsluútreiðslum viðvíkjandi.

erhvervs- og familieforhold ikke uden fare for deres velfærd kan bestride hvervet.

4) Personer, der ikke er bosat på Færøerne.
5) Personer, der er ansat under vragerinstitutionen.

**Stk. 2.** Endvidere kan den, der i 5 år har været ansat som formand for udvalget, begære sig fritaget for formandshvervet.

**Stk. 3.** Sorenskriveren afgør endeligt, hvorvidt de i stk. 1-3 omhandlede fritagelses- eller udelukkelsesgrunde foreligger.«

3. § 6 formuleres således:

»Alle valg og udnævnelser sker for 3 år ad gangen. Indtræder fritagelses- eller udelukkelsesgrunde i funktionsperioden, eller bliver et medlem på grund af sygdom, bortrejse eller andet lovligt forfald midlertidigt forhindret i at udøve sit hverv, indtræder suppleanten i medlemmets sted. I tilfælde, hvor også suppleanten er forhindret i at beklæde erhvervet, vælges eller udnævnes stedfortræder for denne.

**Stk. 2.** Udvalget fastsætter nærmere regler for dets virksomhed. Disse regler skal godkendes af landsstyret efter indhentet udtalelse fra sorenskriveren.«

**4.** § 7 formuleres således:

»Enhver, som er beskæftiget med eksport af fiskeolie og fiskemel fra Færøerne, har pligt til på begæring af udvalget at give alle oplysninger vedrørende prisforhold, eksportvarer og produktionsomkostninger.

**2. stk.** Tann, sum ikki ger hetta, kemur undir sekt, um ikki harðari revsing er uppiborin.«

**Stk. 2.** Undladelse heraf straffes med bøde, såfremt ikke højere straf er forskyldt.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Løgtingslógin um studning til veiðu av ídnaðarfiski frá 1975 § 4 heimilaði eini 6-mannanevnd til at fylgja við og hava eftirlit við ásetaninum av avreiðingarprísum á fiski til ídnað.

Í 1978 varð henda greinin broytt solciðis, at sett varð í staðin nevnd til at áseta avreiðingarprísin á ídnaðarfiski.

Orsøkin til broytingarnar í 1978 var, at landsstýrið ynskti, at skipanini fyri ídnaðarfisk skuldi vera hin sama sum fyri feskfiskin smbr. lógini um ráfiskagrunnin.

Fært hevur verið fram, at tað er ynskiligt, at meiri kapping verður í prísásetingini fyri ídnaðarfisk. M. a. hevur felagið Nótaskip sent landsstýrinum bræv um hetta.

Munur er á møguleikunum hjá virki í Føroyum og t. d. í Danmark, bæði av geografiskum orsøkum og tí munur er á framleiðslukostnaði. Hetta seinna er viðurkent í tí, at í løtuni verður bert studningur latin til ídnaðarfisk landaður í Føroyum. Hóast hetta verður tað hildið vera rætt, at prísásetingin í Føroyum kemur meira at laga seg eftir teimum prísum, sum eru at fáa aðrastaðni, serlig í Danmark, og tí verður skotið upp at gera nevndina til eina eftirlitsnevnd við somu heimildum, sum hon hevði í upprunalíkinum í løgtingslógini frá 1975. Nevndin verður ein eftirlitsnevnd, umboðandi somu feløg og virki, sum prísásetingaruevndin í dag.

1. viðgerð 20. februar. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 4. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av landsstýrinum tann 13. februar 1986 og undir 1. viðgerð 20. í s. m. beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Erlendur Patursson, Jógvan Sundstein, Sigfríður Vørðhamar, Tórálvur Mohr Olsen og Juul Jacobsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, men hevur hesar viðmerkingar:

Í teim viðmerkingum, ið fylgdu við uppskoti landsstýrisins til lógina frá 1974 um studning til ídnaðarfiskivciði, var cingin grund givin fyri at seta ta eftirlitsnevnd, ið tá varð sett. Orðaljóðið í lógini viðvíkjandi hesi nevnd var hetta:

»At fylgja við og hava eftirlit við ásetanini av avreiðingarprísinum á fiski til ídnað verður sett 6-mannanevnd.«

Men sum tað skilst hevur grundin verið tann, at ídnaðarfiskurin skuldi fáa prísstudning, og tí hevur tað verið hildið rímiligt, at fylgt varð við og havt eftirlit við sjálvum prísinum.

Hetta varð so samtykt tá.

Í løgtingssetuni 1977 hevur landsstýrið broytingaruppskot til hesa skipan. Í viðmerkingunum sigur nú landsstýrið:

»Eftir § 4 í lógini um studning til veiði av ídnaðarfiski situr cin 6-mannanevnd at fylgja við og hava eftirlit við ásetanini av avreiðingarprísinum. Nevndin hevur so statt onga heimild at áseta prísirnar. Øðrvísi er eftir lógini um ráfiskagrunnin, har verulig prísásetingarnevnd er skipað.

Í báðum hesum førum letur landskassin studning til fisk, ið avreiddur verður í Føroyum. Landsstýrið heldur tað av prinsipiellum grundum ikki vera rætt, at munur er, og mælir til, at eisini ídnaðarfiski viðvíkjandi verður avreiðingarprísurin settur av nevnd umboðandi teir ymsu bólkarnar, ið hava áhuga í prísásetingini.«

Fiskivinnunevndin var í høvuðsheitum saind við landsstýrið um at seta slíka prísásetingarnevnd fyri ídnaðarfisk, og varð henda nýskipan samtykt.

Í tí uppskoti, ið landsstýrið nú hevur lagt fram, verður mælt til at ganga aftur til ta gomlu skipanina, t. e. at henda nevnd ikki longur skal vera prísásetingarnevnd, men bert hava til uppgávu »at fylgja við og hava eftirlit við ásetanini av avreiðingarprísinum á fiski til ídnað«.

Nú eru grundgevingar landsstýrisins heilt aðrar enn tær, ið fylgdu við uppskotinum frá 1977.

Nevnt verður, at ynskiligt er, at meiri kapping verður í prísásetingini fyri ídnaðarfisk, og at m. a. felagið Nótaskip hevur sent landsstýrinum bræv um hetta.

Bent verður á, at studningur bert verður latin til ídnaðarfisk, ið landaður verður í Føroyum, men verður tað hildið vera rætt, at prisásetingin í Føroyum kemur meira at laga seg eftir teim prísum, sum eru at fáa aðrar staðir.

Við besum grundum mælir nú landsstýrið til, at henda nógv umrødda nevnd, ið ikki verður nøkur prísásetingarnevnd, men bert nevnd, ið skal fylgja við og hava eftirlit við prísinum.

Ein minniluti (Hilmar Kass) tekur ikki undir við uppskotinum og setir einki uppskot fram.

Ein annar minniluti (Jógvan I. Olsen) tekur støðu í tingsalinum.

2. viðgerð 8. apríl. Málið varð aftur beint í fiskivinnunevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

## Álit II

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 13. februar 1986 og undir 1. viðgerð 20. februar beint í fiskivinnunevndina, sum 4. apríl legði fram álit.

Undir 2. viðgerð 8. apríl varð málið aftur beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur aftur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Erlendur Patursson, Tórálvur Mohr Olsen, Sigfríður Vørðhamar) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til at samtykkja tað.

Minnilutin (Jógvan I. Olsen) tekur ikki undir við samansetingini av nevndini, sum landsstýrið skjýtur upp, av tí at í uppskotinum er samansetingin av nevndini ójøvn millum áhugafeløgini (seljarar/keyparar), nevniliga triggir øðrumegin, meðan í núgaldandi lóg er umboðanin líka millum áhugafeløgini, og setir sostatt viðvíkjandi vali av nevnd fram

### Broytingaruppskot

### til

### uppskot landsstýrisins

| | |
|---|---|
| 1) Felagið Nótaskip velur 1 lim og 1 varamann. | 1) Foreningen Nótaskip vælger 1 medlem og 1 suppleant. |
| 2) Felagið Ídnaðarskip velur 1 lim og 1 varamann. | 2) Foreningen Ídnaðarskip vælger 1 medlem og 1 suppleant. |
| 3) Føroya Fiskimannafelag velur 1 lim og 1 varamann. | 3) Føroya Fiskimannafelag vælger 1 medlem og 1 suppleant. |
| 4) Fiskiídnaðarvirkini velja 3 limir og 3 varamenn. | 4) Fiskeindustrivirksomhederne vælger 3 medlemmer og 3 suppleanter. |
| 5) Landsstýrið tilnevnir 1 lim, ið skal vera formaður fyri nevndini, og 1 varamann. Báðir limirnir óheftir av fiskiídnaðinum.« | 5) Landsstyret udpeger 1 medlem, som skal være formand for udvalget, og 1 suppleant. Begge medlemmer uafhængige af fiskeindustrien.« |

Minnilutin (Hilmar Kass) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eingi uppskot fram.

2. viðgerð 11. apríl. Broytingaruppskot frá minnilutanum (Jógvan I. Olsen) fall við 9-0. § 1 í uppskoti landsstýrisins fall við 14-0. Málið sostatt burturdottið.

F. L. j. nr. 1501-15-2/86.

# 63. Trygdargrunnur løntakaranna

Ár 1986, hósdagin 20. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um trygdargrunn løntakaranna.**

§ 1. Settur verður á stovn grunnur til at tryggja føroyskum løntakarum á privata arbeiðsmarknaðinum krav eftir ikki útgoldnari løn undir hesum umstøðum:

1. Tá arbeiðsplássið fer av knóranum,
2. tá arbeiðsgevari doyr, og búgvið verður skift í rættinum,
3. tá virki letur aftur, og arbeiðsgevarin prógvast eftir rættarúrskurð ikki er førur fyri at rinda lønarkravið.

§ 2. Treytir fyri at fáa pening úr grunninum eru:

at kravið er uppiborið sambært lógini,
at kravið úrslitalcyst er roynt við rættsligari incasso,
at kravið er ikki avoldað,
at cingin onnur trygging gildir.

**lagtingslov om lønmodtagernes sikringsfond.**

§ 1. Der etableres et fond til sikring af færøske lønmodtagere på det private arbejdsmarked krav på ikke udbetalt løn under disse forhold:

1. Når arbejdsstedet går konkurs,
2. når arbejdsgiveren dør og boet skiftes af skifteretten.
3. Når virksomheden lukker, og arbejdsgiveren beviser med retskendelse, at han ikke er i stand til at honorere lønkravet.

§ 2. Det er en betingelse for at få beløb fra fondet:

at kravet er lovmedholdeligt,
at kravet uden resultat er forsøgt inddrevet med retslig inkasso,
at kravet ikke er forældet,
at kravet ikke er sikret på anden måde.

§ 3. Arbeiðsgevarar rinda grunninum árliga 100 kr. fyri hvønn løntakara, tá lógin fær gildi til árslok 1986. Gjaldið skal vera goldið í seinasta lagi 31. januar árið eftir og kann innheintast við panting.
**2. stk.** Landskassin veitir grunninum somu upphædd.
**3. stk.** Ajourføring av árliga tryggingargjaldinum verður ásett sambært reglugerð.

§ 3. Arbejdsgiverne betaler til fondet 100 kr. årlig for hver lønmodtager fra det tidspunkt, loven får gyldighed til udløbet af 1986. Beløbet skal være betalt ikke senere end 31. januar det følgende år og kan indhentes ved udpantning.
**Stk. 2.** Landskassen betaler samme beløb til fondet.
**Stk. 3.** Ajourføring af det årlige sikringsbidrag fastsættes med et reglement.

§ 4. Almannastovan umsitur grunnin og virkar móttaranna vegna undir rættarviðgerð av trotabúgvi.

§ 4. Almannastovan administrerer og fungerer på modtagernes vegne under skifterettens behandling af konkursloven.

§ 5. Grunnurin rindar í mesta lagi 80% av kravinum og hægst tað, hann er førur fyri at rinda.
**2. stk.** Grunnurin kann rinda løntakaranum forskot upp á krøv teirra í trotabúgvum.

§ 5. Fondet betaler højst 80% af kravet og endvidere højst det, det er i stand til at betale.
**Stk. 2.** Fondet kan betale lønmodtager forskud på krav i et konkursbo.

§ 6. Roknskaparárið er fíggjarárið, og roknskapur grunsins verður grannskoðaður og endurskoðaður eftir somu reglum sum roknskapur landsins.

§ 6. Regnskabsåret er finansåret, fondets regnskaber revideres og decideres efter de regler, som gælder for landets regnskaber.

§ 7. Almennir myndugleikar, arbeiðsgevarar og yrkisfeløg skulu eftir ynski geva grunninum upplýsingar, sum hava týdning fyri avgerðir um útgjalding úr grunninum.

§ 7. Offentlige myndigheder, arbejdsgivere og erhvervsvirksomheder skal efter begæring give fondet de oplysninger, der har betydning for afgørelser om udbetaling fra fondet.

§ 8. Ósemjur millum arbeiðsgevara, búgv hansara og grunnin kunnu leggjast fyri gerðarrætt, um

§ 8. Tvistigheder mellem arbejdsgiver, dennes bo og fondet kan forelægges en voldgift, såfremt

ósemja tekur seg upp millum partarnar.

uoverensstemmelser opstår mellem parterne.

§ 9. Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 9. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Fiskimenn og útgerðarmenn hava fingið ein trygdargrunn veiðimanna við løgtingslóg frá 1979, men eingin tílsvarandi lóg tryggjar løntakarar hjá privatum vinnuvirkjum. Starvsfólk hjá tí almenna eru tryggjað á annan hátt.

Tíbetur fara virki sjáldan á ørmundarhúsi í dag. Men tíðir skifta, og tann vanlukka at fara á húsagang rakar ikki bert eigarar av virki og familjur teirra, men tíverri eisini starvsfólk, sum ikki hava aðra trygd enn at koma framman fyri vanligar kreditorar, so úrslitið verður mangan soltið.

Einir 15.000 løntakarar munnu vera í teim bólkum, sum henda lóg er ætlað at fevna um, so hon virkar breitt og røkkur stórum parti av landsins verkamonnum og -kvinnum, handverkarum, handils- og kranbarfólki í stórum parti av tí alsamt vaksandi talinum á starvsfólki í privata tænastusektorinum.

Eins og við trygdargrunni veiðimanna røkkur hesin grunnur til at útgjalda húsagangsraktum løntakarum upp til 80% av lønarmissinum tilsamans. Soleiðis kann grunnurin veita t. d. 50% av samlaðu upphæddini, um trotabúgvið greiðir t. d. 30%, tá uppgjørt er.

Størsti fyrimunur við slíkum grunni er, at hann virkar skjótt og kann enntá útgjalda forskot. Skjót hjálp er dupult hjálp.

Í grannalondum okkara verður mett, at 100 kr. árliga fyri hvønn tryggingartakara er nóg mikið til at røkka grunsins endamáli í vanligum tíðum. Men upphæddin kann regulerast við prístali ella broyttum umstøðum við almennari reglugerð.

100 kr. er eisini so lágt tal, at tað ikki tyngir ofta frammanundan ovbyrjað vinnuvirki.

1. viðgerð 28. februar. Málið varð beint í arbeiðaramálanevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum tann 20. februar 1986 og undir 1. viðgerð tann 28. februar 1986 beint í arbeiðsmálanevndina.

Arbeiðsmálanevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meirilluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Øssur av Steinum, Jørgen Thomsen og Sverre Midjord) vísir til samgonguskjalið og setir onki uppskot fram, tá landsstýrið hevur sett nevnd at arbeiða við hesum málinum.

Minnilutin (Martin Nielsen) mælir til, at fyriliggjandi uppskot verður samtykt.

Ein annar minniluti (Ivan Johannesen) mælir til, at trygdargrunnur veiðimanna eisini kemur at umfata løntakarar á landi og setir fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

**Uppskot til samtyktar:**

»Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at lógin um trygdargrunn veiðimanna eisini kemur at umfata løntakarar á landi.«

2. viðgerð 3. apríl. Uppskot Fólkafloksins fall við 8 ja-atkvøðum, 21 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir. Uppskot til samtyktar frá minnilutanum í arbeiðsmálanevndini fall við 7 ja-atkvøðum, 22 atkvøddu ikki, 3 vóru burturstaddir. Atkvøtt varð við navnakalli í báðum førum.

Atkvøðugreiðsla av upprunauppskoti:

Ja atkvøddu:
D. P. Danielsen,
Anfinn Kallsberg,
Sigfríður Vørðhamar,
Svend Aage Ellefsen,
Eyðun Videro,
Jógvan Sundstein,
Poul Michelsen,
Adolf V. Hansen.

Atkvøddu ikki:
Pauli Ellefsen,
Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Jógvan Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Dánjal Larsen,
Henrik Old,
Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jákup Lindenskov,

Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Andrias Højgaard,
Hilmar Kass,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen,
Heini O. Heinesen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson,
Juul Jacobsen.

Burturstaddir: Agnar Nielsen,
Jóannes Dalsgaard,
Páll Josephsen.

Atkvøðugreiðslan av Sambandsfloksins uppskoti til samtyktar varð eftir áheitan frá Sambandsflokkinum eisini greidd við navnakalli soleiðis: við 7 ja-atkvøðum, 22 atkvøddu ikki; 3 vóru burturstaddir.

Atkvøtt varð soleiðis:

Ja atkvøddu: Pauli Ellefsen,
Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Jógvan Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Dánjal Larsen,
Adolf Hansen.

Atkvøddu ikki: Dánjal P. Danielsen,
Anfinn Kallsberg,
Sigfríður Vørðhamar,
Svend Aage Ellefsen,
Eyðun Viderø,
Jógvan Sundstein,
Poul Michelsen,
Henrik Old,
Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jákup Lindenskov,
Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Andrias Højgaard,
Hilmar Kass,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen,

Heini O. Heinesen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson,
Juul Jacobsen.

Burturstaddir: Agnar Nielsen,
Jóannes Dalsgaard,
Páll Josephsen.

# 64. Endurgjald til familjur, ið vilja passa egin børn.

Ár 1986, hósdagin 20. februar legði Anfinn Kallsberg, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti til landskassan.**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti til landskassan verður gjørd henda broyting:

§ 2 verður soljóðandi:

»**§ 2.** Fyri hvørt barnið, sum ikki er 16 ár í byrjanini av tí álmanakkaári, sum skattur er ásettur, verður í útroknaða landsskattinum sambært § 1 í hesari lóg, hjá teimum skattskyldugu eftir § 1, nr. 1-6 í samtíðarskattalógini, drignar 1.800 kr. frá sbrt. § 46, 3. stk. í somu lóg. Fyri hjún er frádrátturin fyri hvørt barnið, sum er undir 7 ár í byrjanini av tí álmanakkaári, sum

**lagtingslov om ændringer i lagtingslov om udskrivning af skat til landskassen.**

**§ 1.** I lagtingslov nr. 87 af 1. september 1983 om udskrivning af skat til landskassen foretages følgende ændring:

§ 2 formuleres således:

»**§ 2.** For hvert barn, som i begyndelsen af det kalenderår, for hvilket skatten udskrives, er under 16 år, gives der i de i kildeskattelovens § 1, nr. 1-6 nævnte skattepligtige personer et fradrag på 1.800 kr. i den i henhold til § 1 i denne lov beregnede skat. For ægtefæller er fradraget for hvert barn, som er under 7 år i begyndelsen af det kalenderår, i hvilket

skattur verður lagdur á, kr. 15.000, um annar av hjúnafeløgunum arbeiðir heima og ikki í skattaárinum hevur havt skattskylduga inntøku. Í hjúnalag verður frádrátturin í skattinum hjá manninum. Um hesin ikki fær nýtt frádráttin til fulnar, skal restin verða dringin frá í skattinum hjá móðurini, um hon er sett í skatt sambært § 4, 2. stk. í samtíðarskattalógini. Við barn meinast hjúnabandsbarn, barn uttan hjúnaband, tá ið móðirin er skattgjaldarin, stjúkbarn, ættleitt barn ella fosturbarn, sum ikki er latið støðugt fosturviðurlag fyri. Er barnafrádrátturin hægri enn skatturin uttan barnafrádrátt, verður munurin útgoldin avvarðandi skattgjaldara. Føroya Gjaldstova rindar peningin í oktober mánaði.«

skatten pålægges, kr. 15.000,-, hvis en af ægtefællerne arbejder hjemme og ikke har haft skattepligtig indtægt i skatteåret. Ægtemanden oppebærer fradraget. Hvis denne ikke kan udnytte fradraget fuldt ud, bliver resten at fradrage hos moderen, hvis denne er ansat til skat ifølge § 4, stk. 2, i kildeskatteloven. Ved barn forstås ægtebarn, barn uden for ægteskab, når moderen er skattepligtig, stedbarn, adoptivbarn eller plejebarn, for hvis pleje, der ikke ydes vedvarende vederlag. Er børnefradraget større end skatten uden børnefradrag, udbetales differencen til den pågældende skatteborger. Føroya Gjaldstova udbetaler beløbet i oktober måned.«

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Uppskotið miðar ímóti:

1. at styðja fíggjarliga grundarlagið undir familjuni,
2. at lætta trýstið á verandi barnaansingarstovnar,
3. at minka um tørvin á nýggjum stovnsplássum og
4. at tryggja meiri rættvísi, javnrætt og ikki minst størri valfrælsi hjá foreldrum og børnum at nýta verandi og komandi dagtøktarpláss.

Stívliga 700 vøggustovu-, barnagarðs- og dagrøktarpláss eru í Klaksvík, Runavík, Tórshavn og á Argjum. Fleiri kommunur hava í kvittanum at útvega sínum borgarum ansingarpláss. Flestum kunnugt hevur gravgangurin eftir plássum verið stórur og verður tað uttan iva langt fram. Pláss verður biðið, áðrenn barnið er føtt. Bert tey fægstu fáa pláss.

Nú hevur Tórshavnar býráð gjørt hol í sjógv við at slóða nýggjar leiðir við serligari og umfatandi barnaansingarskipan fyri høvuðsstaðin.

Hetta megnartiltak, sum fær stóra undirtøku frá foreldrum og skattgjaldarum, eigur tó ikki at útiloka, at løgtingið kann gera sítt til at økja um

valfrælsið hjá familjum við smærri børnum, sum figgjarliga kosta bæði teimum og samfelagnum pening at ansa, antin ansingin fer fram í heiminum ella uttan fyri heimið.

Talið á børnum millum 0 og 6 ár í Føroyum liggur nú um 5.000 ialt, so almenna barnaansingin uttan fyri heimið røkkur bert einum barni av sjey, meðan 85% av føroysku børnunum framvegis slíta sínar barnaskógvar inni hjá foreldrunum.

Nýggja skipanin í Havn bøtir nakað væl um tilboðið á ansing.

Frá sakkønari síðu verður upplýst, at eitt vøggustovupláss kostar í meðal um 65.000 kr., eitt barnagarðspláss um 40.000 kr. og eitt privat ansingarheim nakað minni í rakstri árliga. Samanlagt kostar eitt barn uttan fyri heimið sostatt í meðal einar 50.000 kr. árliga.

Hesin kostnaður verður býttur nakað soleiðis: 40% danski staturin, 30% kommunan og 30% (stundum minni) foreldrini. Landskassin rindar einki. Men kortini viðkemur hesin spurningur løgtinginum, sum eftir røttum átti at rindað statsins part.

Verandi barnaansingarskipan við higartil bert 700 plássum gevur teim fáu foreldrum, sum eru so heppin at fáa pláss fyri sínum barni/børnum 30.000 kr. árliga í barnaansingarstuðuli pr. barn, umframt at skipanin loysir bæði foreldrini frá heiminum í dagtímunum til lønta inntøku.

Hin vegin eru figgjarligu skyldurnar hjá ungum hjúnum við børnum og nýggjum húsum, serliga tá skatturin kemur omaná, so stórar, at bæði foreldrini verða tvingað út at arbeiða, antin tey vilja tað ella heldur kundu hugsað sær, at annað varð heima, meðan barnið/børnini er/eru smá.

Hetta lógaruppskot kundi gjørt sítt til at bøtt um valfrælsið hjá øllum barnaforeldrum, so tey sleppa at velja — leyst av figgjarligum áneyðum uttanífrá — um bæði hjúnini vilja arbeiða úti uttan hendan eyka barnafrádrátt, ella um annað teirra vil vera heima hjá smábarni/børnum og so fáa fyrimun av frádráttinum upp á 15.000 kr. pr. barn.

Tann logiska fylgjan av tí higartil førda barnaansingarpolitikkinum er væl, at øll børn millum 0 og 6 ár fáa stovnspláss við tíðini, umøll foreldur skulu hava sama rætt til almennt ansingarpláss fyri sínum børnum. Men henda altumfatandi almenna barnaansingin hevði kostað 5.000 (børn) × 50.000 kr. (pr. stovnspláss) ella tilsamans upp ímóti 250 milj. kr. árliga í rakstri — umframt bygningsíløgur. So hvørt sum talið á stovnsplássum økist, herðist kostnaðartrýstið á allar skattgjaldarar, eisini tey foreldur, sum til eina og hvørja tíð ikki enn hava útvegað sínum børnum stovnspláss.

Uppskotið miðar ímóti at lætta skattliga trýstið á eina vanliga inntøku, at hon verður nokk hjá eini familju at klára seg við, um annað av hjúnunum vil arbeiða í heiminum, meðan børnini eru smá.

Í minst møguligan mun eigur talið á børnum, eini hjún ynskja sær, at vera figgjarliga treytað.

Uppskotið hevði skorið eftirspurningin eftir verandi barnaansingarplássum niður og minkað um tørvin á nýggjum plássum tilsvarandi.

Viðari ber tað í sær, at føroyski tørvurin á donskum peningaveitingum til hetta endamál minkar.

Valfrælsið í hesum uppskoti stuðlar trivnaðin hjá kjarnufamiljuni, sum er grundstøðið undir samfelag okkara.

Tilsamans hevur landskassin um 20 mió. kr. í minniinntøku árliga av hesum uppskoti, um tað fevnir stívliga 2.500 børn. Roknast kann við, at helmingurin av føroyskum foreldrum høvdu valt at passa egin børn. Sum er, kostar barnaansingin í Føroyum 30 mió. kr. árliga tilsamans og fevnir bert 700 børn. Ein minniinntøka er ikki hitt sama sum ein meirnýtsla.

Sammett við, at hvørt barn á ansingarstovni kostar foreldrum 12.000 kr. og tí almenna 38.000 kr. árliga í rakstri, er hesin eyka barnafrádráttur í landsskatti upp á 13.200 kr. til hjún við einari inntøku væl spardur peningur hjá tí almenna, sum altso rindar 3 ferðir so nógv pr. dagstovnarpláss í sín part, sum hesin eyka barnafrádráttur til tey foreldur at børnum millum 0-6 ár, ið ikki brúka almenna barnaansing, kostar.

Førir hetta uppskot til, at tað ikki longur verður fíggjarlig vanskepna hjá ungum hjúnum við nýggjum húsum at fáa børn, stendst eisini samfelagsligt gagn av hesi lógarbroyting. Føroyum tørvar eitt økt barnatal í longdini, tí fráflytingin verður altíð stór frá einum oyggjasamfelag, og demografiska gongdin økir talið á fólki í útbúgving og á pensjónistum í mun til talið á fólki í vinnuførum árum. Økt barnatal hevði byrgt upp fyri hesi hóttan móti vælferðini. Vælferðin er jú treytað av, at nóg nógv eru, sum kunnu gjalda fyri tey, sum ikki makta sjálv.

Um foreldur sleppa at velja, antin bæði ella bert annað arbeiðir úti, meðan børnini eru smá, ger hetta uppskot sítt til, at útboðið av arbeiðsplássum veksur í mun til eftirspurning, at fleiri ung sleppa í arbeiði har, sum nú barnaforeldur av skattatrýsti og fíggjarávum eru tvingað til at arbeiða, og at føroyski arbeiðsmarknaðurin verður meiri liðiligur.

1. viðgerð 28. februar. Málið varð beint í skattanevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Uppskotið gongur út uppá, har annar hjúnafelagin er heimaarbeiðandi, skal vera loyvt at draga 15.000 kr. frá í útroknaða landsskattinum fyri hvørt barnið, ið er undir 7 ár, hjá tí útiarbeiðandi hjúnafelaganum.

Mett verður, um hetta uppskot verður samtykt, fær landskassin eina minni inntøku upp á 20 mió. kr.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Hilmar Kass, Heini O. Heinesen og Poul Jacob Olsen) kann ikki taka undir við uppskoti Fólkafloksins, men vísir til tað, sum er niðurfelt í samgonguskjalinum. Har stendur: »... barnafrádráttur í landsskattinum verður hækkaður, skattalágmarkið somuleiðis.« Hetta verður gjørt í sambandi við, at landskassin skal hava eykainntøkur við broyttum tollgjøldum. Reglurnar um barnafrádrátt í kommunuskattinum verða endurskoðaðar og broyttar.

Ein minnilutin (Jógvan Sundstein) mælir til, at uppskot Fólkafloksins verður samtykt.

Ein annar minniluti (Terje Davidsen) heldur ikki, at uppskotið loysir trupulleikarnar á rættan hátt og kann tí ikki taka undir við uppskotinum. Hann setir tí einki uppskot fram, men vísir til uppskot Sambandsfloksins í løgtingsmáli nr. 69: Um serskatting av hjúnafelaga.

2. viðgerð 3. apríl. Uppskot Fólkafloksins fall við 7-0 atkvøðum. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu: Dánjal P. Danielsen,
Anfinn Kallsberg,
Sigfríður Vørðhamar,
Svend Aage Ellefsen,
Eyðun Videro,
Jógvan Sundstein,
Poul Michelsen.

Atkvøddu ikki: Pauli Ellefsen,
Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Jógvan Olsen,
Johs. Martin Olsen,
Dánjal Larsen,
Henrik Old,
Sverre Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Jóannes Dalsgaard,
J. Lindenskov,
Poul J. Olsen,
Jørgen Thomsen,
Andrias Højgaard,
Hilmar Kass,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen,

Heini O. Heinesen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson,
Adolf V. Hansen,
Juul Jacobsen.

Burturstaddir: Agnar Nielsen,
Páll Josephsen.

# 65. Demokratisering av sjónvarpsmonopolinum

Ár 1986, hósdagin 20. februar legði Óli Breckmann, løgtingsmaður, vegna Fólkaflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um demokratisering av sjónvarpsmonopolinum.**

**§ 1.** Løgtingið velur 9-manna nevnd av sakkønum at kanna og skriva álit um verkætlan til at demokratisera sjónvarpsmonopolið.

**§ 2.** Álit nevndarinnar verður tøkt so skjótt, at landsstýrið kann leggja lógaruppskot fyri tingið í tráð við hesa lóg og eftir tilráðing nevndarinnar á ólavsøku komandi.

**§ 3.** Nevndin verður mannað, so hon umboðar sakkunnleika um

**lagtingslov om demokratisering af tv-monopolet.**

**§ 1.** Lagtinget vælger et udvalg på 9 medlemmer af sagkyndige at undersøge og skrive en betænkning om et program til demokratisering af tv-monopolet.

**§ 2.** Udvalgets betænkning skal foreligge så betids, at landsstyret kan lægge lovforslag for tinget i overensstemmelse med denne lov og i henhold til udvalgets indstilling kommende olaj.

**§ 3.** Udvalget sammensættes således, at det repræsenterer sag-

fjølmiðlar, tekniskt og innihaldsliga, mentan, trúarlív, búskap og løgfrøði, og verður vald eftir vanligum løgtingslutfalsvali.

kyndige for massemedierne teknisk og ved sin sammensætning iøvrigt, kultur, religion, økonomi og juridiskt. Udvalget vælges efter lagtingets regler om forholdstalvalg.

**§ 4.** Arbeiðssetningur nevndarinnar er at finna fram til bestu og bíligastu sjónvarpsskipan eftir entreprisumodellinum við einum sendineti sum nú, og við einum øðrum óheftum SV-2 sendineti, og frægastu tiggingarloysn í báðum førum, eisini møguliga lýsingarinntøkum.

**§ 4.** Udvalgets kommisorium er at finde frem til den bedste og billigste tv-ordning efter et entreprisemodel med et sendenet som nu, og med et andet uafhængigt tv-2 sendenet, og med den bedste økonomiske løsning i begge tilfælde også med mulige reklameindtægter.

**§ 5.** Sjónvarpsgrunnurin ber útreiðslurnar, uppp til 500.000 kr., ið standast av nevndararbeiðinum.

**§ 5.** TV-fondet afholder udgifterne indtil 500.000 kr. til udvalgsarbejdet.

**§ 6.** Henda lóg fær gildi beinan vegin.

**§ 6.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Framleiðsluorkan og -háttur hjá SVF eru avmarkað, og maktar stovnurin ikki at kappast í undirhaldi við sjónbandaidnaðin longu nú. Hvaðna verri verður, tá tað longu í ár ber til at taka tónleika-, films-, ítróttar-, undirhalds- og útlendskar tíðindasendingar niður frá 6 satellittum. Fylgisveinarnir fjølgast í stórum komandi árini.

SVF arbeiðir undir trongum korum og við litlari manning, men hevur gott sendinet og sendaraútgerð at ráða yvir. Hesum okkara nýggja tíðindamonopoli gongst rættiliga væl at gera føroyskar tíðindasendingar og so tær breiðaru og djúparu sendingarnar um aktuell ella áhugaverd føroysk evni.

Eyðvitað er, at uttan mun til, hvussu nógv stovnurin verður útbygdur í verandi líki sum monopol, dragna vit sum frá líður longur og longur afturút á hesum týðandi upplýsingarøki.

Í grannalondum okkara víðka tey útboðið av landsumfatandi og lokalum senditilfari við at gera tað møguligt hjá fleiri áhugabólkum, felløgum og samtøkum av einstaklingum at framleiða og sjónvarpa egið upplýsingartilfar. Sumstaðni verður hetta gjørt við sonevndum SV-2, ið eru sjálvstøðug sendinet óheft av statsmonopolinum. Aðrastaðni royna tey at brúka

tíðindamonopolið sum varpara av sendingum, sum onnur feløg enn starvsfólkini á almenna SV-monopolinum framleiða.

Um tíðindaflutningur og upplýsing í Føroyum skuldu lokið vanlig demokratisk krøv um pressufrælsi, áttu bert tekniskar forðingar at darvað fríari upplýsing, og eingin monopollóggáva at vart einstakan stovn við framíhjárætti, meðan øll onnur einki pressufrælsi hava, orsakað av skerjingum á hesi náttúrligt ófjøtraða virkisøki í einum fríum landi.

Men sum ikki einaferð hevur tøknfrøðin í fría vesturheiminum gjørt henda pressucinkarrætt ótíðarhóskandi. Hesi sannroynd ber til at laga seg eftir við einari frígerðing av SV-framleiðslurættinum við hesum lógaruppskoti.

Eitt føroyskt SV-2 krevur nýggja sendaraútgerð á fjøllunum fyri millum 5-10 mió. kr.

Men ein loyvisskipan innan karmarnar hjá SVF, sum byggir á entreprisumodellið, kann fáast í lag uttan cykakostnað í útgerð.

Tað eigur sostatt at vera loyvt feløgum, sum eru stovnað bert við framleiðslu av SV-sendingum fyri eyga, at leiga sær fastar tíðir, nakrar tímar um mánaðin, inn á sendinetið hjá SVF við egnum sendingum. Á henda hátt kundu lokalu sjónvarpsfeløgini, sum enn eiga útbúnað, fæ og serkønt fólk, sent nakrar tímar ialt hvørja viku.

Tey SV-studiir, sum eru í landinum, men sum ikki hava havt loyvi til at nýta kunnleika og útgerð, kundu verið við til at framleiða eftir umbøn, sáttmála ella leysari avtalu.

Hvør senditími hjá SVF kostar sum er um 5.000 kr. Umroknað til føroyskar og føroyskaðar sendingar kostar hvør tími um 10.000 kr., meðan hvør føroyskt framleiddur senditími kostar 20.000 kr.

Sostatt eru útreiðslurnar til føroyskt senditilfar stórar sum er, og hevði ein loyvisskipan eftir entreprisumodellinum neyvan kostað meir um tíman enn hin verandi.

Annars eigur nevndin at kanna møguleikan fyri lýsingainntøkum, SVF ella eitt av tí óheft studioverkstað kundi tikið upp á seg at framleiða lýsingar til at figgja sendingar við, ella kundi hvør einstakur loyvishavari av senditíð útvegað sær egnar lýsingarinntøkur, tó so at lýsingar bert fáa innivist í blokkum ávíst minutttal fyri hvønn senditíma.

Lond, sum hava roynt skipan við lýsingarfígging av sjónvarpi, kunnu prógva, at sjónvarpslýsingarnar ikki koma upp um 20% av samlaða lýsingarumsetninginum í landinum, bert brotpartur av tí, ið avísir og serliga fakbløð lýsa fyri.

Umframt at lata loyvishavarum studio og sendinet, kann SVF framleiða egnar tíðindasendingar eins og nú so ofta um vikuna, sum myndugleikar, nevnd og leiðsla halda vera rímiligt, kanska sum nú upp í fjórðing av samlaðu senditíðini.

Sjónvarpsnevndin eigur at hava sum uppgávu at viðgera umsóknir um sendiloyvi, ið kann veitast feløgum t. d. upp til 3 ár. Sendiloyvi, ið ikki verður brúkt, ið verður misnýtt ímóti vanligari pressulóg, kann takast frá loyvishavara. Sendingar eiga at lúka vanlig krøv eftir pressulógini, og framleiðarin eigur at goyma hvørja sending í ávíst tíðarskeið, eftir at hon er send.

Í almennum gildi kann skoytast uppí, at tað í dag er dýrari at útvega fullfiggjaða framleiðsluútgerð til eina avís enn til eitt sjónvarpsverkstað. Postverkið tryggjar útbering av føroysku bløðunum. Telefonverkið kundi hóskandi tikið upp á seg tekniskt og fíggjarliga at tryggja sendinetið til framtíðar føroyskt sjónvarp eftir entreprisuskipanini.

Tekniskt liggur leiðin viðopin fyri, at stórar skapandi kreftir verða loystar í føroyska samfelagnum til framleiðslu av sjónvarpssendingum. Grundreglan eigur at vera, at bert tekniskar avmarkingar forða fyri, at hesar skapandi kreftir sleppa at virka frítt, og er núverandi darvandi einkarrættur í stríð við grundlóg og viðurkendan mannarætt.

1. viðgerð 28. februar. Málið varð beint í mentannar- og skúlanevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Fólkaflokkinum 20. februar 1986 og undir 1. viðgerð 28. í s. m. beint í mentannar- og skúlanevndina.

Endamálið við uppskotinum er at lata øðrum sendinetið hjá Sjónvarpi Føroya, tá sjónvarpið ikki nýtir tað.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jóannes Dalsgaard, Páll Josephsen, Hergeir Nielsen) vísir til samgonguskjalið, har avtalað er ein samskipan av Útvarpi og Sjónvarpi og til, at hesin spurningur skjótt verður tikin upp í landsstýrissamgonguni.

Meirilutin setir tí einki uppskot fram.

Ein minniluti (Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskoti fólkafloksins og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Ein annar minniluti (Dánjal Larsen) heldur uppskotið vera ov illa undirbygt og setir einki uppskot fram.

2. viðgerð 14. apríl. Uppskotið fall við 6-0 atkvøðum.

# 66. Kanning av føroysku flogvallaviðurskiftunum

Ár 1986, hósdagin 20. februar legði Eilif Samuelsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar.**

Heitt verður á Landsstýrið um at seta niður serkøna nevnd til at kanna flogvallaviðurskiftini í Føroyum.

Kannað verður um flogvøllurin í Vágum í framtíðini kann lúka tey krøv til trygd og til kapasitet, sum sett verða.

Kannað verður eisini um betri og bíligari alternativar loysnir eru at finna.

**Viðmerkingar:**

Undir seinna heimsbardaga bleiv cin flogvøllur bygdur vesturi í Vágum.

Hesin sami flogvøllur er grundarlagið undir tí einasta flogvølli vit hava.

Stórar fløgur eru gjørdar í flogvøllin í Vágum, og hevur hesin vøllur higartil virkað væl, bæði reint tekniskt og tá hugsað verður um tað sonevnda servicestøðið.

Vanligasta atfinningin í dagliga kjakinum ímóti hesum flogvølli er, at hann liggur ov langt burtur frá summum øðrum plássum. Nakað kann vera um tað, men er hetta ikki orsøkin til, at uppskotið verður lagt fram.

Uppskotið er í heila tikið ikki meint sum atfinning mógvegis ti, sum gjørt er, men bert ein hyggjan fram í tíðina.

Føroyska samfelagið verður alt meira bundið at møgulcikunum fyri at koma aftur og fram loftvegis. Hetta er galdandi fyri ferðafólk, bæði røsk og sjúk, fyri post og nú í alt størri mun fyri farmagóðs.

Tað er cin veruleiki, at bert serliga útgjørd størri flogfør kunnu lenda á og fara avstað frá flogvøllinum í Vágum, og at eingi reiðiliga stór flogfør í dag finnast, sum kunnu nýta henda flogvøll, sum hann nú er innrættaður.

Tað gerst eisini alt týðiligari, at tað verður neyðugt, at okkara vinnuliv fær høvi til at flyta vørur til útflutnings loftvegis. Hetta kemur at gera tað tvingandi neyðugt antin at útbyggja flogvøllin í Vágum við longri lendingarbreyt, og helst við einari afturat, ella at fyrireika bygging av flogvølli á øðrum stað í Føroyum.

Tá støða verður tikin til hesar útbyggingar, eru tað serliga tveir høvuðsspurningar, sum troka seg fram.

Tann fyrsti er spurningurin um størst møguliga trygd fyri ferðafólk, manning, flogfar og farm.

Hin spurningurin er kostnaðurin av at útbyggja flogvøllin og kostnaðurin í víðari merking av at reka flúgvingina upp á Føroyar í framtíðini.

Út frá hesum viðmerkingum loyvir Sambandsflokkurin sær at seta fram hetta.

1. viðgerð 25. februar. Málið varð beint í samferðslunevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av Sambandsflokkinum 20. februar 1986 og undir 1. viðgerð 25. í s. m. beint í samferðslunevndina.

Flokkurin mælir til, at sett verður nevnd at kanna flogvallaviðurskiftini so sum tryggleika og nýtslumøguleikarnar, tá hugsað verður um veruligan farmaflutning.

Nevndin hevur á fundi tann 7. apríl viðgjørt uppskotið, og er nevndin komin til ta niðurstøðu, at tað ikki skuldi verið neyðugt við nevnd til at kanna hesi viðurskifti.

Samferðslunevndin heldur, at væl av tilfari er framkomið, sum viðger stóran part av hesum spurningum. Tað er tí ríminligt, at hetta nevndararbeiðið, sum varð loyst úr hondum fyrra helmingin av sjeytiárunum, verður tikið til viðgerðar saman við eini nýggjari meting av trygdarviðurskiftunum.

Eisini verður mett um spurningin at leingja verandi flogvøll, um samferðsluviðurskiftini til og frá vøllinum, t. v. s. viðurskiftini viðvíkjandi sambandinum um Vestmannasund v. m., hevur verið viðgjørdur.

Í staðin fyri uppskot Sambandsfloksins setir ein samd nevnd fram fylgjandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar.**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at kanna flogvallaviðurskiftini viðvíkjandi tryggleikanum, lendingarviðurskiftunum við farmaflutningi fyri eyga.

Tað tilfar um flogvallaviðurskiftini, sum er til taks, eigur at verða nýtt í samband við kanningarnar.

2. viðgerð 11. apríl. Atkvøðugreiðsla 14. apríl. Uppskot Sambandsfloksins fall burtur, meðan eitt uppskot til samtyktar frá samdari samferðslunevnd varð samtykt við 26-0 atkvøðum.

# 67. Nýggj lóggáva og nýggjar reglur um trygging í Føroyum

Ár 1986, hósdagin 20. februar legði Agnar Nielsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar.**

Heitt verður á Landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið eina nýggja lóggávu og nýggjar reglur fyri trygging í Føroyum, sum eisini inniber, at einkarrætturin til trygging verður avtikin, og at peningur, bundin og vunnin frá trygging, framvegis verður verandi í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Á Løgtingi og í dagligum munnligum og skrivligum kjaki verður ofta tosað um at broyta lógir og reglur, tí hesar eru gamlar og ótíðarhóskandi. T.d. meta summir heimastýrislógina vera alt ov gamla, hon er frá 1948.

Føroya Vanlukkutrygging bleiv stovnað í 1926, tó hava broytingar verið gjørdar av og á, seinast í 1979 í sambandi við dagpeningaskiparina. Hóast broytingar í hesi lóg, so virkar hon alt annað enn tíðarhóskandi. Kemur skaðatilburður fyri, sum ber deyðsfall við sær, fær avvarðandi goldið meðaltal út frá inntøkuni 3 tey seinastu árini. Inntøkur kunnu vera sera ójavnar, bæði fyri tað einstaka árið hjá einum borgara, og eisini sera ójavnur hjá teimum ymisku borgarunum. Við øðrum orðum kann tann sami skaðatilburður í einum føri geva upp til fleiri ferðir tað endurgjald, sum verður givið í einum øðrum føri.

Lógin fyri Føroya Brunatrygging er frá 1937 uttan stórvegis lógarbroytingar. Undir verandi viðurskiftum verður dúgliga kært um, hvussu torført tað er at fáa endurgjald uttan tap, uttan so at hús brenna í grund.

Tryggingarsambandið varð stovnað í 1940. Nakrar broytingar eru gjørdar við bráðfeingis kunngerðum, og er núgaldandi lóg um trygging frá 25. mars 1956. Tá Tryggingarsambandið í 1940 varð stovnað, vóru Føroyar hersettar, og hevði hetta ivaleyst sína ávirkan á, at talan bleiv um einkarrætt ella monopol. Ein onnur orsøk hevur ivaleyst verið at tryggja, at peningurin bleiv verandi í landinum.

Undir viðgerðini av nýggju brunalógini kom aftur týðiliga fram, at neyðugt er at gera nýggjar lógir og reglur á tryggingarøkinum, og í hesum sambandi at avtaka galdandi einkarrætt ella monopol.

Umframt at vera ov gamlar og ótíðarhóskandi hvør sær, so hanga lógir og reglur fyri teir einstøku tryggingarstovnarnar ikki saman. Nevnast kann, at nevndirnar í Føroya Vanlukkutrygging og í Føroya Brunatrygging ikki hava myndugleika til at hava ávísar egnar avgerðir, uttan at annað hvørt Tryggingarsambandið ella umboðsráðið hava rætt til at leggja uppí. Nevnast kann eisini, at nevndin í Tryggingarsambandinum ásetir nevndarsamsýning fyri nevndina í Føroya Vanlukkutrygging, meðan umboðsráðið ásetir samsýning til nevndirnar í Føroya Brunatrygging og í Tryggingarsambandinum. Endaliga kann nevnast, at tað er sera ótíðarhóskandi, at nevndarlimir verða valdir fyri 15 ár í senn. Nógv onnur dømi kundu verðið nevnd fyri at vísa á, at galdandi lógir og reglur á tryggingarøkinum hava verið og framvegis eru sera ótíðarhóskandi til stóran skaða fyri øll okkum, sum hava fyri neyðini at tryggja bæði okkum sjálvi og ognarlutir v. m.

Ein orsøkin til at vit eru eftirbátar á tryggingarøkinum í mun til okkara grannalond er ivaleyst, at talan hjá okkum er um einkarrætt. Avtøka av einkarrættinum hevði í sjálvum sær borið í sær rationaliseringar og effektivitet.

Viðmerkjast kann, at landsstýrismaðurin, sum í undanfarna landsstýri umsat tryggingarmál, hevði eitt uppskot til nýggja lóg á borðinum, sum av ávísum orsøkum ikki bleiv lagt fyri løgtingið. Millum annað gekk uppskotið út uppá at avtaka einkarrættin til tryggingar í Føroyum.

Hildið verður, at tað verður alt meira neyðugt at gera munandi broytingar í lóggávu og reglum um tryggingarviðurskiftini í Føroyum. Broytingarnar eiga at verða gjørdar soleiðis, at tann peningur, sum verður bundin og vunnin í sambandi við trygging í størst møguligan mun framvegis verður verandi í Føroyum. Mett verður, at hetta lættliga kann lata seg gera.

1. viðgerð 28. februar. Málið varð beint í idnaðarnevndina, sum 17. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av Sambandsflokkinum 20. februar 1986 og varð við 1. viðgerð 28. februar 1986 beint í ídnaðarnevndina.

Nevndin er samd um, at tryggingarlóggávan eigur at endurskoðast, tí hon er ósamsvarandi nútíðarviðurskiftum.

Seinast varð tryggingarlóggávan endurskoðað í 1956. Síðani tá eru farin fram týðandi umskifti og broytingar í samfelagnum, sum eisini krevja, at samtyktirnar fyri tryggingarsamtakið verður nútímansgjørdar.

Hugsað verður um nevndarval, umboðsmannaráð og reglurnar fyri hesum. Bygnaðurin (struktururin) í tryggingarsamtakinum í síni heild, at hann kann verða samskipaður meira sum ein heild.

Spurningar um tryggingartreytir, tryggingargjøld og tryggingarveitingar hava av og á verið frammi sum tingmál.

Eyðsýnt er, at her eru viðurskifti, sum krevja broytingar, um tær ymsu tryggingarnar skulu samsvara nútímans tryggingarprinsippum og harvið betur tæna tryggingartakarunum (brúkarunum).

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Olaf Olsen, Jørgen Thomsen og Jákup Lindenskov) setir í staðir fyri uppskotið frá Sambandsflokkinum fram hetta

## Uppskot

## til

## samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum at leggja fyri ólavsøkutingið komandi uppskot til nýggja endurskoðaða lóggávu um tryggingarsamtakið í Føroyum.

Minnilutin (Agnar Nielsen) mælir til at samtykkja uppskotið frá Sambandsflokkinum, men tekur í øðrum umfari undir við meirilutanum.

2. viðgerð 17. apríl. Uppskot Sambandsfloksins fall við 9-0 atkvøðum. Meirilutans uppskot til samtyktar samtykt við 30-0 atkvøðum.

# 68. Um nýtsluna av m/tr. »Magnus Heinason«

Ár 1986, hósdagin 20. februar legði Jógvan Olsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar.**

Heitt verður á Landsstýrið um at tryggja, at Fiskirannsóknarstovan fær loyvi til at nýta m/tr. »Magnus Heinason« til royndarfiskiskap og til havrannsóknir í tann mun, sum ynskiligt er.

**Viðmerkingar:**

M/tr. »Magnus Heinason« hevur verið og verður nýttur til trý ymisk endamál við triðingi av tíðini til hvørt. Endamálini eru: Royndarfiskiskapur, havrannsóknir og vinnuligur fiskiskapur.

Tað er ivalcyst rætt í byrjanini at nýta skipið til vinnuligan fiskiskap ein part av tíðini.

Men Sambandsflokkurin metir, at tíðin nú er komin hartil, at Fiskirannsóknarstovan fær møguleika til at nýta skipið, sum henni hugar til royndarfiskiskap og havrannsóknir.

Skipið ger meira nyttu við at reka royndarfiskiskap, og við at leita eftir svartkjafti og øðrum fiski, enn at kappast við restina av fiskiflotanum á okkara alt ov trongu fiskileiðum og okkara alt ov grunnu stuðulsgrunnum til tey skip, vit eiga.

Eisini er rætt at gera fleiri havrannsóknir. Hin vegin hevur ein fatan av, at mark er fyri hesum, so leingi arbeiðsorkan uppi á landi til viðgerð av tí savnaða tilfarinum er so avmarkað, sum hon enn er.

Út frá hesum setir Sambandsflokkurin fram hetta.

1. viðgerð 25. februar. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt av Sambandsflokkinum 20. februar og undir 1. viðgerð 25. í s. m. beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tórálvur Mohr Olsen, Hilmar Kass, Juul Jacobsen, Erlendur Patursson, Olaf Olsen, Anfinn Kallsberg) tekur ikki undir við málinum og setir einki uppskot fram, av tí at tað er óneyðugt at leggja málið fyri tingið, tí landsstýrið og fiskirannsóknarstovan hava heimild at stýra nýtsluni av m/tr. »Magnusi Heinasyni«.

Minnilutin (Flemming Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 14. apríl. Uppskot Sambandsfloksins fall við 14-0 atkvøðum.

# 69. Um serskatting av hjúnafelaga

Ár 1986, hósdagin 20. februar legði Agnar Nielsen, løgtingsmaður, vegna Sambandsflokkin fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar.**

Heitt verður á Landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot um broytingar í skattalógini, sum førir við sær, at heimagangandi hjúnafelagi verður skattaður av helminginum av inntøkuni, upp til eina vanliga ársløn fyri ófaklærdan.

**Viðmerkingar:**

Sambandsflokkurin hevur fyrr í uppskoti mælt til, at heimagangandi hjúnafelagar verða serskilt skattaðir av helvtini av inntøkuni upp til eina vanliga ársløn fyri ófaklærdan.

Henda broyting gevur nakað av tekniskum trupulleikum innan skattaumsitingina, men ikki fleiri enn at teir kunnu loysast. Verandi í samgongu frá 1981 til og við 1984 var Sambandsflokkurin við til eina totala umlegging av okkara skattaskipan til samtíðarskatt.

Tað var ikki hildið ráðiligt at hava hesar her nevndu broytingina við,

samstundis sum øll skattaskipanin bleiv umløgd. Hetta vildi bert gjørt umleggingina fløktari.

Nú tykist umleggingin til samtíðarskatt at vera nærum liðug. Tó eru enn nøkur »programarbeiðir« eftir at gera.

Sambandsflokkurin mælir nú til, at Landsstýrið, so skjótt tað er gjørligt við tí arbeiðsorku skattaumsitingin hevur, fer í holt við at byggja inn í skattaskipanina, at heimagangandi hjúnafelagi skattar serskilt av helvtini av inntøkuni við nevnda marki uppeftir.

Út frá hesum viðmerkingum verður sett fram hetta.

1. viðgerð 28. februar. Málið varð beint í skattanevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt 20. februar 1986 og við 1. viðgerð 25. februar beint í skattanevndina.

Hetta mál snýr seg um, tá ið bert annar hjúnafelagin hevur inntøku, so skal skatturin, sum hesin fær, verða býttur sundur í helvt, soleiðis at hin heimaarbeiðandi hjúnafelagin fær helmingin av skattinum.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Hilmar Kass, Poul J. Olsen) tekur ikki undir við hesum máli.

Vit eru vitandi um, at Landsstýrið arbeiðir við einum líknandi máli, og setir sostatt einki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Sundstein) tekur í høvuðsheitum undir við uppskotinum, men av tí at tað bert ásetir inntøkupartin hjá heimaarbeiðandi hjúnafelagnum til eina vanliga ófaklærda løn uttan mun til, hvat samlaða inntøkan annars er, setir minnilutin í staðin fram hetta

## Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður Landsstýrinum í seinasta lagi 1. oktober 1986 at leggja fyri Løgtingið eitt greitt uppskot um broyting í skattalógini, soleiðis at hjúnafelagar verða skattaðir hvør sær av helminginum av samlaðu inntøkuni hjá báðum hjúnafeløgunum.

Minnilutin (Johannes Martin Olsen) mælir til, at uppskotið verður samtykt.

2. viðgerð 11. mars 1986. 13. mars varð atkvøðugreiðslan útsett eftir áheitan. Atkvøðugreiðsla 3. apríl. Uppskot Sambandsfloksins fall við 10-0 atkvøðum.

# 70. Rættargangslógin

Ár 1986, hósdagin 13. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar.**

Løgtingið samtykkir viðlagda »Forslag til lov for Færøerne om rettens pleje«.

**Viðmerkingar:**

1. Galdandi rættargangslóg í Føroyum er lóg nr. 72 frá 5. mars 1979, ið inniheldur galdandi rættargangslóg í Danmark við ársskiftið 1972 og § 1 í lóg nr. 285 frá 14. juni 1974 og lóg nr. 88 frá 26. mars 1975, allar við broytingum vegna serligu føroysku viðurskiftini.

   Aftaná 1972 og til tann 1. november 1984 er danska rættargangslógin broytt við 28 lógum, smbr. skjal 1.
2. M. a. av tí at landsrætturin og hægstirættur eru kærustovnar hjá Føroya rætti, verður hildið hóskandi, at rættargangsreglurnar líkjast so nógv sum gjørligt. Ein arbeiðsbólkur við ríkisumboðsmanninum, landfútanum, sorinskrivaranum, skrivstovustjóranum í landsstýrinum og einum fulltrúa á ríkisumboðnum sum limum hevur tí gjørt eitt uppskot til eina nýggja føroyska rættargangslóg. Uppskotið hevur verið lagt fyri løgmálaráðið, har tað hevur fingið eina lógartekniska viðgerð. Í uppskotinum eru tær 28 broytingarlógirnar í størst møguligan mun tiknar við í uppskotið, og ávísar serreglur í galdandi rættargangslóg í Føroyum verður skotið upp at avtaka.
3. Í galdandi rættargangslóg í Føroyum er ein rað av serstøkum freistum (t. d. § 1, nr. 11, 19, 20, 42, 64, 81, 96, 128, 129 og 131). Serstøku freistirnar stava frá fyrstu føroysku rættargangslógini frá 1924, og var hetta orsakað av teimum truplu samferðsluviðurskiftunum, ið tá vóru

bæði í Føroyum og millum Føroyar og hin partin av ríkinum. Nú samferðslan er vorðin so góð, er tað óneyðugt við øllum teimum serstøku freistunum við undantak av freistini fyri kæru av landsrættardómum. Í uppskotinum er tí bert sett ein serstøk freist í § 1, nr. 114.

4. Eftir galdandi rættargangslóg í Føroyum kunnu persónar uttan løgfrøðiliga útbúgving røkja arbeiði ella størv, sum eftir rættargangslógini í Danmark krevur løgfrøðiligt embætisprógv v. m. (§ 1, nr. 9, 33 og 35). Hesar serreglur, sum í dag eru óneyðugar, verður mælt til at avtaka. Eftir uppskotinum eru tað bert løgfrøðingar, ið kunnu vera dómarar, og tað eru í høvuðsheitum bert advokatar, ið kunnu møta fyri onnur í rættinum (§ 131, smbr. §§ 136, 260 og 730).
5. Serstøku reglurnar í føroysku rættargangslógini, um at dómsmansstovnurin ikki finst í Føroyum, verður mælt til at varðveita, smbr. § 1, nr. 9 v. fl. í uppskotinum.
6. Við lóg nr. 325 frá 13. juni 1973 og lóg nr. 270 frá 10. juni 1981 vórðu í Danmark innførdar sokallaðar lokalnevndir í øllum politidømum. Í lokalnevndunum sita politimeistarin, 2 starvsfólkaumboð, eitt ávíst tal av fólkavaldum og í samband við viðgerð av ávísum sakarmálum ein forsvarsadvokatur. Endamálið hjá lokalnevndini er lýst í § 115a í rættargangslógini. Lokalnevndin hevur partvíst ta vanligu uppgávuna at útbyggja sambandið millum løgregluna og fólkið og partvíst ta ávisu uppgávuna at viðgera klagur yvir framferðina hjá løgreglumonnum í tænastuni. Í samband við viðgerð av klagum, hevur nevndin 3 møguleikar: avvísing, nærri kanning av málinum hjá einum hægri myndugleika innan ákæruvaldið ella nærri kanning av málinum í rættinum. Skotið verður upp at innføra lokalnevnd í føroysku rættargangslógina, smbr. § 1, nr. 28-32 og 123-125 í uppskotinum.
7. Reglurnar í rættargangslógini um advokatar (kap. 12-15b) eru heilt umskrivaðar við lóg nr. 277 frá 9. juni 1982. Umframt málsligar og systematiskar broytingar innihalda nýggju reglurnar ávís frávik frá núgaldandi reglum í Føroyum. Nevnast kunnu fyrr umrøddu advokatserrættindi (§ 131), at møtirættur kann fáast aftaná bert 2 royndarsakir (§ 133), at advokatar hereftir kunnu hava 2 fulltrúar (§ 135) og stovnanin av advokatnevndini (kap. 15-15b).

   Skotið verður upp at taka hesar reglur í føroysku rættargangslógina, tó soleiðis at serstaka reglan um at royndin í dómsviðgerð kann fara fram í Føroya rætti, verður framvegis galdandi (§ 1, nr. 36 í uppskotinum), og reglurnar um EF-advokatar ganga út (§1, nr. 35).
8. Borgarliga rættargangsskipanin (3. bók í rættargangslógini) er broytt fleiri ferðir. Tann mest víðgongda broytingin varð gjørd við lóg nr. 260 frá 8. juni 1979, har reglurnar um borgarligu rættarviðgerðina í rættargangslógini vórðu gjørdar einfaldari og liðiligari. Nýggju reglurnar hava

við sær, at sakarmálsviðgerðin verður einfaldari og meira rationel.

Serstaka reglan í føroysku rættargangslógini, um at øll borgarlig mál skulu viðgerast í Føroya rætti á 1. rættarstigi, verður mælt til at varðveita, smbr. § 1, nr. 42-44 o. fl. í uppskotinum.

9. Reglurnar um tvingsilsfullgerð (kap. 45-55) eru nógv broyttar við lóg nr. 258 frá 26. mai 1976 og lóg nr. 291 frá 8. juni 1978.

a. Við lóg nr. 258 frá 26. mai 1976 er innkrevjingin av peningakrøvum gjørd einklari, og skuldarin verður betri vardur. Tær týdningarmestu broytingarnar í lógini eru víðkanir av møguleikunum til tvingsilsfullgerð uttan dóm, avtøka av skiljingini millum fíggjarúttøka og panting, avtøka av ófrávíkiligu kravinum um meting av tí, ið úttøka er gjørd í, ein munandi víðkan av teimum málum, har rekvirenturin ikki nýtist at møta, ein víðkan av tí, sum skuldarin hevur rætt til at hava eftir til lívsins uppihald, meira skerjing av tí, sum fíggjarúttøka kann gerast ein skerjing av løgregluheinting eftir pantibrævi uttan at skuldarin er hjástaddur, ein vegleiðaraskylda, ein møguleiki at útnevna ein advokat fyri skuldaran í fútarættinum, ein regla um at ein skuldari ikki kann innkallast av nýggjum í fútarættin, fyrrenn 6 mánaðir aftaná insolventsváttan og ein heimild til, at sorinskrivarin kann nokta at taka tað frá skuldaranum, sum úttøka er gjørd í, so leingi hesin heldur eina avdráttarskipan, ið er ásett í fútarættinum. Reglan vil geva fútarættinum munandi minni arbeiði.

b. Við lóg nr. 291 frá 8. juni 1978 verða reglurnar um tvingsilssølu broyttar. Høvuðsendamálið í lógini er at avmarka talið av tvingsilssølum av fastari ogn og har, tað ikki slepst undan sølu, at avmarka tað tap, sum oftast stendst av hesum bæði fyri eigara og hinar rættindahavararnar. Millum broytingarnar kunnu nevnast: Vegleiðing av skuldaranum (§ 561, stk. 1), útnevning av advokati fyri skuldaran (§ 561, stk. 6), freist til at fyribyrgja tvingsilssølu (§ 561, stk. 3), setan av einum sakkønum persóni at royna at selja ognina í fríum handli (§ 562), betri lýsing (§ 566) og avtøka av skylduni altíð at hava ein fyrirreikandi fund (§ 563).

Skotið verður upp, at reglurnar verða settar í føroysku rættargangslógina, smbr. § 1, nr. 64-74 í uppskotinum.

10. Serligu reglurnar í galdandi rættargangslóg í Føroyum um, at øll rættarmál skulu viðgerast í Føroya rætti sum mál á 1. rættarstigi, verður mælt til at varðveita, smbr. § 1, nr. 80, 102 og 103 í uppskotinum.

11. Eftir lóg nr. 253 frá 16. juni 1980 verður innsett eitt nýtt kap. 66[a] í lógina um, at útnevnast kann ein advokatur í neyðtøku- og neyðtøkuliknandi málum fyri tann neyðtikna. Advokaturin kann veita hjálp bæði undir løgreglukanningini og undir viðgerðini av málinum í

rættinum. Støðan hjá advokatinum er sum hjá einum tilnevndum forsvarara. Útreiðslurnar til advokatin verða goldnar av tí almenna.

Skotið verður upp, at hesar reglur koma við í føroysku rættargangslógina, smbr. § 1, nr. 96 í uppskotinum.

12. Viðgerðin av revsimálum áðrenn dómsviðgerðina er eftir føroysku rættargangslógini formelt tvideild, við tað at hon er samansett av eini forgransking, ið løgreglan reikar fyri. Við lóg nr. 243 frá 8. juni 1978 verður innført ein einstáttað skipan, har revsimál verða fyrireikað av løgregluni — eftirkanningin — og har uppgávan hjá rættinum bert er at hava eftirlit við lógligheitini av løgreglukanningini, at avgera tvídráttir um rættindini hjá ákærda og forsvara og at taka støðu til tey kanningarstig, sum t. d. fongsling, rannsókn og hald, ið eru so víðfevnd, at tey krevja rættsins góðtøku.

Harafturat verður støðan hjá forsvararanum styrkt undir kanningini, men verður tó samstundis gjørt møguligt at avskera bæði valdar og tilnevndar forsvararar at virka í einstøkum máli.

Skotið verður upp at taka reglurnar við í føroysku rættargangslógini.

13. Treytirnar fyri at seta persónar í varðhald (kap. 70) eru herdar og gjørdar nágreiniligari við lóg nr. 243 frá 3. juni 1978. Eftir lógini verður førd ein ávís víðkað atgongd til at nýta varðhald, orsakað av vandanum fyri týning av prógvtilfari, men samstundis verður eftirlitið styrkt við, hvussu leingi varðhaldið skal vara. Tí kann freistin, ið er galdandi fyri varðhald ikki fara upp um 4 vikur.

Eisini eru reglurnar um avbyrging av varðhaldsfangum broyttar við lóg nr. 299 frá 6. juni 1984. Eftir galdandi rættargangslóg í Føroyum (§ 784, stk. 1, nr. 2) inniheldur lógin bert heimild fyri rættin, til eftir áheitan frá løgregluni at avgera, at ein varðhaldsfangi skal haldast heilt ella partvist avbyrgdur. Av tí at varðhald er ein so stór skerjing av rættindum, eru meira nágreiniligar reglur ásettar fyri, nær varðhald kann nýtast, t. d. soleiðis at fullkomin avbyrging ikki kann nýtast í meira enn 8 vikur, uttan so at ákæran snýr seg um brotsverk, sum kann geva meira enn 6 ára fongsul (§ 770[a], stk. 2), og fyrsta freistin fyri, hvussu leingi varðhaldið má vara, má ikki fara upp um 2 vikur (§ 770[c], 2. pkt.).

Skotið verður upp at taka reglurnar við í føroysku rættargangslógina, smbr. § 1, nr. 99-101 í uppskotinum.

14. At lóg nr. 299 frá 6. juni 1984 um broyting í donsku rættargangslógini verður sett í gildi her, er ein fyritreyt fyri, at ætlaðu broytingarnar í ferðslulógini um viðgerð av málum um rúsdrekka- og promillukoyring uttan rættarviðgerð.

15. Við lóg nr. 243 frá 8. juni 1978 verða reglurnar í kap. 93[a], útbygdar við tí endamáli at styrkja møguleikarnar fyri, at persónar, ið hava verið

ákærdir í einum revsimáli, kunnu fáa endurgjald, um teir undir revsimálinum hava verið ákærdir í teirra rættindum ella hava sitið revsing av. Nýskpanin hevur tað við sær, at fleiri straffirættarlig tiltøk kunna koma undir endurgjaldsskyldu, at varðhúsareglan um skuld verður avtikin, og at innførd verður ein vanlig regla um møguleika at veita endurgjald fyri handtøku og varðhald, um so er, at tiltakið ikki hevur staðið í rímiligan mun, til úrslitið av revsimálinum, ella at tað av aðrari serstakari orsøk verður hildið rímiligt.

Skotið verður upp at taka reglurnar við í rættargangslógina, smbr. § 1, nr. 122 í uppskotinum.

Hjálagt fylgja hesi skjøl:

1) Udkast til lov for Færøerne om rettens pleje,
2) Lógarkunngerð nr. 555 frá 1. november 1984,
3) Galdandi rættargangslóg í Føroyum.

**Sí skjal 12.**

1. viðgerð 21. mars. Málið varð beint í rættarnevndina og ikki afturkomið haðani.

F. L. j. nr. 501-8-2.

# 71. Frádráttur í skattskyldugu inntøkuni av gávum til ávísar felagsskapir

Ár 1986, hósdagin 20. februar legði Johs. Martin Olsen, løgtingsmaður, fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar.**

Heitt verður á Landsstýrið um at leggja fram lógaruppskot um loyvi til at draga frá í skattskyldugu inntøkuni gávur til ávísar felagsskapir, sum hava til endamál at gera eitt kristiligt og uppbyggjandi arbeiði.

**Viðmerkingar:**

Tiðin tykist bera í sær, at tað verður alt torførari at halda fram við ti

uppbyggjandi arbeiði, sum ymiskir felagsskapir hava gjørt og framvegis gera í okkara samfelag.

Í okkara grannalondum hevur ein leingi havt møgulcikar fyri, at skattaborgarin hevur kunnað drigið frá gávur til tílíkar felagsskapir.

Hvørjir felagsskapir har kunna koma inn undir hesar reglur, hevur verið avgjørt av tí almenna.

Tað er eitki merkiligt í, at hesir felagsskapir venda eyguni ímóti tí almenna, sum jú í forvegin veitir stuðul til so mong við so mongum ymiskum endamálum.

Ein máti at sleppa undan at víðka rammurnar fyri almennan stuðul er at liberalisera viðurskiftini soleiðis, at tey, sum ganga inn fyri hesum ymisku og ávisu felagsskapum, kunnu draga hesar gávur frá í skattskyldugu inntøkuni.

Í fyrstu atløgu eigur ikki at verða givið heilt leyst. Mesta mark eigur at verða sett fyri, hvussu nógv hvør einstakur skattgjaldari kann draga frá fyri hvørt árið.

Av umsitingarligum orsøkum hevði ivaleyst eisini verið rætt at sett minstamark fyri tílíkan frádrátt.

Eg kundi hugsað mær, at eitt minstamark uppá kr. 500 og eitt mestamark uppá kr. 2.000 um árið var á leið, og at ein borgari innan fyri hesar rammur kundi givið til meira enn ein felagsskap. Rættast er, at Føroya Landsstýri sjálvt ger ein lista yvir teir felagsskapir, sum kunnu koma inn undir hesar reglur, ella at Landsstýrið letur hetta arbeiði upp í hendurnar á Líkningarráðnum ella øðrum stovni.

Av felagsskapum, sum eiga at verða góðkendir, kann eg nevna teir alment góðtiknu kristiligu bólkarnar, skótarørsluna og aðrar felagsskapir, sum reka uppbyggingararbeiði her á landi.

Út frá hesum viðmerkingum loyvir undirritaði sær at seta fram hetta.

1. viðgerð 27. februar. Málið varð beint í skattanevndina, sum 10. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð framlagt 20. februar 1986 av Johannes M. Olsen og undir 1. viðgerð 27. februar beint í skattanevndina.

Hetta mál gongur út uppá at kunna draga gávur, sum eru frá kr. 500 til kr. 2.000 frá í skattskyldugu inntøkuni fyri ávísar felagsskapir.

Meirilutin (Heini O. Heinesen, Hilmar Kass, Poul J. Olsen og Jógvan Sundstein) kann ikki taka undir við hesum uppskoti, tí hetta verður præcedensskapandi. Vit hava her á landi so nógvar felagsskapir, sum kanska við góðum rætti kundu komið og biðið um henda sama møguleika,

eisini heldur meirilutin tað ikki vera rætt aftur nú at loyva so nógvum frádráttum, rættari og einklari hevði verið at hækkað persónsdrádráttin.

Meirilutin setir sostatt einki uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Johannes M. Olsen) mælir til, at uppskotið verður samtykt.

11. mars varð málið afturtikið.

# 72. Broyting í revsilógini

Ár 1986, hósdagin 20. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar.**

Løgtingið samtykkir

1. Viðlagda uppskot til kgl. fyriskipan um at seta broyting í revsilógina, lógina um samarbeiði við Finnland, Ísland, Noreg og Svøriki um útlevering av revsing v. m. og lóg um flyting til annað land til revsingar, í gildi í Føroyum,
2. At ST-sáttmálin frá 10. december 1984 móti torturi og aðrari harðari, ómenniskjaligari ella vanærandi viðgerð ella revsing verður lýstur at galda í Føroyum.

**Viðmerkingar:**

Ríkisstýrið hevur ætlan um at ratificera ST-sáttmálan frá 10. december 1984 móti torturi v. m. Fyri at kunna góðkenna sáttmálan er neyðugt at gera nakrar broytingar í revsilógini fyri at lúka ST-sáttmálan.

Eftir broytingaruppskotinum verður straffimyndugleikin hjá donskum dómstólum víðkaður til í størri mun at kunna revsa fyri gerðir, sum eru framdar uttan fyri ríkið fyri brot á millumlanda sáttmálar, t. d. umrødda sáttmála um tortur og sáttmálan um gíðslatøku.

Viðlagt fylgja eintøk av uppskotunum til kgl. fyriskipan, lógaruppskotinum við viðmerkingum, ST-sáttmálanum móti torturi og uppskotið til fólkatingssamtykt um góðkenning av nevnda sáttmála.

**Sí skjal 13.**

1. viðgerð 27. februar. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 11. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur hin 20. februar 1986 lagt uppskotið fyri tingið.

Málið var aftaná 1. viðgerð 27. februar 1986 beint í rættarnevndina.

Talan er um broyting í revsilógini og lóg um samstarv við Finnland, Ísland, Noreg og Svøriki um útinning av revsing v. m. og lóg um flyting til annað land til revsingar.

Harumframt verður mælt til, at ST-sáttmálin frá 10. december 1984 móti torturi og aðrari harðari, ómennniskjaligari ella vanærandi viðgerð ella revsing verður lýst at galda í Føroyum.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið, og ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 13. mars. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 501-2-1.

# 73. Keyp av rognum

Ár 1986, týsdagin 25. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um keyp av rognum.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at keypa fyri upp til 5 mió. kr. í rognum, og at selja hesi til góðskingarvirki í Føroyum.

**2. stk.** Landsstýrinum verður heimilað at selja hesi rogn av landinum, fæst ikki sáttmáli við góðskingarvirki í Føroyum.

**lagtingslov om køb af rogn.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at købe for op til 5 mio. kr. rogn, og at sælge disse til forædlingsvirksomheder på Færøerne.

**Stk. 2.** Landsstyret bemyndiges til at sælge disse rogn ud af landet, om ikke kontrakt fås med forædlingsvirksomhed på Færøerne.

| | |
|---|---|
| **§ 2.** Landsstýrið kann upptaka neyðug lán í hesum sambandi. | **§ 2.** I denne forbindelse kan landsstyret optage nødvendige lån. |
| **§ 3.** Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. | **§ 3.** Lagtingsloven får gyldighed dagen efter dens kundgørelse. |

**Viðmerkingar:**

P/f Kovin í Sandavági varð sett á stovn í 1976, og í 1981 fór felagið undir at byggja virki, ið skuldi framleiða dósarogn, og sum eisini kundi framleiða aðrar dósavørur, eitt nú livur og posteitir. Tá virkið stóð liðugt og fór undir framleiðslu á sumri 1982, var kostnaðurin 9,4 mió. kr.

Umframt at framleiða dósavørur kann virkið eisini taka ímóti og viðgera síl og laks. Í 1985 tók virkið ímóti meginpartinum av alifiskinum úr Vágum. Eisini hevur virkið í ávísan mun gjørt arbeiði fyri flakavirkið Snarfrost. Her er talan um t.d. pakking av svartkalva og havtasku í tíðarbilum, tá nógv arbeiði er á Snarfrost.

Sum nevnt, fór Kovin undir rognframleiðsluna á sumri 1982. Men frá byrjan av fekk virkið trupulleikar við søluni. Í 1984 fór virkið undir roynd-arframleiðsluna av posteium. Aftur her tóku trupulleikar seg upp við søluni. Seinastu árini hevur virkið alla tíðina framleiytt nakað av dósalivur til heimamarknaðin.

Sjálv framleiðslan hjá virkinum hevur gingið væl. Tá framleiðslan fór í gongd, varð mett, at framleiðslukostnaðurin fyri hvørja dós skuldi verða 40 til 45 oyru. Í dag er framleiðslukostnaðurin komin niður á 20 til 25 oyru. Tá rogn verða framleidd, arbeiða eini 13-14 fólk á virkinum, og kemur onnur framleiðsla afturat, kemur talið upp á 20 fólk.

Í 1982 varð mett, at virkið kundi fáa 15,50 kr. fyri kilo av lidnum rognum (1 kg = 5 dósir). Miðal avrokningin fyri tey næstu trý árini var 9,75 fyri kilo. Hesi árini (1982, 1983 og 1984) hevði virkið eitt hall, sum lá úr 1 upp í 3 mió. kr. Hetta hevur ført til, at virkið í dag hevur eina skuld upp á umleið 16 mió. kr.

Virðisøkingin, ið stendst av rognarframleiðsluni hjá P/f Kovanum, kann lýsast soleiðis: Selja vit 1 kg av rárognum av landinum, er prísurin 10,50 kr. Um P/f Kovin fær 1 kg av rárognum, verður hetta gjørt til 2,6 dósakilo, og var søluprísurin á hesum kilo í fjør 24 kr. (Tá er sjálv dósin ikki viðroknað, tá hon er ókeypis frá Amanda Konserves). Av hesum 24 kr. fara 10,50 kr. til keyp av rárognum, slakar 5 kr. fara til arbeiðsløn, virkið fær slakar 6 kr., og restin ella 2,50 kr. til 3,- kr. fer til farmagjald, tilsetning og svinn.

Í fjør komu 490 tons av rognum í land í Føroyum. Tey seinastu 10 árini hevur nøgdin ligið í millum 400 og 500 tons. Men øll rognini verða ikki tikin. Mett verður, at um øll toskarognini, upsarognini, longu- og blálongu-

rognini vórðu tikin, so komu vit upp á eini 7-800 tons um árið. Hetta vildi givið eina lidna framleiðslu upp á umleið 2.000 tons.

Við ársbyrjan 1985 fekk felagið eina loysn á sølutrupulleikunum. Tá gjørdi P/f Kovin sølusáttmála við Amanda Konserves í Kerteminde. Hesin sáttmáli gav felagnum ein fastan prís upp á 2,80 kr. fyri dósina. Hetta svarar til 14 kr. fyri kilo. (Her er hædd tikin fyri, hvat sjálv dósin kostar. Hon er annars ókeypis frá Amanda Konserves). Hóast ein góðan sølusáttmála gjørdist árið 1985 ikki øðrvísi enn árini frammanundan. Orsakað av fiskimannaverkfallinum í Íslandi og Canada og orsakað av ísviðurskiftunum í Eystursjónum seinasta vár gjørdist eftirspurningurin eftir rárognum sera stórur, og prísurin hækkaði við 3 kr. fyri kilo. Haun fór úr 7,50 kr. upp í 10,50 kr.

Í ár er sáttmálin við Amanda Konserves broyttur við einum gliðiskala, soleiðis at dekningsavlopið er sett fast til 45 oyru pr. dós og verður sambært sáttmálanum óbroytt, um tað skuldi hent, at prísir og lønir hækka. Amanda Konserves er sinnað at keypa minst 4 mió. dósir og kann eisini keypa meira, t.d. 5 ella 6 mió. dósir, um hetta letur seg gera.

Sum áður nevnt komu 490 tons av rognum í land í Føroyum í 1985. Av hesum keypti p/f Kovin 230 tons og framleiddi 2 mió. dósir. Sostatt útfluttu vit 260 tons av rárognum til Danmarkar. Við tí nýggja sølusáttmálanum skuldi tað verið møguligt hjá Kovanum at fingið øll rogn, sum koma á land í Føroyum.

Landsstýrið umhugsar tiltøk, sum kunnu gera, at øll rognini verða tikin. Hetta førir so til, at samlaða nøgdin verður eini 7-800 tons um árið. Men fyrst av øllum mugu vit tryggja, at rognini í ár ikki fara av landinum og síðani mugu vit royna at fáa framleiðsluna í gongd av nýggjum.

Støðan hjá P/F Kovanum er ógreið í løtuni. Við tí skuld, felagið hevur, er tað vónleyst at halda fram við rakstrinum. Ein møguleiki er, at P/F Kovin fer í likvidatión og at annað felag, ið kann leiga virkisbygninginum frá likvidator, verður sett á stovn. Amanda Konserves hevur onki ímóti, at sølusáttmálin verður fluttur til annað felag.

Meðan hesin og aðrir møguleikar verða kannaðir, mælir landsstýrið til, at landskassin fær heimild til at keyoa tey rogn, ið eru á goymslu í Føroyum í løtuni, og somuleiðis tey, sum koma á land restina av rognatíðini.

Hesi rogn verða at selja til stigtakarar, sum ætla at fara undir aftur rognaframleiðslu. Verður av eini hvørji orsøk ikki farið undir rognaframleiðslu, selir landsstýrið rognini av landinum sum rá rogn.

1. viðgerð av málinum 28. februar. Málið varð beint í tinggjarnevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið verður lagt fram av landsstýrinum tann 25. februar 1986 og undir 1. viðgerð tann 28. í s.m. beint í figgjarmevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins við tí ískoyti, at heimildin eisini fevnir um rakstrarútreiðslur í tilknýti til keypið, goymslukostnað og til søluvirksemi.

Samsvarandi hesum setir figgjarnevndin til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

### Broytingaruppskot

§ 2 verður orðað soleiðis:

»Landsstýrinum verður heimilað at taka upp neyðug lán í hesum sambandi, herundir eisini til rakstrarútreiðslur í tilknýti til keypið sbrt. § 1, goymslukostnað og til søluvirksemi.«

§ 2 formuleres således:

»Landsstyret bemyndiges til at optage nødvendige lån i denne forbindelse, herunder også til driftsudgifter i tilknytning til købet i medfør af § 1, lageromkostninger og til salgsvirksomheder.«

2. viðgerð 21. mars. § 1 samtykt við 19-0. Broytingaruppskotið frá figgjarnevndini til § 2 samtykt við 19-0 atkvøðum, § 3 samtykt við 19-0. Við 19-0 atkvøðum varð samtykt at beina málið soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

24. mars løgdu tingmenninir Hilmar Kass, Juul Jacobsen, Ivan Johannesen, Eyðun Viderø og Signar Hansen fram soljóðandi

### Broytingaruppskot

§ 3 verður orðað soleiðis:

»Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi tann 1. juni 1986.«

§ 3 formuleres således:

»Lagtingsloven får gyldighed dagen efter dens kundgørelse og træder ud af kraft den 1. juni 1986.«

3. viðgerð 24. mars. Broytingaruppskotið varð samtykt við 24-0 atkvøðum. Uppskotið soleiðis broytt endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1427-1-167-2 Lóg nr. 37 frá 10. apríl 1986.

# 74. Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir

Ár 1986, týsdagin 25. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna Landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir.**

**§ 1.** Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1986 og 1987 at veita vanligt veðhald fyri lánum upp til 3,0 mió. kr. hvørt fíggjarárið til smærri ídnaðarvirkir.

**§ 2.** Hesi lán verða at nýta til stovnan av nýggjum virkjum, víðkan og nútímansgerð av gomlum o. t.
**2. stk.** Veðhald skal altíð verða ásett við eini mestuupphædd.
**3. stk.** Lánini mugu ikki fara upp um 70% av tí virði, sum nýggju íløgurnar hava eftir meting.
**4. stk.** Lánini skulu verða tryggjað við panti í fastogn ella leysafæ innan fyri 70% av tí virði, fastognin ella leysafæið eru mett til. Leysafæ kann tó bert nýtast sum pant, um metingarvirðið er ikki minni enn 150.000 kr.

**§ 3.** Kemur landskassin sum

**lagtingslov om garanti for lån til mindre industrivirksomheder.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansårene 1986 og 1987 at yde simpel kaution for lån indtil 3,0 mio. kr. hvert finansår til mindre industrivirksomheder.

§ 2. Disse lån skal anvendes til reetablering af virksomheder, udvidelse og modernisering af gamle o. l.
**Stk. 2.** Kautionen skal altid være fastsat med et maximumsbeløb.
**Stk. 3.** Lånene må ikke overstige 70% af den værdi, som de nye investeringer har i henhold til vurdering.
**Stk. 4.** Lånene skal være sikrede ved pant i fast ejendom eller løsøre indenfor 70% af den værdi, som den faste ejendom eller løsøret er vurderet til. Løsøre kan dog kun anvendes som pant, for så vidt vurderingssummen er ikke mindre end 150.000 kr.

§ 3. Såfremt landskassen som

veðhaldari at rinda pening, og sostatt fær krav móti skuldaranum, verður kravið at renta við rentu, landsstýrið ásetir, frá ti degi, landskassin hevur lagt pening út.

kautionist keommer til at betale penge, og på denne måde får krav imod skyldneren, forrentes dette krav med en rente, som landsstyret fastsætter, fra den dag, landskassen har udlagt beløbet.

§ 4. Um lán ikki er veitt 1 ár eftir, at landsstýrið hevur givið tilsøgn um veðhald, fellur tilsøgnin burtur.

§ 4. Såfremt lån ikke er effektueret et år efter, at landsstyret har givet tilsagn om kaution, bortfalder tilsagnet.

§ 5. Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 5. Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur hvørt ella annaðhvørt ár síðani 1960 fingið heimild við løgtingslóg at veðhalda fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir. 1. januar 1986 gekk núverandi heimild út, sum er ásett við løgtingslóg nr. 37 frá 3. mai 1984, jbr. løgtingsmál nr. 28/1983. Við heimild í løgtingslóg nr. 32 frá 3. mai 1984 um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir hevur landsstýrið í fíggjarárinum 1984/85 veitt 800.000 kr. í veðhaldi, og í fíggjarárinum 1985 einki í veðhaldi.

Uppskotið til nýggja løgtingslóg um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir verður tí við hesum lagt fram. Í høvuðsheitunum svarar uppskotið til innihaldið í løgtingslóg nr. 32 frá 3. mai 1984 um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirkir, sum var galdandi fyri fíggjarárið 1984/85 og 1985.

Eisini er nú ásett í lógini, at veðhaldið er vanligt veðhald. Hetta merkir, at kreditor ikki kann krevja skuldina goldna av landskassanum, fyrr enn hann við úrslitaleysum rættarmáli og tvingsilssølu hevur ásannað, at peningurin ikki verður goldin.

Landsstýrið hevur latið spurningin um, hvørt tað er neyðugt at endurnýggja lógina til ummælis hjá Ídnaðargrunninum, Menningargrunninum og Ídnaðarstovuni, og eru hesi ummæli hjáløgd.

Víst verður annars til viðmerkingarnar í løgtingslóg nr. 32 frá 3. mai 1984.

1. viðgerð 28. februar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 25. februar 1986 og undir 1. viðgerð 28. í s. m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið. Eftir samráð við landsstýrismannin í ídnaðarmálum Vilhelm Johannesen varð avgjørt at heita á landsstýrið um at taka málið um simpla og sjálvskuldarakautión upp til nýggja viðgerð. Tá veðhaldsheimild landskassans í fyriliggjandi øki er útgingin, verður neyðugt, at tann áður galdandi heimild verður endurnýggjað. Meðan bíðað verður eftir støðutøku landsstýrisins til kautiónsháttin, mælir ein samd fíggjarnevnd til, at lógin framvegis veitir veðhald at skilja sum sjálvskuldaraveðhald og setir til uppskot landsstýrisins fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| Í § 1 verður gjørd henda broyting: | I § 1 foretages følgende ændring: |
| Orðið »vanligt« verður strikað. | Ordet »simpel« udgår. |

2. viðgerð 9. apríl. Broytingaruppskot til § 1 frá samdari fíggjarnevnd varð samtykt við 23-0 atkvøðum. § 1 varð samtykt við 26-0, § 2 við 27-0 atkvøðum.

3. viðgerð 10. apríl. Lógin endaliga samtykt við 26-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1427-2. Lóg nr. 68 frá 5. juni 1986.

# 75. Broyting í løgtingslóg um Føroya Náttúrugripasavn

Ár 1986, hósdagin 13. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna Landsstýrið fram soljóðandi

# Uppskot

# til

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Náttúrugripasavn.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 26 frá 17. august 1955 um Føroya Náttúrugripasavn verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 3 verður aftaná »c) Plantusavnið« skoytt uppí: », undir leiðslu hvørt av sínum deildarleiðara, sum landsstýrið setir.«
2. § 5 verður orðað soleiðis:
   »Landsstýrið tilnevnir eftir umsókn ein av deildarleiðarunum til fyristøðufólk.«
3. Í § 6 verður »fyristøðumanninum« broytt til »fyristøðufólkinum«.
4. Í § 7 verður »Fyristøðumaðurin« broytt til »Fyristøðufólkið«.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om Færøernes Naturhistoriske Samling.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 26 af 17. august 1955 om Færøernes Naturhistoriske Samling foretages følgende ændringer:

1. I § 3 tilføjes efter »c) plantesamlingen«: », under ledelse af hver sin afdelingsleder, som landsstyret ansætter.«
2. § 5 affattes således:
   »Landsstyret udnævner efter ansøgning en afdelingsleder til forstander.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Tá Føroya Náttúrugripasavn varð stovnað við løgtingslóg nr. 26 frá 17. august 1955 gjørdist Føroya Jarðfrøðisavn ein deild av Náttúrugripasavninum, og fyristøðumaðurin á Føroya Jarðfrøðisavni fekk sambært § 5 í nevndu løgtingslóg ta dagligu leiðsluna á Føroya Náttúrugripasavni.

Tá leiðarin av Føroya Náttúrugripasavni legði frá sær vegna aldur 1. oktober 1980, samtykti landsstýrið at seta starvsfólk at røkja tær 3 deildirnar á Náttúrugripasavninum, eitt fyri hvørja deildina, og fyrrverandi leiðarin av Náttúrugripasavninum átók sær tá at røkja Jarðfrøðisavnið, tí jarðfrøðingur ikki var tøkur.

Eftir uppskoti frá Náttúrugripasavninum góðkendi landsstýrið í hesum sambandi hesa skipan viðvíkjandi leiðsluni av Náttúrugripasavninum: »Náttúrugripasavnið verður stýrt av savnsvørðunum í felag. Teir velja sjálvir formann, sum umsitur figgjarlógina og umboðar savnið úteftir. Undirvísingarliga fyrisitingin verður løgd undir Fróðskaparsetur Føroya.

Tá savnsvørðurin á Jarðfrøðisavninum ynskti at vera leysur av hesum starvi, og jarðfrøðingur framvegis ikki var tøkur, samtykti landsstýrið, at leiðarin av plantusavninum frá 1. februar 1984 skuldi vera fyribils leiðari av Jarðfrøðisavninum og harvið eisini fyribils leiðari av Náttúrugripasavninum sambært § 5 í frammanfyri nevndu løgtingslóg.

Frá fyribilsleiðaranum av Náttúrugripasavninum hevur landsstýrið síðani fingið áheitan um, at § 5 í frammanfyri nevndu løgtingslóg verður broytt, so at landsstýrið eftir umsókn tilnevnir ein av deildarleiðarunum til fyristøðufólk á Náttúrugripasavninum.

Landsstýrið setir tí fram uppskot til broyting í løgtingslógini um Føroya Náttúrugripasavn samsvarandi hesum.

1. viðgerð 21. mars. Málið varð uttan orðaskifti beint í skúla- og mentannarnevndina, sum legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram av landsstýrinum 13. mars 1986 og varð eftir 1. viðgerð 20. í s. m. beint í mentannarmála- og skúlanevndina.

Málið snýr seg um, at landsstýrið eftir umsókn kann seta ein deildarleiðara á Náttúrugripasavninum í starv sum fyristøðufólk á Føroya Náttúrugripasavni.

Nevndin hevur viðgjørt málið og vísir til ta niðurstøðu, at talan er ikki um nakra nýnormering.

Ein samd nevnd tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað óbroytt.

2. viðgerð 15. apríl. § 1 samtykt við 24-0, § 2 við 25-0. Við 25-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 16. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 20-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 2205-14. Lóg nr. 69 frá 5. juni 1986.

# 76. Broytingar í borgarligu revsilógini

Ár 1986, hósdagin 27. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna Landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið mælir til, at hesar lógir og fyriskipanir verða at galda í Føroyum og verða kunngjørdar eftir lóg nr. 51 frá 1. apríl 1896 um »kundgørelse af love og anordninger på Færøerne«:

1. Lóg nr. 63 frá 3. mars 1948, sum broytt við lóg nr. 293 frá 8. juni 1978,
2. fyrisetan um at § 205 í borgarligu revsilógini verður sett úr gildi,
3. lóg nr. 248 frá 9. juni 1967 tó undantikið § 1, nr. 11,
4. fyrisetan um at fyrningarfreistin fyri brot av lógum um almennar skattir í ongum førum er stytri enn 10 ár.
5. lóg nr. 319 frá 13. juni 1973,
6. lóg nr. 250 frá 12. juni 1975,
7. §§ 5 og 7, í lóg nr. 266 frá 26. juni 1975,
8. § 1, nr. 1 og 4-19, og § 2 í lóg nr. 268 frá 26. juni 1975,
9. lóg nr. 195 frá 28. april 1976,
10. lóg nr. 132 frá 9. apríl 1980,
11. lóg nr. 256 frá 27. mai 1981,
12. lóg nr. 160 frá 28. apríl 1982,
13. lóg nr. 239 frá 1. juni 1982,
14. lóg nr. 228 frá 6. juni 1985,
15. lóg nr. 229 frá 6. juni 1985,
16. lóg nr. 573 frá 19. december 1985,
17. lóg nr. 156 frá 10. mai 1967,
18. fyriskipan nr. 40 frá 3. februar 1978,
19. fyriskipan nr. 143 frá 7. apríl 1982,
20. §§ 8, 13 og 14 í lóg nr. 247 frá 9. juni 1967,
21. lóg nr. 524 frá 28. november 1969,
22. lóg nr. 252 frá 12. juni 1975,
23. lóg nr. 278 frá 9. juni 1982,
24. lóg nr. 233 frá 6. juni 1985 undantikið § 1, nr. 4, í lógini.

**Viðmerkingar:**
Landfútin hevur sent landsstýrinum viðløgdu »Redegørelse for ikrafttræden for Færøerne af ændringer af borgerlig straffelov m. v.« við fylgiskjølum frá december 1985.

Í inngangínum í frágreiðingini sigur landfútin, at frágreiðingin er gjørd við tí í hyggju at geva heimastýrinum høvi at taka støðu til spurningin um dagførslu av borgarligu revsilógini.

Landfútin heldur fram og sigur, at tilsamans 21 lógir um broytingar í revsilógini og 7 lógir, ið hava meir og minni tilknýti til revsilógina og nakrar fyrisitingarligar forskriftir, givnar við heimild í hesum lógum, ikki eru settar í gildi í Føroyum. Orsøkin er, at spurningurin um at seta lógirnar og forskriftirnar í gildi í fleiri førum ikki er lagdur fyri føroysku myndugleikarnar, ella at hesir ikki hava svarað. Í tveimum førum hava føroysku myndugleikarnir svarað, at tað ikki er ynski um at seta lógirnar í gildi.

Aðalsjónarmið landfútaembætisins er, at tá ið revsilóg og lógir í samband við revsilógina umræður longst gjørligt eigur at vera rættareind í Danmark og í Føroyum.

Í samband við, at landfútin sendir landsstýrinum frágreiðingin, spyr ríkisumboðið, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at tær í uppskotinum til samtyktar nevndu lógir v. m. verða settar í gildi í Føroyum.

1. viðgerð 6. mars. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 11. mars legði fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið 27. februar 1986. Aftaná 1. viðgerð hin 6. mars varð málið beint í rættarnevndina.

Talan er um dagførslu av borgarligu revsilógini. Mælt verður til, at 24 ymiskar lógir og fyriskipanir verða at galda í Føroyum.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um, at tað ikki er gjørligt at viðgera hetta uppskot til lítar, áðrenn tingið fer heim, og setir tí fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingsins rættarnevnd verður gjørd til millumtinganevnd til tess at

koma við áliti í tingmáli nr. 76/1985: Broytingar í borgarligu revsilógini í ólavsøkutingsetuni.

2. viðgerð 13. mars. Uppskot landsstýrisins samtykt við 24-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 501-2-1.

# 77. Veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins

Ár 1986, hósdagin 27. februar legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til Menningargrunn Ídnaðarins.**

**§ 1.** Menningargrunni Ídnaðarins verður loyvt umframt hansara árligu lánsheimild sambært § 6 í løgtingslóg nr. 37 frá 26. juni 1973, sum broytt við løgtingslóg nr. 89 frá 18. september 1980, at upptaka 30 mió. kr. í láni við landskassaveðhaldi ella mótvirðið í fremmandum gjaldoyra av nevndu upphædd.

**2. stk.** Lánstreytirnar skulu góðkennast av landsstýrinum og fíggjarnevndini.

**§ 2.** Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

**lagtingslov om garanti for lån til Menningargrunnur Ídnaðarins.**

**§ 1.** Menningargrunnur Ídnaðarins får tilladelse til, udover den årlige lånhjemmel i henhold til § 6 i lagtingslov nr. 37 af 26. juni 1973, som ændret ved lagtingslov nr. 89 af 18. september 1980 at optage 30 mio. kr. i lån med garanti fra landskassen eller modværdien i fremmed valuta af nævnte beløb.

**Stk. 2.** Vilkårene for lånet skal godkendes af landsstyret og finansudvalget.

**§ 2.** Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**
Í skrivi frá 7. februar 1986 hevur Menningargrunnur Ídnaðarins heitt á landsstýrið um at geva grunninum heimild til at taka eitt uttanlandslán upp á 30 mió. kr.; landsstýrið veðheldur landskassans vegna fyri láninum, skulu lánstreytirnar góðkennast av landsstýrinum og fíggjarnevndini.

Menningargrunnur Ídnaðarins hevur í boði eitt lán upp á mótvirðið av 30 mió. kr. d.kr. í DM.

Talan er um eitt lán við multi-currencyklausul, og verður rentan 1¼% yvir London Inter Bank rentuna, sum í løtuni fyri DM fer at liggja umleið 6,3 til 6,5% p.a. Rentuskeiðini eru 6 ella 12 mánaðir, og er lánið yvir 10 ár, tey fyrstu 2 avdráttarfrí, og skal lánið rindast aftur við 16 líka stórum hálvárligum gjøldum, fyrstu ferð 2 ár aftaná at lánið er útgoldið Menningargrunninum. Menningargrunnurin hevur møguleika fyri at siga upp lánið við 14 daga freist.

Fyriliggjandi tilboð er í gildi til 28. februar 1986.

Sum tilskilað í viðmerkingunum í samband við veðhald fyri láni til Menningargrunnin, ið tikið verður í Nordiska Investeringsbanken, Helsingfors, eru krøvini til Menningargrunnin um fígging av ídnaðarvirkjum alsamt vaksandi. Tey seinru árini er tað so hent, at ein nýggj menningarkrevjandi vinna hevur tikið seg upp, alivinnan. Henda vinnan er seinru árini farin við mestapartinum av fíggjarorkuni hjá Menningargrunninum, og er hetta sostatt orsøk til, at ídnaðurin á landi ikki hevur fingið tær upphæddir, sum ynskiligt var. Sambært likviditetsætlan Menningargrunnsins fyri 1986, so kemur grunninum at tørva einar 65 mió. kr. fyri at kunna halda fram við at fíggja allar tær alistøðir, sum eru í gongd, og fyri at kunna læna nakað út til annað ídnaðarfyritaksemi. Menningargrunnurin ger sær ómak fyri at fáa so bilig og rímilig uttanlandslán sum møguligt, og verður mett, at fyriliggjandi tilboð er rímiliga gott, og at tað er beint at taka av.

Játtanin til grunnin úr landskassanum fylgir ikki við fíggjarorku menningargrunsins annars.

Hetta m.a. hevur ført við sær, at eginogn grunsins ikki er vaksandi samsvarandi útlánunum, og er rentumarginalur grunsins eisini fallin av somu orsøk, og er hann í løtuni nær við 0. Útlánsrenta grunsins til lán við veð í fastari ogn er í løtuni 8,5% p.a. og til lán við veð í virkisgøgnum 9,5% p.a. Stovningarprovisjón er ¾%.

Skal Menningargrunnurin framyvir kunna læna út til hesa rentu, uttan at »trygd« grunsins skal koma í vanda, er neyðugt at taka upp lán til víðari útlán, sum hava eina lægri rentu enn hesa omanfyri nevndu.

Við fyriliggjandi lántilboði hevur Menningargrunnurin enn sostatt møguleikan at bøta um hesi viðurskifti og kann m.a. fara í holt við góðskingarvirkir, har fleiri umsóknir eru til viðgerðar í grunninum.

Samanumtikið kann sigast, at skal Menningargrunnurin í framtíðini kunna fylgja við tíðini og bjóða tíðarhóskandi figging, so er neyðugt, at grunnurin kann bjóða lán til lágar rentur fyri m. a. at kappast við tey kreditfelagslánini, sum í løtuni eru á marknaðinum í Føroyum.

1. viðgerð 6. mars. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 3. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 27. februar 1986 og undir 1. viðgerð 6. mars beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Nevndin heitir samstundis á landsstýrið og menningargrunnin um at bera so í band, at ídnaðurin á landi ikki verður við sviðið soð.

F. L. j. nr. 1212-14-1. Lóg nr. 43 frá 2. mai 1986.

# 78. Sølubúð við tollfríum vørum á flogvøllinum

Ár 1986, hósdagin 6. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um sølubúð við tollfríum vørum á flogvøllinum.**

§ 1. Landsstýrið fær heimild til at veita almennum stovni rætt til at selja ferðandi, ið fara úr Føroyum við flogfari, ótollaðar vørur. Loyvið kann eisini fevna um rúsdrekka, vín og øl, og koma reglurnar í rús-

**lagtingslov om handel med toldfrie varer på flyvepladsen.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at give offentlig institution ret til at sælge rejsende, der rejser fra Færøerne med fly, utoldede varer. Tilladelsen kan også omfatte spiritus, vin og øl, og finder bestemmel-

drekkalóggávuni ikki í nýtslu fyri hesa sølu.

§ 2. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur fyri søluni v.m.

§ 3. Landsstýrið kann í samráð við figgjarnevnd løgtingsins taka upp neyðug lán til innrætting av hølum v.m. og til figging av rakstrinum.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi dagin eftir kunngerðing.

scrne i spirituslovgivningen ikke anvendelse for dette salg.

§ 2. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere bestemmelser for salget m.v.

§ 3. Landsstyret kan i samråd med lagtingets finansudvalg optage nødvendigt lån til indretning af lokaler m.v. og til financiering af driften.

§ 4. Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Eftir galdandi tolllóg (lógarbroyting nr. 76 frá 4. august 1984) er heimild at endurrinda innflutningsgjaldið, serliga innflutningsgjaldið og eykainnflutningsgjaldið av vørum, ið verða endurútfluttar.

Hesar reglur verða nýttar av handilsvirkjum, men kunnu ikki nýtast fyri vørur, ið ferðandi hava við sær út av landinum. Í øllum floghavnum er vanligt, at ferðandi kunnu keypa við sær út av landinum ótollaðar vørur, og er her serliga talan um høgt tollaðar vørur sum tubbakk, rúsdrekka og vørur úr gulli og silvuri.

Tá talan er um flúgving úr Føroyum, er støðan tann í dag, at ferðafólkini bert hava ein møgulcika fyri at keypa tollfríar vørur, og er hetta umborð á flogfarinum.

Hetta førir við sær, at flogternurnar, umframt at veita allar aðrar tænastur eisini skulu taka sær av søluni av rúsdrekka, cigarettum og øðrum tollfríum vørum. Hetta bøtir ikki um tænastustøðið á flogferðunum úr Føroyum.

Spurningurin er tí, um vit ikki eiga at broyta tollreglurnar soleiðis, at tað gerst møguligt at hava eina sølu á flogvøllinum, har tey, sum fara úr Føroyum, kunnu keypa sær tollfríar vørur.

Landsstýrið hevur hugsað sær, at onkur almennur stovnur t.d. Ferðamannamiðstøðin, stendur fyri rakstrinum av eini tílíkari sølubúð. Tá Ferðamannamiðstøðin verður nevnd, so kemst hetta av, at í álitinum um Ferðamannamiðstøðina verður hetta nevnt sum ein møguleiki fyri at útvega inntøkur til rakstur av Ferðamannamiðstøðini.

Tað er helst skilagott fyri ferðamannavinnuna, at Ferðamannamiðstøðin eftir nærri ásettum reglum veitir ávísan stuðul til lokalar kunningar- og

ferðamannastøðir. T.d. kundi rakstrarstuðul verið latin til eina tílíka stovu í hvørjari sýslu.

Um landsstýrið velur at lata Ferðamannamiðstøðina standa fyri rakstrinum, kundi partur av avlopinum farið til rakstur av Ferðamannamiðstøðini og lokalu kunningar- og ferðamannastovunum. Ein partur kundi eisini farið í gistingarhúsgrunnin hjá landsstýrinum.

Nevndin til kannan av ferðamannavinnuni metti í 1983 samfelagsliga vinningin av eini sølu á flogvøllinum til umleið 2,8 mió. kr.

1. viðgerð 8. apríl. Málið varð beint í rættarnevndina, sum 16. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 6. mars 1986 og undir 1. viðgerð 8. apríl beint í rættarnevndina.

Orðaskiftið í samband við 1. viðgerð var ógvuliga drúgt og snúði seg einamest um rúsdrekkapolitikk sum heild.

Ein samd rættarnevnd visir annars til tingmál nr. 81 frá 15. apríl 1980: Loyvi til brygging av øli. Í álitinum frá serstøku seksmannanevndini við einum umboði fyri hvønn flokkin, ið varð sett til at viðgera málið, var soljóðandi uppskot til samtyktar gjørt:

»Álagt verður landsstýrinum:

1) at gera eina kanning av, hvussu núverandi rúsdrekkaskipan virkar samanlíknað við orðaljóðið í lóggávuni á hesum øki,
2) at kanna avleiðingarnar, sum koma at standast av teirri broyting, sum nú er samtykt, og á Ólavsøku 1981 leggja frágreiðing fyri tingið,
3) um kanningarnar sambært punktini 1 og 2 benda á tað, at koma við uppskotum um neyðugar broytingar í rúsdrekkalóggávuni á Ólavsøkutingsetuni 1981,
4) meira miðvíst enn higartil at stuðla upplýsingararbeiði um vandarnar, ið standast av rúsdrekkanisnýtsluni.«

Sigast kann, at ikki nakað miðvíst er gjørt fyri at seta í verk hesa samtykt.

Orðaskiftið á tingi vísti, at stórur áhugi er fyri júst hesum spurningum.

Rættarnevndin, ið skal vera millumtinganevnd til ólavsøku, vil tí eftir førimuni royna at greiða nakrar av hesum spurningum og koma við frágreiðing um hetta.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Karin Kjølbro, Jóannes Dalsgaard og Jógvan Sundstein) tekur undir við uppskotinum frá landsstýrinum og hevur hesar viðmerkingar:

Í § 2, 2. pkt. verður gjørt vart við, at í samband við hesa sølu koma reglurnar í rúsdrekkalógini í Føroyum ikki í nýtslu. Meirilutin roknar tí við, at sølan fer fram í tráð við lóggávuna í tí landinum, sum hin ferðandi skal til. Meirilutin yvirletur til landsstýrið at avgera, hvussu raksturin av slíkari sølubúð verður skipaður.

Ein minniluti (Jákup Lindenskov) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, men heldur at raksturin av almennum stovni eigur at fara um løgtingsins figgjarlóg. Sjálvt um endamálið við sølubúð á flogvøllinum ikki einans er at selja rúsandi drykkir, so kemst ikki uttanum, at tað fyri tað mesta eru drykkjuvørur og tubbaksvørur, ið hava keypsáhugan í tollfríum sølubúðum.

Hetta eru samstundis tær vørur, sum samfelagið sum mest eigur at tálma umfarið av og halda profitáhuga burtur frá. Vit hava prógvfasta vitan um, at økt umfar av alkoholdrykkum og harnæst tubbak, eru størstu sosialu vandamálini í vestur- sum eysturheiminum.

Afturhald við umfarinum av hesum vørum er frægasta gongda leið at bøta um standin. Stig til økta tollfría sølu, um tað so er til tey, sum fara av landinum økir heldur enn minkar um umfarið. Afturhald gerst eisini við reklamubanni. Reglurnar í rúsdrekkalógini um reklamubann eiga at verða orðaðar hvassari, somuleiðis heimildin hjá landsstýrinum at geva eykaloyvi.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

**1. Broytingaruppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í lóg »om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m. a.«**

| | |
|---|---|
| § 1. | § 1. |
| Í »Lov for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m. m.« nr. 115 frá 4. apríl 1928 við seinni broytingum verður henda broyting gjørd: | I »Lov for Færøerne om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m. m.« nr. 115 af 4. april 1928 med senere ændringer foretages følgende ændring: |
| »**2. stk.** Vinnurekandi uttan- | »**Stk. 2.** Handelsdrivende uden- |

lands, sum vanliga selja rúsdrekka til Føroya hava ikki loyvi at lýsa í føroyskum fjølmiðlum ella á annan hátt við handilsmerki, handilsnavni, telefonnummari ella telefontíð.«

lands, der sædvanligvis sælger berusende drikke til Færøerne, har ikke tilladelse at annoncere i færøske medier eller på anden måde med firmamærke, firmanavn, telefonnummer eller telefontid.«

§ 2.

Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

**2.** Bannað verður bryggjaríunum at brúka telefonsvarara alt samdøgrið og at útflýggja uttanfyri vanliga afturlatingartíð.

Minnilutin setir tí fram

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at broyta kunngerð um brygging og útflýgging av sterkum øli, nr. 78 frá 11. juli 1980, sum broytt við kunngerð nr. 104 frá 15. desember 1980, solciðis at § 5 verður soljóðandi:

»§ 5. Øl kann bert verða bílagt og útflýggjað frá mánadegi til fríggjadag í vanligu arbeiðstíðini.«

**3.** Verandi heimild hjá landsstýrinum at geva eykaloyvir verður broytt soleiðis:

Eykaloyvir verða bert givin til serligar, rundar føðingardagar frá 50, 60 o.s.fr., brúdleyp, silvurbrúdleyp o.s.fr., feløg til ársveitslu. Fyri at fáa eykaloyvi, skal skrivlig umsókn verða latin í góðari tíð og við ummæli frá kommunalu myndugleikunum, og setir minnilutin samsvarandi hesum fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skamtan av rúsdrekka.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 61 frá 19. mai

§ 1.

I lagtingslov nr. 61 af 19. mai

1980 um skamtan av rúsdrekka verður hendan broyting gjørd:

§ 3 verður soljóðandi:

»§ 3.

Umsóknir um eykaloyvi til rúsdrekka, hóast § 1, verða skrivliga at senda kommununi í tí bygd ella býi, viðkomandi er tilmeldaður, ella um umsøkjarin ikki er tilmeldaður í Føroyum í tí kommunu, viðkomandi hevur uppihald.

**2. stk.** Kommunan sendir umsóknina til landsstýrið við sínum ummæli, og tekur landsstýrið tá støðu til, um eykaloyvið verður veitt.

**3. stk.** Landsstýrið kann bert veita eykaloyvi til hesi høvi:

a) føðingardagar 50 ár, 60 ár, 65 ár, 70 ár o.s.fr.
b) brúdleyp og harav fylgjandi jubileumsbrúdleyp 25 ár, 50 ár, 60 ár, 65 ár, 70 ár o.s.fr.
c) starvsjubilæum hjá persóni 25 ár, 40 ár, 50 ár o.s.fr.
d) heilt serliga samkomu í samband við, at ein persónur fær fleiri persónar »ekstraordinert« á vitjan, t.d. drotningavitjan, vitjan av almennum kendum persónum, feløgum ella útlendskum gestum í stórum tali.

**4. stk.** Fyri hvørt eykaloyvi, sum landsstýrið veitir, verður at lata eitt avgjald upp á 500 kr. Upphæddin verður á hvørjum ári frá 1. januar prístalsviðgjørd. Innkomni peningurin fer í hjálpargrunnin móti alkoholmisnýtslu.«

1980 om rationering af spiritus foretages følgende ændring:

I § 3 foretages følgende ændringer:

»§ 3.

Ansøgninger om dispensationer til spiritusm uagtet § 1, skal skriftligt sendes kommunen i den bygd eller by, vedkommende er tilmeldt, eller hvis ansøgeren ikke er tilmeldt på Færøerne, i den kommune, vedkommende opholder sig.

**Stk. 2.** Kommunen sender ansøgningen til landsstyret med sin udtalelse, og bestemmer landsstyret siden om dispensationen skal gives.

**Stk. 3.** Landsstyret kan kun give dispensation til disse lejligheder:

a) fødselsdage 50 år, 60 år, 65 år, 70 år o.s.v.
b) bryllup og deraf følgende jubilæumsbryllup 25 år, 50 år, 60 år, 65 år, 70 år o.s.v.
c) stillingsjubilæum hos en person 25 år, 40 år, 50 år o.s.v.
d) helt speciel sammenkomst i forbindelse med, at en person får stort ekstraordinært besøg, f.eks. dronningebesøg, besøg af alment kendte personer, foreninger eller udenlandske gæster i stort antal.

**Stk. 4.** For hver enkelt dispensation, der ydes af landsstyret, skal der betales en afgift på 500 kr. Beløbet skal pristalsbehandles hvert år fra 1. januar. Indtægten er til fordel for hjælpefonden mod alkoholmisbrug.«

| § 2. | § 2. |
| --- | --- |
| Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd. | Lagtingsloven får gyldighed dagen efter kundgørelsen. |

Ein annar minniluti (Dánjal Larsen) tekur ikki undir við uppskotinum og setir eitt uppskot fram.

2. viðgerð 17. apríl. Uppskot landsstýrisins fall við 13 ja-atkvøðum, 10 nei-atkvøðum; 9 atkvøddu kki. Atkvøtt varð við navnakalli soleiðis:

Ja atkvøddu:
Óli Breckmann,
Anfinn Kallsberg,
Svend Aage Ellefsen,
Jógvan Sundstein,
Poul Michelsen,
Tórálvur Mohr Olsen,
Tummas Arabo,
Asbjørn Joensen,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen,
Karin Kjølbro,
Øssur av Steinum,
Erlendur Patursson.

Nei atkvøddu:
Ivan Johannesen,
Agnar Nielsen,
Jógvan Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Jutta Midjord,
Henrik Old,
Sverre Midjord,
Jákup Lindenskov,
Adolf V. Hansen,
Tordur Niclasen.

Atkvøddu ikki:
Olaf Olsen,
Eyðun Viderø,
Flemming Mikkelsen,
Jona Henriksen,
Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Hilmar Kass,
Heini O. Heinesen,
Dánjal Larsen.

Broytingaruppskot til løgtingslóg frá Jákupi Lindenskov, § 1, varð samtykt við 20 ja-atkvøðum, 1 nei-atkvøðu; 11 atkvøddu ikki.

Ja atkvøddu: Ivan Johannesen,
Flemming Mikkelsen,
Agnar Nielsen,
Jógvan Olsen,
Johannes Martin Olsen,
Jutta Midjord,
Henrik Old,
Sverre Midjord,
Jona Henriksen,
Jákup Lindenskov,
Poul Jacob Olsen,
Jørgen Thomsen,
Tummas Arabo,
Signar Hansen,
Hergeir Nielsen,
Heini O. Heinesen,
Karin Kjølbro,
Erlendur Patursson,
Adolf V. Hansen,
Tordur Niclasen.

Nei atkvøddi: Øssur av Steinum.

Atkvøddu ikki: Óli Breckmann,
Anfinn Kallsberg,
Olaf Olsen,
Svend Aage Ellefsen,
Eyðun Viderø,
Jógvan Sundstein,
Poul Michelsen,
Jutta Midjord,
Tórálvur Mohr Olsen,
Asbjørn Joensen,
Hilmar Kass.

§ 2 í uppskotinum frá Jákupi Lindenskov varð samtykt við 21-0 og uppskotið til samtyktar frá sama varð samtykt við 17-0 atkvøðum. Broytingaruppskotið frá Jákupi Lindenskov fall við 13-0. § 2, 2. pkt. frá sama varð samtykt við 20-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 404-99-7. Lóg nr. 70 frá 5. juni 1986.

# 79. Setan av ríkislóg um grønlendska flaggið í Føroyum.

Ár 1986, týsdagin 11. mars legði rættarnevndin fram soljóðandi

**Álit**

Landsstýrið hevur í skrivi til løgtingsins rættarnevnd dagf. 15. september 1985 lagt spurningin um lóg nr. 222 frá 6. juni 1985 um grønlendskt flagg fyri tingið.

Mælt verður til, at tikið verður undir við uppskotinum.

Rættarnevndin hevur viðgjørt málið og setir ein samd nevnd soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Lóg nr. 222 dagf. 6. juni 1985 um grønlendskt flagg verður sett í gildi í Føroyum.

2. viðgerð 20. mars. Uppskotið til samtyktar frá rættarnevndini varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 2-1.

# 80. Regulering av føroyska fiskiskapinum í 1986 í kanadiskum sjógvi

Ár 1986, hósdagin 11. mars legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

# Uppskot

# til

# samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar fiskikvoture føroyinga í kanadiskum sjógvi í 1986 sambært rammusáttmála frá 3. juni 1980 millum Danmark og Kanada um føroysk fiskirættindi í kanadiskum sjógvi.

**Viðmerkingar:**

Í samband við 7. regluliga ársfundin í NAFO á Kuba 9.-13. september 1985 varð fundur hildin millum umboð fyri Føroya landsstýri og kanadisku stjórnina um føroysk fiskirættindi í 1986 í kanadiskum sjógvi sambært rammusáttmálan við Kanada.

Kvotuynski landsstýrisins fyri 1986 vóru:

| Øki | Toskur | Svartkalvi |
|---|---|---|
| 0 | - | 3.000 |
| 2GH | 2.000 | 1.000 |
| 2J3KL | 1.000 | 1.000 |

Sambært fotoavrit av telexi frá 31. januar 1986, skjal í, hevur kanadiska stjórnin samtykt at tilluta Føroyum fylgjandi kvotur fyri 1986:

| Øki | Toskur | Svartkalvi |
|---|---|---|
| 0 | - | 3.000 |
| 2GH | 2.500 | 500 |
| 2J3KL | - | 500 |

Umframt hesar nevndu kvotur hava føroyingar í 1986 eins og undanfarin ár atgongd til at veiða hemara í kanadiskum sjógvi.

Landsstýrið hevur síðani 1983 roynt at fáa eina toskakvotu á økinum 2J3KL aftur, men hesum ynski vil kanadiska stjórnin ikki koma á møti.

19.27
+
81235 tingns fa
dfo/mpo ott
faroese home government
torshavn, faroe islands
attn: j. klett or
g. gunnarsson

re: 1985 faroese allocations in the cdn fishery zone

this telex is to inform your of the allocations and fishing plan for the faroe islands in 1985. a more detailed respinse to the note delivered by mr. a. olafsson during the sept. nafo meeting will follow.

fishing plan for the faroe islands in 1985

| species | stock area | allocations (tons) | daily catch rate | fishing days | days on ground |
|---|---|---|---|---|---|
| | | (m.t.) | (m.t.) | | |
| cod | 2gh | 2,500 | 7 | 358 | 412 |
| g halibut | 0 | 3,000 | 4 | 750 | 863 |
| g halibut | 2gh | 500 | 3 | 167 | 192 |
| g halibut | 2j+3kl | 500 | 3 | 167 | 192 |

probeagle

shark zone 4 (-3ps) unrestricted

bob applebaum
director general
international directorate
dfo coll 1410
+ x
81235 tingns fa
dfo/mpo ott

1. viðgerð 21. mars. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fyri løgtingið ab landsstýrinum 13. mars 1986, og við 1. viðgerð 21. í s.m. varð tað beint í marknaðarnevndina.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Jógvan Olsen og Agnar Nielsen) vísir á, at fiskiskip, sum fiska í kanadiskum sjógvi. lata avgjald fyri hesi rættindini. Í undanfarna ári varð gjaldið um kr. 500.000 fyri øll skipini.

Minnilutin heldur tað vera órímiligt, at hesi skip skulu gjalda fyri fiskirættindi, meðan skip, ið fiska aðrastaðir í fremmandum sjógvi ikki gjalda fyri fiskiloyvi, og setir minnilutin fram soljóðandi

## Uppskot

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at landskassin rindar tey gjøld, ið eru í samband við fiskirættindi í fremmandum sjógvi, tá landsstýrið hevur gjørt fiskiavtaluna.

2. viðgerð 11. apríl. Uppskot landsstýrisins samtykt við 28-0 atkvøðum. Uppskot til samtyktar frá minnilutanum fall við 6-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1500-1-11-8.

# 81. Lán til keyp av húsum til Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð o.ø.

Ár 1986, hósdagin 13. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

## Uppskot

## til

**løgtingslóg um lán til keyp av hús-**

**lagtingslov om lån til køb af hus til**

**um til Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð o.ø.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at upptaka neyðug lán upp til 13,5 mió. kr. til keyp av húsum til Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð og upp til 6 mió. kr. til keyp av bókagoymslu.

§ 2. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**Landscentral for undervisningsmateriale m.m.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån op til 13,5 mio. kr. til køb af hus til Landscentral for undervisningsmateriale og op til 6 mió. kr. til køb af boglager.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Sambært § 25, 4. stk. í løgtingslóg nr. 21 frá 22. mars 1979 um fólkaskúlan verður ein Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð stovnað eftir greiniligari reglum, sum landsstýrið ásetir. Til raksturin av Landsmiðstøðini vóru avsettar 1.094.000 kr. á fíggjarløgtingslógini fyri fíggjarárið 1985, og á fíggjarløgtingslógini fyri fggjarárið 1986 eru avsettar 1.559.000 kr. til raksturin, og Landsskúlafyrisitingin hevur roynt at útvegað Landsmiðstøðini innivist, men striltið hevur gingið, og Landsmiðstøðin er sostatt ikki farin at virka enn.

Tað hevur tó leingi verið í umbúna annaðhvørt at leiga tær báðar niðastu hæddirnar í húsunum Bóklbindaragøta 8 ella at keypa húsini og síðani at innrætta báðar tær niðastu hæddirnar til Landsmiðstøðina, og eigarin er nú sinnaður at selja húsini, sum eru í 4 hæddum.

Í fyrstu atløgu er ætlanin at innrætta báðar tær niðastu hæddirnar til Landsmiðstøðina. Í hinum báðum hæddunum eru 8 íbúðir tilsamans, sum í løtuni eru leigaðar ut, men um hesi leigumál verða uppsøgd, kunnu tær báðar hæddirnar verða innrættaðar til at hýsa Føroya Skúlabókagrunni og Bókamiðsøluni, sum í løtuni hava innivist í leigaðum hølum ávikavist á Hoydalsvegi 40 og á Tinghúsvegi 18, 3. hædd.

Serliga Bókamiðstøðin hevur ringar húsaumstøður og hevur bøkur liggjandi á goymslu ymsa staðni í býnum.

Metingarmenninir hjá Húsalánsgrunninum bava mett virðið av húsaognini Bókbindaragøta 8 til 13,5 mió. kr., og eigarin er sinnaður at selja ognina fyri hesa upphædd.

Harumframt hevur eigarin bjóðað landsstýrinum at keypa bøkurnar hjá Bókagarði fyri 50% av søluvirðinum, sum verður mett at liggja um 10-12 mió. kr., ella fyri 5-6 mió. kr. Bøkurnar eru allar tílíkar, sum bókasøvnini koma at keypa, so hvørt tey verða stovnað.

Landsskúlaráðið hevur á fundi 17. februar 1986 einmælt samtykt at mæla landsstýrinum til at útvega figging til keyp av húsaognini Bókbindaragøta 8 fyri 13,5 mió. kr. og til keyp av bókagoymsluni hjá Bókagarði fyri 5-6 mió. kr., og landsstýrið hevur á fundi 28. februar 1986 samtykt at leggja fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um heimild at upptaka neyðug lán til keypið av umrøddu húsaogn og bókagoymslu.

1. viðgerð 21. mars. Máljð varð beint i mentannar- og skúlanevndina, sum 21. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 13. mars 1986 og undir 1. viðgerð 21. í s.m. varð tað beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt máljð og hevur undir viðgerðini havt fund við landsskúlastjóran, sum greiddi frá teimum ætlanum, sum eru við landsmiðstøðina fyri undirvísingaramboð.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Ein meiriluti (Asbjørn Joensen, Hergeir Nielsen og Jóannes Dalsgaard, Dánbjal Larsen) fegnast um, at landsstýrið nú hevur tikið stig til at fáa landsmiðstøðina at virka soleiðis, sum tað er ásett í løgtingslóg um fólkaskúlan frá 1979.

Meirilutin er av tí áskoðan, at tað er ógvuliga umráðandi at fáa landsmiðstøðina til verka í hesum ári.

Hinvegin eru, síðani málið varð lagt fram, komnir í ljósmála aðrir møgulcikar enn teir, sum eru nevndir í uppskoti landsstýrisins. Meirilutin heldur, at hesir møgulcikar eiga at verða kannaðir, áðrenn endalig støða verður tikin í málinum. Meirilutin skjýtur tí upp, at mentannar- og skúlanevndin heldur fram sum millumtinganevnd í løgtingsmáli nr. 81/1985 fyri at leggja fram álit á ólavsøku. Meirilutin setir fylgjandi

## Uppskot

## til

## samtyktar

Løgtingið samtykkir, at mentannar- og skúlanevndin sum millumtinganevnd heldur fram at arbeiða við løgtingsmáli nr. 81/1985, og leggur nevndin fram álit í málinum á ólavsøku 1986.

Ein minniluti (Óli Breckmann) førir fram:

Samgongan tykist ikki før fyri at uppfylla setningin í samgonguskjalinum um, at landsfyrisitingin eigur at húsast í egnum hølum.

Hetta er annað dømið í stutta tíð, um, at landsstýrið ikki er sinnað at gjalda tann pris fyri keyp av hóskandi hølum, sum seljarin ynskir. Eink samsvar er heldur millum uppskot landsstýrisins og støðuna, sum samgongunnar umboð í nevndini hava tikið til hetta uppskot. Við atliti til ósemjuna og ráðaloysið í samgonguni um hetta keypsmál, landsmiðstøð, setir minnilutin eink uppskot fram.

2. viðgerð 17. apríl. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum í nevndini samtykt við 18-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2427-13.

# 82. Stuðul til bygging av 2. byggistigi av Tekniska skúlanum í Klaksvík

Ár 1986, hósdagin 13. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

til

| | |
|---|---|
| **løgtingslóg um stuðul til bygging av 2. byggistigi av Tekniska skúlanum í Klaksvík.** | **lagtingslov om tilskud til bygning af 2. etape af Teknisk skole i Klaksvik.** |
| § 1. Landsstýrinum verður heimilað at veita Tekniska skúlanum í Klaksvík upp til 6,5 mió. kr. í studningi til bygging av 2. byggistigi av skúlanum. | § 1. Landsstyret bemyndiges til at yde Teknisk skole i Klaksvik op til 6,5 mió. kr. i tilskud til bygning af 2. etape af skolen. |
| § 2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at upptaka neyðug lán til veiting av nevnda studningi. | § 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån til ydelse af næsvnte tilskud. |

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Við skrivi dagfest 27. februar 1986 hevur landsskúlafyrisitingin sent landsstýrinum eina kostnaðarmeting viðvíkjandi bygging av 2. byggistigi av Tekniska Skúlanum í Klaksvík upp á umleið 19 mió. kr. við tilmæli um, at landsstýrið útvegar tann pening til byggingina, sum ikki verður útvegað við prioritetsláni og ríkisláni.

Landsskúlaráðið hevur einmælt góðkent hetta byggimálið.

Bygging av tekniskum skúlum og handilsskúla hevur verið figgjað við ⅓ í prioritetsláni, ½ í ríkisláni og ⅙ í eginpeningi, og landsstýrið hevur við heimild í serligari løgtingslóg rindað hesum skúlum studning svarandi til eginpeningin ella tann partin av eginpeninginum, sum skúlin sjálvur hevur ikki havt tøkan.

Kenslumálaráðið hevur góðkent, at bygging kann verða framd við tekniska skúlarnar og handilsskúlan í Føroyum fyri upp til 30 mió. kr. í árunum 1985-87, tað er fyri upp til 15 mió. kr. í ríkisláni, og kenslumálaráðið hevur herumframt biðið føroysku skúlamyndugleikarnar taka avgerð um, hvør bygging skal verða framd. Í tann mun samlaði byggikostnaðurin fer upp um 30 mió. kr., mugu føroysku skúlamyndugleikarnir sostatt yvirfyri ríkismyndugleikunum vátta, at landskassin ber meirkostnaðin.

Eftir hesum verður kostnaðurin av byggingini av 2. byggistigi av Tekniska skúlanum í Klaksvík upp á tilsamans 19 mió. kr. at figgja soleiðis:

Av kostnaðarrammu kenslumálaráðsins 15 mió. kr.:

| | |
|---|---|
| Prioritetslán ⅓ ella | 5,0 mió. kr. |
| Ríkislán ½ ella | 7,5 » » |
| Landskassastudningur ⅙ ella | 2,5 » » |
| Tilsamans | 15,0 mió. kr. |
| Landskassastudningur svarandi til munin millum samlaða kostnaðin 19 mió. kr. og kostnaðarrammuna 15 mió. kr. ella | 4,0 mió. kr. |
| Tilsamans | 19,0 mió. kr. |

Landsstýrið leggur sostatt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um, at landsstýrinum verður heimilað at rinda Tekniska skúlanum í Klaksvík studning eftir vanligari mannagongd upp á ein ⅙ ella 2,5 mió. kr. av tí byggikostnaðinum av 2. byggistigi, sum kenslumálaráðið hevur lagt til grund fyri figging við prioritets- og ríkislánum, og herumframt studning svarandi til meirkostnaðin 4 mió. kr. ella tilsamans 6,5 mió. kr.

1. viðgerð 21. mars. Málið varð beint í skúla- og mentannarnevndina, sum 24. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Uppskotið er lagt fram av landsstýrinum og varð eftir 1. viðgerð tann 21. mars 1986 beint í mentannar- og skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og undir viðgerðini havt fund við landsskúlafyrisitingina. Undir 1. viðgerð varð upplýst, at Tekniski Skúlin í Klaksvík er í álvarsomum høllistrupulleikum, og at tað tí er ógvuliga umráðandi at fáa 2. byggjistig framt.

Kostnaðurin er mettur til 19 mió. kr. tilsamans. Av hesum verður landskassans partur tilsamans 6.5 mió. kr. Av hesum 6,5 mió. kr. eru 2,5 mió. kr. vanligur landskassastudningur, meðan restin, 4 mió. kr. stava frá tí byggikostnaðurin fer upp um ta av danska statinum settu rammu uppá 15 mió. kr.

Skúlanevndin tekur til eftirtektar, at tað undir 1. viðgerð av flestu røðarum varð víst á vandan fyri, at byggingin fór at gerast dýrari enn kostnaðarmetingin. Nevndin heitir tí á landsstýrið um at ansa væl eftir, at kostnaðarmetingin verður hildin.

Undir nevndarviðgerðini er tað upplýst, at føroyski landskassin einsamallur ber allan møguligan meirkostnað, um farið verður enn meira út um rammurnar.

Skúlanevndin hevur saman við fólki frá landsskúlafyrisitingini gjøgnumgingið prosjektið og mælir ein samd nevnd løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 24. mars. §§ 1, 2 og 3 vórðu samtyktar við ávikavist 23-0, 24-0 og 23-0. Við 24-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskotið endaliga samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2105-14-2-2. Lóg nr. 34 frá 16. april 1986.

# 83. Stuðul til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali

Ár 1986, hósdagin 13. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

## Uppskot

## til

**løgtingslóg um stuðul til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at veita Føroya Handilsskúla upp til 7,5 mió. kr. í studningi til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali.

§ 2. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at upptaka neyðug lán til veiting av nevnda studningi.

§ 3. Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

**lagtingslov om tilskud til bygning af afdeling af Færøernes Handelsskole i Kambsdal.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til at yde Færøernes Handelsskole op til 7,5 mio. kr. i tilskud til bygning af afdeling af Færøernes Handelsskole i Kambsdal.

§ 2. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån til ydelse af nævnte tilskud.

§ 3. Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Við skrivi dagfest 27. februar 1986 hevur landsskúlafyrisitingin sent landsstýrinum eina kostnaðarmeting viðvíkjandi bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali upp á umleið 20 mió. kr. við tilmæli um, at landsstýrið útvegar tann pening til byggingina, sum ikki verður útvegað við prioritetsláni og ríkisláni.

Landsskúlaráðið hevur eintmælt góðkent hetta byggimálið.

Bygging av tekniskum skúlum og handilsskúla hevur verið figgjað við ⅓ í prioritetsláni, ½ í ríkisláni og ⅙ í eginpeningi, og landsstýrið hevur við heimild í serligari løgtingslóg rindað hesum skúlum studning svarandi til eginpeningin ella tann partin av eginpeninginum, sum skúlin sjálvur hevur ikki havt tøkan.

Kenslumálaráðið hevur góðkent, at bygging kann verða framd til teknisku skúlarnar og handilsskúlan í Føroyum fyri upp til 30 mió. kr. í árunum 1985-1987, tað er fyri upp til 15 mió. kr. í ríkisláni, og kenslumálaráðið hevur herumframt biðið føroysku skúlamyndugleikarnar taka avgerð um, hvør bygging skal verða framd. Í tann mun samlaði byggikostnaðurin fer upp um 30 mió. kr., mugu føroysku skúlamyndugleikarnir sostatt yvirfyri ríkismyndugleikunum vátta, at landskassin ber meirkostnaðin.

Eftir hesin verður kostnaðurin av byggingini av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali upp á tilsamans 20 mió. kr. at fíggja soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Prioritetslán ⅓ ella | 5,0 | mió. kr. |
| ríkislán ½ ella | 7,5 | » » |
| landskassastudningur ⅙ ella | 2,5 | » » |
| Tilsamans | 15,0 | mió. kr. |
| Landskassastrudningur svarandi til munin millum samlaða kostnaðin 20 mió. kr. og kostnaðarrammuna 15 mió. kr. ella | 5,0 | mió. kr, |
| Tilsamans | 20,0 | mió. kr. |

Landsstýrið leggur sostatt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um, at landsstýrinum verður heimilað at rinda Føroya Handilsskúla studning eftir vanligari mannagongd upp á ⅙ ella 2,5 mió. kr. av tí byggikostnaðinum av deild skúlans á Kambsdali, sum kenslumálaráðið hevur lagt til grund fyri figging av prioritets- og ríkislánum, og herumframt studning svarandi til meirkostnaðin 5 mió. kr. ella tilsamans 7,5 mió. kr.

1. viðgerð 21. mars. Málið varð beint í skúla- og mentannarnevnd, sum 24. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið, ið snýr seg um bygging av handilsskúladeild á Kambsdali, er lagt fram av landsstýrinum. Málið varð eftir 1. viðgerð tann 21. mars 1986 beint í mentannar- go skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og gjøgnumgingið prosjektið saman við einum umboði fyri landsskúlafyrisitingina.

Talan er um ein 1200m² stóran bygning á Kambsdali og er kostnaðurin mettur til 20 mió. kr. Av hesum eru 7,5 mió. kr. landskassans partur. 2,5 mió. kr. av hesum svara til vanliga ⅙ stuðulin til líknandi stovnsbygningar. Av tí at farið verður upp um rammur kenslumálaráðsins uppá 15 mió. kr., verður landskassin at leggja upp til 5 mió. kr. út aftrat, ella tilsamans hægst 7,5 mió. kr.

Um alt gongur eftir ætlan, kann skúlin standa liðugur á heysti 1988.

Skúlanevndin tekur til eftirtektar, at framsøgumenn undir 1. viðgerð løgdu stóran dent á, at kostnaðarætlanin verður hildin, og heitir nevndin tí á landsstýrið um at hava nøkvt eftirlit við høvuðsprojekteringini, eins og við sjálvari byggingini.

Ein samd nevnd tekur annars undir við lógaruppskotinum, og mælir løgtinginum til at samtykkja tað óbroytt.

2. viðgerð 24. mars. § 1 varð samtykt við 24-0, § 2 við 23-0 og § 3 við 24-0, og við 24-0 atkvøðum varð samtykt, at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð á seinni fundi sama dag. Uppskotið endaliga samtykt við 23-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 2128-6. Lóg nr. 35 frá 16. apríl 1986.

# 84. Broyting í løgtingslóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum

Ár 1986, fríggjadagin 21. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum.**

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 24 frá 1. juni 1978 við seinri broytingum um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum verður § 2, 1. stk. síðsta punktum: »Tá bygt verður deksfiskifar á føroyskari skipasmiðju tó upp til 30%« broytt til: »Tá bygt verður deksfiskifar á føroyskari skipasmiðju, tó upp til 25% og/ella rentustudning. Landsstýrið fyriseitir við góðkenning frá figgjarnevnd Føroya løgtings í kunngerð gjøllari, hvussu heimildin verður at nýta.«

**lagtingslov om ændringer i lagtingslov om fornyelse af fiskerflåden.**

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 24 af 1. juni 1978 med senere ændringer om fornyelse af fiskerflåden bliver § 2, stk. 1, sidste punktum: »Såfremt dæksfiskerfartøj bliver bygget på færøsk værft, dog op til 30%« ændret til: »Såfremt dæksfiskerfartøj bliver bygget på færøsk værft, dog op til 25% og/eller rentesubsidium. Landsstyret fastsætter med finansudvalgets godkendelse nærmere i kundgørelse, hvordan hjemmelen vil være at anvende.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

Høvuðsendamálið við lógaruppskotinum er at geva møguleikar fyri at fáa eina figging til vega, sum stillar føroyskar skipasmiðjur javnt við útlendskar. Aðrastaðnis eru møguleikar skipacigaranna at fáa um 22% av kostnaðarprísinum veitt sum rentustudningur.

Ætlanin er, at skipacigarin kann velja ímillum at fáa fult stuðulslán 25% og ongan rentustudning, 22% rentustudning og einki stuðulslán ella 10% stuðulslán og 15% rentustudning.

Rentustudningurin skal verða veittur av byggikostnaðinum og verður goldin yvir 5 ár við hálvárligum gjøldum. Niðanfyri eru vístir tríggir møguleikar fyri figging av skipum bygd í Føroyum.

| Vanlig figging — bygging í Føroyum | |
|---|---|
| 10% | eginpeningur |
| 25% | stuðulslán |
| 15% | fiskaríbankin |
| 50% | rcalurin |

**22% rentustudningur**

| | | |
|---|---|---|
| 10% | eginpeningur | |
| 20% | landskassaveðhald | uttanlandslán |
| 17% | bankaveðhald við transporti í rentustudninginum | uttanlandslán |
| 53% | pant uttan veðhald | uttanlandslán |

**15% rentustudningur**

| | | |
|---|---|---|
| 10% | eginpeningur | |
| 10% | stuðulslán | |
| 15% | landskassaveðhald | uttanlandslán |
| 11,6% | bankaveðhald við transporti í rentustudninginum | uttanlandslán |
| 53,4% | pant uttan veðhald | uttanlandslán |

Fyri landskassan verður likviditetsmyndin hendan, um t.d. skip fyri 100 mió. kr. verða bygd ávíst ár:

**Dømi I:** 25% studningslán yvir 20 ár, 3 tey fyrstu avdráttarfri, rentan 4% p.a., avdráttur hálvárligur.

**Dømi II** 22% rentustudningur yvir 5 ár. Útrokningargrundarlagið verður niðurskrivað 10% pr. hálvár.

**Dømi III** 15% rentustudningur og 10% stuðulslán.

# 85. Broyting í lógini um landsbanka

Ár 1986, fríggjadagin 21. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um Landsbanka Føroya.**

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om Landsbanki Føroya.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya verður § 5 orðað soleiðis:

»Landsstýrið ger viðtøkur fyri bankan. Broytingar í viðtøkunum kunnu verða gjørdar eftir tilmæli frá nevndini og stjórnini aftaná ummæli frá umsjónarráðnum.«

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 57 af 2. oktober 1978 om Landsbanki Føroya affattes § 5 således:

»Landsstyret udfærdiger vedtægter for banken. Ændringer i vedtægterne kan foretages efter indstilling af bestyrelsen og direktionen efter udtalelse fra tilsynsrådet.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft dagen efter bekendtgørelsen.

**Viðmerkingar:**

Eftir § 5 í løgtingslóg nr. 57 frá 2. oktober 1978 um Landsbanka Føroya skal umsjónarráðið gera viðtøkur fyri bankan eftir uppskoti frá nevndini og stjórnini. Viðtøkurnar skulu staðfestast av landsstýrinum.

Tað er sostatt neyðugt eftir galdandi lóg fyrst at seta stjóra og gera viðtøkur fyri bankan áðrenn nakrar aðrar fyrireikingar til stovnsetingina av bankanum kunnu fara fram.

Landsstýrið heldur tað vera rættast, at ein stórur partur av neyðugu fyrireikingunum til sjálva stovnsetingina av bankanum verða gjørdar áðrenn avgjørt verður at seta stjóra og annað starvsfólk.

Á búskapardeildini á landsskrivstovuni eru settir 2 figgjarfrøðingar, sum eisini kunnu taka sær av einum parti av fyrireikingararbeiðinum.

Men eitt tað fyrsta, ið er neyðugt at gera, er sum nevnt at fáa viðtøkur fyri bankan.

Sostatt verður skotið upp at broyta lógina soleiðis, at viðtøkurnar kunnu gerast av landsstýrinum, meðan broytingar bert kunnu gerast eftir tilmæli frá nevndini og stjóranum aftan á ummæli frá umsjónarráðnum.

1. viðgerð 4. apríl. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 21. mars 1986 og undir 1. viðgerð 4. apríl 1986 beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Juul Jacobsen og Signar Hansen) mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Eyðun Viderø) kann ikki taka undir við uppskotinum, av tí at tað frátekur umsjónarráðnum rættin og skylduna at gera viðtøkur bankans og áleggur landsstýrinum hetta arbeiðið.

Minnilutin (Ivan Johannesen) tekur heldur ikki undir við uppskoti landsstýrisins og undirstrikar, at hann ikki kann taka undir við slíkari lóggávu yvirhøvur, og at tað er óneyðugt við landsbanka í Føroyum.

2. viðgerð 9. apríl. Atkvøðugreiðsla 10. apríl. §§ 1 og 2 samtyktar við 17-4 atkvøðum, og við 17-4 atkvøðum varð samtykt at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð 11. apríl. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 17-5 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1400-9. Lóg nr. 52 frá 14. mai 1986.

# 86. Løgtingslóg um hvalaveiðu

Ár 1986, fríggjadagin 21. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um hvalaveiðu.**

§ 1.

Í § 3 í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 um hvalaveiði verður skoytt uppí sum:

**2. stk.** Landsstýrið og fiskivinnunevndin heimila landsstýrinum við kunngerð at áseta bráðfeingisbann fyri grindaveiði í ávísum hvalvág-

**lagtingslov om ændring af lagtingslov om hvalfangst.**

§ 1.

I § 3 i lagtingslov nr. 57 af 5. juni 1984 om hvalfangst tilføjes som:

**Stk. 2.** Landsstyret og fiskeriudvalget bemyndiger landsstyret til ved kundgørelse at fastsætte midlertidigt forbud mod grindefangst i

um, har landsstýrið metir tað neyðugt. Bráðfeingis veiðisteðgur kann verða ásettur at galda í upp til 1 ár.

§ 2.

§ 4 verður orðað soleiðis:

»Allur hvalur (Cetacea) er friðaður fyri veiðu uttan mun til veiðuhátt.

**2. stk.** Landsstýrinum er í serstøkum føri saman við fiskivinnunevnd løgtingsins heimilað at undantaka ávís hvalasløg frá friðigini.«

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

visse hvalhavne, hvor landsstyret anser det for nødvendigt. Midlertidigt fangstforbud kan fastsættes for et tidsrum på max. 1 år.

§ 2.

§ 4 formuleres således:

»Alle hvaler (Cetacea) er fredet for fangst, uanset fangsmåde.

**Stk. 2.** Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets fiskeriudvalg i særlige tilfælde at undtage visse hvalarter fra fredning.«

§ 3.

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

Í sambandi við at landsstýrið hevur sett ein arbeiðsbólk at samskipa løgtingslógina um vernd av dýrum, grindareglugerðina og løgtingslóg um hvalaveiðu, hevur arbeiðsbólkurin mett og landsstýrið tikið undir við, at beinast hevði verið, at Føroya Landsstýri fekk myndugleika at áseta bráðfeingis veiðusteðg av grind, har tað var mett neyðugt, nevniliga í teimum førum, har eitt grindaumdømi hevði fingið neyðuga grind.

Henda leið er áður gingin, men tá hava sýslumenninir av sínum eintingum sett bannið. Sum nú er, liggur myndugleikin hjá Føroya Landsstýri saman við Fiskivinnunevnd Løgtingsins, men skotið verður upp, at hetta verður broytt, tí neyðugt er oftani at fara skjótt fram, t.d. tá ið tvær grindir doyggja í eini hvalvág við stuttum millumbili.

Onnur broytingin at friða ymsar hvalir er gjørd fyri at lógin skal vera í samsvar við reglur, ásettar av IWC (altjóða hvalaveiðinevndini).

1. viðgerð 4. apríl. Málið beint í fiskivinnunevndina, sum 11. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 21. mars 1986 og undir 1. viðgerð 4. apríl beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið.

Ein samd nevnd førir fram, at sbrt. § 3 í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 er landsstýrinum saman við fiskivinnunevnd løgtingsins heimilað við kunngerð at ásetа reglur um, hvussu veiða skal fremjast á landleiðini, tað er m.a. reglur um minstamát, friðað økir, friðingartíðir, veiðureiðskap og nýtslu teirra, veiðuhættir, avmarking av veiðunøgd og veiðuorku.

Fiskivinnunevndin tekur ikki undir við, at landsstýrið einsamalt fær hesa heimild og mælir til, at § 1 í uppskoti landsstýrisins verður strikað, meðan nevndin tekur undir við §§ 2 og 3, sum sostatt verða broyttar til §§ 1 og 2 og soljóðandi:

**§ 1.**

§ 4 í løgtingslóg nr. 57 frá5. juni 1984 um hvalaveiðu verður orðað soleiðis:

»Allur hvalur (Cetacea) er friðaður fyri veiðu uttan mun til veiðuhátt.

**2. stk.** Landsstýrinum er í serstøkum føri saman við fiskivinnunevnd løgtingsins heimilað at undantaka ávís hvalasløg frá friðingini.«

**§ 2.**

Henda lóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**§ 1.**

§ 4 i lagtingslov nr. 57 af 5. juni 1984 om hvalfangst formuleres således:

»Alle hvaler (Cetacea) er fredet for fangst, uanset fangstmåde.

**Stk. 2.** Landsstyret bemyndiges til sammen med lagtingets fiskeriudvalg i særlige tilfælde at undtage visse hvalarter fra fredning.«

**§ 2.**

Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

2. viðgerð 11. apríl. Uppskot landsstýrisins fall burtur. Uppskotið frá fiskivinnunevndini § 1 varð samtykt við 20-0 og § 2 eisini við 20-0. Við 20-0 atkvøðum varð samtykt at málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð.

3. viðgerð 15. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 30-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 1611-11-4. Lóg nr. 41 frá 2. mai 1986.

# 87. Broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m.

Ár 1986, fríggjadagin 21. mars legði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av rentutryggingum v.m.**

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 51 frá 29. december 1971 um skatt av rentutryggingum v.m. verður § 3a orðað soljóðandi:

»Til kapitaleftirlønarskipanir jbr. §§ 2 og 3 kann arbeiðsgevari og løntakari tilsamans hægst draga frá kr. 25.000 av árligu inntøku løntakarans, herí íroknað ómaksløn, tantiéme og allar aðrar samsýningar. Frádrátturin verður att prístalsviðgera á hvørjum ári við prístalinum 1. juli 1986 sett til 100, sum galdandi fyri komandi álmanakkaár.

**2. stk.** Eftirlønarskipanir, ið hava gildi fyri 29. mai 1985, koma tó ikki undir ásetingarnar í 1. stk.

**3. stk.** Likningarráðið kann við kunngerð áseta nærri reglur um upplýsingarskyldu og gjaldshátt v.m. í samband við umsitingina av eftirlønarskipanum eftir hesi lóg.

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om beskatning af renteforsikring m.v.**

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 51 af 29. december 1971 om beskatning af renteforsikring m.v. formuleres § 3a følgende:

»Til kapitalpensionsordninger jfr. §§ 2 og 3 kan arbejdsgiver og lønmodtager højst fradrage kr. 25.000 i lønmodtagerens årlige indkomst, heri medregnet honorar, tantiémeog vederlag af enhver art. Fradraget pristalsreguleres hvert år med pristallet 1. juli 1986 sat lig med 100, som gældende for det efterfølgende kalenderår.

**Stk. 2.** Pensionsordninger, som er trådt i kraft før 29. maj 1985, omfattes ikke af bestemmelserne i stk. 1.

**Stk. 3.** Ligningsrådet kan ved bekendtgørelse fastsætte nærmere regler vedrørende oplysningspligt og betalingsform m.m. i forbindelse med administrationen af pensionsordninger i henhold til denne lov.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá og við 29. mai 1985. Tann í § 1, 1. stk. ásetta frádráttarupphædd fær gildi frá og við 1. januar 1986. Til kapitaleftirlønarskipanir, jbr. §§ 2 og 3, sum avtala er gjørd um at seta í gildi í tíðarskeiðinum 29. mai - 31. december 1985, kann tilsamans hægst dragast frá 15% av árligu inntøku løntakarans, herí froknað ómaksløn, tantiéme og allar aðrar samsýningar. Samlaði frádráttur arbeiðsgevarans og løntakarans kann tó ongantíð verða hægri enn kr. 50.000 árliga.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra og med 29. maj 1985. Det i § 1, stk. 1, fastsatte fradragsbeløb træder i kraft fra og med 1. januar 1986. Til kapitalspensionsordninger, jfr. §§ 2 og 3, som er aftalt til at træde i kraft i tidsrummet 29. maj - 31. december, kan der højst fradrages 15% af lønmodtagerens årlige indkomst, heri medregnet honorar, tantiéme og vederlag af enhver art. Arbejdsgiverens og lønmodtagerens samlede fradrag kan dog aldrig være større end kr. 50.000 årlig.

**Viðmerkingar:**

Eftir hesum lógaruppskoti verður eisini loyvt løntakara at draga frá gjøld til kapitaleftirlønarskipanir í skattskyldugu inntøkuni.

Frádrátturin er tó avmarkaður á tann hátt, at løntakarin og arbeiðsgevari hansara tilsamans hægst kunnu draga frá kr. 25.000 av árligu inntøku løntakarans.

Samstundis ber uppskotið í sær, at galdandi frádráttarhámark fyri gjøld til eftirlønarskipanir við leypandi útgjalding fellur burtur.

Í uppskotinum er ásett, at tær eftirlønarskipanir, sum vóru í gildi frammanundan 29. mai 1985 koma ikki undir nevndu avmarking. Broytingar í hesum skipanum, ið gjørdar verða aftan á 29. mai 1985, koma tó undir avmarkingina.

Fyri at koma uttan um skerjandi fyrimæli við afturvirkandi gildi verður skotið upp, at serstakar skiftisreglur viðvíkjandi frádráttarhámarkinum verða at galda fyri kapitaleftirlønarskipanir, sum eru gjørdar í tíðarskeiðinum 25. mai til 31. december 1985.

1. viðgerð 4. apríl. Málið beint í skattanevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið var framlagt av landsstýrinum 2. mars 1986 og við 1. viðgerð 4. apríl beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Heini O. Heinesen, Hilmar Kass) tekur undir við uppskoti landsstýrisins.

Minnilutin (Pauli Ellefsen úr Sambandsflokkinum og Jógvan Sundstein úr Fólkaflokkinum) tekur ikki undir við uppskoti landsstýrisins, sum forðar fyri einari rímiligari privatari uppsparing í okkara samfelag.

Uppskot landsstýrisins forðar eisini fyri, at ein stórur partur av okkara fólki fær møguleikar fyri at ogna sær eina kapitaleftirlønartrygging, sum fær nakran veruligan týdning, tá brúk er fyri henni.

Minnilutin skjýtur tí upp, at uppskot landsstýrisins verður broytt soleiðis, at upphæddin »kr. 25.000« verður broytt til »20%, tó í mesta lagi kr. 50.000« og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

| | |
|---|---|
| Í § 1 verða orðini »kr. 25.000« broytt til: »20%, tó í mesta lagi kr. 50.000.« | I § 1 ændres ordene »kr. 25.000« til: »20%, dog højst kr. 50.000.« |

2. viðgerð 10. apríl 1986. § 1 í uppskoti landsstýrisins varð samtykt við 18-0, § 2 við 18-3. Broytingaruppskot minnilutans fall við 13-0. At málið skuldi fara soleiðis samtykt til 3. viðgerð varð samtykt við 18-0 atkvøðum.

3. viðgerð 11. apríl. Uppskot landsstýrisins samtykt við 18-0 atkvøðum.

Lóg nr. 51 frá 14. mai 1986.

# 88. Løgtingslóg um landsjørð

Ár 1986, fríggjadagin 21. mars legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

| | |
|---|---|
| **løgtingslóg um landsjørð.** | **lagtingslov om landsjord.** |
| § 1. Endamálið við hesi lóg er, at | § 1. Formålet med denne lov er |

tað fyrisitingarliga gerast møguleikar fyri at menna framleiðsluna av landsjørðini. Lógin miðar ímóti at fáa landsjørðina í hóskandi brúkseindir, ið kunnu geva eina rímiliga úrtøku.

at skabe mulighed for administrativt at stimulere landsjordens produktion. Loven tilsigter en sammenlægning af landsjorden i passende brugsenheder, der vil være i stand til at afgive et rimeligt udbytte.

## 1. bólkur
## Jarðarráð og álitismenn.

## 1. afsnit
## Landbrugsråd og tillidsmænd.

**§ 2.** Jarðarráðið hevur tey størv um hendur, sum verða áløgd ti sambært lóg ella eftir avgerð landsstýrisins.

**2. stk.** Landsstýrið kann fyriskipa reglugerð fyri Jarðarráðið.

**§ 2.** Landbrugsrådet forvalter de sagsområder, som pålægges det ved lov eller landsstyrebeslutning.

**Stk. 2.** Landsstyret kan foreskrive reglement for landbrugsrådet.

**§ 3.** Í Jarðarráðnum eru 3 limir, sum verða valdir av landsstýrinum.

**2. stk.** Starvstíðin er 4 ár.

**3. stk.** Fyri hvønn lim verður tiltakslimur valdur eftir reglunum í 1. stk.

**4. stk.** Landsstýrið velur formann ráðsins.

**§ 3.** Landbrugsrådet har 3 medlemmer, der vælges af landsstyret.

**Stk. 2.** Funktionsperioden er 4 år.

**Stk. 3.** For hvert medlem vælges der suppleant efter reglerne i 1. stk.

**Stk. 4.** Landsstyret vælger rådsformanden.

**§ 4.** Limir ráðsins eru inhabilir til at luttaka í málsviðgerðum eftir somu reglum sum sorinskrivarin.

**§ 4.** Rådsmedlemmerne er inhabile for så vidt angår deltagelse i sagsbehandling efter de samme regler, som er gældende for sorenskriveren.

**2. stk.** Avgerðir ráðsins skulu vera skrivliga grundaðar.

**3. stk.** Eingin avgerð kann samtykkjast í Jarðarráðnum, eru ikki 2 atkvøður fyri henni.

**Stk. 2.** Rådets afgørelser skal være skriftligt begrundet.

**Stk. 3.** Ingen afgørelse kan vedtages i landbrugsrådet, uden at den opnår 2 stemmer.

**§ 5.** Jarðarráðið er heimilað at

**§ 5.** Landbrugsrådet har hjem-

seta so nógvar álitismenn um landið, sum tørvur er á.

**2. stk.** Álitismenninir ganga Jarðarráðnum til handa við metingum og tílíkum, og í málum, ið krevja serkunnleika til viðurskiftini á plássinum. Avgerðarrætt hava teir ongan.

**3. stk.** Eftir somu reglum kann ráðið taka sær serkøna hjálp.

mel til at antage det antal tillidsmænd over hele landet, som der er behov for.

**Stk. 2.** Tillidsmændene skal assistere landbrugsrådet med vurderinger o.lign., og i sager, der kræver særlig kundskab til forholdene på stedet. De har ingen beslutningsmyndighed.

**Stk. 3.** Efter samme regler kan rådet antage hjælp med specialkundskab.

**§ 6.** Samsýning til limir og starvsfólk Jarðarráðsins ásetir landsstýrið, og verður hann goldin úr Jarðargrunninum. Jarðargrunnurin rindar útreiðslur til skrivstovuhald ráðsins eftir fyriskipan landsstýrisins.

**§ 6.** Vederlaget til landbrugsrådets medlemmer og personale fastsættes af landsstyret og afholdes af jordfonden. Jordfonden afholder udgifterne til rådets kontorhold efter landsstyrets bestemmelse.

## 2. bólkur
## Jørð hjá tí almenna.

## 2. afsnit
## Offentlig jord.

**§ 7.** Eftir niðanfyri nevndu reglum fyrisitir Jarðarráðið alla almenna jørð, ið ikki verður fyrisitin av øðrum almennum stovni, herundir kommununum.

**2. stk.** Har sum annað ikki er ásett, kunnu avgerðir Jarðarráðsins leggjast fyri landsstýrið, tó ikki um festiskifti og leigu av traðum. Slík kærumál skulu vera framkomin til landsstýrið í seinasta lagi vikudagin 6 vikur aftan á, at avgerð ráðsins er kunngjørd viuðkomandi, ella er send honum á posthúsið, og seinni komin fram til móttakaran.

**3. stk.** Jarðarráðið skal í avgerðum skila til, hvønn myndugleika kærast kann til.

**§ 7.** Efter nedenfor nævnte regler forvalter landbrugsrådet al offentlig jord, der ikke forvaltes af anden offentlig institution, herunder kommuner.

**Stk. 2.** Hvor andet ikke er fastsat, kan landbrugsrådets beslutninger forelægges landsstyret, dog ikke når det drejer sig om fæsteskifte og leje af trøer. Sådanne klager skal være indkommet til landsstyret senest ugedagen 6 uger efter at rådets afgørelse er gjort vedkommende bekendt, eller sendt ham i posten og senere kommet modtageren i hænde.

**Stk. 3.** Landbrugsrådet skal i dets afgørelser angive, til hvilke myndigheder der kan ankes.

## 3. bólkur
## Jørð í festi.

**§ 8.** Jarðarráðið hevur rætt til at lata almenna jørð í festi.
**2. stk.** Festið stendur við, so leingi festarin er á lívi, tó bert til hann hevur fylt 70 ár.
**3. stk.** Jørð kann latast í festi eitt avmarkað styttri áramál.
**4. stk.** Festitreytirnar verða ásettar í einum festibrævi og skulu fremja endamálið við hesi lóg. Festibrøvini, sum altíð gjølla skulu skila til, hvat festinum tilhoyrir, verða prentað á oyðubløð, sum landsstýrið skal góðkenna.

**§ 9.** Festarin rindar øll gjøld, sum hvíla á festinum, og rindar jarðargrunninum festileigu.
**2. stk.** Landsstýrið skipar í kunngerð fyri, hvussu leigan verður ásett.

**§ 10.** Verður festið leyst, skal Jarðarráðið taka avgerð um, hvørt tað kann verða uppihildið sum sjálvstøðugt festi ella verða lagt saman við øðrum festi.
**2. stk.** Skal festið halda fram sum sjálvstøðugt brúk, hava hjúnaðarfelagi og livsarvingar seinasta festara, um teir hava eitt minstamark av jarðarbrúkskunnleika, sum landsstýrið ásetir í kunngerð, framihjárætt til at taka við festinum í hesi raðfylgju:
1. Eftirsitandi hjúnafelagi,
2. elsta barn ella eftirkomari tess,

## 3. afsnit
## Bortfæstning af jord.

**§ 8.** Landbrugsrådet er berettiget til at bortfæste offentlig jord.
**Stk. 2.** Fæsteforholdet vedvarer, så længe fæsteren lever, dog kun til han er fyldt 70 år.
**Stk. 3.** Jord kan bortfæstes for et begrænset kortere tidsrum.
**Stk. 4.** Fæstevilkårene fastsættes i et fæstebrev og skal fremme formålet med denne lov. Fæstebrevene, der altid nøje skal angive hvad der hører til fæstet, bliver trykt i form af blanketter, der skal godkendes af landsstyret.

**§ 9.** Fæsteren afholder alle afgifter, der påhviler fæstet, og indbetaler fæstelejen til jordfonden.
**Stk. 2.** Landsstyret fastsætter i kundgørelse, hvordan lejen fastsættes.

**§ 10.** Bliver fæstet ledigt, skal landbrugsrådet træffe bestemmelse om, hvorvidt det kan opretholdes som særskilt fæste eller sammenlægges med et andet fæste.
**Stk. 2.** Skal fæstet fortsætte som selvstændigt brug, har den sidste fæsters ægtefælle og livsarvinger, hvis de besidder et mindstemål af landbrugskyndighed, der fastsættes af landsstyret i kundgørelse, forhåndsret til fæstet i denne rækkefølge:
1. Efterlevende ægtefælle,
2. ældste barn eller dets efterkommer,

3. yngri barn ella eftirkomari tess.

**3. stk.** Hava fleiri framíhjárætt til festið, tekur Jarðarráðið avgerð um, hvør skal hava fyrsta framíhjárætt.

**4. stk.** Situr tann, sum hevur framíhjárætt sambært hesi grein longu við landsjørð, missir hann framíhjárættin soleiðis at skilja, at Jarðarráðið kann treyta nýtsluna av framíhjárættinum av, at hann sigur frá sær brúkið, hann hevur frammanundan.

**5. stk.** Jarðarráðnum er heimilað at siggja burtur frá framíhjárættinum, tá persónur, sum hevur framíhjárætt, ikki fyri ráðnum førir prógv fyri, at hann sum høvuðsvinnu ætlar at fáast við jarðarbrúk.

**6. stk.** Umsøkjari, sum er ónøgdur við avgerð tikna við heimild í hesi grein, kann krevja málið lagt fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti til yvirlandbúnaðarstevnu. Kærufreistin er 6 vikur frá tí degi, Jarðarráðið hevur tikið avgerð.

3. yngre barn eller dets efterkommer.

**Stk. 3.** Har flere forhåndsret til fæstet, tager landbrugsrådet bestemmelse om, hvem der skal have første forhåndsret.

**Stk. 4.** Besidder den, der har forhåndsret i henhold til denne paragraf, allerede landsjord, fortaber vedkommende forhåndsretten således at forstå, at landbrugsrådet kan betinge afbenyttelsen af forhåndsretten af, at vedkommende frasiger sig det brug, han besidder i forvejen.

**Stk. 5.** Landbrugsrådet er bemyndiget til at se bort fra forhåndsretten, om en person ikke overfor landbrugsrådet kan føre bevis for, at han har i sinde at have landbrug som hovedbeskæftigelse.

**Stk. 6.** En ansøger, der er utilfreds med en beslutning taget med hjemmel i denne paragraf, kan kræve sagen forelagt en landbokommission med kæreret til overlandskommissionen. Appelfristen er 6 uger fra den dag, landbrugsrådet har truffet afgørelse.

**§ 11.** Sundurbýti av festijørð til fleiri brúk kann bert fara fram sum undantak, tá festið verður leyst og bert eftir avgerð Jarðarráðsins. Tað gerst ikki, uttan so at ráðið ætlar um, at tey nýggju festini kunnu røkjast sum sjálvstøðug festi ella so, at tað frábýtta verður lagt aftrat einum festi, ið frammanundan er ov lítið at verða røkt sum sjálvstøðugt festi.

**2. stk.** Verður sundurbýti framt

§ 11. Opdeling af fæstejord i flere brug kan kun forekomme undtagelsesvis, når et fæste bliver ledigt og kun efter landbrugsrådets bestemmelse. Det kan ikke ydes uden at rådet antager, at de nye fæster kan drives som selvstændige fæster eller således, at den fradelte jord tillægges et fæste, der i forvejen er for lille til at blive drevet som selvstændigt fæste.

**Stk. 2.** Finder opdeling sted ved

við festiskifti, hevur tann, ið hevur framíhjárætt sambært § 10, rætt til at velja, hvat av teimum nýggju festunum, hann tekur.

**§ 12.** Tann, ið hevur landsjørð í festi, skal hava bústað sín, har festið er. Jarðarráðið kann í serstøkum førum við góðkenning landsstýrisins loyva undantaki frá hesum. Festið skal røkjast sum eitt væl umsitið jarðarbrúk. Eftir skráseting av hvørjum festi verður framleiðsluskyldan hjá hvørjum festi sær ásett. Landsstýrið ásetir í kunngerð nærri reglur um framleiðsluskylduna og tey tiltøk, ið neyðug eru, fyri at bóndar kunnu lúka sína skyldu.

**2. stk.** Jarðarráðið hevur eftirlit við, um framleiðsluskyldan verður hildin.

**3. stk.** Noktar festarin eftirlitinum upplýsingar sambært § 12, 2. stk., kann jarðarráðið uppsiga festimálið.

**4. stk.** Verða treytirnar viðvíkjandi bústaði, framleiðsluskyldu, festileigu og innstøðu ikki hildnar, ella kríatúr ella bygningar verða misrøkt, ella festarin ikki heldur sínar lániskyldur til jarðargrunnin, skal Jarðarráðið taka støðu festarans til viðgerðar og áleggja honum at fáa vðurskiftini í rættlag. Verður áheitanin ikki fylgd, hevur Jarðarráðið rætt til at siga festimálið upp, hóast ásetanina í § 8, 2. stk. og 3. stk.

fæsteskifte, har den, der har forhåndsret i henhold til § 10, ret til at udvælge sig, hvilket af de nye fæster, han måtte ønske.

**§ 12.** Den, der har landsjord i fæste, skal have fast bopæl, hvor fæstet er beliggende. Landbrugsrådet kan i særlige tilfælde efter landsstyrets godkendelse tillade undtagelse herfra. Fæstet skal drives som et velholdt landbrug. Ved registrering af hvert fæste bliver hvert fæstes produktionspligt fastsat for sig. Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse de nærmere bestemmelser om produktionspligten og de foranstaltninger, der er nødvendige, for at bønder kan opfylde deres forpligtelse.

**Stk. 2.** Landbrugsrådet fører tilsyn med, hvorvidt produktionspligten bliver overholdt.

**Stk. 3.** Hvis fæsteren nægter at give tilsynet oplysninger i henhold til § 12, stk. 2, kan landbrugsrådet opsige fæstemålet.

**Stk. 4.** Bliver betingelserne vedrørende bopæl, produktionspligt, fæsteleje og besætning ikke overholdt, eller kreaturer eller bygninger forsømmes, eller fæsteren ikke overholder sine låneforpligtelser overfor jordfonden, skal landbrugsrådet tage fæsterens forhold til behandling og pålægge ham at få forholdet brugt i orden. Bliver henstillingen ikke fulgt, er landbrugsrådet bemyndiget til at opsige fæstemålet uanset bestemmelsen i § 8, stk. 2 og stk. 3.

**5. stk.** Avgerðir Jarðarráðsins um uppsøgn sambært 3. stk. og 4. stk. kunnu skjótast inn fyri rættin.

**6. stk.** Festarin hevur rætt til at nýta festið við lunnindum, ið hoyra tí til á ein slíkan hátt, sum samsvarar 1. stk. Hann hevur veiðirættindi av festinum, rætt til at fiska í áum og vøtnum. Hann hevur torvskurðar- og kolanámsrætt til egna nýtslu. Meðan hann situr við festinum, hevur hann rætt til at leiga øðrum veiðurættindi, herundir fuglabjørg og urðar, og fiksirættindi, tó í mesta lagi fyri 5 ár í senn. Hann hevur eisini rætt til at selja grót, eyr, sand og tara o.t. við loyvi Jarðarráðsins. Ráðið ásetir eisini sølutreytirnar.

**§ 13.** Fráfarandi festari hevur rætt til endurgjald eftir nærri reglum, sum landsstýrið ásetir við kunngerð, frá nýggja festaranum, eftir meting fyri egnar íløgur, sum gjørdar eru á festinum, og sum jarðarráðið hevur góðkent framman-anundan, at farið varð í gongd.
**2. stk.** Við festiskifti letur Jarðarráðið brúkið kanna og meta, og tekur støðu til, um grundarlag er fyri endurgjaldskravi móti seinasta festara.

**§ 14.** Festari, sum ikki rættstundis svarar Jarðargrunninum tey gjøld, sum henda lóg áleggur, kann pantast.

**Stk. 5.** Landbrugsrådets beslutninger vedrørende opsigelse i henhold til stk. 3 og stk. 4 kan appelleres til domstolene.
**Stk. 6.** Fæsteren er berettiget til at gøre brug af fæstet med tilhørende rettigheder, således at det er i overensstemmelse med stk. 1. Han besidder fæstede jagtrettigheder og har fiskerettighederne til elve og indsøer. Han sidder inde med retten til tørveskær og kulbrydning til eget forbrug. Medens han besidder fæstet, har han ret til at udleje jagtrettighederne til anden side, herunder fuglefjelde og urer, og fiskerettigheder, dog højst for 5 år ad gangen. Han har også ret til at sælge sten, grus, sand, tang o.lign. med landbrugsrådets tilladelse. Rådet fastsætter også salgsbetingelserne.

**§ 13.** En afgående fæster er berettiget til erstatning efter nærmere regler, som landsstyret fastsætter ved kundgørelse, fra den nye fæster, efter vurdering for egne investeringer, der er tilført fæstet, og som landbrugsrådet har godkendt, inden de blev foretaget.
**Stk. 2.** Ved fæsteskifte foretager landbrugsrådet en undersøgelse og vurdering af bruget, og tager stilling til, hvorvidt der foreligger grundlag for erstatningskrav mod den sidste fæster.

**§ 14.** En fæster, der ikke rettidigt udreder de afgifter til jordfonden, som fastsættes ved denne lov, kan udpantes.

## 4. bólkur
## Leiga av landsjørð.

**§ 15.** Jarðarráðið hevur rætt til at leiga út traðir og traðarstykki, stykki til urtagarðsbrúk, grundstykki til húsabygging, ídnaðarendamál og tílíkt í eitt ávíst áramál.

**2. stk.** Áðrenn jørð verður útleigað burtur av einum festigarði ella leigutrøð, eigur festarin ella traðarmaður at verða eftirspurdur; sýtir hann fyri at ganga við til leigumálið, kann hann krevja málið lagt fyri landbúnaðarstevnu við kærurætti til yvirlandsbúnaðarstevnu.

**3. stk.** Verður jørð útleigað sambært 1. stk., skal ráðið fyrst ætla um, hvørt leigan av lendinum skaðar festið. Ráðið skal ansa eftir, at jørð ikki verður innløgd av haganum, so leingi innløgd jørð er, ið ikki verður nýtt, sum hon eigur at vera.

**4. stk.** Tá ið lendi verður leigað út sambært stk. 1, ásetir Jarðarráðið treytir, sum fremja endamálið við hesi lóg. Skrivligur leigusáttmáli verður gjørdur, har treytirnar fyri leigu eru tilskilaðar.

**5. stk.** Leigusáttmáli sambært stk. 1 fellur burtur ella kann sigast upp, tá ið

1. leigari doyr,
2. felag stendur sum leigari, og felagið verður avtikið ella verður óvirkið,
3. leigarin ikki fylgir teimum

## 4. afsnit
## Leje af landsjord.

**§ 15.** Landbrugsrådet er berettiget til at udleje trøer og trøstykker, lodder til havebrug, byggegrunde til husbyggeri, industriformål o.lign. for et bestemt åremål.

**Stk. 2.** Inden jord bliver fralejet en fæstegård eller lejetrø, skal fæsteren eller trøbesidderen adspørges. Nægter han at gå med til lejemålet, kan han kræve sagen forelagt en landbokommission med kæreret til overlandbokommissionen.

**Stk. 3.** Bliver jord udlejet i henhold til stk. 1, skal rådet først vurdere, om udlejningen af arealet vil forvolde fæstet skade. Rådet skal påse, at jord ikke bliver optaget af udmarken, så længe der findes optaget jord, der ikke bliver anvendt, som den skal.

**Stk. 4.** Når et areal bliver udlejet i henhold til stk. 1, fastsætter landbrugsrådet betingelserne således, at de fremmer formålet med denne lov. Skriftlig lejekontrakt bliver oprettet, hvor lejevilkårene anføres.

**Stk. 5.** En lejekontrakt i henhold til stk. 1 bortfalder eller kan opsiges, når

1. lejeren dør,
2. et selskab står som lejer, og selskabet opløses eller bliver uvirksomt,
3. lejeren ikke overholder de i

treytum, sum ásettar eru í sáttmálanum ella lóggávuni annars.

**§ 16.** Hvørja ferð eitt leigumál er at enda komið, letur Jarðarráðið leigumálið kanna og meta, og tekur støðu til um grundarlag er fyri endurgjaldskravi móti seinasta leigara.

**§ 17.** Leigari, sum ikki rættstundis svarar jarðargrunninum tey gjøldm sum henda lóg áleggur, kann pantast.

kontrakten og lovgivningen iøvrigt fastsatte betingelser.

**§ 16.** Hver gang et lejemål er udløbet, foretager landbrugsrådet en undersøgelse og vurdering af lejemålet, og tager stilling til, hvorvidt der foreligger grundlag for erstatningskrav mod den sidste lejer.

**§ 17.** En lejer, der ikke rettidigt udreder de afgifter til jordfonden, som denne lov fastsætter, kan udpantes.

### 5. bólkur
### Søla av landsjørð og keyp av ognarjørð.

**§ 18.** Jarðarráðið hevur rætt til at selja burtur av almennari jørð til almenn endamál, grundstykki til búsabygging, ídnaðarendamál o.t.
**2. stk.** Verða øki seld til slík endamál, sum nevnd eru í 1. stk., skal ráðið ansa eftir at selja ódyrkaða jørð fram um dyrkaða, og jørð, sum er óvanda dyrkilendi fram um gott lendi. Somuleiðis skal ráðið ansa eftir, at ikki verða seld øki, ið liggja solciðis fyri, at sølan skaðar ella minkar um virðið á grannajarðarbrúki meira enn neyðugt er.

**3. stk.** Fyri jørð, sum seld verður sambært hesi grein, verður at gjalda í hondina. Bert í undantaksføri kann ráðið bjóða borg, og tá bert móti l. veðrætti í ti selda ella móti aðrari fullgóðari trygd.

### 5. afsnit
### Salg af landsjord og køb af odelsjord.

**§ 18.** Landbrugsrådet er berettiget til at frasælge offentlig jord til offentlige formål, byggegrunde til husbyggeri, industriformål o.lign.
**Stk. 2.** Bliver arealer solgt til sådanne formål, som nævnt i stk. 1, skal rådet påse at sælge udyrket jord frem for dyrket, og jord, som er dårligt egnet for opdyrkning frem for opdyrkelig jord, Ligeledes skal rådet påse, at der ikke bliver solgt arealer, der har sådan beliggenhed, at salget vil skade eller formindske nabolandbrugets værdi mere end nødvendigt.
**Stk. 3.** Jord, der bliver solgt i henhold til denne paragraf, skal betales kontant. Kun i undtagelsestilfælde kan rådet tilbyde kredit, og da kun mod 1. prioritet i det solgte eller mod anden fuldgod sikkerhed.

**4. stk.** § 15, 2. stk. er eisini galdandi sølum viðvíkjandi.
**5. stk.** Saman við keypsprísinum verður møgulig avloysing fyri vetrarbit goldin.

**§ 19.** Selur Jarðarráðið til byggigrundir ella tílíkt burtur av dyrkaðari jørð, sum persónur hevur leigað, kann viðkomandi fáa endurgjald fyri uppdyrking, sum er gjørd í leigutíðini.

**§ 20.** Liggur ognarjørð, sum ikki verður røkt av eigaranum, og er innangarðsjørðin gott dyrkilendi, hevur Jarðarráðið rætt til, tá tað ætlar um, at tørvur er á dyrkilendi har í bygdini, at taka upp tingingar við avvarðandi eigara um at fáa jørðina til keyps.

**2. stk.** Fæst slíkt keyp í lag, og verður tað góðtikið av landsstýrinum, skal Jarðarráðið útleiga ella festa jørðina sambært ásetanunum í hesi lóg.

## 6. bólkur
## Nær lógin kemur í gildi.

**§ 21.** Henda lóg kemur í gildi tá tað í kunngerð verður ásett av landsstýrinum.
**2. stk.** Samstundis fer úr gildi § 1 til og við § 7 og § 10 til og við § 27 í »Lov om Færøerne nr. 174 fra 24. maj 1937 om jordbrugets fremme«.

**Stk. 4.** § 15, stk. 2 gælder også for salg.
**Stk. 5.** Sammen med købssummen bliver eventuel afløsning for vintergræsning betalt.

**§ 19.** Frasælger landbrugsrådet arealer til byggegrunde o.lign. af opdyrket jord, som en person har i leje, kan vedkommende få erstatning for opdyrkning, som er foretaget i lejetiden.

**§ 20.** Forefindes odelsjord, der ikke bliver røgtet af ejeren, og er hjemmemarken letopdyrkelig jord, er landbrugsrådet berettiget til, når det mener, at der er mangel på opdyrkelig jord i den pågældende bygd, at optage forhandlinger med vedkommende ejer om at få jorden til købs.
**Stk. 2.** Kommer sådant køb i stand, og det bliver godkendt af landsstyret, skal landbrugsrådet udleje eller bortfæste jorden i henhold til bestemmelserne i denne lov.

## 6. afsnit
## Lovens ikrafttræden.

**§ 21.** Denne lov træder i kraft, når det fastsættes af landsstyret med kundgørelse.
**Stk. 2.** Samtidig ophæves § 1 til og med § 7 og § 10 til og med § 27 i »Lov for Færøerne nr. 174 af 24. maj 1937 om jordbrugets fremme« ud af kraft.

**Viðmerkingar:**

Við at áleggja framleiðsluskyldu og gera tað møguligt at fáa annan festara í staðin, um hon ikki verður hildin, skuldu møguleikarnir hjá fyrisitingini at fáa festarar við yrkisligum fortreytum og hegni at røkja jarðarbrúk verið munandi betri enn eftir galdandi lóg.

Tað, at leigumál til traðir eisini er treytað av, at tær verða nýttar til ávís endamál, sum er ásett í leigusáttmálanum, ger eisini møguleikarnar munandi betri at fáa betri skil á tær nógvu órøktu leigutraðirnar.

Við hóskandi brúksstødd er her, í flestum førum, hugsað um brúk, ið við góðari røkt kunnu geva einum húski rímiliga ársinntøku.

Hetta hevur við sær munandi samanlegging av smærri festum.

Á smáplássum, serliga í útoyggjum, verður mett, at tað ikki eigur at verða samanlagt í eins stóran mun, soleiðis at hon stuðlar burturflytingina, men eigur á annan hátt at verða stuðlað undir vinnu, sum kann verða ískoyti til jarðarbrúkið.

Støða er ikki tikin til, hvat ið hóskandi brúk er, og ei heldur til, hvat ið er rímilig inntøka.

Hetta eigur at verða gjørt í samráð við vinnuna (yrkisfeløgini).

Annars eru hesar viðmerkingar til tær einstøku greinirnar:

**Til § 2:** Greinin kemur í staðin fyri § 11 í galdanmdi lóg.

**Til § 3:** Greinin kemur í staðin fyri § 4 í galdandi lóg.

Eftir § 4 í galdandi lóg sita 2 limir valdir av Føroya Landsstýri og ein av Føroya Búnaðarfelag. Mett verður, at eingin grund er til at lógfesta landbúnaðarráðgevaranum nakran atgongurætt til fundir Føroya Jarðarráðs.

**Til § 4:** Greinin kemur í staðin fyri § 7 í galdandi lóg, og ger onga veruliga broyting í rættarstøðuni. Grundgevingin sambært stk. 2 skal vera nágreinilig. Tað er t.d. ikki nóg mikið at upplýsa, at avgerðin er grundað á upplýsingar, sum komnar eru fram undir málinum, ella at vísa til lógarheimild.

**Til § 5:** Greinin er samsvarandi § 5, stk. 5 í galdandi lóg.

**Til § 6:** Greinin er samsvarandi § 8 í galdandi lóg.

**Til § 7:** Greinin kemur í staðin fyri § 10 í galdandi lóg.

Stk. 4 er nýtt, og er í samljóði við nýggjari fyrisitingarligum grundreglum.

**Til § 8:** Greinin kemur í staðin fyri § 15 í galdandi lóg.

**Til § 8, 2. stk.:** Mett verður rímiligt, at aldursmarkið verður tað sama sum fyri fólk í almennum starvi.

Tá tað verður hildið rímiligt at gera undantak, kann tað gerast sum áramálsfesti sambært 3. stk.

**Til § 8, 3. stk.:** Áramálsfesti eigur bert at fara fram tá ið:

1) møguleikar eru fyri samanlegging, sundurbýti ella umlegging av festum innan fyri nøkur fá ár,
2) roknast kann við, at jørðin um stutta tið skal nýtast til annað alment endamál,

3) tá útbýgvin festari (m.a. barn) væntast at verða tøkur um stutta tíð.
**Til § 9:** Greinin kemur í staðin fyri § 17 í galdandi lóg.
**Til § 9, 2. stk.:** Miðað eigur at verða ímóti, við áseting av leigugjaldinum, at tað ikki tyngir raksturin, um so er, at framleiðsluskylda, ið nevnd er í 12. grein, 1. stk., verður hildin.
**Til § 10:** Greinin kemur í staðin fyri § 19 í galdandi lóg.
**Til § 10, 1. stk.:** Fyri at hava møguleika fyri at fáa landsjørðina í hóskandi brúkseindir er neyðugt at avmarka galdandi festirættindi hjá lívsarvingum, soleiðis at samanlegging av festum kann fara fram hvørja ferð festir verða leys, uttan mun til lívsarvingar eru til ella ikki.
**Til § 10, 2. stk.:** Høvuðstreytin fyri at fáa festi er, at komandi festari lýkur yrkisligar fortreytir, Lýkur eftirsitandi hjúnafelagi ella lívsarvingur hesar treytir, verður mett rímiligt, at hann hevur forrætt fram um onnur, ið eisini lúka treytirnar.

Mett verður, at tað er rættari at landsstýrið ásetir hesar treytir í kunngerð, enn at tær verða ásettar av sjálvari fyrisitingini/Jarðarráðnum.

Av tí at festini sambært hesum uppskoti eru persónlig verður tað mett neyðugt, at hjúnafelagi hevur fyrsta rætt at taka við festinum, um hann/hon lýkur yrkisligu fortreytirnar, um so er, at festarin fellur frá.

Framíhjárætturin til festið, er í tann mun hesin er ásettur í nýggja lógaruppskotinum, broyttur í mun til fyrr galdandi lóggávu, soleiðis at tað elsta barnið, uttan mun til, um tað er drongur ella genta, ella um tað er føtt uttanfyri ella innanfyri hjúnalag hevur rættin. Sambært altjóða sáttmála, sum Danmark arbeiðir fyri at góðkenna, er ikki loyvt at gera mun á kvinnum og monnum, og sostatt ber ikki til, uttan at koma í stríð við fólkarætt, at gera arvafylgjuna soleiðis, at maður gongur framum kvinnu.
**Til § 10, 3. stk.:** Her verður serliga sipað til, tá festi skulu leggjast saman, og tað tá til bæðio (øll) festini eru lívsarvingar, ið lúka tær yrkisligu fortreytirnar.
**Til § 10, 4. stk.:** Er fyri so vítt endurtøka av § 18, 3. stk. í galdandi lóg.
**Til § 10, 5. stk.:** Endamálið við lógini er sum nevnt at fáa almennu jørðina í hóskandi brúkseindir, sum eitt húski kann fáa eina rímiliga ársinntøku av. Mett verður, at persónur, ið hevur aðra høvuðsvinnu enn landbúnað, ikki eisini skal hava framíhjárætt til eitt festi.
**Til § 11:** Greinin kemur í staðin fyri § 20 í galdandi lóg.
**Til § 11, 1. stk.:** Mett verður, at tað ikki kemur ofta fyri, at garðar eru nóg stórir til beinleiðis at verða sundurbýttir, men at tað oftari verður tørvur á regulering, bæði tá talan er um at fáa eitt festi í hóskandi støddd, og tá einum festi tørvar t.d. dyrkilendi.
**Til § 12:** Greinin broytir partvíst § 16 í galdandi lóg.
**Til § 12, 1. stk.:** Undantaksmøguleikin ætlast nýttur, har grannabygdir

liggja soleiðis, at einki er til hindurs fyri at røkja festið, um so er, at festi og bústaður eru hvørt í síni bygd.

**Til § 12, 3. og 4. stk.:** Tá festari ikki lýkur ásettar treytir fyri at hava fingið festið ella misrøkir tað, skal fyrisitingin (Jarðarráðið) hava betri møguleikar at gera nakað við viðurskiftini — møguliga taka festið aftur — enn tað hevur eftir galdandi lóg, sum krevur, at sakarmál verður reist frá Jarðarráðsins síðu.

**Til 5. stk.:** Mál um uppsøgn av festara verða hildin at vera so álvarslig, at møguleiki eigur at verða fyri, at dómstólarnir taka støðu til málið.

**Til § 12, 6. stk.:** Søla av m.a. gróti, eyri og sandi er at skilja sum leyst tilfar. Verður talan um meira umfatandi sølur, sum t.d. grót frá broti ella grevstur eftir sandi, er tað Jarðarráðið, sum stendur fyri søluni, móti at innkomni peningurin verður settur á avvarðandi festikonto við vanligum treytum.

**Til § 13:** Greinin er nýggj. Tiltøk, sum eru góðkend av Jarðarráðnum, verða virðismett, tá tey eru liðug.

Tað virðið, sum er omanfyri fígging fyri jarðarbrúkslán og studning, verður roknað sum eginíløga.

**Til 1. stk.:** Skyldan at lata fráfarandi festara hald fellur burtur.

Við festiskifti verða virðini gjørd upp.

Endurgjaldkrav verður at seta um:

a) innistøðan ikki er til,
b) bygningar eru verri farnir enn av vanligum brúki, og
c) bøur og/ella hagi eru í verri standi, enn tá tikið varð við festinum.

**Til § 15, 1. stk.:** Sambært uppskotinum verður bert møguligt at leiga búnaðarjørð (traðir).

Leigumálini av jørð skulu vera upp á áramál og persónlig ella til fyritøkur (sambært § 16, 5. stk. nr. 1 og § 15, 5. stk. nr. 2)

**Til § 15, 4. stk.:** Leigumál av traðum verður bert gjørt, um leigarin kann vísa á framleiðsluætlanir, sum Jarðarráðið kann góðkenna. Heldur nýtslan av trøðni, sambært teimum góðkendu ætlanunum, av eini hvørjari orsøk uppat, er leigumálið burturfallið, sjálvt um áramálið sambært sáttmálanum ikki er úti (sambært § 15, 5. stk. nr. 3).

**Til § 18:** Sambært uppskotinum verður eingin møguleiki at keypa jørð til jarðarbrúk (traðir).

**Til § 18, 3. stk.:** Søla upp á borg kann koma fyri, tá kommunur keypa størri lendi til byggigrundir. Lánini skulu ganga í mesta lagi í 5 ár, ella til lendið er tikið í brúk sambært endamálinum við keypinum.

**Til § 18, 5. stk.:** Gjaldið fyri vetrarbit verður til eina og hvørja tíð ásett av Føroya Jarðarráð.

**Til § 19:** Endurgjald eigur at verða latið, tá selt verður av dyrkaðum lendi, sum er í nýtslu sum dyrkað lendi.

**Til § 20:** Endamálið við at keypa ognarjørð er, at hon kann leggjast saman við festi og solciðis gera brúkið meira hóskandi til støddar.
**Til § 21:** Lógin verður sett í gildi við kunngerð frá landsstýrinum. Lógin verður sett í gildi, tá tær í lógini nevndu kunngerðir og skrásetingar eru gjørdar.

1. viðgerð 4. apríl. Skotið varð upp at velja serliga 6-manna nevnd, hetta fall við 7-0 atkvøðum. Málið varð beint í búnaðarnevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 2. mars 1986 og við 1. viðgerð 4. apríl beint í landbúnaðarnevndina.

Nevndin hevur havt fund um málið og ásannar, at tað er so umfatandi, at tíð verður ikki til í hesi tingsetuni at viðgera tað nóg gjølla og m.a. fáa ummæli frá feløgum og stovnum, sum lógaruppskotið viðvíkir.

Tí verður neyðugt, um nevndin skal halda fram við viðgerðini, at gera hana til millumtinganevnd, og setir nevndin tí fram soljóðandi

## Uppskot

## til

## samtyktar

Landbúnaðarnevnd Løgtingsins verður millumtinganevnd til viðgerðar av løgtingsmáli nr. 88/1985: Løgtingslóg um landsjørð.

2. viðgerð 11. apríl. Uppskot til samtyktar frá búnaðarnevndini um, at nevndin verður gjørd til millumtinganevnd hesum máli viðvíkjandi varð samtykt við 24-0 atkvøðum.

F.L. J.nr. 1700-9.

# 89. Søla av parti av landssjúkrahúsins føstu ogn

Ár 1986, hósdagin 3. apríl legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

# Uppskot

## til

## løgtingslóg um sølu av einum parti av fastogn landssjúkrahúsins.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað at loyva sølu av matr. nr. 1040[u] og 915[f], 884[æ], 910[t], 1013[h], 889[at], 893[s], Tórshavn.

§ 2. Løgtingslógin kemur í gildi, tá hon verður kunngjørd.

## lagtingslov om salg af en del af landssygehusets faste ejendom.

§ 1. Landsstyret bemyndiges at tillade salg af matr. nr. 1040[u] og 915[f], 884[æ], 910[t], 1013[h], 889[at], 893[s], Tórshavn.

§ 2. Lagtingsloven træder i kraft ved dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

Landsstýrið hevur á fundi 22. december 1983 havt til viðgerðar spurning um bygging av íbúðum til hjálparlæknarnar á Landssjúkrahúsinum.

Talan er um ognirnar Bóndabrekka 13, Norðgsvegur 1, Grønalíð 2, Íslandsvegur 15, Háskúlavegur 5, J. Nolsøesgøta 9, Grønlandsvegur 63 og Grønlandsvegur 65.

Samtykt varð á fundinum at selja tey 8 læknahúsini, sum keypt vórðu í árunum 1962-72, og at byggja hjálparlæknaíbúðir svarandi til søluprísin fyri tey 8 læknahúsini.

Sum grundgeving hevur sjúkrahússtjórin ført fram:

»Landssjúkrahúsið eigur 8 hús í Tórshavn, ið vórðu keypt í tíðarskeiðinum 1962-72. orsøkin til keypini var, at sjúkrahúsið hevði skyldu til at útvega hóskandi innivist til hjálparlæknar, sambært sáttmála.

Í 1969 varð ein bygningur við 8 íbúðum til hjálparlæknar á sjúkrahúsinum tikin í nýtslu.

Sostatt eru 16 íbúðir til taks til hjálparlæknar á Landssjúkrahúsinum.

Frá 1. apríl 1983 eru 25 hjálparlæknastørv á sjúkrahúsinum. Fleiri hjálparlæknar búgva í hinum íbúðablokkunum, ið ikki eru ætlaðir teimum.

Tey húsini, Landssjúkrahúsið eigur uttan fyri sjúkrahúsøkið, eru øll, burtursæð frá tveimum, eldri hús, og krevja sostatt rættiliga nógv viðlikahald, innan sum uttan og somuleiðis umhvørvið.

Hetta er sera tíðarkrevjandi hjá starvsfólkunum á Landssjúkrahúsinum at hava hetta um hendur, og av tí at nógv er at gera við viðlikahald á sjúkrahúsøkinum, bygningarnir har eru 10-20 ára gamlir, verða bygningarnir í býnum ikki hildnir í tíðarhóskandi standi.

Sambært sáttmála frá 1. apríl 1981 hava sjúkrahúsini skyldu til at varðveita talið á íbúðum til hjálparlæknar.

Fyri at gera umsitingina av húsunum lættari, hevur Landssjúkrahúsið skotið upp at selja tey 8 húsini í býnum, og í staðin, á sjúkrahúsøkinum fyri søluupphæddina at byggja íbúðir til hjálparlæknar.

Samsvarandi § 19 í løgtingslóg nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum er neyðugt við løgtingslóg til tílíka sølu, og verður spurningurin um sølu tí lagdur løgtinginum til støðutøku.

1. viðgerð 7. apríl. Skotið varð upp at beina málið í almanna- og heilsunevndina, hetta fall við 14-0 atkvøðum. Málið varð síðani beint í fíggjarnevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. apríl 1986 og undir 1. viðgerð tann 7. í sama mánaði beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Juul Jacobsen, Signar Hansen og Ivan Johannesen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir løgtinginum til, at hetta verður samtykt.

Minnilutin (Annfinn Kallsberg og Eyðun Viderø) kann í prinsippinum vera við til at geva landsstýrinum heimild til at selja tær í lógaruppskotinum nevndu húsaognir.

Tó er tað ein fortreyt, at landsstýrið fyrst kannar, um nýtsla kann gerast av summum av húsunum til endamál, sum tað almenna hevur skyldu at røkja. Í øllum førum eigur landsstýrið at kanna, um eitt ella tvey hús kunnu nýtast til bústað og uppihaldspláss fyri evnaveik í samsvar við ta samtykt, løgtingið hevur gjørt um, at hesi skulu hava búpláss í smærri eindum.

2. viðgerð 9. apríl. §§ 1 og 2 vórðu samtyktar við 26-0 og við 26 atkvøðum varð samtykt at beina málið til 3. viðgerð.

11. apríl løgdu tingmenninir Jóannes Dalsgaard, Jógvan Sundstein, Thomas Arabo, Anfinn Kallsberg, Sverre Midjord, Karin Kjølbro, Adolf V. Hansen, Jákup Lindenskov og Jutta Midjord fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Í samband við sølu av teimum í løgtingsmáli nr. 89/1985 nevndu ognum

hjá landssjúkrahúsinum samtykkir løgtingið, at eitt hóskandi tal (tó hægst 3) av hesum ognum verður selt til ein rímiligan prís til felagsskapir við sosialum og heilsuligum endamáli.

Málið varð síðani beint aftur í figgjarnevndina, sum 15. apríl legði fram

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. apríl 1986 og undir 1. viðgerð tann 7. í sama mánaði beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin legði fram álit í málinum 8. apríl 1986.

Aftaná 2. viðgerð 9. apríl 1986 settu tingmenninir Jóannes Dalsgaard, Tummas Arabo, Sverri Midjord, Jógvan Sundstein, Karin Kjølbro, J. Lindenskov, J. Midjord og Adolf V. Hansen fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

»Í samband við sølu av teimum í løgtingsmáli nr. 89/1985 nevndu ognum hjá landssjúkrahúsinum samtykkir løgtingið, at eitt hóskandi tal (tó hægst 3) av hesum ognum verður selt til ein rímiligan prís til felagsskapir við sosialum og heilsuligum endamáli.«

Málið varð beint í figgjarnevndina, sum hevur viðgjørt málið á fundi tann 14. apríl 1986.

Jógvan Durhuus, landsstýrismaður fyri avvarðandi málsøki, hevur eftir áheitan frá figgjarnevndini, eftir ynski frá Ivan Johannesen, á fundi 14. apríl 1986 givið frágreiðing um málið og segði landsstýrismaðurin, at uppskotið dagfest 10. apríl 1986 eftir áskoðan hansara er til fánýtis og mælti hann til, at hetta ikki fær undirtøku, men at í staðin verður tikið undir við uppskoti landsstýrisins. Undirstrikaði, at landsstýrið alla tíðina hevur spurningin, ið umrøddur er í uppskotinum til samtyktar í huga, og at arbeitt verður við hesum.

Nevndin býtti seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Juul Jacobsen, Hergeir Nielsen og Ivan Johannesen) tekur til eftirtektar tað, ið landsstýrismaðurin hevur sagt við figgjarnevndina og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Eyðun Viderø) mælir til at samtykkja uppskotið til samtyktar dagfest 10. apríl 1986.

3. viðgerð. Uppskotið til samtyktar frá 9 tingmonnum varð afturtikið. Uppskot landsstýrisins endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F.L. j.nr. 901-4-5. Lóg nr. 56 frá 16. mai 1986.

# 90. Broyting í løgtingslóg um vernd av dýrum

Ár 1986, hósdagin 3. apríl legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vernd av dýrum.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum verður hendan broyting gjørd:

§ 3, 10. stk. í løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum við broytingum verður orðað soleiðis:

»at stinga, skutla ella høgga smærri hvalir. Sýslumaðurin ella grindaformaðurin kann í serligum førum geva loyvi til at stinga ella høgga grindahvalirnar.«

§ 2.

Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

**Lagtingslov om ændring af lagingslov om værnd af dyr.**

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 af lagtingslov om værn af dyr foretages følgende ændring:

§ 3, stk. 10 i lagtingslov nr. 9 af 14. marts 1985 om værn af dyr med ændringer formuleres således:

»at stikke, harpunerer eller hugge grindehvaler eller andre småhvaler. Sysselmanden eller grindeformanden kan i særlige tilfælde give tilladelse til at stikke eller hugge grindehvalerne.«

§ 2.

Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

Í álitinum dagfest januar 1984 frá arbeiðsbólkinum at kann dýraverndarlógina stendur í viðmerkingunum til kapittul 2 um avlíving (§ 8), at »tá ið landgongdin miscydnaðist, var bert eftir at stinga ella høgga, og tá ið heilt illa gekst, at skutla.

Í samband við, at landsstýrið hevur sett arbeiðsbólk at samskipa dýraverndarlógina, lóg um hvalaveiðu og grindareglugerðina, hevur arbeiðsbólkurin mett, at fyri at lúka treytirnar í dýraverndarlógini um, at dýr skulu avlívast ruddiligt ella so skjótt og pínuleyst sum gjørligt, er tað neyðugt at

broyta lógina og taka burtur møgulcikan at skutla, tí tað er ikki mett at verða hóskandi máti at drepa grind uppá.

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í fiskivinnunevndina, sum 9. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð framlagt av landsstýrinum 3. apríl 1986 og undir 1. viðgerð 7. í s.m. beint í fiskivinnunevndina.

Fiskivinnunevndin hevur viðgjørt málið, og kann cin samd nevnd taka undir við uppskoti landsstýrisins og setir samsvarandi hesum fram soljóðandi

## Broytingaruppskot

§ 3.

»Í løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum verður hendan broyting gjørd:

§ 3, 10. pkt. í løgtingslóg nr. 9 frá 14. mars 1985 um vernd av dýrum við broytingum verður orðað soleiðis:

»at stinga ella skutla grindahvalir ella aðrar smærri hvalir. Sýslumaðurin ella grindaformaðurin kann í serligum førum geva loyvi til at stinga grindahvalirnar.«

§ 1.

»I lagtingslov nr. 9 af lagtingslov om værn for dyr foretages følgende ændring:

§ 3, pkt. 10 i lagtingslov nr. 9 af 14. marts 1985 om værn af dyr med ændringer formuleres således:

»at stikke eller harpunere grindehvaler eller andre småhvaler. Sysselmanden eller grindeformanden kan i særlige tilfælde give tilladelse til at stikke grindehvalerne.«

§ 2.

Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.«

§ 2.

Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.«

15. apríl boðaði formaðurin frá, at skriv frá landsstýrinum varð komið, har løgmaður boðaði frá, at málið varð afturtikið.

F.t., j.nr. 1713-13-1.

# 91. Løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um fuglaveiðu v. m.

Ár 1986, hósdagin 3. apríl legði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um fuglaveiðu v. m.**

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974 og nr. 60 frá 5. juni 1984 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 17 verður soljóðandi:

»Uppi á landi yvirhøvur, eisini á vøtnum, á firðum, víkum og sundum og á sjónum yvirhøvur út at sjómarkinum er allur fuglur friðaður móti skjóting og veiðu, sum ikki er tilskilaður í hesi grein (smbr. §§ 14 og 16):

**2. stk.** Sum skilað til niðanfyri skal verða loyvt at veiða ella skjóta hesar fuglar ella fuglasløg:

a) alt árið: Kráku, ravn, kjógva, skúgv, havhest, súlu og øll másasløg, tó ritu bert á sjónum.

b) 15. august - 1. apríl: Lunda, lomviga og álku.

c) 1. september - 31. oktober: Skarv.«

**lagtingslov om fuglefangst m. v.**

**§ 1.**

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst som ændret ved lagtingslov nr. 33 af 7. juni 1972, nr. 44 af 24. maj 1974 og nr. 60 af 5. juni 1984 foretages følgende ændringer:

1) § 17 affattes således:

»Overalt på landjorden, herunder alle ferske vande, i fjorde, vige og sunde samt på havet, så langt søterritoriet går, skal alle fugle, som ikke er angivet i denne paragraf (jfr. §§ 14 og 16) være fredet mod jagt og fangst:

**Stk. 2.** Som nedenfor anført skal det være tilladt at fange eller skyde følgende fugle eller fuglearter:

a) hele året: Krage, ravn, kjove, storkjove, mallemuk, sule og alle mågearter, den tretåede måge dog kun på havet.

b) 15. august - 1. april: Lunde, lomvie og alke.

c) 1. september - 31. oktober: Skarv.«

2) Sum nýtt 2. stk. í § 18 verður sett:
**2. stk.** Loyvt er at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni.

§ 2.
Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3.
Frá 1. apríl 1988 verður § 17 soljóðandi:
»Uppi á landi yvirhøvur, eisini á vøtnum, á firðum, víkum og sundum og á sjónum yvirhøvur út at sjómarkinum er allur fuglur friðaður móti skjóting og veiðu, sum ikki er tilskilaður í hesi grein (smbr. §§ 14 og 16):
**2. stk.** Sum skilað til niðanfyri skal verða loyvt at veiða ella skjóta hesar fuglar ella fuglasløg:
a) alt árið: Kráku, ravn, kjógva, skúgv, havhest, súlu, lomviga, álku og øll másasløg, tó ritu bert á sjónum.
b) 15. august - 1. apríl: Lunda.
c) 1. september - 31. oktober: Skarv.

**Viðmerkingar:**
Galdandi fuglaveiðulóg er frá 1954 og er síðan tá broytt fleiri ferðir.
Fyriliggjandi uppskot snýr seg um at broyta fuglaveiðulógina soleiðis, at
1) Summarfriðingin av lomviga og álku, sum varð ásett í 1980 við løgtingslóg nr. 43 frá 12. mai 1980 í fyribils 5 ár, verður longd í enn 2 ár.
2) Loyvt verður at skjóta skarv frá 1. september til 31. oktober.
3) Loyvt verður at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni.

**Viðvíkjandi 1):** Summarfriðingin av lomviga og álku varð í 1980 ásett fyri at menna stovnin. Bergur Olsen á Fiskirannsóknarstovuni hevur fyri lands-

2) Som nyt stk. 2 i § 18 indsættes:
**Stk. 2.** Det er tilladt at tage lomvieæg hvert år til og med 8. juni

§ 2.
Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

§ 3.
Fra 1. april 1988 affattes § 17 således:
»Overalt på landjorden, herunder alle ferske vande, i fjorde, vige sunde samt på havet, så langt søterritoriet går, skal alle fugle, som ikke er angivet i denne paragraf (jfr. §§ 14 og 16) være fredet mod jagt og fangst:
**Stk. 2.** Som nedenfor anført skal det være tilladt at fange eller skyde følgende fugle eller fuglearter:
a) hele året: Krage, ravn, kjove, storkjove, lomvie, alke, mallemuk, sule og alle mågearter, den tretåede måge dog kun på havet.
b) 15. august - 1. april: Lunde.
c) 1. september - 31. oktober: Skarv.

**Viðmerkingar:**
Galdandi fuglaveiðulóg er frá 1954 og er síðan tá broytt fleiri ferðir.
Fyriliggjandi uppskot snýr seg um at broyta fuglaveiðulógina soleiðis, at
1) Summarfriðingin av lomviga og álku, sum varð ásett í 1980 við løgtingslóg nr. 43 frá 12. mai 1980 í fyribils 5 ár, verður longd í enn 2 ár.
2) Loyvt verður at skjóta skarv frá 1. september til 31. oktober.
3) Loyvt verður at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni.

**Viðvíkjandi 1):** Summarfriðingin av lomviga og álku varð í 1980 ásett fyri at menna stovnin. Bergur Olsen á Fiskirannsóknarstovuni hevur fyri lands-

stýrið gjørt hjáløgdu kanning av støðuni hjá tí føroyska lomviga- og álkustovninum, og hevur landsstýrið út frá hesi frágreiðing mett tað ráðiligt at leingja summarfriðingina í enn 2 ár.

**Viðvíkjandi 2):** Skarvurin vr í 1972 friðaður alt árið við teirri grundgeving, at skarvurin ikki skuldi koma fyri somu lagnu sum hiplingurin, sum er horvin um okkara leiðir. Landsstýrið metir nú, at stovnurin er so mikið mentur, at ráðiligt er at skjóta skarv í mánaðunum september og oktober. Hetta er uttan fyri verpitíðina, og er skarvurin hesa árstíð best egnaður sum matur.

**Viðvíkjandi 3):** Vandi er fyri, at siðurin at ræna egg fellur burtur, og verður tí eftir uppskotinum loyvt at ræna lomvigaregg, tó ikki seinni enn 8. juli, við tað at lomvigi ikki leggur aftur, um eggini verða tikin scinni.

Upplýsast kann, at landsstýrið hevur sett nevnd at gera uppskot til endurskoðaða fuglaveiðulóg.

**Skjal 1):** Galdandi fuglaveiðulóg við seinni broytingum.
**Skjal 2):** Bergur Olsen: *Støðan hjá tí føroyska lomviga- og álkustovninum.*
**Sí skjal 14!**

1. viðgerð 4. apríl 1986. Málið varð beint í umhvørvisnevndina, sum 8. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið er lagt fram 3. apríl 1986 av landsstýrinum og varð aftaná 1. viðgerð 4. í s. m. beint í umhvørvisnevndina. Endamálið við uppskotinum er at broyta fuglaveiðilógina, soleiðis at summarfriðingin av lomviga og álku, sum hevur verið galdandi í fimm ár, verður longd við tveimum árum. Eisini verður skotið upp at loyva veiði av skarvi frá 1. september til 31. oktober. Viðari verður skotið upp at loyva at taka egg á hvørjum ári til og við 8. juni.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur havt fund við Berg Olsen, stud. scient, sum í fleiri ár hevur gjørt lomvigateljingar í Høvdanum í Skúvoy. Nevndin hevur saman við Bergi Olsen gjøgnumgingið tað tilfar, sum landsstýrið hevur lagt við málinum og hevur í hesum sambandi serliga viðgjørt spurningin um friðingina og tann týdning, hon hevur fyri lomvigastovnin. Tilfarið, sum fyriliggur í málinum, vísir, at stovnurin framvegis er í afturgongd, men tilfarið vísir eisini, at afturgongdin ikki hevur verið so ógvuslig hesi fimm árini, lomvigin hevur verið friðaður. Nevndin er tí komin til ta niðurstøðu, at friðingin hevur hjálpt upp á stovnin, og at friðingin framvegis eigur at vera í gildi.

Nevndin tekur til eftirtektar, at landsstýrið hevur sett nevnd at gera

uppskot til nýggja fuglaveiðilóg, og gongur nevndin tí út frá, at friðingarspurningurin tí verður tikin upp til nýggja viðgerð, tá hendan nevnd er liðug við arbeiði sítt.

Nevndin metir tað kanningararbeiðið, sum tey seinastu árini hevur verið gjørt við at telja lomviga, vera av stórum týdningi. Samstundis er nevndin komin til ta niðurstøðu, at arbeiðið átti at fevnt um fleiri fuglabjørg. Nevndin heldur eisini, at virkast má fyri, at tey kanningarúrslit, sum higartil eru innsavnað, verða nærri viðgjørd og givin út. Nevndin hevur eisini undir viðgerðini umhugsað lunda- og skarvastovnin og er komin til ta niðurstøðu, at vit lítið og einki vita um hesar stovnar. Tað er tí av stórum týdningi, at eisini hesir stovnar verða kannaðir. Út frá hesum heldur nevndin tað vera neyðugt at áleggja landsstýrinum at fáa í lag meiri víttfevnandi kanningar av sjó- og bjargafuglinum. Nevndin setir tí soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum í komandi fíggjarári at útvega neyðturviliga játtan, soleiðis at farast kann undir meira víttfevnandi kanningar av føroyskum sjó- og bjargafuglastovnum.

Nevndin hevur eisini viðgjørt spurningin um altur at loyva ræning, og heldur nevndin, at hetta loyvið kann verða givið undir ávísum treytum. Nevndin skjýtur tí upp at broyta uppskot landsstýrisins soleiðis, at tað bert verður loyvt at taka lomvigaregg á ávísum støðum eftir nærri kunngerð frá landsstýrinum. Hetta metir nevndin at vera neyðugt fyri ikki at ørkymla tey kanningarúrslit, sum higartil fyriliggja, og fyri at ein møgulig ræning kann samskipast við tær vísundarligu rannsóknirnar av lomvigastovninum. Nevndin setir tí til uppskot landsstýrisins fram fylgjandi

**Broytingaruppskot**

Í § 1, nr. 2, verður 2. stk. soljóðandi:

»**2. stk.** Loyvt er at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni á ávísum støðum í ávísum fuglabjørgum eftir nærri kunngerð frá Føroya landsstýri.«

I § 1, nr. 2, formuleres stk. 2 således:

»**Stk. 2.** Det er tilladt at tage lomvigeæg hvert år til og med 8. juni på bestemte pladser i bestemte fuglefjelde efter nærmere bekendtgørelse fastsat af Færøernes landsstyre.«

Annars mælir ein samd nevnd til at samtykkja uppskot landsstýrisins við frammanfyri standandi broyting.

2. viðgerð 8. apríl. Broytingaruppskot til § 1 varð samtykt við 24-0, § 1 soleiðis broytt samtykt við 26-0, § 2 við 27-0, § 3a varð samtykt við 21-0, § 3, b og c varð samtykt við 28-0. Við 29-0 varð samtykt at beina málið til 3. viðgerð. Uppskotið til samtyktar varð samtykt við 28-0 atkvøðum.

10. apríl legði umhvørvisnevndin fram soljóðandi

**Álit II**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 3. apríl 1986 og undir 1. viðgerð tann 4. í s. m. beint í umhvørvisnevndina.

Við 2. viðgerð tann 8. apríl 1986 varð samtykt eitt broytingaruppskot frá umhvørvisnevndini, men varð málið eftir hetta víst aftur til umhvørvisnevndina, av tí at víst varð á tekniskan skeivleika í broytingaruppskotinum frá nevndini.

Nevndin hevur rættað henda tekniska skeivleika í niðanfyri standandi broytingaruppskoti. Annars er nevndin av teirri áskoðan, at galdandi friðing av fugli bert røkkur geografiskt út til sjómarkið, sum er ásett við kgl. anordning nr. 599 frá 21. december 1976 til 3 fjórðingar. Hetta heldur nevndin verða ov stutt og skuldi verið ásett til 200 fjórðingar sum okkara fiskimark, ásett við kgl. anordning nr. 598 frá 21. december 1976.

Nevndin setir fram soljóðandi

**Broytingaruppskot**

**til**

**uppskot landsstýrisins**

§ 1 verður orðað soleiðis:

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiði sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974 og nr. 60 frá 5. juni 1984 verða gjørdar hesar broytingar:

§ 1 formuleres som følger:

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst som ændret ved lagtingslov nr. 33 af 7. juni 1972, nr. 44 af 24. maj 1974 og nr. 60 af 5. juni 1984 foretages følgende ændringer:

1) § 17 verður soljóðandi:
»Uppi á landi yvirhøvur, eisini á vøtnum, á firðum, víkum og sundum og á sjónum yvirhøvur út at fiskimarkinum er allur fuglur friðaður móti skjóting og veiðu, sum ikki er tilskilað í hesi grein (smbr. §§ 14 og 16).

**2. stk.** Sum skilað til niðanfyri skal verða loyvt at veiða ella skjóta hesar fuglar ella fuglasløg:
a) alt árið: Kráku, ravn, kjógva, skúgv, havhest, súlu og øll másasløg, tó ritu bert á sjónum.
b) 15. august - 1. apríl: Lunda, lomviga og álku.
c) 1. september - 31. oktober: Skarv.

2) Sum nýtt 2. stk. í § 18 verður sett:
»**2. stk.** Loyvt er at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni á ávísum støðum í ávísum fuglabjørgum eftir nærri kunngerð frá Føroya landsstýri.«

Annars setir nevndin fram hetta

1) § 17 affattes således:
»Overalt på landjorden, herunder alle ferske vande, i fjorde, vige og sunde samt på havet, så langt fiskeriterritoriet går, skal alle fugle, som ikke er angivet i denne paragraf (jfr. §§ 14 og 16) være fredet mod jagt og fangst.
**Stk. 2.** Som nedenfor anført skal det være tilladt at fange eller skyde følgende fugle eller fuglearter:
a) hele året: Krage, ravn, kjove, storkjove, mallemuk, sule og alle mågearter, den tretåede måge dog kun på havet.
b) 15. august - 1. april: Lunde, lomvie og alke.
c) 1. september - 31. oktober: Skarv.

2) Som nyt stk. 2 i § 18 indsættes:
»**Stk. 2.** Det er tilladt at tage lomvieæg hvert år til og med 8. juni på bestemte pladser i bestemte fuglefjelde efter nærmere bekendtgørelse fastsat af Færøernes landsstyre.«

## Broytingaruppskot

Í løgtingslóg um fuglaveiðu v. m., sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974 og nr. 60 frá 5. juni 1984 verður § 1 soljóðandi:

»**§ 1.** Á sjónum út at fiskimark-

I lagtingslov om fuglefangst m. m., som ændret med lagtingslov nr. 33 af 7. juni 1972, nr. 44 af 24. maj 1974 og nr. 60 af 5. juni 1984 formuleres § 1 således:

»**§ 1.** Jagtretten på fisketerri-

inum undir Føroyum er veiðirætturin við teim avvikum, sum tilskilað eru í hesi lóg, opin fyri einum og hvørjum, sum hevur danskan heimarætt.«

toriet ved Færøerne er med de i denne lov fastsatte undtagelse fri for enhver, som har dansk indfødsret.«

11. apríl legði umhvørivsnevndin fram soljóðandi

## Álit III

Umhvørvisnevndin hevur viðgjørt málið av nýggjum og hevur samtykt í staðin fyri uppskot landsstýrisins og uppskotini í áliti I og áliti II at seta fram fylgjandi

### Uppskot

### til

### løgtingslóg um fuglaveiðu v. m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 7. juni 1972, nr. 44 frá 24. mai 1974 og nr. 60 frá 5. juni 1984 verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 1 verður soljóðandi:
»**§ 1.** Á sjónum út at fiskimarkinum undir Føroyum er veiðirætturin við teim avvikum, sum tilskilað eru í hesi lóg, opin fyri einum og hvørjum, sum hevur danskan heimarætt.«

2) § 17 verður soljóðandi:
»**§ 17.** Uppi á landi yvirhøvur, eisini á vøtnum, á firðum, víkum og sundum og á sjónum yvirhøvur út at fiskimarkinum er allur fuglur friðaður móti skjóting og veiðu, sum ikki er tilskilaður í hesi grein (smbr. §§ 14 og 16).

### lagtingslov om fuglefangst m. v.

§ 1

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst som ændret ved lagtingslov nr. 33 af 7. juni 1972, nr. 44 af 24. mau 1974 og nr. 60 af 5. juni 1984 foretages følgende ændringer:

1) § 1 affattes således:
»**§ 1.** Jagtretten på fiskeriterritoriet ved Færøerne er med de i denne lov fastsatte undtagelse fri for enhver, som har dansk indfødsret.«

2) § 17 affattes således:
»**§ 17.** Overalt på landjorden, herunder alle ferske vande, i fjorde, vige og sunde samt på havet, så langt fiskeriterritoriet går, skal alle fugle, som ikke er angivet i denne paragraf (jfr. §§ 14 og 16) være fredet mod jagt og fangst.

**2. stk.** Sum tilskilað til niðanfyri, skal verða loyvt at veiða ella skjóta hesar fuglar ella fuglasløg:

a) alt árið: Kráku, ravn, kjógva, skúgv, havhest, súlu og øll másaløg, tó ritu bert á sjónum.

b) 15. august - 1. apríl: Lunda, lomviga og álku.

c) 1. september - 31. oktober: Skarv.

3) Sum nýtt 2. stk. í § 18 verður sett:

»**2. stk.** Loyvt er at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni á ávísum støðum í ávísum fuglabjørgum eftir nærri kunngerð frá Føroya landsstýri.«

§ 2.

Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

§ 3.

Frá 1. apríl 1988 verður § 17 soljóðandi:

»**§ 17.** Uppi á landi yvirhøvur eisini á vøtnum, á firðum, víkum og sundum og sjónum yvirhøvur út at fiskimarkinum er allur fuglur friðaður móti skjóting og veiðu, sum ikki er tilskilaður í hesi grein (smbr. §§ 14 og 16):

**2. stk.** Sum skilað til niðanfyri, skal verða loyvt at veiða ella skjóta hesar fuglar ella fuglasløg:

a) alt árið: Kráku, ravn, kjógva, skúgv, havhest, súlu, lomviga,

**Stk. 2.** Som nedenfor anført, skal det være tilladt at fange eller skyde følgende fugle eller fuglearter:

a) hele året: Krage, ravn, kjove, storkjove, mallemuk, sule og alle mågearter, den tretåede måge dog kun på havet.

b) 15. august - 1. april: Lunde, lomvie og alke.

c) 1. september - 31. oktober: Skarv.

3) Som nyt stk. 2 i § 18 indsættes:

»**Stk. 2.** Det er tilladt at tage lomvieæg hvert år til og med 8. juni på bestemte pladser i bestemte fuglefjelde efter nærmere bekendtgørelse fastsat af Færøernes landsstyre.«

§ 2.

Lagtingsloven træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

§ 3.

Fra 1. april 1988 affattes § 17 således:

»**§ 17.** Overalt på landjorden, herunder alle ferske vande, i fjorde, vige, sunde, samt på havet, så langt fiskeriterritoriet går, skal alle fugle, som ikke er angivet i denne paragraf (jfr. §§ 14 og 16), være fredet mod jagt og fangst:

**Stk. 2.** Som nedenfor anført, skal det være tilladt at fange eller skyde følgende fugle eller fuglearter:

a) hele året: Krage, ravn, kjove, storkjove, lomvie, alke, malle-

álku og øll másasløg, tó ritu bert á sjónum.

b) 15. august - 1. apríl: Lunda.
c) 1. september - 31. oktober: Skarv.«

muk, sule og alle mågearter, den tretåede måge dog kun på havet.

b) 15. august - 1. april: Lunde.
c) 1. september - 31. oktober: Skarv.«

3. viðgerð sama dag. Lógaruppskotið í áliti III, § 1 samtykt við 22-0, § 2 við 24-0 og § 3 við 22-0. Lógin varð síðani samtykt og avgreidd við 23-0.

F. L. j. nr. 610-9-2. Lóg nr. 33 frá 16. apríl 1986.

# 92. Sáttmálaskjal um Tingmannaráð útnorðurs

Ár 1986, hósdagin 3. apríl legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir soljóðandi sáttmálaskjal um Tingmannaráð útnorðurs:

Sáttmálaskjal um Tingmannaráð útnorðurs.
Inngangur
í sannkenning um

**at** Føroyar, Grønland og Ísland, londini í útnorði, hava áhugamál í felag um at varðveita livandi og lívleysa tilfeingi sítt og gagnnýta tað við fyriliti,

**at** hetta tilfeingi er londunum alvegis umvarðandi til búskapar, mentannar og framtíðar menningar,

at tað er mikilsvert heiminum annars til lívbjargingar, at hesi lond varðveita livandi tilfeingi sítt og nýta tað við fyriliti,
at londini ásanna, at neyðsynt er at stimbra og menna samvinnu í mentum, viðskiftum og samferðslu og samvinnu annars, og
at londini við at stimbra og menna samstarvið gera sítt til at fremja góðsemju og friðarliga samtilveru í heiminum,

hava vit — kosnir tingmenn á Føroya løgtingi, Landstingi Grønlands og Altingi Íslands við støði í samtyktum á Føroya løgtingi 27. januar 1981, Landstingi Grønlands 23. mai 1985 og Altingi Íslands 19. mai 1981 um samstarv tinganna millum — á fundi í Nuuk 24. september 1985 sannað, at tørvur er á formligum sáttmálaskjali, ið skipar reglurnar fyri samstarvinum.

Vit samtykkja og viðurkenna so statt hetta sáttmálaskjal, og ásetingar tess eru tilskilaðar her niðanfyri:

**1. kapittul.**

**1.** Til at røkja tingsamstarvið millum Føroya, Grønlands og Íslands verður skipað tingmannaráð útnorðurs, her niðanfyri nevnt **ráðið.**

**2.** Ráðið kann av sínum eintingum samtykkja tilmæli til eitt ella fleiri av londunum.

**2. kapittul.**

**1.** Til ráðið velja Føroya løgting, Landsting Grønlands og Alting Íslands millum tingmenn sínar tað tal á ráðsmonnum og varamonnum teirra, sum hvørt tingið sær tekur avgerð um. Skuldi umboð hjá ráðsmonnum verið at enda komið vegna val og nýggj umboð ikki góðkend, áðrenn ráðseta verður hildin, kunnu teir flokkar, ið umboðaðir verða á tingi, velja bráðfeingis ráðsmenn og varamenn teirra.

Tingini, ávikavist flokkarnir, geva ráðsformanni boð um ráðsmenn og varamenn teirra.

**2.** Ráðið er samtyktarført, tá ið allir 3 bólkar fyri londini eru umboðaðir og hvør bólkur umboðaður við meiriluta.

**3.** Formaðurin fyri ráðnum verður valdur til skiftis úr bólkunum fyri eitt ár í senn. Um somu tíð verður valdur fyrsti næstformaður og annar næstformaður. Hesir tríggir eru forsæti ráðsins.

**4.** Formaðurin boðar til ársetu ráðsins, tíð og stað, sum ráðið ger av. Meiriluti av ráðsmonnum kann um formannin boða til eykasetu, formaðurin setir á staðin.

**3. kapittul.**

**1.** Á ráðsetu kann verða tikið til umrøðu hvørt eitt evni, ið kann vera samstarvinum umvarðandi.

2. Tá ið tilmæli verður framsent, skal verða gjørd grein á teirri undirtøku, ið tað varð samtykt við í ráðnum.

**4. kapittul.**
Formaðurin sær um skrivstovuhaldið.

**5. kapittul.**
Hvørt land sær ber kostnaðin av luttøku ráðsmann sína í samstarvinum. Útreiðslurnar av skrivstovuhaldinum fylgja formanninum.

**6. kapittul.**
Gjørd verður starvsskipan til at fremja fyriskipanir og ætlanir í sáttmálaskjalinum. Starvsskipanin verður løgd fyri ráðsctu til samtyktis.

**7. kapittul.**
Hetta sáttmálaskjal, ið ritað er á donskum, føroyskum, grønlendskum og íslendskum øllum javngildum, kemur í gildi, tá ið tað er samtykt á Føroya løgtingi, Landstingi Grønlands og Altingi Íslands.

**Viðmerkingar:**
Við støði í samtyktum á Føroya Løgtingi 27. januar 1981, Landstingi Grønlands 23. mai 1985 og Altingi Íslands 19. mai 1981 hava valdir tingmenn á løgtinginum, landstinginum og altinginum á fundi í Nuuk 24. september 1985 einmælt samtykt »Charter for Vestnordens Parlamentariske Samarbejdsråd«.

Eftir 7. kapitli skulu tey 3 tingini góðkenna sáttmálaskjalið fyri, at tað kemur í gildi.

Føroyaks týðingin av skjalinum verður løgd fyri løgtingið til góðkenningar, meðan danska útgávan er løgd við sum skjal.

**Sí skjølini 15 A-B.**

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í marknaðarnevndina, sum 10. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fyri løgtingið av landsstýrinum tann 3. apríl 1986. Við 1. viðgerð, sum var 7. apríl, varð málið beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Hergeir Nielsen, Signar Hansen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Henrik Old, Jógvan Olsen og Agnar Nielsen) kann ikki góðtaka orðingina í føroysku týðingini og setir fram

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Málið verður sent landsstýrinum aftur til nýggja týðing, sum er nærri vanligum føroyskum málburði.

2. viðgerð 11. apríl. Atkvøðugreiðsla 14. apríl. Uppskotið til samtyktar frá minnilutanum í nevndini fall við 13-0, og uppskot landsstýrisins varð samtykt við 25-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 9-36-1.

# 93. Bygging í Tinganesi

Ár 1986, hósdagin 3. apríl legði løgmaður fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið góðkennir, at landsstýrið fer undir bygging av húsum í Tinganesi á toftunum eftir Sjóbúðini og Vektabúðini, og solciðis at húsini verða at nýta av fyrisitingini, men bygd á tann hátt, at løgtingið seinri hann flyta inn.

Eftir ætlan frá 24. februar 1986 er kostnaðurin mettur til 15.784.000 kr.

**Viðmerkingar:**

Sjóbúðin og Vektabúðin í Tinganesi brunnu báðar í grund í 1950, og hava toftirnar staðið ónýttar síðani.

Í 1969 stóðu landsstýrið og býráðið fyri eini norrønari arkitektkapping um eina varðveitingar- og endurnýggingarætlan fyri gamla býarpartin í Tórshavn. Teir 3 arkitektarnir, ið vunnu kappingina, gjørdu eftir áheitan

uppskot um, hvussu byggjast átti í Tinganesi i samband við, at løgtingshús varð bygt niðarlaga á Reyninum. Uppskotið varð ikki framt helst tí, at semja var ikki um at flyta løgtingshúsið.

Í 1983 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk at gera uppskot til bygging á toftunum. Setningurin hjá bólkinum var, at húsini í fyrra umfari skuldu vera til fyrisitingina, landsskrivstovuna, men bygd soleiðis, at løgtingið seinri kundi flyta inn uttan stórvegis broytingar. Tingsalur skuldi vera, og hini húsini í Tinganesi skuldu verða løgtinginum tøk.

Um gongdina í málinum hevur landsstýrið kunnað formansskap løgtingsins.

Málið er nú komið so langt, at detailprojekteringin er liðug 15. apríl 1986, og kann 1. partur av arbeiðinum, tað verður pakkhúsið á Sælingahellu og gerð av tekniskari miðstøð har, verða boðin út beint aftaná. Byggitíðin er ætlað til 2 ár, men verður møguliga longri, síðani fornminnissavnið ger ymsar kanningar í toftunum.

Eftir viðløgdum skrivi frá 24. februar 1986 frá arkitektunum er kostnaðurin mettur til 15.784.000 kr.

Tveir eru grunnarnir, ið nýtast kunnu til rindan av byggikostnaðinum. Teir eru:

| | |
|---|---|
| Grunnurin til nýtt løgtingshús ..... | 4.459.435,89 kr. |
| alt stendur á bók við uppsøgn. | |
| Grunnurin til umsitingarhús ..... | 5.181.135,38 kr. |
| 2.395.421,06 kr. standa á bók við uppsøgn. | |
| | 9.640.571,27 kr. |

Eftir hesum koma at resta í um 6.143.500 kr., sum landsstýrið ætlar at taka við í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1987 og 1988 við eini helvt hvørt árið.

**Sí skjølini 16 A-B.**

1. viðgerð 7. apríl. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 11. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 3. apríl 1986 og undir 1. viðgerð 7. í s. m. beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Asbjørn Joensen, Juul Jacobsen og Signar

Hansen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins og mælir til, at hetta verður samtykt.

Ásannandi at annar grunnurin, ið nýtast skal til ætlaðu byggingina, er lógarfestur til nýtt løgtingshús, setir nevndi meiriluti fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

| **løgtingslóg um bygging í Tinganesi.** | **lagtingslov om bygning på Tinganes.** |
|---|---|
| **§ 1.** | **§ 1.** |
| Landsstýrinum verður heimilað úr grunninum til nýtt løgtingshús at nýta kr. 4.459.435,89 til bygging í Tinganesi. | Landsstyret bemyndiges til af fonden til nyt lagtingshus at anvende kr. 4.459.435,89 til bygning på Tinganes. |
| **§ 2.** | **§ 2.** |
| Henda lóg fær gildi beinan vegin. | Denne lov træder i kraft straks. |

Minnilutin (Anfinn Kallsberg, Eyðun Viderø og Ivan Johannesen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men soleiðis, at í reglu 3 í uppskotinum til samtyktar verður innsett aftan á orðið »húsini«: »í fyrsta umfari«.

2. viðgerð 11. apríl. Atkvøðugreiðslan um uppskotið til samtyktar varð útsett. Lógaruppskotið frá figgjarnevndini varð aftur beint í figgjarnevndina, sum 15. apríl legði fram soljóðandi

**Álit II**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 3. apríl 1985 og undir 1. viðgerð 7. í sama mánaði beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin legði fram álit tann 8. apríl 1985.

Undir 2. viðgerð varð í tinginum nomið við ætlaðu byggingina í Tinganesi og ávísar ætlanir, ið Tórshavnar býráð hevur viðvikjandi býarplaninum í Tinganesi.

Málið varð tí eftir 2. viðgerð í tinginum tann 11. apríl 1986 beint aftur í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur á fundi 14. apríl 1986 viðgjørt málið og hevur

hildið fund við Poul Michelsen, býráðsformann, Kj. Kristiansen, býráðsskrivara, og Gunnar Hoydal, býararkitekt.

Býráðsformaðurin Poul Michelsen legði dent á, at Tórshavnar kommuna ynskir at kunna figgjarnevndina um, at kommunala umsitingin arbeiðir við ætlanum um at broyta býarplanin fyri Tinganes.

Býráðið er ikki sinnað til, at landsumsitingin með alla verður í Tinganesi, bert fyribils. Undirstrikaði, at býráðið ikki vil gera av, hvussu loysnin skal vera, men vil boða frá hugsan síni. Tað er ætlan býráðsins at avmarka avvarðandi øki til búpláss, ikki til umsiting.

Fundurin við umboðini fyri Tórshavnar býráð endaði við, at býráðsformaðurin tilskilaði, hvat býráðið leggur í orðini »fyrisiting«, ið sostatt inniber lóggávu og henni beinleiðis tilknýtt umsiting, men ikki vanlig landsumsiting.

Vísti til skriv frá Tórshavnar býráð, dagfest 11. apríl 1986, til Føroya Landsstýri.

Figgjarnevndin leggur sostatt álit sítt, dagfest 8. apríl 1986, aftur fyri tingið. Ivan Johannesen ger tað ískoyti til støðu sína, at í fyriliggjandi máli er umráðandi, at allir møguleikar verða hildnir opnir.

3. viðgerð 15. apríl. Uppskotið til samtyktar frá meirilutanum fall við 16-0, og lógaruppskotið frá sama meirilutanum fall við 15-0 atkvøðum. Uppskot landsstýrisins varð samtykt við 20-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 2418-1.

# 94. Broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna

Ár 1986, týsdagin 8. apríl legði løgmaður vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna.**

**lagtingslov om ændring i lagtingslov om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet.**

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 48 frá 28. mai 1984 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna verður gjørd henda broyting:

§ 4, 1. stk. verður orðað soleiðis:

»§ 4. Manningini á føroyskum deksfiskifari undir 100 brutto skrásett tons á útróðri innanfyri 100 fjórðingar úr landi í Føroyum verður, um hon ikki er undir minstuløn arskipan, tryggjað ein minstaforvinning, tó tá talan er um snelluveiddan fisk, bert hálvan minstaforvinning. Minstiforvinningurin er pr. 1. januar 1986 kr. 832,57 til hvønn mannin fyri hvønn útróðrardagin.«

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 1.

I lagtingslov nr. 48 af 28. maj 1984 om mindsteløn og anden støtte til fiskerierhvervet foretages følgende ændring:

§ 4, stk. 1 formueleres således:

»§ 4. Der sikres mandskabet på færøsk dæksfiskerfartøj under 100 brutto reg. tons i hjemmefiskeri inden for 100 sømil fra land af Færøerne, såfremt mandskabet ikke er under mindsteiønsordning, en mindsteindtægt, dog når der er tale om fisk, der er fanget med snelle, kun halv mindsteforvinding. Mindsteindtægten er pr. 1. jan. 1986 kr. 832,57 til hver af mandskabet for hver fiskedag.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

**Viðmerkingar:**

Í løgtingsmáli nr. 13/1985: Broyting í løgtingslóg um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna varð skotið upp av landsstýrinum at hækka minstutønina smbr. § 3 í nevndu lóg.

Í álitinum frá figgjarnevndini varð sett fram broytingaruppskot um, at minstiforvinningurin prosentvís skuldi hækkast samsvarandi.

Tað av løgtinginum samtykta broytingaruppskotið vísir eina upphædd upp á kr. 778,10, ið galdandi var tá pr. 1. juli.

Tað beina talið skuldi verið 7% hægri ella 7% av kr. 778,10 = kr. 54,47, soleiðis at upphæddin fyri minstaforvinningi skuldi verið sett til kr. 832,57.

Víst verður annars til landsstýrisins viðmerkingar í løgtingsmáli nr. 13/1985.

1. viðgerð 9. apríl. Málið varð uttan nevndarviðgerð beint til 2. viðgerð.

2. viðgerð 10. apríl. Lógaruppskotið samtykt við 26-0 atkvøðum.

3. viðgerð 11. apríl. Uppskotið endaliga samtykt við 28-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1539-2-1. Lóg nr. 42 frá 2. mai 1986.

# 95. Lán til Telefonverk Føroya Løgtings

Ár 1986, fríggjadagin 11. apríl legði Lasse Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið fram soljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um lán til Telefonverk Føroya Løgtings.**

**§ 1.** Telefonverki Føroya Løgtings verður heimilað í figgjarárunum 1986-1990 at læna 93,3 mio. kr. ella mótvirðið av hesi upphædd heilt ella lutvíst í fremmandum gjaldoyra úr Nordisk Investeringsbank, NIB, til figging av íløgum.

**§ 2.** Landsstýrið fær heimild at veðhalda landskassans vegna fyri hesum láni tikið smbrt. § 1.

**§ 3.** Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**lagtingslov om lån til Telefonverk Føroya Løgtings.**

**§ 1.** Telefonverk Føroya Løgtings bemyndiges til i finansårene 1986-1990 at låne 93,3 mio. kr. eller modværdien af dette beløb helt eller delvis i fremmed valuta fra Nordisk Investeringsbank, NIB, til finansiering af investeringer.

**§ 2.** Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lånet optaget i henhold til § 1.

**§ 3.** Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

**Tørvurin á peningaíløgum.**

Telefonverkið hevur støðuga tilgongd av feløgum og tænastum, ið krevja munandi íløgur. 1. juli 1985 vóru o.u. 17.200 telefonfelagar settir til føroyska telefonnetið, ella 38 fyri hvørjar 100 íbúgvar. Tá havt verður í huga, at tíðin, tá eingir telefonfelagar koma afturat, enn minni enn so er rokkin — hetta sæst m. a. við at bera saman við onnur norðurlond — er ikki veruleikafjart at vænta eftirfylgjandi gongd í tíðarskeiðinum 1986-90 innan vanliga telefonnetið:

| | **Árligur vøkstur í procentum í miðal** |
|---|---|
| Telefonfelagatal | 5,0% |
| Telefontal | 9,0% |
| Telefonnýtsla | 10-12 % |

Harumframt er bráðtørvur á at fáa NMT-farteleſon í lag í Føroyum, og hartil verður bygd fylgissveinastøð á Húsareyni saman við danska P & T.

**Peningaíløgur 1986-90.**
Peningaíløgur 1986-1990 (bæði árini íroknað) siggjast í niðanfyri standandi talvu. Allar íløgurnar verða 186.627.000 kr. tilsamans í 1986-prísum.

| Íløgur sbr. íløgu- og figgjar-ætlanir 1986-1990 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 |
|---|---|---|---|---|---|
| Í 1986-prísum ..... | 27.941 | 46.941 | 46.941 | 38.899 | 24.898 |
| Virðisminkan (7% árliga)..... | | 50.227 | 53.743 | | |

Í ***hjáløgdu*** »Íløgu- og figgjarætlanir 1986-90 Telefonverk Føroya Løgtings« er gjøllari greitt frá teimum einstøku íløgunum, soleiðis at tað, hvat NMT-fartelefonini viðvíkir, er gjørd ein sjálvstøðug rakstrar- og gjaldførisætlan fyri at lýsa, hvørja ávirkan henda íløgan fær á figgjarstøðu verksins sum heild. NMT-skipanin verður ein partur av telefonskipanini sum heild, ið til eina og hvørja tíð skal nøkta kommunikatiónstørvin, um ikki stoðgur skal koma í framburð og menning á øllum samfelagsøkjum. Tí má tað vera einum greitt, at íløgutørvur verksins ikki minkar, um NMT-skipanin ikki verður framd, tí so skulu íløgurnar gerast aðrastaðni í telefonnetinum. Sum dømi kunnu nevnast útjaðaraøki, ali- og smoltstøðir. Við NMT-skipanini fæst automatisk telefontænasta at nøkta tílíkan tørv. Við ongari NMT-skipan er sera kostnaðarmikið at grava kaðalar ella gera einstøk radiosambond í staðin.

Í mun til íløguætlan telefonverksins hevur landsstýrið tó avgjørt at flyta íløgur fyri 20 mió. kr. frá 1986 til 1989 og 1990.

**Fígging og figgjarstøða.**
Figgjanin av samlaðu íløguni upp á 186,6 mió. kr. er tryggjað við, at Nordisk Investeringsbank, NIB, hevur treytað av landskassaveðhaldi játtað 93,3 mió. kr., og trygd er fingin fyri, at 50 mió. kr. kunnu útvegast í Føroyum yvir 5 ár uttan landskassaveðhald. Játtanin frá NIB verður serliga nýtt til keyp av digitalum støðum og NMT-útgerð. Henda játtan er avgerandi fyri, at telefonverkið kann gera sáttmála um útgerð fram til 1990.

Nágreinilig figgjarætlan er gjørd fyri íløgutíðarskeiðið og fram til 1993, og vil landsstýrið í samband við viðgerðina handa figgjarnevndini hesa ætlan.

Hóast tað, at íløgurnar hetta fimm ára skeiðið eru um 200 mió. kr., so veksur samlaða skuldin bert við um 60 mió. kr., pr. 1. januar 1986 var hon 252 mió. kr., og bókað eginogn batnar við 52 mió. kr., eins og verkið verður

at gjalda avdráttir hesi fimm árini upp á tilsamans 106 mió. kr. Hesi tøl eru grundað á gjaldoyrisvirði pr. 9. februar 1986; men síðani tá er dollarin nógv fallin eins og rentan, so mett verður, at veruliga langfreistaða skuldin pr. 1. januar helst kemur at minka niður í um 225 mió. kr., og síðan partur av hesi skuld er lán í Føroyum, so verður uttanlandsskuld verksins suin heild at minka við um 75 mió. kr. fyri hetta fimmáraskeiðið.

Orsøkirnar til tílíkan bata eru serliga, at dollara-virðið er nógv minkað, at NMT-skipanin skapar nýggjar týðandi inntøkur, og at landsstýrið og figgjarnevndin framdu taksthækkingar pr. 1. januar 1986.

— — — — —

Landsstýrið leggur dent á, at TFL fremur hesa útbygging við digital-støðum, NMT-skipan og fylgisveinastøð við sambandi til útheimin soleiðis, at TFL framvegis virkar á einum høgum tekniskum støði.

Hetta er m. a. eisini neyðugt, skal verkið verða ført fyri at yvirtaka uppgávurnar hjá danska Post- og Telegrafverkinum í Føroyum.

Samráðingar fara í løtuni fram um hesa yvirtøku, ið kann fara fram í 1987 og 88; men fortreyt frá danskari síðu er, at vit framvegis eiga ein tekniskt útbygdan stovn, sum kann átaka sær tílíkar uppgávur.

At enda skal viðmerkjast, at sambært reglugerð landsstýrisins so eru høvuðsuppgávur telefonverksins:

— at lúka landsins tørv á telefonsambandinum innanlands og millum Føroyar og útheimin,
— at vera tænastuveitandi stovnur, og í so stóran mun sum gjørligt tikin út frá handilsligum sjónarmiðum,
— at laga seg eftir menning samfelagsins og átaka sær viðkað virksemi, tá ið viðurskiftini tala fyri tí.

\+ Viðløgd er iløgu- og figgjarætlan 1986-90.
**Sí skjal 17.**

1. viðgerð 14. apríl. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 17. apríl legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 11. apríl 1986 og undir 1. viðgerð tann 14. í s. m. beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið, og í tilknýti til tað tilfar, ið viðlagt varð í málinum, eru útvegaðar rakstrar- og likviditetsætlanir til 1/4 - 31/12 1985 og árini 1986/93.

Meirilutin (Jørgen Thomsen, Ashjørn Joensen, Tordur Niclasen og Signar Hansen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum viðmerkingum:

Til tess at tryggja, at ætlaða íløgan verður gjørd og umsitin á mest skynsama hátt, so er orsøk til at vísa varsemi í figgjarligu og teknisku spurningunum.

Støddin á stovninum og tær mongu krevjandi figgjarligu og teknisku uppgávur, ið skulu røkjast, krevja eina figgjarumsiting burturav, samstundis sum neyðugt er við tekniskum eftirliti at meta um og ráðgeva. Tað er tí ein fyritreyt fyri tilmæli meirilutans um at samtykkja fyriliggjandi lógaruppskot, at skipað verður ein serstøk figgjardeild við egnum figgjarstjóra, og at landsstýrið setir eina tekniska nevnd. Galdandi reglugerð fyri Telefonverk Føroya Løgtings er frá 10. februar 1984. Neyðugt verður tí, at landsstýrið samtykkir broytta reglugerð, soleiðis at figgjardeildin verður skipað við heimild í nýggju reglugerðini, og at leiðsluspurningurin fyri tann deildina fær útgreinaðar heimildarreglur, og verða reglurnar at áseta fyri virksemið hjá teknisku nevndini. Í reglunum fyri figgjardeildina skal verða tilskilað, hvør hevur avgerðarrættin og fráboðanir og samráðingarskyldu til landsstýrismann og/ella landsstýrið. Reglugerðin verður at góðkenna av figgjarnevnd løgtingsins, og skal landsstýrismaðurin fyri telefonverkið hvørt hálva árið geva figgjarnevnd løgtingsins frágreiðing um gongdina yvirhøvur bæði tekniskt og figgjarliga.

Undir 1. viðgerð varð víst á, at í framløguskrivi landsstýrisins var einki nevnt um tørvin hjá gomlum og hjálparleysum at fáa boð frá sær, um okkurt skuldi borist teimum á. Eisini varð víst á, at telefontól eru, ið kunnu nýtast av blindum og deyvum. Figgjarnevndin ásannar hesi viðurskifti og heitir við hesum á landsstýrið um at taka hetta við í ætlaðu útbyggingina.

Út frá frammanfyri standandi setir meirilutin fram soljóðandi

**Uppskot I**

**til**

**samtyktar**

Álagt verður landsstýrinum at syrgja fyri, at skipað verður serstøk figgjardeild við egnum figgjarstjóra á Telefonverki Føroya Løgtings.

## Uppskot II

## til

## samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna íløguætlanina og teknisku framstigini so gjølla, so hvørt tey verða framd. Til hetta arbeiðið setir landsstýrið 3-mannanevnd, ið hevur tekniskt og fíggjarligt innlit.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Hyðun Viderø) átalar, at landsstýrið kemur so seint í tingsetuna við einum so týdningarmiklum máli.

Minnilutin ásannar, at nútíðargerð og viðlíkahald av telefonnetinum eru av størsta týdningi fyri føroyska samfelagið. Eisini má ásannast, at nógv í fyriliggjandi uppskoti sær skilagott út. Hin vegin heldur minnilutin, at fíggjarnevndin má hava tíð til at viðgera málið gjølla, og við hjálp frá serkønum fólki fáa høvi til at eftirkanna bæði teknisku og fíggjarligu upplýsingarnar.

Eisini heldur minnilutin, at tað er neyðugt hjá telefonverkinum, at tað fær eina yvirordnaða leiðslu, sum hevur ábyrgdina av, at fíggjarliga stýringin og dagliga leiðslan og organisatiónin virkar á rættan hátt. Stovnurin eigur tí at hava eina nevnd, sum hevur hesa ábyrgd. Tað verður tí bert endaliga politiska ábyrgdin, sum verður hjá landsstýri og løgtingi.

Nevndin má virka sum ein partafelagsnevnd og skipar seg sjálv. Víst verður í hesum sambandi til, at § 1 í núverandi reglugerð m. a. sigur, at stovnurin í so stóran mun sum gjørligt skal verða rikin út frá handilsligum sjónarmiðum.

Minnilutin setir tí fram soljóðandi

## Uppskot III

## til

## samtyktar

Í reglugerð fyri Telefonverk Føroya Løgtings nr. 16 frá 10. februar 1984 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Sum nýggj § 2 verður sett:
   »Løgtingið velur eina 5-mannanevnd at stýra telefonverkinum. Nevndin hevur yvirordnaðu leiðsluna av stovninum og ábyrgdina av, at leiðslan og organisatiónin virka væl og fíggjarliga forsvarligt.

**2. stk.** Nevndin, sum verður at hava nøkunlunda sama virkisøki sum ein partafelagsnevnd, verður vald fyri 2 ár í senn. Fyrsta skeiðið gongur frá 1. mai 1986 til 1. januar 1989.«

2) §§ 2-8 verða ávikavist §§ 3-9.

3) § 3, stk. 1 verður soljóðandi:
»Nevndin setir telefonverksstjóran, ið hevur dagligu leiðsluna av telefonhúsinum.«

4) Í § 3, stk. 2, verður »landsstýrið« broytt til »nevndin«.

5) Í § 3, stk. 4 verður í 1. pkt. sett »nevndini« í staðin fyri »landsstýrinum«.

6) § 4 verður soljóðandi:
»**§ 4.** Telefonverkið verður bundið við undirskrift av telefonverksstjóranum, um ikki eisini nevndarundirskrift krevst.
**2. stk.** Ávísingarskipanin verður ásett av landsstýrinum.«

## Uppskot IV

## til

## samtyktar

Løgtingið velur nevndirnar í seinasta lagi 28. apríl 1986.
Reglugerðin skal kunngerast í seinasta lagi 29. apríl 1986. Møguliga seinni broytingar í reglugerð skulu góðkennast av fíggjarnevndini.

## Uppskot V

## til

## samtyktar

Løgtingsins fíggjarnevnd arbeiðir víðari við tingmáli nr. 95/1985 og leggur tað fram aftur í ólavsøkutingsetuni 1986.

Minnilutin (Ivan Johannesen) førir fram:

Minnilutin átalar, at so stutt tíð verður givin til at viðgera hetta stóra mál, og hevur minnilutin ongan møguleika at kanna hetta mál til lítar.

Tað, sum hetta mál inniber, er, at landskassin skal veðhalda fyri láni upp á 93,3 mió. kr. í fíggjarárunum 1986-1990. Lánið skal takast úr Nordisk Investeringsbank, N.I.B., Helsinki, til fígging av íløgum.

Í viðmerkingunum verður sagt, at Telefonverk Føroya Løgtings roknar við ógvuligum stórum vøkstri í brúkinum av telefon. Eisini verður roknað við vøkstri í telefontalinum, soleiðis at munandi útbyggingar verða neyðugar.

Víðari verður sagt, at bráðtørvur er á at fáa NNT-fartelefon í lag í Føroyum, og hartil verður bygd fylgisveinastøð á Húsarcyni.

Peningaíløgurnar hetta 5-ára skeiðið eru um 200 mió. kr.

Uttan at taka støðu til, umhenda útbygging fyri 200 mió. kr. er neyðug ella ikki, hevur minnilutin sett uppskot fram í fíggjarnevnd løgtingsins, um at fíggjarnevndin tekur sær tíð at viðgera hetta mál. Uppskot minnilutans er, at fíggjarnevndin setir niður nevnd at kanna Telefonverk Føroya Løgtings við tí málsetningi, at kannað verður:

1. Samlaða útbyggingin,
2. Fíggingarviðurskiftini á stovninum,
3. Øll rakstrarviðurskiftini,

og at fíggjarnevndin leggur málið aftur fram á ólavsøkutingsetuni 1986.

Meiriluti var ikki í fíggjarnevndini fyri hesum uppskoti.

Út frá teimum úttalilsum, sum alment eru komin fram av framstandandi persónum innanfyri Telefonverk Føroya Løgtings, so er ringt skil á fíggjarviðurskiftunum innan stovnin. Út frá hesum er tað minnilutans metan, at neyðugt er at gera hesa kanning, áðrenn løgtingið viðtekur at binda landskassan fyri so stórar upphæddir, sum her er talan um.

Meirilutin hevur uppskot um, at skipað verður fíggjardeild við egnum stjóra, og at virksemi hansara verður skipað við reglugerð.

Eisini hevur meirilutin uppskot um, at 3-mannanevnd við tekniskum og fíggjarligum innliti verður sett at fylgja við útbyggingunum á telefonverkinum. Hesum tekur minnilutin undir við.

Tað er metan minnilutans, at løgtingið eigur ikki at avgreiða hetta mál, fyrrenn øll viðurskifti innan Telefonverk Føroya Løgtings eru kannað.

Út frá hesum setir minnilutin fram hetta

**Uppskot VI**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið setir niður 5-mannanevnd at kanna viðurskiftini innan Telefonverk Føroya Løgtings.

Kannast skulu fíggjarviðurskiftini og tann útbygging, ið umrøddu 200 mió. kr. skulu nýtast til eins og rakstrarviðurskiftini sum heild.

2. viðgerð 17. apríl. Uppskot I til samtyktar frá meirilutanum í fíggjarnevndini varð samtykt við 24-0, uppskot II varð samtykt við 23-0. Uppskot III til samtyktar frá minnilutanum fall við 8-0 atkvøðum. Uppskot IV fall burtur av sær sjálvum. Uppskot V fall við 14-0. Uppskot VI fall við 15-0.

Landsstýrisins uppskot til lóg, § 1, varð samtykt við 17-1, § 2 við 17-0, § 3 við 17-0. Við 17-1 atkvøðum varð samtykt at beina málið til 3. viðgerð.

3. viðgerð á seinri fundi sama dag. Lógaruppskotið endaliga samtykt við 17-0.

F. L. j. nr. 1900-3-23. Lóg nr. 46 frá 2. mai 1986.

# 96. Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin

Ár 1986, mánadagin 14. apríl legði Atli P. Dam, løgmaður, vegna landsstýrið framsoljóðandi

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin.**

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri innan- ella uttanlandsláni til Húsalánsgrunnin upp á 40 mió. kr. ella mótvirðið av hesi upphædd í fremmandum gjaldoyra.

§ 2. Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**lagtingslov om garanti for lån til Huselånefonden.**

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for indenlands- eller udenlandslån til Húsalánsgrunnin på 40 mio. kr. eller modværdien af nævnte beløb i udenlandsk valuta.

§ 2. Denne lov træder i kraft dagen efter dens kundgørelse.

**Viðmerkingar:**

Húsalánsgrunnurin hevur við skrivum frá 3. oktober 1984, 15. januar, 23. juli og 7. november 1985 sent landsstýrinum soljóðandi umsókn við hjáløgdum skjølum:

Fotoavrit av skrivi frá Húsalánsgrunninum 3. oktober 1984.
Fotoavrit av skrivi frá Húsalánsgrunninum 15. januar 1985.
Fotoavrit av skrivi frá Húsalánsgrunninum 23. juli 1985.
Fotoavrit av skrivi frá Húsalánsgrunninum 7. november 1985.
Fotoavrit av likviditetsætlan fyri fíggjarárini 1985, 1986, 1987 og 1988.

Landsstýrið hevur á fundi 11. apríl 1986 samtykt at geva loyvi til at taka lán upp á kr. 40 mió. kr., og verður lógaruppskotið við hesum lagt fyri løgtingið.
**Sí skjølini 18 A-E!**

1. viðgerð 15. apríl. Málið varð beint í figgjarnevndina, sum 17. apríl legði fram soljóðandi

**Álit**

Málið varð lagt fram av landsstýrinum tann 14. apríl 1986 og undir 1. viðgerð tann 15. sama mánað beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið, og mælir ein samd nevnd tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Í samband við fyriliggjandi mál heitir figgjarnevndin á landsstýrið um at taka upp samráðing við 1. prioritetshavaran í sethúsum um, at hesin setir seg fyri størri parti av figgingini enn áður.

2. viðgerð 17. apríl 1986. § 1 varð samtykt við 29-0, § 2 við 28-0. At fara soleiðis til 3. viðgerð samtykt við 28-0 atkvøðum.

3. viðgerð 17. apríl. Málið endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum.

F. L. j. nr. 1426-5-5. Lóg nr. 45 frá 2. mai 1986.

# 100-1 Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi rutusigling inn á Skálafjørðin.

Ár 1985, hósdagin 1. august boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Í mong ár hevur reglulig rutusigling verið úr Havn inn á Skálafjørðin umleið 7-8 tíðina á kvøldi, men tá landsstýrið lýsti seinastu summarferðaætlanina, so var hesin møgulcki tikin frá teimum, sum vanliga nýttu hesa farleið á kvøldi.

Undirritaði hevur áður gjørt vart við, at vit ikki kunnu góðtaka eina slíka skerjing av ferðamøguleikunum millum Havnina og Skálafjørðin, og tí verður hervið spurt:

1. Hevur landsstýrið gjørt nakað fyri at fáa henda túrin inn aftur í ferðaætlanina?
2. Um so er, at landsstýrið higartil einki hevur gjørt við málið, heiti eg á tað um at fáa hesa sigling aftur í rættlag sum skjótast.

1. august varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

6. januar svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurningunum soleiðis:

**Svar**

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið gjørt nakað fyri at fáa túrin inn aftur í ferðaætlanina?
2. Um so er, at landsstýrið higartil einki hevur gjørt við málið, heiti eg á tað um at fáa hesa sigling aftur í rættlag sum skjótast.

**Svar**

Túrurin á kvøldið er komin inn aftur í ferðaætlanina, og var hetta eisini hugsanin, at so skuldi verða. Umframt hetta er túratalið inn á Skálafjørðin økt við einum túri aftrat.

Síðani sitandi landsstýrið tók við, hevur ongantíð verið talan um at skerja ferðamøguleikarnar millum Havnina og Skálafjørðin, tvørturímóti. Ferðamøguleikarnir hava ongantíð verið á so tryggum støði sum nú.

Hetta er gjørt, tí at sitandi landsstýrið metti tað neyðugt, at fólk skuldi fáa tryggari samband, enn tey høvdu frammanundan, og var hetta m.a. eisini orsøkin til, at nýtt strandfaraskip varð keypt til hesa sigling.

# 100-2. Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann, viðvíkjandi fosturtøku í Føroyum.

Ár 1985, hósdagin 1. august boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Tordi Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Hevur landsstýrið givið sær far um vøksturin í fosturtøkum tey seinastu árini?

2. Hvørji møgulig tiltøk ætlar landsstýrið at seta í verk, soleiðis at í størsta mun kann sleppast undan fosturtøku?

**Viðmerkingar:**

Ásannast má, at eitt minkandi virði (degradering) av menniskjanum er farin fram tey seinastu árini. Hetta er m.a. komið til sjóndar í at eitt land fyri og annað eftir hevur sett lóg um »fría« fosturtøku í verk.

Lógin um »fría« fosturtøku í Danmark kom í gildi 1973 og eru síðan framdar gott 20.000 fosturtøkur árliga.

Lógin galdandi fyri Føroyar er frá 1956 og varð við kgl. fyriskipan sett í verk 20. juni 1959.

Sambært hesa lóg kann fosturtøka fremjast sum niðanfyri tilskilað:

§ 1.

**Stk. 1.** En kvinde kan få sit svangerskab afbrudt i følgende tilfælde:

1) Når svangerskabets afbrydelse er nødvendig for at afværge alvorlig fare for kvindens liv eller helbred. Ved bedømmelsen af denne fare skal der på grundlag af en vurdering af samtlige omstændigheder, herunder de forhold, hvorunder kvinden må leve, tages hensyn ikke alene til fysisk eller psykisk sygdom, men også til tilstedeværende eller truende fysiske eller psykiske svækkelsestilstande.

2) Når kvinden er blevet besvangret under sådanne omstændigheder, som omhandles i Borgerlig Straffelov af 15. april 1930 § 210 eller § 210, jfr. § 212, samt når svangerskabet skyldes krænkelse af kvindens kønsfrihed under sådanne omstændigheder, der omhandles i straffelovens §§ 216-223 eller disse paragraffer sammenholdt med § 224.

3) Når der er nærliggende fare for, at barnet på grund af arvelige anlæg eller på grund af beskadigelser eller sygdom, pådraget i fosterlivet, vil blive lidende af sindssygdom, åndssvaghed, andre svære mentale forstyrrelser, epilepsi eller alvorlig og uhelbredelig abnormitet eller legemlig sygdom.

4) Når i ganske særlige tilfælde alvorlige fysiske og psykiske de-

> fekter eller andre lægeligt begrundede forhold medfører, at kvinden skønnes uegnet til at tage vare på sit barn.

Sostatt skulu ávísar fyritreytir fyriliggja, til tess at galdandi lóg gevur heimild til fosturtøku.

Spurningur, sum í hesum sambandi hevur verið frammi, er, hvussu farið verður um galdandi lóg — ella — um galdandi lóg verður umsitin, sum um onnur var galdandi?

Eina ábending um hetta fáa vit, har serlækni í kvinnusjúkum í samrøðu við Útvarpið upp á fyrispurning, um kvinnum verður noktað fosturtøku í Føroyum, svarar soleiðis:

> »Ja, eg veit um tað, men tá er kvinnan komin so langt, at tað hevur verið ov vandamikið at gjørt hetta. Annars haldi eg, at tað sjáldan verður noktað í Føroyum nú.«

Vísandi til ársfrágreiðingar landslæknans sæst, at í tíðarskeiðnum 1982-1984 eru 226 fosturtøkur framdar her á landi — ávikavist 74 í 1982, 69 í 1983 og 83 í 1984.

Til samanlíkningar kann nevnast, sambært aðrar keldur, at í tíðarskeiðnum 1971-1980 eru framdar 529 fosturtøkur.

Í mun til talið av livandi føddum børnum eru fosturtøkurnar ávikavist fyri 1971: 5,6%, 1974: 7,2%, 1980: 6,5%, 1982: 10,2% og fyri 1984: 12,1%.

Hóast »sosial-grund« (indikatión) sambært galdandi lóg ikki heimilar fosturtøku, so kundi eitt hvørt týtt upp á, at orsøk hjá mongum júst er av sosialum slagi.

Ein møgulig øking av fosturtøkum framyvir kemur óivað at kunna setast í samband við menningina innan tann sokallaða prænatala diagnostikkin ella fosturkanningina.

Upprunin til umtalaðu kanning var ynski um skjótast gjørligt at ávísa møguligar sjúkur hjá fostrinum við tí fyri eygað at veita møguliga viðgerð longu í móðurlívi ella beint eftir, at barnið varð borið í heim.

Nú tykist vend at vera komin í, soleiðis at endamálið nú í alt størri mun er at staðfesta møgulig brek ella sjúkur, soleiðis at mamman/foreldur fáa tilboð um fosturtøku ístaðin fyri at barnið verður føtt.

Tá er endamálið at linna og bjarga lívi broytt til í størst møguligan mun at minka talið av brekaðum børnum, ið fødd verða.

Í hesum sambandi kann spyrjast, hvat slag av samfelag er tað vit so spakuliga — men miðvíst — stýra ímóti?

Eitt samfelag verður mangan mett í mun til, hvussu farið verður um tey veikastu, og kann tað tí á ongan hátt góðtakast, at tað mest hjálparleysa og

veika — barnið í móðurlívi — orsakað sosialar ella figgjarligar umstøður, ikki verður horið í heim her á landi.

Ei heldur kann tað metast rætt og rímiligt, at møgulig brek/sjúka hjá barni í móðurlívi, avmarkar tess rætt til lívið.

Sostatt hvílir stór ábyrgd eisini á landsins myndugleikum, at stimbra og seta í verk neyðug tiltøk til tess at umstøður av m.a. nevnda slagi ikki verða stýrandi í avgerðini um møguliga fosturtøku.

Loksins eigur at havast í huga orðini hjá móður Teresu, tá hon í 1979 fekk friðarheiðursløn Nobels handaða: »Tær tjóðir, sum loyva fosturtøku, mega sigast at vera tær fátækastu av øllum. Slíkt fátækradømi er verri enn tað materialistiska. Fosturtøka er hernaður móti børnum, og er skriggið frá tí ófødda største hóttan móti friðinum í dag.«

1. august varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

16. apríl svaraði Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Tordur Niclasen, løgtingsmaður, hevur sett mær niðanfyri standandi fyrispurningar:

1. Hevur landsstýrið givið sær far um vøksturin í fosturtøkum tey seinastu árini?
2. Hvørji møgulig tiltøk ætlar landsstýrið at seta í verk, soleiðis at í størstan mun kann sleppast undan fosturtøku?

**Ad. 1.** Fosturtøkur verða framdar við heimild í lóg nr. 177 frá 23. juni 1956, sum er sett í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan nr. 288 frá 29. juni 1959.

Eftir lógini kann ein barnsferð verða avbrotin, um tveir autoriseraðir læknar eru samdir um, at treytirnar í lógini eru loknar.

Um tað verða framdar ov nógvar fosturtøkur eftir galdandi lóg er ilt at siga. Læknar meta, at eftir galdandi lóg er talið á fosturtøkum á rættari leið.

Sosialar indikatiónir fyri fosturtøku eru ikki nevndar í lógini og verða heldur ongantíð nýttar av læknunum sum grundgeving fyri at avbróta eina barnsferð.

Við tí meira framkomna kanningarteknikkinum av barnakonum verða fleiri og fleiri tilburðir funnir, har tað verður mett mest forsvarligt at fremja

eina fosturtøku og má m. a. hetta metast at vera orsøkin til, at talið á fosturtøkum veksur í mun til burðartalið.

**Ad. 2.** Landsstýrið umhugsar ikki at seta tiltøk í verk móti fosturtøku, sum læknaliga verður mett ráðilig at gera við heimild í galdandi lóg.

Spyrjarin metir í sínum viðmerkingum, at tað er skeivt í øllum førum at fremja fosturtøku, sjálvt um vandi er fyri, at barnið verður brekað.

Um tað rætta ella órætta í at loyva fosturtøku verður altíð ein persónligur spurningur, litaður av støðutakanini hjá tí einstaka.

Landsstýrið metir, at læknarnir umsita galdandi lóg eftir bestu sannføring og læknaligu meting.

# 100-3. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi lántøku hjá Tórshavnar kommunu.

Ár 1985, hósdagin 1. august boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Poul Michelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Tórshavnar býráð bað í apríl mánað í ár um loyvi landsstýrisins til upptøku av lánum uppá 30 mió. kr.

Slíkt loyvi skulu kommunur sbrt. kommunulógina hava frá landsstýrinum, um tær skulu hava lán, ið ikki verða goldin aftur við í minsta lagi ¼ um árið.

Eftir samtyktu ársfíggjarætlanini hjá kommununi tørvaði henni 30 mió. kr. í lántøku fyri at fremja tær ætlanir, ið vóru samtyktar við fíggjarætlanini.

Býráðið greiddi frá, at tað hevði ikki gjørt av, hvar lánini skuldu vera tikin upp, men býráðið helt, at eitt býti kundi verið 10 mió. kr. í Føroyum, 10 mió. kr. í Danmark, meðan tær seinastu 10 mió. kr. kundu verið tiknar aðravegir, helst uttanlands.

Tað kom býráðnum dátt við at fáa skriv frá landsstýrinum seinast í mai mánað, har sagt verður:

»at landsstýrið hevur samtykt at góðkenna, at kommunan lænir 10 mió. kr. í Føroyum og 10 mió. kr. í Danmark, meðan spurningurin um tær 10 mió. kr. at læna í útlendskari valuta verður skotin út til viðgerðar seinri.«

Svar landsstýrisins reisir nakrar rættiliga principiellar spurningar:

1. Við hvørjari heimild kann landsstýrið avmarka ávístan lántørv hjá kommunu við ⅔?

Tað er jú í roynd og veru tað, ið landsstýrið ger við svari sínum. Tað sigur, at tit biðja um loyvi at læna 30 mió. kr., men fáa bert loyvi at læna 20 mió. kr. nú.

Tað er kommununi greitt, at um samlaðu lán hennara vóru so stór, at ivi var um, hvørt hon kundi rinda lán síni aftur við teirri inntøku, ið hon hevur, so kundi landsstýrið ikki uttan víðari góðkent nýggja lántøku. Men hetta er ikki trupulleikin her. Landsstýrið veit, at av inntøkuni nýtir kommunan einans 16% til at rinda rentur og avdrátt við.

Tað er kommununi somuleiðis greitt, at um kommunan við lánunum hevði ætlað tiltøk gjørd, ið ikki falla innan fyri kommunalu heimildina, so hevði landsstýrið ikki loyvi at góðkent slíka lántøku. Men hetta er ikki tað, ið landsstýrið nýtir sum orsøk at avmarka lánsupphæddina við ⅔.

Fyrsti spurningurin er tí heilt greiður.

2. Við hvørjari heimild út um tær nevndu kann landsstýrið avmarka lántørv hjá kommunu við sum her ⅔?

Nevndu heimildir skuldu verið ivaleysar, tá tað snýr seg um kommunalt eftirlit, og vóru tær fylgdar, so vóru fleiri kommunur ikki í teirri støðu, tær eru í dag.

Tað kann tí vera neyðugt hjá landsstýrinum at bøta um tað, ið hevur fingið loyvið at hent. Hesum fari eg at taka undir við, men eg fari kortini at biðja um, at landsstýrismaðurin vísir á heimildina at gera tað, ið her verður gjørt — í stríð við galdandi kommunulóg og soleiðis, sum arbeitt hevur verið eftir henni.

Lat okkum annaðhvørt fáa greitt upplýst heimildina, og er hon ikki har ella ivasom, so lat okkum fáa lógaruppskot, ið klárt sigur frá teimum avmarkingum, ið landsstýrið metir neyðugar at gera í kommunala sjálvstýrinum.

Beint fyri Ólavsøku fingu kommunurnar sendandi oyðubløð at fylla út um hvørji lán, kommunurnar høvdu pr. 1. juli 1985, og hvørji lán tær ætlaðu at taka í verandi og komandi ári.

Sjálvt um skotbráið er stutt — 14 dagar — fær landsstýrið vónandi hesar upplýsingar frá øllum kommunum í Føroyum. Trupult er tó kortini at geva upplýsingar um hvønn lánsstovn, ið ætlast at vera nýttur, tá lán skulu takast upp í 1986.

Her veldst um, hvørjir møguleikar eru teir bestu, tá lánið skal takast upp.

Men vit í Havnar kommunu vilja eins og higartil sera positivt medvirka til, at landsstýrið fær hesar upplýsingar.

Vit eru samdir í, at ansast má eftir tí samlaða føroyska búskapinum, og at landið kemur burturúr hesi stóru uttanlandsskuld, tað er komið í.

Sín part av hesum arbeiði hevur kommunan leingi lagt dent á at gjørt og hevur tí megnað at minka um samlaðu lánini hjá kommununi úr 130 mió. kr. í 1980 niður í 120 mió. kr. í 1985, ella úr 10.265 kr. pr. íbúgva í 1980 niður í 8.790 kr. pr. íbúgva í 1985.

Kommunan vil eisini framyvir gera sítt til at hava positiva ávirkan á landsbúskapin, og tí kann kommunan taka undir við teimum kanningum, ið verða framdar.

Men kommunan heldur ikki, at landsstýrið kann nýta hesar kanningar til at forða teimum kommunum, ið hava gjørt sín part av arbeiðinum og reiðiliga tað, tá landsstýrið skal finna atgerðir at gera ímóti teimum, ið hava yvirútnyttað systemið — við stilltigandi loyvi landsstýrisins.

1. august varð við 28-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

18. december 1985 svaraði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Tórshavnar býráð bað í skrivi dagfestum 24. apríl 1985 um loyvi landsstýrisins til upptøku av lánum upp á 30 mió. kr., samsvarandi løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 um føroysku kommunurnar, § 39, stk. 1.

Kommunan greiddi frá, at henni tørvaði 30 mió. kr. í lántøku fyri at fremja tær ætlanir, ið vóru samtyktar við figgjarætlanini. Býráðið segði viðari frá, at tað ikki hevði gjørt av, hvar lánini skuldu verða tikin upp, men býráðið helt, at eitt býti kundi verið 10 mió. kr. í Føroyum, 10 mió. kr. í Danmark, meðan tær seinastu 10 mió. kr. kundu verið tiknar aðrarvegir, helst uttanlands.

Við skrivi dagfestum 22. mai 1985 segði landsstýrið frá, at tað hevði samtykt at góðkenna, at kommunan lænir 10 mió. kr. í Føroyum og 10 mió. kr. í Danmark, meðan spurningurin um tær 10 mió. kr. at læna í útlendskum valuta, varð skotin út til viðgerðar seinni.

Í skrivi dagfestum 8. juli 1985 mótmælir býráðið, at landsstýrið bert hevur givið loyvi til, at býráðið lænir 20 mió. kr. til ymisk ávís projekt sambært figgjarætlanini. Býráðið sigur seg ikki duga at síggja við hvørjari heimild, landsstýrið hevur tikið hesa avgerð, og vísir á, at projektini eru

innanfyri arbeiðsøki kommununnar, og at kommunan skuldi verið før fyri at goldið lánini aftur.

Landsstýrið svarar til hetta aftur í skrivi dagfestum 2. august 1985, at orsøkin til, at landsstýrið hevur avmarkað lánloyvini, er ikki, at landsstýrið heldur, at býráðið er farið út um sínar uppgávur, ella at kommunan skuldi ikki verið før fyri at goldið aftur. Orsøkin er, at landsstýrið ásannar, at uttanlandsskuld Føroya sum heild er ov stór, og at landsstýrið hevur sett sær fyri at temja skuldina øllum samfelagnum at gagni.

Seinni, nevniliga 27. september 1985, loyvir landsstýrið býráðnum at upptaka tær 10 mió. kr. í láni í útlendskum valuta.

Poul Michelsen, løgtingsmaður, spyr í hesum sambandi:

Við hvørjari heimild hevur landsstýrið avmarkað ávísari lántøku hjá kommununi?

Landsstýrið skilir spurningin soleiðis:

Gevur § 39 í kommunulógini landsstýrinum heimild til, tá tað viðger lánumsóknir frá kommunum at taka atlit til annað enn fíggjarligu støðuna hjá tí einstøku kommununi, nevniliga landsbúskaparlig atlit.

Til hetta spurning skal viðmerkjast:

§ 39 í kommunulógini er átøk tí í Danmark fyrr galdandi § 55, stk. 1, í donsku kommunestyrelsesloven nr. 223 frá 31. maj 1968. Hetta ásetan var í Danmark tulkað soleiðis, at eftirlitsmyndugleikin bæði kundi taka atlit til fíggjarligu støðuna hjá kommununi og landsbúskaparlig atlit sum heild.

Hetta sæst m.a. av »cirkulære om kommunernes låntagning« v.m. frá 1970 (Ministerialtidende 1970, s. 443). Av hesum framgongur av kap. 1, at innanríkismálaráðharrin ynskti avmarkingar í kommunalu lántøkunum generelt út frá »hensynet til opretholdelse af samfundsøkonomisk balance«.

§ 39, stk. 1, er átøk § 55, stk. 1, í nevndu lóg, og hevur landsstýrið somu støðu, sum innanríkismálaráðharrin tá hevði, nevniliga at § 39, stk. 1, gevur landsstýrinum heimild til at taka

a) atlit til fíggjarligu støðuna hjá tí einstøku kommununi,

b) atlit til landsfíggjarligu støðuna,

tá støða skal takast til, um lánloyvi kunnu gevast einstakari kommunu.

# 100-4. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferjulegu í Kirkjubø.

Ár 1985, týsdagin 22. oktober boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi, sum var soljóðandi:

**FYRISPURNINGUR**

Nær ætlar landsstýrið at bøta um ferðasambandið til Sandoynna, Hest og Koltur við einari ferjulegu í Kirkjubø?

**Viðmerkingar:**
Undanfarna landsstýrið gjørdi fyrireikingar til at byggja eina ferjulegu í Kirkjubø.

Modelroyndir vístu, at ein ferja hevði ligið trygt alt árið í tí ætlaðu ferjuleguni.

Tað er av sera stórum týdningi fyri Sandoynna, Hest, Koltur og eisini Skúvoynna, at ætlanir undanfarna landsstýrisins verða settar í verk.

Út frá hesum loyvi eg mær at spyrja landsstýrismannin.

23. oktober varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

18. december svaraði Lassi Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Fyrispurningurin var soljóðandi:

Nær ætlar landsstýrið at bøta um ferðasambandið til Sandoynna, Hest og Koltur við einari ferjulegu í Kirkjubø?

**Svar**

Tá ið ætlanin hjá undanfarna landsstýri datt niðurfyri, viðvíkjandi einari ferjulegu í Kirkjubø, var og er sjálvsagt neyðugt hjá núverandi landsstýrinum at finna loysnir, sum roknast kann við.

Landsstýrið hevur í løtuni til viðgerðar:

a) ferjulegu í Kirkjubø,

b) ferjulegu á Velbastað.

Tær neyðugu kanningarnar í sambandi við hesar báðar spurningar eru ikki loknar enn; men roknast kann við, at spurningurin verður framlagdur til viðgerðar í landsstýrinum í hesum árinum. Avsettar eru á komandi fíggjarlógaruppskotinum 6 milj. kr. til ferjulegu. Umframt hetta, er heimilað landsstýrinum landskassans vegna at læna upp til 13 milj. kr.

Landsverkfrøðingurin upplýsir, at tað tekur umleið 3 ár at byggja eina tílíka ferjulegu.

Samferðsluviðurskiftini til Sandoynna eru í dag á einum tílíkum støði, av vit livørki partapolitiskt, lokapolitiskt ella landspolitiskt kunnu góðtaka verandi umstøður, og m.a. tí hevur landsstýrið valt at prioritera samferðsluviðurskiftini til og frá Sandoynni høgt.

# 100-5. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi frádrátti í pensjónum.

Ár 1985, týsdagin 22. oktober boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jógvan Sundstein, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Hvat ger landsstýrið fyri at frádrátturin fyri fólkapensjónistar í tænastumannapensjon ella pensjónsviðbót verður avtikin?
2. Hvat ger landsstýrið fyri at geva avlamis- og fólkapensjónistum møguleika fyri at fáa lønarinntøku fyri ítrivsarbeiði, uttan at avlamispensjónin ella viðbótin til fólkapensjónina minka ella fella burtur?

**Viðmerkingar:**

1. Grunduppheddin til fólkapensjón er vanliga ikki niðurskorin í mun til aðra inntøku hjá viðkomandi fólkapensjónisti.

   Men tá ið tað snýr seg um persónar, ið fáa tænastumannapensjón ella pensjónsviðbót, verða upp til 74% av fólkapensjónini drigin frá í himari pensjónini.

   Serliga hjá teimum persónum, sum ikki hava rætt til fulla tænastumannapensjón, men bert fáa serliga játtan um lutvísa pensjón (viðbót) vegna langa tænastu, merkist hetta serliga nógv. Her er ein órættur, sum eigur at fáast burtur úr okkara fólkapensjóns- og tænastumannapensjónslóggávu.

Spurningurin er eisini, um lógin í veruleikanum umfatar tey, sum bert fáa játtaða eftirlønarviðbót, tí tey hava verið í almennum starvi uttan tænastumannaskipan.

2. Mangan koma avlamis- og partvís eisini fólkapensjónistar út fyri, at teirra pensjónir ella viðbøtur minka, tí teir átaka sær okkurt lønað arbeiði, t.d. egning. Slíkt ger ikki umstøður teirra betri, tvørturímóti skapar tað teimum keðiligar trupulleikar, eins og tað samfelagsliga bert er til ógagns. Slíkir persónar áttu tí at kunna vunnið sær eina væl hægri upphædd, enn núverandi reglur siga, uttan niðurskurð í almennu veitingunum.

23. oktober 1985 varð við 18-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

18. december 1985 svaraði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat ger landsstýrið, fyri at frádrátturin fyri fólkapensjónistar í tænastumannapensjón ella pensjónsviðbót verður avtikin?
2. Hvat ger landsstýrið fyri at geva avlamis- og fólkapensjónistum møguleika fyri at fáa lønarinntøku fyri ítrivsarbeiði, uttan at avlamispensjónin ella viðbótin til fólkapensjónina minka ella falla burtur?

Fyrst av øllum fari eg at siga, at eg eri glaður og takki fyri hetta fyrispurning, tí at hann vísir okkum á trupulleikar, ið landsstýrini frammanundan einki hava kunnað gjørt við, men vit nú eru farnir í holt við at loysa.

Til fyrra partin av fyrispurninginum kann eg upplýsa, at reglurnar um frádrátt fyri m.a. fólkapensjón í tænastumannapensjón, samskipanarfrádrátt. eru at finna í §§ 27-29 í løgtingslóg nr. 32 frá 5. juli 1971 um tænastumannaeftirlønir, sum vil siga, at 4 landsstýri undan okkum hava sitið og umsitið hesa lóg.

Reglurnar um samskipanarfrádrátt í løgtingslógini um tænastumannaeftirlønir eru tær somu sum reglurnar í donsku lógini um tænastumannaeftirlønir, og eg skal í hesum sambandi gera vart við, at løgtingslógin um tænastumannaeftirlønir bert umfatar tey, sum sett eru í starv eftir løgtingslóg um tænastumenn landsins, meðan reglurnar í donsku lógini um tænastumannaeftirlønir eru galdandi fyri aðrar, t.d. lærarar í fólkaskúlanum í Føroyum.

Tá orðið »pensjónsviðbót« er nýtt í hesum parti av fyrispurninginum, gangi eg út frá, at talan er ikki um pensjónsviðbót eftir almannalóggávuni, men um ta pensjón, sum vanliga verður rópt »eftirlønarsamsýning«, og sum í serligum føri verður veitt fólki, ið hevur ongan rætt til tænastumannapensjón.

Í viðmerkingunum til fyrispurningin verður um eftirlønarsamsýningina sagt, at spurningurin eisini er, um lógin — tað er ásetanin um samskipanarfrádrátt — í veruleikanum umfatar tey, sum bert fáa játtaða eftirlønarviðbót — t. e. eftirlønarsamsýning — tí tey hava verið í almennum starvi uttan tænastumannaskipan.

Til hesa viðmerking er at siga, at galdandi regla um eftirlønarsamsýning er, at tey starvsfólk, sum vóru í starvi hjá landinum, tá ið fyrsta føroyska tænastumannalógin kom í gildi 28. mars 1949, og sum framvegis eru í starvi hjá landinum, tá tey fara frá vegna aldur ella heilsubrek, fáa eina eftirlønarsamsýning svarandi til ⅔ av teirri eftirløn, viðkomandi hevði fingið, um hann var tænastumaður.

Mannagongdin viðvikjandi eftirlønarsamsýning og samskipanarfrádrátti er, at landsstýrið við samtykki fíggjarnevndarinnar hevur nýtt løgtingslógina um tænastumannaeftirlønir samsvarandi (analogt), tó við ⅔ sum tilskilað frammanfyri, fyri ikki-tænastumenn, sum settir vóru áðrenn 28. mars 1949.

Higartil hevur eftirlønarsamsýning verið ⅔ av tænastumannaeftirlønini. Haraftrat hevur fullur samskipanarfrádráttur verið gjørdur. Landsstýrið fer nú at leggja fyri fíggjarnevnd løgtingsins uppskot um at broyta hetta soleiðis, at eisini samskipanarfrádrátturin í eftirlønarsamsýningini verður ⅔ av samskipanarfrádráttinum fyri tænastumenn.

Landsstýrið er harumframt vitandi um, at teir í Danmark hugsa um at broyta og so við og við heilt at avtaka samskipanarfrádráttin, og vit vilja taka tað sama upp til umhugsunar í Føroyum.

Til næsta partin av fyrispurninginum skal eg fyrst upplýsa, at ein fólka- ella avlamispensjónistur eftir yvirlitinum yvir almannaveitingar tann 1. oktober 1985 kann hava 9.504,00 kr. sum ársinntøku, uttan at tað ávirkar pensjónsviðbót, grundarupphædd, brennistudning ella viðbøtur annars til pensjónina.

Ein hækking onnur enn tann vanliga prístalshækkingin í umrøddu upphædd, 9.504,00 kr., krevur lógarbroyting bæði á løgtingi og á fólkatingi, og eftir teimum samráðingum, sum landsstýrið hevði við almannamálaráðið danska í heyst um hækkan í ymiskum almannaveitingum, meta vit tað vera ivingasamt, um nakar møguleiki yvirhøvur er fyri at fáa eina slíka framda.

Landsstýrið arbeiðir tó við málinum og skal í næstum undir samráðingar við danir um blokkstuðulsskipan. Tá ið henda kemur igjøgnum, verða tað

uttan iva møguleikar fyri at hækka eisini loyvda inntøkumark hjá pensjónistum.

Viðmerkingarnar til fyrispurningin nevna egning sum dømi, og tað kom eisini fram á útróðrarstevnuni í Klaksvík, at egningin hjá pensjónistum er ov hart skattað. Undirritaði kann tí í hesum sambandi upplýsa, at eg havi reist spurningin í landsstýrinum um at broyta skattalógina, soleiðis at egning verður punktskattað, t. e. skattað fyri seg eins og rentuinntøka uttan at ávirka aðrar inntøkur. Tað hevði hjálpt um hjá pensjónistum og øðrum, ið egna í fríløtum, og tað hevði eisini komið væl við hjá útróðrarbátum.

Verði mær at enda loyvt til at vísa á hjáløgdu frágreiðing frá Almannastovuni, har lýst verður munurin millum figgjarstøðuna hjá einum fólkapensjónisti uttan aðra inntøku enn fólkapensjónina og einum fólkapensjónisti, sum umframt pensjón hevur cina arbeiðsinntøku upp á 25.000 kr. og skerda pensjónsviðbót og hægri skatt samsvarandi hesum. Henda frágreiðing vísir, at 47,4% av arbeiðsinntøkuni í hesum føri kemur pensjónistunum til góða.

## Upprit

1. Útrokningar eru gjørdar til sammetingar millum
   - **A.** Stakur fólkapensjónistur, limur í fólkakirkjuni, yvir 67 ár men undir 80 ár, búgvandi í Klaksvík, ongar viðbøtur útum pensjónsviðbót, **onga inntøku út um fólkapensjónina.**
   - **B.** Stakur fólkapensjónistur, limur í fólkakirkjuni, yvir 67 ár men undir 80 ár, búgvandi í Klaksvík, ongar viðbøtur útum pensjónsviðbót, **arbeiðsinntøka 25.000 kr.**

   Allar upphæddir eru ársupphæddir fyri 1984.
2. Útrokningarnar geva fylgjandi úrslit:

| | | A. | | B. |
|---|---|---|---|---|
| | | **Ongin inntøka** | | **25.000 kr.** |
| Grundarupphædd | | 33.033 kr. | | 33.033 kr. |
| Pensjónsviðbót | | 5.991 kr. | | 2.119, kr. |
| Fólkapensjón tils. | | 39.024 kr. | | 34.152 kr. |
| Arbeiðsinntøka | | 0 kr. | | 25.000 kr. |
| Inntøka tils. | | 39.024 kr. | | 59.152 kr. |
| Landsskattur | 0 kr. | | 1.948 kr | |
| Kommunuskattur | 2.080 kr. | | 8.382 kr. | |
| Kirkjuskattur | 62 kr. | 2.142 kr. | 101 kr. | 10.431 kr. |
| Peningur til taks | | 36.882 kr. | | 48.721 kr. |

3. Munurin ímillum A. og B. er sostatt 11.839 kr. og hevur tað við sær, at 47,4% av teimum 25.000 kr. kemur pensjónistunum til góðar.

# 100-6. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi telefonsambandinum til/frá og millum bygdir í Vágum.

Ár 1985, týsdagin 26. november boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá løgtingsmonnunum Ivan Johannesen og Svend Aage Ellefsen, sum var soljóðandi

**Fyrispurningur**

1. Verða ábøtur gjørdar á telefonnetið til/frá og millum bygdir í Vágum?
2. Hvussu verða ábøturnar fyriskipaðar?
3. Nær verða tær loknar?

**Viðmerkingar:**

Tað er eingin loyna, at telefonútgerðin í Vágum er ógvuliga svikalig.

Mangan er torført at fáa samtalu ígjøgnum, og mangan eru hoyrilíkindini sera vánalig.

Men tað, sum uppaftur verri er, er at telefonsambandið vestur í Vágar so mangan verður slitið og verður tá burtur longri tíðarskeið. Verður sambandið millum støðina í Havn og Vágarnar slitið, fæst heldur ikki samband millum felagar í Vágum, tá øll sambindingin ímillum felagarnar liggur á høvuðsstøðini í Tórshavn.

Eitt slit á kaðalin frá móttakarastøðini á Velbastaðhálsi oman til Havnar hevur sostatt tað til fylgu, at einki samband fæst við ella ímillum telefonfelagarnar í Vágum.

Hetta er komið fyri fleiri ferðir seinastu tíðina, og tað kann skjótt fáa sera óhepnar og álvarsamar fylgjur.

Hetta eru ótolandi viðurskifti, sum í stundini krevja eina broyting til tað betra.

Ein oyggj við út ímóti 3.000 menniskjum, flogvøllí og øðrum týðandi útbúnaði kann ikki framhaldandi góðtaka cina telefonskipan, ið ikki er á at líta.

Fyri okkum í Vágum er tað ti umráðandi at fáa greiði á hesum spurninginum.

3. december svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Fyrispurningurin var soljóðandi:
1. Verða ábøtur gjørdar á telefonnetið til/frá og millum bygdir í Vágum?
2. Hvussu verða ábøturnar fyriskipaðar?
3. Nær verða tær loknar?

**Svar**

Sum kunnugt hevur Telefonverk Føroya Løgtings (TFL) ábyrgdina av uppbygging og rakstri av øllum innanoyggja telefonsambandi í Føroyum, meðan danska »Post- og Telegrafvæsenet« (P&T) hevur ábyrgdina av øllum uttanlands telefonsambandi millum Føroyar og umheimin, og fremur hesa tænastu m. a. við einum samarbeiði við TFL.

Í sambandi við teir spurningar, sum eru settir, skal verða nevnt, at telefonnetið í einum samfelag er ein samanhangandi heild soleiðis, at atgerðir og trupulleikar í einum parti kunnu merkjast aðrastaðni eisini. At útbyggingar og ymsar broytingar og atgerðir eru neyðugar í einum telefonneti sum tí føroyska, har árligi vøksturin í telefontrafikkinum er 10-12% og í felagatalinum er 5%, er eyðsæð. Tað er heldur ikki løgið, at slíkar neyðugar broytingar av og á í styttri tíðarbilum føra við sær trupulleikar av ymsum slag, t.d. at meira trafikkur kemur á eitt strekki ella til eina støð, enn útbyggingin í løtuni svarar til, uttan so at órímiliga stórar íløgur verða gjørdar at tryggja einhvønn marginalan tørv, ið sum kunnugt er ein statistisk støddd.

Ein av teimum útbyggingum, sum nú fer fram, er ein viðkan av telefonkanal-talinum til útlandið úr 120 til 180. Hesa útbygging hevur P&T sum ábyrgdarhavandi framt í samarbeiði við TFL, og verður arbeiðið liðugt um fáar dagar. Frammanundan hevur kanal-talið verið ov lítið í eina tíð at nøkta tørvin ávísar tíðir í samdøgninum, og hava fólk sjálvsagt kunnað merkt hetta, tá ringt hevur verið til útheimin.

Umframt beinleiðis vansan við, at tað er upptikið ov ofta, tá roynt verður at ringja uttanlands, hevur henda viðkan havt við sær, at bygdastøðirnar og serliga millumbygdastøðirnar eru ov nógv lastaðar. T.d. hava trupulleikar verið í Søldarfirði av hesum slag. Hetta kemst av, at tá fólk av bygd ringja til útlandið, verða telefonlinjur til Havnar eisini bundnar. Tá hesar samrøður ikki kunnu verða gjøgnumførdar, tekur tað eitt lítið tíðarbil, áðrenn telefonlinjan millum bygdastøðina og Havnina er leys aftur. Fólk eru vanliga ótolin og ringja beinanvegin aftur, hóast møgulcikin fyri at fáa fatt ikki er til staðar á uttanlandssambandinum. Tey binda harvið eina linju aftrat til onga nyttu. Verður hetta gjørt nóg ofta og av nóg nógvum fólki, ið eru tilknýtt eina bygdastøð, verða skjótt allar linjur upptiknar, hóast bert fáar linjur í veruleikanum verða brúktar til telefonsamrøður.

Hesin trupulleikin hevur gjørt seg galdandi m.a. í teimum bygdum í Eysturoynni, sum eru knýttar at millumbygdastøðini í Søldarfirði, umframt í Vágum, men skuldi verið burtur, tá uttanlandslinjurnar eru lidnar. TFL's partur av hesum arbeiði hevur verið liðugur síðan tíðliga á sumri 1985; men trupulleikar tóku seg tíverri upp í tí danska endanum.

Telefonverkið er nú í ferð við eina størri umlegging og víðking av telefonskipanini, (har eisini nýggjur teknikkur verður tikin í brúk). Hesi strekkir eru við í hesum umfari:

Tórshavn-Tvøroyri.
Tvøroyri-Vágur.
Tvøroyri-Ilvalba.
Vágur-Sumba.
Miðvágur-Sørvágur.
Søldarfjørður-Fuglafjørður.
Søldarfjørður-Leirvík.
Klaksvík-Norðdepil.
Fuglafjørður-Oyndarfjørður.
Tórshavn-Sund/Kaldbak.

Tá hesi arbeiði verða liðug til várs, verður linjutalið millum nevndu bygdir nóg stórt í eina tíð. Eisini verður útgerð leys úr hesum støðum, sum kann verða nýtt at økja um linjutalið til aðrar bygdir, har serliga Søldarfjarðar-økið hevur átrokandi tørv, men eisini aðrar bygdir fáa gagn av hesi útgerð. Hesi arbeiði verða framd í vetur, tí útgerðin er tøk. Til dømis verður linjutalið Eysturoyggin-Tórshavn í hesum sambandi økt við 25%.

Tíverri viðførir kaðalslit av og á avbrot á sambandinum millum bygdir. Hetta hevur, sum nevnt í fyrispurninginum, í seinastuni verið áfatt í telefonsambandinum til Vágar. Tað er greitt, at hetta er óheppið; men tað kundi vanliga verið sloppið undan flestu av hesum feilum, um menn, ið gera graviarbeiði av ymsum slag, áðrenn teir fara í holt við arbeiðið, høvdu sagt telefonverkinum frá, sum teir hava skyldu til, samb. byggisamtyktina. Fyri at sleppa undan, at størri bygdir og landspartar í Føroyum liggja uttan telefon, eru lidnar ætlanir um í komandi tíð at gera dupult samband, so skjótt sum íløgufiggjarætlanir verða góðtiknar av landsstýri og løgtingi.

Tað er ein sannroynd, at eitt nútímans og vælvirkandi telefonnet í síni heild er sera viðkvæmt, um tað ikki støðugt verður útbygt í mun til tann væntaða nýtsluvøkstur. Samb. bestu sannføring er gjørd frammanfyri nevnda íløguætlan fyri 1986-1990. TFL sigur, at fremjan av hesi ætlan er fortreyt fyri, at vit kunnu loysa verandi trupulleikar og nøkta tann støðugt vaksandi tørvin.

# 100-7. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi byggisamtyktini í Kollafirði.

Ár 1985, týsdagin 3. december boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Øssi av Steinum, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvat hevur landsstýrið gjørt fyri at fylgja byggisamtyktini hjá Kollafjarðar kommunu viðvíkjandi íbindingini av iðnaðarøkinum í Sundunum í landsvegin?

Nær kann Kollafjarðar kommuna fara undir hesa vegagerð sambært byggisamtyktini fyri Kollafjarðar kommunu frá 17. oktober 1979?

**Viðmerkingar:**

Longu í 1980 gav kommunan eitt principielt byggiloyvi til Chemilux norðuri í Sundum á iðnaðarøkinum har, men bygdaráðið, ið sat frá 1981-85, fekk ikki avgreitt tað endaliga byggiloyvið, tí landsverkfrøðingurin noktaði íbindingina í landsvegin.

Sama skilið hevur verið við øðrum umsóknum í tíðarskeiðinum frá 1981-85.

Nú hevur nýtt bygdaráð sitið í 11 mánaðir, og enn er einki, ið røkist fyri nakrari loysn, hóast dúgliga hevur verið arbeitt við hesum máli, og hóast byggisamtyktin fyri Kollafjarðar kommunu klárt og greitt vísir á, hvar umrødda íbinding skal vera.

3. december varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

5. januar 1986 svaraði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

**Svar**

Sum svar til fyrra spurningin, um hvat landsstýrið hevur gjørt fyri at fylgja byggisamtyktini fyri Kollafjarðar kommunu viðvíkjandi vegaíbinding úr iðnaðarøki norðuri í Sundum í landsvegin, er at siga:

At við skrivi dagfest 29. oktober 1982 varð frá vegamyndugleikum landsins givið prinsipielt íbindingarloyvi við heimild í §§ 6 og 7 í løgtingslóg

nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir, við teirri treyt av ferðslutrygdarorsøkum, at bústaðir ikki verða bygdir undir landsvegnum norðuri í Sundum, og ber hetta við sær, at byggisamtyktin fyri kommununa átti at verið broytt samsvarandi hesum. Í sama skrivi varð kommunan biðin um at senda inn uppskot til vegíbinding, soleiðis at endaligt íbindingarloyvi kundi útskrivast, um uppskotið varð góðtikið.

Táið byggisamtyktin fyri kommununa varð endurskoðað í 1983/84, varð í góðkenningarskrivi landsstýrisins, dagfest 9. februar 1984, heitt á kommununa at broyta byggisamtyktina á økinum, talan er um, í samsvari við áðurnevnda skriv frá 29. oktober 1982. Heimildin fyri hesi áheitan er í § 4, 3. parti í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum sigur: »Landsstýrið kann áleggja kommunu at broyta eina góðkenda byggisamtykt.«

Síðani tá hava ymiskar samráðingar verið um málið, m.a. tí at landsstýrið í áðurnevnda góðkenningarskrivi eisini hevur heitt á kommununa um at umhugsa annað øki til vinnuendamál enn á Rættarleiti; men úrslitið er, at vinnuøkið verður verandi á Rættarleiti.

Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu hevur 2. december 1985 viðgjørt málið, soleiðis sum náttúrufriðingarlógin ásetir, og fer yvirfriðingarnevndin — eftir kærufreitst upp á 4 vikur — at taka endaliga støðu í málinum.

Eisini hevur landsverkfrøðingurin fyri kommununa gjørt áður umbidna projekt av íbindingarvegnum og við skrivi, dagfest 2. januar 1986, útskrivað íbindingarloyvið.

Viðvíkjandi seinna spurninginum, um nær kommunan kann fara undir nevndu vegagerð, er at nevna:

At um annars ognarviðurskiftini eru í lagi, og tær treytir, sum settar eru í íbindingarloyvinum, verða fylgdar, kann kommunan fara undir vegarbeiðið so skjótt, sum yvirnáttúrufriðingarnevndin hevur givið endaliga loyvið.

# 100-8. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi atløguviðurskiftunum hjá Strandfaraskipum Landsins í Havn.

Ár 1985, týsdagin 3. december varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at niðanfyristandandi fyrispurningur frá Jákup Lindenskov, løgtingsformanni, skuldi svarast:

## Fyrispurningur

1. Hví hava smærru skip strandferðslunnar ikki fast atløgupláss við Bursatanga?
2. Vil landsstýrið skipa so fyri, at ferðaskipini, ið sigla til Nólsoyar, Hest, Koltur (og Skúvoyar) fáa fast atløgupláss við Bursatanga?

**Viðmerkingar:**

Tað er rættiliga tilvildarligt, hvar ferðaskipini leggja at, tað kann verða langt úti á molanum ella innari ella við Bursatanga. Hetta eru viðurskifti, sum eru til ovurstóran ampa hjá teimum ferðandi, ikki minst fyri tey, sum koma av plássum, har eingir bilar eru, tí tað kann vera torført, um ikki ógjørligt at skula gita sær til, um tú skalt vera á Bursatanga ella hvar úti á molanum til fráfaringartíð og samstundis vera klárur at taka til renningar ofta við viðføri fyri at náa skipið — vit hava tá í huganum vísuna »Um 8 minuttir fer »Másin« avstað...«

Sama ger seg galdandi við farmagóðsi, mjólkardunkum, sum standa eftir á Bursatanga, tí skipið liggur á molanum og øvugt.

Herafturat eru møguleikar hjá ferðafólki yvirhøvur sera vánaligir, tey mugu standa úti í øllum veðri og bíða, uttan at kunna leita sær skýli; her eru viðurskiftini út av lagi í Havn.

11. apríl svaraði Lassi Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis

## Svar

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hví hava smærru skip strandferðslunnar ikki fast atløgupláss við Bursatanga?
2. Vil landsstýrið skipa so fyri, at ferðaskipini, ið sigla til Nólsoyar, Hest, Koltur (og Skúvoyar) fáa fast atløgupláss við Bursatanga?

## Svar

Øll strandfaraskipini hava í dag fæst atløgupláss, nevniliga soleiðis:

A. Dúgvan við Bursatanga.
B. Ritan við Bursatanga.
C. Tróndur framman fyri havnarskrivstovuna, við ferjuleguna á Molanum.
D. Smyril við ferjuleguna á molanum.
E. Pride við molan framman fyri Smyril.

Sostatt er greitt, at strandfaraskipini hava føst atløgupláss, og viðvíkjandi spurninginum um farmagóðs og mjólkardunkum v. m., hava bæði pakkhús-

menn strandferðslunnar eins og teir, ið kom við og eftir mjólkardunkum, kunnleika um, hvar skipini hava síni føstu atløgupláss.

Strandferðsluskipið, ið siglir til Nólsoyar, Hests og Skúvoyar, eitur Pride og hevur fast atløgupláss úti á eystara molanum framman fyri Smyril. Skal Pride hava fast atløgupláss á ella við Bursatanga, mugu antin Ritan ella Dúgvan flytast ella býta um pláss við onnur skip, og so er sami trupulleikin aftur við teimum ferðandi, sum skulu ávikavist til Sandoynna ella inn á Skálafjørðin.

Einasti møguleiki fyri at fáa broytt um atløguplássið hjá Pride er, at ferðaætlanin verður broytt soleiðis, at hetta skip kann sigla rututúrarnar frá og til Bursatanga tær tiðirnar, tá annaðhvørt Dúgvan ella Ritan ikki liggja har.

Annars kann viðmerkjast, at tá siglingarloyvi fyri Tróndа til Skopunar verður í lagi, verður óneyðugt við tveimum skipum til Skopunar, og verður hetta tá gjørt við Tróndi, sum hevur fast atløgupláss undir havnarskrivstovuni, og kemur ferðaskipið til Nólsoyar, antin hetta verður Pride ella Ritan, at liggja og hava fast atløgupláss við Bursatanga.

Viðvíkjandi spurninginum um, at ferðafólk mugu standa úti í øllum veðri og bíða eftir strandfaraskipunum, er at siga, at hetta skuldi verið óneyðugt, tá strandferðslan eigur eitt hús, ið stendur á Bursatanga, ið er ætlað ferðafólki at bíða í. Húsið letur upp tíðliga á morgni og verður læst aftur um kvøldið, tá skipini eru liðug at sigla, og kunnu ferðafólk nýta húsið sum bíðihøli allan dagin.

# 100-9. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi kommunalari barnaansing.

Ár 1985, mánadagin 16. december boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá løgtingslimunum Karin Kjølbro og Jóannes Dalsgaard, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Hvørja støðu hevður landsstýrið til tær kommunalu ætlanir um sonevndar »ófraditionellar« barnaansingarskipanir, sum nú eru upp á tal?
2. Kann landsstýrið veita foreldrum og avvarðandi trygd fyri, at eingin barnaansingarskipan, sum ikki er fult í tráð við galdandi lóggávu, verður loyvd nakrari kommunu?

3. Ætlar landsstýrið at taka upp samráðingar við statsligar og kommunalar myndugleikar um framtíðarútbyggingina av barnaansingarstovnum í Føroyum?

**Viðmerkingar:**
Sum kunnugt er tørvurin á barnagarðs- og vøggustovuplássum sera stórur í Tórshavn og á flestu stórplássum.

Ein rættiliga stór útbygging er farin fram á hesum øki, men kortini restar nógv í til tess at nøkta tørvin, og hevur ávís kommuna samtykt at seta í verk barnaansingarætlan, sum víkir heilt munandi frá tí, sum vanliga verður fatað sum kommunal barnaansing, tað veri seg við dagstovnum ella dagrøkt.

Talan er, eftir hvat fjølmiðlarnir vilja vita, um eina ansingarskipan á ítróttarøki undir umstøðum, sum ikki kunnu metast at vera forsvarligar, um hugsað verður um tørv barnanna. Skipanin er eftir øllum at døma eisini beinleiðis í strið við barnaforsorgarlógina.

Nevnda skipan verður søgd at verða neyðug, av tí at vanligir dagstovnar eru ov kostnaðarmiklir. Eisini verður givið sum grund, at danska sosialstýrið hevur blokkerað fyri fleiri dagstovnum í Føroyum.

***Av tí,*** at tað er av stórum týdning, at eingin skipan, sum bert kann hugsast at verða til ógagns fyri børnini, verður sett í verk, ***av tí*** at nevndu ætlanir hava vakt ótta og ótryggleika, og ***av tí*** at tað má fáast greiði á, hvørt danska sosialstýrið blokkerar fyri eini ábyrgdarfullari og forsvarligari útbygging av dagstovnum í Føroyum, halda undirritaðu tað verða neyðugt at seta landsstýrismanninum hendа fyrispurning, sum er í trimum punktum.

16. december 1985 varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

15. januar 1986 svaraði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

1. Hvørja støðu hevur landsstýrið til tær kommunalu ætlanir um sonevndar »ótraditionellar« barnaansingarskipanir, sum nú eru upp á tal?
2. Kann landsstýrið veita foreldrum og avvarðandi trygd fyri, at eingin barnaansingarskipan, sum ikki er fult í tráð við galdandi lóggávu, verður foyvd nakrari kommunu?
3. Ætlar landsstýrið at taka upp samráðingar við statsligar og kommunalar myndugleikar um framtíðarútbyggingina av barnaansingarstovnum í Føroyum?

Til **1:**
Til hetta er at siga, at málið um tær ætlaðu sonevndu »ótraditionellu« barnaansingarskipanir er til viðgerðar í landsstýrinum.

Landsstýrið hevur 13. september 1985 fingið skriv við áliti »Frítíðarvirksemi fyri børn — barnaansing« frá Tórshavnar býráð, har biðið verður um prinsipiella tilsøgn um studning til ymiskar barnaansingarskipanir.

Málið varð 27. september 1985 sent Almannastovuni og Landsskúlafyrisitingini til ummælis, og Landsskúlafyrisitingin hevur sent landsstýrinum ummæli sítt 18. oktober 1985, meðan landsstýrið ikki enn hevur fingið ummælið frá Almannastovuni, av tí at Almannastovna bíðar eftir umbidnum tilfari frá Tórshavnar býráð.

So skjótt Almannastovan hevur fingið hetta tilfar og sent landsstýrinum ummæli sítt, fer landsstýrið at taka støðu í málinum.

**Til 2:**
Landsstýrið skal eftir barnaforsorgarlógini § 32 góðkenna dagstovnar fyri børn og ung, og landsstýrið fer ikki at góðkenna, at dagsstovnar verða settir á stovn, sum ikki eru í samljóð við ta til cina og hvørja tíð galdandi lóggávu.

**Til 3:**
Landsstýrið hevur ongar ætlanir um at taka upp beinleiðis samráðingar við ríkis- og kommunumyndugleikar um framtíðarútbygging av barnaansingarstovnum í Føroyum.

Hetta er ikki neyðugt, tá landsstýrið einsamalt eftir barnaforsorgarlógini § 32, 1. stk. hevur góðkenningarmyndugleika, og tá ein stovnur er góðkendur, rindar eftir § 43, 1. stk. í barnaforsorgarlógini ríkiskassin 40%, avvarðandi kommuna 30% og foreldrini 30% av rakstrinum, meðan húsaútreiðslurnar tó verða rindaðar við 4/7 úr ríkiskassanum og 3/7 av avvarðandi kommunu.

Men landsstýrið vil stuðla stovnseting av barnagørðum og vøggustovum, har tað verður hildið neyðugt og er ynskiligt, og vil landsstýrið somuleiðis virka fyri, at dagrøktarskipanin verður útbygd, sum tørvur er.

Harumframt kannar landsstýrið í dag møguleikan fyri og miðar ímóti at kunna veita stuðul til foreldur, ið ansa børnum sínum heima og sostatt ikki gera nýtslu av nøkrum vøggustovu-, barnagarðs- ella dagrøktartilboðum.

F. L. j. nr. 1031-19-1.

# 100-10. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferjuhavnini inni á Firði í Vestmanna.

(Frá Olafi Olsen, løgtingsmanni).

Ikki framsettur.

# 100-11. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi bygging av posthúsi á Tvøroyri.

Ár 1985, hósdagin 19. december boðaði formaðurin frá einum fyrispurningi frá Sverra Midjord, løgtingsmanni, sum var soljóðandi

## Fyrispurningur

1. Hvørjar ítøkiligar ætlanir fyriliggja frá samgonguni 1980-84 viðvíkjandi bygging av posthúsi á Tvøroyri?
2. Hvørjar fyrireikingar fyriliggja frá samgonguni 1980-84 viðvíkjandi flyting av frímerkjadeild til Suðuroyar?
3. Hvørjar ætlanir hevur verandi samgonga fyri at loysa málið viðvíkjandi posthúsinum á Tvøroyri?
4. Hvørja støðu hevur verandi samgonga til flyting av frímerkjadeild til Suðuroyar?

11. apríl 1986 svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

## Svar

Partar av fyrispurninginum, pkt. 1 og 2, viðvíkja ætlanum hjá samgonguni 1980-84. Tað er eyðsæð, at hetta landsstýrið ikki kann svara uppá, hvørjar ætlanir ella hugsanir tann samgongan hevði. Hesin partur av fyrispurninginum kann tí bert svarast í tann mun, okkurt er farið fram, sum framgongur av málinum.

**Ad 1:**
Í 1983 var tilboð um leigumál til posthús í skrivstovubygningi, ið N. J. Mortensen hevði og hevur ætlanir um at byggja á Tvøroyri.

Enn er einki komið burtur úr hesari bygging, m.a. tí neyðug loyvi í sambandi við byggingina enn ikki eru fingin.

Postverkið upplýsir, at eitt skifti var býráðið eisini inni í myndini sum útleigari til postverkið í bygningi, býráðið sjálvt ætlaði at byggja.

**Ad 2:**
Einki fyriliggur um ætlanir hjá samgonguni 1980-84 um flyting av frímerkjadeildini til Suðuroyar.

**Ad 3:**
Tað verður framvegis arbeitt við spurninginum um at loysa høli strupulleikarnar hjá posthúsinum á Tvøroyri. Tað, sum frammanundan er farið fram sbrt. pkt. 1 viðvíkjandi møguligum leigumáli við N. J. Mortensen ella býráðið, hevur sjálvandi seinkað einari endaligari loysn.

Postverkið upplýsir, at tað seinasta, ið fyriliggur í hesum máli, er skriv, dagfest 4. mars í ár, frá býráðnum á Tvøroyri, har sagt verður, at byggjast kann á økinum hjá N. J. Mortensen, treytað av at tað eru brúkararnir av hølunum t.d. postverkið, sum byggja og eiga hølini og ikki N. J. Mortensen.

Ongar tingingar hava verið síðani nevnda skriv.

**Ad 4:**
Samgongan hevur ikki tikið nakra støðu í spurninginum um flyting av frímerkjadeildini.

Postverkið upplýsir í hesum sambandi, at arbeiðið á frímerkjadeildini hevur verið munandi í minking og heldur annars ikki, at tað er til gagns fyri postverkið ella fólkið, sum starvast har, at deildin verður flutt.

# 110-12. Fyrispurningur til løgmans viðvíkjandi uppsøgn av postmeistaranum

(Frá Óla Breckmann, løgtingsmanni).

Ikki framsettur.

# 100-13. Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrislim, viðvíkjandi vanlukkutrygging.

Ár 1986, mikudagin 12. februar boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Olafi Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Er arbeiðið við at endurskoða vanlukkutryggingarfyriskipanina fullført?
2. Nær verður úrslitið av hesum arbeiði lagt fyri tingið?

**Viðmerkingar:**
Fyri einum ári síðani legði Fólkaflokkurin uppskot fram fyri tingið um at fáa øll vanlukkutryggjað, og eisini uppskot til samtyktar um at endurskoða vanlukkutryggingarskipanina.

Hesi uppskot vórðu ikki samtykt, men meirilutin í Almanna- og Heilsunevndini legði eitt annað uppskot til samtyktar fram, sum ljóðaði soleiðis:

> Løgtingið áleggur landsstýrinum at skipa fyri, at 9-mannanevndin viðvíkjandi endurskoðan av vanlukkutryggingini fær høvi til at fullføra arbeiðssetning sín. Úrslitið av hesum arbeiði verður lagt fyri tingið í komandi tingsetu.

Hetta uppskotið varð samtykt við 30 atkvøðum.

Tað var annars upplýst í álitinum frá nevndini, at umtalaða 9-mannanevnd var komin so langt við arbeiði sínum, at klárt var at fara undir sjálvt lógarsmíðið.

Eg vóni ti, at nevndin »hevur fingið høvi til«, sum tað stendur í uppskotinum til samtyktar, at fullføra arbeiðið. Nú er eitt ár liðið, og skuldi ti úrslitið kunna fyriligið nú. Ti verða hesir spurningar settir fram.

12. februar varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

15. februar svaraði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Fyrispurningurin var soljóðandi:
1. Er arbeiðið við at endurskoða vanlukkutryggingarfyriskipanina fullført?
2. Nær verður úrslitið av hesum arbeiði lagt fyri tingið?

**Til 1:**
Arbeiðið við at endurskoða vanlukkutryggingarfyriskipanina er um at vera fullført.

Formaðurin í tí arbeiðsbólkinum, sum landsstýrið við skrivi, dagfest 3. februar 1980 setti at endurskoða vanlukkutryggingarfyriskipanina, hevur boðað landsstýrinum frá, at arbeiðsbólkinum bert tørvar nakrar fáar fundir aftrat fyri at kunna enda arbeiði sítt.

**Til 2:**
Eg meti, at arbeiðsbólkurin verður liðugur við arbeiði sítt so skjótt, at landsstýrið fer at kunna leggja úrslitið fyri tingið í komandi ólavsøkutingsetu.

# 100-14. Fyrispurningur til Jóngerð Purkhús, landsstýrislim, viðvíkjandi upplýsingum um skatt.

Ár 1986, mikudagin 12. februar boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Olafi Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Eru broytingarnar í upplýsingartænastuni um gjalding og útrokning av skatti klárar at seta í verk?
2. Nær kunnu skattaborgararnir rokna við, at teir fáa meira at vita um, hvussu teirra peningur til tað almenna verður tikin av lønini, og citt orð um, at tað verður gjørt?

**Viðmerkingar:**
Fólkaflokkurin legði hin 20. mars 1985 fram uppskot til samtyktar fyri løgtingið um upplýsingar til skattaborgararnar um tann pening, sum teir rinda til tað almenna. Málið varð ikki samtykt, men ein meiriluti (samgonguflokkarnir) í skattanevndini, sum hevði málið til viðgerðar, skrivaði í álitinum, at hann ásannar, at upplýsingarnar viðvíkjandi samtíðarskattinum ikki eru nóg góðar. Víðari verður sagt í álitinum frá meirilutanum, at fyrireikingar eru gjørdar til at gera broytingar í upplýsingartænastuni til heystar.

Nú er so heystið farið, og várið líður eisini. Tí verða hesir spurningar settir fram nú.

12. februar 1986 varð við 20-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

15. apríl svaraði Jóngerð Purkhús, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Eru broytingarnar í upplýsingartænastuni um gjalding og útrokning av skatti klárar at seta í verk?
2. Nær kunnu skattaborgararnir rokna við, at teir fáa meira at vita um, hvussu teirra peningur til tað almenna verður tikin av lønini, og citt orð um, at tað verður gjørt?

**Ad 1:**

Ætlanin er ikki at senda skattaborgarunum eina útrokning hvørja ferð, ið skatturin verður trektur í sambband við eina lønarútgjalding.

Ein tílík útrokning er rættiliga umfatandi og kompliscrað, og tað vil tí verða rættiliga ivasamt, hvørja gleði skattaborgararnir fara at fáa av at fáa hesa útrokning sendandi, hvørja ferð skattur verður trektur. Eisini er ein tílík mannagongd rættiliga kostnaðarmikil. Roknast kann við einari eyka-útreiðslu uppá í minsta lagi 10 mió. kr. árliga til koyring á P/F Elektron, pappír, brævbjálvar, pakking, falding og porto.

**Ad 2:**

Arbeitt verður við at bøta um upplýsingartænastuna yvirfyri skattaborgarunum, og kemur hon framyvir at byggja á hesi tiltøk:

1. Hin 30. juni 1986 verður kontoavrit sent út til allar skattaborgarar. Hetta kontoavrit fer at vísa, hvørjar lønir eru farnar gjøgnum A-skattaskipanina frá 1. januar til 30. juni 1986, og hvussu nógvur skattur er roknaður av hvørjari einstakari lønarútgjalding. Ætlanin er framyvir at senda 2 tílík avrit út árliga, eitt 30. juni og eitt 31. december.

2. Tá ið eitt inntøkuár er endað, verður ein lítil bóklingur sendur til hvønn einstakan skattaborgara. Eftir hesum bóklingi kunnu skattaborgararnir rokna skatt teirra og kann í hesum sambandi nevnast, at tá ið árið er liðugt, er útrokningin av skattinum sera einføld.

3. Á ársuppgerðini, ið fyri 1985 verður útsend 1. oktober í ár, verður skatta-útrokningin eisini víst í høvuðsheitinum. Arbeitt verður fyri, at løntakarar fáa ársuppgerðina senda út uppaftur fyrr komandi ár.

4. Um ein skattaborgari ynskir at síggja skattaútrokningina av einari ávísari lønarútgjalding, kann hann ringja til líkningarvaldið og fáa eina tílíka útrokning sendandi.

Í hesum sambandi skal nevnast, at arbeitt verður í løtuni við einari kunningardeild á Líkningarráð Føroya, ið skattaborgarar kunnu ringja til og fáa skjótt svar upp á allar vanligar skattaspurningar.

# 100-15. Fyrispurningur til Atla Dam, løgmann, viðvíkjandi fiskivinnuavtaluni Ísland-Føroyar.

Ár 1986, hósdagin 20. februar boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jógvani I. Olsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hevur landsstýrið havt nakrar samráðingar við íslendingar um okkara fiskiloyvir fyri 1986?

**Viðmerkingar:**
Sambært avtalu við Ísland frá 13. januar 1983 um sínamillum fiskirættindi Føroyar-Ísland eru almennu reglurnar hesar:

Heildarveiðan hjá føroyskum skipum undir Íslandi má ikki vera hægri enn 17.000 tons uppá ársgrundarlag, og av hesi nøgd má veiðan eftir toski ikki fara upp um 8.000 tons.

Íslendskir myndugleikar áseta mest loyvdu veiðunøgd, m. a. fyri tosk, hjá føroyskum skipum hvørt ár, eftir samráðingar við Føroya landsstýri, og havandi í huga støðuna hjá viðkomandi fiskastovnum eins væl og onnur viðurskifti av týdningi fyri báðar partar.

Føroysk skip, sum fiska undir hesum treytum, skulu lúka somu reglur sum íslendsk skip í somu fiskivciðu, harímillum reglur um meskastødd í botntroli og flótitroli, minstamát fyri fiskasløg, friðingarøki og reglur um stongd øki.

Føroysku skipini skulu dagliga siga íslendsku sjóverjuni frá, hvar tey eru stødd, meðan tey veiða undir Íslandi.

Henda skipanin um fiskivinnuna undir Íslandi hjá føroyskum skipum kemur istaðin fyri eldri fyriskipan um sama evni og kann verða uppsøgd við 6 mánaða freist av báðum pørtum.

Tað framgongur, at veiðunøgdin av botnfiski, føroyingar kunnu fiska í íslendskum sjógvi, eftir samráðingar millum partarnar, skal ásetast fyri hvørt ár, og at vit í mesta lagi fáa 17.000 tons.

Orsakað av at íslendski toskastovnurin var illa fyri í 1983, fór okkara partur niður í ialt 8.500 tons.

Í sama sambandi var týðiliga víst á, at henda nøgd vildi bliva hækkað aftur, um toskastovnurin seinni bleiv betri fyri.

Tað frættist, at toskastovnurin við Ísland hevur ment seg væl aftur, og tí skuldu góðir møguleikar verið fyri at økt aftur um okkara part í íslendskum sjógvi.

Nú er komið út í hálvan februar, og tí loyvi eg mær at seta fram henda spurning.

Sama dag varð við 22-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

17. apríl svaraði løgmaður fyrispurninginum soleiðis

**Svar**

Spurningurin snýr seg um samráðingar við íslendingar um fiskiloyvi við Ísland í 1986.

Svarið er, at munnligar samráðingar á fundi og í telefon hava verið um málið, eins og umsóknir, ið byggja á galdandi avtalu, eru sendar íslendingum í góðari tið, áðrenn fiskiskapurin skuldi byrja.

Úrslitið hevur fyribils verið, at íslendingar hava játtað fiskiloyvir til 3.000 tons, ið kunnu veiðast fram til 1. august.

Tað er eingin loyna, at annað fiskivinnumál — sum júst í gjár og í dag hevur verið viðgjørt á millumlandastigi — er tengt at hesum máli.

Avtalað er, at samráðingar um hetta mál verða tiknar upp í bræði.

# 100-16. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferðasambandinum til Mykines.

Ár 1986, mánadagin 24. februar boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Ivan Johannesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

## Fyrispurningur

1. Hevur landsstýrið, sum lovað, funnið eina loysn, soleiðis at eitt betri hóskandi far enn m/b Súlan kemur at sigla upp á Mykines?
2. Eru nakrar fyrireikingar gjørdar, fyri at ábøtur kunnu verða gjørdar á lendingarviðurskiftini komandi summar?

**Viðmerkingar:**
Tann 9. august 1985 vóru Lasse Klein, Ivan Johannesen, Svend Åge Ellefsen, umboð fyri Strandferðsluna og umboð fyri Landsverkfrøðingin úti í Mykinesi fyri at kunna okkum um ferðasambandið til og úr Mykinesi.

Fundur var við Bygdarráðið, sum vísti á, at m/b Súlan var eitt sera illa hóskandi far til at røkja ferðafólkaflutning, og at báturin harumframt var í ringum standi.

Bygdarráðið vísti eisini á, at lendingarviðurskiftini vóru vánalig og trongdu til stórar ábøtur.

Undanfarna landsstýrið fyrireikaði bygging av nýggjum skipi til siglingina upp á Mykines. Arbeiðið bleiv útboðið, men núverandi landsstýri steðgaði hesi ætlan.

Út frá hesum loyvir undirritaði sær at seta fram henda fyrispurning.

24. februar varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at Lasse Klein, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

10. apríl svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum frá Ivan Johannesen, løgtingsmanni, soleiðis:

## Svar

Fyrispurningurin Ivan Johannesens snýr seg um ferðasambandið til Mykines, og er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið, sum lovað, funnið eina loysn, soleiðis at eitt betri hóskandi far enn m/b Súlan kemur at sigla upp á Mykines?
2. Eru nakrar fyrireikingar gjørdar, fyri at ábøtur kunnu verða gjørdar á lendingarviðurskiftini komandi summar?

**Ad 1:**
Eingin ivi er um, at m/b »Súlan« er í sera ringum standi og er illa hóskandi far til at røkja ferða- og farmaflutning til Mykines í tí standi, sum hon í dag er í.

Fleiri royndir eru gjørdar til tess at fáa nýtt skip til hesa farleið, men enn hevur hetta ikki eydnast. Aftur nú verða royndir gjørdar, og úrslitið av hesum royndum verða helst tøkar seinri í hesum mánaðinum.

Um tað ikki eydnast at keypa ella leiga hóskandi far beinanvegin, verður neyðugt at útvega eitt av førunum í strandferðsluflotanum sum eina fyribilsloysn, til vit hava funnið eitt hóskandi far.

**Ad 2:**
Til henda spurningin er at siga, at skitsuprojekt er gjørt i sambandi við betran av verandi lending, soleiðis at atløgusíðan verður 25 m long, og dýpið inni á gjónni 3,5 - 4 metrar. Hetta skuldi givið møguleikar fyri, at t. d. ein 14 - 15 metrar langur bátur kann nýta lendingina. Kostnaðurin av hesum arbeiði verður mett til 3 mió. kr.

Annar møguleiki er eisini kannaður, og kostnaðurin mettur til einar 12 -14 mió. kr.

Nakrar beinleiðis fyritreikingar til bygging eru ikki gjørdar enn, men mett verður, at ábøtur á verandi lending kunnu fremjast í summar, treytað av at bygdarráðið gongur inn fyri, at arbeiðið byrjar, at neyðug figging fæst til vega, og at kønur arbeiðstakari kann átaka sær at fremja arbeiðið.

# 100-17. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi nýggjum millumbylgjusendara.

Ár 1986, mánadagin 24. februar boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Tordi Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvussu langt er komið áleiðis, og nær kann væntast, at nýggjur millumbylgjusendari til Útvarp Føroya verður tikin í nýtslu?

**Viðmerkingar:**
Søgan hjá millumbylgjusendaranum er í stuttum hon, at síðan Útvarp Føroya varð sett á stovn í 1957 hevur ein 5 kW sendari verið nýttur.

Á altjóða ráðstevnu í Geneve í 1976 fekk útvarpið tillutað MB-frekvens við 200 kW sendistyrki. Árið eftir legði landsstýrið uppskot á ting um at byggja útvarpinum sendara við umtalaðu styrki. Málið fór í figgjarnevndina og bleiv liggjandi har.

Í 1982 var so uppskot aftur á tingborði um at byggja sterkari MB-sendara til útvarpið. Málið fór í nevnd og varð í nevndarálitinum av meirilutanum vist á, at landsstýrið arbeiddi við málinum.

Í brævi, dagfest 13. juni 1984, heitir landsstýrið á Telefonverk Føroya Løgtings um at skipa fyri projektering av nýggjum millumbylgjusendara á Skúvanesi, soleiðis at farast kann undir at byggja á sumri 1985.

Í februar 1985 verður fylgjandi upplýst av TFL: »Arbeiðið er byrjað, hvat viðvíkur projektering og ætlanum um umvæling av loranstøðini á Skúvanesi, ið skal hýsa nýggja millumbylgjusendaranum. Seinri í summar verður detailprojekteringin liðug, og verður projektið tá lagt fyri landsstýrið til støðutakan um, hvønn og hvussu stóran sendara vit eiga at ordra...« Í hesum sambandi varð eisini upplýst, at TFL fór at mæla til ein 200 kW sendara og 150 metrar høga antennumastur.

Hóast FM-sendarin hevur bøtt um lurtimøguleikarnar á landi, so kann ikki sigast, at hetta hevur hjálpt stórvegis upp á støðuna hjá sjófólki okkara — útróðra- og fiskimonnum landsins. Hesir hava í so máta verið stak illa fyri, og eigur nú málið sum skjótast at fáa eina loysn, soleiðis at landsmenn okkara, ið búleikast á sjónum, á hesum øki eisini fáa rímilig kor.

Havandi í huga,

***at*** liðin eru nærum 10 ár, síðan uppskot um sterkari millumbylgjusendara kom á tingborð,

***at*** livitíðin hjá 5 kW sendaranum fer at styttast,

***at*** peningur í fleiri ár er avsettur á fíggjarløgtingslógini til endamálið, og

***at*** fiski- og útróðramenn áður hava sent løgtinginum áheitan um at fáa bøtt um viðurskiftini, er tað, at spurningurin verður reistur.

Loksins verður havt í huga støðan hjá samgonguni í hesum máli, har beinleiðis verður sagt: »Millumbylgjusendari verður bygdur ***beinanvegin***«.

15. apríl svaraði Lasse Klein, landsstýrimaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Fyrispurningurin var soljóðandi:

»Hvussu langt er komið áleiðis, og nær kann væntast, at nýggjur millumbylgjusendari til Útvarp Føroya verður tikin í nýtslu?«

**Svar**

Um gongdina í málinum viðvíkjandi nýggja millumbylgjusendara til Útvarp Føroya kann upplýsast:

Eftir at hava havt eitt fyribils útboð í december 1985 av einari millumbylgjusendistøð, eru orienterandi tilboð júst innkomin.

Við hesum sum grundarlagi er ætlanin saman við P&T at gera eitt endaligt útboð til eina millumbylgjusendistøð á Skúvanesi.

Hetta ætlast at verða liðugt í apríl mánað og verður sent landsstýrinum til støðutakan og góðkenningar, áðrenn tað verður sent á marknaðin. Útboðs-

tilfarið kann verða sent á marknaðin allarfyrst í mei mánaða, og kunnu tilboðini verða TFL í hendi um august-september mánaða og endaliga støðutakan í oktober-november mánað.

Ábøtur og møgulig umbygging av sendibygningi og byggjan av antennu, fundamentum v. m. verður væntandi sett í gongd um ársskiftið 86/87. Viðvíkjandi sendaranum eru leveringstíðirnar ymiskar, levering av einum sendara varierar frá 6 mánaðum til 18 mánaðar, hartil kemur installatiónstíðin av hesum, sum tekur frá tveimum til fýra mánaðir, alt eftir fabrikati og installatiónsorku.

Um henda tíðarætlan heldur og levering av sendaranum tekur eitt ár aftan á bílegging, er møguleiki fyri, at sendistøðin kann verða tikin í nýtslu á vári 1988.

Sambært fyribils tilboðini væntast samlaði kostnaðurin at verða umleið 25 milj. krónur fyri eina sendistøð við 200-kilo-Watt sendimegi.

# 100-18. Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, viðvíkjandi starvsfólkatørvinum á psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum.

Ár 1986, mánadagin 24. februar boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Tordi Niclasen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvørjar ætlanir hevur landsstýrið til tess at bøta um átrokandi tørvin fyri pleygarum til psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum?

**Viðmerkingar:**

Á psykiatrisku deild á landssjúkrahúsinum starvast sum óivað kunnugt sjúkrasystrar og pleygarar. Í eitt ávíst mát hava eisini sjúkrahjálparar arbeitt, tá tørvurin á pleygarum ikki var nøktaður.

Hesin tørvur upp á pleygarar til psykiatrisku deildirnar hevur nú - meir ella minni — í 10 ár gjørt seg galdandi.

Hvat sjálvari pleygaranormeringini viðvíkir verður upplýst, at henda er til 29 pleygarar, og er tá ikki íroknað deild 5, sum hevur eina normering til 12 sjúkrahjálparar/pleygarar.

Í dag eru minst 10 pleygarastørv ikki sett, og hevur hetta einamest rakt ta einu psykiatrisku deildina — nevnifiga ta akuttu móttakaradeildina.

Roynt hevur verið at hjálpt upp á tørvin við at hava útlendingar í starvi — styttri ella longri tíðarskeið. Hóast hetta hevur verið ein hjálp, so er tørvurin við hesum langt frá nøktaður.

At starvsfólkamangul soleiðis ger seg galdandi — ikki minst innan nevnda part av sjúkrahúsverkinum — má metast sera óheppið, bæði fyri tey sum har starvast, men einamest fyri sjúklingarnar og avvarðandi teirra.

Vitandi, at starvsfólk stundum hava gjørt vart við hesar trupulleikar hjá avvarðandi myndugleikum, og at støðan í dag er kanska truplari enn nakrantíð, er tað, at spurningurin verður reistur. Hetta í vónini um, at eitthvørt ítøkiligt nú verður gjørt.

Sama dag varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

15. apríl svaraði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Tordur Niclasen sigur frá, at starvsfólkatørvurin einamest hevur rakt ta akuttu móttøkudeildina.

Tað er rætt, at 10 pleygarastørv eru ósett, tey eru fyribils sett við sjúkrahjálparum.

Hetta hevur ikki einamest rakt deild 2.

Trupulleikarnir á deild 2 stava frá, at avloysarar ikki kunnu fáast, tá ið pleygarum berst frá vegna sjúku.

Á psykiatrisku deild 2 eru 12 pleygarastørv, og harafturat er eitt starv, ið fevnir um uttanduraarbeiði, knýtt at deild 2.

Av teimum 13 eru 11 sett við pleygarum, harav ein er sjúkur.

2 størv eru ósett orsakað av farloyvi.

Ein ófaklærdur er knýttur at deildini við tí fyri eyga, at hann møguliga fær áhuga fyri at læra til pleygara.

Í løtuni og til apríl er harafturat 1 pleygari uppá 70% tíð.

**Hvat er gjørt:**

Í 1984 varð avtala gjørd við Viborg amtskommune um útbúgving av 2 pleygarum um árið. Teir fyrstu byrjaðu í september 1985, og verða teir lidnir í mai 1986.

**Hvat eigur at verða gjørt:**

Fyri at nøkta tørvin av pleygarum, verður neyðugt at skipa fyri útbúgvingini í Føroyum, tá ið tørvur er á.

Útbúgvingin er skipað soleiðis, at fyrst verður farið ígjøgnum sjúkrahjálparaútbúgvingina (12 mánaðir) og harnæst sjálva pleygaraútbúgvingina (8 mánaðir).

Í løtuni verður arbeitt við einum uppskoti um at skipa fyri útbúgving í Føroyum.

Sundhedsstyrelsen skal góðtaka útbúgvingarnar, og hevur stýrið sagt frá, at einki skuldi verið til hindurs fyri at útbúgva sjúkrahjálparar og pleygarar.

# 100-19. Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, viðvíkjandi deild Føroya Handilsskúla á Kambsdali og seinna byggistigi av Tekniska Skúla í Klaksvík.

Ár 1986, mánadagin 24. februar boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Eilif Samuelsen, løgtingsmanni, sum spurdi vegna Paula Ellefsen, løgtingsmann, og var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Nær verður farið undir at byggja deild Føroya Handilsskúla á Kambsdali, og nær skal byggingin verða liðug?
2. Nær verður farið undir seinna byggistigið av Tekniska Skúla í Klaksvík, og nær skal henda bygging verða liðug?

Undanfarna landsstýrið hevði fleiri ferðir samráðingar við donsku stjórnina um útbygging av føroysku vinnuskúlunum, serliga Handilsskúlanum, teknisku skúlunum og Maskinskúlanum. Av tí at samráðingar vóru við undirvísingarmálaráðið, og innanhýsis strukturbroytingar førdu við sær, at maskinskúlar vórðu fluttir frá undirvísingarmálaráðnum til íðnaðarmálaráðið, varð endalig avtala bert rokkin viðvíkjandi Handilsskúlanum og teknisku skúlunum.

Í skrivi frá undirvísingarmálaráðnum til landsskúlafyrisitingina, dagfest 28. september 1984, stendur m. a.:

Citat:

»Spørgsmålet om mulighederne for bevillinger til byggeri for de færøske erhvervsskoler har været gjort til genstand for drøftelser imellem færøske og danske myndigheder, senest ved undervisningsministerens besøg på Færøerne i juni 1984.

Det fremgår af de foreliggende oplysninger, at der ønskes byggeri i forbindelse med Torshavn tekniske skole, Klaksvig tekniske skole og Færøernes handelsskole.

Byggeri til de færøske erhvervsskoler påregnes finansieret på tilsvarende måde som danske erhvervsskolebyggerier, hvilket vil sige, at der lokalt skal tilvejebringes en egenkapital på 1/6 af den samlede byggeudgift. Desuden optages størst mulige offentlige lån efter undervisningsministeriets byggedirektorats godkendelse (ca. 1/3 af byggesummen), og endelig finansieres restsummen ved et rente- og afdragsfrit statslån (ca. 1/2 af byggesummen).

På baggrund af de stedfundne drøftelser — og som oplyst af undervisningsministeren den 25. juni 1984 i et møde med repræsentanter for de færøske myndigheder — vil ministeriet kunne godkende, at der i årene 1985-87 incl. gennemføres byggeri til brug for de færøske erhvervsskoler for et samlet beløb på indtil 30 mio. kr. (svarende til ca. 15 mio. kr. i rente- og afdragsfrit statslån).

Det er herved forudsat, at de færøske myndigheder afgiver indstilling om, hvilke byggerier der inden for den angivne statslånsramme bør fremmes, idet der dog alene vil kunne ydes statslån til byggeri til undervisning, hvortil der fra dansk side ydes tilskud i henhold til gældende lovgivning.

.....

Det skal endelig anføres, at man fra ministeriets side finder, at et eventuelt yderligere handelsskolebyggeri ud over det i Torshavn gennemførte må ses i nøje sammenhæng med en afklaring af bl. a. de økonomiske forhold omkring FHS-undervisningen ved Færøernes handelsskole.

Ministeriet påregner på baggrund heraf at modtage de færøske myndigheders indstilling om, hvilke byggerier til undervisningsbrug man inden for de anførte rammer ønsker fremmet.« Citat slut.

Sambært hesum skrivi var greitt at fara undir bygging av vinnuskúlum fyri eina upphædd uppá uml. 30 mió. kr.

Hildið var skilabest, at hesin peningur verð nýttur til at byggja deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali og at gera seinna byggistigið av Tekniska Skúla í Klaksvík.

Viðvíkjandi Handilsskúlanum var víðari útbygging tó treytað av, at figgjarligu viðurskiftini viðvíkjandi FHS-útbúgvingini komu í rættlag.

Eftir drúgvar samráðingar varð hesin spurningur endaliga loystur, javnber hjálagda avrit av skrivi frá undirvísingarmálaráðnum, dagfest 1. februar 1985.

Nú er meira enn eitt ár farið, síðani fíggjarspurningurin varð endaliga greiddur — burtursæð frá eginpeninginum uppá ⅙, sum avvarðandi skúli, kommuna og landið vanliga plaga at fáa til vega — men enn er einki hoyrt um, at tær byggiætlanir, ið fyriliggja frá nevndum skúlanna verða framdar.

Tann peningur, ið játtaður varð frá rikisstýrinum, er nettokrónur, tí er umráðandi, at byggingin verður framd skjótast gjørligt, so ikki ov stórur partur av upphæddini verður søplaður burtur av inflatiónini.

Sama dag varð við 26-0 atkvøðum samtykt, at Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

3. apríl svaraði Jógvan Durhuus, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Nær verður farið undir at byggja deild Føroya Handilsskúla á Kambsdali, og nær skal byggingiu verða liðug?
2. Nær verður farið undir seinna byggistigið av Tekniska Skúla í Klaksvík, og nær skal henda bygging verða liðug?

**Til 1:**

Um henda spurning vísi eg til løgtingsmál nr. 83/1985: Stuðul til bygging av deild av Føroya Handilsskúla á Kambsdali, sum landsstýrið nú leggur fyri løgtingið.

Tá uppskotið til løgtingslóg í hesum løgtingsmáli er samtykt, verður málið at leggja fyri byggifyrisitingina hjá kanslumálaráðnum, fíggjarmálaráðið og fíggjarnevnd fólkatingsins, har tað ætlandi verður avgreitt áðrenn 5. juni í ár.

Tá verður klárt at fara undir projektering og bygging, sum verður mett at taka 2 ár, og byggingin fer sostatt ætlandi at verða liðug á sumri 1988.

**Til 2:**

Um henda spurning vísi eg til løgtingsmál nr. 82/1985: Stuðul til bygging av 2. byggistigi av Tekniska Skúlanum í Klaksvík, sum landsstýrið nú leggur fyri løgtingið.

Um víðari viðgerð av málinum og byggitíð er tað sama galdandi, sum eg havi sagt frá í svarinum til spurning 1.

# 100-20. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi bygging av ellis- og røktarheimi í Sandoy.

Ár 1986, mánadagin 24. februar boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Eyðuni Viderø, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Nær kunnu kommunurnar í Sandoy vænta at fáa svar frá Landsstýrinum upp á umsókn, sum varð send Landsstýrinum í november 1984, um stuðul til figgjan og rakstur av Ellis- og Røktarheimi í Sandoy?

**Viðmerkingar:**

Fyri at koma tí tørvi á møti, sum er í Sandoynni fyri einum Ellis- og Røktarheimi, settu kommunurnar í oynni eina nevnd við einum limi úr hvørjum bygdarráð, og fekk henda nevnd til uppgávu at kanna, hvussu nógvum plássum brúk var fyri til tyngri og lættari røktarsjúklingar og umlætting.

Henda nevnd var liðug við arbeiði sítt á heysti 1984, og hevði nevndin latið gera eitt uppskot til bygging við kostnað.

Bygdarráðini í Sandoynni hava síðani góðkent uppskotið, og varð tað í november 1984 sent Landsstýrinum, men hóast áheitanir bæði munnliga og skrivliga, so er einki frætt aftur, og tí er tað, at undirritaði loyvir sær at seta nevnda spurning til landsstýrismannin.

15. apríl svaraði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Landsstýrið hevur fingið skriv viðvíkjandi bygging av Sandoyar Røktar- og Ellisheimi, dagfest 23. oktober 1984, frá Sands, Skálavíkar, Skopunnar og Húsavíkar bygdarráðum, og skriv frá Sands bygdarráði, dagfest 19. november 1984, um sama mál.

Landsstýrið sendi tann 29. januar 1985 Almannastovuni málið til umnælis.

Landsstýrið hevur fingið ummælið, dagfest 10. apríl 1986, frá Almannastovuni, ið metir, at tørvur er á røktarheimi, sum skotið er upp.

Landsstýrið hevur enn ikki tikið støðu til málið, men mett verður, at ikki kann farast undir byggingina, fyrr enn aftan á at Suðurstreymoyar Røktar- og Umlættingarheim er liðugt á vári 1987, og at peningur er til taks í fólkapensjónsgrunninum og ansingar- og røktarheimsgrunninum.

# 100-21. Fyrispurningur til Jógvan Durhuus, landsstýrismann, viðvíkjandi bygging av hølum til Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy.

Ár 1986, mánadagin 24. februar boðaði formaðurin frá omanfyrinevnda fyrispurningi frá Eilif Samuelsen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Hvørja støðu hevur hetta landsstýrið til bygging av hølum til Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy?

2. Hevur landsstýrið ætlanir um at biðja Landsskúlafyrisitingina útvega projekt til eina tílíka bygging?

Við løgtingslóg nr. 76 frá 21. mai 1982 samtykti løgtingið at seta á stovn Studentaskúla og HF-skeið í Eysturoynni.

Skúlin fekk fyribils innivist í gomlu skúlabygningunum við Gøtugjógv. Haraftrat vórðu í 1985 tikin í nýtslu eini nýbygd hús við nøkrum skúlastovum og matstovu.

Eyðvitað er, at skúlin hesa tíðina hevur havt alt annað enn góðar umstøður at virka undir, men við einum góðum vilja og góðum toli frá bæði næmingum og lærarum hevur skúlin so dánt verið førur fyri at røkja sína uppgávu.

Tað er eingin ivi um, at grundin til, at bæði næmingar og lærarar hava sýnt eina slíka langmóð, er vónin um »sælari tíðir«. Øll hava gingið við í vissu í huganum, at hetta bert eru fyribils høli, og at ætlanin er, at skúlin skal fáa sínar egnu bygningar, formaðar júst til skúlans nýtslu.

Hetta varð eisini ætlanin hjá undanfarna landsstýri og hjá landsskúlafyrisitingini, sum í góðum samarbeiði framdu hetta mál, so langt sum tað nú er komið.

Tað hevur staðist nógv tjak um henda skúlna. Tað mesta tjakið kann sigast at hava verið tápuligt — ið hvussu so er fáfongt — tí tað hevur snúð seg um nakað so týdningarlítið, sum ***hvar*** ið skúlin skal vera.

At studentaskúli skuldi setast á stovn í Eysturoynni, vóru so at siga øll heilt samd um, og tað er tað, sum hevur størstan týdning, at ávísir flokkar og persónar lótu lokal áhugamál, ið bert gagnaðu teimum sjálvum, ganga fram um yvirordnað sjónarmið, sum fóru at tæna øllum samfelagnum best, tað mugu vit bara harmast um.

Nógv hevur verið talað um, at ein fiskivinnutjóð sum Føroyar eigur at hava eina fiskivinnuútbúgving. Einki átti at verið meiri natúrligt enn tað, men vit hava aftrað okkum, kanska mest orsakað av, at ein slík útbúgving er kostnaðarmikil. Og við teimum útlitum, ið hómast fyri framman, nú vit kanska fara at fáa eina blokkstudningsskipan eftir ti mynstri, hetta landsstýrið hevur stungið út, so er uppaftur meira umráðandi, at vit fara at útnytta okkara tilfeingi, bæði tað figgjarliga og tað menniskjaliga, so væl sum vit yvirhøvur kunnu.

Um nú og tá ið hægri handilsskúli verður bygdur í Eysturoynni, so hava vit í honum saman við studentaskúlanum so gott sum allar tær lærarakreftir, øll tey fakhøli og allan tann útbúnað, ið neyðugt er fyri at gera eina fiskivinnuútbúgving til veruleika.

Men fyritreytin er, at alt smásinni og alt sjálvsøkni verður sett til viks til frama fyri heildina. Eftir eru so mest praktiskir spurningar um samskipan, og hesar spurningar er Landsskúlafyrisitingin væl før fyri at greiða saman við teimum avvarðandi áhugaðu pørtunum. M.a. út frá hesum sjónarmiðum verður spurt.

24. februar varð við 25-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi svarast.

Fyrispurningurin varð ikki svaraður.

# 100-22. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi bygging av umlættingarheimi til brekað í Klaksvík, og hvat landsstýrið ætlar at gera fyri vinnurekandi, tá tey verða sjúk og gomul.

Ár 1986, hósdagin 27. februar boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Heina O. Heinesen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Hvussu langt er komið við at fyrireika bygging av umlættingarheimi til brekað í Klaksvík?

2. Hvussu er støðan hjá fólki, sum eru vinnurekandi í Føroyum, tá hesi verða sjúk og gomul og ikki í sama mun sum áður eru før fyri at klára seg fíggjarliga. Hvønn møguleika hava hesi fyri at fáa hjálp, so sum dagpening og aðra hjálp. Hevur landsstýrið nakra ætlan á hesum øki?

**ad 1.:**
Umsókn um figging til rakstur av slíkum heimi varð send landsstýrinum 2. oktober 1984.

**ad 2.:**
Eg eri vitandi um persónar, sum hava verið í fríari vinnu, og sum eru komnir heilt illa fyri fíggjarliga, tí lógin ikki rúmar nakra hjálp til slíkar, uttan so at hesir sleppa sær av við síni vinnutól, tað kann vera t.d. ein hýruvognur ella ein minni forrætning og annað.

Tað er heilt ómenniskjansligt, at tað ikki finnast nakrar møguleikar í lógini, tá hesin tørvur stendst av sjúku og elli.

Sama dag varð við 24-0 atkvøðum samtykt, at N. P. Danielsen, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

## Svar

Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, hevur sett mær niðanfyristandandi fyrispurningar:

1. Hvussu langt er komið við at fyrireika bygging av umlættingarheimi til brekað í Klaksvík?

2. Hvussu er støðan hjá fólki, sum eru vinnurekandi í Føroyum, tá hesi verða sjúk og gomul og ikki í sama mun sum áður eru før fyri at klára seg fíggjarliga. Hvønn møguleika hava hesi fyri at fáa hjálp, so sum dagpening og aðra hjálp. Hevur landsstýrið nakra ætlan á hesum øki?

**Ad 1.**

Landsstýrið fekk í skrivi, dagfestum 2. oktober 1984, umsókn frá Javna um fígging av rakstrinum av einum umlættingarheimi í Klaksvík og eisini eitt uppskot um dagstovn í leigaðum hølum.

Umsóknin varð send til ummælis hjá Almannastovuni, sum so aftur legði hana fyri Andveikraverndina, ið metti tørvin vera til staðar á tílíkum heimi. Almannastovan mælti tí í skrivi frá 12. mars 1985 til, at landsstýrið grundstøðiliga tók undir við uppskotinum frá »Javna« um at fáa til vega stovn til 5 fólk til døgnumlætting og 10 fólk til dagumlætting.

Um so var, at landsstýrið ynskti, at dagumlætting hjá »Javna« skuldi byrja fyri fyrst í leigaðum hølum, mælti Almannastovan í nýggjum skrivi frá 28. mars 1985 til sum fyribilsskipan, at dagumlættingin fyri vaksin varð skipað sum vardur verkstaður við heimild í avlamispensjónslógini § 34, stk. 2 og dagumlættingin fyri børn annaðhvørt eftir § 11 í lógini um frítíðarundirvísing ella eftir § 17 í forsorgarlógini.

Málið varð tá lagt fyri Vanlukkutryggingarráðið, sum í brævi 14. november 1985 segði seg sum er ikki kunna góðkenna nevnda stovn at hava rætt til tilskot eftir avlamispensjónslógini § 34, stk. 2.

Landsstýrið hevur síðan aftur heitt á Endurbúgvingarstovuna og biðið tey í samráð við »Javna«, Almannastovuna og Andveikraverndina um at gera eitt fullfíggjað uppskot til ein vardan verkstað í Klaksvík.

Landsstýrið vil, tá ið hetta tilfar er fingið til vega, av nýggjum biðja vanlukkutryggingarráðið um »innstilling« í málinum, áðrenn endalig støða verður tikin um góðkenning.

Eftir § 32 í forsorgarlógini hevur landsstýrið heimild til at góðkenna umlættingarheimið, meðan fíggingin av rakstrinum eftir § 40, 6. stk. verður ásett av almannamálaráðnum danska aftan á samráðing við landsstýrið.

Landsstýrið hevur í skrivi, dagfestum 26. februar 1986, biðið almannaráðið um tilsøgn til, at raksturin av umlættingarheimum verður fíggjaður eins og raksturin av Frítíðarheiminum í Skrivaragøtu við 50% úr ríkiskassanum og 50% úr Føroyum. Bíðað verður eftir svari úr Danmørk.

Skuldi tað hent, at almannaráðið ikki veitir umbidnu tilsøgn, umhugsar landsstýrið, at hetta ætlaða umlættingarheimið hjá Javna í Klaksvík og onnur heim, sum higartil hava verið »§ 32-heim«, framyvir skulu verða figgjað eins og røktarheim eftir fólka- og avlamispensjónslógini ella við serligari játtan á figgjarløgtingslógini.

**Ad 2:**

Tey, sum reka sjálvstøðuga vinnu, kunnu eins og heimaarbeiðandi tekna seg til ta sjálvbodnu dagpeningaskipanina við fullari ella hálvari upphædd. Hetta kostar sum er ávikavist 160 kr. og 80 kr. fyri ársfjórðingin. Tá tey so gerast sjúk – óarbeiðsfør – sambært læknaváttan, fáa tey í løtuni ávikavist 2.143,00 kr. og 1.072,00 kr. um vikuna í upp til 13 vikur við orgum treytum annars. Tú kanst ikki tekna teg til skipanina, táið tú ert óarbeiðsførur ella vinnuevnini eru munandi skerd.

Við útrokning av pensjón hjá teimum, sum reka sjálvstøðuga vinnu, verður roknað við inntøkuni av vinnuni sambært roknskap, sum viðkomandi hevur gjørt til líkningarvaldið, møguliga við teimum broytingum, sum líkningarvaldið hevur gjørt. Við útrokningina verður roknað við verandi ognarviðurskiftum, sum viðkomandi sjálvur hevur lagt til rættis, tá sæð verður burtur frá gávum.

Tá ið veiting av pensjón byrjar, verður roknað við tí inntøkuni, sum viðkomandi kann ætlast at hava í framtíðini, og er tað sama galdandi, um munandi broytingar koma í inntøkuviðurskiftunum. Í hesum førum verður sosatt roknað við inntøkuni í seinasta roknskaparári við teimum broytingum, sum farnar eru fram. Hesar kunnu verða hægri útreiðslur til hjálparfólk í handli ella minni inntøkur av hýruvognskoyring.

Annars verður roknað við roknskaparligu inntøkuni í árinum frammanundan.

Viðvíkjandi hjálp eftir forsorgarlógini er at siga, at hjálp eftir § 13 verður veitt við føstum upphæddum við frádrátti (»krónu fyri krónu«) av nettoinntøku, sum viðkomandi ella hjúnafelagin hevur í tíðarskeiðinum — mánaðinum. Hjálp sambært § 9 í forsorgarlógini verður roknað út eftir føstum privatum útreiðslum og ein upphædd til undirhalds, tó við ávísum hægstamarki. Her verður inntøka drigin frá á sama hátt. Í báðum førum verður roknað við nettoúrtøku av vinnu sambært seinasta roknskap, møguliga broytt eftir núverandi viðurskiftum. Fastar útreiðslur av vinnutólum ganga inn í nettoúrtøkuna av vinnuni og verður ikki roknaðar sum fastar privatar útreiðslur.

Ásannast kann, at tað kann vera av sálarligum týdningi fyri fólk at halda fram við virksemi sínum, hóast tað figgjarliga sæð ikki gevur nógv av sær og verður mest at kalla ítriv. Lóggávan tykist ikki vera til hindurs fyri ti.

Landsstýrið hevur ikki ætlanir um broytingar.

# 100-23. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferjulegu í Kirkjubø.

Ár 1986, hósdagin 6. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Jógvani Sundstein, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

1. Eru tær neyðugu kanningarnar í samband við ferjulegu við Gomlu Rætt gjørdar, áðrenn politisk samtykt um hesa plasering varð gjørd?
2. Er heimildin frá 1983 um gerð av ferjulegu í Kirkjubø eisini galdandi fyri ta nýggju ætlanina?
3. Nær kann sjálvt arbeiðið (spreinging v. m.) byrja?
4. Hvussu langt er komið við detailprojektering og kostnaðarætlan, og hvør verður samlaði kostnaðurin?
5. Hví hevur núverandi landsstýri slept ætlanini, sum fólk úr Kirkjubø høvdu gjørt, og sum lutt landsstýrið góðtók?

**Viðmerkingar:**

Í 1983 (tingmál nr. 86/1982, sí eisini tingmál nr. 65/1981) samtykti tingið, at ferjulega skal gerast í Kirkjubø. Samstundis varð samtykt ein lánheimild upp á 13 mió. kr. (løgtingslóg nr. 43 frá 3. mai 1983). Seinri eru avsettar 16 mió. kr. á løgtingsfiggjarlógini, so samlaði tøki peningurin í løtuni til hesa fløgu er 19 mió. kr. Ætlaði kostnaðurin av útbyggingini í Kirkjubø er uml. 25 mió. kr.

Upprunaliga ætlan landsstýrisins frá 1981 var ikki endaliga góðkend av friðingarmyndugleikunum, men bóðu hesir um víðari viðgerð og onnur uppskot. Tað uppskotið, sum hevur best undirtøku í Kirkjubø, og sum táverandi landsstýri eisini góðkendi, er ein ferjulega á Árnanesi og ein moli suður frá Syðrusuggu. Hesin moli kann verja fornminnini og kirkjuna í Kirkjubø og verður til stóran bata fyri bygdina við róligari sjógvi innanfyri.

Forarbeiðið til hesa útbygging er gjørt, og kann arbeiðið byrja beinanvegin, myndugleikagóðkenningar fyriliggja.

Nú frættist, at samgongan hevur gjørt eina politiska neyðsemju, sum ber í sær, at alt hetta forarbeiðið er spilt, og at vit missa verjugarðin hjá fornminnunum. Í staðin fyri projektið, sum ein meiriluti í Kirkjubø ynskir, skal eitt nýtt gerast við eini ferjulegu á Gomlu Rætt.

Eftir øllum skilagóðum upplýsingum at døma er henda ætlanin nógv dýrari (helst dupult so dýr) enn hin fyrra. Harafturat er verri atkomuligt,

og alt tað forarbeiði, sum skal gerast, tekur langa tíð. Arbeiðsbyrjanin er sostatt útsett í rættiliga langa tíð, meðan nýggja ætlanin verður kannað.

Oman á alt hetta kemur ein samgongumaður við úttalilsum um, at loysnin er eitt tekniskt mistak (men eitt politiskt kompromis). Harumframt sigur landsstýrismaðurin í samferðslumálum, at um vit (t.e. landsstýrismenninir?) ikki eru nøgdir við ta arbeiðsætlan, sum landsverkfrøðingurin kemur við, so skal onkur annar gera hetta arbeiðið (Tingakrossur 28. februar 1986).

Á henda hátt sigur ein samgongumaður beint fram, at projektið er tekniskt óbrúkiligt, meðan hin samgongumaðurin hóttir við, at um ikki tekniski sakkunnleikin (landsverkfrøðingurin) ger, sum hann hugsar, so skal hann missa arbeiðið.

Hetta ber alt í sær, at ein fær varhugan av, at politiska neyðsemjan er gjørd uttan tanka fyri dygdini í projektinum og uttan at hugsa um tað neyðuga í at fáa eina góða farleið millum Sandoynna, Hest og Steymoynna og uttan at geva sær far um meirkostnaðin av komprominum. Harafturat hevur verjan av fornminnunum mist sín besta møguleika, og møguleikarnir fyri ymiskum virksemi í Kirkjubø í sambband við sjógvin (t.d. aling) eru eisini burtur.

Tí loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum í samferðslumálum, Lassa Klein, hesar spurningar.

10. mars varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Lasse Klein, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

10. apríl svaraði Lasse Klein fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Spurningur Jógvan Sundsteins snýr seg um ferjulegu við Gomlu Rætt og býtir seg í 5 partar:

1. Eru tær neyðugu kanningarnar í sambband við ferjulegu við Gomlu Rætt gjørdar, áðrenn politisk samtykt um hesa plasering varð gjørd?
2. Er heimildin frá 1983 um gerð av ferjulegu í Kirkjubø eisini galdandi fyri ta nýggju ætlanina?
3. Nær kann sjálvt arbeiðið (spreinging v.m.) byrja?
4. Hvussu langt er komið við detailprojektering og kostnaðarætlan, og hvør verður samlaði kostnaðurin?
5. Hví hevur núverandi landsstýri slept ætlanini, sum fólk úr Kirkjubø høvdu gjørt, og sum hitt landsstýrið góðtók?

Til fyrsta, triðja og fjórða spurningin er at siga, at áðrenn politiska samtyktin varð gjørd, vóru kanningar av dýpinum framdar umframt fyri-

bils metingar av alduviðurskiftunum. Á hesum grundarlagi varð eitt fyribils projekt gjørt við kostnaðarmeting og viðmerkingum.

Niðurstøðan var, at tað ber til at gera nýtiliga ferjuhavn við Gomlu Rætt, men at vanligar kanningar skuldu gerast, áðrenn bygt verður.

Aldumátingar eru byrjaðar, og pláss er longu bílagt á Dansk Hydraulisk Institut til modellroyndir, sum byrja í september og verða lidnar í oktober 1986.

Grundað á hesi viðurskiftir og á umtalaðu royndir er avtala nú gjørd um, at projektið skal vera klárt til útbjóðingar um ársskiftið 1986/87, so klárt verður at arbeiða februar/mars 1987, ið er rætta tíðin at byrja tílíkt arbeiði.

Við fyriliggjandi uppskoti sum grundarlag hevur landsverkfrøðingurin mett kostnaðin upp á 50 mió. kr., meðan eitt nú Arkitektafelag Føroya metir kostnaðin at verða millum 34 mió. kr. til 39 mió. kr. at byggja.

Viðvíkjandi 2. spurningi er tað landsstýrisins meting, at heimildin frá 1983 eisini er galdandi fyri ta nýggju ætlanina.

At enda skal sigast til fimta spurningin, at støðan í málinum var so, at einki útlit var til, at nøkur ferjuhavn varð veruleiki, um hon skuldi verið í Kirkjubø, og hevði samgongan í samgonguskjalinum bundið seg til at loysa málið. Talan er um eina politiska semju, har gerð av ferjuhavn við Árnanes veik til fyrimuns fyri eini loysn, ið kann fremjast í hesum valskeiðinum við teimum vansum og fyrimununi, tað ber í sær.

Dreymurin um endaligu loysnina av ferjuleguspurninginum á streymoyarlandinum er funnin, arbeiðið er farið í gongd, og orsøkin til ta loysn, sum funnið er fram til, er fyrst og fremst hon, at tað ber ikki longur til at bjóða sandoyarfólki so vánaligar samferðslumøguleikar, sum hava verið galdandi.

Tað ber ikki til at skulka sær undan hesum veruleika, tí tað finnast stutt sagt ongar undanførslur longur fyri ikki at fremja og útbyggja umtalaðu loysn.

# 100-24. Fyrispurningur til Lassa Klein, landsstýrismann, viðvíkjandi ferjulegu í Kirkjubø.

Ár 1986, hósdagin 6. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Asbjørn Joensen, løgtingsmanni, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Sum kunnugt er samgongan í spurninginum um ferjulegu við Kirkjubø

komin til ta niðurstøðu, at henda í staðin fyri á Árnanesi skal byggjast við Gomlu Rætt.

At hetta ikki er hin besta loysnin, kann ein hugsa sær til, tá landsverkfrøðingurin ikki í sini ætlan hevur tikið hetta pláss við í meting av landgongdini hjá sandoyingum og fólki annars á streymoyarlandinum og hin vegin.

Tað man eisini tykjast mongum løgið, at citt politiskt kompromis so skjótt kundi loysa henda trupla spurning. Peningur hevur ivaleyst í hesum samanhangi ikki havt nakran týdning.

At henda niðurstøða samgongunnar var skilagóð, fekk ein varhugan av í frásøgn landsstýrismansins í fjølmiðlunum um hesi viðurskifti, og eisini má havast í huga fráboðanina um, at hetta mál skal loysast av hesi samgonguni.

Hin vegin kann ein ikki lata allar aðrar hugsanir fara afturvið uttan umrøðu, og er hetta ikki minst galdandi, tá ein fyrrverandi landsstýrismaður, ið hevur umsitið hetta mál í heili 6 av teim 24 árunum, ætlan um ferjulegu hevur verið frammi, skírir hetta sum eitt ósømiligt skálkaskjól í Dagblaðnum frá 28. februar 1986.

Ein heil opna í blaðnum viðger spurningin um ferjulegu, og av hesum eigur fyrrverandi landsstýrismaður í samferðslumálum í heili 6 ár hálva opnuna, og er her at skoyta uppí, at einki spurdist burtur úr nakrari loysn hesi mongu ár.

D. P. Danielsen førir m. a. fram: »Kirkjubøur er framvegis einasta kyrrupláss hesumegin, og Árnanes er framvegis best egnaða pláss til ferjulegu.« Og hann sigur viðari: »Henda avgerðin hjá sitandi samgongu broytir ikki pctti — hetta er einki annað uttan *eitt skálkaskjól fyri einki at gera við málið í hesi setuni.*

Tað stutta av tí langa er, at her fyriliggur einki uppskot, og skulu líka neyvar kanningar gerast av hesum økinum sum av øðrum uppskotum, fer tað at taka fleiri ár, áðrenn farið verður í gongd.«

Hetta er álvarslig og avgerandi úttala, so um rætt er frásagt, er fráboðan um høga prioritering heilt skeiv, og er tá neyðugt at umhugsa spurningin av nýggjum.

Við hesi úttalu sum grund verður landsstýrismaðurin biðin um at svara nevndu spurningum, og sum fylgiskjal til svarið at koma við eini úttalu frá landsverkfrøðinginum sjálvum viðvikjandi ferjulcguspurninginum.

1. Kann landsstýrismaðurin í svari sínum við fylgiskjali fáa viðmerking til umrøðuna í Dagblaðnum viðvíkjandi ferjulcgu við Gomlu Rætt?

2. Kann landsstýrismaðurin í sama skjali frá landsverkfrøðinginum fáa váttan fyri, at byrjast kann longu til heystar at gera ferjulegu við Gomlu Rætt?

3. Kann landsstýrismaðurin í sama skjali fáa eina meting um meirkostnaðin av ferjuleguni við Gomlu Rætt í mun til bíligastu loysnina við Árnanes, vegagerð ikki íroknað?

10. mars varð við 23-0 atkvøðum samtykt, at Lasse Klein, landsstýrismaður, skuldi svara fyrispurninginum.

10. apríl svaraði Lasse Klein, landsstýrismaður, fyrispurninginum frá Asbjørn Joensen, løgtingsmanni, soleiðis:

**Svar**

Spurningur Asbjørn Joensens snýr seg um ferjulegu við Gomlu Rætt og býtir seg í tríggjar partar.

1. Kann landsstýrismaðurin í svari sínum við fylgiskjali fáa viðmerking til umrøðuna í Dagblaðnum viðvíkjandi ferjulegu við Gomlu Rætt?
2. Kann landsstýrismaðurin í sama skjali frá landsverkfrøðinginum fáa váttan fyri, at byrjast kann longu til heystar at gera ferjulegu við Gomlu Rætt?
3. Kann landsstýrismaðurin í sama skjali fáa eina meting um meirkostnaðin av ferjuleguni við Gomlu Rætt í mun til bíligastu loysnina við Árnanes, vegagerð ikki íroknað?

Til 1. spurning er at siga, at landsstýrið er væl vitandi um, at ferjuhavnin við Árnanes var tann bíligara loysnin, men hin vegin var støðan í málinum tann, at einki útlit var til, at nøkur ferjuhavn varð veruleiki, um hon skuldi verið har, og hevði samgongan í samgonguskjalinum bundið seg til at loysa málið. Talan er sostatt um eina politiska semju, har gerð av ferjuhavn við Árnanes veik til fyrimuns fyri eini loysn, ið kann fremjast í hesum valskeiðinum við teimum vansum og fyrimunum, tað ber í sær.

Til 2. spurning er at siga, at fyrircikingar longu eru í gongd, og sum tað skilst á hjálagda skjali frá landsverkfrøðinginum er komið langt ávegis við fyrircikingunum.

Aldumátingar eru byrjaðar, og pláss er longu bílagt á Dansk Hydraulisk Institut til modellroyndir, sum byrja í september og verða lidnar í oktober 1986.

Hóast tað er tekniskt møguligt at byrja til heystar, hava vit kortini útsett sjálva byrjanina til februar/mars 1987, m. a. orsakað av veðurlagnum.

Grundað á hesi viðurskifti og á umtalaðar royndir er avtala nú gjørd um, at projektið skal vera klárt til útbjóðingar um ársskiftið 1986/87, so klárt verður at arbeiða á vári 1987, ið er rætta tíðin at byrja tílíkt arbeiði.

3. spurningurin er sjálvandi torførur at svar nágreiniliga uppá í dag. Men við fyriliggjandi uppskoti sum grundarlag hevur landsverkfrøðingurin mett kostnaðin upp á 50 mió. kr., meðan eitt mí Arkitektafelag Føroya metir kostnaðin at vera millum 34 mió. til 39 mió. kr. at byggja.

Ferjuhavnin í Kirkjubø varð mett til o. u. 30 mió. kr.

Roknast má sostatt við einum meirikostnaði millum 10 og 20 mió. kr.

Gjørd er ein fyribils tíðarætlan fyri projektering og útbjóðing av ferjuhavnini við Gomlu Rætt av landsverkfrøðingsstovninum, og er henda tíðarætlan viðløgd.

Tað er eingin ivi um, at tað ber til at gera ferjnhavn við Gomlu Rætt, har møguligt er at koma at, tá ið siglandi er úr Skopun.

Landsverkfrøðingurin er av fullum álvara farin í gongd við samlaðu ætlanina, og verður undir ongum umstøðum vikið frá hjáløgdu ætlan.

Fyrispurningurin snýr seg eisini um eina blaðgrein í Dagblaðnum frá 28. februar 1986, og tað harmar meg sjálvsagt at skula verða noyddan at aftursvisa nærum øllum teimum viðmerkingum, sum ein fyrrverandi landsstýrismaður í samferðslumálum hevur, og serstakliga tá hugsað verður, at viðkomandi hevur havt ábyrgdina av hesum málsøki í heili seks ár, uttan at tað eydnaðist honum at fáa loyst spurningin yvirhøvur.

Undirritaði frøist um, at ein loysn nú er funnin í hesum máli aftan á 25 ára royndir, og vil sjálvsagt geva øllum øðrum lut í hesi frøi, og meti avgerðina um, at bygt verður við Gomlu Rætt eftir umstøðunum rætta at vera.

# 100-25. Fyrispurningur til Niels Paula Danielsen, landsstýrismann, viðvíkjandi dálking av Sørvágs firði

Ár 1986, týsdagin 11. mars boðaði formaðurin frá omanfyri nevnda fyrispurningi frá Svend Aage Ellefsen, sum var soljóðandi:

**Fyrispurningur**

Hvussu langt er landsstýrið komið við málunum viðvíkjandi kloakkini av flogvøllinum, og nær kann væntast, at hon verður løgd út á streymasjógv?

**Viðmerkingar:**
Eftir at sørvingar og aðrir høvdu gjørt vart við, at vandi var fyri, at kloakkvatn av flogvøllinum kundi dálkað Leitisvatn, Stórá og aðrar áir í

Sørvági, varð kloakk løgd av flogvøllinum oman til Sørvágs og út í »Bugin« á Sørvágsfirði.

Tiltakið var eitt úrslit av samráðingum millum undanfarna landsstýri, Sørvágs bygdaráð og danskar myndugleikar, og var sum slíkt eitt gott framstig.

Hin vegin varð ikki við samráðingarlok tikin nóg góð hædd fyri tí fiskaaling, sum tá ikki var komin, men sum nú fer fram har á leiðini, og sum orsakað av kloakkini er útsett fyri stórum dálkingar- og smittuvanda.

Sørvágur er einasta pláss í Vágum, sum frá náttúrunnar hond er egnað til fiskaaling í vanligum flótandi ringum, og stórt spell verður, um ein vinna, sum er í sunnum og góðum vøkstri, skal falla niðurfyri av atgerðarloysi frá politiskari síðu.

Sørvágs bygdaráð hevur fleiri ferðir, og nú seinast í skrivi frá 3. december 1985, heitt á landsstýrið um at taka málið upp aftur fyri at fáa longt kloakkina út á streymastjógv, men til fánýtis higartil.

Til tess at skunda undir málið, loyvi eg mær at seta landsstýrismanninum fyrispurningin.

11. mars varð við 27-0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða svaraður.

16. apríl svaraði Niels Pauli Danielsen, landsstýrismaður, fyrispurninginum soleiðis:

**Svar**

Sum Svend Aage Ellefsen sigur frá í sínum viðmerkingum, er kloakk gjørd frá flogvøllinum oman gjøgnum Seyrvágs-bygd og vestur í Bugin á norðara armi á fjørðinum, o. u. 1,25 km vestan fyri kirkjuna.

Henda kloakk hevur kostað einar 5 mió. kr. at gera, sum Seyrvágs kommuna hevur borið 500.000 kr. av, Statens Luftfartsvæsen 1,5 mió. kr. og landið 3 mió. kr. Kloakkin varð liðug í 1983, men tá var tað hent, at spurningurin hevði tikið seg upp um aling á fjørðinum, og hevur bygdaráðið tí higartil sett seg ímóti, at frárenningin frá flogvøllinum og hotellinum varð bundin í kloakkina. Hon tekur tí í dag bara ímóti frá einum ella tveimum húsum. Tað, sum rennur frá flogvøllinum og hotellinum, fer framvegis í Stórá og oman á fjørðin.

Bygdaráðið hevur, sum Svend Aage Ellefsen sigur, ynskir um, at kloakkin verður førd út á streymasjógv, t. e. út um Akranessker millum Bíggjar og Gásadals. Projekt er einki gjørt, men longdin er einar 4 km. Tað verður hildið fyri torført at leggja leiðning hesa leið, m. a. krevjast fleiri pumpustøðir, og ber alt hetta við sær, at kostnaðurin verður stórur — einar 12 mió. kr. verður mett — og raksturin kostnaðarmikil.

Landsstýrið umhugsar støðuna og kannar, um tað skuldu verið eins góðar ella kanska uppaftur betri loysnir, sum eru ikki so kostnaðarmiklar.

Tað er landsstýrinum greitt, at kloakkspurningur sum hesin er aktuellur viðahvar í Føroyum í dag, og vil landsstýrið tí royna at finna útvegir fyri at loysa teir fíggjarligu trupulleikarnar, sum kunnu standast av tílíkum tiltøkum.

RED: 10 X

Nasjonalbibliote

**Nasjonalbiblioteket**
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12





RE

Nas

N
N

Telephone: +47 7

# LØGTINGS
# TIDINDI

# 1985

Páll Pitersen

LØGTINGSTÍÐINDI 1985 — BIND B

# Løgtingstíðindi

# 1985

**Bind B**

Skjøl til Løgtingstíðindi

TÓRSHAVN 1990

Løgtingstíðindi 1985 - - Bind B.
© Føroya Løgting.
Lagt til rættis: Esther Bech.
Lay out, fotosats, umbr.,
repro og prent: Einars Offsett.
Hefting: Helge Justinussen.

# INNIHALDSYVIRLIT BIND B

## Skjøl til Løgtingstíðindi 1985


| Skjal nr. | Løg-tings-mál nr. | | Bls. |
|---|---|---|---|
| 1 | | Landskassaroknskapur | 7 |
| 2 | | Fylgiskjøl til frágreiðing frá løgmanni á ólavsøku 1985 | 47 |
| 3 | 8 | A-F Skjøl til figgjarløgtingslóg 1986 | 111 |
| 4 | 11 | Lýsing av einum millumtjóða orkuprogrammi í Føroyum | 554 |
| 5 | 16 | A-C Broyting í fólkatingsvallógini | 560 |
| 6 | 21 | Nýggj arvalóg | 599 |
| 7 | 36 | A-J Nýggj brunalóg | 615 |
| 8 | 41 | Ríkislóg um almennar skráir | 692 |
| 9 | 44 | Bygging av hølum til Bileftirlitið | 694 |
| 10 | 47 | A-B Løgtingslóg um broyting í lóg um landbúnaðarins frama | 698 |
| 11 | 48 | Broytingar í løgtingslóg um ferðslu | 701 |
| 12 | 70 | Broyting í rættargangslógini | 785 |
| 13 | 72 | Broyting í revsilógini | 803 |
| 14 | 91 | Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu | 804 |
| 15 | 92 | Sáttmálaskjal til Tingmannaráð Útnorðurs | 812 |
| 16 | 93 | Bygging í Tinganesi | 814 |
| 17 | 95 | Lán til Telefonverk Føroya Løgtings | 817 |
| 18 | 96 | A-E Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin | 831 |

# LANDSKASSIN

## Rakstrarroknskapur 1985

og

## fíggjarstøða pr. 31. desember 1985

# Viðmerkingar til landskassaroknskapin 1985

Fylgjandi **ognir,** sum eru fíggjaðar yvir § 13: Nýggir vegir, brýr, breiðkan av brúm og umsiting av vegum, eru ikki upptiknar í landskassans roknskapi:

**Skerv- og asfaltverk**

| | Byggi kostnaður | Niðurskrivað til pr. 31.12.85 |
|---|---|---|
| Skervverkið í Porkeri | 5..963.087,00 | 3.406.666,00 |
| Skervverkið á Sandi | 1.419.318,00 | 419.543,00 |
| Skervverkið í Sandavági | 4.094.860,00 | 2.696.532,00 |
| Skervverkið í Hundsarabotni | 18.913.883,00 | 7.729.472,00 |
| Skervverkið á Lambareiði | 35.915.995,00 | 19.280.553,00 |
| Bitumengoymslan í Porkeri | 562.552,00 | 406.402,00 |
| Bitumengoymslan á Sandi | 330.455,00 | 330.455,00 |
| Bitumengoymslan í Hósvík | 9.858.023,00 | 4.609.620,00 |
| Asfaltverkið í Hundsarabotni | 6.215.508,00 | 2.417.970,00 |
| Asfaltverkið á Lambareiði | 8.008.638,00 | 4.806.056,00 |
| | 91.282.319,00 | 46.103.269,00 |

**Smiðjur og goymsluhús**

| | Byggi-kostnaður | Niðurskrivað til pr. 31.12.85 |
|---|---|---|
| Maskinstøðin í Kollafirði | 8.550.000 | 5.200.000 |
| Goymsluhús í Kollafirði | 2.000.000 | 1.550.000 |
| Smiðjan á Lambareiði | 220.000 | 105.000 |
| Smiðjan í Norðdepli (gamla) | 80.000 | 19.000 |
| Smiðjan í Hvannasundi | 1.000.000 | 903.000 |
| Smiðjan á Sandi (gamla) | 50.000 | 21.000 |
| Smiðjan á Sandi (nýggja) | 1.200.000 | 1.085.000 |
| Smiðjan í Øravík | 1.000.000 | 903.000 |
| Smiðjan í Kallsoynni | 100.000 | 62.000 |
| Goymsluhús í Havnardali | 200.000 | 180.000 |
| Goymslu- og vaktarhús í sb. við kavagr. á Oyggjarv. | 250.000 | 225.600 |
| Goymsluhús norðuri við Streymin | 200.000 | 190.000 |
| Goymsluhús á Grind á Eiði | 200.000 | 190.000 |
| Servicekont. á Lambareiði | 275.000 | 260.000 |
| Servicekont. í Haraldsundi | 400.000 | 380.000 |
| Goymsluhús á Stykkinum | 200.000 | 184.000 |
| Goymsluhús í Sørvági | 200.000 | 184.000 |
| | 16.125.000 | 11.641.600 |

Fylgjandi **skuld** pr. 31. des. 1985 er ikki bókførd í landskassans roknskapi:

| | |
|---|---|
| Keyp av maskinum upp á avgjald | 5.984.654,00 |
| keyp av útgerð til skervverk | 1.590.000,00 |
| | 7.574.654,00 |

Landskassans **uttanlandaskuld** tann 31. desember 1985 sær soleiðis út:

| | | Skuld 31.12.85 | Bókførd skuld | Skuld við kursi 31.12.85 |
|---|---|---|---|---|
| Exportfinans | Nkr. | 7.522.901,20 | 7.270.599,68 | 8.986.105,48 |
| Kreditbank, Luxembourg | Bfr. | 24.000.000,00 | 979.840,00 | 4.278.240,00 |
| Westdeutsche Landesbank | DM | 12.320.000,00 | 33.850.137,96 | 44.727.760,00 |
| Algemene Bank, Holland | Hfl. | 14.545.454,54 | 40.728.250,75 | 46.913.454,52 |
| N. V. Bank voor Nederland | Hfl. | 20.000.000,00 | 55.747.292,27 | 64.506.000,00 |
| Manufactor Hanover Ltd. | US-dollar | 8.444.444,45 | 61.484.403,73 | 77.102.844,50 |
| 3lán agent Handelsbanken | US-dollar | 4.900.000,00 | 29.448.790,00 | 44.739.940,00 |
| 6 lán agent Privatbanken | US-dollar | 5.400.000,00 | 28.191.858,85 | 49.305.240,00 |
| Nordfinanz Bank, Zürich | Sfr. | 10.000.000,00 | 41.876.625,00 | 43.401.000,00 |
| Nordic Bank, London | Sfr. | 3.350.000,00 | 13.660.630,00 | 14.539.335,00 |
| | | | 313.238.428,24 | 398.499.919,50 |

Viðvíkjandi landskassans **veðhaldsskyldum** er at siga, at sambært yvirlit (fylgiskjal til landskassaroknskapin) veðheldur landskassin 31.12.85 fyri kr. 1.717.500.000,00, og av hesum eru kr. 160.000.000,00 gjaldkomnar.
Tað er gjaldstovuni kunnugt, at roknskapurin viðvíkjandi landskassans veðhaldsskyldum ikki er eftirfarandi á ávísum økjum m.a. orsakað av tørvandi upplýsingum, ið ikki eru komnar gjaldstovuni í hendi.

Undir landskassans bruttoinntøkum framgongur, at endurgjøld ríkiskassans eru 254.802.144,51 kr., men her skal tilskilast, at 97.890.759,82 kr. ikki er við í nevndu upphædd. Hetta er ríkiskassans partur av rakstrinum av sjúkrahúsunum, sum hava sjálvstøðugt on-line roknskaparhald við edv-systeminum hjá gjaldstovuni.

**Ad. § 25: Avskrivingar:**
Gjaldstovan hevur bókað 1 ára avskrivingar 60.179.937,63 kr., meðan løgtingsjáttanin er 25% minni (9 mðr.) 45.542.000,00 kr., av hesi orsøk er rakstrarhallið økt við 14.637. 937,63 kr.

Hesin roknskapur er prentaður soleiðis:

400 eintøk av ársroknskapinum 1985
14 eintøk av kontolistum
14 eintøk av rakstrarstøðum, tó ikki § 13-1
14 eintøk av rakstrarstøðum § 13-1
14 eintøk av landskassans veðhaldsskyldum

# Rakstrarroknskapur landskassans fyri fíggjarárið 1985

## (Samandráttur)

| | | Roknskapur | Fíggjarlóg |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | | |
| (§ 1) | Skattir | 677.537.440,17 | 612.953.000,00 |
| (§ 2) | Toll- og framleiðslugjøld | 509.148.885,34 | 541.000.000,00 |
| (§ 3) | Onnur gjøld | 1.557.440,55 | 1.015.000,00 |
| (§ 4) | Inntøkur av spæli | 990.590,28 | 580.000,00 |
| (§ 5) | Rentur og vinningsbýti v.m. | ÷69.921.817,35 | ÷36.000.000,00 |
| (§ 6) | Landsstovnar (sjá rakstrarstað) | ÷57.280.697,95 | ÷66.748.000,00 |
| (§ 7) | Partur av avlopi danska tjóðarbankans | 31.438.154,00 | 10.000.000,00 |
| (§ 8) | Ymsar inntøkur | 330,52 | 5.000,00 |
| | | 1.093.470.325,56 | 1.062.805.000,00 |
| **Útreiðslur:** | | | |
| (§ 6) | Landsstovnar (sjá undir inntøkum) | 7.318.069,09 | 8.046.000,00 |
| (§ 10) | Løgtingið | 81.487.767,80 | 72.211.000,00 |
| (§ 11) | Landsumsitingin | 85.098.697,04 | 92.836.000,00 |
| (§ 12) | Heilsumál | 106.800.000,00 | 106.800.000,00 |
| (§ 13) | Samferðslumál, fgrunnar | 107.813.177,32 | 107.750.000,00 |
| (§ 13) | Vegir, brýr v.m. | 99.460.319,29 | 96.553.000,00 |
| (§ 14) | Skúlamál | 40.870.396,51 | 41.324.000,00 |
| (§ 15) | Vísind, bókmentir og list | 270.680.326,75 | 256.145.000,00 |
| (§ 16) | Fiskivinna, sigling o.t. | 28.919.995,63 | 28.624.000,00 |
| (§ 17) | Landbúnaður og matrikulering | 28.269.497,79 | 28.025.000,00 |
| (§ 18) | Handil, ídnaður v.m. | 183.809.045,87 | 176.647.000,00 |
| (§ 19) | Almannamál | 3.358.656,60 | 2.965.000,00 |
| (§ 20) | Pensjónsútreiðslur | 13.000.000,00 | 13.000.000,00 |
| (§ 21) | Effektivar veðhaldsbindingar | 2.428.394,00 | 2.276.000,00 |
| (§ 22) | Aðrar og óvissar útreiðslur | ÷3.979.829,88 | : 21.812.000,00 |
| (§ 23) | At leggja í ymsar grunnar v.m. | – | – |
| (§ 24) | Avdráttur av lánum | 60.179.937,63 | 45.542.000,00 |
| (§ 25) | Avskrivingar | 75.724,54 | 170.000,00 |
| (§ 26) | Ymsar ognarútreiðslur | 50.000,00 | 5.700.000,00 |
| (§ 27) | Reguleringskonto | ÷22.169.850,42 | 3.000,00 |
| | Rakstrarhall | 1.093.470.325,56 | 1.062.805.000,00 |

# Fíggjarstøða landskassans pr. 31. des. 1985

## (Samandráttur)

| | | Aktiv | Passiv |
|---|---|---|---|
| (§ 30) | Kassa- banka, sparikassa- og giro-peningur | 62.652.051,14 | |
| (§ 31) | Virðisbrøv | 12.829.951,00 | |
| (§ 32) | Útlán úr landskassanum (inc. ferðaforskot, tollkredit og alimentatión | 146.958.069,65 | |
| (§ 33) | Inntøkueftirstøður | 373.038.244,70 | |
| (§ 34) | Aktiv hjá grunnum (innistandandi, útlán v.m.) | 689.537.817,23 | |
| (§ 35) | Aktiv hjá deponentum | 9.547.633,34 | |
| (§ 36) | Millumrokningar við kommunur | | 49.611.639,75 |
| (§ 36) | Millumrokningar við landsstovnar | | 38.940.371,75 |
| (§ 37) | Fastar ognir og anlegg | 19.967.163,69 | |
| (§ 38) | Skip | 131.683.405,69 | |
| (§ 39) | Millumrokningar við nýtt fíggjarár | | 179.459.697,17 |
| (§ 40) | Millumrokningar, skuld | | 46.115.748,24 |
| (§ 41) | Lán | | 609.141.065,39 |
| (§ 42) | Deposita | | 11.591.084,84 |
| (§ 44) | Grunnar | | 684.079.576,36 |
| (§ 45) | Fløgur fíggjað við lánum | 151.373.560,69 | |
| (§ 46) | Kapitalkonto | | 14.764.845,82 |
| (§ 50) | Refusiónsmillumrokningar | 12.626.459,81 | |
| (§ 51) | Vinnulánsgrunnur løgtingsins | | 1.821.335,29 |
| (§ 52) | Heilsufrøðilig Starvsstova, 4 projekt + Aliráðið | | 923.140,66 |
| (§ 60) | Útreiðsluefirstøður, Landssjúkrahúsið | | 45.495,30 |
| (§ 61) | Bileftirlitsstøð o.a. | 4.109.793,21 | |
| | Rakstrarhall | 22.169.850,42 | |
| | | 1.636.494.000,57 | 1.636.494.000,57 |

Viðvíkjandi ábyrgdum sjá undir fororðinum.

FØROYA GJALDSTOVA, tann 30. desember 1986.

N. Rasmussen H. Mohr

# Specifikatión til 3000/6300 (§ 13)

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3000 | Anlegg av vegum | | 25.531.186,92 |
| 3100 | Kommunal arbeiði | | 435.820,07 |
| 3200 | Tunnil, Húsar-Mikladal | | 34.000.961,75 |
| 3300 | Ábøtur av vegum | | 11.528.764,15 |
| 3400 | Viðlíkahald av vegum | | 10.201.992,71 |
| 3500 | Vegarekkverk | | 1.048.498,70 |
| 3600 | Kavagrevstur | | 2.269.375,69 |
| 3700 | Vegstudningur | | 6.149.677,70 |
| 3800 | Ferjulegur, viðlíkahald | | 5.398.844,28 |
| 3900 | Asfaltering, gamlir vegir | | 5.191.845,39 |
| 5600 | Mobil amboð - rakstur/keyp | | 21.776.575,03 |
| 5700 | Smiðjur | | 9.975.673,59 |
| 5800 | Skervverk | | 7.960.695,78 |
| 5900 | Asfaltverk | | 9.444.152,31 |
| 6000 | Havnir | 37.839.509,00 | |
| 6100/6800 | Lendingar og bátahavnir | 27.776.528,00 | |
| | Mótrokningar | ÷65.616.037,00 | 0,00 |
| | | | 150.914.064,07 |

# Specifikatión

Nú føroyska fíggjarárið, eins og tað danska, fylgir álmannakkaárinum, fer at bera betur til at samanbera tær útreiðslur, sum standast av at reka føroyskar og danskar undirvísingarstovnar í Føroyum.

Fyri allar tær konti undir § 14, sum hetta uppskot fevnir um, hevur landsskúlafyrisitingin roynt at tikið allar útreiðslur fyri viðkomandi umráði við, uttan mun til um tær verða goldnar av landsstýrinum, ríkinum ella

øðrum. Uppskotið skuldi tí givið eina mynd av, hvat ið alt undirvísingarverkið kostar.

Tær upplýsingar, ið eru tøkar fyri útreiðslur kommununnar til rakstur av fólkaskúlanum og til kvøldskúlan, verða ikki mettar at vera nóg nágreiniligar til at verða tiknir við í løtuni. Tó verður mett, at kommunurnar gjalda umf. 20% av samlaðu rakstrarútreiðslum fólkaskúlans. Kommunuútreiðslurnar til kvøldskúlan, sambært løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvísing v. m., eru 50% av læraralønunum v. m. við frádrátti av innskrivingargjaldi næminganna. Eisini gjalda kommunurnar 50% av lærara- og leiðaralønum á musikkskúlum.

Byggiútreiðslurnar eru tiknar við í tann mun, tað snýr seg um útreiðslur, ið verða goldnar av landskassanum ella ríkiskassanum.

Sum byggiútreiðslur verða roknaðar bæði beinleiðis útreiðslur og avseting til serligar grunnar, sum studningur til eitt nú fólkaskúlabygging í kommununum verður veittur úr.

Allar útreiðslur til undirvísingarmál eftir uppskotinum eru tilsamans 252 mió. kr. Av hesum verður endurgoldið úr ríkiskassanum 122 mió. kr. Kommunurnar gjalda 9 mió. kr. Á hendan hátt verða allar útreiðslurnar hjá landskassanum til undirvísingarmál 130 mió. kr. Nærri greining av endurgjaldinum sæst av viðmerkingunum til hvørja konto sær.

Tann hækking í samlaðu útreiðslunum til undirvísingarverkið frá 1985, umroknað til 12 mánaðir, til 1986, sum er umf. 5,2 mió. kr. ella umf. 9%, er sundurbýtt millum hesar konti: 14103 Fólkaskúlin 1,9 mió. kr., 14502 Studentaskúlar og HF-skeið 0,3 mió. kr. og aðrar konti umf. 3,3 mió. kr.

**Viðmerkingar til tey/tær einstøku rakstrarstøð/konti:**

**ad 73057, 73207 Endurgjald/ríkið/kommunurnar.**

Tær upgivnu peningahæddir á hesi konto eru ávikavist samlaða endurgjaldið á øllum útreiðslukonti innan § 14. Í viðmerkingunum til tær einstøku útreiðslukonti er upplýst býtið av útreiðslum til landskassan, ríkiskassan og kommunurnar.

**Ad 14053 Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið.**

Markið millum teir einstøku undirvísingarstovnar er ikki skarpt.

Lærarar, sum eru knýttir at einum undirvísingarstovni, undirvísa ofta á fleiri øðrum stovnum.

Yvirtøkan av skúlafyrisitingini førir við sær, at nógv mál, sum áður hava verið umsitin av ríkisfyrisitingini, nú verða umsitin av landsskúlafyrisitingini og teimum undirvísingarstovnum, sum liggja undir henni. Talið av málum, sum verða fyrisitin av landsskúlafyrisitingini, er javnt vaksandi.

Viðvíkjandi sjálvari undirvísingini eru gjørdar ella fara at verða gjørdar lógarbroytingar.

Hesi viðurskifti føra við sær, at í framtíðini verður størri tørvur enn áður á framhaldandi útbúgving fyri lærarar á teimum ymsu undirvísingarstovnunum. Slík útbúgving kann fara fram á skeiðum, sum verða hildin bæði innanoyggja og uttanlands. Seinastu árini hava t. d. faklig feløg innan fólkaskúlalærarar hildið fleiri stutt skeið í Føroyum. Tann í uppskotinum nevndi peningur skal brúkast til studning til lærarar, sum skulu luttaka í fakligum skeiðum innanoyggja og uttanlands, og til skeið, sum verða fyriskipað av landsskúlafyrisitingini, fakligum feløgum ella av øðrum.

Tá ið talan er um studning til luttakarar á skeiðum, hava allar útreiðslur í sambandi við luttøkuna møguleika at koma við sum grundarlag undir viðgerð av studningsveiting. Vanliga skulu kortini vikarútreiðslur bókast á konto hjá tí einstaka undirvísingarstovni. Støddin á studninginum lagar seg eftir, hvørjar útreiðslurnar eru, hvat skeið tað er, og hvørjir møguleikar eru fyri studningi frá øðrum.

Sum ein høvuðsregla kunnu lærarar frá øllum undirvísingarstovnum undir landsskúlafyrisitingini fáa studning av hesi konto.

Henda konto skal fyrst av øllum brúkast sum studningur til lærarar á teimum undirvísingarstovnum, sum ikki hava serstaka konto til hetta endamál, t. d. í fólkaskúlanum. Hon skal aftrat brúkast í teimum førum, har lærarar luttaka í skeiðum, sum standa í sambandi við undirvísingarhættir. Og so kann hon eisini brúkast í teimum serligu førum, tá ið kontoin hjá undirvísingarstovninum er brúkt upp.

Studningur at halda skeið fyri, kann verða veittur sum gjald av undirskoti ella sum ávís peningahædd. Støddin á studninginum lagar seg m. a. eftir tí skeiði, talan er um, og áðrenn studningurin verður játtaður, skal figgjarætlanin fyri skeiðið verða framvegað. Serliga verður serlæraraútbúgvingarskeiðið, sum fer at tyngja heldur nógv á hesa konto í ár.

Tað skal viðmerkjast, at av konto — Ferðastudningur/ríkið verður veittur studningur til fólkaskúlalærarar, sum luttaka í skeiðum uttanlands. Henda konto verður væntandi strikað, tá ið grundarlagið undir ríkisstudninginum verður broytt.

Sambært reglugerð fyri landsskúlastjóran, reglugerð nr. 3 frá 2. januar 1980, § 4, 2. stk., eigur landsskúlastjórin, í samarbeiði við skúlabókagrunnin og innan tær figgjarligu rammurnar, at tryggja fyrireiking og útgávu av undirvísingartilfari og lærubókum til teir ymsu undirvísingarstovnarnar. Fyri at kunna gera eitt munagott arbeiði á hesum øki, er neyðugt, at lærarar, sum hava hug og evnir at gera skúlabøkur, kunnu fáa farloyvi frá skúlanum í einum tíðarskeiði upp á t. d. 3 mánaðir, og av tí at bókaútgáva í Føroyum ikki er eitt lønandi arbeiði, má møguleiki skapast, fyri at teir fáa frí við løn. Skúlabókagrunnurin hevur í einstøkum føri givið

stuðul til lærarar, men landsskúlafyrisitingin metir, at samsvarandi virksemið hjá landsskúlafyrisitingini sum heild og samsvarandi áðurnevndu reglugerð nr. 3, eigur tað at vera landsskúlafyrisitingin og ikki skúlabókagrunnurin, sum hevur um hendi at lata møguligan stuðul til lærarar.

Landsskúlafyrisitingin metir, at slíkar útreiðslur eiga at verða bornar av konto 14053 Felagsútreiðslur fyri skúlaverkið, og er tí henda konto hækkað við 290.000 kr. til hetta endamál.

Sundurgreinað sær kontoin soleiðis út:

| | |
|---|---|
| 1. Vanlig virksemi | 400.000 kr. |
| 2. Vikarútreiðslur | 290.000 kr. |
| 3. Føroyski skúlin í Keypmannahavn og Århus | 60.000 kr. |
| 4. Skeið til danskar lærarar | 25.000 kr. |
| 5. Flytipeningur til studentaskúlalærarar | 75.000 kr. |
| Tilsamans | 850.000 kr. |

Sum kunnugt hava studentaskúlar og HF-skeið framvegis fyri nevðini at fáa lærarar uttanifrá — lærarar, sum ikki skilja føroyskt. —

Skúlarnir meta, at tað er avgjørt neyðugt, at hesir lærarar fáa eitt skeið í føroyskum máli og um føroysk viðurskifti.

Hetta er eisini viðtikið av landsskúlaráðnum.

Fyri at tryggja, at skúlarnir kunnu fáa lærarar, sum tosa føroyskt, so hvørt hetta gerst møguligt, verða teir omanfyri nevndu lærarar settir í eitt tvey ára skeið, treytað av at teir fáa flytiútreiðslur endurgoldnar.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 84/85 | 253.000 |
| J: | 85 | 638.000 |
| U: | 86 | 850.000 |

**Ad 14067 Endurgjald til rithøvundar:**

Hetta er nýtt rakstrarstað, sum er sett á stovn sambært skriv frá landsstýrinum, dagfest 30. september 1983, J. nr. 2209-1.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 84/85 | 154.000 |
| J: | 85 | 53.000 |
| U: | 86 | 70.000 |

**Ad 73057 Endurgjald/ríkið**

Henda konto sæst ikki í høvuðsyvirlitinum. Tær endurgjaldingar og útreiðslur, henda konto fevnir um fyri ríkiskassan, eru at finna á hvørjum einstøkum rakstrarstað.

Ríkiskassaútreiðslurnar á hesi konto eru fyri liggjarárið 1986:

| | |
|---|---|
| Læraralønir | 57.750.000 |
| Eftirlønir | 5.595.200 |
| Skúlabarnaflutningur | 1.250.000 |
| | 64.595.200 |

| | |
|---|---|
| Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir | 30.000 kr. |
| Frítíðarundirvísingin | 4.439.000 kr. |
| Studningur til skúlabygging | 8.800.000 kr. |
| Landsmiðstøðin | 381.000 kr. |
| Skúlin á Trøðni | 8.857.000 kr. |
| Tilsamans | 22.507.000 kr. |

Útreiðslur, sum landskassin ikki luttekur í:

| | |
|---|---|
| Ferðaútreiðslur/ríkið | 50.000 kr. |
| Føroya Læraraskúli | 9.100.000 kr. |
| Tekniskir skúlar | 15.638.000 kr. |
| Handilsskúlin | 6.693.000 kr. |
| Føroya Maskinskúli | 2.000.000 kr. |
| Privatir skúlar | 1.133.000 kr. |
| Tilsamans | 34.614.000 kr. |

**Ad 73207 Endurgjald/kommunurnar.**

Heldur ikki henda konto sæst í høvuðsyvirlitinum. Tær endurgjaldingar, henda konto fevnir um, eru at finna á hvørjari einstakari konto.

Útreiðslurnar hjá kommununum á hesi konto verða fyri liggjarárið 1986:

| | |
|---|---|
| Skúlabarnaflutningur | 2.500.000 kr. |
| Frítíðarundirvísingin | 4.325.000 kr. |
| Musikkskúlin | 2.180.500 kr. |
| | 9.005.500 kr. |

**Ad 14103 Fólkaskúlin.**

Hetta rakstrarstað kann býtast upp í hesar konti:

| Í 1.000 kr. Konto | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 73057 | Endurgjald, ríkið . . . . . | ÷ 64.197 | ÷ 48.739 | ÷ 64.595 | |
| 13207 | Endurgjald, kommunurnar . . . | ÷ 3.203 | ÷ 2.402 | ÷ 2.500 | |
| 103127 | Løn/lærarar . . . . . | 104.791 | 76.074 | 105.000 | |
| 103558 | Eftirlønir . . . . . | 7.503 | 5.780 | 7.444 | |
| 253069 | Skúlabarnaflutningur . . . . . | 4.476 | 4.804 | 5.000 | |
| | Samlaðar útreiðslur . . . . . | 116.770 | 86.658 | 117.444 | |
| Ríkiskassi/kommunurnar . . . . . | | 67.400 | 51.141 | 67.095 | |
| Landskassans partur . . . . . | | 49.370 | 35.517 | 50.349 | 54.129 *) |

Í hesari uppgerð eru útreiðslurnar til frítíðarundirvísingina ikki roknaðar við.

*) **Viðmerking landsstýrisins:**
Landskassans partur incl. lønarhækking í 1986.

**Ad 103127 Læraralønir.**

Lønirnar eru settar í tí lønarlagi, sum var galdandi 1. apríl 1985. Í skúlaárinum 1985/86 eru 7.783 næmingar í fólkaskúlanum, og lisnir verða uml. 15.855 læraratímar um vikuna; hetta svarar til uml. 17.500 lønartímar. Í 1984/85 vóru 7.800 næmingar, og lisnir vórðu uml. 15.400 læraratímar um vikuna; hetta svaraði til uml. 16.500 lønartímar. Roknað verður ikki við nøkrum vøkstri í næmingatalinum.

Henda konto fevnir — umframt tær veruligu lønarútreiðslurnar til lærarar — somuleiðis um vikarútreiðslur bæði til skipað og ikki sett størv og til ikki-sett størv og útreiðslur í sambandi við skeiðuppihald ella sjúku hjá lærarum. Av hesi konto verður somuleiðis flutningssamsýning o. s. fr. goldið í sambandi við starvssetan læraranna. Lønarútreiðslur til tey starvsfólk, sum arbeiða í landsskúlafyrisitingini, deild fyri fólkaskúlan v. m., og sum hava eina pedagogiska útbúgving, verða eisini goldnar av hesi konto.

Roknað verður við tí útgoldnu lønini fyri apríl mánað 1985, sambært innkallingarskriv landsstýrisins.

Samlaðu útreiðslurnar til læraralønir í figgjarárinum 1985/86 væntast at verða 104.896.064 kr.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 84/85 | 104.791.000 |
| J: | 85 | 76.074.000 |
| U: | 86 | 105.000.000 |

Sostatt er henda konto vaksin við umleið 0,2% frá R 84/85 til U 86 og við 3,5% frá J 85 til U 86, men her skal tó viðmerkjast, at J 85 er umroknað til 12 við 2.600.000 kr. lægri enn U 85; sostatt er U 86 968.000 kr. ell 0,01% hægri enn U 85. Av tí samlaðu upphæddini 105 mió. kr. skal ríkið gjalda 55% svarandi til 57,8 mió. kr.

Landskassans útreiðslur í trý ára skeiðnum eru:

| | | |
|---|---|---|
| R: | 84/85 | 47.155.960 |
| J: | 85 | 45.644.400 |
| U: | 86 | 47.250.000 |

**Ad 103558 Eftirlønir**

Av tí at eftirlønir verða reguleraðar sambært danskt prístal, og prístalshækkingin sambært lóg er sett úr gildi, er eingin hækking á hesari konto.

Roknað verður við støði í útgoldnari eftirløn fyri apríl mánað 1985.

Samlaðar útreiðslur fyri figgjarárið 1986 verða mettar til 7,444 mió. kr.

| | | |
|---|---|---|
| R: | 84/85 | 7.503.000 |
| J: | 85 | 5.780.000 |
| U: | 86 | 7.444.000 |

Í mun til játtanina fyri 1985 er kontoin lækkað við 3,4%. Hetta kemst av, at prístalshækkingar ikki eru gjørdar.

Av hesum útreiðslum skal ríkiskassin gjalda 80%. Landskassans partur verður sostatt:

| | | |
|---|---|---|
| R: | 84/85 | 1.500.600 |
| J: | 85 | 1.156.000 |
| U: | 86 | 1.488.800 |

**Ad 253069 Skúlabarnaflutningur**

Tað er oftast sera ymist, nær tær ymsu kommunurnar senda inn endurgjaldskrav fyri skúlabarnaflutning.

Sostatt eru roknskapartølini ikki avgjørt álítandi.

Uppskotið verður grundað á roknskapartølini fyri 1984/85, og søkt verður um:

| | | |
|---|---|---|
| R: | 84/85 | 4.476.000 |
| J: | 85 | 3.603.000 |
| U: | 86 | 5.000.000 |

Tær samlaðu útreiðslurnar verða býttar soleiðis:

| | |
|---|---|
| Ríkiskassin | 25% |
| Kommunurnar | 50% |
| Landskassin | 25% |

| | | |
|---|---|---|
| Landskassans partur er: | R: 84/85 | 1.119.000 |
| | J: 85 | 900.750 |
| | U: 86 | 1.250.000 |

---

**Suðuroyar HF-skeið**

**Rakstrarstað 14155**

**Figgjarlógaruppskot fyri 1986**

| Kontonummar og navn | kr. Roknskapur 1984/85 | 1.000 kr. Játtan 1985 | 1.000 kr. Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 83809 Leiguinntøkur | 0,00 | 11.0 | 0.0 | 0.0 |
| 103168 Løn, sáttmálalønt | 1.006.836,38 | 896.0 | 1.569.6 | 1.695.2 |
| 103222 Løn, reingerð | 45.863,64 | 56.0 | 46.2 | 46.2 |
| 103288 Løn, onnur | 1.980,00 | 5.0 | 2.0 | 2.0 |
| 103296 Løn, timalønt | 623.083,01 | 307.0 | 291.0 | 314.3 |
| 103405 Løn, úrtíðarløn | 425.390,53 | 159.0 | 200.0 | 216.0 |
| 103507 Samsýningar | 3.215,50 | 11.0 | 4.0 | 4.0 |
| 113202 Ferða- og dagpeningur | 374.455,42 | 225.0 | 330.0 | 330.0 |
| 213105 El, hiti og vask | 16.873,98 | 23.0 | 17.0 | 17.0 |
| 213408 Umvælingar v. m. | 8.060,40 | 15.0 | 7.0 | 7.0 |
| 213702 Ognartrygging | 156,00 | 1.0 | 1.0 | 1.0 |
| 213806 Leiguútreiðslur | 54.400,00 | 173.0 | 233.7 | 233.7 |
| 233051 Innbúgv | 12.871,45 | 26.0 | 13.0 | 13.0 |
| 233155 Prentlutir | 23.898,50 | 13.0 | 17.0 | 17.0 |
| 233259 Postgjald | 2.216,00 | 3.0 | 2.5 | 2.5 |
| 233354 Telefon og telex | 6.480,00 | 12.0 | 7.0 | 7.0 |
| 233409 Leiga av maskinum | 35.905,81 | 38.0 | 36.0 | 36.0 |
| 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur | 1.232,00 | 2.0 | 1.2 | 1.2 |
| 253085 Bókakeyp og -innbinding | 44.966,95 | 53.0 | 45.0 | 45.0 |
| 253093 Søvnini | 28.448,21 | 23.0 | 29.0 | 29.0 |
| 253903 Aðrar útreiðslur | 2.127,00 | 59.0 | 2.5 | 2.5 |
| 253077 Ekskursiónir | 12.315,50 | 18.0 | 13.0 | 13.0 |
| 253148 Kost og logi | 15.766,35 | 26.0 | 16.0 | 16.0 |
| | 2.746.542,63 | 2.213.0 | 2.883.7 | 3.048.6 |

**Viðmerkingar:**

**213806 Leiguútreiðslur**

| | | |
|---|---|---|
| a) Leiga — Húsið í Vági ..... | 43.200 | |
| b) Leiga — Ítróttarhøll (Vági) ..... | 16.500 | |
| c) Leiga — Hølir á Tvøroyri ..... | 150.000 | (sáttmáli ikki gjørdur) |
| d) Nýggj hølir í Vági ..... | 24.000 | |
| | 233.700 | |

**ad c)** Upphæddin er tann úr fíggjarlóg '85. Tvøroyrar kommuna krevur eina størri upphædd, men sáttmálin er ikki undirskrivaður enn.

**ad d)** Húsið í Vági er so trongligt, at neyðugt er antin at byggja um/út, ella at leiga onnur hølir afturat.

**233409 Leiga av maskinum**

Vit meta at 84/85 upphæddin er ov lítil. Tann nýggja Data-útgerðin krevur størri útreiðslur. (Sí vøkstur í játtan »aðrar útreiðslur« frá 84/85 til 86). Okkara meting er 74.000 kr.).

**253077 Ekskursiónir**

Vit hava eisini her fylgt leiðbeiningini, men meina, at upphæddin er ov lítil. Tað lítla brúkið 84/85 hongur saman við einari avlýsing. Tørvurin var altso størri enn útreiðslan vísir.

Av tí, at vit hava roynt at hildið útreiðslurnar niðri í 84/85 við sparsemi og við at útskjóta innkeyp, og tí at fíggjarlógaruppskot okkara fyri 1985 eisini var hildið so lágt sum gjørligt, meta vit at reduktiónin, sum fylgir við leiðbeiningini, fer at gera raksturin ógvuliga tungan.

**Suðuroy**

**ad 103168 Løn/sáttmálaløn**

Bruttoløn 1/4 1985 (fastar løn).

Adjunktar (9) kr. 1.349.315. Uppí er roknað 1 aldursviðbót hjá hvørjum. Við 1,5% í frítíðarløn verður samlaða upphæddin **kr. 1.369.555.** — Sí annars skjal 1.

**ad 103296 Løn/tímaløn**

Lønir 1/4 1985. Tímalærarar (6), kr. 286.682 + 1,5% í frítíðarløn, **kr. 290.982.** — Sí annars skjal 1.

**ad 103405 Úrtíðarlønir**

Sáttmálaløn, kr. 405.061 + 1,5% í frítíðarløn, **kr. 411.137.** — Sí annars skjal 1.

Skjal 1.

**SUÐUROY**

**Sáttmálaløn**

| | Føst løn kr. | Yvirtíðarløn kr. | Landskassans partur av eftirlønargjaldi 10% |
|---|---|---|---|
| Adjunktur | 64.650 | 2.485 | 5.683 |
| Adjunktur | 200.808 | 135.230 | 17.712 |
| Adjunktur | 158.549 | 34.374 | 14.030 |
| Adjunktur | 44.333 | 6.204 | 3.936 |
| Adjunktur | 205.908 | 77.354 | 18.222 |
| Adjunktur | 233.508 | 84.903 | 20.982 |
| Adjunktur | 72.843 | 9.804 | 6.337 |
| Adjunktur | 186.608 | 0.0 | 16.292 |
| Adjunktur | 182.108 | 54.707 | 15.482 |
| Tilsamans | kr. 1.349.315 | kr. 405.061 | |

| | |
|---|---|
| **Tímaløn** | kr. 64.986 |
| | 12.765 |
| | 26.948 |
| | 25.529 |
| | 103.800 |
| | 52.654 |
| Tilsamans | kr. 286.682 |

**Klaksvíkar HF-skeið**

**Rakstrarstað nr. 14169**

**Fíggjaruppskot fyri 1986**

| Konto | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1.000 kr. | Uppskot 1986 1.000 kr. | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 103168 | Løn/sáttmálaløn t. . . | 1.041.095,17 | 1.439.1 | 1.027.0 | 1.109.2 |
| 103222 | Løn/reingerð . . . . . | 80.223,92 | 185.5 | 96.6 | 96.6 |
| 103288 | Løn/onnur . . . . . | 6.660,09 | 30.6 | 16.0 | 17.0 |
| 103296 | Tímaløn . . . . . | 390.013,72 | 277.6 | 223.0 | 240.8 |
| 103405 | Úrtíðarløn . . . . . | 289.408,83 | 218.3 | 188.0 | 203.0 |
| 103509 | Samsýningar . . . . . | 18.939,79 | 43.2 | 21.1 | 21.1 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. | 29.632,20 | 92.0 | 40.0 | 40.0 |
| 213105 | El, hiti og vask . . . . | 86.938,51 | 123.0 | 70.2 | 70.2 |
| 213408 | Umvælingar v. m. . . . | 65.516,59 | 190.0 | 70.0 | 70.0 |
| 213702 | Ognartrygging . . . . . | 2.450,00 | 6.7 | 10.0 | 10.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur . . . . . | 0,00 | 14.8 | 12.0 | 12.0 |
| 233051 | Innbúgv . . . . . | 50.836,90 | 121.5 | 50.0 | 50.0 |
| 233155 | Prentlutir . . . . . | 2.225,75 | 27.3 | 15.0 | 15.0 |
| 233259 | Postgjald . . . . . | 981,00 | 2.8 | 1.0 | 1.0 |
| 233354 | Telefon og telex . . . . | 7.421,00 | 14.5 | 10.0 | 10.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 32.183,11 | 49.1 | 32.0 | 32.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútr. | 3.221,70 | 20.0 | 5.0 | 5.0 |
| 253077 | Ekskursiónir . . . . . | 14.148,50 | 19.0 | 9.0 | 9.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innb. | 89.358,55 | 102.5 | 60.0 | 60.0 |
| 253093 | Søvnini. . . . . | 150.879,56 | 230.2 | 140.0 | 140.0 |
| 253148 | Kost og logi . . . . . | 0,00 | 16.3 | 0.0 | 0.0 |
| 251903 | Aðrar útreiðslur . . . . | 16.273,57 | 75.0 | 10.0 | 10.0 |
| 233553 | Telduútgerð v. m. . . . | 0,00 | 86.2 | 0.0 | 0.0 |
| 14169 | | 2.378.407,66 | 3.385.0 | 2.105.9 | 2.221.9 |

**ad 103168 Løn/sáttmálaløn**

Næmingatalið í Klaksvík — og harvið tímatalið — er fallið munandi, men mett verður kortini, at vit altíð koma at hava *ein* 1. flokk og *ein* 2. flokk, svarandi til 170 løntimar (ferðing íroknað). Mett verður, at 110 tímar verða lisnir av adjunktum á 6. trini svarandi til (110/21.5) × 16733 × 12 = 1.027.000 kr., (sí skjal 11).

**Tilsamans: 1.027.000 kr.**

**ad 103222 Løn/reingerð**
Løn pr. 1/4-85: 77.269,92 kr.

Henda løn svarar til 4 tímar reingerð. Niðasta hædd er komin afturat, og vaskifólkið vil gera reint her eisini móti eini samsýning svarandi til 1 tíma. Tessvegna verður skotið upp 77.269,92 × 5/4 = **96.587,40 kr.**

**Tilsamans: 96.587 kr.**

**ad 103288 Løn/onnur**
HF hevur ikki fastsettan pedel, og ikki verður roknað við meira enn uml. 20 tímum pr. mð. til pedelarbeiði, smærri umvælingar, smáørindi:
20 tímar á 66,30 × 12 = 15.912 kr.

**Tilsamans: 16.000 kr.**

**ad 103296 Tímaløn**
Væntandi verða 35 tímar lisnir av D2'arum (532 kr.). svarandi til 223.000 kr., (sí skjal II).

**Tilsamans: 223.000 kr.**

**ad 103405 Úrtíðarløn**
Væntandi verða 25 tímar lisnir sum yvirtímar, har 10 verða løntir við 313 kr./mð. og 15 tímar løntir við 838 kr./mð., svarandi til
37.500 kr. + 150.840 kr. = 188.000 kr., (sí skjal II).

**Tilsamans: 188.000 kr.**

**ad 103509 Samsýningar**
Til prógtøkuvakt (incl. sjúkra- og umroyndir):

| | |
|---|---|
| 3 vaktir á 35 tímar á 66,30 kr. ..... | 7.160 kr. |
| Fyrilestrar: 10 tímar á 600 kr. ..... | 6.000 kr. |
| Skrivstovuhjálp: ..... | 5.000 kr. |
| Gardinseyming og uppvarting á dimissiónsdegi og á fyrsta skúladegi: ..... | 3.000 kr. |
| | 21.160 kr. |

**Tilsamans: 21.160 kr.**

**ad 113202 Ferða- og dagpeningur**
Talið av ferðum fer væntandi at liggja á 5 komandi ár.
Tað gevur: (200 × 40 × 5) = **40.000 kr.**

**Tilsamans: 40.000 kr.**

**ad 213105 El, hiti og vask**

| | |
|---|---|
| Til elektricitet (5 málarar) | 21.600 kr. |
| Til olju (hølir á tils. 660 m²) | 33.600 kr. |
| Til vask/reingerð (sápa, tvøgur, ljósperur o.a.) | 15.000 kr. |
| | 70.200 kr. |

**Tilsamans: 70.200 kr.**

**ad 213408 Umvælingar v. m.**

| | |
|---|---|
| Gólválegging í niðastu hædd (50 m²) | 15.000 kr. |
| 1 dupulthurð og 3 vindeygu í niðastu | 30.000 kr. |
| Klæða og isolera veggirnar í niðastu hædd | 15.000 kr. |
| Klæða loftið í niðastu hædd | 10.000 kr. |
| | 70.000 kr. |

**Tilsamans: 70.000 kr.**

**ad 213806 Leiguútreiðslur**
Leiga av K. Í. Høllini til finleik:
200 kr. tímin, 1,5 tímar pr. viku = 200 × 1,5 × 40.
**Tilsamans: 12.000 kr.**

**ad 213702 Ognartrygging.**
**Tilsamans: 10.000 kr.**

**ad 233051 Innbúgv.**

| | |
|---|---|
| 2 kortuppheng | 2.000 kr. |
| 2 kortskinnarar | 6.000 kr. |
| 2 bókasavnsreolir v/hjólum | 10.000 kr. |
| 8 arbeiðsborð | 20.000 kr. |
| 1 skáp v/lási til video | 2.500 kr. |
| 1 skrivimaskinuborð | 1.500 kr. |
| 2 skáp til kemi | 8.000 kr. |
| | 50.000 kr. |

**Tilsamans: 50.000 kr.**

**ad 233155 Prentlutir.**
**Tilsamans: 15.000 kr.**

**ad 233259 Postgjald.**
**Tilsamans: 1.000 kr.**

**ad 233354 Telefon og Telex.**
Rakstur av verandi apparatum **10.000 kr.**
**Tilsamans: 10.000 kr.**

ad 233409 Leiga av maskinum.
Til leigu av kopimaskinu verður roknað við:
**Tilsamans: 32.000 kr.**

**ad 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur.**
Útgerð til arkivering og bókhald: **5.000 kr.**
**Tilsamans: 5.000 kr.**

**ad 253077 Ekskursiónir.**
Til 2 flokkar, 4.500 kr. pr. flokk:
**Tilsamans: 9.000 kr.**

**ad 253085 Bókakeyp og innbinding.**
Til viðlíkahald og endurnýggjan av handbókum til uml. 20 fak verður roknað við 3.000 kr. pr. fak í meðal, heruppií blaðhald og orðabøkur
**Tilsamans: 60.000 kr.**

**ad 253093 Søvnini**

| | |
|---|---|
| Fysik (sí skjal A) ..... | 55.000 kr. |
| Matematik (sí skjal B) ..... | 5.900 kr. |
| Kemi (sí skjal C) ..... | 25.000 kr. |
| Biologi (sí skjal D) ..... | 25.000 kr. |
| Fiskivinna (sí skjal E) ..... | 15.000 kr. |
| Data ..... | 2.000 kr. |
| Tónleikur ..... | 5.000 kr. |
| Ítrótt ..... | 5.000 kr. |
| AV øll fak (video, ljóbond bond, film v. m.) ..... | 2.000 kr. |
| | 139.900 kr. |

**Tilsamans: 140.000 kr.**

**ad 253903 Aðrar útreiðslur.**

| | |
|---|---|
| Próvtøkupappír, krit, talvusvampar o. tl. | 3.000 kr. |
| Lýsingar ..... | 1.500 kr. |
| Vørur til dimissiónsdag, censorkaffi, 1. skúladag ..... | 3.000 kr. |
| Annað (t. d. amboð) ..... | 2.500 kr. |
| | 10.000 kr. |

**Tilsamans: 10.000 kr.**

| | Skipað størv 31.3.1985 | | Nýskipað størv 1.4.1985 | Leys hjálp 1.4.1985 | Tímalønt 1.4.1985 | Løn 1) 1.4.1985 | | | Nýnormering 2) | Játtan 1984/85 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | sett | leys | | | | lønarfl. | | kr. | Yvirtíð | |
| adjuntkur | x | | | | | YF | 02 | 63.919 | 50.998 | |
| « | x | | | | | YF | 01 | 55.818 | 46.416 | |
| « | x | | | | | YF | 10 | 221.908 | 19.476 | |
| « | x | | | | | YF | 05 | 103.733 | 38.292 | |
| « | x | | | | | YF | 06 | 182.634 | 93.228 | |
| « | x | | | | | YF | 08 | 63.332 | 20.940 | |
| « | x | | | | | YF | 03 | 130.065 | 62.676 | |
| « | x | | | | | YF | 02 | 24.821 | 9.504 | |
| « | x | | | | | YF | 03 | 127.266 | 28.728 | |
| « | x | | | | | YF | 06 | 39.498 | 14.712 | |
| « | x | | | | | YF | 03 | 46.950 | 12.492 | |
| « | x | | | | | YF | 02 | 116.877 | 51.252 | |
| | | | | | | | | 1.176.827 | | 1.303.000 |
| | | | | | | | | | 448.787 | 222.000 |
| tímalærari | x | | | | | D2 | | 12.764 | | |
| « | x | | | | | D2 | | 81.374 | | |
| « | x | | | | | D1 | | 11.346 | | |
| « | x | | | | | D2 | | 38.783 | | |
| « | x | | | | | KV | | 143.606 | | |
| | | | | | | | | 287.876 | | 215.000 |

Skjal A

## UPPGERÐ YVIR FYSIKSAVNIÐ 1986

| | |
|---|---|
| Spektrometer | 15.000 kr. |
| 5 spektrallamper | 3.000 kr. |
| 2 lampehuse | 1.000 kr. |
| Transformer | 1.000 kr. |
| HT-enhed | 2.500 kr. |
| Laser | 3.000 kr. |
| Fotodektor | 600 kr. |
| Lyslederudstyr | 1.000 kr. |
| Optisk bænk | 400 kr. |
| Bølgeapparat | 3.000 kr. |
| Elektronisk afbøjningsrør | 2.500 kr. |
| Helmholtz spolesæt | 1.500 kr. |
| Elektrondiffrantionsrør | 2.500 kr. |
| Universal stativ | 1.500 kr. |
| Millikan apparat | 4.000 kr. |
| Planks konstant-apparat | 2.500 kr. |
| Forskelligt I-HF udstyr (Lufttermometer, Boyle-Mariotte, varmekapacitet, Joules lov, dekademodstande o. s. v.) | 5.000 kr. |
| Forskellige mindre effekter (Niveauborde, standere, muffer, lodder, tråd o.s. v. | 5.000 kr. |
| Ialt | 55.000 kr. |

Skjal B

Klaksvíkar HF-skeið
3870 Klaksvík

**Samlingskontoen i matematik. Finansåret 1986.**

| | |
|---|---|
| 20 stk. lommeregnere TI-35 á kr. 295,- | 5.900 kr. |

**Skjal C**

## EVNAFRØÐI 1986/87

### Søvn

| | |
|---|---|
| $CO_2$-fløska og ventilur | 3.000 kr. |
| Stativ | 2.000 kr. |
| Kemikaliur | 2.000 kr. |
| Trygdarútgerð | 4.000 kr. |
| Brúsur | 2.000 kr. |
| Rotatiónsfordampari | 12.000 kr. |
| Tilsamans | 25.000 kr. |

**Skjal D**

## LÍVFRØÐI 1986/87

### Søvn

| | |
|---|---|
| 3 Olympos mikroskop (á kr. 4.000,-) | 12.000 kr. |
| 2 Olympos stereo-luppar (á kr. 2.000,-) | 4.000 kr. |
| Eyka-útgerð til mikroskop | 2.000 kr. |
| 1 mátitól til boyrn | 2.500 kr. |
| 1 mátitól til hjarta/puls/blóðtrýst | 3.500 kr. |
| Agar-plátur og agar-akstrakt | 1.000 kr. |
| Tilsamans | 25.000 kr. |

**Skjal E**

## FISKIVINNA 1986/87

### Søvn

| | |
|---|---|
| 2 línur (á 3 stk.), húkar, standarar, stampar | 6.000 kr. |
| 6 snørir og eyka húkar, teymar, pilkar | 1.000 kr. |
| 10 seiðakikarar (leysar, tilgjørdar) | 1.000 kr. |
| Glasfløskur til plankton-kanningar | 500 kr. |
| 2 plankton-trol | 500 kr. |
| 1 model av skipi v/nót | 3.000 kr. |
| 1 model av skipi v/troli | 3.000 kr. |
| Tilsamans | 15.000 kr. |

## Rakstrarstað nr. 14174 Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy

### Fíggjaruppskot fyri 1986

| Konto | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/1 - 31/12 1.000 kr. | Uppskot 1986 1.000 kr. | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn | 22.967,65 | 279.000 | 291.827 | 315.173 |
| 103143 | Løn/starvsfólk ..... | 354.328,70 | 548.750 | 598.876 | 646.786 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt ... | 3.003.913,10 | 4.287.900 | 5.020.000 | 5.421.600 |
| 103222 | Løn/reingerð ..... | 184.821,94 | 295.000 | 265.000 | 265.000 |
| 103288 | Løn/onnur ..... | 2.440,56 | 15.750 | 20.000 | 21.600 |
| 103296 | Løn/tímalønt ..... | 1.489.015,83 | 722.250 | 638.400 | 689.472 |
| 103405 | Løn/úrtíðarløn .... | 695.098,13 | 424.200 | 376.000 | 406.080 |
| 103509 | Samsýningar ..... | 41.473,83 | 49.625 | 25.000 | 25.000 |
| 113202 | Ferða- og dagpening | 640.751,07 | 674.750 | 259.000 | 259.000 |
| 213105 | El, hiti og vask ..... | 186.357,03 | 216.300 | 276.000 | 276.000 |
| 213408 | Umvælingar ..... | 52.485,10 | 70.200 | 109.000 | 109.000 |
| 213702 | Ognartrygging ..... | 15.527,00 | 23.050 | 23.000 | 23.000 |
| 213806 | Leiguútreiðslur..... | 184.111,74 | 289.900 | 325.000 | 325.000 |
| 233051 | Innbúgv ..... | 178.734,32 | 294.500 | 83.000 | 83.000 |
| 233155 | Prentlutir ..... | 36.756,45 | 65.800 | 49.000 | 49.000 |
| 233259 | Postgjald ..... | 9.333,70 | 9.500 | 8.000 | 8.000 |
| 233354 | Telefon og telex .... | 30.522,50 | 80.450 | 20.000 | 20.000 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 155.400,01 | 182.500 | 144.000 | 144.000 |
| 233553 | EDV-útreiðslur .... | 0,00 | 90.000 | 50.000 | 50.000 |
| 233561 | Skrivstovuútreiðstur | 19.433,10 | 17.450 | 10.000 | 10.000 |
| 253077 | Ekskursiónir ..... | 39.064,15 | 39.050 | 35.500 | 35.500 |
| 253085 | Bókakeyp og innb. | 252.759,30 | 207.000 | 178.000 | 178.000 |
| 253093 | Søvnini..... | 394.489,78 | 409.250 | 410.300 | 410.300 |
| 253107 | Kostur (kantinan) | ÷ 45.318,22 | ÷ 72.500 | ÷ 162.000 | + 162.000 |
| 253148 | Kost og logi ..... | 2.475,00 | 0 | 0 | 0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur .... | 104.553,25 | 97.700 | 100.000 | 100.000 |
| | Ekskursiónir uttanlands | 0,00 | 0 | 0.000 | 0.000 |
| 14174 | | 8.051.495,02 | 9.317.375 | 9.152.903 | 9.708.511 |

**ad 103048 Løn/tænastumenn.**

Løn pr. 1/4-85: 291.827 kr.
Sí skjal 11.

**Tilsamans: 291.827 kr.**

**ad 103143 Løn/starvsfólk.**

| | | |
|---|---|---|
| 3/4 skrivstovukvinna | 101.062,70 kr. | |
| 1/4 skrivstovukvinna | 40.743,93 kr. | |
| 2,5 kantinudama | 305.000,00 kr. | (mctt) |
| Skúlatænarin | 152.069,16 kr. | |

**Tilsamans: 598.876 kr.**

**ad 103168 Løn/sáttmálaløn.**

Gingið verður út frá, at flokkatalið, greinvalshold og ferðing millum Klaksvík/ Gøtu verður á sama støði sum 1985. Av hesum verða væntandi 50 tímar lisnir sum yvirtímar og 100 tímar lisnir av tímalærarum.

Væntandi verða 25 sáttmálalønt í 1986 við miðal lønaraldri svarandi til 6. trin (16.733 kr.) svarandi til **5.020.000 kr.**

Sum vant kenna vit ikki útfallið av greinvali, valfakum, næmingatilgongd og starvsaldrar á nýggjum lærarum, og lutfallið millum sáttmálasettar og tímalærarar, so upphæddin má takast við ávisum fyrivarni. Sí skjal 11.

**Tilsamans: 5.020.000 kr.**

**ad 103222 Løn/reingerð.**

4 føst vaskifólk 240.000 kr. + 25.000 kr. til aðra vasking (tá Gøtu skúli verður læntur, vasking av handkløðum, klútum v. m.).

**Tilsamans: 265.000 kr.**

**ad 103288 Løn/onnur.**

Fyrifallandi arbeiðir sum m. a. næmingar gera: arkivering, reinskriving av tímatalvum, flyting av borðum við prógtøkur, kopiering fyri skrivstovuna o. a. 17.000 kr.
Kopiering í samband við ritgerðarsavn 20.000 kr.

**Tilsamans: 37.000 kr.**

**ad 103296 Tímaløn.**

Væntandi verða 100 tímar lisnir av D2'arum (532 kr.) svarandi til **638.400 kr.**

**Tilsamans: 638.400 kr.**

**ad 103405 Úrtíðarlønir.**

Væntandi verða 50 tímar lisnir sum yvirtímar, har teir 20 verða løntir við 313 kr. pr. mð., og teir verða løntir 838 kr. pr. mð.
Svarandi til 75.000 + 301.680 = **376.000**
Sí skjal 11.

**Tilsamans: 376.000 kr.**

**ad 103509 Samsýningar.**

Fjelagstímar (10 max.) mugu haldast í tveimum (einki høli rúmar øllum næmingunum) 600 × 10 × 2 = **12.000.**

2) Umsjón við skrivligum prógtøkum, sjúkraroyndum v. m. **36.000.**

3) Annað: Gardinseyming, smáørindir til handils, posthús v. m. **3.000.**

**Tilsamans: 51.000 kr.**

**ad 113202 Ferða- og dagpening, innanlands.**

1) Flutningur av næmingum.

Roknað verður við »Bygdaleiðir« kemur at yvirtaka so gott sum alla koyring, sum seinasta ár kostaði okkum umleið 500 tús. Tað sum eftir verður:

a) koyring av næm. 18 tímar til fimleik til og frá Kambsdali
**40.000 kr.**

b) koyring av næm. til skrivligar prógtøkur, ársroyndir og terminsroyndir í høllini í Runavík
**15.000 kr.**

c) koyring av næm. til Havnar í samband við bókasøvnini og ymiskar sýningar.
**26.000 kr.**

2) Flutningur av lærarum:

Talið á ferðum til Klaksvíkar fer helst at liggja á 26
tessvegna: 26 × 200 × 40 = 208.000 kr.

**Tilsamans: 289.000 kr.**

**ad 213105 El, hiti og vask.**

Afturat tí, vit søktu seinasta ár, er tann nýggi bygningurin komin afturat. Hetta verður mett til 25.000 kr. (olja) + 26.000 kr. (SEV) = 51.000 kr.
Tessvegna: 225.000 kr. + 51.000 kr.

**Tilsamans: 276.000 kr.**

**ad 213408 Umvælingar v. m.**

| | |
|---|---|
| Viðlíkahald innan av 1929-bygninginum | 80.000 kr. |
| Máling, tapet | 2.000 kr. |
| Broyting av kopi- og arkivrúmi | 15.000 kr. |
| Aðrar ábøtur | 12.000 kr. |

**Tilsamans: 109.000 kr.**

**ad 213702 Ognartrygging.**
Ognartrygging, vanlukkutrygging av lærarum, pedelli, vaskikonum og næmingum í arbeiðstíð, ábyrgdartrygging, trygging av bókasavni verður mett til 23.000 kr.

**Tilsamans: 23.000 kr.**

**ad 213806 Leiguútreiðslur.**
1) Leiga av ítróttarhøll 18 tímar um vikuna á 150,00 kr. í 40 vikur
+ ein ítróttardag á 8 tímar = $18 \times 150 \times 40 + 8 \times 150 =$ **109.200 kr.**
2) Leiga av ítróttarhølf í 10 dagar til prógtøkur og **TERMINSROYNDIR** (fyrstu ferð!) **30.000 kr.**
3) Leiga av skúlunum frá Gøtu kommunu: 120.000 kr.
Leiga av lofti hjá Halldor Konoy: 66.000 kr.
186.000 kr.

**Tilsamans: 325.200 kr.**

**ad 233051 Innbúgv.**

| | |
|---|---|
| Reolir til arkiv | 6.000 kr. |
| Skáp til kemi/bio/fys. | 25.000 kr. |
| Skáp til ítróttaramboð í Gøtu skúla | 10.000 kr. |
| Reolir til datarúmið | 5.000 kr. |
| Skáp til musik í Gøtu skúla | 12.000 kr. |
| Kortskinnarar í fysik st. | 6.000 kr. |
| Radio við bandupptakara til 2 hølir | 4.000 kr. |
| Skáp til AV-útgerð | 15.000 kr. |

**Tilsamans: 83.000 kr.**

**ad 233155 Prentlutir.**
1) Pappír til prógtøkur, kopiering og til **dataundirvísing** 42.000 kr.
2) Sverta til Rank Xerox, film til overheadprojektørar 7.000 kr.

**Tilsamans: 49.000 kr.**

**ad 233259 Postgjald.**
**Tilsamans: 10.000 kr.**

**ad 233354 Telefon og telex.**
Rakstur av verandi apparatum: 38.000 kr.

**Tilsamans: 38.000 kr.**

**ad 233409 Leiga av maskinum.**
Leiga av kopimaskinu: 120.000 kr.
Leiga av datamaskinum: 22.000 kr.
**Tilsamans: 144.000 kr.**

**ad 233553 EDV-útreiðslur.** Sí skjal 6.
**Tilsamans: 50.000 kr.**

**ad 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur.**
Supplering av MODULEX 1.000 kr., arkiveringsútgerð (samlimappur, brævordnarar v.m.) 4.000 kr., eksamensprotokollir, hondbøkur, pappirformularar 8.000 kr., smærri ting: hønur, holarar, skriviamboð v. m. 4.000 kr., lestrarvegleiðarunum tørvar eina skrivimaskinu 6.000 kr.
**Tilsamans: 23.000 kr.**

**ad 253077 Ekskursiónir.**
13 flokkar á 4.500 kr.
**Tilsamans: 58.500 kr.**

**ad Ekskursiónir, uttanlands.**
**Tilsamans: 55.000 kr.**

**ad 253085 Bókakeyp og innbindingar.**
Mett verður, at hvørjum faki nýtist 6.000 kr. í meðal. Tessvegna verður skotið upp 27 × 6.000 = **162.000 kr.**
Savn til tónleikin, 16.000 kr.
**Tilsamans: 178.000 kr.**

**ad 253093 Søvnini.**
Tørvur er á amboðum í biologi 64.600 kr. (sí skjal B), geografi 35.900 kr. (sí skjal E), fysik 190.000 kr. (sí skjal D), kemi 45.000 kr. (sí skjal D), danskt 4.000 kr. (sí skjal C), enskt 9.200 kr. (si skjal A), franskt 7.200 kr. (sí skjal C), matematik 17.700 kr. (sí skjal B), lestrarvegleiðing 5.000 kr. (sí skjal A), ítrótt 45.000 kr. (sí skjal F), AV-útgerð:
diasútgerð 7.000 kr., flygel 40.000 kr.
Samfelagsfak 26.700 kr. (sí skjal F).
**Tilsamans: 497.300 kr.**

**ad 253107 Kostur.**
Út frá teim heilt fáu døgum nýggja matstovan hevur koyrt, meta vit, at nettoinntøkan verður 810 kr./dag. Uppá ársbasis gevur tað ca. 162.000 kr.
**Tilsamans: ÷ 162.000 kr.**

| | Skipað størv 31.3.1985 | | Nýskipað størv 1.4.1985 | Leys hjálp 1.4.1985 | Tímalønt 1.4.1985 | Løn 1) 1.4.1985 | | | Nýnorm-ering 2) | Játtan 1984/85 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | sett | leys | | | | lønarfl. | | kr. | Yvirtíð | |
| Rektari (løn-tænastum.) | x | | | | | YF | 37 | 291.827 | 0 | 267.300 |
| Adjunktur (løn-sáttm.+yvirt.) | x | | | | | TF | 03 | 186.608 | 117.616 | |
| " | x | | | | | YF | 11 | 227.608 | 94.968 | |
| " | x | | | | | YF | 05 | 92.174 | 34.020 | |
| " | x | | | | | YF | 06 | 18.173 | 9.276 | |
| " | x | | | | | YF | 09 | 216.403 | 29.544 | |
| " | x | | | | | YF | 06 | 200.808 | 52.188 | |
| " | x | | | | | YF | 02 | 173.508 | 74.832 | |
| " | x | | | | | YF | 02 | 182.108 | 6.588 | |
| " | x | | | | | YF | 08 | 147.775 | 48.852 | |
| " | x | | | | | YF | 03 | 56.542 | 27.240 | |
| " | x | | | | | YF | 07 | 205.908 | 14.436 | |
| " | x | | | | | YF | 02 | 157.286 | 60.288 | |
| " | x | | | | | YF | 02 | 65.231 | 28.608 | |
| " | x | | | | | YF | 03 | 59.341 | 13.392 | |
| " | x | | | | | YF | 06 | 19.759 | 7.356 | |
| " | x | | | | | YF | 03 | 139.657 | 37.164 | |
| " | x | | | | | YF | 02 | 118.188 | 94.296 | |
| " | x | | | | | YF | 01 | 121.889 | 101.376 | |
| | | | | | | | | 2.388.971 | | 4.608.000 |
| | | | | | | | | | 852.124 | 974.000 |

| | Skipað størv 31.3.1985 | | Nýskipað størv 1.4.1985 | Leys hjálp 1.4.1985 | Tímalønt 1.4.1985 | Løn 1) 1.4.1985 | | Nýnorm-ering 2) | Játtan 1984/85 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | sett | leys | | | | lønarfl. | kr. | Yvirtíð | |
| Tímalærari (løn-tímalønt) | x | | | | | D1 | 153.127 | | |
| " | x | | | | | KV | 142.195 | | |
| " | x | | | | | D2 | 81.374 | | |
| " | x | | | | | D2 | 19.146 | | |
| " | x | | | | | KV | 229.746 | | |
| " | x | | | | | KV | 124.664 | | |
| " | x | | | | | D2 | 202.638 | | |
| " | x | | | | | D2 | 19.146 | | |
| " | x | | | | | KV | 253.755 | | |
| " | x | | | | | KV | 95.787 | | |
| " | x | | | | | D2 | 57.440 | | |
| " | x | | | | | D2 | 135.134 | | |
| " | x | | | | | D2 | 175.513 | | |
| " | x | | | | | D1 | 68.078 | | |
| | | | | | | | 1.757.802 | | 804.600 |
| ½ skrivstovuky. (løn-starvsmf.) | | | | | | St. 9/14 | 101.063 | | |
| ¼ " | x | | | | | St. 9/7 | 40.744 | | |
| 1 kantinudama | x | | | | x | | 122.000 | | |
| 1 skúlatænari | x | | | | | St. 9/14 | 152.069 | | |
| 1½ kantinudama | | | x | | x | | 183.000 | | |
| | | | | | | | 598.876 | | 411.000 |

**ad 253903 Aðrar útreiðslur.**
Við tað at ymiskt, ið ikki kann setast undir hinar kontoirnar má rindast av onkrari konto, er vert at nevna nøkur ting, sum eru nøkurlunda fastar útreiðslur: Krit 5.000 kr., lýsingar 8.000 kr., ársrit 25.000 kr., stuðul til uppingaarbeiði í næmingafelagnum 6.000 kr., flytiútreiðslur hjá nýggjum lærarum 100.000 kr., umboðan 3.000 kr., evnisvika 8.000 kr., amboð til pedellin 10.000 kr.
**Tilsamans: 165.000 kr.**

**Viðmerkingar:**
Tað sum í leiðbeiningini á skjali I er nevnt játtan 1985 (1/1 - 31/12) hava vit skilt sum (játtan 1984/85) × 0,25 + játtan 1985 (1/4 - 31/12).

**Viðvíkjandi treytunum undir pkt. 5 í leiðbeiningini.**
Tær í leiðbeiningini undir pkt. 5 nevndu »**Allar aðrar konti** undantikið.....« geva eftir uppskotinum 2.299.800 kr. Samlaða nýtslan á somu konti í 1984/85 var 2.302.059 kr.

Treytirnar skuldu sostatt verið uppfyltar.

---

**Skjal A**

Til engelskgruppen ønskes:

| | |
|---|---|
| 10 tomme videobånd ..... | 4.000 kr. |
| 2 videofilm uden undertekster .... | 4.000 kr. |
| 10 grammofonplader ..... | 1.200 kr. |
| I alt | 9.200 kr. |

på engelskgruppens vegne

---

**Skjal C**

Til franskgruppen ønskes:

| | |
|---|---|
| 10 tomme videobånd ..... | 4.000 kr. |
| 1 videofilm uden undertekster .... | 2.000 kr. |
| 10 grammofonplader ..... | 1.200 kr. |
| I alt | 7.200 kr. |

på franskgruppens vegne

**Viðvíkjandi savn-konto til fakið danskt í fíggjarárinum 1985/86:**

Hervið verður sett fram ynski um, at fakið danskt fær eina peninga-upphædd uppá kr. 4.000,- tillutaða á eina savn-konto.

Broytingar í undirvísingartilfarinum hava verið soleiðis, at AV-tilfar í dag er ein týðandi partur. Tað hava tó verið trupulleikar í hesum sambandi, við tað at nevnda tilfar ikki kann keypast inn yvir bóka-konto okkara.

---

**Skjal B**

**Budgetforslag for biologi-savn Finansåret 1986:**

| | |
|---|---|
| Spirometer, model »Student« ..... | 9.000 kr. |
| Kymograf ..... | 15.000 kr. |
| Biocord. grundenhed E. F. C: måler og Bioskriver ..... | 10.600 kr. |
| A'D Converter Type (nr. kunn ikki lesast) .... | 3.000 kr. |
| Oxygenmåler. Sylanc model 621 ..... | 6.000 kr. |
| 2 stereoluper. Scandidact ..... | 6.000 kr. |
| 2 mikroskoper. Olympus ..... | 9.000 kr. |
| Glasvarer, diverse ..... | 4.000 kr. |
| Ialt ..... | 64.600 kr. |

---

Ansøgning til samlingskonto i finansåret 1986

**MATEMATIK**

60 stk. lommeregnere TI-35 a kr. 295,- = 17.700,- kr.

---

**Skjal D**

**ÚTGERÐ TIL KEMISAVNIÐ 1986/87**

| | |
|---|---|
| Rotatiónsfordampari ..... | 12.000 kr. |
| Dunkar til upploysingarevni ..... | 1.000 kr. |
| Brúsur ..... | 1.500 kr. |
| Kemikaliur ..... | 5.000 kr. |
| Vekt ..... | 12.000 kr. |
| Glasútgerð + leidningar ..... | 1.000 kr. |
| Moltiges-detector + Drager-rør ..... | 2.500 kr. |
| T-X-skrivari ..... | 10.000 kr. |
| Ialt ..... | 45.000 kr. |

## ÚTGERÐ TIL FYSIKSAVNIÐ

### 1986/87.

| | |
|---|---|
| Elektron-diffraktiónsrør | 3.000 kr. |
| Røntgenapparatur | 15.000 kr. |
| Lykaútgerð til røntgentól | 10.000 kr. |
| Scaler Monitor | 7.000 kr. |
| Scintillatiónsteljari | 45.000 kr. |
| Meteorologi-útgerð | 5.000 kr. |
| Dampmaskina | 1.500 kr. |
| Ljósleiðari | 1.500 kr. |
| Permanentar magnetir | 1.000 kr. |
| Streymvekt | 1.500 kr. |
| Radioaktivar keldur | 1.500 kr. |
| Geigerteljari | 2.000 kr. |
| GM-rør | 8.000 kr. |
| Ionisatiónskamar | 1.500 kr. |
| Einkultkanalysator | 4.000 kr. |
| Faststofdetektor | 1.500 kr. |
| Scintillatiónsrør | 10.000 kr. |
| HT-eind | 2.000 kr. |
| Testgenerator | 1.000 kr. |
| Peal-convertari | 8.000 kr. |
| 4 teljarar | 7.000 kr. |
| Ultraljóðútgerð | 3.000 kr. |
| Elektronikútgerð | 10.000 kr. |
| Franck-Hertz útgerð | 9.000 kr. |
| Foto-útgerð | 10.000 kr. |
| Aldumaskina | 7.000 kr. |
| Gyroskopútgerð | 8.000 kr. |
| $CO_2$-fløska | 3.000 kr. |
| $N_2$-fløska | 3.000 kr. |
| Til samans | 190.000 kr. |

**16.06.85** **Skjal E.**

**Til Geografi-savnið við Studentaskúlan og HF-skeiðið i Eysturoy.**

**Hagtals-bøkur**

| | |
|---|---|
| GO-statistik (20 eintøk) | 1.800,- kr. |
| Latinamerika i kort og tal (20 eint.) | 2.400,- kr. |
| Afrika i kort og tal (20 eint.) | 2.200,- kr. |
| Indien i kort og tal (20 eint.) | 2.400,- kr. |
| Sydafrika i kort og tal (20 eint.) | 2.200,- kr. |
| Statesment yearbook (1 eintak) | 1.250,- kr. |
| Sipri-årbogen (1 eintak) | 150,- kr. |

**Kort**

| | |
|---|---|
| Topogr. 1:20.000 (Føroyar-ymisk) | 2.000,- kr. |
| Jarðfr. f. Føroyar (10 eintøk) | 1.000,- kr. |
| Luftfoto (ymsar lokalitetir) | 3.000,- kr. |
| OH-transparentir (uppbyggjan av savni) | 1.500,- kr. |
| Stór kort (ymisk) | 8.000,- kr. |

**Apparatur**

| | |
|---|---|
| Antiskop | 2.500,- kr. |
| Ljósborð | 1.500,- kr. |
| **Diasseriur** (til 4 úrvald lond) | 4.000,- kr. |
| Tilsamans | 35.900,- kr. |

***Jógvan Mørkøre***

---

**Ansøgning om bevilling til E.D.V.**

| | |
|---|---|
| Printer RC 60 | 25.000,- kr. |
| Plotter | 20.000,- kr. |
| Disketter og programmet | 5.000,- kr. |
| | 50.000,- kr. |

d. 25/6-85 ***Finn Møller***

**Uppskot á fíggjarlógini 1985/86.**

Útgerð til lestrarvegleiðing/søvn.

| | | |
|---|---|---|
| Videoband: | »Hvordan er det at gå i gymnasiet«. Studie og Erhverv. ..... | 900,- kr. |
| Videoband: | »Ansættelsessamtalen«. Studie og Erhverv. ..... | 900,- kr. |
| Diasseriur ..... | | 1.000,- kr. |
| Transparentseria/video viðv. arbeiðsmøguleikum. Studie og Erhverv ..... | | 3.000,- kr. |
| | | 5.000,- kr. |

**Skjal F**

**Samfelagsfak:**

| | | |
|---|---|---|
| EDV-skráir: | Samson ..... | 3.800,- kr. |
| | 3 stk. Databasir ..... | 3.000,- kr. |
| Kort: | 8 stk. ..... | 5.000,- kr. |
| Overheadprojector: | transparentir búskaparliga ringræsir arbeiðsmarknaður ..... | 900,- kr. |
| Hagtalsbøkur: | Year-book of statistics 20 eintøk á 150,- kr. ..... | 3.000,- kr. |
| Spøl: | »Verdenskontrol« frá Samvirke 4 stk. ..... | 1.000,- kr. |
| Løgtingstíðindi + Føroya Kunngerðasavn ..... | | 10.000,- kr. |
| | | 26.000,- kr. |

**Budgetforslag**

**for**

**Idræt**

| | |
|---|---|
| 20 volleybolde á 300,- kr. | 6.000,- kr. |
| 10 basketbolde á 250,- kr. | 2.500,- kr. |
| 10 fodbolde á 500,- kr. | 5.000,- kr. |
| 20 badmintonketchere á 200,- kr. | 4.000,- kr. |
| Badmintonbolde | 2.000,- kr. |
| 20 bluser med skolens mærke á 150,- kr. | 3.000,- kr. |
| 10 markeringskegler á 100,- kr. | 1.000,- kr. |
| Bolde af skum, plast o. lign. | 4.000,- kr. |
| Vandpolobolde 10 stk. á 150,- kr. | 1.500,- kr. |
| Hockeysæt | 5.000,- kr. |
| Bordtennisbat | 2.000,- kr. |
| Bordtennisnet | 500,- kr. |
| Bordtennisbolde | 500,- kr. |
| Stopure 5 á 300,- kr. | 1.500,- kr. |
| 20 kompasser á 175,- kr. | 3.500,- kr. |
| Skærme til orienteringsløb | 3.000,- kr. |
| Ialt | 45.000,- kr. |

## Rakstrarstað nr. 14205 Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar.

### Fíggjaruppskot fyri 1986.

| Konto | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4-31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur | ÷ 6.400,00 | ÷ 9.0 | ÷ 6.4 | ÷ 6.4 |
| 103048 | Løn/tænastumenn | 1.113.864,37 | 653.0 | 1.044.1 | 1.127.6 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 304.635,65 | 464.1 | 518.7 | 560.2 |
| 103168 | Løn/sáttmálalønt | 9.139.533,32 | 7.592.3 | 9.602.9 | 10.371.1 |
| 103222 | Løn/reingerð | 693.666,29 | 516.0 | 788.6 | 788.6 |
| 103288 | Løn/onnur | 10.450,19 | 16.5 | 10.5 | 11.3 |
| 103296 | Løn/tímalønt | 914.093,52 | 508.8 | 658.7 | 711.4 |
| 103405 | Løn/túrtíðarlønt | 2.170.380,39 | 896.3 | 907.1 | 979.7 |
| 103509 | Samsýningar | 16.209,84 | 24.8 | 16.3 | 16.3 |
| 113202 | Ferða- og dagpen. innanlands | 30.009,70 | 88.5 | 130.0 | 106.0 |
| 231105 | El, hiti og vask | 562.739,26 | 370.5 | 560.0 | 560.0 |
| 213408 | Umvælingar v. m. | 53.504,47 | 135.0 | 90.6 | 70.0 |
| 213607 | Størri umbyggingar | 55.755,13 | 240.0 | 50.0 | 50.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 52.923,00 | 40.5 | 56.0 | 56.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 68.955,00 | 194.0 | 300.6 | 80.0 |
| 233051 | Innbúgv | 118.853,69 | 364.5 | 260.0 | 90.0 |
| 233155 | Prentlutir | 63.595,39 | 60.0 | 78.6 | 63.5 |
| 233259 | Postgjald | 9.983,30 | 8.3 | 10.0 | 10.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 26.281,36 | 24.0 | 26.3 | 26.3 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 159.720,23 | 168.8 | 204.7 | 204.7 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 9.465,90 | 8.3 | 9.0 | 9.0 |
| 253077 | Ekskursiónir | 26.030,72 | 26.3 | 26.1 | 26.1 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 74.766,73 | 90.0 | 74.8 | 74.8 |
| 253093 | Søvnini | 452.763,22 | 442.5 | 452.8 | 350.0 |
| 253857 | Vøllurin | 9.742,95 | 15.0 | 9.8 | 9.8 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 115.814,54 | 115.0 | 127.4 | 115.8 |
| 14205 | | 16.264.243,16 | 13.054.0 | 16.028.1 | 16.461.8 |

**Viðmerkingar:**

**ad 103048 Løn/tænastumenn**
Bruttolønir 1/4 1985 (fastar lønir).
Rektari (1), lærarar (2), skúlatænari (1), kr. 1.028.622. Við 1,5% í fritíðarløn verður samlaða upphæddin **kr. 1.044.051.** Sí annars skjal 1.

**ad 103143 Løn/starvsfólk, 1/4 1985**

1) Skrivstovukvinna, kr. 139.422,64 + 1,5% frítíðarløn, kr. 141.514.
2) Hjálparmaður hjá skúlatænaranum,
   kr. 152.193,48 + 1,5% frítíðarløn, kr. 154.476.
3) Hjálparmaður hjá skúlatænaranum,
   kr. 152.064,00 + 1,5% frítíðarløn, kr. 154.345.
4) Søkt verður um eitt hálvt starv aftur at starvinum hjá skrivstovukvinnuni, tí her er nú ov nógv arbeiði til 1 fólk. Roknað verður við 67.356 + 1,5% í frítíðarløn = kr. 68.366 (smb. starvsmannafelagssáttmálanum 9. flokki, 5. stig).
   1) 2) 3) 4) tilsamans **kr. 518.701.**

**ad 103168 Løn/sáttmálalønt**

Bruttolønir 1/4 1985 (fastar lønir).
Lektorar (7), adjunktar (39), kr. 9.460.961. Uppí er roknað 1 aldursviðbót hjá hvørjum.
Við 1,5% í frítíðarløn verður samlaða upphæddin **kr. 9.602.875.**
Sí annars skjal 1.

**ad 103222 Løn/reingerð**

Henda útreiðsla var í 1984/85 kr. 693.666,29. Men gjørt verður vart við, at tímaløntin er uppfarin síðan. Smb. bókhaldslistanum fyri mai 1985 er samlaða lønin hjá reingerðarkvinnunum (11 í tali) kr. 63.076,63 um mánaðin. Yvir 12 mánaðir verður hetta kr. 756.920 + kr. 20.000 (ásett av landsstýrinum: kr. 2.000 árliga til 10 reingerðarkvinnur fyri høvuðsreingerð) = kr. 776.920 + 1,5% í frítíðarløn = **kr. 788.574.** — Um talið fyri 1984/85 skal nýtast, kemur hetta ***ikki*** at halda, og ein skúli við u. 500 næminguin krevur reingerð til tann prís, tað kostar.

**ad 103288 Løn/onnur**

Fyrifallandi arbeiði, m. a. næmingar, ið hjálpa til við skrásetingararbeiði á bókasavninum, flyting av borðum og stólum til royndir og prógvtøkur v. m.

**ad 103296 Løn/timaløntt**

Løuir 1/4 1985.
Tímalærarar (7), kr. 648.866 + 1,5% í frítíðarløn, **kr. 658.700.**
Sí annars skjal 1a.

**ad 103405 Løn/úrtíðarløuir.**

Sí síðu 6.

**ad 103509 Samsýningar**
Til felagstímar og umsjón við skrivligum prógtøkum. Tað, ið brúkt er í 1984/85, kr. 16.209,84, verður helst ov lítið fyri 1986. Men so má virksemið, serliga viðv. felagstímum, avmarkast — til skaða fyri tað mentunarliga árinið uttanífrá, sum felagstímarnir eru ætlaðir til.

**ad 113202 Ferða- og dagpeningur innanlands**
1) Ferðaútreiðslur hjá lærarum úr Suðuroy til Hoydalar og úr Gøtu til Hoydalar. Fyri 1984/85 var av misgáum ikki tikið hædd fyri, at ein lærari (Kári N. Olsen, psykologur) umframt til Suðuroyar eisini skuldi ferðast úr Gøtu til Hoydalar 1 ferð um vikuna. Hetta hevur havt við sær, at útreiðslan hevur verið kr. 30.000 í 1984/85 í staðin fyri, sum skotið upp og játtað, kr. 16.700. Tí verður umráðandi neyðugt at søkja um upphæddina kr. 30.000 fyri 1986, tí ferðapeningur ***má*** vera tøkur til teir nevndu lærararnar.
2) Busskoyring við næmingum til svimjihøll í Gundadali og fimleikahøll á Hálsi var ikki til í uppskotinum og játtanini fyri 1984/85. Eftir áheitan frá landsskúlafyrisitingini vórðu kr. 50.000 tiknar burtur av ymsum kontoum til hetta endamál í seinra helminginum av 1984/85, og fyri 1985/86 varð søkt um kr. 100.000 til sama endamál (minkað við 25% til kr. 75.000 fyri apr.-dec. 1985). Fyri 1986 verður neyðugt við kr. 100.000 til busskoyringina. Sostatt 1) og 2) tilsamans **kr. 130.000.** (Vist verður á, at samlaða nýtsla skúlans í 1984/85 hevði verið munandi minni enn játtað).

**ad 213105 El, hiti og vask**
El- og serliga oljuprísir eru sum kunnugt sera ótryggir, og hevur nú í fleiri ár verið tikið alt hugsandi fyrivarni í uppskotunum hesi útreiðslu viðvíkjandi. Í 1984/85 hevur útreiðslan verið kr. 562.739,26, sum er væl meiri enn játtað. Men el (S.E.V.-prísirnir eru júst farnir upp), olja og vaskievni eru átrokandi neyðug, og ikki ber til at spara meir enn eftir førinuni verður gjørt. Um søkt verður um tað sama sum fyri 1985/86, kr. 494.000 (nú minkað við 25% fyri apr.-dec. 1985), verður hetta helst alt ov lítið. Tí verður søkt um **kr. 560.000** fyri 1986 — eisini við øllum hugsandi fyrivarni.

**ad 213408 Umvælingar v. m.**
Til viðlíkahald av skúlanum innan og uttan, viðlíkahald av viðarlundini v. m. verða kr. 53.500 alt ov lítið. Tí verður spurt, um ikki í minsta lagi ein upphædd, stór kr. 37.100, sum vit í 1984/85 umsíðir fingu í endurgjaldi frá brunatryggingini fyri ein brunaskaða í 1981, og sum er við í roknskapinum sum inntøka, kann góðskrivast okkum, soleiðis at vit fáa kr. **90.600** at arbeiða við í 1986.

**ad 213607 Størri umbyggingar**

1) Til umbygging og samanlegging av tveimum skúlastovum í »gamla húsi« til datafrálæruna og til at hava tey nýggju teldutólini í (sí viðm. til k. 233051, innbúgv), kr. 20.000.
2) Til ymsar broytingar í fysikk- og biologihølunum, kr. 30.000.
   1) og 2) tilsamans **kr. 50.000.**

**ad 213702 Ognartrygging**

1) Brunatrygging v. m. av skúlabygningi, undirvísingarambøðum og bókasavni.
2) Vanlukkutrygging av lærarum, skúlatænarum, reingerðarfólki og næmingum í arbeiðstíðini + ábyrgdartrygging. Um talið viðv. tryggingum, kr. 49.115,94 skal nýtast, verður gjørt vart við, at tað kemur ***ikki*** at halda. Vit hava ikki tamarhald á krøvunum frá tryggingini, og tey skulu gjaldast, hvussu víkur og vendir. Vit søktu um kr. 54.000 fyri 1985/86 (nú minkað við 25% fyri apr.-dec. 1985 og longu yvirtrekt). Søkt verður um **kr. 56.000** fyri 1986 í vón um, at hetta fer at halda hóast nógva óvissu.

**ad 213806 Leiguútreiðslur**

1) Ítróttarhøllin á Hálsi, 15 t. um vikuna á kr. 200 = 3.000. Í 40 vikur verður hetta kr. 120.000 + 1 ítróttardag í 8 tímar, kr. 1.600. Tilsamans kr. 129.600.
2) Skúlin hevur eisini fyri neyðini at hava tímar í svimjihøllini í Gundadali. Fimleikalærararnir hava mett talið av tímum til 855 t. um árið, og um prísurin fyri hetta eisini verður kr. 200 um tíman, verður henda útreiðsla kr. 171.000.
   1) og 2) tilsamans **kr. 300.600.**
   (Í 1984/85 hevur kommunan eingi kravt, men eg vænti ikki, at so verður framyvir, um landsstýrið ella landsskúlafyrisitingin ikki fáa teir at veita okkum innivist ókeypis).

**ad 233051 Innbúgv**

Til hetta endamál varð fyri 1985/86 søkt um kr. 486.000 (sum við ÷25% verður til kr. 364.500 fyri apr.-dec. 1985). Umframt til útskifting av skúlaborðum og -stólum, talvum og innbúgvi annars, serliga til biologi-, kemi-og fysikkhølir, tí ein stórur partur er gamalt og tørvar endurnýggjan, er okkum fyri 1985 játtað kr. 225.000 til teldur til frálæruna í ***datalæru***, sum okkum er ***álagt*** av landsskúlafyrisitingini at veita ***øllum*** næmingum. Roknað varð í uppskotinum fyri 1985/86 út frá, at 2 næmingar skula vera um 1 teldutól í senn, t. v. s. at tá ið flokkarnir eru 24 næmingar hvør, verður tað neyðuga talið av teldum 12 (24 : 2).

Hvør telda kostar nú við »prentara« u. kr. 30.000. Tann játtaða upphæddin er ikki nóg mikið til tørvin: 12 teldur (við prentara) á kr. 30.000 = kr. 360.000; vit kunnu í hesum fíggjarári (1985) bert fáa 7,5 teldur v. m. fyri tann játtaða peningin (kr. 225.000), meðan tørvurin er 12 teldutól. Sostatt vanta í 6 × 30.000 = kr. 180.000 til tess at fáa tað neyðuga talið av teldum v. m. ***Men*** henda útreiðsla var ikki til í 1984/85, hon er ***áløgd*** okkum síðan. Tí er neyðugt at fáa játtað fyri 1986 kr. 180.000 til endamálið — umframt til innbúgv annars kr. 80.000.
Tilsamans **kr. 260.000.**

**ad 233155 Prentlutir**
1) Pappír til ljósprent (Rank-Xerox).
2) Tilfar til fotokopitól.
3) Pappír, disklar v. m. til datatól.
(Nýggj útreiðsla til disklar v. m. nevnd undir viðm. til 233051, innbúgv, í samband við datatól: kr. 15.000 afturat roknskapartalinum kr. 63.595).

**ad 233409 Leiga av maskinum**
1) Til ljósprent (Rank Xerox). Rakstrarroknskapurin hevur talið kr. 159.720. Men smb. skrivi frá Rank Xerox dagf. 26/4 1985 fer leigan t. 1/8 1985 upp við 3,8% fyri hvørja av teimum báðum maskinunum, vit hava (= 7,6%), sostatt kr. 171.858.
2) Leiga av teldum til hf-frálæruna í datalæru, kr. 32.872 (sáttmálabundið gjald).
1) og 2) tilsamans **kr. 204.703.**

**ad 253077 Ekskursiónir**
Lærugreinir sum biologi, geografi, fiskivinna, føroyskt o. a. hava lestrarútferðir til aðrar oyggjar og bygdir fyri neyðini. Flokkarnir eru nógvir (25), og ferðaútreiðslur eru ikki til at koma uttanum.

**ad 253085 Bókakeyp og innbinding**
Henda útreiðsla er (umframt til innbinding) serliga ætlað til 1) øking og nútímansføring av serstøkum bókum og bókaverkum, 2) bøkur til útláns til næmingar, sum úrdrøg í teimum ymsu fakunum verða lisin úr og sum vegna prís, vit ikki kunnu krevja, tey (t. e. í roynd og veru foreldrini) noyðast at keypa sjálvi, tí vit her onga skipan hava á tann bógv, at tað almenna eins og í t. d. Danmark útvegar skúlunum lærubøkur til útláns til næmingarnar. — Tíðarrit og bløð koma eisini upp í útreiðsluna umframt sett av orðahókum í teimum ymsu málunum, vit hava á tímaskránni, og sum skulu vera til taks til royndir og prógtøkur.

**ad 253093 Søvnini**

Henda útreiðsla fevnir um fleiri søvn sum: fysikk, kemi, biologi, fiskivinna, geografi, tónleik, ítrótt, søgu, samfelagsfrøði, religión, tílevning, A/V-tól.

Søvnini eru dýr at viðlíkahalda og endurnýggja, við alsamt hækkandi prísum, og nógvir eru næmingarnir um tey.

Aftan á vitjan í 1984 av fakkonsulenti í biologi fingu vit at vita, at biologisavnið var millum tey trið-vánaligastu í ríkinum, og fakkonsulentur í fysikk, sum var her í mars í ár (1985), hevur víst á, at eisini fysikksavninum tørvar endurnýggjan og ábót.

**ad 253857 Vøllurin**

Hetta er til við tíðini at gera vøllin hóskiligan til ítróttarendamál.

**ad 253903 Aðrar útreiðslur**

Á hesa konto verður sett tað nógva ymiska, sum ikki kann skipast undir aðrar kontoir. Nógv av tí er óvæntað, ið stingur seg upp árið ígjøgnum, og ilt er tí at meta eitt toluliga haldgott tal.

Útreiðslan fevnir m.a. um: krit, pappír til royndir og prógvtøkur, karakterprotokollur og -bøkur, ársritið, stuðul til næmingararbeiði í næmingafelagnum, flytiútreiðslur v.m. hjá nýggjum lærarum, evnisviku; og síðan 1982/83 hevur verið søkt um og játtað kr. 20.000 um árið í 5 ár at seta á bankabók við tí endamáli at geva út eitt minnisrit í 1987, tá ið skúlin verður 50 ár.

Umframt játtanina fyri 1984/85, kr. 107.400, loyva vit okkum at søkja um kr. 20.000 til samskifti við skúlar í øðrum norðurlondum, t.e. at senda skúlaflokk ella -flokkar at vitja skúlar í øðrum norðurlondum og so fáa skúlaflokk/-flokkar afturímóti henda vegin. (At roknskapartalið fyri 1984/85 er hægri enn játtanin hevur sína orsøk í, at ein upphædd stór kr. 40.000 eftir álicitan frá landsskúlafyrisitingini varð tikin av ymsum øðrum kontoum og løgd oman á hesa (og kr. 10.000 varð tikið av hesi eisini) til busskoyring úr Hoydølum til ítróttarhøllina á Hálsi. Sí viðm. til konto 113202, ferða- og dagpeningur innanlands, pkt. 2).

**ad 103450 Løn/úrtíðarlønir**

1) Tænastumenn, kr. 67.259.
2) Sáttmálalønt, kr. 746.470.
3) Leysir vikarar og burðarfarloyvisvikartímar v.m., kr. 80.000.

1) 2) 3) tilsamans kr. 893.729 + 1,5% í frítíðarløn, kr. 907.135.

Sí annars skjal 1 og 1a.

## HOYDALAR

**Skjal 1**

| Tænastumenn | Føst løn | Yvirtíðarløn | Landskassans partur av eftirlønargjaldi 10% |
|---|---|---|---|
| Rektari ..... | kr. 287.515 | kr. 0.0 | |
| Lektor ..... | 214.916 | 19.477 | |
| Lærari ..... | 182.223 | 35.854 | |
| Lærari ..... | 192.245 | 11.928 | |
| Skúlatænari ..... | 151.723 | 0.0 | |
| Tilsamans ..... | kr. 1.028.622 | kr. 67.259 | |

**Sáttmálalønt**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Lektor ..... | kr. 251.708 | kr. 0.0 | kr. 22.802 |
| Lektor ..... | 251.708 | 14.445 | 22.802 |
| Lektor ..... | 251.708 | 0.0 | 22.802 |
| Lektor ..... | 251.708 | 19.477 | 22.802 |
| Lektor ..... | 251.708 | 1.882 | 22.802 |
| Lektor ..... | 251.708 | 11.556 | 22.802 |
| Lektor ..... | 251.708 | 24.510 | 22.802 |
| Adjunktur ..... | 205.908 | 1.224 | 18.222 |
| Adjunktur ..... | 200.808 | 29.543 | 17.712 |
| Adjunktur ..... | 239.508 | 34.576 | 21.582 |
| Adjunktur ..... | 221.908 | 24.510 | 19.822 |
| Adjunktur ..... | 205.908 | 7.530 | 18.222 |
| Adjunktur ..... | 131.258 | 5.045 | 11.539 |
| Adjunktur ..... | 195.908 | 9.412 | 17.222 |
| Adjunktur ..... | 205.908 | 64.772 | 18.222 |
| Adjunktur ..... | 200.808 | 34.576 | 17.712 |
| Adjunktur ..... | 233.508 | 37.092 | 20.982 |
| Adjunktur ..... | 200.808 | 5.647 | 17.712 |
| Adjunktur ..... | 233.508 | 0.0 | 20.982 |
| Adjunktur ..... | 205.908 | 34.576 | 18.222 |
| Adjunktur ..... | 200.808 | 5.647 | 17.712 |
| Adjunktur ..... | 200.808 | 14.445 | 17.712 |
| Adjunktur ..... | 47.359 | 10.267 | 4.736 |
| Adjunktur ..... | 221.908 | 21.994 | 19.822 |
| Adjunktur ..... | 211.108 | 9.412 | 18.742 |
| Adjunktur ..... | 205.908 | 6.588 | 18.222 |
| Adjunktur ..... | 186.608 | 4.706 | 16.300 |
| Adjunktur ..... | 200.808 | 20.834 | 17.712 |
| Adjunktur ..... | 182.108 | 24.510 | 15.842 |

## HOYDALAR

(Framhald av skjali 1)

| Tænastumenn | Fast løn | Yvirtíðarløn | Landskassans partur av eftirlønargjaldi 10% |
|---|---|---|---|
| Adjunktur ..... | 84.443 | 11.817 | 7.497 |
| Adjunktur ..... | 216.408 | 19.477 | 19.272 |
| Adjunktur ..... | 211.108 | 9.412 | 18.742 |
| Adjunktur ..... | 211.108 | 12.278 | 18.742 |
| Adjunktur ..... | 211.108 | 64.772 | 18.742 |
| Adjunktur ..... | 200.808 | 24.510 | 17.712 |
| Adjunktur ..... | 233.508 | 5.647 | 20.982 |
| Adjunktur ..... | 233.508 | 38.212 | 20.982 |
| Adjunktur ..... | 186.608 | 9.412 | 16.292 |
| Adjunktur ..... | 186.608 | 9.412 | 16.292 |
| Adjunktur ..... | 233.508 | 9.412 | 20.982 |
| Adjunktur ..... | 245.708 | 24.510 | 22.202 |
| Adjunktur ..... | 109.265 | 14.706 | 9.505 |
| Adjunktur ..... | 182.108 | 1.882 | 15.842 |
| Adjunktur ..... | 186.608 | 0.0 | 16.292 |
| Adjunktur ..... | 216.408 | 5.647 | 19.272 |
| Adjunktur ..... | 211.108 | 6.588 | 18.742 |
| Tilsamans ..... | kr. 9.460.961 | kr. 746.470 | |

| | |
|---|---|
| Timaløn ..... | kr. 76.588 |
| | 129.561 |
| | 159.558 |
| | 79.779 |
| | 43.922 |
| | 95.735 |
| | 63.823 |
| Tilsamans ..... | kr. 648.866 |

# Uppskot til figgjarætlan fyri raksturin av kostdeild Føroya Studentaskúla og HF-skeið figgjarárið 1986.

**Rakstrarstað nr. 14257.**

| Konto | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4-31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguiontøkur | ÷ 70.954,08 | ÷ 56.0 | ÷ 70.0 | ÷ 70.0 |
| 83929 | Næmingagjald (skúlar) | ÷423.000,00 | ÷376.0 | ÷466.0 | ÷466.0 |
| 103243 | Løn — starvsfólk | 171.106,39 | 136.5 | 175.0 | 189.0 |
| 103222 | Løn — reingerð | 226.575,74 | 172.5 | 230.0 | 230.0 |
| 103288 | Løn — onnur | 1.398.097,30 | 1.170.0 | 1.500.0 | 1.620.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 357.877,22 | 281.0 | 394.0 | 394.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 24.958,00 | 18.5 | 25.0 | 25.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 194.520,00 | 165.0 | 140.0 | 140.0 |
| 233051 | Innbúgv | 45.980,24 | 41.0 | 55.0 | 55.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 14.368,05 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 253107 | Kostur | ÷162.358,22 | ÷150.0 | ÷150.0 | ÷150.0 |
| 253306 | Amboð | 50.550,49 | 45.0 | 55.0 | 55.0 |
| 253314 | Aðrar umsitingarútreiðslur | 224.046,00 | 187.5 | 250.0 | 225.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 56.446,28 | 56.0 | 70.0 | 55.0 |
| 14257 | | 2.108.213,41 | 1.706.0 | 2.223.0 (játtan 84/85 2.268.0) | 2.317.0 |

**Viðmerkingar:**

**ad 83929 Næmingagjald (skúlar)**

Roknað er við, at 52 næmingar gjalda kr. 7.000 um árið (í Hoydølum og við Hoydalsvegin), og 12 næmingum, sum gjalda kr. 8.500 um árið (við Varðagøtu). Upphæddin er minni enn mett varð í uppskotinum fyri 1985/86, og kemur hetta av, at vit nú ikki leiga øll húsini longur. Hetta kemur so eisini at siggjast aftur í leiguútreiðslunum (kt. 213806).

**ad 103288 Løn/onnur**

Vegna umlegging og arbeiðstíð og ajourføring av lønum í samband við hetta, kann vera eitt sindur torført at seta nágreiniligt tal á hesa konto. Vit rokna ikki við at seta fólk aftrat, sum arbeiðsumstøðurnar eru í løtuni.

**ad 233051 Innbúgv**
Tað eru nú meir enn tjúgu ár liðin, síðan kostdeildin varð sett á stovn, so innbúgvið fer at vera slitið, og má á hvørjum ári okkurt gerast í stand ella nýtt verða keypt.

**ad 253107 Kostur**
Roknskapurin 83/84 vísti kr. 215.846,34 til avlops, meu 84/85 var avlopið kr. 162.358,22, so her er ilt at meta um, men kr. 150.000 mátti ikki farið at verið langt av leið.

**ad 253306 Amboð**
Neyðugt er at væla og endurnýggjað amboð í køki og kantinu og at keypa nýggjan borðbúnað, tí hann svinnur á hvørjum ári.

**ad 253314 Aðrar umsitingarútreiðslur**
Húsini eru: Gamla hús, Nýggja hús, Læknahúsini, Hoydalsvegur I — og partvís húsini við Varðagøtu 30 (innanhýsis), sum vit hava til leigu.

Hetta eru gomul hús, sum hava umvælingar og ábøtur fyri neyðini á hvørjum ári.

**ad 253903 Aðrar útreiðslur**
Á hesa konto verða bókaðar óvæntaðar útreiðslur, og útreiðslur, sum standast av at fríðka um umhvørvið í Hoydølum.

Her hevur mangt ligið í órøkt í mong ár, men nú hava vit vónir um —um peningur verður játtaður í nøkur ár — at tað verður eins vakurt og væl røkt og tað sigst at hava verið í sínari tíð.

---

## VIÐMERKINGAR TIL FÍGGJARLÓGARUPPSKOT 1986 FYRI FØROYA SJÓMANSSKÚLA

**14307**

Vísandi til fyriliggjandi fíggjarlógaruppskot, har í viðmerkingum skúlastjórans verður sagt frá, at neyðugt er at skifta øll vindeygu út, mælir Landsskúlafyrisitingin til at loysa hetta mál soleiðis, at tann partur av vindeygunum, sum ikki kemur undir komandi tilbygging av Føroya Sjómansskúla eisini kemur við í tilbyggingina.

Landsskúlafyrisitingin hevur kannað eftir, hvat hetta fer at kosta eyka og hevur fingið upplýst, at her verður kostnaðurin 410.000 kr. aftrat.

Vísandi til skriv frá Føroya Landsstýri, dagfest 15. september 1983 og 13. februar 1985, um tilbygging av Føroya Sjómansskúla, skal hervið verða sagt frá, at Landsbyggifelagið er við at gera detail-projektering hesum viðvíkjandi, og hevur Landsskúlafyrisitingin fingið upplýst, at kostnaðurin fyri tilbyggingina verður mettur til 12.000.000 kr. við at byggja 775m² gólvvídd aftrat, soleiðis sum áður samtykt.

Fyribils kostnaðarætlan verður sostatt:

| | | |
|---|---|---|
| Tilbygging 775m² ..... | = | 12.000.000 kr. |
| Útskiftan av vindeygum ..... | = | 410.000 kr. |
| Tilsamans | = | 12.410.000 kr. |
| Sjómansskúli í grunn (313319) 83/84 ..... | = | 500.000 kr. |
| Sjómansskúli í grunn 84/85 ..... | = | 500.000 kr. |
| Sjómansskúli í grunn 1/4 - 31/12 1985 ..... | = | 375.000 kr. |
| At fáa til vega ..... | = | 11.035.000 kr. |

Í samband við viðgerð av fíggjarviðurskiftum skúlans verður biðið um viðmæli, at hesin peningur verður tøkur 1. januar 1986, soleiðis at arbeiðið kann byrja sum skjótast.

## Fíggjarlógaruppskot 1986 fyri Føroya Sjómansskúla, 14307

| Konto | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn | 1.306.447,97 | 1.381.600 | 2.896.000 | 3.127.000 |
| 103127 | » /lærarar | 1.042.065,60 | 907.450 | - | - |
| 103143 | » /starvsfólk | 221.328,83 | 219.900 | 227.600 | 245.800 |
| 103222 | » /reingerð | 316.354,90 | 331.500 | 331.765 | 331.765 |
| 103288 | » /onnur | 379.583,47 | 378.700 | 383.630 | 414.300 |
| 103405 | » /úrtíðarlønir | 642.821,96 | 625.850 | 333.360 | 360.100 |
| 113202 | Ferða- og dagp. innanl. | 1.422,50 | 11.500 | 2.000 | 2.000 |
| 213105 | El, hiti og vask | 144.968,24 | 182.450 | 175.000 | 175.000 |
| 213503 | Umsiting | 90.518,52 | 122.450 | 122.450 | 190.000 |
| 213702 | Ognartrygging | 19.939,00 | 24.950 | 24.000 | 24.000 |
| 233051 | Innbúgv | - | 34.950 | 30.000 | 30.000 |
| 233354 | Telefon og telex | 18.142,75 | 33.200 | 30.000 | 30.000 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 65.783,66 | 66.750 | 20.000 | 20.000 |
| 253306 | Amboð | 282.704,90 | 372.500 | 350.000 | 192.000 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 19.624,81 | 50.000 | 10.000 | 10.000 |
| 253977 | Eldsløkking | 210.162,17 | 136.250 | 210.000 | 210.000 |
| | | 4.761.869,38 | 4.880.000 | 5.155.805 | 5.262.665 |

**Viðmerkingar:**

**ad 103048**

| | kr. |
|---|---|
| Stjóri | 262.240 |
| Varastjóri | 214.920 |
| 1 sjómansskúlalærari | 206.940 |
| 1 sjómansskúlalærari | 206.950 |
| 1 » | 195.768 |
| 1 » | 206.940 |
| 1 » | 188.808 |
| 1 » | 195.775 |
| 1 » | 182.220 |
| 1 » | 175.980 |
| 1 » | 175.980 |
| 1 » | 175.980 |
| 1 » normerað, men ikki sett | 170.070 |
| 1½% feriuløn | 38.429 |
| | 2.597.000 |

**ad 103127** fellur burtur

**ad 103143**

| | |
|---|---|
| Skúlatænari | 152.055 |
| ½ starvsfólk | 72.180 |
| 1½% feriuløn | 3.365 |
| | 227.600 |

**ad 103222**

| | |
|---|---|
| 5 reingeringskvinnur á kr. 53.290 í ársløn | 266.450 |
| 9½% feriuløn | 25.315 |
| Høvuðsreingering | 40.000 |
| | 331.765 |

**ad 103288**

| | |
|---|---|
| 1 tímalærari, sjórætt | 136.720 |
| 1 » , heilsulæra | 83.920 |
| 9½% feriuløn | 12.990 |
| vikarløn, vegna sjúku, eyka útbúgving hjá lærarum, cykaskeið | 150.000 |
| | 383.630 |

**ad 103405**

| | |
|---|---|
| Úrtíðarlønir (+ 1 lærara, + 1 klassa) | 624.000 |
| 1½% feriuløn | 9.360 |
| | 633.360 |

**ad 213503** sí viðmerking til ad øllum

**ad 253306**

| | |
|---|---|
| til viðlíkahald, endurnýggjan og umvæling av tólum | 350.000 |

**ad 253977**

| | |
|---|---|
| útreiðslur til eldsløkkingarskeið, læknakanningar og annað hesum viðvíkjandi | 210.000 |

**ad øllum**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingaruppskoti seinni, um umstøðurnar broytast munandi.

Um umstøðurnar kann sigast, at tey flestu vindeyguni leka, tá ið ættin stendur á, og gjóstur er nógvur. Neyðugt verður tí at fáa nýggj vindeygu. Spurningurin er so: skulu vit søkja um hendan pening á konto 213503 *ella* skulu vit taka hesa útskifting saman við tilbygninginum? Um tað fyrra er galdandi, skal peningahæddin, sum vit hava søkt um á konto 213503, hækkast munandi.

# VIÐMERKINGAR TIL FÍGGJARLÓGARUPPSKOT 1986 FYRI KLAKSVÍKAR SJÓMANSSKÚLA

**14409**

Sum kunnugt, er Kokkaskúlin í Klaksvík undir Klaksvíkar Sjómansskúla, men heldur til í leigaðum høli hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag.

Leigutreiðslur av hesum eru 120.000 kr. árliga, meðan nóg mikið av plássi er á sjómansskúlanum.

Fyri at loysa hetta mál, vil Landsskúlafyrisitingin koma við hesum uppskoti, soleiðis, at ein køkur verður gjørdur í kjallaranum á sjómansskúlanum, sum annars er væl egnaður við tað, at hesin er partvís innrættaður og klæddur við flísum.

Hetta kann gerast soleiðis, at avsettar verða 500.000,- á konto 213607, meðan 213806 verður strikað.

Uppskotið samsvarar fyribils-metan, gjørd av Tróndi Fuglø, arkitekti.

| | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1.000 kr. | Uppskot 1986 1.000 kr. | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 83809 | Leiguinntøkur | 0,00 | ÷ 4.0 | ÷ 4.0 | ÷ 4.0 |
| 103048 | Løn — tænastumenn | 206.015,60 | 230.0 | 230.0 | 248.0 |
| 103127 | Løn — lærarar | 435.362,08 | 480.0 | 450.0 | 486.0 |
| 103143 | Løn — starvsfólk | 0,00 | 5.0 | 0.0 | 0.0 |
| 103151 | Løn — avloysarar | 1.600,00 | 20.0 | 10.0 | 10.0 |
| 103222 | Løn — reingerð | 42.139,09 | 50.0 | 50.0 | 50.0 |
| 103288 | Løn — onnur | 6.306,08 | 20.0 | 0.0 | 0.0 |
| 103405 | Løn — úrtíðarløn | 51.257,16 | 60.0 | 30.0 | 30.0 |
| 103509 | Samsýningar | 14.491,44 | 8.0 | 0.0 | 0.0 |
| 113052 | Útiviðbót | 0,00 | 8.0 | 6.0 | 6.0 |
| 113202 | Ferða- og dagpen., innanlands | 0,00 | 12.0 | 10.0 | 10.0 |
| 203204 | Prenting | 0,00 | 2.0 | 10.0 | 10.0 |
| 203308 | Lýsingar | 3.226,15 | 6.0 | 5.0 | 5.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 49.048,07 | 60.0 | 60.0 | 60.0 |
| 213408 | Umvælingar v. m. | 8.810,33 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 213503 | Umsiting | 4.946,65 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 213607 | Størri umbyggingar | 0,00 | 0.0 | 500.0 | 500.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 6.400,00 | 33.0 | 20.0 | 20.0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 70.000,00 | 100.0 | 0.0 | 0.0 |
| 233051 | Innbúgv | 9.375,00 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 233259 | Postgjald | 331,00 | 8.0 | 8.0 | 8.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 12.288,00 | 8.0 | 15.0 | 15.0 |

| (Framhald) | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1.000 kr. | Uppskot 1986 1.000 kr. | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 233409 | Leiga av maskinum ..... | 0.00 | 0.0 | 0.0 | 0.0 |
| 233504 | Sakkøn hjálp ..... | 0,00 | 2.0 | 2.0 | 2.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur ... | 14.485,25 | 10.0 | 15.0 | 15.0 |
| 253077 | Ekskursiónir ..... | 0,00 | 10.0 | 0.0 | 0.0 |
| 253085 | Bókakeyp og -innbinding .... | 19.215,19 | 20.0 | 20.0 | 20.0 |
| 253107 | Kostur ..... | 121.840,19 | 110.0 | 130.0 | 130.0 |
| 253306 | Amboð..... | 73.827,35 | 40.0 | 90.0 | 90.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 19.318,45 | 40.0 | 20.0 | 20.0 |
| 253977 | Eldsløkking ..... | 33.363,00 | 25.0 | 65.0 | 65.0 |
| | | 1.203.646,08 | 1.423.0 | 1.802.0 | 1.856.0 |

**Sbrt. skriv dagf. 1. juli 1985:**

Viðmerkingar til fíggjarløgtingslóg 1986.

213607. Størri umbyggingar. Fáa innrætta høli∂ til Kokkaskúla.
Tekningar og fyrrverandi ætlanir liggja í landsstýrinum og landsskúlafyrisitingini.

253306. Amboð.
Neyðugt við fjarskrivara fyri at kunna koyra Radiotelefoni.

| | Skipað størv 31.3 - 1985 | | Nýskipað størv 1.4. - 1985 | Leys hjálp 1.4. - 1985 | Tímalønt 1.4. - 1985 | Løn [1] 1.4 - 85 | | Nýnorm-ering [2] | Játtan 1984/85 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | sett | leys | | | | lønarfl. | kr. | | |
| Tænastumaður | | | | | | | | | 230 |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| Tænastumannaliknandi | 1 | | 0 | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| Sáttmálalønt | | | | | 1 | | | | 643 |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| Starvsfólk | | | | 2 | 6 | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| Næmingar | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |

ad[1]) Møguligt eftirlønargjald skal íroknast lønina.
ad[2]) um nýnormering skal grundgevast.

**Sbrt. skriv dagf. 12. juni 1985 frá landsstýrinum:**

Landsskúlafyrisitingin hevur í skrivi dagfest 8. mai 1985 søkt landsstýrið um kr. 500.000,- til motorpassaraskeið á Føroya Maskinskúla at byrja 1. august 1985. Landsskúlaráðið hevur samtykt ætlanina á fundi 1. mai 1985.

Landsstýrið hevur viðgjørt málið á fundi 7. juni 1985 og hevur samtykt at viðgera málið í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum 1986.

Henda samtykt ber í sær, at skeiðið ikki kann byrja 1. august 1985, og verður kunngerðin tí heldur ikki sett í gildi nú.

Landsskúlafyrisitingin eigur at taka uppskotið við á fíggjarlógaruppskotið fyri 1986, sum skal vera landsstýrinum í hendi 1. juli 1985.

**Sbrt. skriv dagf. 30. juni 1985 frá Føroya Fólkaháskúla:**

Hjálagt verður sent uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1986 fyri Føroya Fólkaháskúla.

Uppskotið er at kalla tað sama sum tann metingin, ið latin varð inn saman við seinasta fíggjarlógaruppskotið, t.v.s. 1985 tølini við 10% hækking. Men í skrivi til landsskúlafyrisitingina í apríl 85 hava vit søkt um at sleppa at seta eitt arbeiðsfólk í køkinum og ein skúlatænara, tí ein umskipan av undirvísingini gjørdi, at lærararnir ikki longur kundu taka sær av hesi uppgávuni, men sjálvt við hesi eykajáttan er hækkingin bert 14% í mun til seinasta fíggjarár.

**Skjal 1** vísir teir fýra bólkarnar (konti), sum rakstur okkara er býttur sundur á.

**Skjal 2** vísir lønir okkara í løtuni, hækkaðar við væntandi tænastualdarviðbótum. Her sæst eisini nýnormeringin av køksfólki og skúlatænara. Viðmerkjast skal, at »leys hjálp« er lækkað munandi.

**Skjal 3** er gjøllari greining av skjali 1 — og vísir eisini tær útreiðslurnar, sum eru umframt lønirnar.

**Skjal 4** er ljóstak av umsóknini til landsskúlafyrisitingina um eykajáttan í samband við umskipan av undirvísingini.

| | Tøl, sambært hjálagda roknskap. | Studningur, sambært løgtingslóg um fólkaháskúlar. | | Játtan | Munur |
|---|---|---|---|---|---|
| Skútaleiðarin | 199.670 | 100% av 199.670 kr. = | 199.670 kr. | 185.000 kr. | 14.670 kr |
| Aðrar lønir | 768.475 | 70% av 768.475 kr. = | 537.932 kr. | 555.100 kr. | ÷17.168 kr. |
| Frálærutilfar | 135.983 | 70% av 135.983 kr. = | 95.188 kr. | 92.400 kr. | 2.788 kr. |
| Innbúgv | 66.731 | 50% av 66.731 kr. = | 33.366 kr. | 22.000 kr. | 11.366 kr. (*) |
| Umvælingar | 187.360 | 70% av 187.360 kr. = | 131.152 kr. | 130.900 kr. | 252 kr. |
| Ljós og hiti | 115.356 | 70% av 115.356 kr. = | 80.749 kr. | 85.000 kr. | ÷ 4.251 kr. |
| Trygging | 7.390 | 70% av 7.390 kr. = | 5.173 kr. | 9.100 kr. | ÷ 3.927 kr. |
| Annað: Skrivstovuútreiðsl. | 24.232 | | | | |
| Telefon | 26.912 | | | | |
| Postgjald | 6.169 | | | | |
| Reingerðarevni | 5.175 | | | | |
| Lýsingar, blaðhald, lærarar á skeið o.a. | 41.764 | 70% av 104.252 kr. = | 72.976 kr. | 61.300 kr. | 11.676 kr. (*) |
| Rentuútreiðslur | 105.047 | 70% av 105.047 kr. = | 73.533 kr. | 59.500 kr. | 14.033 kr. |
| Næmingar úr menningarlondum | 5.580 | 0% av 5.580 kr. = | 0 kr. | 0 kr. | 0 kr. |
| Eftirlønir | 188.218 | 100% av 188.218 kr. = | 188.218 kr. | 192.500 kr. | ÷ 4.282 kr. |
| Byggistudningur | 60.000 | | 60.000 kr. | 60.000 kr. | 0 kr. |
| Sambært løgtingslóg um fólkaháskúlar áttu vit at fingið | | | 1.477.957 kr. | 1.452.800 kr. | 25.157 kr. |
| Vit hava fingið: Rakstrarstudning | | 1.200.300 kr. | | | 23.047 kr. |
| Eftirlønir | | 192.500 kr. | | | |
| Byggistudning | | 60.000 kr. | 1.452.800 kr. | | 2.110 kr. |
| Munur at útgjalda okkum | | | 25.157 kr. | | |
| | | | 23.047 kr. | | |
| Endalig regulering til fíggjarárið 1984/85 | | | 2.110 kr. | | |

(*) Háskúlin vil sjálvur bera kostnaðin av hesum hækkingum.

./. Hjálagdur er roknskapur fyri 1984/85

| | Skipað starv 31.3 - 1985 | | Nýskipað starv 1.4. - 1985 | Leys hjálp 1.4. - 1985 | Tímalønt 1.4. - 1985 | Løn [1] 1.4 - 85 | | Nýnorm-ering [2] | Játtan 1984/85 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | sett | leys | | | | lønarfl. | kr. | | |
| Tænastumaður | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| Tænastumannalíknandi | 1 | | | | | 29-3[3]) | 205.017[3]) | | 185.000[3]) |
| - | 1 | | | | | 19-1-2 | 151.000[4]) | | |
| - | | 1 | | | | 13-4 | 143.404[4]) | | |
| - | | 1 | | | | 13-3 | 141.240[4]) | | |
| - | | 1 | | | | 13-1 | 137.084[4]) | | |
| Sáttmálalønt | | | | | x | | 125.000[4]) | | |
| - | | | | x | | | 70.000[4]) | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| Starvsfólk | | | | | 2 | | | 270.000[4]) | |
| - | | | | | | tils. | 767.728 | 270.000 | 555.100 |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | 70% | = 726.410 | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| Næmingar | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |
| - | | | | | | | | | |

ad [1]) Møguligt eftirlønargjald skal íroknast lønina.
ad [2]) Umsókn um nýnormering skal grundgevast.
ad [3]) Av hesum 100%.
ad [4]) Av hesum ziodar landskassin 70%.

Nýnormering er til **eitt fólk í køkinum** og **til ein skúlatænara**, hon er grundgivin í brævi til Landsskúlafyrisitingina í apríl 1985. Ljóstak av hesum brævi er viðlagt.

| Rokniskapur 84/85 | | Játtan 1985 | Uppskot til játtan 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| Leiðaraløn | 100% av 199.670 kr. = 199.670 | 201.000 | 100% av 205.017 kr. = 205.017 | 224.658 |
| Læraralønir | | 396.000 | 70% av 572.728 kr. = 400.910 | |
| Yvirtíð | 70% av 768.475 kr. = 537.932 | 82.000 | 70% av 125.000 kr. = 87.500 | |
| Eykahjálp | | 93.000 | 70% av 70.000 kr. = 49.000 | |
| Skúlatænari + køksfólk | | 0 | 70% av 270.000 kr. = 189.000 | |
| Innbúgv | 50% av 66.731 kr. = 33.366 | 25.000 | 50% av 55.000 kr. = 27.500 | |
| Umvæling. | 70% av 187.360 kr. = 131.152 | 140.000 | 70% av 200.000 kr. = 140.000 | |
| Frálærutilf. | 70% av 135.983 kr. = 95.188 | 98.000 | 70% av 154.000 kr. = 107.800 | 1.380.467 |
| Ljós og hiti | 70% av 115.356 kr. = 80.749 | 100.000 | 70% av 159.000 kr. = 112.000 | |
| Tryggingar | 70% av 7.390 kr. = 5.173 | 17.000 | 70% av 24.000 kr. = 17.000 | |
| Aðrar útr.: (skrivst., telef., blaðhald, reingerð, lýsing, lærarar á skeið) | 70% av 104.252 kr. = 72.976 | 68.000 | 70% av 105.000 kr. = 70.500 | |
| Rentuútr. | 70% av 105.047 kr. = 73.533 | 85.000 | 70% av 110.000 kr. = 77.000 | |
| 1. Rakstrarstudningur tilsamans | 1.229.739 | 1.305.000[1]) | 1.486.227 | 1.605.125 |
| 2. Byggistudningur | 60.000 | 60.000[1]) | 60.000[2]) | 60.000 |
| 3. Eftirlønir (Marius & Jóhannes) | 188.219 | 194.000[1]) | 194.000 | 194.000 |
| 4. Næmingastuðningur (upp til 70% av næmingagjaldinum) | 266.600 | 460.000[1]) | (40 næm. í 10 mðr. á 1700 kr. x 70%) 476.000[3]) | 476.000 |
| | 1.744.558 | 2.019.000[1]) | 2.216.227 | 2.335.125 |
| 5. Eykajáttan til umbygging av húsum | 0 | 225.000[1]) | 0 | 0 |

[1]) Øll talini fyri 1985 eru niðurskorin til 75% vegna fíggjarársflyting, eisini byggistuðningurin 60.000 kr. og umbyggingin 225.000 kr. Men gjaldið til umbygging er nú játtað sum rentu/avdráttarfrítt lán 260.000 kr., men ikki útgoldið enn.

[2]) Hetta er seinasta av teim 10 gjøldunum, sum játtað vórðu (fyrstu ferð útgoldið í fíggjarárinum 77/78). Um tørt 45.000 verða útgoldnar í 1985, meðan vit søkja 15.000 eyka fyri 1986, ella 15.000 útgoldnar í 1. ársfjórðingi 1987.

[3]) Hetta talið er maksimum upphædd, nýtslan veldst um tal av næmingum og inntøkuviðurskiftum teirra.

**Sbrt. skriv frá Føroya Fólkaháskúla, apríl 1985:**

Hjálagt verður sent uppskot til nýskipan av háskúlaundirvísingini á teim longu háskúlaskeiðunum (2 ferðir 18 vikur: miðjan august-jóla, miðjan februar-jóanssøku).

Í høvuðsheitunum er uppskotið hetta:

1) Allir háskúlanæmingar hava eina ávísa kjarnu av lærugreinum í felag.
2) Harumframt verða 3 linjur skipaðar:
   I. Almenn skúlalinja, — sum skal geva næmingum, ið ikki eru í undirvísingar-rættigum aldri, møguleika at fara til fráfaringarroynd fólkaskúlans. (Sambært uppskot, sum Endurbúgvingarstovan hevur sent skúlamyndugleikum og landsstýrinum).
   II. Fiskivinnulinja.
   III. Ungdómsleiðaralinja, Í altjóða ungdómsárinum er náttúrligt, at farið verður undir eitt tiltak, sum kann menna ungmannafelagsvirksemið í landinum. Undirvísingin á hesi linju er mest ætlað (ung)fólki, sum ætlar at virka í bygda-og ungdómsfeløgum, men er vónandi eisini mennandi og kveikjandi fyri annað ungdómsarbeiði: skótar, kristilig feløg, ítróttarfeløg — ella sum grundarlag undir seinni pedagogiskari útbúgving.

Si annars gjøllari frágreiðing í hjáløgdu skjølum:

Skjal 1: Uppskot til nýskipan av háskúlaundirvísingini.
Skjal 2: Uppskot um fiskivinnulinju.
Skjal 3: Uppskot um ungdómsleiðaralinju.

Háskúlin er førur fyri og til reiðar at fara undir hesa undirvísing frá komandi skúlaári, men til tess at gera tað er neyðugt at biðja landsskúlamyndugleikarnar gera okkum tann beina at

1) loyva fráviki frá grein I í løgtingslóg um studning til fólkaháskúlar (nr. 101-1978): ***háskúlar megu ikki búgva undir prógv.***
   Tað er neyðugt vegna lingu 1: Almennu skúlalinjuna. Vit hava fingið játtan frá Venjingarskúlanum til at lata næmingarnar fara upp til roynd har og tískil fáa prógv haðani, og okkum nýtist sostatt ikki at skipa fyri prógvtøku. Men skulu næmingarnir ikki innskrivast til royndina sum sjálvlesandi (privatistar) — tað krevur nógv størri lisið pensum — so má háskúlaundirvísingin góðkennast at ***búgva undir prógv,*** sjálvandi við í minsta lagi tí pensa-kravi, sum fólkaskúlalógin fyriskipar.

2) viðmæla eina eykajáttan fyri mánaðirnar aug.-des. kr. 70.000 og fyri komandi fíggjarár kr. 170.000.

Tað er so, at higartil hevur undirvísingin verið skipað so, at næmingarnir hava verið við í øllum vanligum arbeiði sum matgerð, reingerð og smáumvælingum, teir 5 lærararnir hava skipað fyri hesum arbeiði sum part av teirra lærarastarvi. Men nýggja skipanin gevur øllum lærarunum fult tímatal umframt hetta praktiska arbeiði, so nú má fólk setast at taka sær av matgerðini burturav.
Somuleiðis kundu vit ynskt okkum at sett ein skúlatænara. So hvørt sum alt háskúlans øki verður sett í stand, garður lagaður, urtagarður gjørdur o. s. fr., verður torført at halda alt við líka í góðum standi uttan at hava fast fólk til tess. Alt størri umvælingararbeiði hevur verið gjørt higartil av leysum fólki eftir arbeiðsrokning. So nakað hevði verið spart á núverandi umvælingarkonto, um skúlatænari var.

Eftir galdandi FA-sáttmála er mánaðarlønin fyri 40-tíma viku kr. 10.231,02, so eykaútreiðslurnar av køksfólki og skúlatænara høvdu verið:
a) í hesum figgjarárinum: 2 . 5 . 10.231,02 kr. = 102.310,20 kr.
   hjá landskassanum at rinda: 70% av 102.310,20 kr. = 71.617,14 kr.
b) í komandi figgjarári: 12 . 2 . 10.231,02 kr. = 245.544,48 kr.
   hjá landskassanum at rinda: 70% av 245.544,48 kr. = 171.881,13 kr.

Praktisk arbeiði verður enn sum fyrr ein partur av háskúlalívinum, tí ætlanin er framvegis, at næmingar skulu taka sær av reingerð og av matgerð um vikuskiftið, umframt eplavelting, fisking o. ø.

Tey stuttskeið av ymsum slagi, sum háskúlin hevur havt í januar-februar og í juni-august, verða sjálvsagt at halda fram. Tí er m.a. í ætlanini um »vanligu skúlalinjuna« við møguligari prógtøku ásett, at næmingar lesa eitt ávíst tilfar í støðginum frá jólum til miðjan februar.

## UPPSKOT TIL NÝSKIPAN AV HÁSKÚLAUNDIRVÍSINGINI

Felags undirvísing við hesum tvungnu lærugreinunum (vanligar háskúlalærugreinir):

| | |
|---|---|
| Føroyskt mál og bókmentir, ..... | 6 t/v |
| Søga, føroysk og veraldar, ..... | 2 t/v |
| Samtíðarkunning: | |
| Náttúru- og umhvørviskunning, | 1 t |
| Politiskar hugsjónir, ..... | 1 t/v |
| Sálarfrøði, ..... | 1 t/v |
| Samfelagslæra, ..... | 1 t/v |
| Átrúnaðarlæra, ..... | 1 t/v |
| Skriviverkstaður, ..... | 2 t/v |
| Ítróttur/rørsla, | 1 t/v (evt. 6 x 15 min/v) |

Hin helmingurin av skúlatíðini er »linjulestur«. Næmingarnir skulu tá velja seg á eina av hesum linjum:

1. Almenn skúlalinja við hesum lærugreinum:
   danskt, enskt, týskt,
   rokning/matematikk,
   evt. alisfrøði, maskinskriving.

   Um næmingur gongur bæði heystskeiðið og várskeiðið, skal bera til at fara til fráfaringarroynd fólkaskúlans (9. fl.). Í støðginum millum heystskeið og várskeið skal slíkur næmingur lesa sjálvur ymist, sum skúlin vísir á í samband við prógtøkuna.

   Prógleysnaður er bert møguligur hjá næmingum, sum eru ov gamlir til at sleppa at ganga í fólkaskúlanum.

2. Fiskivinnulinja.
   Undirvísingin verður løgd til rættis saman við ymsum stovnum, sum knýttir eru at fiskivinnuni.

3. Ungdómsleiðaralinja/fritíðarleiðaralinja.
   (Sí frágreiðing á viðlagda skjali).

(4.) Harumframt verður høvi til at velja ein ella fleiri kreativar lærugreinir: hondarbeiði, leir, evning, leik, tónleik, sum verða á tímatalvuni tveir seinnapartar um vikuna. Hesar kreativu lærugreinir verða lagdar soleiðis, at næmingar av øllum trimum linjum kunna velja tær. Møguliga skal tað vera tvungið at velja minst eina kreativa grein, ella minst annan dagin av teim kreativu greinunum.

**FISKIVINNULINJAN**

**Endamál:**

1. Geva næmingunum eitt innlit í og fatan av tí støðu, sum føroysk fiskivinna og fiskaídnaður eru í í dag.
2. Geva teimum høvi til at meta um, hvussu hesin týdningarmikli vinnuvegur okkara kann mennast — og hvørji politisk, havrættarlig og vistfrøðilig sjónarmið megu vera uppií, tá ið ætlast skal um framtíðarvánirnar.

**Innihald:**

1. Havfrøði (Oceanografi), Livfrøði (Havbiologi).
   Stovnsmetingar og stovnsrøkt. ..... 24 tímar

   Samarbeiði við Fiskirannsóknarstovuna um hesi evni.

2. Føroysk fiskivinnusøga
   (Teknologiskt, samfelagsliga, búskaparliga) ..... 12 tímar.

   Nútíðar amboð og skip.

   Fiskaaling ..... 24 tímar.

3. Felagsviðurskifti:
   Fiskimannafelagið, Meginfelag útróðrarmanna, Reiðarafelagið.
   Sáttmálaviðurskifti ..... 12 tímar.
   Samarbeiði við nevndu feløg um hesi evni.

4. Siglingarfrøði: Navigatión, streymlæra, sjóreglur ..... 12 tímar.

5. Fiskivinnupolitikkur:
   Ætlanir, avmarkingar, figging, stýring, marknaðarviðurskifti.
   Framtíðarútlit ..... 24 tímar.

6. Praktikk:
   Á heystskeiðinum ein slupptúrur í 1 viku.
   Á várskeiðinum ein túr við Magnus Heinason í 1 viku.
   1 praktikk-vika á ymsum fiskavirkjum (av ymsum slagi).
   1 praktikk-vika seinnapartar á degi á ymsum fiskavirkjum
   í Suðurstreymi.
   Praktikk-undirvísingin skal leggjast til rættis saman við teim
   ymsu stovnunum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni ..... 12 tímar.
   Góðskueftirlit, góðskufremjan.

7. Gera uppgávu í mynd/skrift/filmi/ljóði eftir egnum vali.
   Uppgávan skal lýsa sjálvvalt evni innan fiskivinnuna ..... 24 tímar.

8. Framløga av uppgávunum og eftirmetingar ..... 12 tímar.

   Roknað verður við undirvísing á fiskivinnulinjuni 12 t/vikuna. Skráin er sostatt til 16 vikur. Háskúlaskeiðið er 18 vikur, men skúlin hevur eisini ymisk felagstiltøk fyri allar linjurnar, sum sostatt taka restina av tíðini, t. e. vanlig samtíðarkunning av ymsum slagi.

## UNGDÓMSLEIÐARALINJAN

### A. Endamál:

1. At gera ungdómin virknan sjálvan, mótvegis »undirhaldsmentanini«, har tú bara bíðar eftir, at okkurt kemur tilgjørt frá onkrum øðrum.

2. Ein týdningarmikil liður í bygdamenningini. Í mongum førum er tað eitt tungt tak hjá fólki í smábygdum at fara undir nakað nýtt. — Vit vænta ikki, at hesi ungfólk eru før fyri beinanvegin at fara heim og loysa allar trupulleikar, men kanska setir hetta so við og við nakað í gongd.

3. Fáa nýggja tilgongd av næmingum til háskúlans. Hetta seinasta er sjálvandi ikki týdningarmikið í sjálvum sær, men eitt land við einum virknum fólki er eitt land á leið — og eitt land, sum ikki er so skjótt at kollsigla mentunarliga (mál, mentan, samfelagsarvur er sjálvandi eisini høvuðsgrein á hesi linju).

### B. Innihald:

1. Upplýsing um felløg og felagsarbeiði:
   Felagslógir. Hvussu gera vit felag og felagslógir.
   Roknskaparhald. Høllisspurningar. Blað- og annað prent.
   Samráðingaháttur.
   Hvussu bera vit okkum skilabest at, tá ið vit vilja byrja eitt ungdómsarbeiði? Hvat er at geva mest gætur?

2. Sálarfrøði og samfelagsfrøði/samvirki.
   Bólkasálarfrøði (samtala, kjak, orðaskifti. Ilerskarar og leiðarar).
   Almenn sálarfrøði.
   Menningarsálarfrøði.
   Kappingarmentan.

3. Mentan.
   Hvat er »føroysk mentan«?
   a. Undirhaldsmentan (video, vikubløð, filmir, poppur o. a. m.)
   b. Handilsmentan (móti, peningur — mótvegis skapanarhuga og skapanartrongd, sjálvsvirksemi.
   c. Kappingarmentan (ítróttur).
   d. Gomul føroysk mentan — hvat er tað?

4. Kvøldseta.
   Hvat er innihaldið í eini kvøldsetu?
   Vit royna at leggja til rættis vetrarskrá við kvøldsetum.
   Evni til kjak (dømi)
   Fyrilestrarfólk: gera ein lista við fólkum, sum kunna greiða frá ymsum evnum.
   Filmur. (Lítt sindur um filmkunnleika).
   Føroyskur dansur (læra kvæði og læra at skipa).
   Spøl.
   Sangir.

C. **Praktikk-skipan:**
   ***Heima á skálanum:***
   Gerið ein ungdómsklubba,
   hava kvøldsetu eina ferð um vikuna.

   ***Uttanfyri skúlan:***
   Vitja bygdafeløg eina ella tvær ferðir,
   kunna okkum um, hvussu tey arbeiða,
   møguliga standa fyri eini kvøldsetu í bygdini.
   Vitja skótaarbeiði ella annað felagsarbeiði.

   ***Uppgáva:***
   Á hvørjum skeiði ger hvør næmingur eina uppgávu um sína egnu bygd við frágreiðing um:
   — søgulig viðurskifti
   — mentanarlig viðurskifti
   — landafrøðilig viðurskifti
   — vansar fyrr og nú
   — fyrimunir fyrr og nú
   — framtíðarmøgulcikar
   Skipa harumframt eina vetrarskrá fyri tína bygd,
   sum bæði inniheldur upplýsandi og skemtilig kvøld.

D. **Fíggjarviðurskifti og praktiskar vánir viðvíkjandi linjuni:**

   Fyri skúlan verður helst ikki talan um eyka útreiðslur, vit hava høli og lærarar, men møguliga verður alt hetta av ongum, um ikki bygda- og ungdómsfeløg kunnu stuðla fólki til at fara á slíkt skeið (mist arbeiðsorka, forsyrgjaraskyldur, hús o.t.). Sjálvandi kostar undirvísingin á hesari linju tað sama sum hjá øðrum báskúlanæmingum: 460 kr./vika við møguleika fyri landskassastuðuli.

Henda linjuundirvísingin umfatar 12 t/vikuna umfraint teir 16 tímarnar, sum eru felags fyri allar 3 linjurnar og tær kreativu lærugreinarnar, sum møguliga eisini verður til at velja ein ella tveir seinnapartar um vikuna — og vit meta, at eitt slíkt skeið skuldi verið ein góður stuðul til at farið í holt við eitthvørt virksemi í sini heimbygd.

**Sbrt. skriv dagf. 30. juni 1985 frá Føroya Fólkaháskúla:**

Á fundi 24. juni 1985 hevði háskúlastjórin roknskapin fyri figgjarárið 1984/85 til viðgerðar, og varð hann einmælt góðtikin.

Hjálagt er skriv við uppseting í 4 teigum: roknskapartøl, lógarbundin studningur, játtan 84/85 og munur (yvirtrekk/avlop).

Á postunum »innbúgv« og »aðrar útreiðslur« eru yvirtrekk, sum háskúlin sjálvur vil bera kostnaðin av, annað ósamsvar stavar frá lønarsáttmálabroytingum, prístalsbroytingum.
Tá ið hetta er tikið við, eru bert 2.110 kr. eftir, og hevur nevndin samtykt ikki at søkja um nakra regulering í ár.

Hjáløgd eru eisini 2 eintøk av grannskoðaða roknskapinum 84/85.

Roknskapur og regulcringsumsókn hava fyrr verið send beinleiðis til landsstýrið, men landsskúlafyrisitingin er helst nú rætti móttakarin.

**Viðmerkingar Landsskúlafyrisitingarinnar til uppskot fyri rakstrarstað 14554 — Føroya Húsarhaldsskúli.**

Biðið verður um, at skúlin fær somu studningssømdir sum Føroya Fólkaháskúli hevur.

Við støði í næmingatali, sum skúlin arbeiðir við, verður mælt til, at samlaða játtanin verður 734.000 kr. har næmingastudningurin kann verða upp til 140.000 kr.

Av tí at uppskot skúlans ikki náddi Landsskúlafyrisitingini fyrr enn tað samlaða uppskotið fyri § 14 var gjørt, verður biðið um somu upphædd sum fyri 1985/86.

**Sambært skriv dagf. 30. sept. 1984 frá Føroya Háskúla:**

**Figgjarætlan 1985/1986**

| | | |
|---|---|---|
| matur | kr. | 60.500,00 |
| leiga av kunningarhølum | - | 102.200,00 |
| olja | - | 59.000,00 |
| ravmagn | - | 41.760,00 |
| hjálpilærarar | - | 77.100,00 |
| viðlíkahald | - | 96.000,00 |
| telefon | - | 10.900,00 |
| skrivstovuhald v.m. | - | 17.200,00 |
| tryggingar | - | 6.000,00 |
| rentur | - | 20.000,00 |
| ymist | - | 10.800,00 |
| náttarvakt | - | 65.000,00 |
| skúlaleiðarin | - | 185.000,00 |
| | kr. | 751.460,00 |

**Føroya Landsstýri at gjalda:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| leiga av kunningarhølum | kr. | 102.200,00 | |
| olja | - | 59.000,00 | |
| ravmagn | - | 41.760,00 | |
| hjálpilærarar | - | 77.100,00 | |
| viðlíkahald | - | 96.000,00 | |
| telefon | - | 10.900,00 | |
| skrivstovuhald v.m. | - | 17.200,00 | |
| tryggingar | - | 6.000,00 | |
| rentur | - | 20.000,00 | |
| ymist | - | 10.800,00 | |
| náttarvakt | - | 65.000,00 | |
| 70% av | kr. | 505.960,00 | kr. 354.172,00 |
| skúlaleiðarin | | | - 185.000,00 |
| eftirstøða 1983 kr. 469.260,19 - kr. 414.720,00 | | | - 54.540,19 |
| | | | kr. 593.712,19 |

Figgjarætlanin fyri 1986/87 og 1987/88 kemur at hava somu upphæddir sum í 1985/86 prislegu, treytað av, at næmingatalið ikki økist.

**ad 14604 Kvøldskúlar**

Í 1983 kom nýggj lóg um frítíðarundirvísing í gildi, løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983, og fór samstundis úr gildi kunngerð nr. 9 frá 22. januar 1931 um ríkisstudning til ungdóms- og kvøldskúlan í Føroyum, sbr. kunngerð nr. 276 frá 7. oktober 1935.

Eftir higartil galdandi reglum hava ríkis- og landskassin goldið 70% av læraralønum og neyðugum flutningi av lærarum. Av hesnm hevur ríkiskassin latið ⅔ og landskassin ⅓, og aðrar rakstrarútreiðslur hevur avvarðandi kommuna goldið.

Nýggja lógin er býtt upp í 3 ymiskar tættir. 1) almenn frítíðarundirvísing, 2) serstøk frítíðarundirvísing og 3) frítíðarvirksemi.

Hvat viðvíkur almennari frítíðarundirvísing, fáa kommununrnar framvegis 50% í studningi til studningsheimilaðar útreiðslur (lærara- og leiðaraløn), sum verða at býta millum lands- og ríkiskassan.

Serstøk frítíðarundirvísing verður øll goldin av lands- og ríkiskassanum, meðan til frítíðarvirksemi kann verða latið upp til 50% í studningi úr lands- og ríkiskassa.

Nýggja lógin hevur heimild í lóg nr. 53 frá 14. februar 1979 um »fritidsundervisning m. v. på Færøerne«. Henda lóg er enn ikki sett í gildi, við tað at landsstýrið fyrst skal hava samráðingar við undirvísingarmálaráðharran, áðrenn lógin verður sett í gildi.

Uppskotið til fíggjarlóg fyri 1986 er grundað á hesi tøl:

| **Almenn frítíðarundirvísing** | | **Lands-/ríkiskassin** |
|---|---|---|
| 1) 55.000 tímar | kr. 7.150.000 | kr. 3.575.000 |
| 2) serstøk frítíðarundirvísing 10.000 tímar | kr. 2.200.000 | kr. 2.200.000 |
| 3) Frítíðarvirksemi 20.000 tímar | kr. 1.500.000 | kr. 750.000 |
| 4) Skeið sambært § 21 í løgtingslóg um frítíðarundirvísing | kr. 100.000 | kr. 100.000 |
| Tilsamans | kr. 10.950.000 | kr. 6.625.000 |
| Komunanna partur | kr. 4.325.000 | |

Býtisfallið millum ríkiskassa og landskassa er í uppskotinum sett til ávikavist ⅔ og ⅓ eins og frammanundan.

Ætlaða tímatalið er gjørt við støði í timatalinum árini frammanundan.

Í fíggjarárinum 1984/85 vórðu nýttir umleið 60.000 tímar til almenna frítíðarundirvísing og serstaka frítíðarundirvísing. Tímatalið í uppskotinum fyri fíggjarárið 1985.

**Fritíðarundirvísingin:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Almenn fritíðarundirvísing<br>55.000 tímar á 130,- kr. = ..... | kr. 7.150.000 |
| 2. | Serstøk fritíðarundirvísing<br>10.000 tímar á 220 kr. = ..... | kr. 2.200.000 |
| 3. | Fritíðarvirksemi<br>20.000 tímar á 75,- kr. = ..... | kr. 1.500.000 |
| 4. | Skeið smb. § 21 ..... | kr. 100.000 |

Landskassans og ríkiskassans partur:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | 50% av kr. 7.150.000 = ..... | kr. 3.575.000 |
| 2. | 100% av kr. 2.200.000 = ..... | kr. 2.200.000 |
| 3. | 50% av kr. 1.500.000 = ..... | kr. 750.000 |
| 4. | 100% av kr. 100.000 = ..... | kr. 100.000 |
| | | 6.625.000 |

Kommunanna partur:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | 50% av kr. 7.150.000 = ..... | kr. 3.575.000 |
| 2. | 50% av kr. 1.500.000 = ..... | kr. 750.000 |
| | | kr. 4.325.000 |

**Kvøldskúlin:**

| | |
|---|---|
| Ríkiskassin ..... | kr. 4.416.667 |
| Landskassin ..... | kr. 2.208.333[1]) |
| Kommunur ..... | kr. 4.325.000 |

| | | |
|---|---|---|
| R: | 83/84 ..... | kr. 9.346 |
| J: | 85 ..... | kr. 9.285 |
| U: | 86 ..... | kr. 10.000 |

[1]) Incl. lønarhækkingar í 1986 er uppskot landsstýrisins 2.382.000 kr.

**Stuðul til musikkskúlar:**

7. juni 1984 kom í gildi nýggj lóg um musikkskúlar — løgtingslóg nr. 69 frá 7. juni 1984. Eftir hesi lóg verður studningur latin úr landskassanum til musikkskúlar, ið eru knýttir at eini kommunu ella kommunalum felagsskapi.

Kanningar gjørdar av nevndini smb. § 7 í omanfyri nevndu lóg vísa, at brúk er fyri millum 20-25 lærarum skúlaárið 1985/86.

Fyri fíggjarárið 1986 verður mett, at brúk er fyri í minsta lagi 23 lærarum + 1 leiðara til at taka sær av hesi undirvísing.

Uppskot til fíggjarlóg fyri musikkskúlar 1986:

| | |
|---|---|
| 1 leiðari sambært § 6 í løgtingslóg nr. 69 frá 1984 (33. lønarflokkur) ..... | kr. 221.403 |
| 23 lærarar í 23. lønarflokki ..... | kr. 4.121.000 |
| Ferðaútreiðslur innanlands 1) ..... | kr. 160.000 |
| Ferðaútreiðslur til og úr Føroyum 2) ..... | kr. 160.000 |
| Leiðarasamsýning á musikkskúlunum 3) ..... | kr. 240.000 |
| | kr. 4.902.403 |

1) Teir lærarar, ið ferðast millum skúlarnar (smb. § 4 í lóg um stuðul til musikkskúlar nr. 69 frá 7. juni 1984) fáa útreiðslurnar endurgoldnar.
2) Enn eru ov fáir føroyingar, ið hava ta útbúgving, ið krevst til at undirvísa. Tað verður tí neyðugt enn nøkur ár at fáa lærarar uttanlendis.
3) Til at fyrireika musikkundirvísingini á staðnum má setast fólk, ið fær eina samsýning fyri hetta t. d. 6% av læraraløni.

Útreiðslur landskassans til hesa studningslóg er so statt:

| | | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|
| 100% av leiðaraløni ..... | kr. 221.403 | kr. 239.115 |
| 50% av læraraløni ..... | kr. 2.060.500 | kr. 2.224.800 |
| 50% av leiðaraløunum á musikkskúlunum | kr. 120.000 | kr. 129.600 |
| 100% av ferðaútreiðslunum ..... | kr. 320.000 | kr. 320.000 |
| | kr. 2.721.903 | kr. 2.913.515 |

**Læraratørvurin í musikkskúlunum**

| | 1984/85 | | 1985/86 | | 1986/87 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Umbiðið | játtað | Umbiðið | játtað | Umbiðið | játtað |
| Norðuroyggjar | 1½ | ½ | 2½ | 1½ | 3½ | 2½ |
| Eysturoy | 4 | 3¼ | 5 | 4 | 6 | 4 |
| Norðurstreymoy | 2 | 1 | 2½ | 2 | 2½ | 2 |
| Suðurstreymoy | 5 | 4¼ | 5 (8) | 5 (8) | 9 | 9 |
| Vágar | 2 | 2 | 2 | 2 | 3 | 2½ |
| Suðuroy | 3 | 1½ | 3 | 2½ | 3 | 3 |
| Tilsamans | 17½ | 12½ | 20 (23) | 17 (20) | 27 | 23 |

Tann stóri vøksturin stendst av, at Tórshavnar Musikkskúli og Klaksvíkar Musikkskúli, ið hava havt sína egnu játtan í fíggjarlógini, ynskja at koma undir hesa musikkskúlaskipan.

Í veruleikanum er talið ikki so nógv vaksið, við tað at Tórshavnar Musikkskúli hevur havt 4 lærarar, og Klaksvíkar Musikkskúli 3 lærarar uttan fyri musikkskúlaskipanina. Taka vit hesar 7 frá, so er ein lítil skerjing farin fram í læraratalinum.

Um ikki játtaðir verða 23 lærarar komandi fíggjarár, so verður stór afturgongd í musikkskúlavirkseminum, tí antin verða hesir áðurnevndu skúlar at halda uppat, ella má virksemið á bygdunum skerjast tilsvarandi.

---

## § 14 Rakstrarstað nr. 14656: Landsmiðstøð fyri undirvísingarambo ð.

**Í 1000 kr.**

| Konto | Navn | Játtan 85 | Uppskot 86 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 8309 | Leiguinntøka | 0 | 0 | 0 |
| 103048 | Løn/tænastumenn | 155,0 | 300,0 | 324,0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 225,0 | 225,0 | 243,0 |
| 103222 | Løn/reingerð | 56,0 | 62,0 | 62,0 |
| 103405 | Úrtíðarlønir | 6,6 | 6,6 | 6,6 |
| 103509 | Samsýningar | 10,0 | 10,0 | 10,0 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur | 8,0 | 16,0 | 16,0 |
| 203204 | Prenting | 150,0 | 200,0 | 200,0 |
| 203308 | Lýsingar | 8,0 | 10,0 | 10,0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 138,0 | 138,0 | 138,0 |
| 233051 | Innbúgv | 25,0 | 25,0 | 25,0 |
| 233259 | Postgjald | 20,0 | 20,0 | 20,0 |
| 233354 | Telefon og telex | 9,6 | 18,0 | 18,0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 24,0 | 24,0 | 24,0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 36,0 | 36,0 | 36,0 |
| 233085 | Bókakeyp og undirvísingarambo ð | 700,0 | 800,0 | 800,0 |
| | Tilsamans | 1.094,0 | 1.910,6 | 1.952,6 |

| | | | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|
| Landskassans partur: | 713.000 | 1.466.000 | 1.558.800 |
| Ríkiskassans partur: konto 103048 | 165.000 | 165.000 | 178.200 |
| konto 253085 | 216.000 | 216.000 | 216.000 |

Kommunanna partur:

Av ti at rakstrarstaðið er nýtt, er eingin roknskapur.

**Viðmerkingar til tær einstøku konti.**
Øll tøl fyri fíggjarárið 1986 eru roknað við støði í, at miðstøðin fer at virka frá 1. oktober 1985.

**Ad 103048 Løn/tænastumenn.**
Eftir uppskotinum til kunngerð verður settur ein leiðari av landsmiðstøðini. Eftir uppskotinum her verður roknað við, at leiðarin verður lærari við skúlabókasavnsútbúgving, og verður hesin ætlandi løntur í lønarrammu 27 í læraralønarlógini. Sostatt verður leiðarin løntur av læraralønarkontoini, herav ríkiskassin skal gjalda 55%. Tað verður eisini neyðugt við konsulenthjálp frá lærarum, og er hendan útreiðslan tikin við í uppskotið.

**Ad 103143 Løn/starvsfólk.**
Tað verður, beinanvegin landsmiðstøðin fer undir virki sítt, neyðugt við einum skrivstovufólki og einum fólki við bókasavnsútbúgving. Væntandi verður tað so hvørt, sum miðstøðin verður útbygd, neyðugt við fleiri skrivstovufólkum, og tí eitt afturat sett í metingina fyri 1987.

**Ad 103222 Løn/reingerð.**
Útreiðslur til reingerð eru settar til kr. 50.400, og er hølið sett til 250m$^2$.

**Ad 103405 Úrtíðarlønir.**
Tað er torført at meta um støddina á hesi konto, men verður mett, at ein ávís upphædd eigur at verða sett av.

**Ad 113202 Ferða- og dagpeningur.**
Landsmiðstøðin skal vera ráðgevari hjá skúlabókasøvnunum kring landið, og má tí metast, at nakað av ferðing verður. Roknast má eisini við, at leiðarin o. o. skulu vitja stovnar og framsýningar uttanlands.

**Ad 203204 Preuting.**
Roknast má við, at Landsmiðstøðin, við tað at hon eisini skal framleiða tilfar, fær rættiliga stórar útreiðslur til prenting.

**Ad 213806 Leiguútreiðslur.**
Tað verður roknað við, at landsmiðstøðin, tá hon er fult útbygd, kemur at hava ein hølistørv uppá 250 til 300m$^2$, og kostar hetta eftir dagsprísinum kr. 460 pr. m$^2$. Upphæddin, sum er sett her, svarar til 300m$^2$. Møguleiki er

fyri at leiga frá Svend Krosstein, sama stað sum Landsskúlafyrisitingin hevur leigað, og er hvør sektión har 146 m² til støddar, men skal Landsmiðstøðin hava nógv meira enn ta einu sektiónina, vil Svend Krosstein treyta sær allan leigusáttmálan longdan til 10 ár. Tað verður tí neyðugt, at landsstýrið tekur avgerð um hetta. Landsmiðstøðin krevur í minsta lagi 300 m² í fyrstu atløgu.

**Ad 233051 Innbúgv.**
Neyðugt verður við skrivstovuinnbúgvi, sum í fyrstu syftu er sett til at kosta kr. 50.000, í komandi árum kr. 25.000.

**Ad 233409 Leiga av maskinum.**
Tað verður her hugsað um kopimaskinu. Seinni verður óivað neyðugt við øðrum maskinum, annaðhvørt at leiga ella at keypa, og tá á konto 233561.

**Ad 233085 Bókakeyp og undirvísingaramboð.**
Í álitinum verður roknað við, at árliga útreiðslan til søvn verður kr. 550.000, og hevur Landsskúlafyrisitingin, við vanligum prísvøkstri í huga, sett upphæddina til kr. 800.000 fyri 1986 og mett ta somu upphædd fyri komandi ár. Havast skal í huga, at miðstøðin eisini umfatar AV-tól, sum eru dýr at keypa.

**Skúlin á Trøðni.**
Ríkið rindar 75% av útreiðslunum og landið 25%. Landskassans útreiðslur í 3 ára skeiðnum verða í 1000 kr.:

| | | |
|---|---|---|
| R: | 84/85 | 2.375 |
| J: | 85 | 2.651 |
| U: | 86 | 2.703 |

**Viðmerkingar til konti, hvørs útreiðslur landskassin ikki luttekur í:**
**Føroya Læraraskúli.**
Allar útreiðslur til læraraskúlan verða goldnar av ríkiskassanum. Tó skal viðmerkjast, at frá fíggjarárinum 1983/84 at rokna, fer ein vaksandi partur av útreiðslunum til prógtøkur at verða goldin av Landsskúlafyrisitingini, konto 233529.

**Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir:**
Ríkiskassin rindar 50% av útreiðslunum á hesi konto.
Landskassans partur í 1000 kr.:

| | | |
|---|---|---|
| R: | 84/85 | 26 |
| J: | 85 | 30 |
| U: | 86 | 30 |

**Tekniskir skúlar.**
Henda konto fevnir um teknisku skúlarnar í Tórshavn og Klaksvík og somuleiðis um skúlaheimini í hesum støðum.

Undirvísingarmálaráðið, Direktoratet for Erhvervsuddannelserne, hevur higartil staðið fyri hesum skúlum. Útreiðslurnar til hesar skúlarnar verða býttar sambært reglunum í fyriskipan nr. 518, dagfest 23. september 1977. Ríkið rindar 50% í rakstrarstudningi til lærlingaundirvísingina og kommunurnar 20%. Ríkið rindar 100% í studningi til prógvtøkuundirvísingina.

Av teimum samlaðu útreiðslunum rindar ríkið uml. 85%, kommunurnar uml. 10%. Tað, ið eftir er, uml. 5%, verður fyrst og fremst rindað sum uppihaldsútreiðslur fyri lærlingar.

Landskassin veitir ikki studning til teir teknisku skúlarnar.

**Handilsskúlar.**
Hesin skúlin fær studning eftir somu reglum sum teknisku skúlarnir, og útreiðslurnar verða býttar á sama hátt.

Landskassin veitir ikki studning til handilsskúlan, men frá 1983 má roknast við, at Landsskúlafyrisitingin skal bera nakað av prógvtøkuútreiðslunum av konto 233529.

**Føroya Maksinskúli.**
Ríkiskassin ber allar útreiðslurnar til raksturin, meðan Landsskúlafyrisitingin frá og við 1986 ber útreiðslurnar av uppgávugerð og prógvtøku.

**Privatir skúlar.**
Teir privatu skúlarnir fáa, sambært figgjarnevndarinnar avgerð 1952, studning frá ríkinum upp á 85% av læraralønunum. Harumframt veitir Tórshavnar Kommuna eitt minni tilskot. Studningur verður ikki veittur úr landskassanum.

Aðrar útreiðslur verða goldnar við næmingagjaldi og tilskoti frá privatum.

— — — — — — —

**Viðmerkingar landsstýrisins:**
Landsstýrið hevur samtykt at seta 500.000 kr. av á figgjarlógaruppskotinum fyri 1986, útreiðslur, ið standast av, at tað eru 2 flokkar á skúlanum 1985/86.

Eykajáttan er fingin fyri útreiðslurnar í 1985.

**Ad § 14 - 14901/313128 ÍTRÓTTASAMBAND FØROYA**

Sbrt. skriv dagf. 29. juni 1985:

**Viðv. konto nr. § 14-14901/313128**
Hjálagt senda vit fíggjarætlan fyri Í.S.F. fyri árið 1986, sum visir ein studningstørv upp á **kr. 3.614.000,00.**

Umsókn frá Fótbóltssamband Føroya um at hækka játtanina til útbúgving av fótbóltsvenjarum frá kr. 50.000,00 til **kr. 75.000,00.**

Umsókn frá Ítróttalæknaskipan Í.L.S. um eina serstaka játtan uppá **kr. 100.000,00.**

Umsókn frá Í.S.F. um eina serstaka játtan til at nýta til umskipan av Í.S.F. upp á **kr. 200.000,00.**

Umsókn frá Í.S.F. vegna ungdóms- og menningardeildina um eina serstaka játtan til útbúgving av ungdóms- og ítróttarvenjarum upp á **kr. 150.000,00.**

Vónandi verður tikið væl undir við hesum uppskoti hjá okkum, men eru ivaspurningar, eru vit altíð fúsir at samráðast um hetta.

— — — — — — —

**Sbrt. skriv dagf. 18. juni 1985:**

**Viðvíkjandi stuðlinum frá Føroya Løgtingi til bóltvenjarar.**
Sum tykkum kunnugt, hevur henda studningsupphædd kr. 50.000,- verið tann sama frá byrjanini av. Virksemi hjá venjaradeildini hjá FSF er alsamnt vaksandi, og er ein miðvís venjaraútbúgving í gongd.

Heitt verður á tykkum um at søkja um, at henda upphædd verður hækkað við minst kr. 25.000,-.

— — — — — — —

**Sbrt. skriv dagf. 29. juni 1985:**

Ítróttarsamband Føroya hevur í 1984 sett eina nevnd at arbeiða við at seta á stovn eina Ítróttalæknaskipan í Føroyum.

Í hesi nevnd sita:

Heðin Mortensen, formaður innan Í.S.F. og Sølvi Winther Olsen, lækni.

Nú er arbeiðið komið so væl áleiðis, at byrjast kann.

Tí vil Í.S.F. heita á Føroya Landsstýri um at veita eina serstaka játtan upp á **kr. 100.000,00**, soleiðis at hendan ítróttalæknaskipan kann setast á stovn.

Peningurin, sum játtaður verður, er ætlaður at keypa útgerð fyri, at fáa specialistar innan ítróttaskaðar til Føroya at halda skeið fyri læknum, sum hava áhuga at útbúgva seg innan ítróttaskaðar o. a.

— — — — — — —

**Sbrt. skriv dagf. 29. juni 1985:**

Ítróttasamband Føroya skal við hesum søkja Føroya Landsstýri um eina serstaka játtan uppá:

**kr. 200.000,00.**

Hesin peningur skal nýtast til umskipan (strukturbroyting) av Ítróttasambandi Føroya.

Ítróttasamband Føroya vil í nærmastu framtíð seta seg í samband við Føroya Landsstýri við eini frágreiðing um, hvat peningurin skal nýtast til.

— — — — — — —

**Sbrt. skriv dagf. 29. juni 1985:**

Tá tað hevur vist seg — í størri mun hesi seinastu árini — at okkara ítróttaungdómur hevur verið latin upp í hendurnar á alt yngri og yngri leiðarum, og tá hesir ikki hava havt møguleika at fingið sær kunnleika í trening og leiðslu av hesum ungdómi, skal Ítróttasamband Føroya vegna Ungdóms-og menningardeildina søkja Føroya Landsstýri um eina serstaka játtan uppá:

**kr. 150.000,00.**

Hesin peningur skal so nýtast til eina meira umfatandi og langtíðarætlaða útbúgving av okkara ungdóms- og ítróttarleiðarum.

— — — — — — —

**Sbrt. skriv dagf. 22. juli 1985:**

Vit fara at heita á Føroya landsstýri um at fáa serstaka játtan upp á kr. 100.000,-, soleiðis at ein ítróttalæknaskipan kann setast á stovn undir Ítróttasambandinum. Vit hava erfaringar av nú ígjøgnum árini, at tað er stórur tørvur á eini slíkari skipan, tí tá ið ítróttafólk fáa skaða, vísir tað seg, at tey hava ongan góðan, sum kann taka sær av teirra skaðum og upptrening aftur, soleiðis at tey bliva arbeiðsfør aftur.

Sigast skal frá, at samráðingar hava verið við læknafelagið um henda

spurning, men vísir tað seg, at tað er sera trupult at fáa teir at skilja okkara støðu, tí ætlanin hjá okkum var, at vit gjøgnum teir kundu fáa ávísar læknar at specialisera seg í ítróttaskaðum, tí í dag hava vit ongan slíkan. Vit hava ætlanir um, sum eina skjóta loysn og hjálp, at fáa avtalur við fysioterapeut og zoneterapeut, ein skipan, sum øll okkara grannalond hava, og sum koyrir við góðum úrsliti fyri ítróttafólkið.

Tí verður heitt á tykkum um at fáa hendla umbidna stuðul, solciðis at vit kunnu fara til verka til gagn fyri øll ítróttafeløg og -fólk í Føroyum.

— — — — — — —

**Sbrt. skriv dagf. 22. juli 1985:**

Ítróttasamband Føroya loyvir sær at søkja um serstaka játtan upp á kr. 200.000,-.

Henda stuðul ætla vit at nýta til at umskipa Ítróttasambandið og sersamboudini, tí tað vísir seg, sum støðan er nú, er tað tíðsspursmál, hvussu leingi og hvussu nógv vit kunnu blíva við at leggja á herðarnar á øllum leiðarunum, sum virka innan Ítróttasambandið. Alt arbeiðið, vóni eg sum tykkum kunnugt, verður gjørt ókeypis og í fritíðini. Kanska í staðin fyri at taka sær av ítróttinum burturav og ungdómsarbeiðnum, fer øll tíðin til eisini at royna at skaffa pening til ungdómsarbeiðið. Hetta er ótolandi í longdini. Kvinnur og menn við góðum evnum sum leiðarar gevast, og tað er at harmast um, og tað kemur ikki at bøta um støðuna innan ítróttin. Tí ætla vit at royna at umskipa Ítróttasambandið solciðis, at leiðararnir veruliga taka sær av ítróttinum, kanska aðrir kundu tikið sær av tí peningaliga.

Vit halda so avgjørt, at nú er tíðin komin, at ítróttirin eisini kann koma upp í part innan teir mongu møguleikar, har lærarar og leiðarar verða settir við fastari løn undir fritíðarlógina.

Vónandi skilja tit støðu okkara. Annars eru vit altíð til reiðar at greiða frá ætlanini.

— — — — — — —

**Sbrt. skriv dagf. 22. juli 1985:**

Vit heita á Føroya Landsstýri um at fáa serstaka játtan upp á kr. 150.000,-, sum skal nýtast til at útbúgva ítróttaleiðarar, sum kunnu taka sær av okkara ítróttarungdómi.

Við teirri figgjarætlan, sum vit hava í dag, er eingin møguleiki at geva okkara ítróttaleiðarum, sum alt gerast yngri og yngri, munagóða útbúgving, tí hesir mugu sjálvsagt fáa kunnleika til, hvussu slíkt arbeiði fer fram.

Sum vit skilja á frítíðarlógaruppskotinum hjá landsstýrinum og løgtinginum, kemur ítrótturin ikki at fáa nakrar sømdir innan hetta øki, og tað eru vit ógvuliga harmir um, tí tað skuldi so avgjørt verið her ígjøgnum, at ítróttaungdómurin fekk stuðul.

Tí verður henda umsókn send tykkum, og vónandi skilja tit støðu okkara, at tað er neyðugt at fáa ungar leiðarar, sum kunnu taka sær av okkara ítróttarungdómi.

**FÍGGJARÆTLAN FYRI Í.S.F. - 1986**

| | | |
|---|---|---|
| INNTØKUR: | | |
| Landskassastudningur | kr. | 3.614.000,00 |
| Útvarp Føroya & Sjónvarp Føroya | kr. | 75.000,00 |
| Limagjøld til Í.S.F. | kr. | 85.000,00 |
| Fótbóltssamband Føroya | kr. | 485.000,00 |
| Hondbóltssamband Føroya | kr. | 235.000,00 |
| Róðrarsamband Føroya | kr. | 15.000,00 |
| Flogbóltssamband Føroya | kr. | 208.000,00 |
| Badmintonsamband Føroya | kr. | 0,00 |
| Borðtennissamband Føroya | kr. | 6.000,00 |
| Svimjisamband Føroya | kr. | 45.000,00 |
| Føroya Fimleikasamband | kr. | 0,00 |
| Ítróttasamband fyri Brekað | kr. | 0,00 |
| Judosamband Føroya | kr. | 8.000,00 |
| Ungdóms- og menningardeildin | kr. | 0,00 |
| INNTØKUR TILSAMANS | kr. | 4.776.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| ÚTREIÐSLUR: | | |
| Felagsrakstur | kr. | 932.000,00 |
| Fótbóltssamband Føroya | kr. | 885.000,00 |
| Hondbóltssamband Føroya | kr. | 1.338.000,00 |
| Róðrarsamband Føroya | kr. | 135.000,00 |
| Flogbóltssamband Føroya | kr. | 736.000,00 |
| Badmintonsamband Føroya | kr. | 128.000,00 |
| Borðtennissamband Føroya | kr. | 124.000,00 |
| Svimjisamband Føroya | kr. | 202.000,00 |
| Føroya Fimleikasamband | kr. | 102.000,00 |
| Ítróttasamband Føroya | kr. | 134.000,00 |
| Judosamband Føroya | kr. | 60.000,00 |
| [1]) Ungdóms- og menningardeildin. (Viðm.) | kr. | 0,00 |
| ÚTREIÐSLUR TILSAMANS | kr. | 4.776.000,00 |

[1]) Viðm. Bræv hjálagt — skjal nr. 5.

Roknskapur og skjøl eru til skjals á Landsskrivstovuni.

---

**Viðmerkingar landsstýrisins:**
Uppskot landsstýrisins til studning til ÍSÍ fyri 1986 er 1.800.000 kr.

---

**Ad § 14 - 14953/313368 FØROYA SKÚLASAVN**

Sbrt. skriv dagf. 15. juni 1985:

Nevndin fyri Føroya Skúlasavni hevur á fundi tann 6. juni gjørt av, at nú »Landsmiðstøð fyri undirvísingarambøð« hevur fingið játtan á fíggjarløgtingslógini, eigur Føroya Skúlasavn **ikki** at søkja um studning komandi fíggjarár.

---

**Ad § 14 - 14953/313376 MEGINFELAG FØROYSKRA STUDENTA**

Sbrt. skriv ódagfest:

Í samband við at fíggjarlógin bert er galdandi fyri ¼ ár, vilja vit heita á Føroya Landsstýri um at síggja okkara umsókn fyri fíggjarárið 1985/86 sum verðandi galdandi eisini fyri síðsta kvartal av áðurnevndu fíggjarløgtingslóg.

---

**Ad § 14 - 14953/313384 NORRØNA FELAGIÐ Í FØROYUM**

Sbrt. skriv dagfest 30. juni 1985:

Hervið verður sent uppskot til fíggjarløgtingslóg 1986 viðvíkjandi Norrøna felagnum í Føroyum, rakstrarstað **14953/313384.**

| | | |
|---|---|---|
| Løn til skrivara, hálva tíð, starvsm.sáttm., 12. lønarfl., 6. stig: | kr. | 75.000,- |
| skrivstovuútgerð | kr. | 30.000,- |
| skrivstovurakstur | kr. | 20.000,- |
| annað virksemi | kr. | 35.000,- |
| | kr. | 160.000,- |

Í samband við fíggjaruppskot okkara 1986 verður vist til tey sjónarmið, sum vóru framløgd á fundi við løgmann og Lassa Klein, landsstýrismann, 18. mars 1985, og sum eru tìl skjals í skrivi okkara til løgmann dagf. 17. apríl 1985. Skrivið er hjálagt.

Vit skiltu fundin soleiðis, at landsstýrið er sinnað at veita okkum skrivstovuhøli. Skal umsitingarliga starv okkara røkjast til lítar, er avgjørt neyðugt við skrivara í hálvdagsstarvi. Í tí sambandi verður vist til nevnda skriv okkara um møguliga koordinering millum skrivarastarv okkara og landsskúlafyrisitingina.

Av tí at umsókn okkara er meira umfatandi enn undanfarin ár, eru vit sinnað at halda útreiðslurnar til vanliga rakstur felagsins á sama støði sum í seinastu umsókn okkara, t.e. kr. 35.000,-. Hjálagdur er seinasti roknskapur, grannskoðaður.

— — — — — — —

**Sbrt. skriv dagf. 17. apríl 1985 til Atla Dam, løgmann:**

Vísandi til fundin, sum Bárður Jákupsson og Heðin M. Klein høvdu við løgmann og Lassa Klein, landsstýrismann, 18. mars 1985, skal nevndin í Norrøna Felagnum í Føroyum skoyta uppí fylgjandi:

Miðskeiðis í 1970-árunum kom nýtt lív í Norrøna Felagið í Føroyum við størri felagsvirksemi, enn verið hevði árini undan — bæði úteftir við millumnorrønum samstarvi við hini limafeløgini og norrønu felagsumsitingina, og eisini innanfelags við fyrilestrum, fundarhaldi og øðrum limatiltøkum vetrarhálvuna.

Sum kunnugt kann felagið vísa á ymisk úrslit í starvi sínum higartil.

Ein megintreyt fyri at hetta hevur borið til er, at felagið fekk sær dagligan skrivara (stjóra). Og felagið var so heppið at fáa dugnafólk í hetta starv. Fyrstu árini fekk skrivarin symbolska samsýning upp á nakrar fáar túsund krónur árliga, men seinastu árini hevur hann arbeitt ókeypis, hevur harumframt herbergað skjølum felagsins, goldið skrivstovuútreiðslur, telefon og annað tílíkt.

Roknskapur felagsins fyri 1984, sum sýndi hall upp á kr. 11.644,41. er hjálagdur.

Ein av inspiratiónskeldunum til at birta nýtt lív í Norrøna Felagið í Føroyum var tann, at byggjast skuldi Norðurlanda hús í Tórshavn. Eins og landsstýrinum helst er kunnugt, hevur íslendska systurfelag okkara rúmlig og ókeypis høli í Norrøna Húsinum í Reykjavík, tó at húsið er væl minni enn okkara. Í Álandi, sum hevur sama status sum vit í norrønum samstarvi, hava landsmyndugleikarnir fingið systurfelagi okkara har ókeypis innivist í síni egnu landsumsiting í Självstyrelsesgården.

Norrøna felagið yaskir framvegis at fáa skrivstovuhøli í Norðurlandahúsinum, um hetta á nakran hátt letur seg gera. Men um so er, at hetta av einhvørji orsøk ikki ber til, heita vit vinarliga á landsins myndugleikar um at fáa okkum onnur skrivstovuhøli í býnum. Felagið vónar og væntar, at landsstýrið dugnar okkum á sama hátt, sum gjørt verður í øðrum norðanlondum, vit vanliga bera okkum saman við.

Vit meta tað vera púra órimiligt, at skrivstovuhald felagsins heldur fram sum higartil. Vit vita, at núverandi skrivari okkara hevur ognað sær stóran og breiðan kunnleika um skipað norðurlendskt samstarv yvirhøvur. Vit vita, at broytta skipan Føroya í Norðurlanda ráðnum setur økt krøv til landsumsitingina.Tí loyva vit okkum at mæla landsins myndugleikum til, at teir løna skrivara okkara hálvan dag. Afturfyri er ikki annað rímiligt, at landsstýrið og Norrøna felagið avtala, hvussu skrivari felagsins kann hjálpa landsumsitingini í málum, sum viðvíkja Norðurlanda ráðnum.

Vit meta, at tílík skipan hevði verið stór og kærkomin hjálp fyri norðurlendskt samstarv, fyri Norrøna Felagið og fyri landsins egnu umsiting.

**RAKSTRARROKNSKAPUR FYRI ÁRIÐ 1984:**

**Inntøkur:**

| | | |
|---|---|---|
| Limagjald | kr. | 23.048,00 |
| Føroya Landsstýri | kr. | 30.000,00 |
| Tórshavnar Býráð | kr. | 10.000,00 |
| Svenskur stuðul | kr. | 12.406,95 |
| »Litteraturaktion I« | kr. | 5.500,00 |
| »Litteraturaktion II« | kr. | 12.462,13 |
| Rentur | kr. | 1.681,30 |
| Veitsla | kr. | 15.126,05 |
| Bókasøla | kr. | 76,70 |
| | kr. | 110.301,13 |

**Útreiðslur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Ferðir | kr. | 32.212,17 | | |
| Studningur | kr. | 31.445,08 | | |
| Veitsla | kr. | 22.448,25 | | |
| Skrivstovurakstur | kr. | 17.299,50 | | |
| »Litteraturaktion I« | kr. | 5.994,00 | | |
| Gjald til meginfelagið | kr. | 4.250,00 | | |
| Lýsingar | kr. | 3.938,60 | | |
| Fundarhald | kr. | 1.874,55 | | |
| Kransur til Hjálmar Olafsson | kr. | 1.000,00 | | |
| Skeið fyri ísl. lærarum | kr. | 789,40 | | |
| Upplýsingartilfar | kr. | 617,37 | | |
| Limagjald | kr. | 76,62 | kr. | 121.945,54 |
| | | munur: | kr. | 11.644,41 |

**Fíggjarstøða:**

| | | |
|---|---|---|
| Kassapeningur | | kr. 416,78 |
| Sparikassi | kr. 2.236,34 | |
| Giro | kr. 71,83 | |
| Føroya Banki | kr. 25.513,57 | |
| Sjóvinnubankin | kr. 6.738,49 | kr. 34.560,23 |
| Saldo við ársbyrjan | kr. 46.621,42 | |
| Hall | kr. 11.644,41 | |
| | kr. 34.977,01 | kr. 34.977,01 |

---

**Ad § 14 - 14953/313439 EFTIRÚTBÚGVING AV HANDVERKARUM**

Sbrt. skriv dagf. 5. juli 1985 frá Landsskúlafyrisitingini:

Heitt verður við hesum á Føroya Landsstýri um á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1986 at seta av kr. 600.000,- á rakstrarstað 14953, konto 313439, Eftirútbúgving av Handverkarum; Landsskúlafyrisitingini at ráða yvir. Av hesum eru kr. 300.000,-ætlaðar til skeiðsútreiðslur og kr. 300.000,- sum lutvíst endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku hjá luttakarum, ið eru uppihaldarar.

---

**Ad § 14 - 14953/313455 LANDSFELAG FØROYINGA Í ÚTBÚGVING**

Sbrt. skriv dagf. 29. juni 1985:

Sambært viðløgdu skjølum heitir Landsfelag Føroyinga í Útbúgving (LFÚ) á Føroya Landsstýri og Løgtingsins fíggjarnevnd um í komandi fíggjarári at seta niðanfyristandandi upphæddir av til LFÚ:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Húsaleiga 12 x 4.800 | 57.600 |
| 2. | Ráðgeving 10 x 70 x 52 + 3.000 | 39.400 |
| 3. | SEV, Telefon og Kunngerðir | 41.400 |
| 4. | Reingerð 12 x 700 | 8.400 |
| 5. | Altjóða útbúgvingarkort | 33.000 |
| 6. | Skrivstovuhald — tilfar | 17.200 |
| 7. | Útbúgvingarsavn 70 x 3 x 52 | 10.920 |
| 8. | Bókhald | 5.000 |
| 9. | Íbúðarformidling 70 x 3 x 52 | 10.920 |
| 10. | Arbeiðsbólkar | 8.700 |
| 11. | Millumtjóða samstarv (3 x 5000) | 15.000 |
| | | 247.500 |

ad. 1 Vegna flyting í nýggj og betri hóskandi høli, er leigan farin upp við kr. 1200 um mánaðin.

ad. 3 Telefon ..... 12 x 2.500 = 30.000 kr.
SEV ..... 12 x 450 = 5.400 kr.
Kunngerðir 12 x 500 = 6.000 kr.

ad. 4 Limaskapur í ISTC/FIYTO: 5.000 kr.
Telex: ..... 18.000 kr.
Tilfar og rekvisitiónir: .... 10.000 kr.

ad. 6 Kopiering 5.000 (mask.) + 4.000 (papp.) = 9.000
Tilfar til skrivstovuna 12 x 450 ..... = 5.400
Porto 1000 x 2,80 ..... = 2.800

ad. 11 Luttøka á 3 uttanlanda fundum (3 x 5.000) = 15.000
(t. d. Norrönt Dagsverk)

**Samanburður við fíggjarárið 1985:**

Játtaðar vóru 135.000 kr. fyri níggju mánaðir, svarandi til 180.000 kr. í einum álmanakkaári. Um vit rokna við einum prístalsvøkstri uppá 7%, gevur hetta eina upphædd uppá ..... 192.600 kr.

Tann samlaða rakstrarupphæddin í ár gevur
eina upphædd upp á ..... 247.500 kr.

Orsøkin til hesa hækking á fíggjarætlanini er at finna í tí sera nógv vaksna aktivitetinum innan LFÚ-virksemi hetta seinasta árið.

Vit kunnu t.d. nevna Ráðgevingina, sum leiðbeinir føroyingum í øllum lestrarligum og íbúðarligum viðurskiftum her heima sum uttanlands.

Altjóða útbúgvingarkortið, ella LFÚ-ferðir, sum veruliga fekk fót undir egið borð í 1985, var eitt sera heppið tiltak. Orsøkin til, at LFÚ fór undir hetta tiltak, var, at tað ofta er sera trupult hjá føroyskum ungdómi at fáa fatur á upplýsingum um bíligar ferðamøguleikar kring heimin. Tað eydnaðist okkum at gera fleiri avtalur viðvíkjandi ferðaavsláttri føroyskum ungdómi at fremja, og í løtuni arbeiða vit við at gerast sjálvstøðugur limur í ISTC, (International Students Travel Conference)) og FIYTO (Federation of International Youth Travel Organisations). Higartil hava vit bert verið limir gjøgnum Danmark, men í februar 1986, um alt gongur sum ætlað, hava Føroyar sjálvstøðugan limaskap.

Landsfelag Føroyinga í Útbúgving, LFÚ, hevur merkt, at stórur tørvur er á tilfari, sum lýsir útbúgvingarmøguleikar, umstøður og krøv, sum hava samband við ymiskar útbúgvingar.

Vanligasta tilfarið, ið nýtt verður í slíkum sambandi, er helst danska »erhvervskartotekið«. Hetta savn tykist at vera hóskandi í mongum føri. Ein serligur vansi við hesum savni er tó, at tað bert fevnir um útbúgvingar í Danmark. Í mongum føri eru t. d. somu útbúgvingar í Føroyum sera ólíkar teim tilsvarandi donsku.

LFÚ metir tí, at stórur tørvur er á einum savni, sum fevnir um og lýsir allar útbúgvingar í Føroyum. Felagið hevur í hesum sambandi søkt Jólamerkjagrunnin um pening og fingið hann játtaðan til útgávu av slíkum savni.

Ætlanin er í fyrstu atløgu at leggja savnið til rættis á sama hátt sum danska erhvervskartotekið, t. v. s. eitt leyst ark um hvørja útbúgving. Sum kunnugt, er ríkiligt av plássi í teimum donsku kartotekskøssunum, og ti verður møguligt at hava føroyska savnið standandi í sama kassa. Ætlanin er harumframt at savnið skal kunna havast í einum serligum ordnara at blaða í.

---

**Ad § 14 - 14953/313455 UNGDÓMSFELAG FØROYA**

Sbrt. skriv dagf. 22. juli 1985:

Ungdómsfelag Føroya vil við hesum søkja um 110.000,00 kr. á Løgtingsins fíggjarlóg fyri árið 86/87.

Rakstrarútreiðslur felagsins eru samsvarandi rakstrarætlanini fyri 84/85, tó við eini hækking uppá 5.000,00 kr. fyri príshækkan seinasta árið.

Vit vóna, at umsóknin verður játtað, tá alt virksemi okkara er treytað av hesi fígging.

**Sbrt. skriv dagfest 10. august 1985:**

Í samband við at løgtingsfíggjarlógin 1986 nú verður løgd fram, fer starvsnevnd Tjóðveldisfloksins at heita á Føroya Landsstýri at seta pening av á fíggjarlógini til Føroya ungdómsráð (FUR).

Sum øllum kunnugt er árið 1985 av SÞ lýst at vera »Ár teirra ungu«, og í hesum sambandi varð samtykt á seinasta flokstingi Tjóðveldisfloksins at koma við slíkari áheitan til landsstýrið.

**Viðmerkingar landsstýrisins:**

Uppskot landsstýrisins er at játta 330.000 kr., soleiðis at veitt verður

| | |
|---|---|
| LFÚ | 220.000 kr. |
| UF | 80.000 kr. |
| FUR | 30.000 kr. |
| | 330.000 kr. |

---

## AD § 15 - 15109 FØROYA LANDSBÓKASAVN

Sbrt. skriv dagf. 3. juli 1985:

**Uppskot til fíggjarlóg 1986**

Hjáløgd verða send uppskot Landsbókasavnsins til fíggjarætlan fyri 1986 viðvíkjandi hesum báðum rakstrarstøðunum:

**§ 15 15109 Føroya Landsbókasavn**
**§ 15 15202 Fólkabókasøvn (og skúlabókasøvn)**

Eftir at uppskotið varð skrivað, varð upplýst úr landsstýrinum, at fíggjarnevndin hevur gingið umsókn Landsbókasavnsins um 50.000 kr. sum eykajáttan á konto 103143 á møti. Søkt varð um hesa eykajáttan, ti bókavørður fer í barsilsorlov frá 1. august 1985.

Niðanfyri standandi uppskot til fíggjarætlan hjá Føroya Landsbókasavni verður við hesum sent Føroya Landsstýri við viðmerkingum og neyðturviligum upplýsingum.

## 5109 Føroya Landsbókasavn

| Kontonummar og -navn | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 3/4 ár | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn | 231.497 | 173.6 | 74.5 | 80.0 |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 1.019.540 | 1.054.9[1]) | 956.0 | 2.112.0 |
| 103168 | Løn/sáttmálaløn | 249.238 | 195.3 | 125.7 | 136.0 |
| 103122 | Løn/reingerð | 94.841 | 90.7 | 129.0 | 139.0 |
| 103288 | Løn/onnur | 158.218 | 107.3 | 123.0 | 133.0 |
| 113102 | Ferða- og dagpen. innanl. | 1.773 | 0.9 | 2.0 | 2.0 |
| 113243 | Ferða- og dagpen. uttanl. | 0.000 | 0.0 | 10.0 | 0.0 |
| 133053 | Fólkatrygging | 2.624 | 3.0 | 4.0 | 4.0 |
| 213105 | El, hiti og vask | 144.238 | 163.5 | 211.0 | 185.0 |
| 213505 | Umsiting | 16.653 | 33.8 | 35.0 | 16.0 |
| 213702 | Ognartrygging | 22.953 | 19.5 | 26.0 | 26.0 |
| 223204 | Flutningur | 6.772 | 7.9 | 9.0 | 9.0 |
| 233051 | Innbúgv | 26.915 | 236.2 | 260.0 | 260.0 |
| 233155 | Prentlutir | 5.508 | 13.5 | 18.0 | 18.0 |
| 233259 | Postgjøld | 21.614 | 26.2 | 40.0 | 30.0 |
| 233354 | Telefon og telex | 27.424 | 28.1 | 40.0 | 40.0 |
| 233409 | Leiga av maskinum | 12.567 | 22.5 | 26.0 | 26.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 30.950 | 15.0 | 35.0 | 31.0 |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 405.609 | 360 | 552.0 | 500.0 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 6.950 | 4.1 | 5.8 | 5.8 |
| Tilsamans | | 2.485.884 | 2.556.0 | 3.682.0 | 3.752.8 |
| | | | 50.0 | | |
| | | | 2.606.0 | | |

[1]) + eykajáttan sbr. F. L. j. nr. 323-12

**Viðmerkingar:**

**103048 Løn/tænastumenn**
Landsbókavørðurin verður løntur í 31. lønarlokki. Hevur farloyvi frá 1/10-85 — 1/10-86.

| | |
|---|---|
| Lønin í 3 mánaðir verður: 19.351,17 kr. x 3 | 58.0 |
| 9,5% av 9 x 19.351,17 | 16.5 |
| | 74.5 |

**103143 Løn/starvsfólk**
Roknað er við lønini pr. 1. apríl 1985 við teimum aldursviðbótum, ið koma afturat innan 31. desember 1986 + 1,5% fritíðarløn + eftirlønargjald, sum er 2,55% fyri mánaðirnar jan. - mai og 5,5% fyri juni-desember 1986

**Føst størv:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| a) | 1 fyrsti bókavørður<br>Løn í 3 mánaðir ..... | 18. lønarfl. | 5. st. | 44.1 |
| b) | 1 bókavørður ..... | 20. » | 9. » | 190.9 |
| c) | 1 do ..... | 15. » | 7. » | 168.5 |
| d) | 1 do ..... | 15. » | 3. » | 160.3 |
| e) | 1 do ..... | 15. » | 2. » | 158.3 |
| f) | 1 do ..... | 15. » | 5. » | 0.0 |
| | ½ starv við starvsstaði á Føroya Læraraskúla (sbrt. skriv F. L. j. nr. 373-26). Lønin verður endurgoldin av Læraraskúlanum. | | | |
| g) | 1 hjálparfólk ..... | 15. lønarfl. | 8. st. | 170.5 |
| | Viðkomandi hjálparfólk, Marjun Berg, er á endaløn í 12. lønarflokki, men eigur at verða flutt upp í 15. lønarfl. vegna serligt ábyrgdarøki, serkunnleika og dugnaskap í langari tænastu. Ábyrgd og arbeiði hennara vaksa í stórum í sambandi við økta tilfarskeypið og skráseting-ararbeiðið til bygda- og skúla-bókasøvnini serliga. | | | |
| h) | 1 hjálparfólk ..... | 9. lønarfl. | 14. st. | 158.3 |
| i) | 1 do ..... | 9. » | 14. » | 158.3 |
| j) | 1 do ..... | 12. » | 2. » | 146.0 |
| k) | 1 skrivari ..... | 12. » | 5. »37/41 | 134.0 |
| l) | 1 bókbindari/konservator ..... | 15. » | 1. »21/42 | 78.1 |
| | Normerað, men verður ikki lýst leyst enn. | | | |

**Avloysarar:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| m) | Fyri landsbókavørð<br>9 mánaðir 1/1-86 - 1/10-86 .... | 31. lønarfl. | 1. st. | 149.5 |
| n) | Fyri 1 bókavørð<br>9 mánaðir ..... | 18. » | 1. » | 166.4 |
| o) | Fyri vísindabókavørð<br>6 mánaðir ..... | 15. » | 2. » | 79.5 |
| | | Tilsamans | 1.962.5 | |
| | ÷ endurgjald frá bókasøvnunum ..... | | | 6.5 |
| | | | | 1.956.0 |

**103168 Løn/sáttmálaløn**

Vísindabókavørðurin er løntur eftir sáttmála við donsku Magisterforeningen. Hevur farloyvi frá 1/7-85 - 1/7-86.

| | |
|---|---|
| Lønin í 6 mánaðir verður: 20.650,00 kr. x 6 ..... | 123.9 |
| 1,5% frítíðarløn ..... | 1.8 |
| | 125.7 |

**103222 Løn/reingerð**

| | |
|---|---|
| 2 fólk á 60 t á 62,24 kr. = 7.468,80 kr. um mánaðin ..... | 90.0 |
| Høvuðsreingerð, avloysarar, vindeygavask ..... | 39.0 |
| | 129.0 |

**103288 Løn/onnur**

Vegna orlov hjá starvsfólki hevur verið neyðugt við fleiri avloysarum, enn roknað var við.

| | |
|---|---|
| Tímaløgt fólk til bókabilin ..... | 50.0 |
| Avloysarar og frítíðaravloysarar ..... | 40.0 |
| Húsavørður ..... | 7.0 |
| Urtagarðs- og annað bønarmansarbeiði ..... | 26.0 |
| | 123.0 |

**213105 El, hiti og vask**

| | |
|---|---|
| Streymmýtsla 67.000 kWt. x 1,50 kr. ..... | 100.5 |
| kW gjald ..... | 1.0 |
| Ljósrør v. m. ..... | 6.0 |
| Olja 31.000 litrar á 3,00 kr. ..... | 93.0 |
| Eftirlit við hitaverki og ljósi ..... | 3.0 |
| Vask ..... | 7.5 |
| | 211.0 |

**233051 Innbúgv**

2. stigið av teimum í byggiætlanini nevndu kompaktrcólunum til goymsluna.

| | |
|---|---|
| Fyrra stigið verður goldið við 235.000 kr. í 1985 ..... | 255.0 |
| Annað innbúgv ..... | 5.0 |
| | 260.0 |

**253085 Bókakeyp og innbinding**

Krøvini um størri bókakeyp eru vaksandi. Bara til bókabilin verður neyðugt við eyka bókakeypi fyri minst 35.000 kr, helst av barnabókum. — Prisvøksturin er

stórur. Á føroyskum bókum hevur hann ligið yvir 15% árliga (frá 1983 til 1984 var miðalprísvøksturin á føroyskum bókum yvir 15.7%). Innbindingarprísurin er somuleiðis uppfarin, og neyðugt verður at lata meira innbinda enn higartil, serliga av føroyska tilfarinum. — Uppskotið fyri 1986 fær tí ikki verið lægri enn 552.000 kr., sum er 15% hægri enn í 1985
(í 12 mánaðir) ..... 552.0

---

**Ad § 15 - 15202 FÓLKABÓKASØVN**

Sbrt. skriv dagf. 3. juli 1985:

| Kontonummar og -navn | | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 3/4 ár | Játtan 1985 4/4 ár | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýr. 1986 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 253011 | Eftirlit ..... | 1.383 | 3.000 | 4.000 | 3.000 | 3.000 |
| 253189 | Skúlabókasøvn, nýstovning | | 330.000 | 440.000 | 440.000 | 440.000 |
| 253202 | Rithøvundasamsýning .... | 70.293 | 59.300 | 79.000 | 84.100 | 84.100 |
| 253219 | Bygging av bókasøvnum | 51.386 | 0.000 | 0.000 | 4.750.000 | 2.000.000 |
| 253227 | Bókabiltænasta ..... | 234.941 | 195.000 | 6.000 | 274.000 | 274.000 |
| 373106 | Rakstrarstud., fólkabókas. | 2.454.119 | 2.362.700 | 50.300 | 3.289.100 | 3.289.100 |
| 373114 | do. skúlabókasøvn ... | | 54.000 | 72.000 | 72.000 | 72.000 |
| Nýtt | Talubókagerð ..... | | | | 30.000 | 30.000 |
| | Tilsamans ..... | 2.812.122 | 3.004.000 | 4.005.300 | 8.942.200 | 6.192.200 |

**VIÐMERKINGAR:**

253189 **Skúlabókasøvn, nýstovning**
Í samráð við Landsskúlafyrisitingina er upphæddin óbroytt. Roknað verður við 8 nýstovnaðum skúlabókasøvnum í framhaldsdeildum og 10 við smærri skúlar. Uppskotið er, at játtaðar verða 30.000 kr. til hvørt av teimum 8 og 20.000 kr. til hvørt av teimum 10 til stovnseting og keyp av grundstovni.

253202 **Rithøvundasamsýning**
Upphæddin er sambært § 8 í bókasavnslógini ásett at svara til 2,5% av játtanini til bókasavnsraksturin. — Í 1984/85 vóru 70 rithøvundar, sum skriva á føroyskum,

umboðaðir í bókasøvnunum við 6.588 bókum. Gjaldið pr. bók var 10,95 kr.

253219 **Bygging av bókasøvnum**
Upplýst er um byggiætlanir í Havn fyri 4 mió. kr., í Klaksvík fyri 2 mió. kr. og í Fuglafirði fyri 3,5 mió. kr. — Eftir §§ 6 og 7 í bókasavnslógini letur landið 50% í byggistudningi.

253227 **Bókabiltænasta**
Royndarkoyringin við einum leigaðum bókabili til 19 pláss í Eysturoynni og Streymoynni í 3 mánaðir frá grækarismessu 1965 eydnaðist stak væl og vísti, sum væntað, at tørvurin á tílíkari tænastu er stórur úti í bókasavnslcysu bygdunum og eigur at verða útbygd.

Koyrt verður aftur frá 15/9 1985 til 1/5 1986 og frá umleið 15/9 1986 til 1/5 1987.

| Rakstrarútreiðslurnar 1/1 til 30/4, 15/9 til 31/12 1986: | |
|---|---|
| Leiga av bili í 7,5 mánaðir ..... | 92.300 kr. |
| Km-gjald: 3 kr. pr. koyrdan km ..... | 48.000 - |
| Varmagjald (um náttina og tá bilurin stendur) ... | 6.800 - |
| Løn til bilførara í umleið 1070 t. ..... | 75.000 - |
| Yvirtíð og eykaarbeiði ..... | 25.000 - |
| Frítíðarløn ..... | 9.500 - |
| Tíma- og dagpeningur 1070 t. á 8,00 kr. ..... | 8.500 - |
| Aðrar útreiðslur ..... | 8.900 - |
| Tilsamans | 274.000 kr. |

Ein av bókavørðunum og annað starvsfólk á Landsbókasavninum røkja bókabiltænastuna. Bókakeypið verður somuleiðis um bókakonto Landsbókasavnsins.

373106 **Rakstrarstudningur/fólkabókasøvn**
Yvirlitið niðanfyri er sett upp eftir fíggjarætlanini hjá hvørjum savninum sær. Bókasøvn, ið eisini eru skúlabókasøvn, eru, sum vant, tikin við her. Umframt lógbundna 60% studningin av rakstrarútreiðslunum í tiðarskeiðinum 1/4 - 31/12 1985 er fjórðingurin av 60% av útreiðslunum í tiðarskeiðinum 1/4 1984 - 31/3 1985 orsakað av broytingini í fíggjarárinum.

| | Figgjar-ætlan 1/4 - 31/12 1985 | 60%av út-reiðslunum 1/4 - 31/12 1985 | 1/4 av 60% av útreiðsl-unum 1984/85 | Studning ur til-samans 1986 |
|---|---|---|---|---|
| a. Bókasavnið i Nes kommuu ..... | 40.000 | 24.000 | 5.600 | 29.600 |
| b. Býarbókasavnið..... | 2.888.000 | 1.732.800 | 511.900 | 2.244.700 |
| c. Eiðis bókasavn ..... | 10.000 | 6.000 | | 6.000 |
| d. Fuglafjarðar bókasavn ..... | 362.500 | 217.500 | 41.000 | 258.500 |
| e. Glyvra bókasavn ..... | 78.000 | 46.800 | 11.400 | 58.200 |
| f. Klaksvíkar bókasavn ..... | 386.000 | 231.600 | 73.000 | 304.600 |
| g. Kollafjarðar bókasavn ..... | 66.000 | 39.600 | 10.100 | 49.700 |
| h. Leirvíkar bókasavn ..... | 60.000 | 36.000 | 8.600 | 44.600 |
| i. Sandavágs-Miðvágs bókasavn .... | 48.400 | 29.000 | 5.500 | 34.500 |
| j. Stranda bókasavn ..... | 100.000 | 60.000 | | 60.000 |
| k. Sunda bókasavn ..... | 12.000 | 7.200 | 1.800 | 9.000 |
| l. Sørvágs bókasavn ..... | 35.10 | 21.100 | 5.000 | 26.100 |
| m. Tvøroyrar bókasavn ..... | 78.500 | 47.200 | 12.400 | 59.600 |
| n. Vágs bókasavn ..... | 75.000 | 45.000 | 14.500 | 59.500 |
| o. Vestmanna bókasavn ..... | 60.000 | 36.000 | 8.500 | 44.500 |
| Tilsamans ..... | 4.299.500 | 2.579.800 | 709.300 | 3.289.100 |

c. Nýliga endurstovnað

j. Nýstovnað

373114 **Rakstrarstudningur, skúlabókasøvn**

Roknað verður við somu upphædd sum fyri alt árið 1985. Heimildini viðvíkjandi verður vist til viðmerkingina til § 15. 15202/373106 í figgjar-løgtingslógini fyri 1985: **Rakstrarstudningur verður eisini at galda skúlabókasøvn.**

Endaligar studningsreglur fyri skúlabókasøvn verða settar í endurskoðaðu bókasavnslógini, sum væntandi kemur í gildi í 1986.

Nýtt kontonr. **Talubókagerð**

Sambært skriv frá 25/6 1985 til landsstýrið verður upp at seta av 30.000 kr. í 1986 til gerð av talu bókum (ljóðbókum) til blind og onnur, sum ikki fáa lisið. Talubókagerðin eigur at verða fyriskipað

av einum talubókagrunni og bondini lænt út gjøgnum bókasøvnini. Frumbondini (master-bondini) eiga at vera í Landsbókasavnsins varðveitslu.

Bøkur við punktskrift á føroyskum eiga somuleiðis at verða fingnar til vega.

— — — — — —

**Aðrar viðmerkingar:**

Víst verður til uppskot landsbókasavnsins um serligan **stuðul til føroyska bókaútgávu** (sí Fylgiskjøl til fíggjarløgtingslóg 1. apríl - 31. desember 1985, bls. 153-154). Verða t.d. settar 500.000 kr. av, kann studningurin til bókasavnsraksturin lækkast við umleið tilsvarandi upphædd.

**Viðmerkingar landsstýrisins:**

2 mió. kr. verða veittar til byggigrunn.

— — — — — —

---

**Ad § 15 - 15304 FØROYA LANDSSKJALASAVN**

Sbrt. skriv dagf. 5. juli 1985:

Við hesum senda vit uppskot til fíggjarlóg fyri Føroya Landsskjalasavn, rakstrarstað 15304.

Vit hava lagt við nøkur skjøl, sum siga eitt sindur um tað virksemið, sum fer fram á Landsskjalasavninum, men tað er neyvan neyðugt at leggja hesi skjøl við í fylgiskjølini til fíggjarlógina.

| Kontonummar og navn Føroya Landsskjalasavn 15304 | Rokn-skapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4 - 31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýr-isins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 103143 Løn - starvsfólk | 549.1 | 569.2 | 537.0 | 580.0 |
| 103168 Løn - sáttmálaløn | 280.9 | 176.0 | 511.0 | 361.0 |
| 103296 Løn - tímaløn | | | 120.0 | 120.0 |
| 103405 Løn - úrtíðarløn | | | 3.0 | 3.0 |
| 102151 Løn - avloysarar | | | 35.0 | 35.0 |
| 103288 Løn - onnur | | | 30.0 | 30.0 |
| 113202 Ferða- og dagp. innanl. | | 7.5 | 5.0 | 5.0 |
| 213105 El, hiti og vask | 59.0 | 52.5 | 60.0 | 60.0 |
| 213408 Umvælingar | 189.0 | 48.8 | 20.0 | 20.0 |
| 213702 Ognartrygging | | 7.5 | 10.0 | 10.0 |
| 213806 Leignútreiðslur | 125.5 | 82.9 | 130.0 | 130.0 |
| 223404 Flutningur | | 37.5 | 37.5 | 37.5 |
| 233051 Innbúgv | 30.3 | 101.2 | 100.0 | 100.0 |
| 233155 Prentlutir | 3.8 | 15.0 | 3.8 | 3.8 |
| 233259 Postgjøld | 2.4 | 3.8 | 2.0 | 2.0 |
| 233354 Telefon | 33.0 | 15.0 | 15.0 | 15,0 |
| 233409 Leiga | | 27.0 | 30.0 | 30.0 |
| 233561 Aðrar skrivstovuútr. | 41.0 | 22.0 | 20.0 | 20,0 |
| 253085 Bókakeyp og -innbind. | 6.4 | 3.8 | 3.0 | 3.0 |
| 253505 Konservering | 19.3 | 37.5 | 50.0 | 42.0 |
| 253521 Flyting, skjalasavn | 14.6 | 3.8 | 5.0 | 5.0 |
| 253521 Pakkitilfar, arkivesk. | 0.2 | 11.2 | 5.0 | 5.0 |
| 253546 Útgáva, keldur | 13.9 | 37.5 | 50.0 | 50.0 |
| 253554 Skráseting | 2.0 | 7.5 | 2.0 | 2.0 |
| 253562 Vísindal. kanningar | 1.8 | 18.8 | 2.0 | 2.0 |
| | | | 1.786.3 | 1.689.3 |

**ad konto 103143 Løn - starvsfólk.**

Tey tvey starvsfólkini í 9. lønarflokki eiga eftir sáttmálanum at vera í minsta lagi í 12. lønarflokki. Av tí at hetta mál enn ikki er avgreitt endaliga frá landsstýrinum, er **ikki** tikin hædd fyri uppflyting.

Orsøkin til lækkingina er, at verandi ½ vísindarliga hjálparstarvið er flutt til konto 103168 Løn - sáttmálaløn.

**ad konto 103168 Løn - sáttmálalønt.**
Tað játtaða ½ leysa starvið verður sett umleið 1. august. Søkt verður aftur í ár um nýnormering til savnsvørð. Søvnini eru tey seinastu fimm árini vaksin í nøgd til tað dupulta — t.v.s. umleið 5000 hillametur. Meginparturin av tí elsta tilfarinum er hvørki skipaður ella skrásettur. Samstundis er talið av fyrispurningum frá inn- og útlandi fleirfaldað, eins og krøvini til savnsins tænastuvirksemi mótvegis ríkis- og landsstovnum eru heilt nógv økt. Hetta stendst sjálvandi av omanfyri nevnda vøkstri í savninum síðan 1980. Tað er tí stórur tørvur á einum søguligt útbúnum fólki afturat til søguligt skrásetingar- og rannsóknararbeiði. Víst verður annars til fundir við landsstýrismannin.

**ad konto 233015 Innbúgv.**
Neyðugt er at mikrofilma alt skjalasavnstilfarið millum ár 1600 og 1850. Ætlan okkara er at gera, sum øll onnur fjóðskjalasøvn gera í dag, at goyma eitt mikrofiche-sett av øllum tí elsta tilfarinum á øðrum staði enn tað originala tilfarið liggur. Hetta verður gjørt av trygdarorsøkum.

**ad konto 253546 Útgáva av søguligum keldum.**
Mælt verður til somu játtan, hóast játtanin í 84 ikki varð nýtt fultút. At geva út og almannakunngera tað søguliga keldutilfar, sum finst á Landsskjalasavninum, má verða ein aðaluppgáva. Hetta arbeiðið er grundarlag undir allari søguligari vísind í Føroyum. Arbeiðið er nú við at koma í gongd av álvara, og fyrsta ritið kemur til heystar og annað í 1986. Ein niðurskurður her kemur at føra til, at hetta útgávustarv støðgar, og tað vildi verið mikið spell.

**Uppskot til grein 15 - 323150. — Grunnur til nýtt Landsskjalasavn.**
Skotið verður upp, at stovnaður verður grunnur »Nýtt Landsskjalasavn í grunn«, hóskandi undir grein 15, konto 323150. Skotið verður upp at byrja við at játta 500.000 kr.

Sum landsstýrinum kunnugt, so átti Landsskjalasavnið helvtina av tí nú strikaða grunninum »Nýtt Landsbóka- og Landsskjalasavn í grunn«, sum var uppá 4 mió. kr. Hesin grunnur varð allur nýttur til nýggja Landsbókasavnið, og fekk Landsskjalasavnið sostatt ongantíð pening sín aftur. Mælt verður eisini til at játta 50.000 kr. til skitsuprojekt til nýtt Landsskjalasavn undir somu konto.

Víst verður annars til brævaskifti millum Landsskjalasavnið og landsstýrið tey seinastu fimm árini og til fundir við bæði fyrrverandi og núverandi landsstýrismenn í mentamálum.

**Viðmerkingar landsstýrisins:** Savnsvørður verður ikki játtaður.

## Ad § 15 - 15406 FØROYA FORNMINNISSAVN

Sbrt. skriv dagf. 1. juli 1985:

Hjálagt verður sent landsstýrinum uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1986, viðvíkjandi rakstrarstaði nr. 15406, Føroya Fornminnissavn og rakstrarstað **nr. 15508**, Bygdasøvn v. m.

| konto nr. | | Rokn-skapnr 1984/85 | Játtan 1.4-31.12.85 75% | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýr-isins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 103048 | Løn/tænastumenn ..... | 97.422,12 | 75.4 | 97.9 | 106.6 |
| 103143 | Løn/starvsfólk ..... | 859.222,78 | 709.1 | 1.309.4 | 1.101.9 |
| 103168 | Løn/sáttmálaløgt ..... | 987.713,37 | 695.4 | 995.5 | 1.075.0 |
| 103222 | Løn/reingerð ..... | 61.142,67 | 116.4 | 155.2 | 168.0 |
| 103288 | Løn/onnur..... | 467.366,57 | 866.0 | 1.343.0 | 1.394.3 |
| 113202 | Ferða- og dagp., innanlands | 101.949,85 | 95.1 | 118.5 | 100.0 |
| 203905 | Ymisk kommunikatión .... | 31.794,69 | 26.5 | 33.0 | 33.0 |
| 213105 | El, hiti og vask ..... | 70.279,81 | 81.6 | 108.8 | 25.0 |
| 213408 | Umvælingar v. m. ..... | 41.700,00 | 33.5 | 41.7 | 35.0 |
| 213702 | Ognartrygging ..... | 17.415,00 | 19.0 | 23.7 | 23.7 |
| 213806 | Leigutreiðslur ..... | 68.636,64 | 60.4 | 80.5 | 80.5 |
| 233051 | Innbúgv..... | 70.061,63 | 262.5 | 210.0 | 180.0 |
| 233259 | Postgjald ..... | 8.017,00 | 7.5 | 10.0 | 10.0 |
| 233354 | Telefon og telex ..... | 23.498,82 | 39.3 | 52.4 | 52.4 |
| 233409 | Leiga av maskinum ..... | 0,00 | 25.5 | 34.0 | 34.0 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 30.838,01 | 24.5 | 30.5 | 30.5 |
| 253085 | Bókakeyp og -innbinding ... | 20.120,26 | 17.3 | 18.5 | 18.5 |
| 253115 | Útgrevstur ..... | 36.179,39 | 45.0 | 60.0 | 60.0 |
| 253268 | Umsiting av fornminnum ... | 186.285,63 | 134.4 | 167.5 | 167.5 |
| 253306 | Amboð ..... | 18.235,35 | 35.6 | 20.9 | 20.9 |
| 253314 | Aðrar umsitingarútreiðslur | 104.022,06 | 213.0 | 184.4 | 150.0 |
| 253322 | Etnologiskar kanningar .... | 20.415,88 | 20.0 | 27.4 | 27.4 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 73.695,55 | 60.0 | 30.0 | 30.0 |
| 253928 | Tænastuakfør, rakstur v. m. | 0,00 | 15.0 | 20.0 | 20.0 |
| | | 3.396.013,09 | 3.678.0 | 5.172.8 | 4.944.2 |

**Ad § 15 - 15508 Bygdasøvn.**

Sbrt. skriv dagf. 1. juli 1985:

| Kt. nr. | | Rokn-skapur 1984/85 | Játtan 1/4-31/12 1985 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýr-isins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 103509 | Samsýningar ..... | 15.000,00 | 12.0 | 15.0 | 15.0 |
| 323293 | Í grunn til gl. prestah. á Nesi | 100.000,00 | 38.0 | 50.0 | 50.0 |
| 373106 | Rakstrartilskot ..... | 190.000,00 | 360.0 | 310.0 | 310.0 |
| 373504 | Fornminnisnevnd ..... | 13.512,43 | 15.0 | 15.0 | 15.0 |
| 373905 | Umvælingarstudn. í grunn ... | 109.999,48 | 90.0 | 125.0 | 125.0 |
| | | 428.511,91 | 515.0 | 515.0 | 515.0 |

**ad kt. nr. 373106: Rakstrartilskot.**

Lógarbundni studningurin til góðkend bygdasøvn verður væntandi:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Miðvágs Bygdasavn ..... | 4.891,03 | 16.0 | 16.0 |
| Norðoya Fornminnissavn ..... | 177.582,00 | 267.0 | 200.0 |
| Vestmanna Bygdarsavn ..... | 7.526,97 | 16.0 | 24.0 |
| Skopunar Bygdarsavn ..... | - | 56.8 | 0 |
| Eiðis Bygdasavn ..... | - | 105.0 | 50.0 |
| Nýstovnan av bygdasøvnum ..... | - | 20.0 | 20.0 |
| | 190.000,00 | 480.0 | 310.0 |

Viðmerkt skal verða, at játtanin 1984/85 var ov tepur, partvís vegna størri virksemi, enn mett á Norðoya Fornminnissavni, og partvís vegna stovnan av Vestmanna Bygdarsavni. Meirútreiðslan er flutt til 1985.

**Skjal II.**

| | Skipað størv 31/3-1985 | | Løn 1/4-1985 | | Nýnormeringar | | Játtan 84/85 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | sett | leys | lønfl. | kr. | | | |
| **Tænastum. likn.** | | | | | | | |
| savnslærari | 1/2 | - | 27.4 | 97.887,00 | | | 94.5 |
| **Sáttmálaløn** | | | | | | | |
| landsanktikvarut | 1 | - | 15 | 300.001,09 | | | |
| Savnvørður | 1 | - | 13 | 268.349,11 | | | |
| Savnvørður | 1 | - | 5 | 188.486,53 | | | |
| arkitektur | 1 | - | 8 | 238.624,38 | | | |
| | | | | | | | 895.8 |
| **Starvsfólk** | | | | | | | |
| skrivari | 30/42 | - | 12.7 | 108.845,36 | | | |
| assistentur | 1 | - | 9.10 | 146.525,40 | | | |
| skrivstovuass. | 12/42 | - | 7.7 | 37.950,45 | | | |
| umsj.maður | - | - | 9.5 | | 136.732,68 | (1) | |
| konservator | 1 | - | 15.7 | 164.137,68 | | | |
| savnshjálpari | 1 | - | 3.12 | 166.105,77 | | | |
| savnshjálpari | 1 | - | 3.10 | 162.198,32 | | | |
| savnshjálpari | - | 1 | 3.8 | 158.290,37 | | | |
| savnshjálpari | - | - | 3.5 | | 76.214,22 | (½) | |
| fotografur | - | - | 3.5 | | 152.428,44 | (1) | |
| | | | | | | | 845.7 |

**Viðmerkingar til skjal II**

Hesar nýnormeringar eru skotnar upp:

1. Umsjónarmaður í Hoyvík
2. ½ savnshjálpari
3. fotografur

ad 1. Við yvirtøkuni av Hoyvík hevur Fornminnissavnið fingið ábyrgdina av bygningunum og stóru almennu økjunum har. Hesi krevja dagliga røkt, og er tað tí neyðugt, at eitt fólk burturav tekur sær av hesum.

ad 2. Seinastu árini hevur savnið av 103288, løn onnur, lønt einum hálvum fólki at taka sær av klædna- og tekstilsavninum. Hópurin av nýinn-

savnaðum klædnagripum er í hesum árum komið til savnið, og túsundtal er skrásett og avfotograferað kring landið. Klædna- og tekstilsavnið er við at koma væl uppundan, men enn er langt á mál. Áhugin er bæði í Føroyum og uttanlands so stórur sum ongantíð, og tað er tí sera umráðandi, at hildið verður áfram við hesum arbeiði. Tað fólk, sum hevur røkt hetta arbeiðið fyri tímaløn, er vorðið alsamt kønari innan økið, og verður tað ein stórur missur, um savnið ikki fær fulla nyttu av teimum íløgum, sum eru gjørdar. Skotið verður tí upp, at hetta fólk kemur í fast hálvt starv sum savnshjálpari. Verður nýnormeringin játtað, kann kt. nr. 103288, løn onnur, verða lækkað við kr. 76.214,22, sum ætlaðar eru hesum endamáli.

ad 3. Myndasavn savnsins er tey seinastu árini ikki bert økt munandi, men eisini vorðið meiri atkomiligt hjá fólki. Hetta hevur ført við sær, at ein savnshjálpari má nýta stívliga helvtina av arbeiðstíð síni til at fara um myndasavnið og til at hjálpa fólki at leita fram myndir. Áhugin fyri gomlum myndum er alsamt í øking, bæði millum fólk í bókmenta- og vísundaligum sambandi. Tað arbeiðið, sum lagt verður í myndasavnið, verður tó stórliga tarnað av, at fotografur ikki er fast knýttur at savninum, tí ov trupult er at fáa gjørt tað neyðuga myrkakamararbeiðið og við leysari hjálp fáar tímar um vikuna hevur verið ógjørligt at fáa nóg kvalifiserað fólk, sum eru sinnað at røkja bæði myrkakamararbeiði og savnið við gomlum plátum og negativum við tí hugi og innliti, sum hetta stóra virðisnikla gamla savn hevur uppiborið — fleiri myndir eru, sum eru tiknar beint eftir, at fotografering varð uppfunnin í 1852.

Skotið verður tí upp, at fotografur verður settur í fast starv. Verður nýnormeringin játtað, kann kt. nr. 103288, løn onnur, verða lækkað við kr. 152.428,44, sum ætlaðar eru hesum endamáli.

**Kt. 103288, løn onnur. (Leys hjálp og tímalønt):** **Skjal 11 b**

| | | Játtan 1.4. - 31.12.85 | Uppskot 1986 | |
|---|---|---|---|---|
| 1. Fyrisiting | fríðargjøld, 9,5% | 37.5 | 82.2 | |
| | at ráða yvir, 575 t. | 25.9 | 38.5 | |
| 2. Fornminnaumsjón | røkt, 100 t | 4.9 | 6.7 | |
| | skráseting, 1000 t. | 46.8 | 67.0 | |
| 3. Dúvugarðar | røkt, 100 t. | 9.2 | 13.4 | |
| Skansin | røkt, 500 t. | 22.7 | 33.3 | |
| 4. Konservering | arbeiðshjálp, 450 t. | 20.0 | 30.1 | |
| 5. Myndasavn | fotoarbeiði, 1040 t. | 24.3 | 72.9 | sí skjal II |
| 6. Fornfrøði | eftirviðgerð, 3 mðr. | 30.7 | 46.8 | |
| | ymisk arbeiði, 350 t. | 15.7 | 23.4 | |
| | rannS. arbeiðshj., 2625 t. | 118.0 | 175.6 | |
| | leiðsla, 6 mðr. | 61.5 | 93.6 | |
| | arbeiðshjálp, 7000 t. | 314.7 | 468.2 | |
| 7. Fólkalívsdeild | skráseting, 580 t. | 26.0 | 40.7 | |
| | klædnarannsókn, 800 t. | 43.0 | 56.0 | sí skjal II |
| 8. Upplýsing | vaktarhald, 1000 t. | 47.4 | 70.1 | |
| | serframsýning, 350 t. | 17.7 | 24.5 | |
| | | 866.0 | 1.343.0 | |

**Viðmerkingar:**

Býtið millum arbeiðsøkini kann verða ávirkað av seinni broytingum í arbeiðsætlanini.

Uppskotið er í tíðarbrúki sett ájavnt játtanina fyri 1.4 - 31.12.1985. Tó hevur verið neyðugt at hækka fritíðargjøldini munandi, eins og tíðarbrúkið til fotoarbeiði er munandi økt í uppskotinum. Verða uppskotnu nýnormeringarnar í skjali II játtaðar, kann henda scinra upphæddin, kr. 72.900 eins og upphæddin kr. 56.000 til klædnarannsókn, verða tiknar burtur úr uppskotinum.

Mest útreiðslukrevjandi arbeiðsøkið er fornfrøðigu rannsóknirnar, sum allar verða trokaðar inn á savnið í sambandi við ymsar útbyggingar. Stóri

vøksturin í 1985 stavar eisini frá, at savnið sjálvt noyddist at yvirtaka liðuggerðina av einum stórum arbeiði, sum annars var partur av vegaarbeiði í Leirvík. Í uppskotinum fyri 1986 verður, umframt eftirviðgerð av gjørdum ranusóknum og smærri uppgávum, roknað við eini rannsókn, sum savnsvørðurin í fornfrøði leiðir, helst í Sandavági, men Eiði og Klaksvík liggja eisini og bíða, og eini størri rannsókn, har fakligi leiðarin má fáast uttanifrá. Her verður mest hugsað um uppafturtøku av rannsóknini í nýggja kirkjugarðinum á Sandi, tí tað tøka gravplássið verður skjótt uppi.

**Viðmerkingar annars:**

Allar konti annars eru, har tað er gjørligt, settar til somu upphædd sum figgjarárið 1984/85.

ad. kt. nr. 103288. Uppskotið er sett til somu upphædd sum figgjarárið 1985/86 við tí fyrivarni, at ilt er at meta um reingerðartørvin í nýggju hølum savnsins.

ad. kt. nr. 113202. Uppskotið er sett til somu upphædd sum figgjarárið 1984/85.

ad. kt. nr. 203905. Uppskotið er sett til somu uppbædd sum figgjarárið 1984/85.

ad. kt. nr. 213105. Uppskotið er sett til somu upphædd sum figgjarárið 1985/86 við tí óvissu í huga, sum stendst av nýggjum hølum.

ad. kt. nr. 213408. Uppskotið er sett til somu upphædd sum figgjarárið 1984/85.

ad. kt. nr. 213702. Uppskotið er sett til somu upphædd sum figgjarárið 1984/85.

ad. kt. nr. 213806. Uppskotið er sett til somu upphædd sum figgjarárið 1985/86.

ad. kt. nr. 233051. Í figgjarárinum 1985/86 skeyt savnið upp at seta av eyka kr. 280.000 til nýíløgur í skrivstovu-, konserverings- og fotolaboratoriuútgerð. Av hesum vórðu kr. 90.000 við umrokning av figgjarárinum útsettar til

1986. Í langtíðarætlanini hevði savnið roknað við eyka kr. 50.000 til nýíløgur.

Uppskotið er sostatt grundað á

| | |
|---|---|
| vanligar útreiðslur (1984/85 upphædd) | kr. 70.000 |
| íløgur útsettar til 1986 | kr. 90.000 |
| íløgur ætlaðar í 1986 | kr. 50.000 |

ad. kt. nr. 233051. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1985/86.

ad. kt. nr. 233354. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1985/86 og er í samsvar við ta útbygging av telefonskipanini, sum er farin fram.

ad. kt. nr. 233409. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1985/86.

ad. kt. nr. 233561. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1984/85.

ad. kt. nr. 253085. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1984/85.

ad. kt. nr. 253115. Sum gjørt varð vart við í uppskotinum til fíggjarárið 1985/86, hevur játtanin seinru árini verið alt ov tepur av tí økta rannsóknarvirksemi, savnið hevur verið noytt at átaka sær og við øktum krøvum til arbeiðsumstøðurnar, arbeiðsskúrar m. a. Uppskotið er tí sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1985/86.

ad. kt. nr. 253268. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1984/85.

ad. kt. nr. 253306. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1984/85.

ad. kt. nr. 253314. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1985/86, undantikið eykajáttan kr. 100.000. Kontoin fevnir um

| | | |
|---|---|---|
| 3 | Skansin, røkt og vaktarhald | kr. 92.400 |
| 4 | Konserverings- og pakkitilfar | kr. 40.000 |
| | Konservering uttanlands | kr. 40.000 |
| 5 | Film, fotopappír, kemikaliur v. m. | kr. 22.000 |

ad. kt. nr. 253322. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1985/86.

ad. kt. nr. 253903. Uppskotið er lækkað til kr. 30.000.

ad. kt. nr. 253928. Uppskotið er sett til somu upphædd sum fíggjarárið 1985/86.

Tað hevur tíverri ikki eydnast stovninum fult út at fylgja leiðbeining landsstýrisins uttan at skerja virksemi sítt álvarsliga, men tað er hóast alt eydnast stovninum at lækka aðrar konti enn lønarkonti munandi í mun til heilársjáttanina fíggjarárið 1985/86. Viðvíkjandi lønarkonti hevur stovnurin endurtikið uppskot sítt um ávísar nýnormeringar, sum stovnurin metir neyðugar fyri avvarðandi arbeiðsuppgávur. Í sambandi við fíggjarlógaruppskot sum heild metir stovnurin tað sum fremstu uppgávu sína at gera vart við tær útreiðslur, sum stovnurin metir, tær upgávur føra við sær, ið lagdar eru á hann.

— — — — —

**Viðmerkingar landsstýrisins:**

ad. kt. nr. 103143. Starvsfólk: 1 fotografur ikki játtaður.
½ savnshjálpari, sum hevur arbeitt sum leys hjálp, játtaður.

1 umsjónarmaður ikki játtaður í fast starv; men løn til 1 umsjónarmann, at arbeiða fyri fyrst í 1986 sett av á konto 103288 Løn/onnur.

**Ad § 15 - 15551 Fiskirannsóknarstovan.**

Sbrt. skriv dagf. 1. juli 1985:

**Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1986:**

| Rakstrarstað | | Roknskapur 1/4 - 85 - 31/12 - 85 | Játtan 1/4 - 31/12 1985 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 73057 | Endurgjald ríkið ..... | ÷ 729 | : 604 | ÷ 925 | ÷ 925 |
| 103143 | Løn starvsfólk ..... | 378 | 383 | 560 | 605 |
| 103168 | Løn sáttmálaløgt ..... | 2.051 | 1.800 | 2.700 | 2.916 |
| 103288 | Løn onnur ..... | 32 | 34 | 45 | 49 |
| 113202 | Ferða- og dagpeningur ... | 26 | 56 | 80 | 26 |
| 213806 | Leiguútreiðslur ..... | 82 | 90 | 150 | 150 |
| 233051 | Innbúgv ..... | 39 | 30 | 45 | 40 |
| 233155 | Prentlutir ..... | 12 | 23 | 35 | 15 |
| 233259 | Postgjøld ..... | 8 | 7 | 12 | 10 |
| 233354 | Telefon ..... | 49 | 45 | 70 | 50 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 28 | 26 | 40 | 30 |
| 253306 | Amboð ..... | 161 | 139 | 200 | 165 |
| 253339 | Leiga av førum o. a. ..... | 288 | 225 | 330 | 300 |
| 253363 | M/s Magnus Heinason ... | 7.200 | 6.964 | 10.775 | 10.000 |
| 253903 | Aðrar útreiðslur ..... | 20 | 30 | 45 | 45 |
| | | 9.645 | 9.248 | 14.162 | 13.476 |

**Viðmerkingar:**

**Konto 253363 M/s Magnus Heinason.**

Roknskapurin fyri Magnus Heinason er við fyrivarni, tí hann er hjá grannskoðara; víst verður til rakstrarætlan.

Roknskapurin fyri Fiskirannsóknarstovuna er ikki bókaður hjá Føroya Gjaldstovu.

**Bygging av Fiskirannsóknarstovu.**

Vegna samtykt um at byggja Fiskirannsóknarstovu søkja vit um kr. 5.000.000,00 á komandi fíggjarlóg til byggingina. (í gruun)

**Rakstrarætlan fyri M/s Magnus Heinasou.**

**Útreiðslur:**

| | |
|---|---|
| Hýrur | 4.300 |
| Brenniolja | 3.600 |
| Fiskireiðskapur | 1.300 |
| Keyp — elektronisk tól | 800 |
| Viðlíkahald — skip | 2.000 |
| Viðlíkahald — maskina | 400 |
| Viðlíkahald — spøl | 200 |
| Viðlíkahald — elektronisk tól | 160 |
| Trygging | 1.000 |
| Havna- og loðsgjøld | 20 |
| Proviantur o. a. | 450 |
| Skipstelefon o. a. | 35 |
| Deccaleiga | 20 |
| Skrivstovulutir & tlf. | 60 |
| Ferðaútreiðslur | 30 |
| | 14.375 |

**Inntøkur:**

| | | |
|---|---|---|
| Søla av fiski incl studning | 3.600 | |
| Munur | 10.775 | |
| | 14.375 | 14.375 |
| Rakstrarískoyti frá Føroya Landsstýri 1986 | | 10.775 |

**Ad § 15 - 15551 Fiskirannsóknarstovan.**

Sbrt skriv dagf. 18. januar 1985 viðvikjandi einum bygningi á Debesartrøð til Fiskirannsóknarstovuna og Vaktar- og Bjargingartænastuna:

Fráfarna landsstýrið viðtók í prinsippinum á landsstýrisfundi 11. okt. 1984 at byggja ein bygning á Debesartrøð til Fiskirannsóknarstovuna og Vaktar- og Bjargingartænastuna, og at peningur skuldi setast av til hetta endamál á komandi figgjarlóg.

Fiskirannsóknarstovan hevur í løtuni heilt ótolandi hølisviðurskifti, og tað er okkara vón, at nýggja landsstýrið vil lata játtanina, ið er skotin upp, verða standandi, so farast kann undir projektering av húsunum í fyrru helvt av 1985 og bygging í seinnu helvt.

Heitt verður við hesum á landsstýrið um at fáa ein fund um hetta mál, helst á Fiskirannsóknarstovuni, so skjótt sum tilber.

**Ad § 15 - 15703 Føroya Náttúrugripasavn.**

Sbrt. skriv dagf. 1. juli 1985:

Vit senda við hesum fíggjarlógaruppskot fyri 1986.
Vit hava viðmerkingar til tríggjar konti, sum er hjálagt.

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4-31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 103143 Løn — starvsfólk ..... | 437 | 424 | 553 | 597 |
| 103168 Løn — sáttmálalønt ..... | 296 | 210 | 395 | 427 |
| 103222 Løn — reingerð ..... | 78 | 68 | 82 | 89 |
| 103288 Løn — onnur ..... | 232 | 128 | 180 | 194 |
| 113202 Ferða- og dagpen. innanl. | 12 | 11 | 12 | 12 |
| 203308 Lýsingar ..... | 1 | 2 | 1,5 | 1,5 |
| 213105 El, hiti og vask ..... | 115 | 105 | 125 | 125 |
| 213503 Umsiting ..... | 81 | 142 | 100 | 80 |
| 231702 Ognartrygging ..... | 10 | 10 | 10,5 | 10,5 |
| 213806 Leiguútreiðslur ..... | 13 | 14 | 19 | 19 |
| 233051 Innbúgv..... | 21 | 21 | 15 | 15 |
| 233155 Prentlutir..... | 4 | 9 | 8 | 8 |
| 233259 Postgjald ..... | 6 | 8 | 6 | 6 |
| 233354 Telefon og telex ..... | 37 | 20 | 22 | 22 |
| 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur | 7 | 6 | 6 | 6 |
| 253085 Bókakeyp ..... | 9 | 8 | 9 | 9 |
| 253306 Amboð ..... | 28 | 23 | 25 | 25 |
| 253396 Kanningar og -savn ..... | 80 | 67 | 85 | 75 |
| 253903 Aðrar útreiðslur..... | 2 | 1 | 12 | 12 |
| | | | 1.666 | 1.733 |

**Viðmerkingar til fíggjarløgtingslóg 1986.**

**Føroya Náttúrugripasavn. Rakstrarstaður 15703.**

Tá Jóannes Rasmussen 1. oktober legði frá sær starvið sum statsgeologur hjá DGU og leiðari av Føroya Náttúrugripasavni, varð hann biðin um framvegis at røkja Jarðfrøðisavnið og vera ráðgevi landsstýrisins í jarðfrøðiligum spurningum, til annar jarðfrøðingur við hóskandi útbúgving var tøkur.

Jóannes Rasmussen hevur í skrivi til Føroya landsstýri dagfest 29/4-85

sagt frá, at hann fegin vil leggja arbeiðið frá sær í várhálvuni 1986, tí hann heldur, at tá skuldi annar jarðfrøðingur kunnað verið tøkur.

Vit skulu við hesum biðja um, at sett verður eitt starv sum jarðfrøðingur við Føroya Náttúrugripasavn.

Viðkomandi jarðfrøðingur skal hava umsjón við jarðfrøðideildini við Føroya Náttúrugripasavn, røkja arkivið, verða almennur ráðgevi landsstýrisins í jarðfrøðiligum spurningum og geva undirvísing í jarðfrøði.

Um vit rokna við, at jarðfrøðingurin verður settur 1. juni 1986, so verða 7 mánaðarlønir at gjalda, umleið 115.000 kr. Samstundis fellur samsýningin til Jóannes Rasmussen — kr. 5.000 um mánaðin burtur. Eykaútreiðslan verður sostatt 115.000 ÷ 35.000 kr. = 80.000 kr., sum vit søkja um á fíggjarlógini 1986.

**Konto nr. 103288 løn onnur.**
Her er roknað kr. 60.000 til hjálp á Jarðfrøðisavninum (játtan frá 1983/84). Kr. 40.000 til vakt á framsýningini. Kr. 80.000 at býta millum deildirnar til fyrifallandi arbeiði, sum t. d. summar assistentar og ymiskt annað hjálpararbeiði.

**Konto nr. 253903 aðrar útreiðslur.**
Her eru lagdar 10.000 kr. aftrat til ferð til Føroyar fyri jarðfrøðing, sum vit søkja um.

— — — — — —

Sbrt. skriv dag. 25. juli 1985:

Á fíggjarlógini 1984-85 fingu vit pening játtaðan til Gamla Bókasavnsbygningin kr. 400.000. Hesin peningurin umfatað bæði gerð av teimum nýggju vindeygunum, men eisini úrtakan av teimum gomlu og ísetan av hesum nýggju.

Tað gekk ómetaliga striltið at fáa vindeyguni gjørd, men í mai mánað í ár (1985) vórðu tey so latin og eru goldin. Vindeyguni liggja trygt og gott í einum av okkara hølum. Men nú standa vit í teirri støðu, at vit ikki hava pening at seta vindeyguni í. Vit hava annars avtalað við Danberg og Sørensen, at teir skulu koma 15. august og fara í holt við hetta arbeiðið. Men tað gerst sjálvandi ikki uttan ta játtaðu peningaupphædd. Um ikki tað kann lata seg gera í ár, so er ikki annað at gera enn at bíða til næsta ár, men so fáa sett 80.000 kr. upp á fíggjarlógina 1986. Tær umleið 80.000 kr., vit høvdu fingið játtaðar, vórðu ongantíð brúktar, men eru farnar aftur í landskassan, sum tað sæst av okkara roknskapi.

Vit høvdu verið takksom fyri, um landsstýrið hevði viljað sagt okkum, hvat vit nú skulu gera við hetta mál.

**Ad § 15 - 15717 DGU (Danmarks Geologiske Undersøgelse) Føroya deild.**

Sbrt. skriv dagf. 12. juni 1985:

Hervið verður sent inn uppskot til figgjarætlan fyri rakstrarstað 15717 fyri figgjarárið 1986. Rakstrarstaðið eigur at verða nevnt **Samarbeiði millum DGU-Føroya Jarðfrøðisavn.**

| Kontonummar 15717<br>Navn: Samarbeið DGU-Føroya<br>Jarðfrøðisavn | Roknskapur | Játtan<br>1/4-31/12<br>1985 | Uppskot<br>1986 | Uppskot<br>landsstýr-<br>isins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 103058 Endurgjald til ríkið | | 183.750 | 245.00 | 245.000 |
| 253459 Útreiðslur viðv.<br>arkivering og goymslu<br>(Jarðfrøðisavnið) | | 45.000 | 60.000 | 60.000 |
| 213806 Húsaleiga: endurgjald<br>til Náttúrugripasavnið | | 52.500 | 70.000 | 70.000 |
| 253396 Kanningararbeiði<br>Fremmandaveitingar<br>(sbr. DGU) | | 56.250 | 75.000 | 75.000 |
| | | 337.500 | 450.000 | 450.000 |

---

**Ad § 15 - 15755 Fróðskaparsetur Føroya**

Sbrt. skriv dagf. 17. juli 1985:

Hjálagt verða send landsstýrinum 2 eintøk av figgjarætlanaruppskoti fyri stovnin. Setursráðið viðgjørdi tey ymsu deildaruppskotini á fundi 25. juni 1985 og góðkendi tey tøl og tær grundgevingar, ið hetta heildaruppskot inniheldur. Uppskotið er skipað so:

| | | |
|---|---|---|
| Fylgiskjal I: | Roknskapur 1984/85, játtan 1985 (9 mán.), uppskot 1986 — til samanberingar uppskot 1985/86 | 1 bls. |
| Fylgiskjal II: | Útfylt oyðublað frá landsstýrinum viðv. størvum | 1 bls. |
| Fylgiskjal III: | Viðmerkingar til uppskotið 1986 (1-9) og býtið av upphæddunum út á setursskrivstovu og deildir ... | 5 bls. |
| Fylgiskjal IV: | Landsstýrinum til kunningar: Nevv uppseting av starvsskipan og lønum (føst størv) pr. 1.4.1985 ... | 4 bls. |

Eftir leiðbeining landsstýrisins eigur uppskotið til figgjarætlan 1986 at verða grundað á játtan og nýtslu 1984/85. Hesum hevur setursráðið ikki hildið seg kunna fylgt, og í viðmerkingunum eru grundirnar tilskilaðar. Her skulu tó nakrar teirra verða tiknar fram:

Samtykt er at fara undir framhaldandi lestur í føroyskum upp til høvuðsgreinarnám. Hesin lestur byrjar í 1986. Lesturin sjálvur og fyrireikingarnar til hann krevja økta játtan.

Á Støðisútbúgvingini er undirvisingarbyrðin hjá lærarunum í støddfrøði og alisfrøði vorðin so tung, at lítil og eingin tíð verður til gransking. Hetta fer at gera tað ógjørligt at halda fakliga støðinum uppi, tíansheldur hugsa um útbygging. Til at bøta um hetta verður søkt um játtan til vikar í nevndu greinum.

Setursráðið metir tað vera í tøkum tíma, at gransking og hægri undirvísing í Føroya søgu verða sett í verk. Til tað verður søkt um játtan til søgufrøðing. Sum kunnugt hevur landsstýrið sett nevnd at gera uppskot til útbygging av Fróðskaparsetrinum. Hetta nevndararbeiðið verður væntandi liðugt til árs. Hvørjar figgjarligar avleiðingar tað fær er ógreitt nú. Men tað, sum er greitt, er, at skal nøkur útbygging fara fram, ber ikki til at skerja verandi virksemi. Her skal kortini verða tilskilað, at tríggjar av umsóknunum í uppskotinum 1986 hava samband við tilætlaðu útbyggingina (umsókn um næming, fulltrúa og ein granskingarstyrk aftrat).

Um so er, at landsstýrið ikki kann taka við uppskotinum, sum tað er, og vil hava broytingar, fara vit við hesum at heita á landsstýrið um at venda sær til setursráðið frammanundan við spurninginum um prioritering. Hetta seinasta leggur ráðið stóran dent á.

— — — — — —

| | Kontonummar og navn | A Roknsk. 1984/85 | B Játtan 1985 1/4-31/12 | C Uppskot 1986 | Viðm. | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| I | 83904 Ymiskar inntøkur .... | ÷ 46.1 | ÷ 22.5 | ÷ 30.0 | 1) | ÷ 30.0 |
| III | 103127 Løn/lærarar..... | 473.4 | 506.0 | 685.0 | 2) | 740.0 |
| II | 103143 Løn/starvsfólk..... | 1.368.9 | 1.095.0 | 1.504.0 | 3) | 1.586.0 |
| II | 103168 Løn/sáttmálaløn .... | 2.470.2 | 2.064.7 | 3.554.0 | 4) | 3.730.0 |
| III | 103288 Løn/onnur ..... | 66.9 | 75.0 | 102.0 | 5) | 100.0 |
| III | 103509 Samsýningar ..... | 64.1 | 93.0 | 130.0 | 6) | 100.0 |
| | 113202 Ferða- og dagp. (innl.) | 13.7 | 32.0 | 35.0 | | 15.0 |
| | 113538 Ferða- og dagp. (útl.) | 98.2 | 101.0 | 137.0 | | 100.0 |
| | 123103 Skeið ..... | 10.7 | 19.0 | 22.0 | | 15.0 |
| | 133053 Fólkatryggingar..... | 8.1 | 7.0 | 9.0 | | 9.0 |
| | 203308 Lýsingar ..... | 25.1 | 22.0 | 30.0 | | 30.0 |
| | 203403 Dagbløð, tíðarrit .... | 18.9 | 19.0 | 25.0 | | 20.0 |
| | 213408 Umvælingar..... | 19.3 | 14.0 | 23.0 | | 20.0 |
| | 213503 Umsitingar..... | 133.5 | 98.0 | 60.0 | 7) | 60.0 |
| IV | 213806 Leiguútreiðslur | 131.7 | 113.0 | 200.0 | 8) | 200.0 |
| | 233051 Innbúgv ..... | 44.4 | 64.0 | 82.0 | | 70.0 |
| | 233155 Prentlutir ..... | 24.3 | 45.0 | 50.0 | | 30.0 |
| | 233259 Postgjald ..... | 25.9 | 27.0 | 35.0 | | 35.0 |
| | 233354 Telefon og telex ..... | 63.8 | 54.0 | 80.0 | | 80.0 |
| | 233545 Serjáttan til dátutól | 3.4 | 0.0 | 0.0 | | 0.0 |
| | 233561 Aðrar skrivstovuútr. | 38.9 | 37.0 | 67.0 | | 50.0 |
| | 253085 Bókakeyp og innbind. | 88.5 | 68.0 | 134.0 | | 110.0 |
| | 253306 Amboð ..... | 85.2 | 101.0 | 140.0 | | 110.0 |
| | 253314 Aðrar umsitingarútr. | 55.1 | 82.0 | 115.0 | | 100.0 |
| | 253903 Aðrar útreiðslur..... | 108.0 | 82.0 | 112.0 | | 108.0 |
| | **Fróðskaparsetrið tilsamans** | 5.394.1 | 4.796.2 | 7.301.0 | | 7.388.0 |
| Tils.: | I Ymiskar inntøkur ... | ÷ 46.1 | ÷ 22.5 | ÷ 30.0 | | |
| | II Fastar lønir (starvsfólk/ sáttmálaløn) | 3.839.1 | 3.159.7 | 5.058.0 | | |
| | III Aðrar lønir og samsýningar ..... | 604.4 | 674.0 | 917.0 | | |
| | IV Leiguútreiðslur ..... | 131.7 | 113.0 | 200.0 | | |
| | Allar aðrar útreiðslur | 865.0 | 872.0 | 1.156.0 | (9) | |

**Viðmerkingar til uppskot til fíggjarætlan 1986:**

1) **Ymiskar inntøkur:**
Tilmeldingargjald til almenn skeið, mett ..... 30.0

2) **Løn/lærarar:**
Undirvísingarhjálp frá leysa- og gestalærarum

a) **Læraraskeið setursins**

| | | |
|---|---|---|
| Lestrarárið 1985-86 at enda (jan.-juni 1986 – 290 t.) | 83.0 | |
| 2 styttri skeið á bygd (jan. 1986 — 40 t.) ..... | 11.5 | |
| Fyribils ætlan fyri lestrarárið 1986-87 (sep.-des. 86): | | |
| Fult ársskeið í Tórshavn (255 t.) ..... | 73.0 | |
| 2 valskeið í Tórshavn (90 t. tils.) ..... | 23.0 | |
| 2 skeið á bygd (90 t. tils.) ..... | 26.0 | |
| Skeiðsleiðsla | | |
| (serviðbót fyri fakliga ábyrgd og leiðslu) ..... | 32.5 | 249.0 |

b) **Skeið fyri almenning:**

| | | |
|---|---|---|
| Lestrarárið 1985-86 at enda: | | |
| Prógvskeið í enskum | | |
| (dagskeið jan.-juni 86 — 120 t.) ..... | 25.0 | |
| Prógvskeið í føroyskum | | |
| (kvøldskeið jan.-mars 86 — 110 t.) ..... | 22.0 | |
| Prógvroyndir, meting ..... | 20.0 | |
| Onnur almenn skeið (jan.-mai 86 — 120.) ..... | 24.0 | |
| Fyribils ætlan fyri lestrarárið 1986-87 (sep.-des. 86): | | |
| Prógvskeið og onnur skeið — 300 t. ..... | 60.0 | 151.0 |

Til samanberingar:

| | |
|---|---|
| a) Tilætlaðir undirvísingartímar..... | 765 t. |
| Undirvísingarárið 1985-86 (ætlan)..... | 770 t. |
| Játtan 1984/85 røkk til..... | 625 t. |
| b) Tilætlaðir undirvísingartímar 1986 ..... | 650 t. |
| Undirvísingarárið 1985-86 (ætlan)..... | 550 t. |
| Játtan 1984/85 røkk til..... | 525 t. |

Hækking í b):
prógvskeið krevja fleiri undirvísingartímar.

c) **Gudfrøðideild/søgu- og siðsøgudeild:**

Uppskot er um samanlegging av lestri í gudfrøði, kristni, søgu og siðsøgu.

Exam. art.-námið í kristni/religión verður sbrt. ætlan liðugt í heysthálvuni 1985.

Ætlan fyri 1986:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Várhálvan: | skeið í kristni fyri leikfólk (60 leysalæraratímar) ..... | 17.5 | |
| Heysthálvan: | gudfrøðilestur (120 t.) ..... | 35.0 | |
| | søgulestur (150 t.) ..... | 42.5 | 95.0 |

Til samanberingar:

| | |
|---|---|
| Tilætlaðir leysalæraratímar 1986 ..... | 330 t. |
| Fíggjarárið 1984/85 vóru á Gudfrøðideild (leysalæraratímar) ..... | 340 t. |

d) **Føroyamálsdeild**

Undirvísingarskráin 1986:

Ársnám (jan.-mai)
Exam. art.-nám. (sep.-des.)
Høvuðsgreinarnám (sep.-des.)

Til serstøk evni verður tørvurin á leysalærara- og gestalærarahjálp mettur til 140 undirvísingartímar 40.0

Til samanberingar:

Leysalæraratímatalið fíggjarárið 1984/85 var um 40 t.

e) **Støðisútbúgving**

Undirvísingarskráin 1986:

Lestrargrein støddfrøði/alisfrøði/evnafrøði
(4. hálva, jan.-juni)

Lestrargrein lívfrøði/evnafrøði
(2. og 3. hálva, jan.-des.)

Lestrargrein støddfrøði/alisfrøði og støddfrøði/alisfrøði/evnafrøði
(1. hálva, sep.-des.)

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til fyrilestrar, venjingar og uppgávurokning verður tørvurin á leysalærara-og gestalærarahjálp mettur til 600 tímar (350 t. á 1. stigi, 250 t. á 2. stigi) ..... | | | 150.0 |
| Tímatalið svarar til 520 t. á 1. stigi. | | | |
| Til samanberingar: Umroknað til 1. stig var leysalæraratímatalið 1984/85 um 430 t. ..... | | | |
| | | | 685.0 |
| **Løn/lærarar, tils.:** Undirvísingarløn til leysalærarar: Grundlønin 1.7.85 er kr. 102,63. Roknað verður við tveimum lønarstigum: 1. grundløn + 90 min. fyrireiking 2. grundløn + 40 min. fyrireiking. | | | |
| 3) **Løn/starvsfólk** | | | |
| Setursskrivstova: | starvsskipan 1.4.85 er 4 starvsfólk (heil størv) ..... | | 694.0 |
| | + umsókn 1986: 1 næming frá 1.7.86 (viðm. niðanfyri) ..... | | 35.0 |
| Føroyamálsdeild: | starvsskipan 1.4.85 er 4 starvsfólk (3½ starv) ..... | | 540.0 |
| Støðisútbúgving: | starvsskipan 1.4.85 er 2 starvsfólk (1½ starv) ..... | | 235.0 |
| **Løn/starvsfólk, tils.** ..... | | | 1.504.0 |
| Eftir uppskoti frá setursskrivstovuni (har higartil 2 starvsfólk á Fróðskaparsetrinum hava fingið upplæring) er samtykt at søkja um játtan til næming heldur enn økta upphædd til leysa hjálp. Umsóknin hevur samband við ætlanirnar um útbygging av setrinum. — Víst verður annars til fylgiskjølini II og IV. | | | |
| 4) **Løn/sáttmálaløn** | | | |
| Setursskrivstova: | umsókn um skipan av fulltrúastarvi frá 1.8.86 (viðm. a) ..... | | 100.0 |
| Gudfrøðideild/ søgu- og siðsøgudeild: | starvsskipan 1.4.85 er 1 deildarleiðara/lektarastarv ..... | 290.0 | |
| | + umsókn um søgufrøðing frá 1.8.86 (viðm. b) ..... | 100.0 | 390.0 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Føroyamálsdeild: | starvsskipan 1.4.85 er<br>2 lektarastørv<br>2 adjunktstørv.<br>Játtað frá 1.10.85<br>1 profcssarastarv<br>1 lektara/adjunktstarv ..... | | 1.607.0 |
| Støðisútbúgving: | starvsskipan 1.4.85 cr<br>3 lcktarastørv<br>1 adjunktstarv ..... | 1.052.0 | |
| | + umsókn um vikar frá 1.8.86 (viðm. c) ..... | 90.0 | 1.142.0 |
| Granskingar-styrkur: | skipan 1.4.85 er 1 styrkur (kandidatstipendium) ..... | 180.0 | |
| | + umsókn um 1 styrk aftrat frá 1.4.86 (viðm. d) ..... | 135.0 | 315.0 |
| **Løn/sáttmálaløn, tils.** ..... | | | 3.554.0 |

a) Tað er greitt longu nú, at tað álit við uppskotum til menningar av Fróðskaparsetrinum sum hægri lærustovni, ið væntandi verður liðugt á vári 1986, kemur at seta nýggj og størri krøv til fyrisitingina, serliga av løgfrøðiligum slag, krøv, sum setursskrivstovan við verandi manning ikki verður ment at lúka. — Tað snýr seg m. a. um dagføring, tillaging, nýgerð av reglum fyri stýring, fyrisiting, útbúgvingar o. t., samstarvsavtalur við føroyskar og útlendskar stovnar, sáttmálaspurningar, lestrarleiðbeining o. s fr. Søkt verður við hesum um at fáa cin fulltrúa við løgfrøðiútbúgving knýttan at setursskrivstovuni, fyrsta árið fullan dag, hareftir hálvan dag (hin helvtin av arbeiðstíðini at nýta til skeiðvirksemi og gransking í løgfrøðiligum evnum, ið hava við føroysk viðurskifti at gera).

b) Sum nevnt í viðm. 2. c) er uppskot um samanlegging av lestri í gudfrøði, kristni/religión, søgu og siðsøgu. Uppskotið (nevndarálit), tilevnað av nevnd, sum setursráðið hevur sett, hevur verið til viðgerðar í lærararáð og setursráð, ið taka undir við, at søkt verður um at skipa starv í søgu við

Fróðskaparsetrið frá 1.8.86. Smærri broytingaruppskot eru til nevndarálitið, ið væntandi verður greitt at senda landsstýrinum til hcystar.

c) Allar lestrargreinir á Støðisútbúgvingini hava støddfrøði sum høvuðs- ella stuðulslærugreinir. Við núverandi útbúgvingartilboði kunnu teir báðir føstu lærararnir í nevndu lærugreinum ikki greiða at átaka sær alla ta neyðugu undirvísingina. Higartil hevur verið roynt at nøkta undirvísingartørvin við leysalærarum, men trupult hevur verið at fáa fólk við ti førleika, sum krevst. Støðisútbúgvingin søkir tí um játtan til ein vikar við skúlacmbætisprógvi í støddfrøði og alisfrøði lestrarárið 1986-87.

d) Granskingarstyrkurin (eitt kandidatstipendium) stóð fyrstu ferð á figgjarlógini 1983/84. Við honum gjørdist eitt meira enn 10 ára gamalt uppskot veruleiki. Fyrsta árið vóru 2 umsøkjarar, ið báðir luku treytirnar at fáa styrk. Til styrkin 1984/85 vóru 6 umsøkjarar. Tríggir teirra luku treytirnar. Avgerðin um granskingarstyrkin 1985/86 er júst tikin. 8 umsóknir vóru, harav í minsta lagi 4 vórðu mettar at standa mát, bert eina bar til at játta. Men í hesum viðfangi samtykti seturstáðið — vísandi til virðið á tilfarinum, sum varð lagt fram, og somuleiðis á valdum granskingarevnum — at søkja um at fáa upphæddina til granskingarstyrk hækkaða, soleiðis at møguleiki er at veita 2 styrkir árliga.

Víst verður annars til fylgiskjal IV: Starvsskipan og lønir pr. 1.4.1985.

5) **Løn/onnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Setursskrivstova: | tímalønt hjálp, serstakliga í sumarfrítíðini (skrivstovan er opin um summarið) | 12.0 | |
| Føroyamálsdeild: | hjálpararbeiði í sambandi við orðasavnið, bandasavnið, málførasavnið, bókasavnið..... | 75.0 | |
| Støðisútbúgving: | hjálpararbeiði í sambandi við dátuviðgerð ..... | 15.0 | 102.0 |

Í mun til roknskap 1984/85 er hetta ein hækking upp á stívliga 400 arbeiðstímar.

6) **Samsýningar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Setursskrivstova: | 20 alm. fyrilestrar í Tórshavn og á bygd ..... | 30.0 | |
| | Sams. til metingarfólk (granskingarst. og størv) ..... | 10.0 | |
| | Fundarpeningur og sams. til ráðsformann ..... | 25.0 | |
| Gudfrøðideild: | prógtøkur ..... | 5.0 | |
| Føroyamálsdeild: | prógtøkur ..... | 15.0 | |
| Støðisútbútging: | prógtøkur ..... | 35.0 | |
| Ymist ..... | | 10.0 | 130.0 |

Prógtøkuútreiðslur av almennum skeiðum eru settar á konto: Løn/lærarar.

7) **Umsitingar**

Allar útreiðslur á hesi konto fara til húsini í J. C. Svabosgøtu 7 (landsogn). Ætlan fyri 1985 og 1986: framhald av ábótum innanhýsis, heruppií málaraarbeiði, nýtt tak.

8) **Leigútreiðslur**

Leigusáttmáli við Málingahandilin fyri undirvísingarhøli til Støðisútbúgvingina (110.0), leiga fyri Føroyamálsdeild (72.0), leiga av goymsluhøli (18.0).

9) **Allar aðrar útreiðslur**

Vøksturin upp um roknskapartøl 1984/85 (tilsamans 291.000 kr.) stendst at kalla allur av øktum virksemi á Fróðskaparsetrinum. Til samanberingar, bæði viðv. leysum lønum og øllum øðrum útreiðslum, er í seinasta teigi sett upp uppskotið frá Fróðskaparsetrinum til figgjarætlan 1985/86. Játtan 1985 (9 mán.) svarar til hetta uppskot ÷ 25%. Íleggingar, ætlanin var at gera í 1985/86, eru eisini lækkaðar við 25%. Tað, sum soleiðis er komið at resta í, er talt við aftur í uppskotinum 1986.

Til konto: Bókakeyp og innbinding er at siga, at 50.000 kr. av teimum 134.000 kr. hava samband við stovnseting av høvuðsgreinarnámi á Føroyamálsdeildini og tilætlað nám í søgu og siðsøgu.

Viðv. konto: Amboð eigur at verða nevnt, at 65.000 kr. av teimum 140.000 kr. eru ætlaðar til útbygging av edv-útgerðini á Støðisútbúgving, soleiðis at deildin í størri mun enn áður verður før fyri at átaka sær edv-uppgávur av ymsum slag, ið eisini koma undirvísingini og granskingini til gagns. Sbrt. uppgerð frá deildini eru í tíðarskeiðinum mai 84 - mai 85 m. a. gjørdar 9 ymiskar spurnarblaðakanningar (út ímóti 4000 spurnarbløð við tils. 740 spurningum). Í umbúna eru 3 stórar kanningar við uml. 3000 spurnarbløðum tils.

**Býtið av upphæddunum í uppskotinum til fíggjarætlan 1986 — við unusókuum**

| | | |
|---|---|---|
| SSS: | Setursskrivstova | (miðfyrisiting fyri stovnin; læraraskeið, almenn skeið, almennir fyrilestrar). |
| GFD/SSD: | Guðfrøðideild/søgu- og siðsøgudeild | (skeið í kristni, prógvlestur í guðfrøði, søgu og siðsøgu, gransking — fyrisiting í stóran mun á SSS). |
| FMD | Føroyamálsdeild | (prógvlestur í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum — frá heysthálvu 1986 tvey næmingalið; orðabókaarbeiði, innsavning, gransking, ráðgeving). |
| STB: | Støðisútbúgving | (náttúruvísindalig støðisútbúgving við prógvtøkum — tvey næmingalið; gransking, ráðgeving). |
| GS: | Granskingarstyrkur | (áður á SSS, her frábýttur, fyrisiting tó á SSS). |

| 83914 | Ymiskar inntøkur | SSS ÷ 30.0 | GFD/SSD | FMD | STB | GS |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 103127 | Løn/lærarar | 400.0 | 95.0 | 40.0 | 150.0 | |
| 103143 | Løn/starvsfólk | 729.0 | | 540.0 | 235.0 | |
| 103168 | Løn/sáttmálaløn | 100.0 | 390.0 | 1.607.0 | 1.142.0 | 315.0 |
| 103288 | Løn/onnur | 12.0 | | 75.0 | 15.0 | |
| 103509 | Samsýningar | 65.0 | 5.0 | 20.0 | 40.0 | |
| | Lønarkonsti tils. | 1.306.0 | 490.0 | 2.282.0 | 1.582.0 | 315.0 |
| 113202 | Ferða-/dagp. innl. | 15.0 | 1.0 | 14.0 | 5.0 | |
| 113538 | Ferða-/dagp. útl. | 20.0 | 7.0 | 90.0 | 20.0 | |
| 123103 | Skeið | 4.0 | | 18.0 | | |
| 133053 | Fólkatryggingar | 9.0 | | | | |
| 203308 | Lýsingar | 30.0 | | | | |
| 203403 | Dagblað, tíðarrit v. m. | 4.0 | | 16.0 | 5.0 | |
| 213408 | Umvælingar | 4.0 | | 9.0 | 10.0 | |
| 213503 | Umsiting | | | | 60.0 | |
| 213806 | Leiguútreiðslur | 18.0 | | 72.0 | 110.0 | |
| 233051 | Innbúgv | 12.0 | 15.0 | 40.0 | 15.0 | |
| 233155 | Prentlutir | 44.0 | | 6.0 | | |
| 233259 | Postgjald | 25.0 | | 5.0 | 5.0 | |
| 233259 | Telefon og telex | 25.0 | 5.0 | 25.0 | 25.0 | |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútr. | 15.0 | 7.0 | 30.0 | 15.0 | |
| 253085 | Bókakeyp og innbinding | 4.0 | 25.0 | 75.0 | 30.0 | |
| 253306 | Amboð | 40.0 | | 15.0 | 85.0 | |
| 253314 | Aðr. umsitingarútr. | 10.0 | | | 105.0 | |
| 253903 | Aðrar útreiðslur | 50 | 2.0 | 55.0 | 5.0 | |
| | Aðrar konti tils. | 329.0 | 62.0 | 470.0 | 495.0 | |
| | Rakstrarstað 15755: | | | | | |
| | Samantalt býti | 1.605.0 | 552.0 | 2.752.0 | 2.077.0 | 315.0 |

**Fylgiskjal IV**

## FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA — rakstrarstað 15755

Starvsskipan og lønir pr. 1.4.1985

103 143 Løn/starvsfólk

Ársløntir 1986 sbrt. sáttmála 1.10.84
+ 1½% fritiðargjald av 1985-lønum.

**Setursskrivstovan**

| | | |
|---|---|---|
| 1. Setursskrivari í 34. lønarflokki (1.12.85 á 6. og seinasta stigi) | 221.484,00 | |
| 2. Assistentur í 12. lønarflokki (1.4.86 á 10. stigi) | 155.436,00 | |
| 3. Assistentur í 9. lønarflokki (1.9.86 á 7 stigi) | 137.284,00 | |
| 4. Yvirassistentur í 15. lønarflokki (1.2.86 á 11. og seinasta stigi) | 169.256,00 | |
| Starvsfólk 1, 2, 3 og 4 (tils. 4 størv) | 683.460,00 | |
| + 1½% fritíðargjald av 1985-lønum, mett eftir játt. 85 | 10.000,00 | |
| **Setursskrivstovan tilsamans** | 693.460,00 | 693.5 |

**Føroyamálsdeildin**

| | | |
|---|---|---|
| 5. Assistentur í 9. lønarflokki (1.4.80 á 14. og seinasta stigi) | 152.064,00 | |
| 6. Assistentur í 9. lønarflokki (1.9.80 á 14. og seinasta stigi — ½ starv) | 76.032,00 | |
| 7. Assistentur í 9. lønarflokki (á seinasta stigi) | 152.064,00 | |
| 8. Savnshjálpari í 12. lønarflokki (1.3.86 á 8. stigi) | 151.742,00 | |
| Starvsfólk 5, 6, 7 og 8 (tils. 3½ starv) | 531.902,00 | |
| + 1½ fritíðargjald av 1985-lønum, mett eftir játt. 85 | 8.000,00 | |
| **Føroyamálsdeildin tilsamans** | 539.902,00 | 539.9 |

**Støðisútbúgvingin**

| | | |
|---|---|---|
| 9. Assistentur í 12. lønarflokki (1.4.86 á 8. stigi) ..... | 151.581,00 | |
| 10. Laborantur í 12. lønarflokki (1.8.81 á 12. og seinasta stigi — $^1/_2$ starv) ..... | 79.890,00 | |
| Starvsfólk 9 og 10 (tils. $1^1/_2$ starv) ..... | 231.471,00 | |
| + $1^1/_2$% fritíðargjald av 1985-lønum, mett eftir játt. 85 | 3.500,00 | |
| **Støðisútbúgvingin tilsamans** ..... | 234.971,00 | 235.0 |
| **TILSAMANS** | | 1.468.4 |

103 168 **Løn/sáttmálaløn**

**Føroyamálsdeildin**

| | |
|---|---|
| 1. 1 lektari í málfrøði og orðabókaritstjóri (1.7.80 á 15. ári, t. e. seinasta stigi í sáttm.) | |
| a) Bruttoársløn 1986 sbrt. sáttm. frá apr. 1985 ..... | 224.219,16 |
| b) 2 eyka dýrtíðarviðbøtur á 1248 | 2.496,00 |
| c) Viðbót eftir avtalu við Føroya landsstýri ..... | 32.500,00 |
| d) Landskassans 10% av eftirlønargjaldinum ..... | 22.188,20 |
| | 281.403,36 |
| 2. 1 lektari í fólkaminnisfrøði og innsavningarleiðari lønaraldur frá 1.1.62, t. e. seinasta stigi í sáttm.) | |
| a) + b) + c) + d) sum starv 1 ..... | 281.403,36 |
| 3. 1 adjunktur í bókmentum (1.4.86 á 8. ári) | |
| a) ..... | 181.607,53 |
| b) ..... | 2.496,00 |
| c) ..... | 32.500,00 |
| d) ..... | 17.824,41 |
| | 234.427,94 |

| | | |
|---|---|---|
| 4. | f adjunktur í málfrøði (1.4.86. á 8. ári) | |
| | a) + b) + c) + d) sum starv 3 ..... | 234.427,94 |
| | Sáttmálalønt 1, 2, 3 og 4 ..... | 1.031.662,60 |
| | + 1½% frítíðargjald av 1985-lønum (útroknað í mun til játtan 1985 | |
| | ÷ 10% eftirlønargjald — mett)..... | 15.000,00 |
| 5. | og | |
| 6. | Vist verður til umsókn í sambandi við **uppskot til fíggjarætlan 1985** fyri løn/sáttmálalønt. | |

Viðmerkingin *var* **hendа:**

**Viðv. umsóknini** um 2 størv frá 1.10.85:

Samtykt er — treytað av neyðugari játtan — at seta høvuðsgreinarnám á stovn í lestrarárinum 1985-86.
Til at fremja hesa samtykt er neyðugt at seta 2 lærarastørv aftrat á Føroyamálsdeildini. Annað teirra eigur at vera á professarastigi (sbrt. hjálagt skjal frá deildini). Høvuðsgreinarnámið verður í fyrstu atløgu eitt royndarnám, tískil verða bæði størvini at tíðaravmarka. Eyka lønarútreiðslur í fíggjarárinum 85/86 eru mettar til 280.000 kr. fyri 6 mán. Í ætlan 86/87 og 87/88 hækkar hetta tal upp í 560.000 kr.

**Umsóknin er játtað**, og størvini, annað í málfrøði og hitt í bókmentafrøði, lýst leys at seta skjótast til ber.

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 1986 heldur setrið seg til nietingina oman fyri (fíggjarárið 1986/87), t.e. størv 5. og 6. | 560.000,00 | |
| **Føroyamálsdeildin tilsamans** ..... | 1.606.662,60 | 1.606.7 |

**Støðisútbúgvingin**

| | | |
|---|---|---|
| 7. 1 lektari í støddd/hag/dátufrøði (1.8.83 á 15. ári, t. e. seinasta stigi í sáttm.) | | |
| a) + b) + c) + d) sum starv 1 ..... | 281.403,36 | |
| 8. 1 adjunktur í alisfrøði (1.4.86 á 7. ári) | | |
| a) ..... | 176.425,67 | |
| b) ..... | 2.496,00 | |
| c) ..... | 32.500,00 | |
| d) ..... | 17.299,81 | |
| | 228.722,48 | |
| 9. 1 lektarastarv í lívfrøði (frá 1.10.80 er full ábyrgd og undirvísingarskylda knýtt at fólki á Náttúrugripasavninum. Afturfyri rindar setrið løn til cin savnvørð. (1.2.84 á 15. ári, t. e. seinasta stigi í sáttm.) | | |
| a) + b) + c) + d) sum starv 1 ..... | 281.403,36 | |
| 10. 1 lektari í evna-/lívfrøði (1.7.86 á 10. ári) | | |
| a) ..... | 191.007,10 | |
| b) ..... | 2.496,00 | |
| c) ..... | 32.500,00 | |
| d) ..... | 18.782,55 | |
| | 244.785,65 | |
| Sáttmálalønt 7, 8, 9 og 10 | 1.036.785,65 | |
| + 1½% av frítíðargjald av 1985-lønum (útroknað í mun til játtan 1985 ÷ 10% eftirlønargjald — mett | 15.000,00 | |
| **Støðisútbúgvingin tilsamans** ..... | 1.051.314,85 | 1.051.3 |
| **Gudfrøðideildin** | | |
| 11. 1 lektari og leiðari (á seinasta stigi í sáttm.) | | |
| a) + c) + d) ..... | 284.965,84 | |
| + 1½% frítíðargjald - meting ..... | 4.500,00 | |
| **Gudfrøðideildin tilsamans** ..... | 289.465,84 | 289.5 |

**Setursskrivstovan**

| | | |
|---|---|---|
| 12. Granskingarstyrkur (kandidatstipendium). Roknað verður við 1 ár magistaraløn á 3. ári uttan viðb. | | |
| a) ..... | 157.300,42 | |
| b) ..... | 2.496,00 | |
| d) ..... | 15.354,30 | |
| | 175.150,72 | |
| + 1½% frítíðargjald - mett ..... | 2.800,00 | |
| **Setursskrivstovan tilsamans .....** | 177.950,72 | 177.9 |
| **Løn/sáttmálaløn tils.** | | 3.125.4 |

**VIÐMERKINGAR:**

Størvini 1, 2, 3, 4, 7, 8, 9 og 10 fáa skalaløn eftir danska magistarasáttmálanum.

Bruttoárslønin og eftirlønargjaldið omanfyri eru sbrt. upphæddum pr. 1.10.84. Leingingin av magistarasáttmálanum 1.4.85 er sum kunnugt ikki komin í gildi í Føroyum.

Starv 11 fær skalaløn eftir føroyska verkfrøðingasáttmálanum.

— — — — —

**Viðv. 12. (granskingarstyrkinum)** er at siga, at teir, sum higartil hava fingið styrk, hava verið løntir eftir danska magistarasáttmálanum (við smærri tillagingum).

---

**Viðmerkingar landsstýrisins:**
Ikki játtað 1 næming og 1 fulltrúa, sum hava samband við ætlaðu útbyggingina. Bíðað eigur at verða eftir tilmælinum frá nevndini.

Játtaðar verða 135.000 kr. til granskingarstyrk.

**Ad § 15 - 15793 Stovnar á Debessartrøð**

Sbrt. skriv dagf. 1. juli 1985:

Hjálagt verður, við góðkenning stovnanna, send landsstýrinum uppskot til fíggjarætlan 1986 fyri rakstrarstað 15793: Stovnar á Debesartrøð (felagsútreiðslur).

Uppskotið er samskipað av setursskrivstovuni, ið sum kunnugt hevur umsitingina av felagsrakstrinum um hendur.

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4-31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 103143 løn/starvsfólk | 152.335,03 | 116.7 | 155.0 | 167.0 |
| 103151 løn/avloysarar | 12.225,82 | 7.2 | 12.0 | 13.0 |
| 103222 løn/reingerð | 291.836,98 | 228.6 | 319.4 | 345.0 |
| 103288 løn/onnur | 123.908,17 | 106.8 | 180.4 | 152.0 |
| 213105 el, hiti og vask | 370.644,32 | 331.9 | 453.5 | 453.5 |
| 213408 umvælingar | 47.009,41 | 18.8 | 25.0 | 25.0 |
| 213702 ognartrygging | 22.762 | 18.8 | 28.0 | 28.0 |
| 213901 ymsar húsaútreiðsl. | 15.038,69 | 31.9 | 39.5 | 39.5 |
| 233314 aðr. skrivstovurútr. | 78.669,19 | 63.7 | 85.0 | 85.0 |
| 253355 umsit. av Debesart. | 25.115,14 | 15.0 | 20.0 | 20.0 |
| 253903 aðrar útreiðslur | 11.632,23 | 11.2 | 15.0 | 15.0 |
| | 11.151.176,19 | 950.9 | 1.292.8 | 1.343.0 |

**Viðmerkingar til fíggjarløgtingslóg 1986.**
**Rakstrarstað 15793/323178: Stovnar á Debesartrøð**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 103143 | Løn/starvsfólk: Húsavørður á øllum stovnum deildum, 9. lfl. 14. stig ..... | | 155.0 |
| 103151 | Løn/avloysarar: fyri húsavørðin í summarfrítíðini ..... | | 12.0 |
| 103222 | Løn/reingerð: 5 vaskikonur løntar fyri 4.010 tímar/árl. frítíðarp. írokn. ..... | 285.615 | |
| | Høvuðsreingerð frítíðarp. írokn. ..... | 19.570 | |
| | Avloysarar uml. 200 t/árið ..... | 14.200 | |
| | | 319.385 | 319.4 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 103268 | Løn/onnur: | | |
| | Umsjónarmaður, sum røkir Debesartrøð fyri arbeiðsmannaløn ..... | 150.000 | |
| | Húsavarðarhjálp uml. 320 tímar/ár ..... | 20.000 | |
| | Maður, ið hevur flaggingina undir hond fyri fasta samsýning ..... | 2.400 | |
| | Ørindafólk til allar stovnar á Debesartrøð ... | 8.000 | 180.4 |
| 213105 | El, hiti og vask: | | |
| | El: felagsmátari fyri alla nýtslu ÷ Fornminnissavn, Støðisútbúgving og Landsbókasavn: | | |
| | kW-gjald ..... | 3.500 | |
| | 150.000 kWt á 1,26 ..... | 190.000 | |
| | Støðisútbúgvingin ..... | 30.000 | |
| | Hiti: 70.000 litrar á 3,00 ..... | 210.000 | |
| | Vaskiamboð og -evni ..... | 20.000 | 453.5 |
| 213406 | Umvælingar (útr. sum illa fáast liðaðar sundur millum stovnarnar + amboð)..... | 25.000 | 25.0 |
| 213702 | Ognartrygging (brunatrygging)..... | | 28.0 |
| 213901 | Ymsar húsaútreiðslur: | | |
| | Kloakkreinsing og viðlíkahald ..... | 5.000 | |
| | Kaminreinsing (øll húsini)..... | 2.500 | |
| | Oljufýrs- og hitastýringarrøkt..... | 12.000 | |
| | Viðlíkahald av fløggum og flaggstong ..... | 2.000 | |
| | Náttarvakt ..... | 15.000 | |
| | Óvæntaðar útreiðslur ..... | 3.000 | 39.5 |
| 233561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur: | | |
| | Leiga og nýtsla av 2 ljóstøkutólum til allar stovnar uttan Landsskjalasavnið og Landsbókasavnið ..... | | 85.0 |
| 253355 | Umsiting av Debesartrøð: | | |
| | Planting og tilfar til at halda trøðna í góðum standi ..... | | 20.0 |
| 252903 | Aðrar útreiðslur ..... | | 15.0 |

**Ad § 15 - 15805 Heilsufrøðilig Starvsstova.**

Sbrt skriv dagf. 28. juni 1985:

./. **Viðmerkingar til hjálagda uppskot fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna til fíggjarlógina 1986**

**83904 Ymiskar inntøkur**
Mett verður, at inntøkurnar í 1986 økjast við 200.000 kr. í mun til 1984/85. Hetta stavar fyrst og fremst frá inntøkum frá alivinnuni fyri arbeiði í samband við at skapa tað nevðuga støði undir sjúku- og heilsuváttanum.

**103143 Løn starvsfólk**
Her verður biðið um eitt fólk við tekniskum og hygiejniskum kunnleika, ið kann verða okkum til hjálpar í samband við eftirlitið á fiskavirkjum, taka hond við í samband við ymiskar uppgávur innan eftirlit og menning, ið verður umbiðið av landsstýrinum, komandi menningarstovuni og annars privatum fiskavirkjum í sini heild. Nevnast kann, at Vilhelm Johannesen, ráðharri í idnaðarmálum, á fundi hin 24. juni 1985 gjørdi starvsstovuni greitt, at ynski landsstýrisins er, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan skuldi halda fram við ávisum grundleggjandi kanningararbeiði innan fiskaídnaðin. Hetta er møguligt, um starvsstovan fær fólk til endamálið.

Í løtuni er bert eitt fult skrivstovustarv (2 hálv) til at nøkta tørvin á einum stovni við 11 fullum størvum. Hetta er sjálvsagt alt ov lítið, og vilja vit tí at byrja við søkja um setan av einum hálvum starvi afturat.

**113202 Ferða- og dagpeningur innanlands**
Søkt verður um 60.000 kr., ið er hækking uppá 45.000 kr. í mun til játtanina í 1984/85. Orsøkin til hetta er, at tað í nógv størri mun er neyðugt at ferðast innanlands. Hetta er serliga í samband við alivinnuna og løggilding/eftirlit við fiskavirkjum/skipum.

**252206 Amboð**
Biðið verður um 600.000 kr., ið er ein hækking uppá kr. 300.000. Orsøkin er, at vit nugu keypa útbúnað til at gera kanningar á staðnum í samband við aling (feltútbúnaður).

Harafturat kemur, at starvsstovan hevur í hyggju at keypa eina minni telduskipan, ið skal lætta um skrivliga - og registreringsarbeiðið á stovninum.

**253903 Aðrar útreiðslur**
Søkt verður um 134.000 kr., ið er ein hækking uppá 89.000 kr. Henda øking

í útreiðslunum stavar m. a. frá kostnaðinum av viruskanningum av alifiski, sum í dag verða gjørdar á donskum laboratorii.

**253928 Tænastuakfør**
Upphæddin skal nýtast til keyp av bili í samband við sjúkufráboðanir og regluligt eftirlitsarbeiði í alivinnuni.

At enda skulu vit undirstrika, at starvsstovan hevur bráðneyðugan tørv fyri at víðka um verandi hølir. Hetta er eisini nevnt í brøvum til landsstýrið dagfest 29. aug. 1984, 24. apríl 1985 og 20. mai 1985, og skal tað enn eina ferð endurtakast, at starvsstovan sum nú er ikki fær arbeitt til fulnar og kunnu haraflurat ikki fara undir veruligar kanningar av eitt nú fiskasjúkum (patologisk og virologisk laboratorium), ið er ein av nýggju tættunum á okkara arbeiðsøkið.

Tað er ynskiligt, at landsstýrið og figgjarnevndin tala við starvsstovuna, um so er at figgjaruppskot okkara verður broytt.

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4-31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýris-ins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 83904 Ymiskar inntøkur | ÷ 320,7 | ÷ 262,5 | ÷ 500,5 | ÷ 500,0 |
| 103143 Løn, starvsfólk | 699,6 | 597,0 | 1.209,2 | 1.306,0 |
| 103151 Løn, avloysarar | 45,3 | 57,0 | 70,0 | 76,0 |
| 103168 Løn, sáttmálalønt | 659,0 | 496,7 | 834,8 | 902,0 |
| 103288 Løn, onnur | 44,4 | 25,5 | 40,0 | 43,0 |
| 103405 Útfiðarløntr | 18,7 | 12,8 | 30,0 | 32,0 |
| 113202 Ferða- og dagp. innanl. | 33,5 | 26,2 | 60,0 | 60,0 |
| 203308 Lýsingar | 22,0 | 11,2 | 30,0 | 30,0 |
| 213503 Umsiting | 12,9 | 7,5 | 10,0 | 10,0 |
| 213702 Ognartrygging | 9,6 | 6,0 | 10,0 | 10,0 |
| 233051 Innbúgv | 51,4 | 22,5 | 30,0 | 30,0 |
| 233155 Prentlutir | 26,6 | 15,0 | 30,0 | 30,0 |
| 233259 Postgjald | 14,8 | 11,3 | 25,0 | 25,0 |
| 233354 Telefon og telex | 55,4 | 39,0 | 60,0 | 60,0 |
| 233504 Sakkøn hjálp | 4,0 | 12,7 | 15,0 | 15,0 |
| 233561 Aðrar skrivstovuútr. | 15,1 | 16,5 | 20,0 | 20,0 |
| 253085 Bókakeyp og innbind. | 44,3 | 26,3 | 45,0 | 45,0 |
| 253306 Amboð | 300,0 | 225,0 | 600,0 | 600,0 |
| 253371 Rannsóknir | 61,9 | 60,0 | 60,0 | 60,0 |
| 253903 Aðrar útreiðslur | 29,1 | 33,3 | 134,0 | 134,0 |
| 253928 Tænastuakfør | 24,3 | 90,0 | 300,0 | 300,0 |
| 253936 Laboratoriurakstur | 178,4 | 225,0 | 350,0 | 350,0 |
| Ialt | 2.029,6 | 1.754,0 | 3.463,0 | 3.638,0 |

**Ad § 15 - 15895 Tónleikur og sangur.**

Sbrt. skriv dagf. 12. juni 1985 frá Føroya Symfoniorkestur:

Loyva okkum at søkja Føroya Landsstýri um, at Føroya Symfoniorkestur kemur á fíggjarlógina við eini upphædd av kr. 100.000 komandi fíggjarár.

Fyri cina tílíka upphædd rokna vit við at kunna halda tríggjar symfonikonsertir árliga, tvær í Norðurlandahúsinum og cina uttan fyri Havnina, og harafturat fáa stuðul uttaneftir av tónleikarum og instruktørum, eventuelt framvega onkur ljóðføri.

Tær ætlaðu útreiðslurnar og inntøkurnar:

| | |
|---|---|
| Tríggjar konsertir við stuðli av tónleiki uttaneftir ..... | 45.000 kr. |
| Ferðapeningur til tónleikarar innaulendis ..... | 20.000 kr. |
| Útreiðslur í samband við konsert á bygd ..... | 25.000 kr. |
| Annað (nótar, ljóðføri o. a.) ..... | 15.000 kr. |
| Inntøkur av konsertum ..... | 15.000 kr. |
| Tilsamans ..... | 100.000 kr. |

**Viðmerkingar landsstýrisins:**
Samlað játtan til Tónleik og sang er 500.000 kr., herav 100.000 kr. til Symfoniorkestrið.

---

**Ad § 15 - 15907/323012 Barnabløð**

Sbrt. skriv dagf. 17. juni 1985 frá Bókadeild Føroya Lærarafelags:

Vísandi til skriv tykkara frá 15. mai í ár — F. L. j. nr. 400-39 — fari eg við hesum vegna Bókadeild Føroya Lærarafelags at søkja um studning til Barna- & ungdómsblaðið

kr. 75.000,-.

Hetta er 15.000 kr. meira enn í fjør, og kemur tað av hækkandi útreiðslum og av, at blaðið framvegis gevur rættliga stórt hall. Tíverri fáa vit ikki enn sagt, hvussu stórt hetta hall er, ti vit hava ikki fingið endaliga uppgerð frá roknskaparføraranum.

Vit vóna, at tað ber til at taka við hesi hækking.

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4-31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| Bókadeild Føroya Læraraf. | | | | |
| Barna- & ungdómsblaðið | | | | |
| § 15 - 323012 Barnabløð | 22.520 kr. | « | 75.000 kr. | 45.000 kr. |

Sbrt. skriv dagf. 18. september 1984:

**RAKSTRARROKNSKAPUR**
**fyri »Barnatíðindi« 1983**

Inntøkur:

| | | |
|---|---|---|
| Lýsingar, blaðhald, søla ..... | kr. | 16.700,- |
| Stuðningur ..... | kr. | 7.500,- |
| | kr. | 24.270,- |

Útreiðslur:

| | | |
|---|---|---|
| Prenting, tilfarsrit o. a. ..... | kr. | 4.800,- |
| Rættlestur ..... | kr. | 1.200,- |
| Postgjald, box ..... | kr. | 1.280,- |
| Telefon ..... | kr. | 980,- |
| Ljós, hiti, reingerð ..... | kr. | 2.800,- |
| Annað ..... | kr. | 500,- |
| Samsýning ..... | kr. | 12.710,- |
| | kr. | 24.270,- |

Ókeypiseintøk verða send teimum lýsandi.
Ókeypiseintøk verða send skúlabørnum.
Ókeypiseintøk verða send sjúkrahúsum.
Haldarar: 200, haldaragjald kr. 30,- um árið.

Viðvíkjandi ætlan fyri 1986/87 og 1987/88, so verður hon lutfalsliga tann sama sum í ár — ætlandi lítil og eingin broyting.

— — — — —

**Viðmerkingar landsstýrisins:**

Uppskot landsstýrisins er at játta 45.000 kr. til bæði bløðini, soleiðis:

| | |
|---|---|
| Til »Barnatíðindi« verður játtað | 7.500 kr. |
| Til »Barna- & Ungdómsblaðið« verður játtað | 37.500 kr. |

**Ad § 15 - 15907/323037 Meginfelag áhugaleikara Føroya.**

Sbrt. skriv dagf. 10. juli 1985:

Meginfelag áhugaleikara Føroya takkar fyri játtaðan stuðul í hesum fíggjarári og loyva okkum við hesum at søkja um 330.000,- kr. úr landskassanum fyri fíggjarárið 1986 sambært hjáløgdu fíggjarætlan. Grannskoðaður roknskapur fyri 1984 er fyrr sendur landsstýrinum. Roknskapur fyri norðurlendskari teaturstevnu í Føroyum í mai 1985 verður sendur landsstýrinum, tá hesin er grannskoðaður.

MáF hevur 8 limafeløg — Havnar Sjónleikarfelag, Klaksvíkar Sjónleikarfelag, Kvívíkar Sjónleikarfelag, Stranda Sjónleikarfelag, Virkið á Sandi, Royndin í Nólsoy, Eydnan á Oyrarbakka og Hvalbiar Sjónleikarfelag. — Onkur einstaklingur hevur eisini meldað seg sum lim í MáF.

Viðvíkjandi virkseminum hjá felágnum vísa vit til frágreiðing í seinastu umsókn okkara frá 24. okt. 1984, og kunnu annars siga frá, at felagið hevur ætlanir um framhaldandi skeiðvirksemi v. m. — Avgjørt er at halda eitt skeið viðvíkjandi »Pallsmíð/Scenografi« í okt. mánað við íslendskum gestalærara. — Í november mánað verður tiltakið »Orð og Leikur« uppafturtikið í samstarvi við Útvarp Føroya. Í januar mánað 1986 roknast tiltakið »Orð og Leikur« enn einaferð at verða fyriskipað í útvarpinum. — Í apríl/mai 1986 fyrireika vit eitt tiltak, har verkevnið verður at fáa bókina »Feðgar á Ferð« eftir Heðin Brú gjørda til leikrit, antin til leikpall ella til sjónvarpsfilm. Ætlaða tiltakið verður væntandi hildið hjá felagnum »Virkið« á Sandi og er ein roynd at umskapa bókmentir til dramatikk. Vit hava fingið játtan frá Ullu Ryum, dramatikara úr Danmark at koma higar at standa fyri hesum tiltaki, sum er ætlað rithøvundunum og sjónleikarum. — Afturat hesum er ætlan at gera eitt skeið fyri ungfólki viðvikjandi »Klovnarí og mimu«. — Norðurlanda Húsið hevur bjóðað MáF at samstarva viðvikjandi skeiðum í »Rødd og rørslu«, og hetta er sostatt eisini við í tíðarætlan okkara.

Royndir okkara eru, at skal leiklistini vera liv lagað, verða vit framhaldandi at arbeiða við tiltøkum, sum styrkja hesa listagrein og vilja vit royna at styrkja og styðja feløg, eins væl og einstaklingar at arbeiða við evnunum og evnunum.

Hjáløgd er »Rapport fra Færøerne« til tykkara kunnleika. Henda frágreiðing var gjørd í samband við norðurlendsku stevnuna.

Við vón um vælvild og góða undirtøku sendir felagið inn hesa umsókn um studning fyri 1986 upp á 330.000,- kr.

— — — — —

Fíggjarætlan 1986 v. m. til skjals á landsskrivstovuni.

**Ad § 15 - 15907/323053 Útgáva av barnabókum.**

Sbrt. skriv dagf. 17. juni 1985:

Vísandi til skriv tykkara frá 15. mai í ár. F. L. j. nr. 400 - 39, fari eg vegna Bókadeild Føroya Lærarafelags at søkja um studning at geva barna- og ungdómsbøkur út fyri

kr. 650.000,-
og kr. 250.000,-.

Fyrra talið er tað sama sum í seinastu umsókn, og fingu vit játtaðar kr. 450.000,- fyri ¼ ár, og hetta takka vit fyri.

Seinna talið er ætlað at brúka til at stovna ein bókaklubba til 3 - 9 ára gomul børn. — Ásannandi tann vaksandi fremmanda ágangin, m. a. við video, fylgisveina-sjónvarpi o. s. fr., halda vit tað vera alneyðugt at geva okkara komandi ættarliðum eitt betri heimligt støði at standa á. Og tað halda vit okkum kunna gera við at bjóða hesum aldursbólki góðan lesna á móðurmálinum, har dentur verður lagdur á bøkur við føroyskum innihaldi.

c) Løs medhjælp — til spidsbelastninger i forbindelse med ensilering o. l.
d) Løn for alm. rengøringsarbejde er incl. i konto 313105

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4—31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 83904 Ymiskar inntøkur | 70.511 | * | 50.000 | ÷ 80.000 |
| 103168 Løn - sáttmálaløn | 0 | * | 493.405 | 533.000 |
| 103143 Løn - starvsfólk | 363.962 | * | 461.485 | 498.000 |
| 103143 Løn nýnormering | 0 | * | 340.000 | 367.000 |
| 103288 Løn - onnur | 0 | * | 55.000 | 55.000 |
| Skeið/endurútbúgving/ starvsfólk | 0 | * | 20.000 | 20.000 |
| 113202 Ferða- og dagpen., innanlands | 0 | * | 50.000 | 50.000 |
| Ferða- og dagpen., uttanlands | 0 | * | 25.000 | **) 0.0 |
| 203602 Borðfæ | 0 | * | 10.000 | 10.000 |
| 213105 El, hiti og vask | 0 | * | 210.000 | 210.000 |
| 213408 Umvælingar v. m. | 0 | * | 20.000 | 20.000 |
| 213702 Ognartrygging | 0 | * | 40.000 | 40.000 |
| 233051 Innbúgv | 0 | * | 35.000 | 35.000 |
| 233155 Prentlutir | 0 | * | 3.000 | 3.000 |
| 233259 Postgjald | 485 | * | 1.500 | 1.500 |
| 233354 Telefon, telex, telefax | 0 | * | 10.000 | 10.000 |
| 233561 Aðrar skrivstovuútr. (EDV) | 0 | * | 120.000 | 40.000 |
| 253131 Leysafæ | 0 | * | 35.000 | 35.000 |
| 253251 Sáðing | 7.840 | * | 368.000 | 368.000 |
| Fóður, hjálpievni, kálvar | 0 | * | 150.000 | 150.000 |
| 253284 Ísáðingarútreiðslur | 456.932 | * | 548.000 | 548.000 |
| 253292 Nýkeyp, royndaramboð og maskinur o. a. | | * | 750.000 | 750.000 |
| 253903 Aðrar útreiðslur | 24.531 | * | 35.000 | 35.000 |
| 253928 Tænastuaklør, rakstur v. m. | 34.926 | * | 125.000 | 125.000 |
| 343109 Royndarstøð í grunn | 6.000.000 | 4.750.000 | ? ? | 0 |
| Tilsamans kr.: | | | 3.955.390 | 3.823.500 |

*) Játtan í 1985 hevur allar útreiðslur førdar undir konto 253903, tilsamans 750.000 kr.
**) Ferða- og dagpeningur uttanlands verður latin úr landskassanum.

| | Skipað størv 31.3.1985 | | Nýskipað størv 1.4.1985 | Leys hjálp 1.4.1985 | Tímalønt 1.4.1985 | Løn [1] 1.4.1985 | | Nýnorm-ering [2] | Játtan 1984/85 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | sett | leys | | | | lønafl. | kr. | | |
| Sáttmálalønt | | | | | | | | | |
| - | | | 1/5/1985, stjóri | | | 09.01.15 | 297.464 | | 400.000 |
| - | | | 1/7/1985, hjálparmaður | | | 09.01.?? | 195.941 | — anslået | |
| - | | | | | | | | | |
| Starvsfólk | | | | | | | | | |
| - | 1 | | | | | 7 | 150.646 | | |
| - | 1 | | | | | 9 | 152.156 | | 250.000 |
| - | 1 | | | | | 9 | 158.683 | | |
| - | | | Traktorførari pr. 1/8/85 | | | | | 150.000* | |
| Næmingar | | | Ung hjálp/næmingur 1/9/85 | | | | | 80.000* | |
| - | | | Ung hjálp/næmingur 1/4/86 | | | | | 80.000* | |
| - | | | Leys hjálp, uml. 400 tímar. | | | | | 30.000* | |
| - | | | Leys hjálp, til reingerð | | | | | 25.000* | |

ad [1]) Møguligt eftirlønargjald skal íroknast lønina.

ad [2]) Umsókn um nýnormering skal grundgevast.

*) Grundgevingar fyri nýnormeringar finnast í hjálagda teksti.

»Arbejdsplan for Royndarstøðin . . .« til skjals á landsskrivstovuni.

**Ad § 17 - 17901/343054-343021-343013-343038 Føroya Jarðarráð**

Sbrt. skriv dagf. 5. juli 1985

Viðlagt figgjarætlan fyri 1986, ið umfatar:

mjólkarstudning
studning til kjøt og egg
studning til súrhoyggjabrunnar
studning til stráfóður
veltistudning
húsdýralógina
íløgur í Jarðargrunnin og
rentustudning.

| | Nýtsla 84/85 | Játtan 85[1]) | Ætlan 1986 | Uppskot landsstýris-ins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| Mjólk | 8.900.000 | 6.750.000 | 10.199.000 | 10.200.000 |
| Kjøt, egg [2]) | | 1.275.000 | 1.741.000 | 1.850.000 |
| Súrhoyggjabr. | 232.000 | 450.000 | 600.000 | 400.000 |
| Stráfóður | 700.000 | 675.000 | 900.000 | 800.000 |
| Nýdyrking v. m. | 2.400.000 | 1.500.000 | 2.000.000 | 2.000.000 |
| Húsdjóraaling | 425.000 | 225.000 | 400.000 | 400.000 |
| íløgur | 4.000.000 | 3.750.000 | 6.000.000 | 5.200.000 |
| Rentustudningur | 2.200.000 | 1.725.000 | 2.300.000 | 2.300.000 |
| Mett yvirnýtsla 1984/85 | | | 370.000 | — |
| | 18.857.000 | 16.350.000[3]) | 24.510.000 | 23.150.000 |

1) Hesi tølini eru fyri apríl-desember 1985.
2) Kontoin er nýggj, var fyrr saman við mjólkarframleiðsluni.
3) Umroknað til eitt heilt ár kr.: 21.800.000.

Orsakað av umlegging av tíðarskeiðnum fyri løgtingsfíggjarlógini, soleiðis at hon í ár skal gerast eitt hálvt ár fyrr enn vanligt, hava vit ikki tøk rokn-skapartøl fyri seinasta fíggjarár 1984/85, men eru hesi gjørd eftir meting útfrá fyribilstølum.

**Viðm. til mjólkarstudningin:**
Mjólkarmongdin til mjólkarvirkini, sum studningur varð latin til í 1984/85 var 4.485.000 litrar, ið er ein vøkstur uppá 24% frá árinum fyri.

Studningur varð latin til uml. 7.600 litrar av privatseldari mjólk.

Fyri 1985 er roknað við einum vøkstri uppá 9% í mun til árið fyri, soleiðis at framleiðslan verður 4.900.000 litrar.

Fyri 1986 verður roknað við einum vøkstri uppá 6%, sum gevur eina framleiðslu uppá 5.200.000 litrar.

Ráðið skjýtur upp at studningsupphæddirnar verða hesar fyri 1986:
studningur til 1. fl. mjólk: 1,30/l.
studningur til 2. og 3. fl. mjólk: óbroyttur, ávikavist 45 og 20 oyru liturin
javningarstudningur okt.-des.: kr. 0,35/l.
flutningsstudningur: kr. 0,45/l
rakstrarstudningur: kr. 0,25/l.

Við einum mettum góðskubýti uppá 92% av 1. floks mjólk, 4,5% 2. floks mjólk og 2,5% 3. floks mjólk, gevur hetta eitt meðalstudning uppá kr. 1.22/l.

Útgreiningin av mjólkarstudninginum verður sostatt:

| | kr. |
|---|---|
| Mjólk, seld til virkini | 6.344.000 |
| Javningarstudningur | 520.000 |
| Privatsøla | 10.000 |
| Rakstrarstudningur til virkini | 1.300.000 |
| Flutningsstudningur | 2.015.000 |
| Rómi | 10.000 |
| | 10.199.000 |

**Viðm. til kjøt og egg:**
Mælt verður til somu upphæddir, sum eru galdandi fyri 1985.

| Framleiðslan verður væntandi: | kr. | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|
| neytakjøt, 93.000 kg á kr. 12,- | 1.116.000 | 1.115.000 |
| neytakjøt, (útoyggjar) 7000 kg á kr. 18,- | 126.000 | 125.000 |
| egg, 3.700.000 stk. á kr. 0,07*) | 259.000 | 370.000 |
| svínakjøt, 30.000 kg á kr. 8,- | 240.000 | 240.000 |
| | 1.741.000 | 1.850.000 |

*) uppskot 3.700.000 á kr. 0,10 = kr. 370.000

**Viðm. til súrhoyggjabrunnastudningin:**
Mælt verður til somu upphædd sum í ár - kr. 600.000.

**Viðm. til stráfóðurstudningin:**
Henda studningsskipanin sær út til at hava havt gott árin á framleiðlsuna, og verður tí mælt til somu játtan - kr. 900.000.

**Viðm. til uppdyrkingina:**

Tað er ikki uppgjørt, hvussu nógv er velt hetta seinasta árið.

Saman við tí reiðiliga stóra undirskotinum, ið stavar frá 1983/84, skal eisini gerast vart við, at útreiðslurnar av hesi konto til køstastudning, skeljar og amboð í 1984/85 var uml. kr. 230.000. Verður tí mælt til somu upphædd í 1986 - kr. 2.000.000.

**Viðm. til húsdýraalingina:**

Tær smærru hækkingarnar, sum nú hava verið í fleiri ár, hava ikki fylgt við vøkstrinum á hesi konto. Serliga er tað studningurin til vaskirættir, ið er vaksin nógv, og var solciðis í 1984/85 kr. 82.000.

Eisini hevur tann stóra framgongdin innan mjólkaframleiðsluna ført við sær hægri premiur.

Verður tí mælt til eina játtan uppá kr. 400.000.

**Íleggingar og rentustudningur:**

Útfrá somu grundgeving sum seinast, og støðugt vaksandi íløgukostnaði, og at roknast kann nú við luttøku í tíggingini av nýggju royndarstøðini, verður mælt til, at íløgustudningurin verður kr. 6.000.000 og rentustudningurin kr. 2.300.000.

**Viðm. til yvirnýtsluna:**

Sambært fyribilstølum sær saldoin á niðanfyristandandi konti soleiðis út við árslok 1984/85:

| | | |
|---|---|---|
| Studningur til mjólkarframleiðslu v. m. ..... | ÷ | 900.000 |
| Studningur til súrhoysbrunnar ..... | + | 1.200.000 |
| Studningur til nýdyrking ..... | ÷ | 620.000 |
| Studningur til húsdjóraaling ..... | ÷ | 150.000 |
| Studningur til stráfóður ..... | + | 100.000 |
| Yvirnýtsla alt ..... | kr. | 370.000 |

og verður tí bíðið um eina eykajáttan samsvarandi.

**Ad § 17 - 17901/343079 Træplanting**

Sbrt. skriv móttikið 25. juli 1985:

| **Kontonummar og navn Skógfriðingarnevnd Føroya 17901 - 343079 (61017 - konto 723000-3867)** | **Roknskapur 1984/85** | **Játtan 1985 1/4—31/12** | **Uppskot 1986** | **Uppskot landsstýrisins 1986** |
|---|---|---|---|---|
| | | 675.000 | 1.170.000 | 900.000 |
| | | | | |
| | | | | |
| Leiguútreiðslur | Tórh.K 1.T.H 3.000+1.000 | | | |
| | | | | |
| 01.07.85: Endalig uppgerð 84/85 | 713.950,04 | | | |
| 84/85: Herav brúkt til div. form løn | 573.484,22 | | | |
| Leiguútreiðslur 84/85 | 4.000,00 | | | |
| | | | | |
| Sostatt, leiðbeining Pkt. 5 | 136.465,82 | | | |
| | | | | |

**Ad § 17 - 17901/343117 Vakstrarhús í grunn**

Sbrt. skriv dagf. 23. juni 1985 frá Føroya Garðyrkisfelag:

Eftir munnligari áheitan frá landsstýrinum, vil felagið koma við hesum tilmælum:

**Uppskot 1.** Sett verður eitt ***garðyrkiráð***, við umboðum úr landsstýri, jarðarráði, menningargrunni og garðyrkifelagi.

**Uppskot 2.** Føroya Jarðarráð fær peningin at umsita.

**Uppskot 3.** Peningurin verður tøkur hjá felagnum sjálvum at ráða yvir.

**ad 1).** Garðyrkiráðið skal viðgera allar spurningar viðvíkjandi uppbygging av vinnuni, so sum: figging, rakstrarætlanir, projektering, søluviðuskifti, *) royndarvirksemi, ráðgeving, nýbyggingarloyvi, útbyggingarloyvi o. a.

**ad 2).** Føroya Jarðarráð hevur higartil figgjað stóran part av vakstrarhúsbyggingini (60% lán), fær møguleika eisini at veita írestaðu 30%, til dømis sum studning. Annars eisini fær møguleika at lata meiri stuðul til annan tørv innan garðyrkisvinnuna, her kundu vit tó hugsað okkum at felagið fekk umboðan í Føroya Jarðarráð.

**ad 3).** Felagið nýtir peningin til stovnsetan av sølufelagskapi, setan av ráðgeva sum eisini kann verða skrivari. Felagið tekur sær av ymsum neyðugum royndum og kanningum.

*) Viðlagt:
Skriv sent Føroya Landsstýri í 1983, sum vit ongantíð hava fingið svar uppá, hetta kundi verið ynskiligt, nú nýggja royndarstøðin skal byrja sítt virksemi.

*) Til skjals á landsskrivstovuni.

— — — — — —

**Viðmerkingar landsstýrisins:**

Landsstýrið hevur samtykt at veita 1.000.000 kr.

**Ad § 18 - 18109 Arbeiðseftirlitið**

**Sbrt. skriv dagf. 9. juli 1985:**

| Konto: | Rokn-skapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4–31/12 | Ætlan 1986 | Uppskot landsstýr-isins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 83904 Ymiskar inntøkur | ÷ 36.025,- | ÷ 24.000,- | ÷ 40.000,- | ÷ 40.000,- |
| 103143 Løn starvsfólk | 554.337,- | 557.325,- | 958.387,- | 840.657,- |
| 103168 Løn sáttmálalønt | 46.810,- | 204.390,- | 274.000,- | 296.000,- |
| 103222 Løn reingerð | 31.589,- | 24.450,- | 35.800,- | 39.000,- |
| 103405 Løn-úrtíðarløn | 16.589,- | 33.750,- | 45.000,- | 49.000,- |
| 103509 Samsýningar | 93.164,- | 67.200,- | 132.100,- | 132.100,- |
| 113202 Ferða- og dagpen. (innanl.) | 91.011,- | 64.125,- | 92.000,- | 92.000,- |
| 123103 Skeið og onnur upplýsing | 93.945,- | 86.250,- | 235.700,- | 185.000,- |
| 203308 Lýsingar | 9.062,- | 10.500,- | 16.000,- | 16.000,- |
| 203403 Dagbløð, tíðarrit v. m. | nýggj kto. | 4.725,- | 6.600,- | 6,600,- |
| 203507 Umboðan | nýggj kto. | 9.000,- | 12.600,- | 0,- |
| 213105 El, hiti og vask | 8.845,- | 12.750,- | 17.900,- | 17.900,- |
| 213806 Leiguútreiðslur | 146.395,- | 88.500,- | 126.500,- | 126.500,- |
| 233051 Innbúgv | 60.856,- | 35.212,- | 137.400,- | 126.000,- |
| 233155 Prentlutir | 49.664,- | 41.250,- | 57.800,- | 57.800,- |
| 233259 Postgjald | 3.135,- | 3.000,- | 4.500,- | 4.500,- |
| 233354 Telefon og telex | 35.582,- | 30.000,- | 42.000,- | 42.000,- |
| 233504 Sakkøn hjálp | 509,- | 9.000,- | 12.600,- | 12.600,- |
| 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur | 40.130,- | 30.000,- | 42.000,- | 42.000,- |
| 253467 Trygdarútgerð | nýggj kto. | 4.125,- | 5.800,- | 5.800,- |
| Arkitektur | | | | *)240.000,- |
| Íalt: | 1.281.623,- | 1.291.552,- | 2.214.687,- | 2.291.457,- |

*) **Viðmerkingar landsstýrisins:**

Arkitektur at hava umsjón og eftirlit við landsins ognum.

**ad konto nr. 83904.**
Ymiskar inntøkur koma at hækka við árunum av fleiri lógarbundnum sýns- og kanningararbeiði í vanligum prisvøkstri.

**ad konto nr. 103143.**

| | | |
|---|---|---|
| Bruttoløn skrivstovufólk | kr. | 167.587,- |
| do. do. $^1/_2$-dags | kr. | 72.800,- |
| do. eftirlitsmaður | kr. | 198.000,- |
| do. do | kr. | 185.000,- |
| do. nýggjur eftirlitsmaður | kr. | 180.000,- |
| do. $^1/_2$-dags arbeiðsmedisinari | kr. | 130.000,- |
| do. frítíðaravloysari | kr. | 25.000,- |
| Bruttoløn ialt | kr. | 958.387,- |

Nýggjur eftirlitsmaður er tikin við sambært tilmæli til Landsstýrið dgf. 28.2.1985.
Ætlanin er, at hesin verður støðaður í Klaksvík.

**ad konto nr. 103168**

| | | |
|---|---|---|
| Bruttoløn leiðara | kr. | 274.000,- |

**ad konto nr. 103222**

| | | |
|---|---|---|
| Reingerð økt til | kr. | 35.800,- |

**ad konto nr. 103405**

| | | |
|---|---|---|
| Sambært sáttmála hava eftirlitsmenn rætt til yvirtíð | kr. | 45.000,- |

**ad konto nr. 103509**

| | | |
|---|---|---|
| Landskassans partur av løn til justermeistara kr. 89.600,- + 5% dýrtíð | kr. | 94.600,- |
| 13.6.1985 viðtók Landsstýrið, at setast skuldi eitt arbeiðsumhvørvisráð. Ætlaðar útreiðslur hertil, fundarpeningur v.m. | kr. | 37.500,- |
| Ætlaðar útreiðslur alt fyri konto nr. 103509 | kr. | 132.100,- |

**ad konto nr. 113202**

| | | |
|---|---|---|
| Ferða- og dagpeningur innanlands. Útreiðslurnar justeraðar eftir roknskapinum 1984/85 | kr. | 92.000,- |

**ad konto nr. 123103**

Skeiðvirksemi og onnur upplýsandi tiltøk.

a. Arbeiðseftirlitið hevur seinastu árini koyrt certifikatskeið fyri krana- og trukkførarar, við góðum úrsliti.
Stórur tørvur er á at halda áfram og útbyggja hetta tiltak.

| | | |
|---|---|---|
| Útreiðslur til kranføraraskeið (ætlaðar) ..... | kr. | 118.500,-. |
| Landskassans partur ⅔ av hesum = ..... | kr. | 79.000,- |
| Útreiðslur til trukkføraraskeið (ætlaðar) ..... | kr. | 95.500,-. |
| Landskassans partur ⅔ av hesum = ..... | kr. | 63.700,- |

b. Skeið fyri tryggleikafólk, sum Arbeiðseftirlitið hevur skyldu at geva frálæru í um trygd á arbeiðsplássunum ..... kr. 30.000,-

c. Skeið fyri málarar, sum nýta epoxy- og polyurethan evnir ..... kr. 22.000,-

d. Temadagar um ymisk evnir innan arbeiðsumhvørvið ..... kr. 8.500,-

e. **Framsýning.** Arbeiðseftirlitið hevur luttikið við framsýningum av persónligari trygdarútgerð á handilsstevnum, og hava vit fingið prógv fyri tað positiva árin, hetta tiltak hevur.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 21.000,-

f. Umseting av útlendskum tilfari innan arbeiðaravernd til føroyskt ..... kr. 11.500,-

Samlaðar útreiðslur fyri konto 123103 ..... kr. 235.700,-

**ad konto nr. 203308**

Av tí at skeiðvirksemi okkara er støðugt vaksandi, økjast hesar útreiðslur ætlandi til ..... kr. 16.000,-

**ad konto nr. 203403**

Kontoin er dýrtíðarviðgjørd ..... kr. 6.600,-

**ad konto nr. 203507**

Kontoin er dýrtíðarviðgjørd ..... kr. 12.600,-

**ad konto nr. 213105**

Kontoin er dýrtíðarviðgjørd ..... kr. 17.900,-

**ad konto nr. 213803 Leiguútreiðslur.**

| | | |
|---|---|---|
| Árlig leiga ..... | kr. | 120.500,- |
| Dýrtíðarhækkan ..... | kr. | 6.000,- |
| árlig leiga ialt ..... | kr. | 126.500,- |

**ad konto nr. 233051 Innbúgv.**

a. Í samband við setan av arbeiðsmedisinara og nýggjum eftirlitsfólki, er tørvur á skrivaraborðum, hillum, lf. v. m.
Ætlaðar útreiðslur hertil ..... kr. 14.000,-

b. Neyðug útgerð til arbeiðsmedicinarin
Ætlaðar útreiðslur hertil ..... kr. 12.000,-

c. Í samband við frálæru í trygd á arbeiðsplássum, er tørvur á ymiskari útgerð, so sum filmar, videobond v. m.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 15.000,-

d. Arbeiðseftirlitinum tørvar eina EDV-útgerð til okkara skrásetingararbeiði av virkjum, arbeiðsfólki, tekniskari útgerð, vanlukkutilburðum v. m.
Fyri eina kompletta EDV-útgerð við eini serskipan, sum er serliga tillagað okkara uppgávum, er kostnaðurin sambært tilboð kr. 171.090,-, og kann hendan fáast uppá eina leasingskipan yvir 40 mánaðir fyri kr. 5.533,- pr. mánað svarandi til ..... kr. 66.400,-/ár
Hetta er bæði bíligari og betri skipan enn ein fyrr umrødd on-line skipan saman við Hagdeildini.

c. Tørvur er á einari miðvísari útbygging av tólum til arbeiðshygiejniskar mátingar.
Ætlaðar útreiðslur hertil ..... kr. 30.000,-

Samlaðar útreiðslur fyri konto 233051 kr. 137.400,-

**ad konto nr. 233155 Prentlutir.**

Útreiðslurnar dýrtíðarviðgjørdar ..... kr. 57.800,-

**ad konto nr. 233259 Postgjald.**

Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 4.500,-

**ad konto nr. 233354 Telefon.**

Útreiðslurnar dýrtíðarviðgjørdar ..... kr. 42.000,-

**ad konto nr. 233504 Sakkøn hjálp.**

Útreiðslurnar dýrtíðgjørdar ..... kr. 12.600,-

**ad konto nr. 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur.**

Útreiðslurnar dýrtíðarviðgjørdar ..... kr. 42.000,-

**ad konto nr. 253467 Trygdarútgerð.**

Arbeiðseftirlitið krevur, at arbeiðararnir nýta serliga verndarútgerð til ávís arbeiðir, tað veri seg trygdarskógvar, hjálmar, oyrnavernd, brillur, arbeiðsbúna v. m.
Neyðugt er, at eftirlitsmenn sjálvir ganga sum eitt gott dømi og nýta hesa útgerð, tá slík virkir verða vitjað.
Ætlaðar útreiðslur ..... kr. 5.800,-

Sbrt. skriv dagf. 25. juli 1985:

**Viðv. eykafigging til $CO_2$-mátara (inniklima).**

Sambært samrøðu við landsstýrismann Vilhelm Johannesen tann 24. juli 1985, hevur umsókn okkara um eykafigging til omanfyri nevnda mátara verið til viðgerðar á landsstýrisfundi.

Avgjørt bleiv her, at vit keypa hesa útgerð nú, men at útreiðslurnar hertil verða tiknar við á komandi figgjarlóg.

Í okkara figgjarætlan fyri 1986 er upphæddin á konto nr. 233051 (innbúgv) sett til kr. 137.400,-.

Vísandi til omanfyri standandi verður tí biðið um, at henda upphædd verður broytt tilsvarandi, soleiðis at her kemur at standa:

kr. 137.400,- + 69.000,- = ..... kr. 206.400,-

Samlaða upphæddin fyri rakstrarstaðið 18109 verður sostatt:
kr. 2.214.687,- + 69.000,- = ..... kr. 2.283.687,-

— — — — — —

**Viðmerkingar landsstýrisins:**

Konto 103143 Løn starvsfólk: Í eftirlitsfólk ikki játtað.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Konto 233051 | Innbúgv: Ikki játtað EDV | kr. | 66.400,- |
| | Ikki játtað innbúgv | kr. | 14.000,- |

men játtaðar eru 69.000 kr. til $CO_2$-mátara til inniklimaroyndir.

**Ad konto § 18 - 18152 Føroya Brandskúli við Áir**

**Sbrt. skriv móttikið 12. juli 1985:**

| **Kontonummar og navn** | **Roknskapur 1984/85** | Játtan 1985 1/4-31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýris-ins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| Rakstrarstað 18152 Konto nr. 253903 | 875.000,- | 574.000,- | 670.100,- | 335.050,- |
| Føroya Brandskúli við Áir | | | | |

**Sundurgreining av uppskoti fyri 1986:**

| | |
|---|---|
| Løn til støðlciðara | 230.500,- |
| Løn tímalønt fólk | 138.800,- |
| Hiti + el | 59.400,- |
| Telefon | 6.400,- |
| Umvælingar | 75.000,- |
| Útgerð (slangur, fløskur v. m.) | 35.000,- |
| Liðuggerð av forskipi | 125.000,- |
| Ialt | 670.100,- |

**Nevndin fyri Føroya Brandskúla vil hervið heita á figgjarnevndina um at taka helvtina av nevndu upphædd - nevnliga kr. 335.050,-** við á figgjarlógina fyri 1986, og vilja vit so søkja tryggingarnar um at figgja hina helvtina, eins og undanfarnu ár.

**Ad § 18 - 18202 Bileftirlit**
**Sbrt. skriv dagf. 20. juni 1985:**

Hjálagt verður hervið sent uppskot um figgjarlóg fyri Bileftirlitið fyri 1986. Vegna feriu verður fylgiskriv sent, tá stovnsleiðarin er afturkomin.

| Kontonummar og navn | Rokn-skapur 1984/85 | Játtan 1985 | Uppskot 1986 | Uppskot landstýris-ins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 83904 Ymiskar Inntøkur | 2.086.380,60 | 2.062,5 | 3.000.0 | 3.000.0 |
| 103143 Løn - Starvsfólk | 741.312,65 | 690.0 | 1.270.0 | 1.372.0 |
| 103222 Løn - Reingerð | 98.016,08 | 97.5 | 130.0 | 130.0 |
| 103288 Løn - Onnur | 537.840,70 | 487.5 | 650.0 | 650.0 |
| 103405 Løn - Útíðarløn | 32.112,34 | 45.0 | 60,0 | 30.0 |
| 113202 Ferða og dagpeningur, innanl. | 103.228,95 | 112.5 | 150.0 | 115.0 |
| 123128 Eftirútbúgving | 4.611,01 | 30.0 | 50.0 | 25.0 |
| 203308 Lýsingar | 0.0 | 0.7 | 1.0 | 1.0 |
| 203403 Dagbløð, tíðarrit v. m. | 3.170,19 | 3.0 | 4.0 | 4.0 |
| 213105 El, hiti og vask | 60.860,17 | 60.0 | 80.0 | 80.0 |
| 213806 Leiguútreiðslur | 274.182,96 | 247.5 | 430.0 | 430.0 |
| 233051 Innbúgv | 6.338,00 | 15.0 | 20.0 | 12.0 |
| 233155 Prentlutir | 120.087,91 | 37.3 | 150.0 | 130.0 |
| 233259 Postgjald | 20.898,00 | 15.0 | 30.0 | 30.0 |
| 233354 Telefon og Telex | 54.384,00 | 60.0 | 80.0 | 80.0 |
| 233553 EDV-Útreiðslur | 89.818,10 | 90.0 | 120.0 | 120.0 |
| 233561 Aðrar Skrivstovuútreiðslur | 30.640,88 | 30.0 | 40.0 | 30.0 |
| 253306 Amboð | 218.329,23 | 150.0 | 200.0 | 200.0 |
| 253881 Hálkubreyt | 500.000,00 | 562.5 | 1.000.0 | 1.000.0 |
| 253903 Aðrar Útreiðslur | 64.616,62 | 45.0 | 60.0 | 60.0 |
| 253928 Tænastuakfør, rakstur v. m. | 126.204,30 | 75.0 | 100.0 | 100.0 |
| 353075 Bileftirlitið í grunn | 1.000.000,00 | 1.125,0 | 3.000.0 | 1.500.0 |
| | 2.000.269.0 | 1.916.2 | 4.625.0 | 3.099.0 |

Evni: Viðmerkingar til figgjarlógaruppskot, sum sent er landsstýrinum 20.6.85.

Skjøl: 1) Uppskotið og fylgiskriv
2) Skriv sent figgjarnevndini 25.4.85, viðvíkjandi figgjarstøðu stovnsins.

Sum viðmerking til skriv landsstýrisins J. nr. 400-39 dagfest 8. mai 85, skal sigast, at samsvar altíð hevur verið millum játtan og nýtslu hjá stovni okkara.

Í hesum skrivi er í samband við byggjan av sýnshøll í Havn m. a. greitt frá biltalsvøkstrinum, lógskyldugum sýnum og koyriroyndum. Líkaleiðis er víst á inntøkur stovnsins og møguligan inntøkuvøkstur, soleiðis at møguleiki vildi verið fyri, at stovnurin kundi hvílt í sær sjálvum.

**83904 Ymiskar inntøkur:**
Víst verður til skjal 2, blað 5.

**103143 Løn starvsfólk:**
At tørvur er á fleiri starvsfólkum, skilst m. a. av at biltalið er so nógv vaksið (sí skjal 2 síðu 2). Fyri at greiða bert tey lógarfestu árligu sýnini, sum eru ca. 20.000 í talið (umsýn + hýruvognar 2 ferðir) so krevjast 6-7 mans til hetta arbeiði, harnæst er so koyriroyndir, ferðsluóhapp og umsiting.

Tá vit enn eru so fáir, er tað tí, at arbeiðsumstøðurnar hava verið sera ringar, hølum viðvíkjandi, harnæst hevur EDV-skipaniu darvað okkum í fleiri ár, soleiðis at møguleiki hevur ikki verið fyri at framt sýnsarbeiði til fulnar.

Tað eru fleiri ár síðan, at Suni Rasmussen og Brynjálvur Jensen eru farnir í annað starv, uttan at nakar er komin í teirra stað. Talan hevur tí verið um minking av mantalinum. Sum tað skilst á skjali 2, síðu 2, so hevur Eysturoyggin nærum 4000 bilar og er sostatt tørvur á fullum starvi í økinum. Ein maður er fastbúgvandi í Klaksvík og ein í Suðuroy.

**103405 Úrtíðarløn:**
Hóast arbeiði okkara er skipað til at verða í vanligari tíð, er kortini neyðugt við nakað av yvirtíðararbeiði, grundað m. a. á at nógvar innkoyringar og ajourføringar á EDV-skipanini verða at gerast aftaná kl. $18^{00}$.

**233155 Prentlutir:**
E.D.V.-skipanin er kostnaðarmikil viðvíkjandi skjølum og tilíkum.

**213806 Leiguútreiðslur:**
Landsstýrið er vitandi um 100% leiguvøksturin, sum vit hava verið fyri í Havn.

**253881 Hálkubreyt:**
Frá Havnar kommunu tykist nú at verða greitt, at vit fáa økið úti í Havnardali. Vísast skal til nýggja ferðslulógaruppskotið, sum kemur til viðgerðar

á tingi í heyst, har verður m.a. krav, at koyritoyndir verða í tveimum pørtum, og í so føri er neyðugt við hálkubreyt.

**353075 Bileftirlitið í grunn:**
Nú er arbeiðið uppá høllina farið í gongd, og er lánjáttan løgd undir loft. Neyðugt er við øktum inntøkum og harvið størri játtan. Vist verður aftur til skjal 2, síðu 3 og 4.

---

**Ad § 18 - 18216/353209 Radioeftirlit.**
**Sbrt. skriv dagf. 19. juni 1985:**

Vísandi til bræv landsstýrisins F. L. j. nr. 400-39, dagsett 8. mai 1985, skulu vit mæla til, at settar verða kr. 325.000,- á fíggjarløgtingslóg fyri fíggjarárið 1986 viðvíkjandi rakstrarstaði 18216/353209: **Radioeftirlitið.**

Nevnda upphædd verður mett at nøkta raksturin av stovninum í fíggjarárinum 1986, um einki óvanligt verður áfatt.

*) Hjálagt ársfrágreiðing fyri 1984.

*) Til skjals á landsskrivstovuni.

---

**Ad § 18 - 18235 Ráðið fyri ferðslutrygd.**
Sbrt. skriv dagf. 1. juli 1985:

Ráðið fyri Ferðslutrygd loyvir sær hervið at heita á Føroya Landsstýri, um at tað í fíggjarárinum 1986 verða játtaðar ráðnum **kr. 674.750,-** til arbeiði tess og rakstur av skrivstovuni.

Ráðið hevur eisini sent Tryggingarsambandi Føroya umsókn um somu upphædd.

Samlaðu útreiðslurnar eru mettar til kr. 1.379.500,-.

Tær seinastu kr. 30.000,- metir ráðið at kunna fáa inn við limagjaldi frá kommunum og øðrum.

Vist verður annars til viðløgd skjøl.

**Yvirlit yvir tiltøk í fíggjarárinum 1986**

| | | |
|---|---|---|
| 1. Ungdómur og ferðsla | kr. | 45.000,00 |
| 2. Ferðsla og alkohol | kr. | 15.000,00 |
| 3. Filmir og myndir | kr. | 125.000,00 |
| 4. Ferðsluringur Barnanna | kr. | 110.000,00 |
| 5. Tilfar til barnagarðar | kr. | 20.000,00 |
| 6. Tilfar til skúlar | kr. | 30.000,00 |
| 7. Lyktakanning | kr. | 15.000,00 |
| 8. Árliga frágreiðing frá RFF | kr. | 10.000,00 |
| 9. Trygdarbelti | kr. | 18.000,00 |
| 10. Ferðslutrygdar-kontaktmannaskipan | kr. | 30.000,00 |
| | kr. | 418.000,00 |

**Viðmerkingar til omanfyri standandi:**

ad. 1. Tiltøk serliga ætlað at røkka ungdóminum (framh. kampanja).
ad. 2. Nýggj kampanja RFF fer undir.
ad. 3. Filmir og myndir at nýta í sambond við fundarvirksemi okkara og at sýna í S.V.F.
ad. 4. Virksemi hjá ferðsluringinum økist, og eru nú limir um alt landið.
ad. 5. Samprenting við »Trygg Trafikk« í Noregi av tilfari til barnagarðar.
ad. 6. Samprenting við »Trygg Trafikk« í Noregi av tilfari til skúlar.
ad. 7. Lyktakanning eins og undanfarin ár.
ad. 8. Árliga frágreiðingin frá RFF um ferðslustøðuna í Føroyum.
ad. 9. Nýggj kampanja RFF fer undir.
ad. 10. Samskipan av ferðslutrygdararbeiði í lokal ferðslutrygdarfeløg.

## Fíggjarætlan fyri 1986

| | | |
|---|---|---|
| Inntøkur: | | |
| Tilskot frá landinum | | 674.750 |
| Tilskot frá Tryggingarsambandinum | | 674.750 |
| Tilskot frá kommununum | | 30.000 |
| Útreiðslur: | | |
| a. Lønir | 270.000 | |
| b. Bókføring og grannskoðan | 10.000 | |
| c. Lýsingar, porto og telefon | 65.000 | |
| d. Leiga, hiti, ljós og reingerð | 60.500 | |
| e. Aðrar útreiðslur | 150.000 | |
| f. Tiltøk í komandi fíggjarári | 418.000 | |
| g. Samsýning til limir í undirnevndum | 50.000 | |
| h. Ferðaútreiðslur og fundir | 45.000 | |
| i. Keyp av tilfari | 90.000 | |
| j. Skeiðvirksemi hjá RFF | 30.000 | |
| k. Ferðslukonsulentvirksemi | 100.000 | |
| l. Dataútgerð til hagtøl v. m. | 80.000 | |
| m. Limagjald til PRI | 11.000 | |
| | kr. 1.379.500 | kr. 1.379.500 |

**Viðmerkingar til útreiðslusíðuna:**

ad. a. Lønir til leiðara og skrivstovufólk.

ad b. Útreiðslur til grannskoðan sambært roknskap.

ad. c. Útreiðslur til lýsingar, porto og telefon samb. roknskap. Ráðið metir tað hava týdning við upplýsandi og agiterandi lýsingum í bløðunum.

ad. d. Útreiðslur til leigu, ljós, hita og reingerð samb. roknskap.

ad. e. Ætlaðar aðrar útreiðslur at taka til, t. d. tá aktuel ferðsluviðurskifti krevja eyka virksemi.

ad. f. Tiltøk í komandi fíggjarári samb. hjálagda yvirlit.

ad. g. Samsýning til limir í teimum serstøku undirnevndum, sum settar eru av starvsnevndini.

ad. h. Ætlaðar ferðaútreiðslur og útreiðslur í samband við almennar fundir og framsýningar um ferðslutrygd.

ad. i. Ætlaðar útreiðslur til keyp av frálærutilfari, ið ókeypis verður latið skúlum og barnagørðum.

ad. j. Útreiðslur í samband við ferðslutrygdarskeið, ætlað ungum frá 16-20 ár, um alt landið.

ad. k. Ferðslukonsulentvirksemi skal skipast um alt landið. Hervið uppsøkjandi virksemi til skúlar, fyritøkur, samkomur og feløg, har ungdómur heldur til. Eisini skal konsulenturin samskipa ferðslutrygdararbeiði við at skapa lokal ferðslutrygdarfeløg við sjálvbodnum fólki. Ætlanin er, at RFF á henda hátt kann fáa enn betur samband við »ferðslubrúkarar«.

ad. l. Útgerð RFF ætlar at fáa sær í samb. við hagtalsviðgerð og kannan av skaðaorsøkum í ferðsluni.

ad. m. Útreiðslur í samband við at RFF er limur í »La Prevention Routiere Internationale« — PRI.

*) Roknskapur til skjals á landsskrivstovuni.

---

**Ad § 18 - 18268 Filmseftirlit**

Sbrt. skriv dagf. 30. juni 1985:

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4—31/12 | Uppskot 1986 | Við-merking | Uppskot landsstýrisins 1986 |
|---|---|---|---|---|---|
| 103143 Løn/starvsfólk | 8.179 | 0 | 80.000 | 1) | 80.000 |
| 103288 Løn/onnur | 21.000 | 20.500 | 12.000 | 2) | 12.000 |
| 103509 Samsýningar | 109.935 | 112.500 | 200.000 | 3) | 200.000 |
| 113202 Ferða- og dagp. innanl. | 0 | 0 | 25.000 | 4) | 25.000 |
| 213901 Ymiskar húsaútreiðslur | 20.130 | 0 | 1.000 | 5) | 1.000 |
| 233051 Innbúgv | 30.493 | 0 | 10.000 | 6) | 10.000 |
| 233155 Prentlutir | 0 | 0 | 3.000 | 7) | 3.000 |
| 233259 Postgjald | ? | 0 | 4.000 | 8) | 4.000 |
| 233354 Telefon og telex | 4.275 | 0 | 7.000 | 9) | 7.000 |
| 233561 Aðrar skrivstovuútr. | 16.969 | 0 | 10.000 | 10) | 10.000 |
| ? Ferða- og dagp. uttanl. | 0 | 0 | 6.000 | 11) | 6.000 |
| Tilsamans: | 210.881 | 133.000 | 358.000 | | 358.000 |

**Viðmerkingar til tey uppskotnu tølini:**

*Sum heild* kann sigast, at tað er torført í løtuni at meta um ta neyðugu peuingaupphæddina til Filmseftirlitið, tí
a) arbeiðsøkið er lógarbundið,
b) nýggja filmseftirlitslógin hevur bert virkað í fáar mánaðir,
c) filmseftirlitið er nógv meira umfatandi enn áður (video er nú við),
d) avgreiðslan er nýstovnað, og enn kennist ikki útbyggingartørvurin.

Seinastu árini undir gomlu filmseftirlitslógini hevur filmseftirlitið verið sera sparið og bert brúkt uml. 50% av játtanini, og so hevði eisini verið seinasta figgjarár, um ikki nýggja lógin móti endanum kom í gildi og álegði filmseftirlitinum eina nógv meira umfatandi arbeiðsbyrði og økta avgreiðslu við høli og skrivstovufólki.

Tá lógaruppskotið var lagt fram á ting, metti táverandi landsstýrismaður í lógarmálum leysliga filmseftirlitið fara at kosta uml. 500.000 kr. í 1983-krónum, og síðani kom sum kunnugt undir 2. og 3. viðgerð allur videogram-marknaðurin í Føroyum upp í filmseftirlitið.

Filmseftirlitið hevur roynt at gera umsitingina av lógini so bíliga.

**Viðmerkingar til uppskot filmseftirlitsins til játtan á figgjarlógina 86:**

Sum YVIRHØVUR gjørligt við m. a. í fyrstu atløgu at sleppa undan at gera nýtslu av dýrum EDV-skrásetingartólum í avgreiðsluni og at hjálpast við »biligt« skrivstovufólk stytst møguliga tið.

Filmseftirlitið roknar *ikki* við, at eftirlitið verður so kostnaðarmikið um eini tvey ár, men má tað vera øllum púra greitt, at eftirlitið verður sera arbeiðskrevjandi og samsvarandi dýrt í fyrstuni, nú skil skal fáast á teimum uml. 20.000 videogrammunum, sum frammanundan eru í umferð í Føroyum vegna tess, at videogram-marknaðurin púra ótálmaður hevur kunnað gjørt sær dælt í fleiri ár, meðan eingin lóggáva og tessvegna einki eftirlit hevur verið.

**1) 103143 Løn/starvsfólk:** Skrivstovukvinnan kostar í løtuni kr. 5.452 um mánaðin fyri hálvdagsarbeiði. Hóast sera ágrýtin, hevur tað verið neyðugt at latið hana arbeitt eyka fyri tímansløn, og so verður framyvir vónandi bert fyrstu 1-2 árini.

**2) Løn/onnur konto 103288:** Hetta er formanslønin. Hon var frá 1976-1983 500 kr. um mánaðin í umsitingarútreiðslur. Er nú 1.000 kr. pr. mánað, sum í sær sjálvum er láturliga lítið fyri at stjórna stovninum, serliga nú, og eftirsum avgreiðslan nú figgjar porto og aðrar umsitingarútreiðslur, verður nettotalið nú kr. 12.000 upp á ársbasis.

**3) 103509 Samsýningar:** Hetta er fundarpeningur fyri nevndararbeiði, fundir, censursýningar o.t. Undanfarin ár hava vit megnað at spart munandi av játtanini, men nú nýggja lógin/kunngerðin kom í gildi febr./mars 1985, og videogrammini komu undir filmseftirlit, er arbeiðsbyrðan vaksin heilt munandi.

**4) 113202 Ferða- og dagpeningur innanlands:** Henda konto er nýggj, men so skjótt komið er undir land við tí mest neyðturviliga censurarbeiðinum, verða stundir at avgreiða onkur eftirlit á bygd á staðnum. Nú umsitingarútreiðslurnar eru lagdar undir avgreiðsluna, fer ørindakoyring fyri filmseftirlitið at vera goldið av hesi konto.

**5) 213901 Ymiskar húsaútreiðslur:** Høvdu onga konto, men hava latið avgreiðsluna smíðað og málað so frægt, at hon er brúkilig. Komandi ár skuldi bert verið neyðugt við onkrum smávegis ábótum á umleið kr. 1.000.

**6) 233051 Innbúgv:** Ætla at keypa lenistólar at sita í til censur í staðin fyri spísiborðsstólarnar, sum vit hava lænt frá landsumsitingini.

**7) 233155 Prentlutir:** Ætla at fáa prentað brævpappír, brævbjálvar og ymisk standardformularir, sum vit higartil hava hjálpst við sum fotokopiir.

**8) 233259 Postgjald:** Ikki havt specifiserøða játtan áður, og tá einki brúk enn figurerar í roknskapinum, er orsøkin, at avgreiðslan, síðani hon opnaði fyri fáum mánaðum síðani, hevur brúkt porto/frakt av forskotskassanum og enn ikki avroknað við Gjaldstovuna hesum viðvíkjandi.

**9) 233354 Telefon og telex:** Telefon við telefonsvarara og innlesing á band er stovnað í februar 1985. Kr. 7.000 árliga er eitt met.

Telefon formansins filmseftirlitsins vegna frá privattelefon verður eisini at gjalda av hesi konto eftir galdandi reglum, max. 920 kr. árliga.

**10) 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur:** Her verður lutvíst hugsað um at keypa eina sektión upp í arkivskápið, sum longu er ov lítið og lutvíst at keypa/leiga lítla fotokopimaskinu møguliga í felag við aðrar landsstovnar, sum eru ella vera etableraðir undir somu lon á Bryggjubakka 12.

**11) kt. ? Ferða- og dagpeningur uttanlands:** Roynt hevur verið gjøgnum brævaskifti og telefon at fáa neyðugt samskifti í lag við danska filmcensurin og danskar videogramdistributørforeiningar fyri at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá Filmseftirlitinum, men tykist tað vera torført uttan beinleiðis samband. Ætlanin er tí skjótast gjørligt at biðja um fund tann vegin. Útreiðslan verður mett til í mesta lagi kr. 6.000.

**Ad § 18 - 18304 Skipaskrá- og uppmáling:**

Sbrt. skriv dagf. 6. juni 1985:

Under henvisning til landsstyrets skrivelse af 8. maj 1985 (j. nr. 400-39) fremsendes vedlagt forslag til finanslov for finansåret 1986 vedrørende konto 18304.

| Kontonummar og navn<br>§ 18-304<br>SKIPASKRÁ OG -UPPMÁTING | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4—31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýris-ins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| Lønir samb. skjal II | | 392.000,- | 534.000,- | 577.000,- |
| Leiga av kopimaskinu<br>kr. 2.500,- um máneðin | | 22.500,- | 30.000,- | 30.000,- |
| Kopimaskina, viðlikahald og pappír | | 4.500,- | 7.000,- | 7.000,- |
| Pappír og prenting | | 3.750,- | 10.000,- | 10.000,- |
| Skrivstovuhald | | 2.250,- | 10.000,- | 10.000,- |
| Trygging | | 4.500,- | 6.000,- | 6.000,- |
| Samsýning — Registrator | | 45.000,- | 60.000,- | 60.000,- |
| Uppmáting av bátum | | 4.500,- | 6.000,- | 6.000,- |
| SAMLAÐ | 226.000,- | 479.000,- | 663.000,- | 706.000,- |

**Ad § 18 - 18318 Semingsmannaskipanin**

Sbrt. skriv dagf. 30. juni 1985:

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4—31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýris-ins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 103509 | | | 33.000 | 33.000 |
| 253903 | | | 20.000 | 20.000 |
| | | | 53.000 | 53.000 |

**Ad § 18 - 18337 Føroya Læruráð:**

Sbrt. skriv dagf. 1. juli 1985:

| Kontonummar og navn | Roknskapur 1984/85 | Játtan 1985 1/4—31/12 | Uppskot 1986 | Uppskot landsstýris-ins 1986 |
|---|---|---|---|---|
| 83904 Ymiskar inntøkur | ÷41,4 | ÷30,0 | ÷38,0 | ÷38,0 |
| 103119 Samsýningar — læruráðið | 0 | 35,2 | 60,0 | 60,0 |
| 103135 Samsýn. — skoðanarm. o.o. | 0 | 135,0 | 180,0 | 180,0 |
| 103288 Løn — onnur | 29,5 | 0 | 0 | 0 |
| 103391 Fundarútreiðslur | 0 | 4,5 | 6,0 | 6,0 |
| 103509 Samsýningar | 209,5 | 0 | 0 | 0 |
| 113189 Ferða- og dagpeningur innanl. — læruráðið | 0 | 3,7 | 10,0 | 10,0 |
| 113197 Ferða- og dagpeningur innanl. — skoðanarmeistarar o.o. | 0 | 10,5 | 25,0 | 25,0 |
| 113202 Ferða- og dagpeningur innanl. | 31,7 | 0 | 0 | 0 |
| 113682 Uttanlandsf. — læroráðið | 0 | 7,5 | 10,0 | 0 |
| 203308 Lýsingar | 18,3 | 4,5 | 15,0 | 15,0 |
| 233155 Prentlutir | 12,2 | 7,5 | 15,0 | 15,0 |
| 233561 Aðrar skrivstovuútreiðslur | 2,5 | 7,1 | 10,0 | 10,0 |
| | 262,3 | 185,5 | 293,0 | 283,0 |

**Viðmerkingar:**

**Ad 83904 Ymiskar inntøkur.** Inntøkurnar stava frá gjaldi, ið lærumeistari skal gjalda í sambandi við, at lærlingur verður innskrivaður til sveinaroynd. Gjaldið er kr. 200,00 fyri hvønn lærling. Roknað verður við, at umleið 90 lærlingar fara til sveinaroynd í Føroyum í 1985/86.

**Ad 103288 Løn onnur.** Samsýningar til limirnar í vanligu og víðkaðu læruráðunum fyri ávikavist »handverk og íðnað« og »handil og skrivstovu« hava higartil vanliga verið bókaðar á hesari konto (»Løn onnur«).

Mælt verður nú til, at hesar útreiðslur saman við samsýning til læruráðsformannin verða bókaðar á konto nr. 103119 við heitinum: »Samsýningar — Læruráðið«. Konto nr. 103288 verður sostatt ikki nýtt longur.

**Ad 103509 Samsýningar.** Samsýningar til formann læruráðsins, skoðanarmeistarar, eftirlitsfólk, uppgávunevndir, el-fagets uddannelsesnævn o. o. eru higartil bókaðar sum útreiðslur á hesari konto.

Visandi til skriv landsstýrisins, j. nr. 400-39, dagfest 8. mai 1985, verður hjálagt sent uppskot til fíggjarløgtingslóg 1986 viðvíkjandi rakstrarstaði 18337: Føroya Læruráð.

Í uppskotinum 1984/85 vóru ávísar broytingar gjørdar í konto-planinum.

Endamálið við broytingunum, sum gjørdar eru í samráð við Føroya Gjaldstovu, er m. a. at fáa konto-heiti, sum hóska betri til læruráðsins uppgávur. Ein onnur grund er, at tað umsitingarliga skal vera lættari, tá útreiðslur sveinaroyndum viðvíkjandi, sambært kunngerð nr. 33 frá 8. juni 1962, skulu býtast millum landskassa, meistara- og sveinafeløgini.

Enn eru tó nakrar broytingar afturat neyðugar, um fíggjarætlan læruráðsins skal vísa sonnu myndina av, hvat stovnurin kostar at reka. Hesar broytingar verða væntandi tiknar við á fíggjarætlanini 1987.

Sum støðan er í løtuni, liggur læruráðsins sekretariatsfunktión Landsskúlafyrisitingini til byrði á tann hátt, at umleið 1½ skrivstovufólk í 9. lønarflokki og ½ námsfulltrúi á Landsskúlafyrisitingini arbeiða við læruráðsmálum, og sum gongdin hevur verið hesi seinastu 5 árini, hevur arbeiðið hjá læruráðnum verið støðugt vaksandi. Skoytast kann uppí, at útreiðslur til telefon, húsaleigu, innbúgv og aðra skrivstuútgerð eisini verða goldnar av Landsskúlafyrisitingini.

Vónandi kann Føroya Landsstýri og fíggjarnevndin ganga uppskotinum á møti.

Mælt verður nú til, at samsýningar, sum hava heinleiðis samband við sveinaroyndir, hereftir verða bókaðar á konto nr. 103135 við heitinum: »Samsýningar — skoðanarmeistarar o. o.«.

Konto 103509 verður sostatt ikki nýtt longur.

**Ad 103119 Samsýningar — læruráðið.** Sí viðmerkingarnar undir ad 103288. Mett verður, at talið á fundum verður umleið 20. Á nøkrum av hesum fundum verður læruráðið viðkað við 2 limum.

**Ad 103135 Samsýningar — skoðanarmeistarar o.o.** Sí viðmerkingarnar undir ad 103509.

Frá komandi fíggjarári verður ajourførda skoðanarmeistaraskipanin væntandi komin í eina fastari legu. Fyribils verður mett, at neyðuga upphæddin er 180.000,00 kr.

**Ad 113202 Ferða- og dagpeningur (innanlands).** Skotið verður upp, at henda konto verður býtt sundur í:

1) Konto nr. 113189 við heitinum »Ferða- og dagpeningur innanlands — læruráðið«.

2) Konto nr. 113197 við heitinum »Ferða- og dagpeningur innanlands - skoðanarmeistarar o. o.«.

**Ad 113189 Ferða- og dagpeningur (innanlands) — læruráðið.** Sí viðmerkingar undir ad 113202.

**Ad 113197 Ferða- og dagpeningur (innanlands) — skoðanarmeistarar o. o.** Sí viðmerking undir ad 113202.

**Ad 113243 Ferða- og dagpeningur (uttanlands).** Til tíðir hevur læruráðsumboð havt fund við Metalindustriens Lærlingeudvalg og aðrar stovnar í Danmark við somu uppgávum sum læruráðið, serliga tá tað snýr seg um føroyskar lærlingar í læru og á skúla í Danmark.

Eisini er í umbúna at lata skrivara læruráðsins taka lut í skeið í Danmark, hildið í »Erhvervsskolens personaleforenings« regi, viðvíkjandi lærlinga- og læruplássskráseting v. m.

**Ad 103391 Fundarútreiðslur.** Av og á hevur læruráðið skipað fyri serligum fundum við fakfólki og áhugaðum í sambandi við planlegging av nýggjum yrkisútbúgvingum í Føroyum.

Søkt verður um kr. 6.000,00 til tílík endamál.

**Ad § 18 - 18356 Ferðamannamiðstøð Føroya**

Sbrt. skriv dagf. 29. juni 1985:

**Rakstrarætlan 1. januar — 31. desember 1986.**

| Rakstrarstað 18356 | | Uppskot stovnsins 1986 Kr. | Uppskot landsstýrisins 1986 Kr. |
|---|---|---|---|
| 103 143 | Løn starvsfólk | 478.000 | 516.240 |
| 103 151 | Løn avloysarar | 40.000 | 40.000 |
| 103 405 | Løn úrtíðarløn | 20.000 | 20.000 |
| 103 222 | Løn reingerð | 15.000 | 15.000 |
| 213 806 | Húsaleiga | 36.000 | 36.000 |
| 213 105 | Ljós, hiti og vaskievni | 40.000 | 40.000 |
| 233 254 | Telefon, telex | 50.000 | 50.000 |
| 233 259 | Postgjald, frakt | 30.000 | 30.000 |
| 233 409 | Maskinleiga (ljósprent o. a.) | 40.000 | 40.000 |
| 233 155 | Prenthutir | 20.000 | 20.000 |
| 203 403 | Blaðhald o. a. m. | 20.000 | 20.000 |
| 233 561 | Aðrar skrivstovuútreiðslur | 35.000 | 35.000 |
| 233 051 | Innbúgv | 100.000 | 50.000 |
| 213 901 | Ymsar húsaútreiðslur | 15.000 | 15.000 |
| 203 308 | Lýsingar | 30.000 | 30.000 |
| 103 509 | Samsýningar | 100.000 | 100.000 |
| 233 504 | Sakkøn hjálp | 60.000 | 60.000 |
| 123 128 | Eftirútbúgving | 50.000 | 50.000 |
| 113 202 | Ferða- og dagpeningur innanlands | 130.000 | 130.000 |
| 203 507 | Umboðan | 100.000 | 70.000 |
| 203 913 | Upplýsing, filmur | 200.000 | 150.000 |
| 203 883 | Útgávuvirksemi | 570.000 | 520.000 |
| 203 875 | Sýningar | 500.000 | 450.000 |
| 203 891 | Framtaksútreiðslur í Føroyum | 350.000 | 300.000 |
| 253 903 | Aðrar og óvissar útreiðslur | 100.000 | 100.000 |
| | | 3.029.000 | 2.887.240 |

**Uppskot til rakstarætlan 1. januar — 31. desember 1986.**

**Viðmerkingar til uppskotið:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 103 | 143 | Løn til starvsfólk. ..... Stjóri 23. fl., korrespondentur 12. fl. og skrivstovufólk 7. fl. | kr. 478.000 |
| 233 | 051 | Innbúgv ..... Neyðugt verður við teldu til skráseting av info-tilfari, (sí kt. 203883) og keyp av innbúgvi annars, sum ikki varð nýtt av játtanini 1. apríl — 31. desember 1985. | kr. 100.000 |
| 123 | 128 | Eftirútbúgving ..... Sambært § 2, 5. stk. í lógini: at fyriskipa upplæring av starvsfólki í ferðamannatænastuvirksemi. | kr. 50.000 |
| 203 | 507 | Umboðan ..... Sambært § 2, 3. stk. í lógini: »at hjálpa og veglciða ferðafólki, íroknað blaðmonnum, ið kom til landið«. | kr. 100.000 |
| | | MEGINFELAG TEIRRA BREKAÐU Í FØROYUM ..... Til nýtslu hjá felagnum, til at taka, til ávisar útreiðslur og umboðan eftir rokning, har serlig tiltøk gerast neyðug. | kr. 20.000 |
| | | Norrønt samstarv ..... Hetta tiltak er longu veruleiki. Føroyar eru uppi í eini ætlan saman við Íslandi um samstarv innan ferðamannavinnuna. Herumframt kann longu í 1986 roknast við luttøku á fundum í NORDISK TURISTRÅD og NORDISK MINISTERRÅDS TURISTUDVALG. | kr. 30.000 |

| | | |
|---|---|---|
| | Blaðmannavitjanir o. a. 1985 ..... | kr. 50.000 |
| 203 913 | Upplýsing ..... | kr. 200.000 |
| | Sambært § 2, 2) í lógini:<br>»at upplýsa um Føroyar bæði innan-og uttanlands«.<br>Gjørdur verður upplýsandi filmur um Føroyar í 1985 fyri játtanina 1. apríl — 31. des. 1985, men røkkur henda ikki til allar útreiðslur at gera filmin lidnan fyri, herundir tónleik, innlegging av talu á fleiri málum og gerð av fleirfaldan av filminum og gerð av videokasettum.<br>Til hetta tiltak verður annars eisini søkt um stuðul hjá ymsum privatum stovnum og fyritøkum um fígging. | |
| 203 883 | Útgávuvirksemi, P. R.-tilfar ..... | kr. 570.000 |
| | sambært lógina § 2, 1), 2) og 11):<br>»at gera skipanir og ætlanir viðvíkjandi føroysku ferðamannavinnuni«.<br>Blaðútgáva »Ferðamannatíðindi« | |
| | 4 ferðir um árið ..... | kr. 40.000 |
| | Travelguide 40.000 eint. (2 mál, DK. og D.) | kr. 100.000 |
| | Travel Manual 1986 ..... | kr. 40.000 |
| | Plakatframleiðsla ..... | kr. 40.000 |
| | Fikkubóklingur um Tinganes ..... | kr. 100.000 |
| | Fikkubóklingur við bygdasøguligum og ferðamannavirði ..... | kr. 100.000 |
| | Rithøvunda- og umsetingar-samsýningar ..... | kr. 100.000 |
| | Myndasavn, heruppií stovnsetingar-útreiðslur og keyp av savnstilfari tilsamans ..... | kr. 50.000 |
| 203 875 | Sýningar ..... | kr. 500.000 |
| | Samb. lógina § 2, 2):<br>»at upplýsa um Føroyar bæði innan-og uttanlands«. Fyriskipan av og luttøku í m. a. hesum tiltøkum: | |

REIS 86 BELLACENTER, Keypmannahavn mars 1986 WORKSHOP í Glasgow september 1986.
INTERNATIONALE TURISMUS BØRSE, Berlin mars 1986.
FÆRØERNE I FOCUS í FORUM, Kcypmannahavn, og í hesum sambandi PR-tiltøk ymsastaðni í Danmark í apríl 1986.
WORLD TRAVEL MARKET í London november 1986.

203 891 Framtaksútreiðslur í Føroyum ..... kr. 350.000
Her verður hugsað um ta skyldu, sum lógin í § 2, 4., 6., 7. og 8. stk. ásetir:
»veita hjálp til áhugafelagsskapir kring landið, herundir stovnseting av avgreiðslum, har tað tykist neyðugt,«
»at leggja til rættis útferðir, vitjanir o. a. ítriv fyri ferðafólk,«
»at hava neyvt samstarv við jarðareigarar og friðingar myndugleikar við tí endamáli, at náttúru- og mentunarvirði ikki verða skemd ella fara fyri skeyti av tí virksemi, ferðamannastreymurin hevur,«
»at skráseta og skipa sølur av gistingarplássum og samskipa hetta virksemið við lokalar avgreiðslur og ferðamannastovur,«
»at virka fyri at tað til eina og hvørja tíð er nóg mikið av rúmligum gistingar- og matstovuhentleikum, bæði í dygd og nøgd,«.
Roknast má við munagóðum uppsøkjandi virksemi úti um landið, sum byrjað er í 1985 í Norðuroyggjum.

Fyrireiking av innanlands útferðum ... kr. 50.000

Samb. § 2, 11):
»at gera vegleiðingar og geva upplýs-

| | |
|---|---|
| ingar um, hvar og hvussu fólk kunnu ferðast ella støðast.«,<br>»at geva tilmæli til avvarðandi myndugleikar / stovnar / virkir um flutningsspurningar, umhvørvisspurningar, mentunartiltøk, fíggjartiltøk og á øðrum økjum, ið hava við fremmandavitjanir at gera,«. | |
| Ymist og óvæntað í samband við stuðul til bygdaavgreiðslur o. a. m. . . . . sambært lógina § 2, 2), 4) og 11):<br>»at upplýsa um Føroyar bæði innan- og uttanlands,«,<br>»veita hjálp til áhugafelagsskapir kring landið, herundir stovnseting av avgreiðslum, har tað tykist neyðugt,«,<br>»at gera vegleiðingar og geva upplýsingar um, hvar og hvussu fólk kunnu ferðast ella støðast. | kr. 100.000 |

---

**Ad § 18 - 18907/353042 Menningargrunnur Ídnaðarins.**
Sbrt. skriv dagf. 12. juli 1985:

Vísandi til skriv grunnsins, dagfest 20. desember 1985, hvar biðið verður um eina hækkan av studningsjáttanini til grunnin úr 11 til 25. mill. kr. fyri fíggjarárið 1986, verður við hesum mint á hetta.

Vart verður gjørt við, at studningsupphæddin fyri 1985 bert bleiv 11 mill. kr., og varð tí neyðugt at upptaka uttanlandslán, stórt 30 mill. kr. Hetta fór alt til figging av alivinnuni.

Fíggjarætlanin fyri 1984/85 byggir á verulig tøl fyri 3 ársfjórðingar og mett tøl fyri 4. ársfjórðing.

Játtaðar eru 43 mió. kr. i 1984/85. Harav 19,9 mió. kr. er til fiskaaling.

Harumframt eru játtaðar 21,8 mió. kr. sum veðhald til rakstur hjá fiskaalarum.

**1984/85**

| | 1 | 2 | 3 | 4 | Ialt |
|---|---|---|---|---|---|
| **Figgjartilgongd** | | | | | |
| Avdráttir av útlánum | 0 | 7.000 | 0 | 8.000 | 15.000 |
| Rentur av útlánum | 0 | 4.000 | 0 | 5.000 | 9.000 |
| Aðrar rentuinntøkur | 450 | 266 | 250 | 800 | 1.866 |
| Landskassin | | 5.500 | | 5.500 | 11.000 |
| Figgjartilgongd ialt | 450 | 16.866 | 250 | 19.300 | 36.866 |
| **Figgjarfrágongd** | | | | | |
| Útgoldin lán | 11.767 | 4.130 | 4.130 | 10.000 | 30.027 |
| Útgoldin studningur | 484 | 497 | 450 | 569 | 1.800 |
| **Rentur:** | | | | | |
| Verandi lán | 1.332 | 467 | 1.332 | 1.547 | 4.578 |
| Nýggj lán | 75 | | 150 | 1.400 | 1.625 |
| **Avdráttir:** | | | | | |
| Verandi lán | 608 | 1.082 | 608 | 1.082 | 3.380 |
| Nýggj lán | | | 250 | | 250 |
| Raksturin | 250 | 250 | 250 | 250 | 1.000 |
| Marknaðarkanningar, gransking v. m. | | | | | |
| Figgjarfrágongd ialt | 14.516 | 6.226 | 7.170 | 14.748 | 42.660 |
| Figgjarúrslit av grunninum | ÷ 14.066 | 10.640 | ÷6.920 | 4.552 | : 5.794 |
| **Figgjarbroytingar:** | | | | | |
| Tap og tap uppá veðhald | 500 | 3.500 | 500 | 5.500 | 10.000 |
| Eftirstøður | | | | | |
| Upptikin lán: | | | | | |
| Innanlands | | | 5.000 | | 5.000 |
| Uttanlands | | | 40.000 | | 40.000 |
| Ialt | ÷ 14.566 | 7.140 | 37.580 | ÷ 948 | 29.206 |
| Likviditetur, primo | 18.400 | 3.834 | 10.974 | 48.554 | 18.400 |
| Likviditetur, ultimo | 3.834 | 10.974 | 48.554 | 47.606 | 47.606 |

Henda fíggjarætlan fyri 1985 telur bert 9 mánaðir, við tað at fíggjarárið verður broytt 1. januar 1986. Í fíggjarárinum verða ætlandi játtaðar 20 mió. kr. til ymiskan ídnað. Uppi í fíggjarætlanini er tikið við uttanlandslán NIB, stórt 13 mió. kr.

Í fíggjarárinum 1986 verða væntandi 47 mió. kr.

| 1985 | | | | 1986 | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 | 3 | Ialt | 1 | 2 | 3 | 4 |
| 0 | 9.000 | 0 | 9.000 | 10.500 | 0 | 12.075 | 0 |
| 0 | 5.650 | 0 | 5.650 | 8.476 | 0 | 8.650 | 0 |
| 600 | 250 | 200 | 1.050 | 200 | 600 | 600 | 250 |
| 6.250 | 6.250 | 6.250 | 18.750 | 6.250 | 6.250 | 6.250 | 6.250 |
| 6.850 | 21.150 | 6.450 | 34.450 | 25.428 | 6.850 | 27.575 | 6.500 |
| 30.000 | 15.000 | 15.000 | 60.000 | 16.000 | 11.000 | 10.000 | 10.000 |
| 500 | 1.000 | 1.000 | 2.500 | 500 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 2.500 | 1.180 | 2.500 | 6.180 | 1.180 | 2.500 | 1.180 | 2.500 |
| 600 | 375 | 600 | 1.575 | 375 | 600 | 375 | 600 |
| 925 | 1.500 | 925 | 3.350 | 1.500 | 925 | 1.500 | 925 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 300 | 300 | 300 | 900 | 300 | 300 | 300 | 300 |
| 250 | 250 | 250 | 750 | 250 | 250 | 250 | 250 |
| 35.075 | 19.605 | 20.575 | 75.255 | 20.105 | 16.575 | 14.605 | 15.575 |
| ÷ 28.225 | 1.545 | ÷ 14.125 | ÷ 40.805 | 5.321 | ÷ 9.725 | 12.970 | ÷ 9.075 |
Dette kapitel, kapitel 4 om skorstensrensning, kapitel 5 om brandsyn og kapitel 6 om forskrifter indeholder bestemmelser af brandforebyggende karakter. Ligeledes er bestemmelserne i kapitel 7 i det væsentligste af præventiv karakter.

Denne forebyggende del af brandvæsenets virksomhed har en meget væsentlig

betydning. Dette gælder i særlig grad under forhold, hvor beredskabet til indsats mod brande er relativt lavt.

## Til § 21.

Bestemmelsen vedrører kvalificeret brandfarlige virksomheder.

Disse er virksomheder, hvori der fremstilles, behandles eller anvendes eksplosive, let antændelige eller særlig brandbare væsker, luftarter eller stoffer.

Virksomheder af denne art må ikke oprettes, væsentlig ombygges, udvides eller driftforandres uden tilladelse fra Landets brandinspektion.

Landets brandinspektion kan i tilladelsen stille betingelser med hensyn til virksomhedens beliggenhed, indretning og benyttelse samt påbyde anskaffelse af brand- og redningsmateriel og en passende vandforsyning.

Der findes ikke i dag her i landet virksomheder, der er omfattet af bestemmelsen.

Iøvrigt bemærkes, at der for en del af de omhandlede virksomheder er gældende lovbestemmelser.

Sprængstoffabrikker må således kun oprettes og drives af personer, der har landsstyrets tilladelse, jfr. lov nr. 68 af 22. maj 1912 »angaaende Sprængstoffer« og lagtingslov nr. 43 af 22. maj 1969 om våben. Det samme gælder fyrværkerifabrikker, jfr. lagtingslov nr. 27 af 8. maj 1969 om fyrværkeri.

Under hensyn til, at stillingtagen til de brandmæssige forhold i virksomheder af den omhandlede karakter forudsætter særlig teknisk ekspertice, er kompetencen henlagt til Landets brandinspektion.

## Til § 22.

Bestemmelsen vedrører andre brandfarlige virksomheder end de i § 21 omhandlede.

I stk. 1 opregnes følgende virksomheder:

1) ejendomme, hvor særlig brandfarlige forhold er til stede, eller hvor store værdier er udsat for ødelæggelse,
2) kirker,
3) teatre,
4) hoteller,
5) sygehuse,
6) bygninger for undervisnings-, udstillings- eller forlystelsesformål,

7) i det hele taget bygninger eller større lokaler, hvori mange mennesker samles.

Bestemmelsen er for så vidt angår de under 1) og 7) nævnte ejendomme, bygninger og lokaler meget elastisk formuleret.

Under 1) henhører således f. eks. fabrikker, større værksteder og lagre og under 7) f. eks. forsamlingshuse og selskabslokaler.

Specielt vedrørende 5) sygehuse bemærkes, at alderdomshjem og plejehjem ligestilles med sygehuse.

For de nævnte ejendomme, bygninger og lokaler gælder, at Landets brandinspektion kan bestemme, at der skal træffes foranstaltninger til formindskelse af brandfaren eller til sikring af forsvarlige rednings- eller slukningsmuligheder i tilfælde af brand.

Der kan herunder påbydes anskaffelse af brandmateriel, indretning af vandforsyning, sikring af udgangsforholdene samt anlæggelse af adgangsveje for brandvæsenets køretøjer og af standpladser for dets stiger og sprøjter.

De krav, der stilles, kan være af bygningsmæssig karakter.

I den gældende lovgivning findes der ikke bestemmelser, der sikrer brandmyndighedernes indflydelse på de brandmæssige forhold i de nævnte ejendomme, bygninger og lokaler.

Ved byggesagers behandling beror det bl. a. på den enkelte kommunes administration og indholdet af de gældende byggebestemmelser, om og i hvilket omfang brandmyndighederne tages med på råd, og hvilke krav der stilles for at formindske brandfaren og for at sikre forsvarlige rednings- og slukningsmuligheder.

Såfremt der ikke i forbindelse med meddelelse af en byggetilladelse er fastsat vilkår om de brandmæssige forhold eller taget forbehold om eventuelt senere at stille betingelser, er der i den gældende lovgivning eller forvaltningsretlige regler næppe hjemmel til senere at stille krav om disse forhold. Ligeledes er der formentlig ikke hjemmel til at ændre fastsatte vilkår, medmindre der er taget forbehold herom.

For visse af de omhandlede ejendomme, bygninger og lokaler — restaurationer, bygninger for forlystelsesformål og teatre — gælder, at der heri foregår en virksomhed, som i henhold til politivedtægten kræver politiets tilladelse, og der vil i polititilladelsen kunne fastsættes vilkår om de brandmæssige forhold.

Ved behandling af ansøgninger om tilladelse til offentlig dans m. v. indhenter politiet udtalelse fra de lokale myndigheder, ligesom landsingeniøren benyttes som konsulent til afgørelse af spørgsmålet om, hvilke krav der skal stilles, for at

bygningen/lokalet i brandmæssig henseende er forsvarlig. Samme fremgangsmåde benyttes ved ansøgninger om fornyelse af tilladelserne, der normalt kun meddeles for en begrænset periode.

Formålet med bestemmelsen i stk. 1 er at råde bod på disse forhold, således at det søges sikret, at de brandmæssige forhold i de af bestemmelsen omfattede ejendomme, bygninger og lokaler til enhver tid er forsvarlige.

Kompetencen til at fastsætte kravene er under hensyn til, at stillingtagen til de brandmæssige forhold i disse ejendomme, bygninger og lokaler kræver en særlig teknisk indsigt, der ikke kan påregnes at være til stede i alle kommuners administration eller ved det lokale brandvæsen, og at der er behov for en ensartet behandling af disse forhold, henlagt til Landets brandinspektion.

Det understreges, at der ved bestemmelsen gives Landets brandinspektion en selvstændig beføjelse til at stille krav, herunder krav af bygningsmæssig karakter, og at de ved lovens ikrafttræden eksisterende ejendomme, bygninger og lokaler er omfattet af bestemmelsen.

Det understreges endvidere, at bestemmelsen i princippet ikke gør indgreb i kommunernes beføjelser med hensyn til behandling af sager om byggetilladelse.

Efter udvalgets opfattelse vil det imidlertid være hensigtsmæssigt, at bygningsmyndighederne ved behandlingen af ansøgninger om tilladelse til opførelse eller ændring af ejendomme/bygninger, der er omfattet af bestemmelsen, forhandler sagen med Landets brandinspektion, således at det sikres, at der er overensstemmelse mellem bygningsmyndighedernes krav og de krav, som Landets brandinspektion vil stille.

Hvis der af Landets brandinspektion stilles krav af bygningsmæssig karakter, som bygningsmyndigheden finder for vidtrækkende, vil bygningsmyndigheden kunne indbringe spørgsmålet for landsstyret, jfr. § 2, stk. 2.

For så vidt angår de eksisterende ejendomme, bygninger og lokaler vil eventuelle krav hensigtsmæssigt kunne stilles i forbindelse med de regelmæssige brandsyn, jfr. § 24, stk. 2.

Den, overfor hvem krav stilles, kan påklage afgørelsen til landsstyret, jfr. § 2, stk. 2.

I bestemmelsens stk. 2 er der optaget regler, der giver Landets brandinspektion hjemmel til at bestemme, at der ved benyttelse af forsamlingshuse, teatre, cirkus og lignende skal etableres brandvagt, og om betalingen herfor.

## Til kapitel 4. Skorstensrensning.

### Til § 23.

Bestemmelsen giver landsstyret hjemmel til at fastsætte regler om skorstensrensning.

Det kan således bestemmes, hvor ofte skorstene og røgkanaler skal renses, hvorledes rensningen skal foretages, hvem der skal foretage rensningen og afgifterne herfor. Afgiften kan efter bestemmelsen inddrives ved udpantning.

I den gældende lovgivning findes der i kongelig anordning nr. 103 af 13. august 1886 »indeholdende Tillæg til Lov angaaende Brandvæsenet i Thorshavn paa Færøerne af 28. Januar 1856«, redegørelses bilag 2, §§ 5-9, bestemmelser om skorstensrensning.

Det er heri fastsat, at enhver ejer er ansvarlig for, at skorstene m. v. behørig vedligeholdes, og at skorstene m. v. skal renses mindst 4 gange om året.

Tórshavn kommune antager skorstensfejere, »der har at gaa alle, som saadant forlange, til Haande med Rensningens Udførelse«.

Det er endvidere fastsat, at den der bevisligt har overdraget rensningen til en af kommunalbestyrelsen antaget skorstensfejer, fritages for ansvaret for rensningen.

Disse regler må betegnes for forældede.

Tórshavn byråd har den 19. december 1983 udstedt et regulativ for skorstensrensning for Tórshavn. Regulativet savner delvis hjemmel i lovgivningen.

I regulativet fastsættes bl. a. følgende ordning:

Enhver ejer har ret til at rense skorstene i eget hus, men iøvrigt har den af byrådet ansatte skorstensrenser eneret til dette arbejde.

Skorstene og røgledninger, hvor centralvarmeanlægget opvarmes med kul, tømmer eller andet fast brændsel, skal renses 1 gang om året, medens der i tilfælde, hvor der alene anvendes olie som brændsel, skal foretages rensning hvert 2-3 år.

Disse bestemmelser er — så vidt udvalget bekendt — i overensstemmelse med den ordning, der rent faktisk har været gældende i kommunen i en årrække.

I lovgivningen om brandvæsenet uden for Tórshavn er der ikke fastsat bestemmelser om skorstensrensning.

Efter udvalgets opfattelse bør der fastsættes regler om rensning af skorstene og røgkanaler.

Regler herom er af hensyn til forebyggelse af brand nødvendige — ikke mindst, nu hvor anvendelse af fast brændsel er ret udbredt.

Udvalget foreslår, at der i medfør af bestemmelsen fastsættes regler om hyppigheden af skorstensrensning svarende til bestemmelsen i det oven for omtalte regulativ for skorstensrensning for Tórshavn.

Udvalget finder endvidere, at rensningen ikke bør overlades til ejeren/brugeren af en ejendom, men foreslår, at rensningen skal foretages af en i henhold til § 6, stk. 2, ansat brandassistent.

Skorstensrenseren er således efter forslaget knyttet til brandvæsenet.

I overensstemmelse med udvalgets forslag om inddelingen af landet i brandområder med fælles brandvæsen, fælles brandinspektør, fælles brandassistenter og mandskab forudsætter udvalget, at skorstensrenseren er fælles for kommuner i brandområdet, og at aftalen om oprettelsen af det fælles brandvæsen indeholder bestemmelser herom.

## Til kapitel 5. Brandsyn.

### Til § 24.

Bestemmelsen vedrører det væsentlige forebyggende brandværn, der er knyttet til brandvæsenets eftersyn af virksomheder, ejendomme, bygninger og lokaler med henblik på at konstatere, om gældende forskrifter er opfyldt, eller om der iøvrigt foreligger mangler, som bør afhjælpes.

I den gældende lovgivning findes der i kongelig anordning nr. 103 af 13. august 1886 »indeholdende Tillæg til Lov angaaende Brandvæsenet i Thorshavn paa Færøerne af 28. Januar 1856«, redegørelsens bilag 2, § 7 en bestemmelse, hvoraf fremgår, at der på bygninger skal afholdes brandsyn mindst 4 gange årlig.

Bestemmelsen er forældet.

Efter det for udvalget oplyste foretages det i et vist omfang brandsyn i Tórshavn kommune.

I kongelig anordning nr. 84 af 16. juni 1882 »om Bygnings- og Brandvæsenet i de færøske Landkommuner«, redegørelsens bilag 3, er der ikke nogen bestemmelse, der klart giver udtryk for, at der skal afholdes brandsyn. § 1 indeholder dog en bestemmelse om, at bygningsmyndigheden skal påse, at de med hensyn til brandvæsenet givne forskrifter overholdes.

Efter det for udvalget oplyste, foretages der i meget begrænset omfang brandsyn uden for Tórshavn kommune.

Bestemmelsens stk. 1 omhandler eftersyn af bygninger, hvori der er indrettet ildsted.

For sådanne bygningers vedkommende kan landsstyret fastsætte regler om, i hvilket omfang brandinspektøren skal foretage brandsyn.

Udvalget foreslår, at der fastsættes regler om, at der skal foretages brandsyn på disse bygninger.

Udvalget finder endvidere, at det vil være rationelt, at brandsyn under brandinspektørens ledelse foretages af den brandassistent, som i henhold til § 23 foretager skorstensrensningen, hvilket forudsætter, at brandassistenten har den fornødne faglige indsigt til at bedømme, om gældende forskrifter er opfyldt.

Såfremt udvalgets forslag følges, vil reglerne om skorstensrensning, jfr. § 23, og reglerne om brandsyn efter denne bestemmelses stk. 1 kunne fastsættes i en bekendtgørelse om skorstensrensning og eftersyn af bygninger, hvori der er indrettet ildsted.

Bestemmelsens stk. 2 omhandler eftersyn af de i §§ 21-22 omhandlede virksomheder, ejendomme, bygninger og lokaler.

Bestemmelsen fastsætter, at Landets brandinspektion med regelmæssige mellemrum skal foretage brandsyn.

At brandsynet er henlagt til Landets brandinspektion er en følge af, at Landets brandinspektion har kompetence med hensyn til fastsættelse af krav om de brandmæssige forhold i disse virksomheder, ejendomme, bygninger og lokaler.

Udvalget forudsætter, at brandsynet så vidt muligt foretages sammen med den lokale brandinspektør. Herved søges sikret, *at* der etableres et nært samarbejde mellem Landets brandinspektion og den lokale brandinspektion, *at* den lokale brandinspektion får indflydelse på de afgørelser, der træffes, og *at* den lokale brandinspektion har nøje kendskab til virksomhedernes, ejendommenes, bygningernes og lokalernes forhold.

Det er over for udvalget oplyst, at en del af de i § 22 nævnte virksomheder, ejendomme, bygninger og lokaler har været genstand for et kvalificeret brandsyn, jfr. iøvrigt bemærkningerne til bestemmelsen.

I 1974 efterså Statens brandinspektion i Danmark sammen med brandmesteren i Tórshavn forsamlingshuse, danselokaler, skoler, hoteller m. v. på Færøerne. Dette skete på politiets initiativ.

I 1978 efterså en fabriksinspektør fra Dansk Brandværns Komité større oplag af benzin, olie og gas på Færøerne. Dette skete på arbejdstilsynets initiativ.

Stk. 3 indeholder bestemmelser om følgerne af de ved brandsynet konstaterede mangler, der bevirker særlig brandfare. Den tilsynsførende kan forbyde den fortsatte benyttelse, indtil manglen er afhjulpet.

Stk. 4 indeholder bestemmelser, der giver den tilsynsførende adgang til i tilfælde af mangler af mindre betydning at give pålæg om, at manglen skal afhjælpes inden en bestemt frist.

Stk. 5 fastsætter, at forbud og påbud efter stk. 3 og 4 skal meddeles skriftligt.

Stk. 6 fastsætter regler om den tilsynsførende registrering af de foretagne brandsyn.

I stk. 7 fastsættes, at den tilsynsførende til politiet skal anmelde undladelse af at efterkomme forbud og pålæg efter stk. 3 og 4.

## Til kapitel 6. Forskrifter.

### Til § 25.

Bestemmelsens stk. 1 giver landsstyret en vidtrækkende hjemmel til ved bekendtgørelse at fastsætte regler om brandmæssige forhold.

Efter bestemmelsen kan landsstyret fastsætte regler

1) om brugen af ild og lys,
2) for opbevaring, transport og brug af letfængelige eller eksplosive, faste, flydende eller luftformige stoffer,
3) for indretning af virksomheder, hvor sådanne stoffer opbevares eller tilvirkes,
4) for indretning og benyttelse af ildsteder og andre anlæg for varme, lys og kraft,
5) samt iøvrigt udfærdige sådanne bestemmelser, som findes fornødne til forebyggelse af brandfare og til sikring af forsvarlige rednings- og slukningsmuligheder i tilfælde af brand.

Der findes følgende gældende forskrifter, der helt eller delvis er omfattet af hjemmelen i stk. 1:

a) Kongelig anordning nr. 251 af 11. november 1912 »om Transport af eksploderende Stoffer«,

b) Kongelig anordning nr. 667 af 15. december 1920 »om Opbevaring af Kalciumkarbid paa Færøerne«, jfr. bekendtgørelse nr. 668 af 15. december 1920 »om Forskrifter for Salget af Karbid«.

c) Bekendtgørelse nr. 85 af 22. marts 1933 »om Opbevaring af brandfarlige Vædsker«. Bekendtgørelsen er udstedt i medfør af lov nr. 73 af 19. marts 1930 »om Motorkøretøjer m.m.«. Denne lov er ophævet ved lagtingslov nr. 65 af 9. september 1963 om færdsel, der imidlertid opretholder bekendtgørelsen.

d) Kundgørelse nr. 58 af 12. september 1969 om fyrværkeri, udstedt i medfør af lagtingslov nr. 27 af 8. maj 1969 om fyrværkeri.

e) Kundgørelse nr. 11 af 30. januar 1980 om lagre til sprængstoffer. Kundgørelsen er udstedt i medfør af lov nr. 68 af 1. april 1912 »angaaende Sprængstoffer«.

Om opretholdelsen af disse forskrifter henvises til bemærkningerne til § 28.

Som foran nævnt er adgangen til administrativt at fastsætte bestemmelser om brandmæssige forhold meget vidtrækkende.

Med henvisning til bemærkningerne i afsnit 5.2. »Forholdet til bygningslovgivningen«, hvori bl.a. anføres, at lovforslaget — bortset fra bestemmelserne i kapitel 3 om brandfarlige virksomheder m.m. og kapitel 6 om forskrifter — ikke indeholder hjemmel til at træffe afgørelser af bygningsmæssig karakter eller udstede forskrifter om bygningsmæssige forhold, henleder udvalget opmærksomheden på, at der med den i stk. 1 anvendte meget generelle formulering er hjemmel til at fastsætte bygningsmæssige forskrifter, når blot de har relation til forebyggelse af brandfare og til sikring af forsvarlige rednings- og slukningsmuligheder i tilfælde af brand.

Udvalget kan anbefale, at landsstyret i mangel af tilstrækkelige bestemmelser i bygningslovgivningen og de i medfør af denne udstedte byggevedtægter benytter denne hjemmel.

Det bemærkes, at der i de i medfør af stk. 1 givne forskrifter vil kunne fastsættes, at bestemmelserne ikke alene gælder for de virksomheder, ejendomme, bygninger og lokaler m.v., som påbegyndes, opføres eller tages i brug, efter at forskrifterne er udstedt, men tillige for virksomheder, ejendomme, bygninger og lokaler m.v., der er påbegyndt, opført eller taget i brug, inden forskrifterne er udstedt.

I stk. 2 fastsættes, at landsstyret kan bemyndige Landets brandinspektion til at udstede detailforskrifter om de i stk. 1 omhandlede forhold. Det kan herunder bestemmes, at de af Statens brandinspektion i Danmark udstedte tekniske forskrifter helt eller delvis skal være gældende. Detailforskrifterne og de tekniske forskrifter kundgøres ikke.

Hensigten med denne bestemmelse er at lette administrationen. De bestemmelser, som stk. 2 vedrører, er overvejende af udpræget teknisk karakter. De henvender sig ikke til borgere i almindelighed, men typisk til personer, der driver en virksomhed, hvor særlig brandfarlige forhold foreligger, og hvor detailforskrifter kan være påkrævede.

Detailforskrifter og tekniske forskrifter af denne art, der udstedes i Danmark, er fritaget for optagelse i lovtidende.

Samme lovgivningsteknik som den, der i stk. 2 foreslås anvendt, er i de senere år brugt i færdselslovgivningen, arbejderbeskyttelseslovgivningen og i et udkast til en lov om levnedsmidler.

## Til kapitel 7. Straf og ikrafttræden.

### Til § 26.

Bestemmelsen indeholder strafbestemmelser med materielt indhold.

Efter stk. 1, nr. 1, strafffes den, der ikke udviser tilbørlig forsigtighed med ild, lys, tændstikker, aske, brandfarlige stoffe, og hvad der iøvrigt kan fremkalde eller befordre ildebrand, eller undlader at påse, at personer, der hører til hans husstand eller virksomhed, udviser sådan forsigtighed.

Om tilsvarende strafbestemmelser i den gældende lovgivning henvises til § 18 i lov af 28. januar 1856 »angaaende Brandvæsenet i Thorshavn paa Færøerne«, redegørelsens bilag 1, og § 7 i Kongelig anordning nr. 84 af 16. juni 1882 »om Bygnings- og Brandvæsenet i de færøske Landkommuner«, redegørelsens bilag 3.

Bestemmelsen skal jævnføres med straffelovens bestemmelser i §§ 180-182 om brandstiftelse.

Efter stk. 1, nr. 2, straffes den, der som ejer eller bruger af visse anlæg, som kan fremkalde eller befordre ildebrand, benytter sådanne anlæg eller lader dem benytte, uanset de ikke er i forsvarlig stand.

Efter stk. 2 straffes undladelse af på forsvarlig måde at renholde ildsteder eller røgrør fra disse eller vedligeholde skorstene, ildsteder eller røgledninger.

### Til § 27.

De i denne bestemmelse indeholdte strafbestemmelser vedrører

1) overtrædelse af påbuds- eller forbudsbestemmelser i loven eller i forskrifter udstedt i medfør af loven,

2) tilsidesættelse af vilkår for en tilladelse i henhold til loven eller i henhold til forskrifter udstedt i medfør af loven,

3) undladelse af at efterkomme forbud eller påbud, der er meddelt i henhold til loven eller i henhold til forskrifter udstedt i medfør af loven.

## Til § 28.

Efter bestemmelsens stk. 1 træder loven i kraft ved dens kundgørelse, det vil sige ved dens bekendtgørelse i »Dimmalætting«.

Stk. 2 indeholder bestemmelser om ophævelse af tidligere lovgivning og om opretholdelse af visse administrative forskrifter.

Særlig med hensyn til ophævelse af kongelig anordning nr. 84 af 16. juni 1882 »om Bygnings- og Brandvæsenet i de færøske Landkommuner« bemærkes, at der under hensyn til den usikkerhed, der er om anordningens gyldighed, jfr. afsnit 2.2., stilles forslag om ophævelse af de bestemmelser i anordningen, der vedrører brandforhold.

Om opretholdelsen af de i bestemmelsen nævnte administrative forskrifter bemærkes, at der ved opretholdelsen af bekendtgørelse nr. 85 af 22. marts 1933 »om Opbevaring af brandfarlige Vædsker« gives mulighed for administrativ ændring af bekendtgørelsen, uden at det er nødvendigt at udarbejde en helt ny bekendtgørelse, og at Tórshavn byråds regulativ af 19. december 1983 om skorstensrensning for Tórshavn i det væsentligste er i overensstemmelse med udvalgets forslag om forskrifter om skorstensrensning, jfr. bemærkningerne til § 23.

De øvrige i bemærkningerne til § 25 nævnte forskrifter, der ikke er udfærdiget med hjemmel i den gældende brandlovgivning, vil fortsat være gældende.

**SKJAL 7B**

**FØROYA KOMMUNUFELAG**
P. O. Boks 73
3850 Glyvrar
Føroyar (Faroe Islands)
Tlf. (042) 47600

29. apríl 1985

FØROYA LANDSSTÝRI
Tinganes

Viðv.: **Brunalógaruppskotinum.** (F. L. 816-9)

Landsstýrið sendi 5. apríl 1984 felagnum uppskotið um nýggja brunalóg til ummælis. Uppskotið hevur verið til viðgerðar í felagnum og eru viðmerkingarnar hesar.

ALMENNAR VIÐMERKINGAR.

Eitt tað fyrsta, ið eigur at verða gjørt vart við, er nevndar-samansetingin, har landsverkfrøðingurin hevur 2 umboð, arbeiðseftirlitið 2 og landfútin 1. Nevndar-samansetingin litar eisini uppskotið, ið er einstáttað miðsavnandi.

Vanliga er fyrsta greinin í eini lóg ein grein, ið sigur nakað um endamálið við lógini. Fyrsta greinin í hesum lógaruppskoti, er um brunaumsjón landsins, ið skal hava eftirlitið við brunamálum. Tað vil siga, at endamálið við lógini verður ikki at gera tiltøk, sum kunnu minka um eldvandan, men at skapa eitt eftirlit, ið skal liggja undir landsverkfrøðinginum.

Verður lisið víðari í lógaruppskotinum, kemur fram, at brunaumsjón landsins er:

1) ráðgevandi hjá myndugleikunum í øllum spurningum í brunamálum, § 1, 2. stk.,
2) endaligur kærustovnur, § 2, 2. stk.,
3) eftirlit, ið sjálvt setur mørkini fyri sínum virksemi,
4) góðkenningarstovnur í øllum spurningum í brunamálum.

Umframt hetta kann brunaumsjón landsins áleggja kommunum óavmarkaðar útreiðslur til brunamál.

Brunaumsjón landsins er eftir uppskotinum so sterk, at allar aðrar ásetingar í lógini kunnu setast til viks av brunaumsjón landsins. Tá nyttar ikki nógv at lóggeva.

Uppskotið er annars ein týðing av donsku lógini, burtursæð frá, at har tað í donsku lógini verður ásett, at løgmálaráðharrin tekur avgerðir ella ger reglur fyri kommununrnar, so er hetta lagt yvir til landsverkfrøðingin, at taka avgerðir eftir reglum, ið eingin annar kennir. Hetta kemur týðiliga fram í § 6, 1. stk.:

> »Í hvørjari kommunu setir býar- ella bygdaráðið ein brunaumsjónarmann. Fleiri kommunur kunnu vera saman um ein brunaumsjónarmann. Tilnevningin skal verða góðkend av brunaumsjón landsins.«

Í donsku lógini er tilsvarandi í § 7, 1. stk.:

> »I hver kommune udnævner kommunalbestyrelsen en brandinspektør. Brandinspektøren kan være fælles for flere kommuner. Justitsministeren fastsætter regler om hvilke betingelser, der skal opfyldes af den, der udnævnes til brandinspektør.«

Til at ráðgeva donsku myndugleikunum í brunamálum, verður eitt brandráð sett á stovn. Hetta brandráð er umrøtt í § 18 í donsku lógini:

> »Der oprettes for hele landet et brandraad bestaaende af 7 medlemmer, der udnævnes af justitsministeren. Af medlemmerne skal 3 udpeges af Kommunernes Landsforening. 1 medlem skal repræsentere civilforsvaret, udnævnes efter forhandling med indenrigsministeren, og 1 medlem udnævnes fra Dansk Brandinspektørforening, medens justitsministeren udpeger 2 medlemmer.
>
> Stk. 2. Blandt raadets medlemmer udnævner justitsministeren formand og næstformand, hvoraf den ene skal være en af repræsentanterne for Kommunernes Landsforening. Brandraadet udfærdiger selv sin forretningsorden, der skal godkendes af justitsministeren.
>
> Stk. 3. Brandraadet skal være raadgivende for myndighederne i spørgsmaal vedrørende brandvæsenet.
>
> Stk. 4. Udgifterne ved brandraadets virksomhed afholdes af statskassen.«

og tryggjar donsku kommununum ávísa ávirkan, men ein tilsvarandi grein er ikki at finna í uppskotinum. Hetta kann bert verða eitt úrslit av nevndarsamansetingini.

Fylgjurnar av lógini verða enn meira miðsavnan, tí tey arbeiði, sum í donsku lógini eru løgd út til brunaumsjónarmenn, skorsteinssóparar og byggimyndugleikan á staðnum, verða í uppskotinum løgd undir landsverkfrøðingin. Grundgevingin fyri at leggja alt undir landsverkfrøðingin er eftir álitinum:

> »Landsingeniørens institution er efter udvalgets opfattelse velegnet til at varetage de opgaver, der henlægges til landets brandinspektion.
>
> Det bør dog fremhæves, at opgaverne er af en sådan karakter, at personalet i Landets brandinspektion må specialuddannes, og at inspektionen derfor bør etableres som en i princippet selvstændig afdeling i landsingeniørens institution.«

Henda niðurstøðan kemur ikki óvart, tá hugsað verður um nevndarsamansetingina.

Brunaumsjón landsins má vera ein sjálvstøðugur stovnur, og ikki ein í princippinum sjálvstøðugur stovnur undir landsverkfrøðinginum, har brunaumsjón landsins kann verða brúkt til at fremja onnur endamál, enn ætlanin er við lógini.

Uppskotið skilir ábyrgd og avgerð, soleiðis at avgerðirnar verða lagdar undir landsverkfrøðingin, meðan kommunan hevur figgjarligu ábyrgdina.

Ótryggleikin við ongum sløkkiliði kann kosta við at hús brenna niður, men í mun til eitt fullbúgvið sløkkilið, kann tann prísurin kortini verða minni, serliga um sløkkiliðið ikki kann koma fram í tíð.

Kommununrnar eru farnar í holt við at seta sløkkilið á stovn, og sýnir hetta, at kommununrnar vísa málinum ans. Íløgurnar verða gjørdar eftir eini metan av, hvat kann verða fingið burturúr. Og tað nyttar lítið at gera stórar íløgur í útbúnað, um eingin kann handfara hann.

Skal yvirhøvur verða vart móti eldi, má tað verða gjørt skjótt, og tá er lítil dugur, at bara ein partur av bygdarfólkinum dugir at handfara sløkkiamboðini.

Í donsku lógini er møguleiki fyri, at brandmeistarin er eitt borgarligt umboð, men hesin møguleikin er tikin burtur í framlagda uppskotinum. Tann møguleikin eigur at vera til staðar.

Undir øllum umstøðum áttu kanningar og fyrispurningar verið øðrum enn

»statens brandtilsyn«. Danmark er jú eitt rættiliga tættbygt land við góðum samferðsluviðurskiftum, har tað ber væl til at hava eldsløkking sum atvinnu.

## NIÐURSTØÐA

Sum er hava vit næstan onga brunalóggávu, so eingin ivi er um, at okkum vantar lóggávu.

Fyriliggjandi uppskot er ein heild, sum gevur landsverkfrøðinginum ógvuliga stórar heimildir bæði á brunatekniska og byggitekniska økinum, meðan útreiðslurnar verða lagdar á kommununrnar. Slík lóggáva kann ikki góðtakast av kommununum.

Kommunufelagið skjýtur tí upp, at eitt annað uppskot, ið byggir á niðanfyri nevndu partar, verður gjørt. (Partar av fyriliggjandi uppskoti kunnu sjálvandi verða brúktir, men denturin má verða fluttur frá landsverkfrøðinginum yvir á kommununrnar).

1. Endamál: Skylda kommunanna at kunna gera hóskandi tiltøk at verja móti eldi.
2. Skipan: a) Hvussu sløkkiliðið er skipað.
   b) Minstukrøv til eldverju.
   c) Útbúgvingarkrøv.
   d) Reglugerð um hesi viðurskifti.
3. Eftirlit, ið ikki er heft av landsverkfrøðingsstovninum. Her kann verða víst til skipanina av arbeiðseftirlitinum (Lóg nr. 58 frá 4/5-74, § 30).
4. Um eldsløkkjan.
5. Um brandsýn og eldhættislig virkir.
6. Um skorsteinssópan.
7. Um revsing og annað.

Felagsins vegna

***Martin Olsen***
formaður

*/ Jens M. Dalsgaard*
skrivari

**SKJAL 7C**

**TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**

Tórshavn, tann 19. juli 1985

J. nr. 45/3 1984

Føroya Landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn.

**Viðv. brunalóggávu fyri Føroyar.**

Við skrivi, dagfest 5. apríl 1984, sendi landsstýrið býráðnum til ummælis eitt álit viðvíkjandi brunalóggávuni, og tann 30. apríl 1985 var býráðið á fundi í landsstýrinum saman við Føroya kommunufelag um uppskotið.

Á hesum fundi greiddi býráðið frá sínum sjónarmiðum um uppskotið og boðaði frá, at tað fór ikki at leggja hesi sjónarmið fram skrivliga.

Tá landsstýrið í skrivi dagfest 14. juni 1985 krevur skrivligt ummæli frá býráðnum innan 15. juli 1985, um sjónarmið býráðsins skulu verða havd í huga, skal býráðið aftur vísa til tað, ið býráðið fordi fram á fundinum tann 30. apríl.

Samstundis skal býráðið minna á, at býráðið í mong ár hevur mint á tørvin á eini brunalóggávu fyri Føroyar, ikki minst í samband við gerð av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn tíðliga í 70-árunum, og tó at býráðið heldur at sentraliseraða umsitingin av brunamálum er skeiv, so er tørvurin á brunalóggávu so stórur, at býráðið vil ikki mæla til, at lógin verður feld av hesi orsøk.

B. v.

***Poul Michelsen***
form.

*/ Kjartan Kristiansen*
skr.

SKJAL 7D

**LANDSVERKFRØÐINGURIN**
Tinghúsvegi 7 . Postbox 72
3800 Tórshavn . Føroyar
Tlf. 11333 . Telex 81353

J. nr. PO/TA 1914

Tórshavn, 16. apríl 1985

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn

Hin 23. oktober 1984 hevur landsskrivstovan biðið okkum um ummæli av uppskoti til løgtingslóg um brunaviðurskifti o. a. m., sum ein nevnd, sett av landsstýrinum 19. november 1984, hevur latið úr hondum.

Lógaruppskotið, sum við hesum verður ummælt, er — í ein ávísan mun — gjørt við brunalógunum í hinum norðurlondunum sum fyrimynd, og tað viðger í høvuðsheitunum hesi øki:

1) Verandi viðurskifti og endamálið við eini brunalóg o. a.
2) Uppskot til bruna- og bjargingarlóg á landi.
3) Viðmerkingar til lógaruppskotið o. a.

Uppskotið miðar ímóti at skapa skipað viðurskiftir viðvíkjandi fyribyrging og sløkking av eldi, so vit fáa eina toluliga eins viðgerð av brunamálum her á landi jv. br. síðu 10 og 52.

Sum nevnt er uppskotið líkt lógunum í hinum norðurlondunum, men her er roknað við neyvari samstarvi millum lokalu myndugleikarnar og brunaumsjón landsins, soleiðis sum nevnt á síðu 70 ovast.

Í sambandi við møguligum bjargingum á landi og undir óhappi við vandamiklum evnum, er tørvur á skipaðum viðurskiftum. Hetta er nevnt á síðu 16.

Í tí dagliga er tað mest á fyribyrgjandi økinum, hetta hevur týdning hjá ti ávísu kommununi. Er óhapp við vandamiklum evni, er harafturímóti tørvur at samskipa bjargingararbeiði t. d. millum kommunur. Hetta er nevnt á síðu 57 ovast, síðu 62 og 63.

Lógin gevur møgulcika hjá stórum kommunum við rættiligari umsiting at vera meirivirknaríbyggimálsviðgerðum. Tærminnikommunurnarfáarætttilog

møgulcika fyri at útvega sær hjálp og vegleiðing frá brunaumsjón landsins, soleiðis at citt nú byggimálsviðgerð av størri bygningum verður meiri eins frá kommunu til kommunu. Hetta er nevnt á síðu 66 ovast.

Í hesum sambandi kann nevnast, at neyðugt verður at útvega reglugerðir til komununurnar at virka eftir. Hetta er nevnt á síðu 64, 70 og 73.

Nøkur dømi um tílíkar reglugerðir eru:

1) Viðvíkjandi goymslu.
2) Viðvíkjandi virkjum, ið tilvirka eldfim ella spreingifim evni.
3) Viðvíkjandi goymslu og nýtslu av gassi.
4) Viðvíkjandi goymslu og tilvirkan av timbri.
5) Viðvíkjandi goymslu og tilvirkan av plastikki.
6) Viðvíkjandi sproytumáling og lakering við eldfimum evni.
7) Vegleiðing fyri góðkenning av tjøldum til samkomuhald v. m.
8) Vegleiðing fyri brunaeftirliti av ymsum vandamiklum bygningum.
9) Vegleiðing til árligar venjingarskráir fyri sløkkilið.
10) Rakstrarvegleiðing fyri samkomuhús og høli.
11) Rakstrarvegleiðing fyri skúlar.
12) Rakstrarvegleiðing fyri gistingarhús.
13) Rakstrarvegleiðing fyri handlar.
14) Rakstrarvegleiðing fyri dagstovnar.

(Nakrar av hesum reglum verða nýttar, tá ávís mál koma fyri).

Vit hava hjálpt kommunum og øðrum við spurningum um, til dømis brunateknisk mál, í tann mun biðið hevur verið um vegleiðing, — eini 60-70 mál hvørt árið — og er hetta vorðið ein fastur táttur hjá okkum gjøgnum tey seinastu 10-15 árini.
Serútbúgvið fólk er á stovninum til hetta endamál.

Hetta samstarvið millum okkum og ymsar myndugleikar, stovnar og projekteringsfeløg økist í hvørjum, hóast vit bert í einstøkum førum virka sum myndugleiki (oljugoymslur, gassgoymslur og servicestøðir).

Henda gongdin vísir, at tørvur er á at kunna leita sær vegleiðing á ***einum*** stað í spurningum, sum lógaruppskotið fevnir um.

Lógaruppskotið hevur við sær, at brunaumsjón landins kann lata kommunum og øðrum hjálp við málsviðgerðum og til at halda »lív« í sløkkiliðum kring landið og tilrættisleggja og samskipa venjingar av ymsum bjargingartiltøkum á landi. t. d., tvørtur um kommunumark.

Samanumtikið má sigast, at lógaruppskotið við viðmerkingum er tillagað okkara umstøðum, samstundis sum tað gongur á møti einum almennum tørvi.

*M. Helmsdal*

SKJAL 7E

**FÆRØERNES KOMMANDO**
Thorshavn

Nr. 127 - U 124/84

23. Nov. 1984.

Til Landsskrivstovuna

Emne: **Frágreiðing um Brunalóggávuna**

Marinestationen modtog 22. oktober 1984 den som emne anførte publikation med anmodning om en udtalelse om den ved denne foreslåede brandlovgivning.

Således foranlediget skal Marinestationen herved meddele, at denne lovgivning ikke giver anledning til bemærkninger.

***J. D. Brusendorff.***

**SKJAL 7F**

**LANDSLÆKNIN**
CHIEF MEDICAL OFFICER
Sigmundargøta 5. Postsmoga 9
3800 Tórshavn. Faroe Islands
Tlf. 11832

Tórshavn, 27. november 1984.

J. nr. 19-17-84

Føroya Landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn.

Landsstýrið hevur við átekning hin 22.10.84. (Ó. Reinert) sent undirritaða »Frágreiðing um brunalóggávuna« við áheitan um ummæli.

Galdandi reglur um brunamál eru frá 1856 og 1882. Hesar reglur eru ikki hóskandi í samfelag okkara í dag.

Undirritaði kann taka undir við tí, ið verður nevnt á bls. 16 um, at lógin kemur at líkjast eini rættiligari bjargingarlóg.

Somuleiðis verður tað mett at hava stóran týdning, at gjørdar verða »beredskabsplaner« fyri øll sjúkrahúsini í Føroyum. Spurningurin verður umrøddur á bls. 26-27.

Eyðvitað fer onkur spurningur at taka seg upp um kommunala sjálvstýrið, tá ein slík lóg skal setast í gildi, men verður hetta hildið at vera ein politiskur spurningur, ið tað liggur uttan fyri heimildarøki undirritaða at gera viðmerkingar til.

Samanumtikið skal undirritaði mæla til, at ein løgtingslóg um eldsbruan o.a. verður sett í gildi sum skjótast. Galdandi reglur eru sum nevnt ikki tíðarhóskandi.

*Høgni Debes Joensen*
landslækni

**SKJAL 7G**

**VAKTAR- OG BJARGINGARTÆNASTAN**
Gongin . Box 347 . Tórshavn

Tórshavn, 20. dec. 1984.

Føroya Landsstýri
att.: J. P. Ellendersen

**Viðv. Frágreiðing um Brunalóggávuna**

Vísandi til áheitan frá Landsstýrinum, dagf. 22/10-1984, viðvíkjandi frágreiðing um brunalóggávuna, uppskot til løgtingslóg um brunaviðurskifti o. a. m.

Til sjálvt uppskotið til løgtingslóg um brunaviðurskifti hevur Vaktar- og bjargingartænastan ongar viðmerkingar.

Viðmerkjast skal tó:
ad: síðu 20 í frágreiðingini **5.3.4. katastrofeledelse.**

Sambært løgtingslóg nr. 83, dagf. 24. okt. 1978, um Vaktar- og bjargingartænastuna, fyrisitur hesin stovnur (VBL) tann føroyska partin av Vaktar- og bjargingartænastuni í samarbeiði við Færøernes Kommando.

ad. síðu 143 afsnit 6 flyulykke i farvandet omkring Færøerne.
a) Telefonisk underretning til Færøernes Kommando.

Samsvarandi omanfyristandandi lóg eigur at standa — Færøernes Kommando og Vaktar- og bjargingartænastuna.

v. h.

***Johan Ziskason***

**SKJAL 7H**

**LANDSFELAGIÐ FYRI BJARGINGARFELØGINI**

5. januar 1985.

Vegna áheitan um ummæli av bókini »Frágreiðing um Brunalóggávuna o. a.«, sent 22/10-84.

Um Brunalóggávuna sjálva havi eg ongar viðmerkingar; men ístaðin nøkur orð um bjargingarfeløgini og L. F. B.

Bjargingarfeløgini innan L. F. B. eru 8 í tali. Limatalið liggur um 1200. Í byrjanini vóru feløgini bert ætlað til sjóbjargingar; men seinni er hetta broytt, so tey vera til staðar, har hjálp er fyri neyðini, bæði á sjógvi og landi. Fyri at fáa betur samband millum feløgini, og ikki minst fyri at keypa tól til felagsskapin, varð L. F. B. stovnað 1975. Í hesi 9 árini, L. F. B. hevur arbeitt saman við bjargingarfeløgunum, hevur eftir umstøðunum gingið væl framá. Viðmerkjast má, at alt arbeið er sjálvboðið. Men tað hevur gingið upp og niður. Aðalmálið er at byggja hesi 8 feløgini upp til veruligar bjargingarstøðir; men til tess koma vit ikki uttanum, at peningaligi stuðulin, L. F. B. fær frá tí almenna, røkkur ov stutt. Á síðu 27 undir »Udvalget henstiller« er gleðiligt at síggja ynski um, ***at*** Landet yder større tilskud til L. F. B.

**Okkum tørvar »tilskud«.**

Sum er, hava feløgini nakað av tólum til taks, men nógv restar í. Nýggj tól koma fram, og alt kostar. Men møguliga størsti tørvurin eru góð hús til at goyma tólini í, halda tey við líka, og so ikki minst húsið sum ein ramma um felagsskapin. Til veruligt brúk eru húsini alt ov smá. Tak til dømis HBF. Men sum sagt, peningur skal til, og tað hava býráðið og bygdaráðini møguliga vitað; men heldur hava teir álíkavæl stuðlað bóltinum o. ø., og skúgvað okkum til síðis. Vit áttu tó møguliga at havt gjørt meira vart við okkum eisini.

**Um vanlukkuráðlegging.**

Føroyar eru citt lítið oyggjaland við einans 44.000 íbúgvum, ið búgva á 17 oyggjum. Við hesum í huga tykir mær, at ein vanlukkuráðlegging eigur at vera so einfald sum gjørligt. Tað hava verið kannaðar brandlógir í Grønlandi, Noregi og Danmark til tess at finna eina hóskandi til okkum. Men, viðvíkjandi kannan av vanlukkuráðlegging, vildi eg mett Ísland at

verið tað land, vit áttu at sammett okkum við. Teir eru væl royndir innan hetta umráðið. Tak til dømis Vestmannaoyggjarnar, har teir fluttu 5.000 menniskju burtur eftir einari nátt. Eisini fingu teir roynt seg við Krafla-umráðið. Tá tílíkar vanlukkur henda har, eru tað »Allmennavarnir«, eitt almannaráð, ið situr í Reykjavík, ið kemur saman. Í hesum ráði sita:

Form. í almannaráðnum
stjórin fyri vegasambandinum
stjórin fyri post og telegraf
stjórin fyri landslæknan
stjórin fyri løgreglustjóran
stjórin í heilsuráðnum (skrivari ráðsins).

Har út frá gongur so alt hjálpararbeiði út til tey sjálvbodnu feløgini, sum eru:

Íslendska bjargingarfelagið »Slysavarna felag Íslands«
Luftverndartænastan
Sjálvbodnir skótar
og Reyðikrossur.

Annars er meginreglan tann, at ein brúkar og samskipar almannafæ og ognir, sum samfelagið hevur í dagligari tænastu. Í 1979 vóru tveir mans sendir yvir til Íslands fyri L. F. B. at kanna teirra viðurskifti, og komu teir heim aftur við nógvum tilfari, at hava til sammetingar her heima hjá okkum.

**Um heimavernd** (CF)

Her er tað sama at siga, sum um vanlukkuráðlegging. Vit eru í einari serskiltari støðu, við tað at vit búgva í einum oyggjalandi. Tað batar ikki at kroysta eina heimaverndarlóg niður yvir hetta fólkið frá hinum lutvís stóru norðurlondunum. Lógin má koma frá fólkinum til at vera fyri fólkið, og er tað aftur her nokk Ísland, ið líkist okkum eina mest.

Rætt er, sum tað stendur á síðu 28, at bjargingarfeløgini fingu tól frá CF ígjøgnum fútan. Tað var í 1979, og komu tey væl við í ti útbygging, L. F. B. tá arbeiddi við fyri bjargingarfeløgini. Men tey bestu tólini fær ein tó við at umbiðja og gjalda tey sjálvur. Heldur fá, men góð, tíðarhóskandi tól, enn nógv og vánalig. Húsaumstøðurnar eru ju, sum sagt áður, ikki ov góðar.

**Ov stór krøv til sjálvbodna hjálp**

Tað hevur altíð verið min meting, at L. F. B. eigur at hava eitt lønt fólk til at røkja áhugamál bjargingarfelagsins. Hetta varð mær serliga skilligt eftir at hava verið í Íslandi og kannað teirra arbeiði í so máta. Ríkið rindar tað, ið skrivstovuhaldið hjá Slysavarnafelagnum kostar. Har eru 9 fólk, harav 4 ganga vakt á kalliskylduni. Um landið hevði goldið einum fólki løn umframt tað, ið L. F. B. fær nú, hevði óivað komið væl burtur úr hjá

okkum. Sum er, vaksa krøvini til teir einstøku leiðararnar ájavnt við útbyggingina, og tað skal skarvast burtur av frítiðini í so stóran mun, at tað gerst alt meira og meira tvørligt at ganga upp í henda álvarsama felagsskap við lív og sál, og røkja tær uppgávur, ið mega haldast við líka, um nakar veruligur dugur skal vera í okkum, tá á stendur. Og vit vita ikki nær, men vit vilja royna við okkara fólki og tólum at standa til reiðar eina og hvørja tíð, hvar sum helst. Hetta átti at verið nóg mikið at sagt, fyri at undirstrika tann tørv á peningaligum stuðli, vit hava fyri neyðini.

**Aðalmálið hjá L. F. B. er:**
Miðað verður ímóti at stovna bjargingarfeløg um alt landið, har sum tørvur er á.

At samskipa tey í landsfelagið L. F. B.
At hjálpa til við útgerð.
At veita stuðul til feløg.
At fyrireika upplýsandi og upplærandi fundir, fyrilestrar o. a.
At vekja áhuga fólksins fyri bjargingarfeløgunum og arbeiði teirra.

Vit kunnu her leggja afturat: At ferðast til skúlar, læra børnini fyrstuhjálp, í útvarpi, sjónvarpi við filmum um bjarging, ferðast felaganna millum o. s. fr.

Innsavnan av peningi er eisini ein táttur, vit hava arbeitt eitt sindur við, og mangt annað kundi verið at trivið í hjá einum manni. Eisini hevði hann kunnað havt neyvt samarbeiði við t. d. ferðslutrygd, tí tað er eisini eitt mál hjá bjargingarfeløgunum at fyribyrgja. At fyribyrgja og bjarga hoyrir saman.

At røkja øll hesi og mong onnur mál til fulnar einsamallur, sum formaður í L. F. B., hinir limirnir sita spjaddir kring landið, er ikki at krevja so lítið.

Eg seti mítt navn undir, og limirnir fáa eitt eintak.

Virðiliga fyri L. F. B.

***Rólant Patursson***
form.

SKJAL 71

**SJÚKRAHÚSSTJÓRIN**
Postsmoga 366 . Kongabrúgvin
Tlf. 15360

Tórshavn, 15. juli 1985

S. J. nr. 150-40

Føroya Landsstýri
Tingancs
3800 Tórshavn

Eg havi fingið »Frágreiðing um brunalóggávuna« við áheitan um ummæli.

Mett verður, at Landsstýrið ynskir viðmerkingar viðvíkjandi »5.3. Forholdet til katastrofeindsats«.

Á blaðsíðu 24 er tilskilað »Det synes ikke klart at fremgå af gældende lovgivning eller administrative bestemmelser, hvem der har ansvaret for ambulancetjenesten.«

Til hetta vil eg viðmerkja, at eftir mínum tykki hava sjúkrahúsini skyldu til at reka sjúklingaflutning, og er hetta skipað soleiðis:

Í Norðoyggjum: Klaksvíkar sjúkrahús hevur 2 sjúkrabilar og ein bát.

Eysturoy, Streymoy, Vágar, Sandoy, Nólsoy, Hestur, Koltur og Mykines:

Landssjúkrahúsið hevur 4 sjúkrabilar og 1 skip. Landssjúkrahúsið hevur samstarv við bjargingarfeløgini á Sandoynni og í Vágum, m.a. við at lata teimum sjúkrabilar til ein symbolskan prís.

Í Suðuroynni: Suðuroyar sjúkrahús hevur 2 sjúkrabilar.

Harumframt hava sjúkrahúsini avtalu við Strandferðsluna, »Sam«, og við sjóverjuna um nýtslu av tyrluni.

Hetta verður mett at nøkta tann »dagliga« tørvin, men er sjálvandi ikki nóg mikið í einari neyðstøðu.

Eg eri samdur í, at bereiðskapsætlanir fyri sjúkrahúsini eiga at gerast. Í løtuni fyriliggur eitt uppskot til ætlan fyri Landssjúkrahúsið. Uppskotið hevur sum grundarlag eina størri flogvanlukku í Vágum.

Har áttu ætlanir fyri hvørt sjúkrahús at verða gjørdar og somuleiðis ein samskipan av hesum ætlanum. Harafturat eiga ætlanir at verða gjørdar við tí fyri eyga at kunna tøma sjúkrahúsini skjótast gjørligt.

Eg meti ikki, at kapasitetur er á sjúkrahúsunum til at gera slíkar ætlanir, og vil tí skjóta upp, at ein konsulentur verður settur til saman við tænastu- og starvsfólki á sjúkrahúsunum og øðrum myndugleikum at gera hesar ætlanir, at seta fólk inn í nýtsluna av teimum, at halda tær viðlíka og at stíla fyri venjingum.

Konsulentirin kann virka fyri fleiri myndugleikar.

Viðkomandi kann umboða sjúkrahúsini í bereiðskapsráðnum, ið er umtalað á blaðsíðu 27.

Til »fordelingslisten« á blaðsíðu 132 verður viðmerkt, at sjúkrahússtjórin, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús eiga at vera við.

Vist verður til Føroya Landsstýri, j. nr. 816-9.

*J. A. Sørensen*

**SKJAL 7 J**

**STATENS LUFTFARTSVÆSEN**
VÁGA FLOGHAVN (Vagar Airport)
3867 SØRVÁGUR
FØROYAR (Faroe Islands)

**Samanseting av nevnd**

Avsnitt I:

Ongin í nevndini hevur tilknýti til nakað brandlið í Føroyum.

Kommunurnar (sum skulu gjalda) eru ikki umboðaðar heldur.

Avsnitt III:

3.3. Nevndin hevur roynt at savna upplýsingar um brandbereiðskap og sigur at:
Materialið neyvan er fullkomið.
Í heiminum er neyvan nakað brandlið, sum er fullkomið.
Fyri at meta um, hvussu til stendur við brandútgerðini, hyggja at skjali nr. 4 síðu 9.
Her síggja vit, at nakrar kommunur uppfylla krøvini í lógaruppskotinum.

Samanbera vit »Eksisterende materiel« skjal 4 síðu 9 við skjal 5, síggja vit, at nógv brandútgerð ikki er tald við.

Í skjali 4 eru heldur ikki allar bygdir, sum hava brandútgerð taldar við, t. d. Kollafjarðar kommuna, sum hevur eitt lutfalsliga vælvirkandi sløkkilið.

Upplýsingarnar hjá nevndini um verandi materiel í landinum — burtursæð frá einstøkum kommunum, er so ófullfiggjað, at skeivt er at gera metingar út frá hesum grundarlagi.

At trupult hevur verið at fáa upplýsingar um brandútgerðina, gevur ikki nevndini heimild at gevast við royndunum at fáa upplýsingarnar.

3.4. **Landets Brandinspektion.**

Lógaruppskotið mælir til, at L. B. skal liggja hjá L. V., m. a. tí L. V. hevur fólk við serligum tekniskum kunnleika.

Hvør er hesin kunnleiki?

Eru aðrir stovnar, kommunur ella einstaklingar, ið harav eiga neyðugan tekniskan kunnleika?

Er neyðugt at leggja L. B. í Tórshavn? (centralisering).

At brandteknisk viðgerð skal verða eins um landið alt, sum nevndin sigur, er ein sjálvfylgja.

4. **Forslagets økonomiske konsekvenser.**

5. **Andre overvejelser.**

Um at senda boð eftir hjálp frá øðrum sløkkiliði (§ 18).

Tá eldur er í, og serliga tá vandi er á ferð við vandamiklum evnum, kann verða neyðugt við hjálp frá øðrum enn sløkkiliði hjá grannakommunum.

Heimild eigur at vera í lógini fyri, at senda boð eftir neyðugari hjálp frá møguligum einstaklingum ella stovnum.

Ansað skal verða eftir, at vit ikki leggja mál undir brandlógina, sum natúrliga hoyra undir eini komandi umhvørvislóg.

5.3.5. **Katastrofeberedskab.**

**Brandvæsen.**

Sambært skjal 4 síða 5, skal í Vágum verða beredskab B.

Í skjali 4 verða bert kommunur nevndar, sostatt falla nakrar bygdir útímillum.

Bereiðskapsmessiga er hetta óheppið, m.a. kemur Gásadalur (Biggjar Kommuna) at økja munandi um teinin, ið koyrast skal, tá berghol til bygdina er komið.

Vatnsoyrar (Miðvágs Kommuna) er bygd við lutfalsliga stórum íðnaði. Her liggur eisini landsins største summarlega.

Krøvini til sløkkilið(ini) økjast samsvarandi.

Verður eitt floghavarí í bygdum umráði (Sørvágur er nærmasta bygd) krevur hetta skjótan, effektivan insats.

Hava vit tvinni A sløkkilið í Vágum í staðin fyri 1 B sløkkilið, fáa vit rimiligan dekning av Bø og seinni Gásadali, umframt at vit tryggja ein skjótari insats í Sørvági sum heild.

Prísmunurin samb. skjal 4 er:

| | |
|---|---|
| Automobilsproyta 8 v. pakn. ..... | 400.000 kr. |
| Árlig løn ..... | 110.400 kr. |
| 2 Automobilsproyta løtt ..... | 480.000 kr. |
| Árlig løn ..... | 153.000 kr. |

Omanfyri verður roknað við deiltíðsmanning. Um møguligt er at halda fram við verandi skipan, verður onki nevnt um í álitinum.

**Ambulancetjeneste.**

Ambulanceorkan í Vágum burdi verið økt í minsta lagi til 4 børur ímóti sum nú, bert 2 børur.

**Redningstjenesten.**

Møguleikin hjá sløkkiliðum, kommunum, landsverkfrøðinginum og lokalum bjargingarfeløgum til at fría innistongd og fastkleimd fólk við núverandi amboðum, ivast vit stórliga í. Serliga um amboðini skulu brúkast í skundi.

Skulu vit avmarka ólukkuna í størsta mun, er neyðugt við eini

**BEREDSKABSPLAN**

sum skal liggja hjá løgreglu, sløkkiliði, bjargingarliði o. ø.

Í beredskabsplaninum skal standa:

— Hvar ein fær fatur á amboðum.
— Akførum.
— Egna hús til innivist.
— Serkønt fólk av ymiskum slag.
— O. m. m. a.

P. S. Í alfabetiskum ordan, og/ella aðrari greiðari skipan.

**Sygehusberedskabet.**

Í Vágum eigur planurin fyri upprætlan av »lasaretti« á Ellishciminum, Zarepta og á Hotel Vágum at verða gjørdur.

Katastrofuplanurin fyri sjúkrahúsið í Havn er áhugaverdur, og átti at verið royndur.

Lækna- og sjúkrasystrahjálp á skaðastaðnum er ógreið, fyri ikki at siga uttan skipan.

**Udvalget henstiller.**

1. Størri stuðul til brandliðini.
2. Størri stuðul til L. F. B.
3. Uppbyggja katastrofubereiðskap, á Landsins Brandinspektión.

Nevndin metir, at L. V. hevur fólk og amboð v. m., sum kann brúkast á einum skaðastaði.

Vit vilja gjarna fáa ein lista yvir hesi fólk og amboð.

Vit mega gera okkum greitt, at amboð hjá landi, kommunu og privatum arbeiðsplássum altíð eru til taks á einum skaðastaði.

Tað mugu tí verða heilt onnur argumentir fyri at leggja katastrofuleiðsluna hjá Landsverkfrøðinginum.

4. at sláa fast, hvar leiðslan av tekniskum insatsi á skaðastaðnum er.

5. tilstrækkelig ambulancekapasitet klarlægges.

6. Beredskabsplaner for alle sygehuse.
   — her ynskja vit eina skipan fyri Vágoynna, sum kann góðtakast.

7. Samanseting av »beredskabsråd«.
   — Fyri Vágoynna hevði verið hóskiligt, at eitt umboð fyri flogvøllin var í nevndini.

**5.4. Forhold til civilforsvaret.**

Sløkkiliðini eru av so stórum týdningi í civilverju, at øll orka eigur fyrst at verða løgd í at fáa sløkkiliðini upp at standa.

Ein annar spurningur er, um L. F. B. kundi átikið sær uppgávurnar, sum civilverjan hevur aðrastaðni.

Vit mæla til, at fundur verður hildin um ivaspurningar í lógaruppskotinum saman við teimum, sum skulu bera fíggjarligu byrðarnar, og teimum sum skulu arbeiða eftir lógini.

V/

STATENS LUFTFARTSVÆSEN
VÁGA FLOGHAVN (Vágar Airport)
3867 SØRVÁGUR
FØROYAR (Faroe Islands)

***Finnbogi Niclasen***
stjóri

***Jóannes Ortind***
Brand- og Redningsleiðari

## 8: Skjal til løgtingsmál nr. 41: RÍKISLÓG UM ALMENNAR SKRÁIR

JUSTITSMINISTERIET

L. A. 1983-522-10.
Den 11. juli 1985.

**UDKAST**

**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om offentlige myndigheders registre.**

I henhold til § 32 i lov nr. 294 af 8. juni 1978 om offentlige myndigheders registre bestemmes:

**§ 1.** Bestemmelserne i § 1, §§ 3-5, §§ 8-17, § 19, stk. 1 og stk. 2, 1. pkt., og §§ 20-29 i lov nr. 294 af 8. juni 1978 om offentlige myndigheders registre gælder med den nedenfor angivne ændringer for registre, der føres for rigsmyndigheder på Færøerne.

1. § 4, stk. 3, affattes således:
»**Stk. 3.** EDB-registre, der føres for rigsmyndighederne, og som indeholder personoplysninger, må kun oprettes efter forudgående forhandling med det færøske hjemmestyre«.

2. I § 4 indsættes som stk. 4 og 5:
»**Stk. 4.** Forinden der meddeles godkendelse af registrerets oprettelse og fastsættes forskrifter for dette, skal der indhentes en udtalelse fra Færøernes registertilsyn om registerets oprettelse og registerforskrifterne.

**Stk. 5.** EDB-registre, der er oparbejdet med henblik på varetagelse af forskellige opgaver, må ikke samkøres«.

3. I § 9, stk. 2, indsættes efter 2. pkt. som nyt punktum:
»Personnumre må kun registreres af en rigsmyndighed, hvis dette er nødvendigt for varetagelsen af myndighedens opgaver over for skattevæsenet«.

4. I § 15, 1. pkt., ændres »registertilsynet« til »Færøernes registertilsyn«.

5. I § 16, stk. 1, udgår ordene »eller oplysningerne i forvejen er offentligt tilgængelige«.

6. Efter § 26 indsættes som ny paragraf:
»**§ 26 a.** Færøernes registertilsyn kan afkræve såvel den eller de for registeret ansvarlige myndigheder som den, der fører registeret, enhver oplysning af betydning for tilsynet.

**Stk. 2.** Tilsynets medlemmer og personale har til enhver tid mod behørig legitimation uden retskendelse adgang til alle lokaler, hvorfra registeret administreres eller kan benyttes, samt til lokaler, hvor registeret eller de tekniske hjælpemidler opbevares eller anvendes.

**Stk. 3.** Tilsynet kan afgive indberetning til den eller de for registeret ansvarlige myndigheder og vedkommende minister om konstaterede overtrædelser af loven eller de fastsatte forskrifter samt iøvrigt om forefundne mangler. Tilsynet skal have underretning om, hvad myndigheden foretager i anledning af indberetningen.

**Stk. 4.** Tilsynet kan til enhver tid fremsætte forslag om ændring af gældende forskrifter over den myndighed, der har fastsat forskrifterne. Bestemmelserne i lovens § 5, stk. 2, gældende tilsvarende«.

7. Efter § 28 indsættes som ny paragraf:
»**§ 28 a.** Færøernes registertilsyn kan offentliggøre udtalelser, som tilsynet har afgivet i medfør af § 4, stk. 4, § 26 a, stk. 3, samt forslag, der er fremsat i medfør af § 26 a, stk. 4. Bestemmelsen i lovens § 8, stk. 2, 2. pkt., gælder tilsvarende«.

**§ 2.** Ved behandlingen af sager vedrørende registre, der føres for rigsmyndighederne, tiltrædes Færøernes registertilsyn af en repræsentant for rigsmyndighederne.

**§ 3.** Anordningen træder i kraft den .....

# 9: Skjal til løgtingsmál nr. 44: BYGGING AV HØLUM TIL BILEFTIRLITIÐ

BILEFTIRLITIÐ

Tórshavn, 21. januar 1986.

Føroya Landsstýri
att.: Vilhelm Johannesen, landsstýrismaður,
Tinganes
3800 Tórshavn.

Sambært skrivi dagfest 20. desember 1985 fingu undirritaðu álagt at kanna projekt og byggikostnað viðvíkjandi nýggja bileftirlitinum í Tórshavn. Eisini varð álagt nevndini at kanna, um byggingin kundi hýsa øðrum virksemi.

Nevndin hevur havt samband við Atla Jensen frá Bileftirlitinum og fingið frágreiðing frá honum viðvíkjandi tørvsanalysu fyri framtíðartørv av hjálparfólkum og við tí plásstørvi, hetta hevur við sær.

Eisini hevur nevndin havt fund við teir projekterandi, Landsbyggifelagið P/F og Sofus Jacobsen, og eru vit komnir til hesa niðurstøðu.

**Skitsuprojekt frá 20. oktober 1983.**

Uppskotið umfatar eftirlitshøll við tveimum banum til last- og persónvognar. Garagu til kannan av bilskaðum. Í skrivstovubygginginum er ein deild til koyriroyndir við 2 skrivstovuhølum, avgreiðsla, skrásetingardeild av nummarspjøldrum, fyrisiting við 6 skrivstovuhølum, arkiv, fundarhøli, matarhøll og goymsluhøli v. m., og eru hesi til støddar:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Eftirlitshøli ..... | 347,4 m² |
| 2. | Garaga ..... | 165,0 m² |
| 3. | Millumbygningur ..... | 116,6 m² |
| 4. | Skrivstovubygningur 1. hædd ..... | 291,8 m² |
| | Skrivstovubygningur kjallari ..... | 322,8 m² |
| | Tilsamans | 1.238,6 m² |

**Endaligt projekt.**

| | |
|---|---|
| 1. Eftirlitshølir | 358 m² |
| 2. Garaga | 147 m² |
| 3. Millumbygningur | 99 m² |
| 4. Skrivstovubygningur 1. hædd | 283 m² |
| Skrivstovubygningur kjallari | 328 m² |
| Tilsamans | 1.215 m² |

Av hesum sæst, at endaliga projektið dagfest 22. september 1985 samsvarar í støddog innihaldi við skitsuprojektið. Onkur smávegis broyting er tó farin fram t.d. flytan av fýr- og ventilatiónsinstallatiónum undir forhøllini yvir í endan á skrivstovubygninginum. Hetta ger hølisviðurskiftini betur, men dýrkar hetta helst installatiónirnar nakað.

Nevndin hevur sæð nýtt standard uppskot til líknandi eftirlitshølir í Noregi. Sýnshøllin, sum er 361 m², samsvarar væl við tekningarnar av norsku høllini, sum eisini hevur 2 banar — ein til lastbilar og ein til persónvognar. Rúmið til kanning av skaddum bilum (garaga) er 148 m², meðan tilsvarandi rúmið í norska uppskotinum er 46,2 m². Til hetta hevur Atli Jensen greitt frá, at Tryggingarsambandið skal fáa ein part av plássinum til sýn av tryggingarskaðum. Fyri skrivstovubygningin er torført at gera samanberingar við norska uppskotið, vegna tess, at virkisøkið í ti føroyska bileftirlitinum er øðrvísi.

Samanumtikið kann sigast, at bygningurin er settur á eitt torført grundstykki, og er eitt stórt og dygdargott arbeiði gjørt fyri at tillaga bygningin til lendið.

Planloysnin sýnist at vera skilagóð og er uppbýtt í virkisøkir við eftirlitshøll, garagu, skrivstovuhølum, samlað um eina felags forhøll.

---

Um tilfarið kann í høvuðsheitum sigast, at nýtt er kent byggitilfar til endamálið. Skapið av húsunum og harav fylgjandi konstruktiónir eru loystar á vanligan hátt.

**Byggikostnaður**

Sambært skitsuprojektinum dagfest 20. oktober 1983 er samlaði byggikostnaðurin mettur at kosta 9.500.000 kr. Á fundi við landsstýrið 18. desember 1985 gjørdi Landsbyggifelagið vart við, at skitsuuppskotið varð mett eini 10-15% ov lágt.

Framskriva vit kostnaðarætlanina uppá 9,5 mió. kr. til í dag, og leggja vit 15%, sum var mett ov lágt aftrat, skuldi bygningurin, sum er vístur á skitsuuppskotinum kosta:

| | |
|---|---|
| Meting 20.10.83 | 9.500.000 kr. |
| Prís- og lønarhækkan | 1.000.000 kr. |
| | 10.500.000 kr. |
| 15% ov lágt mett | 1.575.000 kr. |
| Kostnaður tilsamans | 12.075.000 kr. |

Nevndin hevur óheft av hesum roynt útfrá skitsuuppskotinum at mett um, hvat bygningurin kemur at kosta. Í metanini verður bygningurin uppbýttur í skrivstovuøki-forhøll og eftirlitshølir-garaga. Kostnaðarmetingin byggir uppá 12.000 kr./m² fyri skrivstovuhøli og 7.000 kr./m² fyri eftirlitshølir og garagu.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Skrivstovuhølir og forhøll | kr. | 12.000 × 726,2 m² | = 8.714.400 kr. |
| eftirlitshøli og garaga | kr. | 7.000 × 512 m² | = 3.584.000 kr. |
| | | | 12.299.400 kr. |

Hyggja vit at okkara meting og sammeta hana við metinginga hjá Landsbyggifelagnum, sæst, at hesar liggja rættiliga nær.

**Endaligur byggikostnaður.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Jørðarbeiði: | gjørt arbeiði | 1.085.000 kr. | |
| | eftir at gera | 715.000 kr. | |
| | | 1.800.000 kr. | 1.800.000 kr. |
| Kloakkarbeiði: Tilboð | | | 630.000 kr. |
| Betongarbeiði: Tilboð | | | 1.920.000 kr. |
| Stálarbeiði: Tilboð | | | 680.000 kr. |
| Timbur- og snikkaraarbeiði | | | 4.655.000 kr. |
| Múraraarbeiði: Meting | | | 270.000 kr. |
| Málaraarbeiði: Meting | | | 400.000 kr. |
| El-arbeiði: Tilboð | | | 818.000 kr. |
| V.V.S.-arbeiði: Tilboð | | | 1.924.000 kr. |
| Skrivstovuinnbúgv | | | 500.000 kr. |
| Entreprisuupphædd | | | 13.597.000 kr. |
| Projektering og eftirlit | | | 2.900.000 kr. |
| Samlaðar byggiútreiðslur | | | 16.497.000 kr. |

Í byggikostnaðinum er ikki íroknað prís- og lønarhækkan í byggitíðini, óvæntaðar útreiðslur og byggirentur.

Av hesum sæst, at munur er í prisinum ímillum skitsuprojekt og veruligan kostnað, og stavar hetta partvís frá, at byggivirksemið er stórt í

løtuni. Møguliga hevur grundarlagið fyri kostnaðarmetingini fyri skitsuprojektið verið ov veikt.

Í ávísum førum kann sigast, at nýttar eru ov dýrar loysnir, m. a. kann nevnast: Karrusellhurð, radiatorar, ið eru innilokaðir, fótpanel í skrivstovubygninginum og stýrda luftskiftið í skrivstovuhølunum, ið verður drivið sjálvstøðugt. Sostatt er ein ávísur mekanikkur og automatikkur í hvørjum høli. Loysnin gevur eitt høgt ventilatiónsstøði og eina ávísa orkusparing, men eisini ein meirkostnað.

Projektering og eftirlit er 21,3% av tiltaksupphæddini, og má haldast at vera ov høg.

**Kunnu hølini nýtast av øðrum stovni?**

Bileftirlitið hevur normering fyri 9 fólkum tilsamans. Atli Jensen hevur upplýst, at við uppskotinum er tikin hædd fyri, at bileftirlitið skal yvirtaka tað arbeiði við motorskráseting og skriving av koyrikortum, sum nú verður gjørd av landfútanum. 3 fólk starvast nú við hetta arbeiði hjá landfútanum. Eisini er ætlanin, at vegskattur og tryggingar kunnu avgreiðast á stovninum, og sostatt kunnu øll viðurskifti við motorakførum avgreiðast á einum staði.

Atli Jensen hevur upplýst, at um bileftirlitið skal lúka sínar skyldur eftir lóggávuni, er neyðugt at seta fleiri fólk, soleiðis at skrivstovufólkið verður 21 fólk, og verður víst til skriv 9. januar 1986 við hjáløgdu skjølum frá bileftirlitinum. Um bileftirlitið fær tað fólk, tað ynskir, verður ikki pláss fyri øðrum, tí í byggninginum er ikki pláss fyri meira enn í mesta lagi 21 fólkum. Øll 21 fólkini á stovninum koma tó ikki samstundis at starvast í hølunum í Tórshavn, ti ætlanin er, at 4 skulu vera í føstum starvi uttan fyri Tórshavn.

Viðvíkjandi nýtslu av fundarhøli í kjallara upplýsti Atli Jensen, at størri dentur fer at verða lagdur á meira samstarv við koyrilærarar við skeiðvirksemi v. m.

Á t. d. arbeiðseftirlitinum starvast í dag umleið 8 fólk, so talan kann ikki vera um, at hesin stovnur kann húsast í hesum hølum, um bileftirlitið fær síni starvsfólkaynski uppfylt.

Annars má haldast, at bygningurin ikki er væl egnaður at húsa tveimum stovnum.

Tórshavn, 21. januar 1986.

*Albert Isfeld* *Arne Samuelsen*

*Ronald F. Poulsen* *Rúni Heinesen*

**SKJAL 10 A**

## 10: Skjal til løgtingsmál nr. 47: LØGTINGSLÓG UM BROYTING Í LÓG UM LANDBÚNAÐARINS FRAMA

Tórshavn, 14. dec. 1985.

Føroya Landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn.

**Viðvíkjandi fóðursølu til føroyskar bóndur:**

Í 1984 vendi Jarðarráðið sær gjøgnum Jógvan Páll Lassen, adv., til Føroya Landsstýri í samband við heimild til at veita lán til bygningar, sum vóru nýttir í samband við fóðursølu.

Hetta var framt í teirri viðurkenning, at fóðursølan til bøndur er av grundleggjandi týdningi fyri raksturin og inntøkumøguleikarnar hjá bøndrunum í samband við mjólkaframleiðslu, afturat hesum kemur, at ávísur almennur stuðul verður veittur til mjólkaframleiðarar, men verður mett av okkum, at ikki er nóg væl samskipað ímillum møguleikan fyri bíligum innkeypi av fóður, til frama fyri bøndurnar.

Nevndirnar í Mjólkarvirki Búnaðarmanna og Føroya Búnaðarfelag hava á fundi viðgjørt henda spurning og eru samd um at heita á Føroya Landsstýri um at fáa jarðarlóggávuna broytta soleiðis, at møguleiki er fyri, at jarðargrunnurin kann veita lán til samtøkur hjá búnaðarmonnum til bygningar til fóðursølu.

Vit eru á teirri fatan, at ein avgerandi fyritreyt í hesum máli má vera, at tað eru samtøkur hjá búnaðarmonnum, sum fáa lánið og ikki ein og hvør, sum fer undir fóðursølu, og kemst hetta av, at fóðursøla eftir okkara tykki ikki eigur at vera ein vinnugrein, har vinningur er ætlaður, men einans sum ein neyðugur partur av mjólkaframleiðsluni, soleiðis at hon verður so ódýr hjá bøndrunum sum møguligt.

Vísandi til hetta loyva vit okkum at heita á Føroya Landsstýri um skjótast møguligt at fáa hetta mál ígjøgnum.

Vegna Føroya Búnaðarfelag:

| | | |
|---|---|---|
| ***Hanus Joensen*** | ***Petur K. av Rana*** | ***Petur Klementsen*** |
| ***Tummas Eikholm*** | ***Fritleiv Joensen*** | ***Liggjas Húsgarð*** |

Vegna Mjólkarvirkið Búnaðarmanna:

***Rasmus Skorheim*** ***Jógvan Joensen***

***Petur Hentze*** ***Jóannes Heinesen***

***Hanus Vang***

L/F Mjókarvirkið Búnaðarmanna hevur skrivað undir hetta bræv við hesari viðmerking:

Nevndin í L/F Mjólkarvirki Búnaðarmanna tekur í prinsippinum undir við hesum skrivi, men er av tí áskoðan, at verður lógin broytt, so má møguleiki eisini gerast fyri, at eitt nú sláturvirki á samtøkustigi kann fíggjast um jarðargrunnin.

**SKJAL 10 B**

Føroya Landsstýri
Tinganes
3800 Tórshavn.

Tórshavn, tann 07.01 - 1986

**Vísandi til skriv til Føroya Landsstýri 14. des. 1985 frá L/F Mjólkarvirki Búnaðarmanna og Búnaðarfelagnum.**

Undirritaðu feløg hava samtykt til fulnar, at taka undir við hesum uppskoti. Somuleiðis um figgjan av sláturvirki.

Vegna Føroya Bóndafelag

***Bjørn Patursson, skr.***

Vegna Tøðfelag Føroya

***Páll Patursson***

## 11: Skjal til løgtingsmál nr. 48: BROYTINGAR Í FERÐSLULÓGINI

UPPSKOT
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um ferðslu.

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om færdsel.

§ 1.

Í ferðslulógini, smbr. lógarkunngerð nr. 10 frá 18. mars 1966, seinast broytt við løgtingslóg nr. 89 frá 10. juni 1982, verða hesar broytingar gjørdar:

1. § 11 verður soleiðis orðað:

»Motorakfar og dragi (traktor) skulu, áðrenn farið verður tikið í nýtslu, verða skrásett her á landi og fáa nummarspjaldur, smbr. tó §§ 12 og 14. Sama er galdandi um viðfestis- ella leguvogn til akfar við skrásetingarskyldu og húsvogn. Landsstýrið kann seta reglur um skrásetingarskyldu fyri onnur viðfestisamboð og fyri motoramboð.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann gera av, at akfar, sum yvirhøvur verður nýtt uttan fyri alfaraveg, verður ikki skrásett. Við undantøku frá skráseting verða ásett tey øki, sum akfarið kann verða nýtt á, og eisini verða settar aðrar treytir fyri tilgerð, útgerð og nýtslu.

**Stk. 3.** Landsstýrið setir reglur um:

1) skráseting,
2) nummarspjøldur,
3) at hava hjá sær skrásetingarskjøl við akstur,

§ 1.

I færdselsloven, jfr. lovbekendtgørelse nr. 10 af 18. marts 1966, som senest ændret ved lagtingslov nr. 89 af 10. juni 1982, foretages følgende ændringer:

1. § 11 affattes således:

»Motorkøretøj og traktor skal, inden køretøjet tages i brug, registreres her i landet og forsynes med nummerplade, jfr. dog §§ 12 og 14. Det samme gælder påhængs- eller sættevogn til et registreringspligtigt køretøj samt campingvogn. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om registreringspligt for andre påhængsredskaber og for motorredskaber.

**Stk. 2.** Landsstyret kan bestemme, at køretøj, som ganske overvejende anvendes uden for offentlige veje, ikke skal registreres. Ved registreringsfritagelse fastsættes de områder, på hvilket køretøjet må anvendes, og der kan fastsættes yderligere vilkår om dets indretning, udstyr og benyttelse.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter bestemmelser om:

1) registrering,

4) um bráðfeingis ella hissini akstur við skrásetingarskyldugum akfari, ið ikki er skrásett, og
5) gjald fyri skráseting og nummarspjøldur.«

2. § 16, 1. stk., 2. pkt. verður soleiðis orðað:
»Sama er, um tann, sum hevur koyrt motordrivið akfar og sekur ella ósekur hevur verið uppi í ella fyri ferðsluóhappi ella hevur verið eltur av løgregluni, og sum innan fyri 6 tímar eftir endaðan akstur tekur til sín rúsdrekka í tílíkari nøgd, at alkoholinnihaldið í blóðinum í nevnda tíðarbili ella aftaná fer upp um 1,20 ‰.«

3. § 16, stk. 3, 2. pkt. verður soleiðis orðað:
»Sama er, um tann, sum hevur koyrt motordrivið akfar, og sekur ella ósekur hevur verið uppi í ella fyri ferðsluóhappi ella hevur verið eltur av løgregluni, og sum innan fyri 6 tímar eftir endaðan akstur, tekur til sín rúsdrekka í tílíkari nøgd, at alkoholinnihaldið í blóðinum í nevnda tíðarbili ella aftaná fer upp um 0,80 ‰.«

4. § 18 verður soleiðis orðað:
»**Koyrikort til motorakfar.**
Bert tann, ið hevur fingið koyrikort, kann koyra motorakfar. Tann, ið koyrir, skal hava koyrikortið hjá sær og skal vísa løgregluni tað, um kravt verður.
**Stk. 2.** Koyrikort kann verða latið persóni, ið
1) fyltur er 18 ár,
2) hevur nóg góð eygu og oyru og annars hevur neyðugan andligan og likamligan førleika, og

2) nummerplader,
3) medbringelse af registreringspapirer under kørslen,
4) midlertidig eller lejlighedsvis kørsel med registreringspligtigt køretøj, der ikke er registreret, og
5) gebyr for registrering og nummerplader.«

2. § 16, stk. 1, 2. pkt., affattes således:
»Det samme gælder den, der som fører af et motordrevet køretøj med eller uden egen skyld har været indblandet i eller iøvrigt udsat for et færdselsuheld eller har været eftersat af politiet, og som i et tidsrum af 6 timer efter kørslens afslutning indtager spiritus i et sådant omfang, at alkoholkoncentrationen i blodet i eller efter nævnte tidsrum overstiger 1,20 ‰.«

3. § 16, stk. 3, 2. pkt. affattes således:
»Det samme gælder den, der som fører af et motordrevet køretøj med eller uden egen skyld har været indblandet i eller iøvrigt udsat for et færdselsuheld eller har været eftersat af politiet, og som i et tidsrum af 6 timer efter kørslens afslutning indtager spiritus i et sådant omfang, at alkoholkoncentrationen i blodet i eller efter nævnte tidsrum overstiger 0,80 ‰.«

4. § 18 affattes således:
»**Kørekort til motorkøretøj.**
Motorkøretøj må kun føres af en person, der har erhvervet kørekort. Føreren skal under kørslen have kørekort hos sig og skal på forlangende vise det til politiet.
**Stk. 2.** Kørekortet kan udstedes til en person, der

3) við eini roynd prógvar, at hann hevur tørvandi dugnaskap í akstri og neyðugan kunnleika til akfarið og viðferð tess og til ferðslureglurnar.

**Stk. 3.** Koyrikort til prutl kann verða latið persóni, ið hevur fylt 16 ár og lýkur tey krøv, ið sett eru í stk. 2, nr. 2 og 3.

**Stk. 4.** Landsstýrið kann seta eykatreytir fyri at fáa koyrikort til motorakfar, ið nýtt verður til vinnuligan fólkaflutning. Landsstýrið kann eisini seta eykatreytir fyri at fáa koyrikort til motorakfar, sum heildartyngdin er oman fyri 3.500 kg, og sum verður nýtt til farmaflutning.

**Stk. 5.** Koyrikort kann verða sýtt einum, ið er bundin av at nýta dusandi ella onnur til vitsávirkandi evni ella ikki kann sær hógv við rúsdrekka. Kravt kann verða, at spurningurin um hetta verður skotin inn fyri rættin sambært reglunum í § 78, stk. 3 í revsilógini.

**Stk. 6.** Koyrikort til motorakfar, ið verður nýtt til vinnuligan fólkaflutning, kann verða sýtt sambært treytum, ið nevndar eru í § 78, stk. 2 í revsilógini.

**Stk. 7.** Landsstýrið setir reglur um treytirnar fyri at fáa útgivið koyrikort, heruppií um koyriroyndina og uni útsjóndina á koyrikortinum og innihald tess og um gjaldið fyri roynd og koyrikort.

**Stk. 8.** Hevur umsøkjari ikki áður havt koyrikort til motorakfar av sama slag, skal hann hjá góðkendum koyrilærara hava fingið læru í akstri, og í tilgerð og við

1) er fyldt 18 år,
2) er i besiddelse af tilstrækkelig syns- og høreevne samt iøvrigt af den fornødne åndelige og legemlige førlighed, og
3) ved en prøve godtgør at have tilstrækkelig førefærdighed og fornødent kendskab til køretøjet og dets behandling samt til færdselsreglerne.

**Stk. 3.** Kørekort til knallert kan udstedes til en person, der er fyldt 16 år, og opfylder de i stk. 2, nr. 2 og 3, fastsatte krav.

**Stk. 4.** Landsstyret kan fastsætte yderligere betingelser for erhvervelse af kørekort til motorkøretøj, der benyttes erhvervsmæssigt til befordring af personer. Landsstyret kan endvidere fastsætte yderligere betingelser for erhvervelse af kørekort til motorkøretøj, hvis totalvægt overstiger 3.500 kg, og som benyttes erhvervsmæssigt til transport af gods.

**Stk. 5.** Kørekort kan nægtes den, der er afhængig af brug af euforiserende eller andre bevidstheds-påvirkende stoffer eller ikke er ædruelig. Spørgsmålet herom kan forlanges indbragt for domstolene. Indbringelsen sker efter reglerne i straffelovens § 78, stk. 3.

**Stk. 6.** Kørekort til motorkøretøj, der benyttes erhvervsmæssigt til befordring af personer, kan nægtes under den i straffelovens § 78, stk. 2 nævnte betingelse.

**Stk. 7.** Landsstyret fastsætter bestemmelser om betingelserne for at få udstedt kørekort, herunder om køreprøven samt om kørekortets

ferð akfarsins. Hevur umsøkjarin ikki áður havt koyrikort, skal hann hjá viðurkendum koyrilærara hava fingið læru í ferðslureglunum. Ásetingarnar galda ikki fyri koyrikort til prutl.

**Stk. 9.** Landsstýrið setir reglur um ta læru, ið nevnd er í stk. 8 og kann heruppií seta reglur um læru á serstøkum og -økjum. Landsstýrið kann harumframt leggja eina meginætlan fyri læruna og reglur um at góðtaka lærubøkur, annað lærutilfar og høli til læruna.«

5. § 18 a verður soleiðis orðað:

**»Koyrikort til draga (traktor) og motoramboð.**

Dragi (traktor) og motoramboð kunnu einans teir persónar koyra, ið hava fingið koyrikort til bil ella serstakt koyrikort til draga (motoramboð).

**Stk. 2.** Stk. 1 geldur ikki fyri koyring á vegaøkjum, ið eru avmarkað á fullgóðan hátt við avbyrging ella merking, ei heldur fyri koyring við motoramboð, ið stýrt verður av fólki til gongu. Slík koyring er loyvd persóni, ið hevur fylt 16 ár.

**Stk. 3.** Tá ið stk. 2, nr. 1, og stk. 8 eru frá, geldur § 18 eisini viðvíkjandi koyrikorti til draga (motoramboð). Koyrikortið kann verða útgivið til persónar, ið hava fylt 16 ár.«

6. Sum nýggj § 18 b verður innsett:

**»Gildi hjá koyrikorti.**

Koyrikort hevur gildi, til eigarin hevur fylt 70 ár. Fyri koyrikort til tey motorakfør, ið nevnd eru í § 18,

udseende og indhold og om gebyret for prøven og kørekortet.

**Stk. 8.** Såfremt en ansøger ikke tidligere har haft kørekort til et motorkøretøj af samme art, skal den pågældende hos en godkendt kørelærer have modtaget undervisning i kørefærdighed, køretøjets indretning og behandling. Såfremt en ansøger ikke tidligere har haft kørekort, skal den pågældende tilligc hos en godkendt kørelærer have modtaget undervisning i færdselsreglerne. Bestemmelserne gælder ikke med hensyn til kørekort til knallert.

**Stk. 9.** Landsstyret fastsætter bestemmelser om den i stk. 8 nævnte undervisning og kan herunder fastsætte bestemmelser om undervisning på særlige lukkede øvelsespladser og anlæg. Landsstyret kan endvidere fastsætte en normalplan for undervisningen og regler om godkendelse af lærebøger, andet undervisningsmateriel og lokaler, der benyttes ved undervisningen.«

5. § 18a affattes således:

**»Kørekort til traktor og motorredskab.**

Traktor og motorredskab må kun føres af personer, der har erhvervet kørekort til bil eller særligt kørekort til traktor (motorredskab).

**Stk. 2.** Stk. 1 gælder ikke for kørsel på vejområder, der er begrænset på betryggende måde ved afspærring eller afmærkning, eller for kørsel med motorredskab, der er bestemt til at føres af en gående. Sådan kørsel kan foretages af personer, der er fyldt 16 år.

**Stk. 3.** § 18, bortset fra stk. 2,

stk. 4, kann landsstýrið seta stytri gildistíð.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann gera av, at koyrikort til bil ella motorsúklu, fyrstu ferð tað verður tikið, verður útgivið við 2 ára gildistíð, og at eigarin, áðrenn gildistíðin er farin, skal fáa eykalæru og taka nýggja roynd í serstøkum aksturførleika sum treyt fyri, at koyrikort við gildistíð, sum ásett í 1. stk. 1. pkt., kann verða latið. Landsstýrið setir reglur fyri eykatæruna og royndina og fyri avleiðingarnar av, at eykalæra hevur ikki verið og roynd ikki tikin, áðrenn gildistíðin er av.

**Stk. 3.** Landsstýrið setir reglur um gildistíðina hjá koyrikortum, ið eru latin persónum, sum hava fylt 70 ár. Landsstýrið kann eisini skipa fyri, at um umstøður eru til tess, skal koyrikort hava stytri gildistíð enn ásett er í stk. 1.

**Stk. 4.** Tá ið gildistíðin er úti, kann koyrikort verða endurnýggjað, um eigarin lýkur treytirnar. Løgreglan ger av, um nýggj roynd skal verða tikin. Landsstýrið kann seta reglur um nýggja royndartøku.«

7. Sum nýggj § 18c verður innsett:

**»Koyrirættindi mist og afturvunnin.**

Løgreglan kann taka koyrirættindini frá persóni, ið ikki longur lýkur treytirnar fyri at fáa koyrikort. Synjar persónur fyri at vera við til tær kanningar ella royndir, ið neyðugar eru til avgerðar um málið, kann løgreglan taka koyrirættindini frá honum í løtuni. Spurningur, hvørt persónur er bundin av at nýta dusandi ella onnur tilvits-

nr. 1, og stk. 8, gælder også med hensyn til kørekort til traktor (motorredskab). Kørekortet kan udstedes til personer, der er fyldt 16 år.«

6. Som ny § 18b indsættes:

**»Gyldighed af kørekort.**

Kørekortet gælder, indtil den pågældende er fyldt 70 år. For kørekort til de motorkøretøjer, der er nævnt i § 18, stk. 4, kan landsstyret fastsætte en kortere gyldighedstid.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte, at kørekort til bil og motorcykel ved første erhvervelse udstedes med en gyldighedstid på 2 år, og at den pågældende inden udløbet af gyldighedstiden skal gennemgå en tillægsundervisning og aflægge en prøve i særlig kørefærdighed som betingelse for, at kørekort med gyldighedstid, som fastsat i stk. 1, 1. pkt., kan erhverves. Landsstyret fastsætter bestemmelser om tillægsundervisningen og prøven og om følgerne af, at tillægsundervisning ikke har fundet sted og prøve ikke er aflagt inden gyldighedstidens udløb.

**Stk. 3.** Landsstyret fastsætter bestemmelser om gyldighedstiden for kørekort, der er udstedt til personer, som er fyldt 70 år. Landsstyret kan endvidere fastsætte, at et kørekort, når forholdene taler derfor, skal gælde i et kortere tidsrum end fastsat i stk. 1.

**Stk. 4.** Efter udløbet af gyldighedsperioden kan kørekortet fornys, såfremt den pågældende stadig opfylder betingelserne. Politiet bestemmer, om der skal aflægges

ávirkandi evni ella rúsdrekka, kann krevjast inn fyri rættin, smbr. § 78, stk. 3 í revsilógini.

**Stk. 2.** Um persónur, ið hevur koyrikort, ikki longur lýkur tey krøv, ið ásett eru í § 18, stk. 2, nr. 2, hevur hann sjálvur skyldu til at boða løgregluni frá. Læknin, sum hevur kannað ella viðgjørt henda persón, hevur skyldu til at ávara hann, um hann heldur tað vera ódømi, at hann framvegis koyrir motorakfar. Tó at lógin býður tagnarskyldu, skal læknin kortini samstundis boða løgregluni frá.

**Stk. 3.** Hevur persónur mist koyrirættindi, kann hann, tá ið frátøkutíðin er umliðin, fáa rættindini aftur, um hann stendur leiðbeinandi roynd. Koyriroyndin kann verða tikin, áðrenn frátøkutíðin er úti. Verkliga royndin kann tó ikki verða tikin, fyrr enn mánaður er eftir av frátøkutíðini. Hevur hin dømdi staðið koyriroynd aftan á ta hending, sum leiddi til átalu, skal leiðbeinandi roynd ikki verða tikin, um so er, at royndin er staðin ikki meira enn eitt ár, áðrenn frátøkutíðin er úti, og ikki meira enn eitt ár, áðrenn søkt verður um at fáa koyrikort aftur.

**Stk. 4.** Landsstýrið kann seta reglur um leiðbeinandi koyriroynd.

**Stk. 5.** Tann, ið hevur mist koyrirættindi sini bráðfeingis ella burturav, skal lata løgregluni koyrikortið.«

8. § 19 verður soleiðis orðað:

»**Venjingarkoyring við motorakfari.**

Næmingi, ið lærir at koyra bil, er ikki loyvt at koyra til venjingar,

ny prøve. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om aflæggelse af ny prøve.«

7. Som ny § 18 c indsættes:

»**Inddragelse og generhvervelse af førerretten.**

Politiet kan inddrage førerretten, hvis den pågældende ikke længere opfylder betingelserne for at få kørekort. Såfremt en person nægter at medvirke til de undersøgelser eller prøver, der er nødvendige til afgørelse heraf, kan politiet straks inddrage førerretten. Spørgsmålet, om den pågældende er afhængig af brug af euforiserende eller andre bevidsthedspåvirkende stoffer eller ikke er ædruelig, kan forlanges indbragt for domstolene. Indbringelsen sker efter reglerne i straffelovens § 78, stk. 3.

**Stk. 2.** Såfremt indehaveren af kørekortet ikke længere opfylder de i § 18, stk. 2, nr. 2, fastsatte krav, påhviler det den pågældende at give meddelelse herom til politiet. Læge, som har undersøgt eller behandlet den pågældende, har pligt til at advare ham, såfremt lægen finder det uforsvarligt, at han fortsat fører motordrevet køretøj. Uanset lovgivningens bestemmelser om tavshedspligt skal lægen samtidig give meddelelse til politiet.

**Stk. 3.** Har førerretten været frakendt, kan retten efter frakendelsestidens udløb kun generhverves, såfremt en orienterende køreprøve bestås. Køreprøven kan aflægges før frakendelsestidens udløb. Den praktiske prøve kan dog tidligst aflægges 1 måned før frakendelses-

uttan so at hann hevur sær við lið góðkendan koyrilærara, ið tá eisini er at rokna sum tann, ið bilin førir. Við koyriroyndina er næmingurin tó at rokna sum bilførari. Um einhvør, ið longu hevur koyrikort, vil íðka seg at koyra í góðkendum akfari við góðkendum koyrilærara undir liðin, er koyrilærarin eisini tá at rokna sum akfarsførari. Í førum, tá ið koyrilærarin er at rokna sum førari, galda reglurnar í §§ 15, 16 og 16a eisini fyri næmingin.

**Stk. 2.** Næmingi er ikki loyvt at koyra á motorsúklu til venjingar, uttan so at góðkendur koyrilærari leggur lag á og ansar eftir; hann ábyrgist, at venjingarkoyringin verður framd á tílíkum stað og á tílíkan hátt, at hon eftir dugnaskaparstigi næmingsins er at rokna sum vandaleys fyri aðra ferðslu. Sama gildur um venjingarkoyring við draga (traktor).

**Stk. 3.** Koyrt má ikki verða til venjingar fyrr enn 3 mánaðir, áðrenn næmingur hevur aldur til at fáa koyrikort, og hjá einum, ið hevur mist koyrirættindi sín, ikki fyrr enn 3 mánaðir áðrenn frátøkutíðin er umliðin.

**Stk. 4.** Landsstýrið setir reglur um venjingarkoyring og um tilgerð av serstøkum avbyrgdum venjingarstøðum og -økjum og um eftirlit við akførum, ið nýtt verða til venjingar. Landsstýrið kann eisini seta reglur um trygdarútgerð og trygging av akførum, ið nýtt verða til venjingar á serstøkum avbyrdum støðum og økjum.«

9. Sum nýggj § 19a verður innsett:

tidens udløb. Har domfældte bestået en køreprøve efter det forhold, der gav anledning til tiltalen, skal orienterende prøve ikke aflægges, såfremt prøven er bestået inden for det sidste år før frakendelsestidens udløb og inden for det sidste år før ansøgningen om generhvervelse af kørekort.

**Stk. 4.** Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om orienterende køreprøve.

**Stk. 5.** Den, der midlertidigt eller endeligt har mistet førerretten, skal aflevere sit kørekort til politiet.«

8. § 19 affattes således:

»**Øvelseskørsel med motorkøretøjer.** Øvelseskørsel for personer, der uddanner sig til kørsel med bil, må kun finde sted, når der i køretøjet ved siden af eleven findes en godkendt kørelærer, der da anses for at være fører af køretøjet. Under køreprøven anses eleven dog for at være fører. Såfremt en person, der allerede har kørekort, foretager øvelseskørsel i et dertil godkendt køretøj med en godkendt kørelærer ved siden af sig, anses kørelæreren for at være fører af køretøjet. I de tilfælde, hvor kørelæreren må anses som fører, gælder bestemmelserne i §§ 15, 16 og 16a også for eleven.

**Stk. 2.** Øvelseskørsel med motorcykel må kun finde sted under vejledning og overvågning af en godkendt kørelærer, der har ansvaret for, at øvelseskørslen foregår på sådanne steder og på en sådan måde, at det efter elevens uddannelsestrin må antages at kunne ske uden fare for den øvrige færdsel.

»**Koyrilærarar.**

Til at hava yrki sum koyrilærari krevst loyvi, sum landsstýrið veitir.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann gera av talið á loyvum og seta reglur um loyvisveitingar. Talið á loyvum verður ásett samsvarandi tørvi á koyrilærarum, og serstakliga við tí í huga at tryggja, at læran verður so góð, ið val er á.

**Stk. 3.** Loyvi kann verða givið persóni, ið er góðkendur sum koyrilærari. Loyvið dettur burtur, um góðkenningin verður ikki endurnýggjað, smbr. stk. 5.

**Stk. 4.** Góðkendur sum koyrilærari kann persónur verða, ið

1) hevur fylt 23 ár,
2) hevur seinastu 3 árini javnan koyrt bil, ávikavist motorsúklu,
3) hevur fingið koyrilæraraútbúgving,
4) hevur staðið roynd fyri koyrilærarar,
5) hevur ikki verið uppi í máli, ið kemur undir § 78, stk. 2 í revsilógini.

**Stk. 5.** Góðkenningin geldur í 5 ár, tó í mesta lagi so leingi sum tann, sum varðir, hevur koyrikort. Hon kann verða endurnýggjað, um handhavin enn lýkur treytirnar í stk. 4, nr. 2 og 5, og sannar, at hann í umlidna tíðarskeiðinum javnan hevur havt yrki sum koyrilærari og ført næmingar fram til roynd.

**Stk. 6.** Landsstýrið kann seta reglur um eykaeftirútbúgving sum treyt fyri, at góðkenning av koyrilærara verður endurnýggjað.

**Stk. 7.** Landsstýrið kann seta

Tilsvarende gælder øvelseskørsel med traktor.

**Stk. 3.** Øvelseskørsel må ikke finde sted tidligere end 3 måneder før det tidspunkt, hvor eleven efter sin alder kan få udstedt kørekort, og for personer, hvem førerretten er frakendt, ikke tidligere end 3 måneder før frakendelsestidens udløb.

**Stk. 4.** Landsstyret fastsætter bestemmelser om øvelseskørsel og om indretning af særlige lukkede øvelsespladser og anlæg og om kontrol med køretøjer, der anvendes til øvelseskørsel. Landsstyret kan endvidere fastsætte bestemmelser om sikkerhedsudstyr og forsikring for køretøjer, der anvendes til øvelseskørsel på særlige lukkede pladser og anlæg.«

9. Som ny § 19 a indsættes:

»**Kørelærere.**

Til udøvelse af erhvervsmæssig virksomhed som kørelærer kræves bevilling. Bevilling gives af landsstyret.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte antallet af bevillinger og bestemmelser om meddelelse af bevilling. Antallet af bevillinger fastsættes efter det behov, der er for kørelærere, og med særlig hensyntagen til at sikre, at der kan gives den bedst mulige undervisning.

**Stk. 3.** Bevilling kan gives til en person, der er godkendt som kørelærer. Bevillingen bortfalder, såfremt godkendelsen ikke fornys, jfr. stk. 5.

**Stk. 4.** Godkendelse som kørelærer kan gives til en person, der

reglur um koyrilæraraútbúgvingina, um royndina, um góðkenningarveiting og um gjald fyri roynd og góðkenning.«

10. § 20 verður soleiðis orðað:

**»Upplýsingarskylda o. a.**

Eigari (nýtari) av akfari skal eftir beiðing frá løgreglu siga frá, hvørji ið nýtt hava akfarið sum førarar.

**Stk. 2.** Eigari (nýtari), førari og tann, ið annars hevur ræði á motordrivnum akfari, mega ikki lata føringina til nakran, ið ikki kann føra akfarið á løgligan hátt.«

11. § 21 verður soleiðis orðað:

**»Útlendskir førarar.**

Persónar, ið ikki hava bústað í Føroyum, kunnu uttan at hava føroyskt ella danskt koyrikort á dvøl her á landi føra motorakfar eftir reglum, ið landsstýrið setir.

**Stk. 2.** Landsstýrið kann seta reglur um, við hvørjum treytum, ið persónar, ið hava rættindi til at føra motorakfar í útlondum, kunnu fáa føroyskt koyrikort.

**Stk. 3.** Landsstýrið kann seta fyri, at koyrikort, sum útgivin eru í Finnlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki fáa gildi her á landi, eisini eftir at handhavin hevur tikið bústað her.«

12. § 29 verður soleiðis orðað:

**»Nýtsla av ymsum farbreytum á vegum.**

Hevur vegur serstakar farbreytir til ymis sløg av ferðslu, skulu tey, ið koyra, nýta ta breyt, ið ætlað er til ferðslu við akfari av avvarðandi slagi.

**Stk. 2.** Prutl skal fara eftir

1) er fyldt 23 år,
2) i de sidste 3 år jævnligt har ført bil, henholdsvis motorcykel,
3) har gennemgået en godkendt kørelæreruddannelse,
4) har bestået en prøve for kørelærere og
5) ikke har udvist et forhold, der omfattes af straffelovens § 78, stk. 2.

**Stk. 5.** Godkendelsen gælder i 5 år, dog højst så længe den pågældende har kørekort. Den kan fornys, såfremt indehaveren stadig opfylder betingelserne i stk. 4, nr. 2 og 5, og godtgør i den forløbne periode jævnligt at have drevet virksomhed som kørelærer og indstillet elever til prøve.

**Stk. 6.** Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om supplerende efteruddannelse som betingelse for fornyelse af godkendelsen som kørelærer.

**Stk. 7.** Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om kørelæreruddannelsen, om prøven, om meddelelse af godkendelsen samt om gebyret for prøven og godkendelsen.«

10. § 20 affattes således:

**»Oplysningspligt m. v.**

Ejeren (brugeren) af et køretøj skal efter anmodning fra politiet oplyse, hvilke personer der som førere har benyttet køretøjet.

**Stk. 2.** Ejeren (brugeren), føreren og den, der iøvrigt har rådighed over et motordrevet køretøj, må ikke overlade føringen til en person, der ikke lovligt kan føre køretøjet.«

súklubreyt, er ikki annað tilskilað við merking. Ferðin á súklubreyt skal verða soleiðis háttað, at hon er ikki til vanda ella ampa fyri aðra ferðslu á hesi breyt. Súkla og prutl mega bert fara eftir súklubreyt høgrumegin við vegin ferðsluleiðina, um ikki annað er tilskilað við merking.

**Stk. 3.** Súkla ella prutl mega ikki ferðast á súklubreyt, um so er, at akfarið vegna breidd sína, tá ið tað er laðið, kann vera til munandi ampa fyri onnur ferðandi á súklubreytini.

**Stk. 4.** Landsstýrið kann seta reglur um ferðing hjá súklum á gongubreytum. Í tílíkum førum eigur greiniligt mark at vera millum tann partin av gongubreytini, sum súklur kunnu ferðast eftir, og tann partin, ið er kannaður fólki til gongu.

**Stk. 5.** Har, sum skriðspor er, skal tað verða nýtt av akførum, ið ferðast við minni ferð enn teirri, ið tilskilað er á ferðslutalvuni við skriðsporið. Annað akfar má ikki ferðast á skriðspori. Tá ið farið verður út av skriðspori, skal førarin vissa sær, at atgerðin kann verða framd uttan vanda ella bága fyri onnur.«

13. Sum nýggj § 29 a verður innsett:
»Koyrandi skulu við fyriliti fyri aðrari ferðslu og viðurskiftum yvirhøvur halda seg so langt til høgru sum til ber.

**Stk. 2.** Hevur akbreytin tríggjar farbreytir, má akfar ikki nýta ta farbreyt, sum er longst vinstrumegin ferðsluleiðina uttan

11. § 21 affattes således:
**»Udenlandske førere.**
Personer, der ikke har bopæl her i landet, kan uden at være i besiddelse af færøsk eller dansk førekort under ophold her i landet føre motorkøretøj efter bestemmelser, der fastsættes af landsstyret.

**Stk. 2.** Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om, under hvilke betingelser personer, der har ret til at føre motorkøretøj i udlandet, kan få færøsk førekort.

**Stk. 3.** Landsstyret kan bestemme, at førekort, der er udstedt i Finland, Island, Norge og Sverige, er gyldige her i landet, også efter at indehaveren har taget bopæl her.«

12. § 29 affattes således:
**»Anvendelse af vejens forskellige baner.**
Er der på vej anlagt særlige baner for forskellige færdselsarter, skal kørende benytte den bane, som er bestemt for færdsel med køretøj af den pågældende art.

**Stk. 2.** Knallert skal føres på cykelsti, medmindre andet er tilkendegivet ved afmærkning. Hastigheden skal på cykelsti afpasses således, at der ikke fremkaldes fare eller ulempe for den øvrige færdsel på denne. Cyklist og knallert må kun anvende cykelsti i højre side af vejen i færdselsretningen, medmindre andet er tilkendegivet ved afmærkning.

**Stk. 3.** Cykel eller knallert må ikke føres på cykelsti, såfremt køretøjet på grund af dets bredde

so er, at ferðslan er einvegis.

**Stk. 3.** So mikið langt skal vera til akfar fyri framman, at vandi er ikki fyri ákoyring, um akfarið fyri framman steðgar ella minkar ferðina. Akfar, sum er undir serligari ferðsluavmarkan, smbr. § 30 b, skal uttan fyri fjølbygt øki eisini lata so langt vera til næsta akfar fyri framman, at akfør, ið fara framum, vandaleyst kunnu koma inn í millum hetta akfar og tað fyri framman.

**Stk. 4.** Akfør skulu halda seg høgrumegin við gøtuhólmar, ferðsluvitar og tílíkt, ið er á akbreytini. Tó kann eisini verða farið vinstrumegin við, um tað er tilskilað við merking ella um nevndi útbúningur er á akbreyt við einvegisferðslu.

**Stk. 5.** Akfar, ið nýtt verður í vegarbeiði, kann við tørvandi varsemi verða koyrt soleiðis, ið arbeiðið krevur.«

14. Sum nýggj § 29 b verður innsett:

»**Sneiðing o. a.**

Í rúmari tíð framman fyri krossveg, har sum akbreytin hevur tvær ella fleiri farbreytir kannaðar ferðslu sama veg, skal akfar taka seg út á farbreytina longst til høgru, skal tað sneiða til høgru, og á farbreytina longst til vinstru, skal tað sneiða til vinstru. Akfar, ið skal beina leið, kann halda seg á teirri farbreyt, sum við fyriliti fyri aðrari ferðslu og framhaldandi akstri er tann, ið best er hóskandi.

**Stk. 2.** Tann, sum ætlar at

i belæsset stand kan være til væsentlig ulempe for andre kørende på cykelstien.

**Stk. 4.** Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om cyklisters anvendelse af fortov og gangsti. Der skal i sådanne tilfælde være klar adskillelse mellem den del af fortovet eller gangstien, hvorpå cyklister må færdes, og den del, der er forbeholdt for gående.

**Stk. 5.** Hvor der findes et krybespor, skal dette anvendes af køretøjer, der fremføres med en lavere hastighed end den, som er angivet på færdselstavlen ved krybesporet. Andet køretøj må ikke føres i krybespor. Ved udkørsel fra krybespor skal den kørende sikre sig, at manøvren kan udføres uden fare eller unødig ulempe for andre.

13. Som ny § 29 a indsættes:

»Placeringen på vejen.

Kørende skal under hensyntagen til anden færdsel og forholdene iøvrigt holde so langt til højre som muligt.

**Stk. 2.** Har kørebanen tre vognbaner, må et køretøj ikke benytte den vognbane, som er beliggende yderst til venstre i færdselsretningen, medmindre færdslen på kørebanen er ensrettet.

**Stk. 3.** Afstanden til foran kørende skal afpasses på en sådan måde, at der ikke er fare for påkørsel, hvis køretøjet foran standser, eller dets hastighed nedsættes. Køretøjer, for hvilke der gælder en særlig hastighedsbegrænsning, jfr. § 30 b, skal uden for tættere

broyta farleið staddur á krossveg, skal, áðrenn sneitt verður, vissa sær, at atgerðin er ikki til vanda ella óneyðugan bága yvir onnur, sum fara somu leið.

**Stk. 3.** Tá ið sneitt verður til høgru, skal akfarið verða havt so langt út at høgra jaðara, sum til ber. Sneiðingin skal vera so krøpp, sum til ber. Tá ið sneitt verður til vinstru, skal akfarið verða havt so langt sum til ber inn at miðjumi á akbreytini ella, um akbreytin hevur einvegis ferðslu, at vinstra jaðara. Sneiðingin verður soleiðis gjørd, at akfarið, tá ið tað fer av krossvegnum, er statt høgrumegin á teirri akbreyt, ið tað sneiðir inn á.

**Stk. 4.** Mótkoyrandi akfør, sum hvørt av sini vegsiðu fara inn á krossveg, har tey bæði skulu sneiða til vinstru, kunnu fara hvørt fram við øðrum til vinstru, um tað fær verið uttan vanda ella ampa.«

15. Sum nýggj § 29 c verður innsett:
»§ 29 b, stk. 1-3, geldur eisini, tá ið koyrt verður um ella burtur frá akbreyt uttan fyri krossveg.

**Stk. 2.** Akfar, ið nýtt verður í vegarbeiði, kann við tørvandi varsemi verða koyrt soleiðis, ið atbeiðið krevur.«

16. Sum nýggj § 29 d verður innsett:
»**Vending, bakking og farbreytarskifti o. a.**

Tann, ið skal venda ella bakka við akfari, skal frammanundan vissa sær, at atgerðin kann verða framd uttan vanda ella bága fyri onnur. Vent skal verða frameftir til

bebygget område tillige holde en sådan afstand til foran kørende, at overhalende køretøjer uden fare kan føres ind imellem et sådant køretøj og køretøjet foran.

**Stk. 4.** Kørende skal holde til højre for helleanlæg, færdselsfyr og lignende, der er anlagt eller anbragt på kørebanen. Kørende kan dog også køre venstre om, hvis dette er tilkendegivet ved afmærkning, eller indretningen er beliggende på kørebaner med ensrettet færdsel.

**Stk. 5.** Køretøj, der anvendes ved vejarbejde, kan med fornøden forsigtighed føres således, som det er nødvendigt af hensyn til arbejdet.«

14. Som ny § 29 b indsættes.
»**Svingning m. v.**

I god tid før vejkryds skal kørende i de tilfælde, hvor kørebanen har to eller flere vognbaner, der er forbeholdt færdslen i samme retning, anbringe sig i vognbanen længst til højre, hvis der skal svinges til højre, og i vognbanen længst til venstre, hvis der skal svinges til venstre. Den, der skal lige ud, kan anbringe sig i den vognbane, som under hensyn til den øvrige færdsel og den fortsatte kørsel er den mest hensigtsmæssige.

**Stk. 2.** Kørende, som i vejkryds ønsker at ændre færdselsretning, skal før forberedelsen og udførelsen af manøvren sikre sig, at denne kan foretages uden fare eller unødig ulempe for andre, som færdes i samme retning.

vinstru, uttan so at umstøðurnar ikki loyva tað.

**Stk. 2.** Áðrenn tann, ið koyrir, fer av stað frá vegjaðara, skiftir um akbreyt ella á annan hátt flytur akfarið til viks, skal hann vissa sær, at atgerðin kann verða framd uttan vanda ella óneyðugan ampa fyri onnur. Sama geldur, tá ið akfar skal steðga ella minka ferðina.

**Stk. 3.** Har, ið talið á farbreytum, sum eru kannaðar ferðslu sama veg, minkar, skulu tey, ið koyra, við fyriliti hvørt fyri øðrum, laga koyring sína eftir broyttu umstøðunum, heruppií við møguliga at broyta ferð. Sama geldur, tá ið tvær akbreytir renna saman.«

17. Sum nýggj § 29 e verður innsett:

**»Koyring við bussstøðg o. a.**

Akfar, sum har ið nærbýlt er, nærkast bussstøðgi, har sum bussur er steðgaður á, skal, um bussførarin gevur merki um fráferð, minka ferðina og, um neyðugt er, steðga, so at bussurin sleppur frá. Bussførarin sleppur harvið ikki frá at vera serliga eftiransin til tess at koma ikki í vanda.

**Stk. 2.** Akfar, sum nærkast bussi, ið er steðgaður at taka upp ella seta av ferðafólk, skal sýna serskilt eftiransni. Sama geldur, tá ið bussur fer frá tílíkum stað. Førarin skal serliga hava eyguni eftir, um fólk til gongu er á akbreytini ella á veg út á hana.«

18. § 31 verður soleiðis orðað:

**»Møti.**

**Stk. 3.** Ved svingning til højre skal køretøjet føres så langt ud mod kørebanens højre kant som muligt. Svinget skal gøres så lille som muligt. Ved svingning til venstre skal køretøjet føres så langt som muligt ind mod kørebanens midte eller, hvis kørebanen har ensrettet færdsel, mod kørebanens venstre kant. Svingningen skal foretages på en sådan måde, at køretøjet, når det forlader krydset, befinder sig til højre på den kørebane, det svinger ind på.

**Stk. 4.** Har den kørebane, som køretøjet efter svingningen føres ind på, to eller flere vognbaner, der er forbeholdt færdslen i samme retning, skal svingningen uanset bestemmelserne i stk. 3 udføres på den måde, der under hensyn til den øvrige færdsel og den fortsatte kørsel er mest hensigtsmæssig.

**68.** I **§§ 536, stk. 2, og 561, stk. 2,** ændres »det sociale udvalg« til: »landsstyrets socialforvaltning«.

**69.** I **§§ 544, stk. 1, 4. pkt., og stk. 2, 1. pkt., 555, stk. 1, 2. pkt., og 566, stk. 1,** indsættes efter »Statstidende«: »eller efter rettens nærmere bestem-

melse i den avis, der er autoriseret til optagelse af offentlige bekendtgørelser på Færøerne«.

**70.** I **§§ 544, stk. 3, 1. pkt., og 634, stk. 4, 1. pkt.,** ændres »landet« til: »riget«.

**71.** I **§ 560, stk. 1, 2. pkt.,** indsættes efter »Med anmodningen skal«: »så vidt muligt«.

**72. § 566, stk. 2, 2. pkt.,** affattes således:
»Bekendtgørelsen skal så vidt muligt indeholde oplysninger om ejendommens matrikelnummer, nøjagtige adresse, ejendomsværdi, karakter, areal og anvendelse, herunder oplysning om størrelsen af det bebyggede areal og dettes indretning.«

**73.** I **§ 573, stk. 2, 6. pkt.,** udgår »med et tillæg af 2 pct.«

**74.** I **§ 609, stk. 2,** ændres »D. L. 5-7-8 og 9« til: »N. L. 5-7-8 og 9«.

**75. § 616, stk. 2 og 3,** affattes således:
»**Stk. 2.** Ved arrest i fast ejendom skal der ske tinglysning (tinglæsning) i overensstemmelse med de derom gældende regler. Ved arrest i fordringer finder bestemmelsen i § 524 tilsvarende anvendelse.
**Stk. 3.** Med hensyn til arrest i registrerede skibe gælder reglerne i skibsregistreringslovgivningen.«

**76.** I **§ 646, stk. 1,** indsættes efter »stat«: », hjemmestyre«.

**77.** I **§ 654, stk. 1, 1. pkt.,** indsættes efter »skifteloven af 30. november 1874«: », jfr. anordning nr. 30 af 14. januar 1876,«.

**78.** I **§ 662, stk. 2,** indsættes efter »lov af 30. november 1874 § 50«: », jfr. anordning nr. 30 af 14. januar 1876,«.

79. I **§ 663** indsættes efter »og 75«: », jfr. anordning nr. 30 af 14. januar 1876,«.

**80.** I **§ 687, stk. 1,** ændres »landsretterne« til: »retten på Færøerne«.

**81.** I **§ 687, stk. 2, nr. 1,** ændres »§§ 40, stk. 1, og 61« til: »§ 61«.

**82.** § **687, stk. 2, nr. 2,** affattes således:
»2) sager, hvori der er spørgsmål om dom til anbringelse i institution i medfør af straffelovens § 68 eller til forvaring, jfr. straffelovens § 69, og«.

**83.** I § **687, stk. 3, nr. 1,** ændres »173, 286 eller 289« til: »173 eller 286«.

**84.** I § **687, stk. 3, nr. 2,** udgår »eller § 925 a«.

**85.** § **688** affattes således:
»§ **688.** Ved byretten, henholdsvis søretten, behandles og påkendes i I. instans uden medvirken af nævninger eller domsmænd alle andre straffesager.
**Stk. 2.** Sager, der ifølge særlig lovbestemmelse er henlagt under systernes politiret, behandles og påkendes efter stk. 1.«

**86.** § **690** affattes således:
»§ **690.** Straffesager, der omfatter flere lovovertrædelser, behandles under medvirken af nævninger, hvis sådan behandling efter reglerne i § 687 kræves med hensyn til en af overtrædelserne.«

**87.** § **692, stk. 2,** affattes således:
»**Stk. 2.** Domsmænd skal ikke medvirke.«

**88.** § **705, stk. 2, 1. pkt.,** udgår.

**89.** § **716, stk. 1 og 2,** affattes således:
»§ **716.** Landfogeden (politimesteren) virker for forfølgning af alle forbrydelser, der ikke er henvist til påtale af private.
**Stk. 2.** Hvad der ved denne lov er pålagt statsadvokaten, påhviler for Færøernes vedkommende, bortset fra ankesagers behandling ved landsretten, landfogeden (politimesteren), som er direkte underordnet rigsadvokaten.«

**90.** § **720** affattes således:
»§ **720.** I alle sager, hvis forfølgning ikke er henvist til private (§ 725), tilkommer det landfogeden (politimesteren) at påtale for den dømmende ret.«

**91.** I § **721, stk. 1, nr. 1,** ændres: »Politimesteren tilkommer det at rejse tiltale for byretten, henholdsvis sø- og handelsretten, i de nedennævnte sager, for så vidt disse er genstand for offentlig påtale (politisager):« til:

»Følgende sager, hvori tiltalte rejses for byretten, betegnes som politisager:«.

**92.** I **§ 721, stk. 1, nr. 1,** udgår »235,«.

**93. § 721, stk. 1, nr. 3,** affattes således:
»3) Sager angående lovovertrædelser, som omhandles i:
a. § 3 i lov nr. 60 af 24. april 1986 om beskyttelse af vandforsyningsanlæg.
b. § 6 i lov nr. 54 af 15. februar 1895 om forholdsregler til beskyttelse af undersøiske telegraf- og telefonledninger.
c. § 17 i lov 36 af 28. februar 1908 for Færøerne om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme hos husdyrene.«

**94.** Efter § 728 indsættes i **kapitel 65:**
»**§ 728 a.** Ingen lagtingsmand kan tiltales eller underkastes fængsling af nogen art uden lagtingets samtykke, medmindre han er grebet på fersk gerning.
**Stk. 2.** For sine ytringer i lagtinget kan intet af dets medlemmer uden tingets samtykke drages til ansvar uden for samme.«

**95. § 731, stk. 1, litra d,** affattes således:
»d) når tiltale er rejst i sager, der påtales i medfør af § 720,«.

**96. I § 741 a, stk. 1, 1. og 2. pkt.,** udgår », stk. 2«.

**97.** I **§ 752, stk. 2,** ændres »det sociale udvalg« til: »landsstyrets socialforvaltning«.

**98.** I **§§ 756 og 763, stk. 2,** ændres »69, 70 eller 72« til: »69 eller 71«.

**99.** I **§§ 764, stk. 2, 1. og 2. pkt., og 767, stk. 1, 1. pkt.,** ændres »landet« til: »riget«.

**100.** I **§ 767, stk. 2,** indsættes som 4. pkt.:
»Landsretten kan bestemme, at sigtede under den mundtlige forhandling skal repræsenteres af en forsvarer, der har kontor på det sted, hvor den overordnede ret sættes.«

**101. § 779, stk. 1, 1. pkt.,** affattes således:
»Til at føre tilsyn med varetægtsfangers behandling og forholdene i varetægtsfængsler udvælger lagtinget efter forholdstal 2 medlemmer af sin midte for 4 år ad gangen.«

**102. I kapitel 76** indsættes foran § 831:
»**§ 830.** Med hensyn til iværksættelsen af tiltale og forberedelse af domsforhandling for retten på Færøerne i sager, hvori nævninger skal medvirke, finder de i dette kapitel indeholdte bestemmelser anvendelse med de fornødne lempelser.«

**103.** Efter § 844 indsættes i **kapitel 77:**
»**§ 844 a.** Med hensyn til domsforhandling ved retten på Færøerne i sager, hvori nævninger skal medvirke, finder de i dette kapitel indeholdte bestemmelser anvendelse med de fornødne lempelser.«

**104.** I **§ 877, stk. 2, nr. 4,** ændres »D. L. 1-2-1« til: »N. L. 1-2-1«.

**105. § 906 a, stk. 1,** affattes således:
»Når sagen er optaget til dom på grundlag af en af nævningerne afsagt og derpå af retten tiltrådt kendelse, som går ud på, at tiltalte er skyldig i et ham påsigtet forhold eller flere sådanne, og når der på grundlag af kendelsen skal træffes afgørelse om en heraf følgende i straffeloven omhandlet retsvirkning, sammentræder sorenskriveren (dommeren) og nævningerne til dommens vedtagelse under ledelse af sorenskriveren (dommeren). Hver nævning har herved én stemme, mens vægten af sorenskriverens (dommerens) stemme er lig nævningernes tal. Ved lige stemmetal gælder med hensyn til strafudmålingen det for tiltalte gunstigste resultat. Nævningerne stemmer først og sorenskriveren (dommeren) sidst. Iøvrigt finder reglerne i §§ 214 og 216 tilsvarende anvendelse på rettens rådslagning og afstemning.«

**106.** I § 925, stk. 2, indsættes efter »fængslet,«: »eller der i sagen bliver spørgsmål om anvendelse af straffelovens §§ 68, 69 eller 72,«.

**107. I § 925, stk. 3, 1. pkt.,** indsættes efter »fængslet,«: »og bliver der ikke i sagen spørgsmål om anvendelse af straffelovens §§ 69, 69 og 72,«.

**108.** I **§ 925, stk. 6,** udgår »samt i sager, i hvilke der bliver spørgsmål om anvendelse af straffelovens §§ 68, 69, 70 og 73«.

**109. § 925 a** udgår.

**110. § 928, stk. 5,** udgår.

**111.** I **§ 940** indsættes som stk. 3:
»**Stk. 3.** Domme i nævningesager påankes direkte til højesteret efter de i dette kapitel givne regler med de fornødne lempelser. Øvrige domme afsagt af retten på Færøerne påankes til landsret efter reglerne i kapitel 83.«

**112.** § **965, stk. 1, 1. pkt.,** affattes således:
»Så snart statsadvokaten har ladet de foreskrevne meddelelser (§§ 947 og 950) forkynde for tiltalte eller har modtaget dennes ankemeddelelse, eventuelt med tilhørende begrundelse, indsender han sagens akter til landsretten.«

**113.** §§ **965 a, b, c og d** udgår.

**114.** I § **966, stk. 1, 3. pkt.,** ændres »2 uger« til: »4 uger«.

**115.** I § **968** indsættes som stk. 5:
»**Stk. 5.** Kære finder i overensstemmelse med reglerne i § 940 sted til højesteret eller til landsret efter de i nærværende kapitel indeholdte regler med de fornødne lempelser.«

**116.** I §§ **976, stk. 1, og 977, stk. 1,** indsættes efter »landsret«: »eller ved retten på Færøerne«.

**117.** I § **983** indsættes efter 1. pkt.:
»For så vidt angår nævningesager finder domsforhandling dog sted ved retten på Færøerne.«

**118.** I § **987, stk. 1, 1. pkt.,** udgår ordene »ved landsretten«. Ordene »ved byret, henholdsvis sø- og handelsretten« ændres til: »iøvrigt«.

**119.** § **987, stk. 3, 2. pkt.,** udgår.

**120.** I § **999, stk. 2,** ændres »landet« til: »riget«.

**121.** I § **1012, stk. 4,** ændres »færdselslovens 119 a« til: »færdselslovgivningen«.

**122.** § **1018 f, stk. 4,** affattes således:
»**Stk. 4.** Sagen behandles uden medvirken af nævninger.«

**123.** I §§ **1019 b, stk. 2, 1. og 2. pkt., 1019 c, 1019 e, stk. 1, 1. pkt., 1019 l, stk. 1, 1. pkt., og 1019 m, stk. 2, 1. pkt.,** ændres »statsadvokaten« til: »rigsadvokaten«.

**124.** § **1019 b, stk. 3,** udgår.

**125.** I § **1019 h** ændres »Statsadvokaten« til: »Rigsadvokaten«.

§ 2.

**Loven træder i kraft den ....**

§ 3.

Lovens regler om lokalnævn finder anvendelse for klager, der indgives den ..... (ikrafttrædelsesdatoen) eller senere.

**Stk. 2.** Personer, der den ..... (ikrafttrædelsesdatoen) opfylder betingelserne for at få meddelt advokatbeskikkelse efter de hidtil gældende regler, kan beskikkes som advokat efter de i loven anførte regler, selv om de ikke opfylder kravene i retsplejelovens § 119, stk. 3, 4 og 6, som affattet ved lov nr. 277 af 9. juni 1982. Personer, som justitsministeren har beskikket som advokat, og personer, som kunne beskikkes som advokat efter 1. pkt., omfattes ikke af bestemmelsen i retsplejelovens § 123, som affattet ved lov nr. 277 af 9. juni 1982. Ansættelse hos eller virksomhed i fællesskab med sådanne advokater kan medregnes i den tid, der er nævnt i § 123, stk. 1.

**Stk. 3.** Faderskabssager, som er anlagt eller begæret genoptaget ved lovens ikrafttræden i overensstemmelse med de hidtil gældende regler, skal anses for at være rejst rettidigt.

**Stk. 4.** Lovens regler finder også anvendelse ved tvangsfuldbyrdelse på grundlag af dokumenter, som er udstedt inden den ..... (ikrafttrædelsesdatoen).

**Stk. 5.** Lovens regler om tvangsauktioner finder kun anvendelse, hvis anmodning om tvangsauktion er indgivet til fogedretten efter lovens ikrafttræden.

**Stk. 6.** Straffesager, i hvilke der endnu ikke er rejst tiltale på den tid, loven træder i kraft, behandles efter de regler, som denne lov foreskriver. Gyldigheden af retshandlinger, som er foretagne i sager, førend loven træder i kraft, bedømmes efter den tidligere lovgivning.

§ 4.

Fra lovens ikrafttræden ophæves lov for Færøerne om rettens pleje nr. 72 af 5. marts 1979.

## Bemærkninger til lovforslaget

1. Lovforslaget indebærer en fuldstændig revision og modernisering af retsplejeloven på Færøerne, således at retsplejen i denne landsdel i videre omfang end i dag tilnærmes retstilstanden i riget iøvrigt.

2. Efter retsplejelovens § 1021, stk. 2, bestemmes det ved særlig lov, i hvilken udstrækning lovens regler skal finde anvendelse på Færøerne. Ved lov nr. 164 af 4. juni 1924 blev retsplejeloven af 1916 med senere ændringer udvidet til at gælde for Færøerne med en række ændringer, som skyldtes øerne fjerne beliggenhed i forhold til den øvrige del af riget, den besværlige forbindelse mellem øernes indbyrdes, manglen på personer med juridisk uddannelse og hensynet til bestående særlige retsdannelser. Denne lov afløstes af lov nr. 174 af 11. maj 1935, der blev ændret i 1937, 1938, 1939 og 1958 og i 1960 afløst af lov nr. 95 af 16. marts 1960. Denne lov blev igen afløst af lov nr. 437 af 17. december 1965, der senere blev afløst af lov nr. 72 af 5. marts 1979, der er den nugældende færøske retsplejelov.

Justitsministeriet har på grundlag af en indstilling fra en arbejdsgruppe udarbejdet et nyt forslag til retsplejelov for Færøerne. Arbejdsgruppen har bestået af dommeren, politimesteren og rigsombudsmanden på Færøerne, kontorchefen ved Færøernes Landsstyre og en fuldmægtig ved rigsombudet. Justitsministeriets lovudkast har været forelagt for det færøske hjemmestyre, der den..... har givet sin tilslutning til forslagets gennemførelse.

3. Ved lovforslaget tages stilling til, i hvilket omfang nedenstående ændringer i den almindelige retsplejelov skal gennemføres for Færøerne:

— § 3 i lov nr. 320 af 13. juni 1973 om ændring af borgerlig straffelov, af lov om ikrafttræden af borgerlig straffelov m. m. og af lov om rettens pleje (Strafferetlige særforanstaltninger m. m.).

— Lov nr. 325 af 13. juni 1973 om ændring af retsplejeloven (Lokalnævn vedrørende politiets virksomhed og behandling af klager over politiet m. v.).

— Lov nr. 286 af 14. juni 1974 om ændring af retsplejeloven (Sø- og handelsretten i København m. v.).

— § 3 i lov nr. 318 af 19. juni 1974 om ændring af tinglysningslov, konkurslov m. v. (Bekæmpelse af skadelig økonomisk virksomhed m. v.).

— § 2 i lov nr. 254 af 12. juni 1975 om ændring af forskellige lovbestemmelser om mødrehjælpens virksomhed (Ændring som følge af lov om social bistand).

— § 1 i lov nr. 267 af 26. juni 1975 om ændring af retsplejeloven, lov om forbrugerklagenævnet og lov om retsafgifter (Forbrugerssager, bødeforelæg på stedet m. v.).

— § 3 i lov nr. 268 af 26. juni 1975 om ændring af borgerlig straffelov, af lov om ikrafttræden af borgerlig straffelov m. m. og af retsplejeloven (Psykisk abnormitet, narkotikakriminalitet, beskyttelse af diplomater m. v.).

— § 1 i lov nr. 258 af 26. maj 1976 om ændring af retsplejeloven, udpantningsloven og lov om inddrivelse af underholdsbidrag (Udlæg og udpantning m. v.).

— § 13 i lov nr. 313 af 10. juni 1976 om ændring af forskellige lovbestemmelser med 20 års aldersgrænse m. v.

— Lov nr. 39 af 26. januar 1977 om ændring af retsplejeloven (Behandling af visse sager efter lov om arbejdsformidling og arbejdsløshedsforsikring m. v.).

— § 17 i lov nr. 299 af 8. juni 1977 om ændring af forskellige lovbestemmelser vedrørende konkurs m. v.

— § 12 i lov nr. 300 af 8. juni 1977 om anerkendelse og fuldbyrdelse af nordiske afgørelser om privatretlige krav og om ændring af retsplejeloven.

— § 1 i lov nr. 243 af 8. juni 1978 om ændring af retsplejeloven m. v. (Efterforskning i straffesager, anholdelse og varetægtsfængsling, erstatning i anledning af strafferetlig forfølgning, herunder for frakendelse eller inddragelse af førerretten m. v.).

— § 2 i lov nr. 244 af 8. juni 1978 om ændring af myndighedsloven og retsplejeloven (Forældremyndighed m. v. over børn uden for ægteskab).

— § 1 i lov nr. 291 af 8. juni 1978 om ændring af retsplejeloven m. v. (Tvangsauktioner).

— Lov nr. 93 af 14. marts 1979 om ændring af retsplejeloven (EF-advokaters virksomhed her i landet).

— § 1 i lov nr. 260 af 8. juni 1979 om ændring af retsplejeloven m. v. (Behandling af borgerlige sager m. v.).

— § 2 i lov nr. 252 af 16. juni 1980 om ændring af borgerlig straffelov (Pornografiske billeder af børn).

— Lov nr. 253 af 16. juni 1980 om ændring af retsplejeloven (Advokatbistand til den forurettede).

— Lov nr. 213 af 13. maj 1981 om ændring af lov om ændring af lov om rettens pleje (Advokaters møderet for landsret m. v.).

— Lov nr. 257 af 27. maj 1981 om ændring af lov om rettens pleje.

— Lov nr. 270 af 10. juni 1981 om ændring af lov om rettens pleje (Lokalnævnenes behandling af klagesager m. v.).

— § 6 i lov nr. 85 af 17. marts 1982 om en undersøgelse af visse forhold vedrørende post- og telegrafvæsenet.

— § 2 i lov nr. 223 af 26. maj 1982 om ændring af lov om børns retsstilling og retsplejeloven (Faderskabssager m. v.).

— § 1 i lov nr. 277 af 9. juni 1982 om ændring af lov om rettens pleje m. v. (Advokater m.v. tilsyn med eksekutorer).

— § 2 i lov nr. 627 af 8. december 1982 om ændring af lov om en værdipapircentral og af lov om rettens pleje.

— Lov nr. 298 af 6. juni 1984 om ændring af retsplejeloven (Lægdommere i straffesager, rationalisering af sagsbehandlingen ved domstolene m. v.).

— § 1 i lov nr. 299 af 6. juni 1984 om ændring af retsplejeloven og færdselsloven (Behandling af straffesager, isolation, varetægtsfængsling m. v.).

4. De afvigelser fra den danske retsplejelov, der opregnes i lovforslagets § 1, svarer i vidt omfang til dem, der var i § 1 i loven fra 1979. Der er dog

på en række områder foretaget ændringer i forhold til de hidtidige regler på Færøerne, således at de særlige færøske regler tilnærmes reglerne i den danske retsplejelov. Det gælder navnlig med hensyn til forskellige tidsfrister (ankefrister og lign.).

Ved gennemførelsen af den første færøske retsplejelov i 1924 indførtes der en lang række afvigelser med hensyn til fristernes længde, bl. a. således at de fleste af fristerne i den danske retsplejelov for fremmøde og appel m. v. blev fordoblet. Afvigelserne er gået igen i samtlige senere færøske retsplejelove, herunder i lov nr. 72 af 5. marts 1979, hvor dog en del af de forlængede frister blev ophævet eller forkortet.

De hidtidige afvigelser skyldes i væsentlig grad øernes beliggenhed, der hidtil har nødvendiggjort forlængelse af frister, hvor meddelelser m. v. skal sendes fra Færøerne til andre dele af riget, ligesom også de vanskelige samfærdselsforhold på øerne har haft betydning.

På grundlag af de forbedringer, der er sket i samfærdselsforholdene, er det imidlertid nu fundet rimeligt at stille forslag om at ophæve de særligt forlængede frister.

I den gældende færøske retsplejelov findes endvidere en del særregler, hvorefter personer uden juridisk uddannelse kan varetage hverv eller stillinger, hvortil der efter den danske retsplejelov kræves juridisk uddannelse. Også på dette område har udviklingen medført, at disse bestemmelser nu bør udgå.

Blandt de færøske afvigelser fra den danske retplejeordning kan iøvrigt fremhæves, at domsmænd ikke medvirker ved behandlingen af straffesager på Færøerne. Det færøske hjemmestyre overvejer fortsat spørgsmålet om domsmandsinsttutionens indførelse på Færøerne.

5. Lovforslaget skønnes ikke at medføre væsentlige administrative eller økonomiske konsekvenser for det offentlige.

## 13: Skjal til løgtingsmál nr. 72: BROYTING Í REVSILÓGINI

JUSTITSMINISTERIET

Den 6. januar 1986

UDKAST

**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov**

**om**

**ændring af straffeloven m. v.**

**(International strafferet).**

VI MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks dronning, gør vitterligt:

I henhold til § 5, stk. 1, i lov nr. ... af ..... om ændring af straffeloven, lov om samarbejde med Finland, Island, Norge og Sverige angående fuldbyrdelse af straf m. v. og lov om overførsel til andet land af retsforfølgning i straffesager (International strafferet) fastsættes:

§ 1. Lovens § 1, nr. 1 og 2, gælder for Færøerne med de ændringer, der følger af § 2.

§ 2. § 1, nr. 1, affattes således:

1. **§ 8, stk. 1, nr. 4,** ophæves og i stedet indsættes:
»4) når handlingen er omfattet af § 183 a. Påtalen kan tillige omfatte overtrædelser af §§ 237 og 244-248, som er begået i forbindelse med overtrædelse af § 183 a,
5) når handlingen er omfattet af mellemfolkelig overenskomst, ifølge hvilken Danmark er forpligtet til at foretage retsforfølgning, eller
6) når udlevering af sigtede til retsforfølgning i et andet land afslås, og handlingen, for så vidt den er foretaget inden for folkeretlig anerkendt statsområde, er strafbar efter den der gældende lovgivning, og den efter dansk ret kan medføre højere straf end fængsel i 1 år.«

§ 3. Anordningen træder i kraft den 1. juli 1986.

# 14: Skjal til løgtingsmál nr. 91: LØGTINGSLÓG UM BROYTING AV LØGTINGSLÓG UM FUGLAVEIÐU V. M.

## STØÐAN HJÁ TÍ FØROYSKA LOMVIGA- OG ÁLKUSTOVNINUM

**Frágreiðing til Føroya Landsstýri í samband við endurskoðan av veiðilógini**

Bergur Olsen, Fiskirannsóknarstovan, 1986.



**Krákuspíld 1965, o. u. 100 lomvigar.**

**Krákuspíld 1983, 23 lomvigar.**



### Støðan hjá føroyska lomvigastovninum

Seinast í 1950-árunum vóru bjargamenn varugir við, at lomvigastovnurin var farin at minka aftan á ein vøkstur síðani aldarskiftið. Henda minking helt fram, og fyrst í 1960-árunum kom rættiligt hóttafall á stovnin, og onki fekst á fleyg longur, tí serstakliga tann ungi fuglurin var horvin. Talið av búfugli helt sær betur, men longu fyrst í 1960-árunum var talið av eggum á St. Dímun komið niður í helvt, og givist varð tí við rættiligari ræning, men fyrst í 1970-árunum var bert ⅓ eftir. Í 1974 góvust skúvingar at ræna, tí tá var talið av eggum komið niður um helvtina av ti vanliga.

Í 1976 fór Andrias Reinert á Fiskirannsóknarstovuni undir at kanna orsøkirnar til minkingina í lomvigastovninum, og byrjað varð við ringmerking í 1968 (Olsen 1980 a). Skipað varð eisini fyri einari teljing av øllum lomvigabjørgunum í 1972 (Dyck og Meltofte 1973, 1975), og lomvigin á Høvdanum á Skúvoy hevur síðani verið regluliga taldur hvørt summar, samstundis sum kanningar eisini eru gjørdar fyri at bøta um teljingarháttin (Olsen 1980 b).

Høvuðsorsøkin til minkingina í lomvigastovninum var helst føðitrot, tí ritustovnurin, sum at kalla ikki varð veiddur, minkaði á sama hátt. Fiskirannsóknarstovan hevði tí eisini ætlanir um at fara undir at kanna lomvigaføðina, men henda kanning er tíverri ikki komin í lag enn (Reinert 1976).

Samstundis sum talið av lomviga minkaði so nógv, at menn máttu gevast við fleyg og ræning, varð bildið fram við snaruveiðu og skjóting. Talið av bátum, sum royndu við snaru, fall tó munandi, men teir fáu, sum hildu fram, veiddu til samans 10.000 til 20.000 lomvigar á hvørjum ári (Olsen 1980 a). Byrsan varð tað vanliga amboðið at veiða lomviga við, og sjálvt um talið av lomviga minkaði, øktist nýtslan av lóðuri, og í 70-árunum eru í miðal nýtt 440.000 skot um árið, og veiðan hevur helst verið o. u. 50.000 til 75.000 lomvigar á hvørjum ári. Tað var eyðsætt, at hetta var ov nógv fyri stovnin, tá hann framman undan var illa fyri, men tvær ferðir blivu uppskot um friðing feld á tingi, áðrenn ein partvís friðing kom í lag í 1980, tá lomvigin varð friðaður ímóti allari veiðu frá 1. apríl til 15. august fram til 1968. Í samband við at henda lógin nú skal endurskoðast og úrslitið av friðingini metast, havi eg viðgjørt nøkur evnir, sum eg meti eru av týdningi í hesum máli.

### Stívliga 200.000 pør av lomviga eiga í Føroyum

Føroyski lomvigastovnurin bleiv taldur á fyrsta sinni í 1972, og úrslitið var 392.000 pør (Dyck og Meltofte 1973, 1975). Eg luttók í hesari teljing, og í 1983 søkti eg landsstýrið um stuðul til at endurtaka teljingina, men um-

sóknin bleiv noktað — eftir tilmæli frá Føroya Náttúrugripasavni. Teljingin skuldi m. a. geva eina ábending um stovnsstøddina, og hvussu tey ymisku bjørgini vóru broytt síðani 1972, tí tað er ymiskt, sum sagt verður frá. Flest eru tó samd um, at minkingin helt fram aftan á 1972. Hetta er eisini úrslitið av teljingum, sum eg havi gjørt í Hestbjørgunum (1979), Vestmannabjørgunum (1979), Vágabjørgunum (1980) og Skúvoyarbjørgunum 1982/83). Minkingarnar vóru ávikavist 85%, 33%, 43% og 27%.

Slíkar teljingar eru sera óvissar, og tær einastu teljingar, sum rættiliga kunnu samanberast, eru tær árligu teljingarnar, sum verða gjørdar á Høvdanum á Skúvoy, har minkingin hevur verið 40% síðani 1972. Um roknað verður við, at samlaði stovnurin, sum í 1972 var 392.000 pør, er minkaður á sama hátt, er stovnurin nú 235.000 pør, men av tí at bert 1,5% av stovninum eigur í Høvdanum, má henda meting takast við stórum fyrivarni.

**Lomvigastovnurin er minkaður o. u. 70% til 90% seinastu 30 árini**

Í 1961 taldi A. Holm Joensen lomvigan, sum sást á landi, tá hann gekk fram við eggini á Skúvoyarbjørgunum (Joensen 1963). Henda teljingin er endurtikin í 1972 (Dyck og Meltofte 1973, 1975) og 1982/83 (Olsen 1985), og út frá hesum tølum meti eg, at stovnurin er minkaður við o. u. 70% -90% frá fyrst í 1950-árunum, tá hann var upp á tað mesta (Olsen 1985). Hetta má sigast at vera ein ógvuliga stór minking, men tá hugsað verður um, hvussu leingi minkingin hevur staðið við, nýtist minkingin »bert« at hava verið 4% - 7% í meðal hvørt ár — tað sama (6%) sum við nágreiniligum teljingum er funnið á Høvdanum á Skúvoy frá 1973 til 1980.

Tað er ikki bert í Føroyum, stórar broytingar eru farnar fram. Í Noreg er talið av lomviga minkað 70% á Vedøy frá 1960-83, meðan talið er 10-faldað á Hornøy frá 1974-83 (Røv 1984). Í tveimum teimum størstu bjørgunum í Íslandi, Hælavikurbjarg og Hornbjarg, er talið minkað ávikavist 85% og 95% frá 1953 til 1979 (Evans 1984).

**Lomvigastovnurin hevur verið skiftandi igjøgnum øldir,**
**men er nú helst væl lægri, enn menn vita um.**

Seinastu tríggjar øldirnar hevur sjófuglastovnurin við Føroyar verið í hæddini mitt í hvørjari øld (Reinert 1976, Nørrevang 1977). Vit vita tó ikki, hvussu stórur stovnurin hevur verið, men nógv bendir á, at lomvigatalið nú er nógv lægri enn í seinasta aldudali, sum var um aldarskiftið, tí menn, sum hava luttikið í ræning síðan 1915, hoyrdu ongantíð undangongumenninar greiða frá so stórari minking, sum er hend hesi seinastu 30 árini. Um stovnurin um aldarskiftið var líka lítil sum nú, má talið vera minst fýrafaldið frá 1900 til 1950, men hetta er neyvan hent, tí talið av eggum og fugli,

sum undangongumennirnir greiddu frá kundi takast uttan at skaða stovnin, liggur tætt upp ímóti teimum størstu veiðunum í hesi øldini.

Vøksturin frá 1900 til 1950 sást mest í ungfuglinum (hellufuglur, setrafuglur, oyðifuglur), og tá nýggjar spíldir blivu tiknar av búfugli. Flestu røkur og spíldir, sum blivu rændar, vóru harafturímóti fullsettar frammanundan og broyttust tí lítið. Minkingin síðani 1950-árini sást eingin fyrst í ungfuglinum, men harafturat minkaði eggjatalið niður um helvt, áðrenn givist varð við ræning.

**Smáu fuglabjørgini hava eisini stórt virði**

Tá hugsað verður um lomvigastovnin í samband við veiðu, verður hugsað um samlaða talið í Føroyum, og her hevur tað mest verið gjørt út frá kanningum á Skúvoy, sum hevur knappliga helvtina av stovninum, men sæð frá einum náttúruverndarligum sjónarmiði, er tað ikki bert samlaða talið, ið er umráðandi, tí nógv av teimum smáu fuglabjørgunum, t.d. Vestmannabjørgini, hava eitt stórt virði sum útferðarpláss. Vandi er fyri, at nógv av hesum smáu plássum eru verri fyri enn Skúvoyarbjørgini, og mugu tey tí verða havd í huga undir viðgerðini av veiðilógini.

**Friðingin hevur bøtt um støðuna hjá føroyska lomvigastovninum**

Tá lomvigin og álkan í 1980 vórðu friðað ímóti allari veiðu frá 1. apríl til 15. august í einum royndarskeiði upp á 6 ár, hugsaðu helst tey flestu, at tað fór at verða skipað fyri kanningum, sum kundu lýsa gongdina hesi árini, men ongin peningur bleiv játtaður til hetta endamál. Peningur varð bert játtaður til at halda fram við kanningunum á Høvdanum á Skúvoy, sum miða ímóti einum teljingarhátti, sum ger tað møguligt at hava eftirlit við øllum stovninum. Hetta kann bert gerast við at hava eftirlit við øllum bjørgunum, men higartil hevur eftirlitið verið avmarkað til Høvdan á Skúvoy, har bert o.u. 1,5% av stovninum eigur, so hetta er eitt lítið grundarlag at gera metingar út frá, men tær kunnu í hvussu er siga, hvussu gongdin hevur verið í Høvdanum og kanska eisini eitt sindur um gongdina í øllum Skúvoyarbjørgunum og bjørgunum har á leið.




**Mynd 1. Úrslitið av lomvigatcljingum á Høvdanum, Skúvoy, 1973-1985. Sami teljingarháttur er nýttur øll árini, og teljarin hevur eisini verið tann sami. Áðrenn friðingin kom í lag, 1973-79 (------), var tann árliga minkingin 6%, meðan hon hevur verið 2% í royndarskeiðinum, 1980-85 (·····). Seinastu 5 árini hevur meðal minkingin bert verið 0,5%, so tað er kanska komin støðgur í minkingina, hóast lomvigatalið er 13% lægri enn, tá friðingin kom í lag.**

Síðani 1973 havi eg talt lomvigan á Høvdanum eina ferð á hvørjum ári uttan 1975, og sami teljingarháttur er nýttur øll árini (Olsen 1980 b). Spíldirnar í Høvdanum, o. u. 300 í tali, eru teknaðar inn á citt kort, og um mánaðarskiftið juni/juli havi eg talt lomvigan, sum sat á hesum spíldum.

Áðrenn friðingin kom í lag, vístu teljingarnar eina minking, sum í meðal var 5,9% á hvørjum ári (Mynd 1), og minkingin tóktist at økjast (Olsen 1980 b). Ringmerkingarúrslit vístu, at í minsta lagi 2% av lomvigastovninum bleiv veiddur við skjóting á hvørjum ári, og nógv bendi á, at nóg mikið av ungfugli kom undan, til at stovnurin kundi vera í javnvág, um eingin veiða var, og tí metti eg, at ein friðing frá 1. apríl til 15. august kundi støðga minkingini (Olsen 1980 a).

Á mynd 1 sæst, at ein avgerandi broyting er hend, síðani friðingin kom í lag. Meðal minkingin er fallin frá 5,9% niður í 1,9%, og um ein bert hyggur at teimum seinastu 5 árunum sæst, at javnvág (÷0,5%) er komin í lomvigatalið.

Orsøkirnar, til at lomvigastovnurin var í minking, vóru helst fleiri, t. d.

føðitrot, dálking, fiskireiðskapur, havhestur og veiða, men tann einasti av hesum meinbogum, sum vit við vissu vita minkaði í tíðarskeiðinum 1980-85, var veiðan, og tí má friðingin hugsast at vera høvuðsorsøkin til, at minkingin er um at vera støðgað.

Hin kann undrast á, hví minkingin helt fram til 1981, tá friðingin kom í lag í 1980, men óvissan í hesum teljingum er hóast alt so stór, at tað ikki ber til at samanbera tølini frá einum ári til tað næsta, og tí er neyðugt at nýta meðal úrslitið fyri nøkur ár fyri at siggja gongdina, og hon er týðiliga batnað.

Ringmerkingar síðani 1962 vísa, at lítið av búfugli varð skotið áðrenn 1. apríl (Mynd 2), hóast lomvigin vanliga kemur í bergið seinast í februar. Nú lomvigin hevur verið friðaður frá 1. apríl, er rættiliga nógv skotið í februar og mars í mun til árini undan friðingina. Hetta er til bága fyri stovnin, tí vanliga doyr bert o. u. 8% av búfuglinum um árið í einum lomvigastovni í javnvág (Kampp 1984), og sostatt eru smáar broytingar í hesum tali avgerandi fyri, um stovnurin nørist ella ikki.




**Mynd 2. Myndin vísir, nær tann ringmerkti lomvigin varð skotin, áðrenn friðingin kom í lag: ------ 4 ára gamlir, ——— 4 ár og eldri (Olsen 1980 a). Lítlð av búfugli varð skotið áðrenn 1. apríl, hóast lomvigin kemur í bergið í februar mánað, men nú lomvigin hevur verið friðaður frá 1. apríl, er rættiliga nógvur búfuglur skotin í februar og mars í mun til árini undan friðingina.**

Friðingin hevur stórliga hjálpt upp á støðuna, men kortini er lomvigatalið í Høvdanum 13% lægri enn, tá lomvigin varð friðaður í 1980. Av tí at hetta eru tey einastu ítøkiligu úrslitini um gongdina í lomvigastovninum, má friðingin halda fram og tíðarskeiðið helst leingjast, so lomvigin eisini er friðaður í februar og mars, tá hann kemur í bergið.

**Ræning**

Áhugin fyri ræning tykist at vera vaksandi, og ofta verður harmast um, at hesin gamli siður dettur burtur, og at eingin fer at finna upp í bjørgini, um loyvi ikki verður givið at ræna aftur. Hetta er harmiligt, men tað var ikki friðingin, sum var atvoldin til, at ræningin helt uppat, tí hetta hendi í næstan øllum bjørgunum, langt áðrenn friðingin kom í lag.

Á St. Dímun góvust teir við rættiligari ræning fyrst í 1960-árunum og hava síðani bert gjørt nøkur smá stig. Á Skúvoy hevur ikki verið rænt síðani 1974, og tá høvdu teir í fleiri ár bert rænt tey pláss, sum vóru best at koma til. Bert í Sandoyar- og Sumbiarbjørgunum varð rænt eitt sindur árini undan friðingina og samlaða veiðan var o. u. 2.000 egg.

Ræningin av 2.000 eggum skaddi stovnin lítið í mun til byrsuna og snaruna, sum tóku o. u. 60.000 til 95.000 lomvigar til samans á hvørjum ári, men tað er torført at geva loyvi at ræna, tá øll onnur lomvigarveiða er bannað á sumri.

Eg meti tó ikki, at áhugin fyri ræning er so stórur, at farið verður undir rættiliga ræning nakrastaðni sum undan 1960-árini, tá stovnurin var o. u. fýra ferðir so stórur, ti úrtøkan er ov lítil, og flestu bjargamenn eru helst samdir um, at fuglurin skal hava frið at menna seg aftur.

Um ræning verður loyvd, er tað neyðugt, at summi økir verða undantikin, og at nágreiniligt eftirlit verður hildið við veiðini, so hagtølini kunnu nýtast til metingar av komandi broytingum.

## Álkan

Álkan varð helst tikin við í friðingina saman við lomviganum, ti hesir fuglar vanliga verða veiddir samstundis. Teir liva eisini undir nøkulunda somu korum, men tað hevur altíð verið lítið til av álku í Føroyum í mun til lomviga, og talið er nógv minkað í hesari øldini. Ongar kanningar eru gjørdar, men í 1974 metti eg, at stovnurin var o. . 5.000 pør (Lloyd 1976), so hetta er ein so lítil stovnur, at hann als ikki átti at verið veiddur.

Álkan hevur mest verið veidd á vetri, men tað hevur helst ikki bert verið føroysk álka, sum er veidd, tí við hvørt fekst rættiliga nógv. Hetta hevur helst verið álka úr Bretlandi og Írlandi, har 144.000 pør eiga (Lloyd 1976). Í hesum londum er álkan friðað alt árið. Seinastu vetrarnar hevur lítið verið av álku, so tað er ivingarsamt, um vit kunnu loyva okkum at halda fram við hesari veiðu.

## Keldur

Dyck, J. & Meltofte H. 1973.
Lomvicoptællingen på Færøerne 1972. Frágreiðing frá Dansk ornithologisk Forening, Keypmannahavn. 97 pp.

Dyck, J. & Meltofte H. 1975.
The Guillemot Uria aalge population of the Faroes 1972. Dansk orn. Foren. Tidsskr. 69, 55-64.

Evans, P. G. H. 1984.
Status and Conservation of Seabirds in Northwest Europe (excluding Norway and the USSR). — ICBP technical Publication No. 2 193-321.

Joensen, A. Holm, 1963.
Ynglefuglene på Skúvoy, Færøerne, deres udbredelse og antal. Dansk orn. Foren. Tidsskr. 57. 1-18.

Kamp, K. 1984.
Problemer vedrørende lomvier og jagt med bemærkninger om forholdene i Grønland. Frágreiðing frá Zoologisk Museum, Keypmannahavn. 7 pp.

Lloyd, C. S. 1976.
An estimate of the world population of the Razorbill. — Brit. Birds, 69. 298-304.

Olsen, B. 1980 a.
Ringmerking av lomviga í Føroyum. Frágreiðing til Føroya Løgting. 22 pp.

Olsen, B. 1980 b.
Lomvigateljingin á Høvdanum á Skúvoy frá 1973 til 1979. Frágreiðing til Føroya Løgting. 5 pp.

Olsen, B. 1982.
Nogle årsager til nedgangen i den færøske lomviebestand vurderet ud fra mønsteret i tilbagegangen og ringmærkningsresultater. — Viltrapport 21, Noreg. 24-30.

Olsen, B. 1985.
Population estimates of Guillemots Uria aalge on Skúvoy, Faroe Islands in 1982/83 compared with estimates in 1961 and 1972. Ikki gjørt almannakunnugt. 22 pp.

Reinert, A. 1976.
Lomvigin. Blaðgreinir í Dimmalætting nr. 97-120.

Røv, 1984.
Frágreiðing frá tí norska havfuglabólkinum.

## 15: Skjal til løgtingsmál nr. 92: SÁTTMÁLASKJAL TIL TINGMANNARÁÐ ÚTNORÐURS

**Sáttmálaskjal um Tingmannaráð útnorðurs**
**Inngangur**
**í sannkenning um**

**at** Føroyar, Grønland og Ísland, londini í útnorði, hava áhugamál í felag um at varðveita livandi og lívleysa tilfeingi sítt og gagnnýta tað við fyriliti,

**at** hetta tilfeingi er londunum alvegis umvarðandi til búskapar, mentanar og framtíðar menningar,

**at** tað er mikilsvert heiminum annars til lívbjargingar, at hesi lond varðveita livandi tilfeingi sítt og nýta tað við fyriliti,

**at** londini ásanna, at neyðsynt er at stimbra og menna samvinnu í mentum, viðskiftum og samferðslu og samvinnu annars, og

**at** londini við at stimbra og menna samstarvið gera sítt til at fremja góðscmju og friðarliga samtilveru í heiminum,

hava vit kosnir tingmenn á Føroya løgtingi, Landstingi Grønlands og Alting Íslands við støði í samtyktum á Føroya løgtingi 27. januar 1981, Landstingi Grønlands 23. mai 1985 og Altingi Íslands 19. mai 1981 um samstarv tinganna millum á fundi í Nuuk 24. september 1985 sannað, at tørvur er á formligum sáttmálaskjali, ið skipar reglurnar fyri samstarvinum.

Vit samtykkja og viðurkenna so statt hetta sáttmálaskjal, og ásetingar tess eru tilskilaðar her niðanfyri:

**1. kapittul.**

1. Til at røkja tingsamstarvið millum Føroya, Grønlands og Íslands verður skipað tingmannaráð útnorðurs, her niðanfyri nevnt **ráðið.**

2. Ráðið kann av sínum eintingum samtykkja tilmæli til eitt ella fleiri av londunum.

**2. kapittul.**

1. Til ráðið velja Føroya løgting, Landsting Grønlands og Alting Íslands millum tingmenn sínar tað tal á ráðsmonnum og varamonnum teirra, sum

hvørt tingið sær tekur avgerð um. Skuldi umboð hjá ráðsmonnum verið at enda komið vegna val og nýggj umboð ikki góðkend, áðrenn ráðseta verður hildin, kunnu teir flokkar, ið umboðaðir verða á tingi, velja bráðfeingis ráðsmenn og varamenn teirra.

Tingini, ávikavist flokkarnir, geva ráðsformanni boð um ráðsmenn og varamenn teirra.

**2.** Ráðið er samtyktarført, tá ið allir 3 bólkar fyri londini eru umboðaðir og hvør bólkur umboðaður við meiriluta.

**3.** Formaðurin fyri ráðnum verður valdur til skiftis úr bólkunum fyri eitt ár í senn. Um somu tíð verður valdur fyrsti næstformaður og annar næstformaður. Hesir tríggir eru forsæti ráðsins.

**4.** Formaðurin boðar til ársetu ráðsins tíð og stað, sum ráðið ger av. Meiriluti av ráðsmonnum kann um formannin boða til eykasetu, formaðurin setur á staðin.

**3. kapittul.**

**1.** Á ráðstevnu kann verða tikið til umrøðu hvørt eitt evni, ið kann vera samstarvinum umvarðandi.

**2.** Tá ið tilmæli verður framsent, skal verða gjørd grein á teirri undirtøku, ið tað varð samtykt við í ráðnum.

**4. kapittul.**

Formaðurin sær um skrivstovuhaldið.

**5. kapittul.**

Hvørt land sær ber kostnaðin av luttøku ráðsmann sína í samstarvinum. Útreiðslurnar av skrivstovuhaldinum fylgja formanninum.

**6. kapittul.**

Gjørd verður starvsskipan til at fremja fyriskipanir og ætlanir í sáttmálaskjalinum. Starvsskipanin verður løgd fyri ráðsetu til samtykkis.

**7. kapittul.**

Hetta sáttmálaskjal, ið ritað er á donskum, føroyskum, grønlendskum og íslendskum øllum javngildum, kemur í gildi, tá ið tað er samtykt á Føroya løgtingi, Landstingi Grønlands og Altingi Íslands.

## 16: Skjal til løgtingsmál nr. 93: BYGGING Í TINGANESI


| | | | |
|---|---|---|---|
| A-PLAN | | Jóran í Dali, ark. m.a.a. | tlf. 16546 |
| Arkitekt- og planleggingarvirkið | | Høgni W. Larsen, ark. m.a.a. | tlf. 16869 |
| Klettaskot | 3800 Tórshavn | Sigmundur í Dali, geodetur | tlf. 11891 |


Klettaskot, tann 24. feb. 1986.

Føroya Landsstýri.
att. Johan Djurhuus, skrivstovustjóra.

**Landsfyrisitingarhús í Tinganesi.**

Detailprojekteringin er ikki heilt liðug enn, men út frá verandi upplýsingum er fylgjandi kostnaðarmeting gjørd.

| | | |
|---|---|---|
| **A. Endurbygging av Sjóbúðini og Vektabúðini, gólvvídd 739 m².** | | |
| 1. Jørð og betongarbeiði | kr. | 1.174.000,- |
| 2. Timburarbeiði | » | 2.611.000,- |
| 3. Snikkaraarbeiði | » | 688.000,- |
| 4. Málaraarbeiði | » | 403.000,- |
| 5. Múraraarbeiði (írokn. lyftrúm) | » | 207.000,- |
| 6. Lyft | » | 345.000,- |
| 7. El arbeiði | » | 515.000,- |
| 8. VVS arbeiði (írokn. kloakk) | » | 587.000,- |
| 9. Óvæntað 15% | » | 980.000,- |
| | kr. | 7.510.000,- |
| Umsiting, projektering og eftirlit | » | 1.465.000,- |
| | kr. | 8.975.000,- |
| **B. Gongd til Bakkapakkhúsið** | kr. | 471.000,- |
| **C. Salurin.** | | |
| Endurbøting og broytingar | kr. | 1.000.000,- |

**D. Pakkhúsið á Sælingahellu, gólvvídd 250 m².**

Húsini eru 100 m² til støddar, hava kjallara, miðhædd og loft. Bygningurin er ljótur í skapi og er ógvuliga illa farin. Hetta ber til at broyta, tí bygningurin er ikki friðaður.

Ætlanin er at nýta kjallaran til tekniska miðstøð fyri alt Tinganes. Harumframt verður møguleiki fyri skrivstovu ella kantinu á miðhædd og fundarhøli á loftinum.

At byggja eini nýggj hús omaná grótgrundina, har vvs og el arbeiði er íroknað, fer at kosta umleið

kr. 1.500.000,-

**E. Teknisk miðstøð fyri alt Tinganes.**

| | | |
|---|---|---|
| Hitamiðstøð, felagskervi, spreinging og kloakk | kr. | 890.000,- |
| El høvuðstalva | » | 120.000,- |
| No-break | | ogn |
| Radioanlegg, við kall | » | 100.000,- |
| Felagsantennuskipan | » | 100.000,- |
| Høvuðsvekslara tlf. | » | 500.000,- |
| Óvæntað 10% | » | 171.000,- |
| | kr. | 1.881.000,- |
| Umsiting, projektering og eftirlit d + e | » | 367.000,- |
| | kr. | 2.248.000,- |

**F. Gøtuljós.**

Gøtuljósið í Tinganesi og útgerðin til tað er ógvuliga ymisk. Her finnast bæði Albertslundlampur og neonljós. Hetta átti at verið útskift við útgerð og ljósi, sum fyrr hevur verið nýtt á staðnum. Kann eftirgerast í Føroyum, sum el lampur.

kr. 90.000,-

**G. Túnið.**

Í samband við at felagskervi verður lagt, eigur túnið at verða gjørt av nýggjum. Í útsjónd sum upprunaliga, men við einum undirlagi, sum tolir bilferðslu. Hetta fer at kosta umleið kr. 1.400,- pr. m².

Úr Skansapakkhúsinum niðan til Bryggjuhúsið eru 350 m² og haðani niðan til Reynagarð eru 330 m².

Hetta arbeiðið ber til at gera stigvíst, men hevði tað verið ein fyrimunur at gjørt strekkið, har kervið verður lagt beinanvegin fyri ikki at asfaltera umaftur.

kr. 500.000,-

**II. Forarbeiði.**
Tað kann verða ringt, á núverandi støði, at meta um kostnaðin av upprudding, for- og kanningararbeiðinum. Hetta verður sett til

kr. 1.000.000,-

Umbygging av øðrum bygningum, enn tey nevndu húsini, eru ikki við í hesi uppgerð.

| | | |
|---|---|---|
| A. Endurbygging av Sjóbúðini og Vektabúðini ..... | kr. | 8.975.000,- |
| B. Gongd til Bakkapakkhúsið ..... | » | 471.000,- |
| C. Salurin ..... | » | 1.000.000,- |
| D. Pakkhúsið á Sælingahellu ..... | » | 1.500.000,- |
| E. Teknisk miðstøð fyri alt Tinganes ..... | » | 2.248.000,- |
| F. Gøtuljós ..... | » | 90.000,- |
| G. Túnið ..... | » | 500.000,- |
| H. Forarbeiði ..... | » | 1.000.000,- |
| | kr. | 15.784.000,- |

Við heilsu

*Jórun í Dali*

*Høgni W. Larsen*

**17: Skjal til løgtingsmál nr. 95:**
**LÁN TIL**
**TELEFONVERK FØROYA**

TELEFONVERK FØROYA LØGTINGS

Tórshavn

ÍLØGU- OG FÍGGJARÆTLAN 1986–90

(BÆÐI ÁRINI ÍROKNAÐ)

**Inngangur**

Tað, at Føroyar liggja norðuri í Atlantshavi einar 300, 450 og 600 km ávikavist frá Hetlandi, Íslandi og Noregi, og at fólkatalið upp á seg er lítið, 45.000 íbúgvar spjaddir út um 17 oyggjar, krevur vælskipað samskifti, skal samfelagið mennast og vera á einum støði, ið tolir at verða borið saman við hini europeisku londini.

Tann stóra útbyggingin av føroyska telefonnetinum hesi seinastu 15 árini hevur verið við til, at stórur vøkstur hevur verið í føroyska vinnulivinum og bruttotjóðarúrtøkuni.

Harumframt hevur eitt dygt telenet gjørt sítt til, at tað er vorðið hugaligari hjá íbúgvunum at verða búgvandi í Føroyum, hóast langt av leið skotnar og ómilda náttúru.

Automatiseringin av føroysku telefonskipanini var frá hondini í 1978 og er við fullari tænastuveiting uppi í danska og alheims telefonnetinum.

**Tørvurin á peningaíløgum**

Støðið undir metingini av, hvussu tørvurin fer at taka seg upp, hevur verið tær fortreytir landsstýrið hevur ásett fyri almennu samfelagsgongdini komandi 4 árini og tær politisku ábendingar, sum hava verið um Telefonverkið. Í løgmansrøðuni sum hildin varð, tá tingið varð sett ólavsøkudag 1985, verður m. a. tikið soleiðis til:

**»Telefonverkið hevur støðuga tilgongd av feløgum og tænastum, ið krevja munandi íløgur. NMT-fartelefonskipan, ið kann nýtast í øllum Norðurlondum, verður arbeitt við, og fyri danska televerkið verður fylgisveinastøð sett upp á Húsareyni. Hendan støð kann, um vit ynskja tað, nýtast í sjónvarpssambandi millum Føroyar og útheimin.«**

Hvat ið annars viðvíkur tørvsmetingini innan teleøkið hevur Telefonverkið gjørt eina forsøgn fyri komandi 5 árini. 1. juli 1985 vóru o. u. 17.200 telefonfelagar settir til føroyska telefonnetið, ella 38 fyri hvørjar 100 íbúgvar. Um hetta sama mundið var talið á telefonum o.u. 27.000, ella 60 fyri hvørjar 100 íbúgvar. Tá havt verður í huga, at tíðin, tá eingir telefonfelagar koma afturat, enn minni enn so er rokkin — hetta sæst m. a. við at samanbera við onnur norðurlond — er ikki veruleikafjart at vænta eftirfylgjandi gongd í tíðarskeiðinum 1986-1990 (bæði árstøl íroknað) innan vanliga telefonnetið:

| | **Árligur vøkstur í procentum í miðal** |
|---|---|
| Telefonfelagatal | 5,0% |
| Telefontal | 9,0% |
| Telefonnýtsla | 10-12% |

Harumframt er bráðtørvur á at fáa NMT-fartelefon í lag í Føroyum, av tí at bæði skipaferðslan (og tá serliga tann stóri fiskiskipaflotin), men eisini vinnulívið sum heild fer at fáa munandi figgjarligan vinning av einari dyggari fartelefon (sbr. niðanfyri).

**Peningafløgur 1986-1990 (bæði árini íroknað).**
Út frá tí, sum frammanfyri er sagt, er sett upp tað yvirlitið, sum tilskilað er í fylgiskjali 1 yvir íløguútreiðslurnar í 5-ára tíðarskeiðinum 1986-1990 (bæði árini íroknað).

Væntað verður, at samlaðu fløgurnar fara at verða 186.627.000,- kr. í 1986-prísum.

Høvuðsúrslitið av teimum útrokningum, sum gjørdar eru, sæst í niðanfyri standandi talvu 1.

**TALVA 1. Íløgur 1986-1990 í 1000 kr.**

| | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 |
|---|---|---|---|---|---|
| Íløgur sbrt. fylgiskjali 1 í 1986-prísum ..... | 46.941 | 46.941 | 46.941 | 22.878 | 22.878 |
| Virðisminkan (7% árliga) ..... | 46.941 | 50.227 | 53.743 | 28.051 | 30.015 |

Niðanfyri er gjøllari greitt frá teimum einstøku íløgunum. Fyri NMT-fartelefonini er gjørd ein sjálvstøðug rakstrar- og gjaldførisætlan fyri at lýsa, hvørja ávirkan henda íløga fær á figgjarstøðu Telefonverksins sum heild.

Annars skal verða sagt frá, at henda ætlaða 5-ára útbyggingin í stóran mun fer at nýta útgerð, sum framleidd er í Norðurlondum, við tað at u.l. 36% av útbyggingaríløgunum fara til svenska felagið L. M. Ericsson (LME). Eitt nú fer nýggja NMT-fartelefonnetið her á oyggjunum, heruppí bæði NMT-fartelefonstøð og radioútgerð, at verða latið av LME. Harafturat skal LME lata digital-støðina í Tórshavn, digitalar undirstøðir og alla multipleksútgerðina. Allir vanligir koparkaðalar verða latnir av NKT og Jydsk Kabel í Danmark og IKO í Svøriki. Optiskar kaðalar og optisk transmissiónsútgerð verður latin av NKT í Danmark.

Telefontól og PABC-støðir verða latin av donsku verksmiðjunum GNT-Automatic og Standard Electric Kirk. Telettra í Italia letur digitalu radioskipanirnar.

Í næsta broti verður í stuttum greitt frá grundgeving og ti tekniska innihaldinum í hvørjum tátti í ætlanini við tilskilan um, hvørjir ið skulu lata útgerðina.

**NMT-fartelefon (sbrt. fylgiskjal 1, 1. stykki)**
NMT-fartelefon fevnir um tær íløgur, sum nevndar eru í fylgiskjali 1 í 1. og

8. stykki og fyri ein part um tær íløgur, sum nevndar eru í 12. stykki. Uppsetan av NMT-fartelefonskipanini í Føroyum krevur harafturat, at ávísar íløgur verða lagdar í telefonnetið fyri at taka økta trafikkin. Íløgurnar til NMT-skipanina eru lýstar hvør sær í fylgjandi brotum — tó undantikið skipanin undir 1. stykki.

Ynski at fáa NMT-fartelefon í Føroyum er grundaður á tann stóra týdning tað hevur at uppihalda einum dyggum samskifti í einum lítlum samfelagi sum tí føroyska, hvørs vinna og samfelagslív eru so tætt tengd at fiskiskapi og sigling. Eini 40% av bruttotjóðarúrtøkuni stava frá fiskivinnu og 98% av útflutninginum eru fiskavørur. Hetta hevur við sær, at eini 15-20% av vinnurøkjandi fólkinum noyðast at vera frá húsum til fiskiskap stóran part av tíðini.

Ein av fyritreytunum fyri at vænta, at sjómenn framvegis fara at trívast, er, at møguleikarnir at fáa samband við heimini eru góðir, og ikki minst tí, at fólkið í Føroyum, eins og í øðrum nútímans samfeløgum, setur vaksandi krøv til samskiftismøguleikarnar.

Harumframt fer sjóvinnan eins og vinnulívið annars í Føroyum at fáa týðandi figgjarligan fyrimun av eini dyggari fartelefonskipan. Tí hevur hugurin hjá føroyska flotanum verið stórur at fáa NMT-fartelefon í Føroyum. NMT-fartelefonin verður hildin at verða tann mest framkomna fartelefon í heiminum og røkkur nú um meginpartin av Norðurlondum. Av tí at Føroyar eru partur av Norðurlondum og støðugt hava sáttmálar og samvinnu við hinar norðurlendsku tjóðirnar, er tað av fleiri orsøkum natúrligt at nýta NMT-fartelefonina í føroyska fartelefonnetinum:

— NMT-fartelefonin er ein automatisk, liðilig og álítandi skipan, ið er uppbygd gjøgnum 10 ára royndir av norðurlendsku telefyrisitingunum og roynd í nýtslu í 4 ár í Noregi, Danmark, Svøríki og Finlandi.

— Føroyski skipaflotin er ofta staddur nærindis strondunum í hinum Norðurlondunum, m.a. leiðunum fram við allari norsku strondini, Norðsjónum, donskum heimasjógvi, Eystursjónum og eisini leiðunum undir Íslandi. Tí fer at bera til at nýta NMT-skipanirnar á øllum hesum leiðum. Í hesum sambandi eigur serliga at verða tikið fram, at føroysk fiskiskip veiða í sjógvi hjá øðrum Norðurlondum og fara við vissu at kunna røkka land við NMT-skipanini, tá tey eru 110 km úti — tó ofta upp í 200 km úr landi flestustaðni á havleiðunum í Norðurlondum, av tí at NMT-fartelefonin nú er útbygd at fevna um alt Danmark, Svøríki, Noreg og hálvt Finland. Harumframt er Ísland í ferð við at fáa sær NMT-fartelefonskipan, sum fer at fevna um alt Ísland og havið uttanum.

— Um so skuldi verið, hevði NMT-fartelefonin eisini verið nýtandi í samband við møguligt framtíðar olí-shore virksemi undir Føroyum.

— Nú føroyska veganetið er útbygt um alt landið, hevur bilferðslan fingið týðandi lut í vinnulivinum, men eisini fyri samfelagið sum heild. Sostatt eru bilarnir nú 13-14.000 í tali, ella 30 fyri hvørjar 100 íbúgvar, og ¼ av teimum eru vinnubilar. Í sambandi við hesa bilferðslu fer NMT-fartelefonin at fáa stóran týdning, bæði fíggjarliga og samfelagsliga.

— Føroyskir bilar koyra mangan í hinum Norðurlondunum, og hin vegin koyra norðurlendskir bilar í Føroyum í vaksandi tali, sum fer at gera NMT-fartelefonina henta hjá vinnulívi og til persónliga nýtslu út um landamørk.

— Til seinast er heldur ikki at gloyma, at NMT-fartelefonin fer at veita fulla atgongd til heimsumfatandi automatisku telefonskipanina og allar tænastuveitingar, sum knýttar eru afturat henni, og at eins lætt fer at verða at ringja við henni sum vanligari automattelefon. NMT-skipanin verður latin av L. M. Ericsson øll sum hon er, og sjálv útveganin er 62% av ætlaðu upphæddini.

Í Føroyum er talið á skipum og bilum hetta (seinast í 1984):

| | Tal |
|---|---|
| Skip omanfyri 20 brt. | 316 |
| Skip niðanfyri 20 brt. | 240 |
| Smærri motorbátar | 750 |
| Vinnubilar | 2.873 |
| Privatbilar | 11.464 |
| Før tilsamans | 15.643 |

Við hesum í huga er í niðanfyristandandi yvirliti tilskilað tann væntaða undirtøka av NMT-fartelefonskipanini, telefonfelaga- og samtalugjøld fyri hvønn telefonfelaga og inntøkurnar tilsamans fyri árini 1988-92.

| | Árligt miðal-telefonfelagstal | Inntøkur fyri hvønn telefonfelaga í 1984-prísum í kr. | Inntøkur tils. í 1984-prísum í mill. kr. | Inntøkur (mill. kr.) tils. í dagl. prísum [1]) |
|---|---|---|---|---|
| 1988 | 550 | 9.000 | 5,0 | 6,2 |
| 1989 | 1.110 | 9.000 | 10,0 | 13,1 |
| 1990 | 1.500 | 8.000 | 12,0 | 16,7 |
| 1991 | 1.875 | 8.000 | 15,0 | 22,1 |
| 1992 | 2.125 | 8.000 | 17,0 | 26,5 |

[1]) Tá ið niett hevur verið um inntøkur í dagligum prísum, er tað við teirri fyritreyt, at har fara at verða meirinntøkur, orsakað av hækking av gjøldum í mun til 1984-støðið upp á 24% í 1988 og síðani við 6% hvørt árið framyvir.

Gerast skal vart við, at inntøkurnar fyri hvønn telefonfelaga (og eisini inntøkurnar tilsamans) fyri ein part eru mettar eftir royndum í hinum Norðurlondunum, og fyri ein part eftir royndum Telefonverksins av telefonnýtslu í Føroyum.

Við tí, sum nevnt er omanfyri í buga, er rakstrar- og gjaldførisætlanin sett upp fyri NMT-fartelefonina fyri tíðarskeiðið 1986-2002, sum tilskilað er í fylgiskjali 2. Tann ætlaða NMT-fartelefonskipanin verður at halda í minsta lagi í 15 ár.

Væntandi verða tløgurnar figgjaðar við einum 12 ára seriuláni (við 9% í árligari rentu), sum verður útgoldið við 25,0 mill. kr. í 1986, 27,0 mill. kr. í 1987 og 28,0 mill. kr. í 1988, og verður afturgoldið í avdráttum í tíðarskeiðinum 1989-1998, sbr. afturgjaldingaryvirlitið yvir lán til NMT-fartelefon, sum sett er upp í fylgiskjali 3.

Tað er Telefonverksins áskoðan, at NMT-fartelefonskipanin, umframt at lúka bæði ein figgjarligan og samfelagsligan tørv hjá føroyska fólkinum og vinnulívinum, eisini fer at roynast ein skilagóð tløga, sum fer at fáa gagnligt árin á Telefonverksins figgjarstøðu, bæði tá hugsað verður styttri fram í tíðina og sum frá líður.

**Digitaliseran av telefonnetinum — digital-støð, digitalar undirstøðir og telefonfelaga multipleks (sbr. fylgiskjal 1, 2., 3. og 4. stykki).**

Nýtsla av digital-teknikki er í dag biligasti, hentasti og liðiligasti útbyggingarmøguleikin at gera telefonnetið dyggari til gagns fyri samfelagið og tess vinnulívi. Tískil leggja telefyrisitingar í øllum londum seg eftir at fáa sær digitalar telcskipanir.

Komandi viðkanir av telefonnetinum í Føroyum fara í mest møguligan

mun at verða framdar við digital-teknikki, bæði viðvíkjandi transmissións- og støðarútgerð. Orsøkin til hetta er:

— Digital útgerð er alt annað líka bíligari enn at víðka við analogari útgerð av sama slag, sum nýtt verður í tí analoga telefonnetinum, sum nú er.

— Hóast telefonnetið er væl útbygt við analogari útgerð, fer ein byrjandi digitaliseran longu nú at vera hent, av tí at netið, sum er, er homogent uppbygt av standard útgerð, bæði viðvíkjandi støðum og FDM-transmissión. Tí er lætt at skifta partar av skipanini um við digitala útgerð og endurnýta ta leysgjørdu analogu útgerðina til víðkan aðrastaðni.

— Við tí skjótt vaksandi datanýtsluni uppá 35% um árið í huga, hevur verið hildið neyðugt og hóskandi at byggja út øll digitalstrekki við datakanalum, so tað sum frá líður fer at bera til at fáa útgjørt allar býir og bygdir við datakanalum. Hetta er ein fyritreyt fyri einum væl virkandi samfelag og tess vinnulívi.

— Viðvíkjandi spurninginum um, hvar digitalar støðir og undirstøðir og digitalur multipleksútbúnaður skulu vera, er netið longu útbúgvið til hetta, við tað at støðarbygningar Telefonverksins, radiostøðir og kaðalgreiningshús, ið øll hava el og hita, hóska væl til endamálið.

— Ljóðgóðskan í telefonini er munandi betri í teimum digitalu skipanunum.

Í hesum sambandi hevur tað avgerandi týdning at nevna, at ein digital telefonstøð, sum tann, ið ætlanir eru um í Tórshavn, fer at kunna setast til stórt tal av telefonfeløgum, bæði beinleiðis, men eisini gjøgnum digitalar undirstøðir. Verða nakrar av hesum settar upp á størri bygdum økjum, fer tað at kunna minka um útreiðslurnar fyri hvønn tilsettan telefonfelaga. Til smærri øki fara felagamultipleksskipanir at verða nýttar.

Eisini er vert at nevna, at tá vit hava eina digitala støð, fer ein økt nýtsla av digitalum transmissiónsskipanum at lækka meðalprísin munandi fyri hvønn telefonfelaga.

Digital-støðir, digitalar undirstøðir og felagamultipleksútgerð verður alt, sum tað er, latið av L. M. Ericsson og fer við 6% av ætlanini fyri hesum.

**Betri góðska í felaganetinum (sbr. fylgiskjal 1, 5. stykki).**

Felaganetið er, sum er, bygt upp við analogum transmissións teknikki. Hesin teknikkur setir mark fyri, hvussu langt kann vera ímillum støð og

telefonfelaga. Hetta hevur eisini við sær, at hjá telefonfelaga, sum býr langt burtur, verður telefonljóðið minni gott til góðsku.

Men við tí nýggja digitala teknikkinum eru ráð fyri at bøta um ljóðgóðskuna hjá slíkum telefonfeløgum. Tá tað harafturat verður hildið umráðandi fyri sosiala trivnaðin í samfelagnum sum heild, at øll verða javnstillað viðvíkjandi tænastuveitingum, er ein peningaupphædd sett av til at bøta um telefonfelaganetið.

Útgerðina letur L. M. Ericsson, og verður hon goldin við 71% av ætlaðu upphæddunum.

**Mynttelefonir (sbr. fylgiskjal 1, 6. stykki)**

Í smáum býum og bygdum ber til við digitalu skipanunum at seta upp mynttelefonir. Til hetta krevst ein eykaútreiðsla til støðarútgerð, sum frá er greitt undir hesi upphædd. Lagt er upp fyri útreiðslurnar til sjálv mynttelefonapparatini og innleggingarnar undir táttinum um »Kaðalar og innleggingar«.

Útgerðina, sum verður goldin við 60% av tí ætlaðu upphæddini, letur L. M. Ericsson.

**Kaðalar og innleggingar (sbr. fylgiskjal 1, 7. stykki)**

Fleggingar í kaðalar og innleggingar verða vanliga býttar sundur í kaðalføring frá telefonfelaga til kaðalgreiningshús og høvuðskaðalar. Fyrri parturin av íløgunum fer framvegis at verða roknaður sum 5.000 kr. fyri hvønn telefonfelaga árliga í miðal. Nýtsla av nýggjum teknikki í komandi árum fer ikki at broyta hesa íløgu.

Seinni parturin av íløgunum, høvuðskaðalin, fer at gerast bíligari við at nýta digitalar undirstøðir og felagamultipleksskipanir. Tí fer tørvurin á íløgum í hesum parti av kaðalnetinum at minka.

Kaðalarnir, sum verða nýttir í telefonfelaganetinum og høvuðskaðalarnir, eru koparkaðalar og meginparturin verður latin av A/S Jydsk Kabel sum umboðið fyri svensku kaðalverksmiðjuna IKO og goldin við o. u. 35% av ætlaðu upphæddini.

Telefontól og telefonfelagaútbúnaður annars eru 2% av ætlanini og verða latin av GNT Automatic og Standard Electric Kirk.

**Transmissiónsskipanir í sambandi við NMT (sbr. fylgiskjal 1, 8. stykki)**

Í sambandi við útbyggingina av NMT-netinum fer ein røð av radiostøðum at verða sett upp ymsastaðni í Føroyum. Haðani fara telefonsamtalur frá skipum og bilum at verða sendar gjøgnum telefonnetið til Tórshavnar, har NMT-telefonstøðin verður. Til hetta verða, í tann mun tað ber til, tær verandi transmissiónskanalirnar nýttar, men harumframt verður neyðugt at byggja út við eini røð av nýggjum transmissiónskanalum. Ein partur av

hesum fer harumframt samstundis at kunna nøkta tann økta tørvin á transmissiónskanalum millum støðir í tí verandi telefonnetinum. Meginparturin av hesi útgerð fer at vera digitalar radioskipanir og multipleksútgerð, og so hartil ein optisk transmissiónsskipan.

Telettra í Italia letur digitalu radioskipanirnar, sum verða goldnar við 40% av upphæddini í ætlanini.

L. M. Ericsson letur multiplekssskipanirnar, sum verða goldnar við 27% av upphæddini í ætlanini. NKT letur ta optisku trevjusamskiftisskipanina, sum verður goldin við 4% av upphæddini í ætlanini.

**Transmissiónsskipanin millum støðir (sbr. fylgiskjal 1, 9. stykki)**

Tann stóri vøksturin av nýtsluni av tí føroyska telefonnetinum fer at gera tað neyðugt at útbyggja transmissiónsskipanirnar milluni telefonstøðirnar. Meginparturin av hesi útbygging fer at verða gjørdur sum radioskipanir og optiskar skipanir.

Upphæddin er í hesi ætlan upp á seg lág, og kemst tað av, at tær transmissiónsskipanir, sum ætlaðar eru at flyta NMT-samtalur til NMT-støðina í Tórshavn fyri ein part nøkta tørvin á samskiftisskipanum millum støðir.

Telettra letur tær digitalu radioskipanirnar, sum verða goldnar við 40% av upphæddini í ætlanini.

L. M. Ericsson letur multiplekssskipanirnar, sum verða goldnar við 33% av upphæddini í ætlanini.

**Data multipleks (sbr. fylgiskjal 1, 10. stykki)**

Í samband við digitalu útbyggingina av telefonnetinum verður stórur møguleiki fyri datasambandi hjá vinnulívinum og tí almenna, herundir peningastovnum, tryggingarfeløgum, fiskavirkjum, skattavaldi o. s. fr. Fyri at kunna gera nýtslu úr hesum møguleika fara fløgur at verða gjørdar í so nevndar datamultipleksarar, sum virka á tann hátt, at til fer at bera at senda fleiri datakanalur gjøgnum eina telefonkanal.

**Fylgisveinastøð (sbr. fylgiskjal 1, 11. stykki)**

Danska Post- og Telegrafverkið (P&T) ber ábyrgdina av altjóða telefonsambandinum úr Føroyum. Ætlanir verða nú gjørdar um at útbyggja hetta samband, sum í dag gongur um ein sjókaðal — SHEFA-kaðalin — við sambandi um fylgisvein afturat. Til hetta skal fylgisveinastøð byggjast í Tórshavn. Jarðstøðin sjálv, t. v. s. sendiútgerðin við antennu, verður figgjað av danska Post- og Telegrafverkinum (P&T), men Telefonverk Føroya Løgtings verður uppi í ætlanini á tann hátt, at tað fer at hava tekniska raksturin í hondum og lata P&T hús við hentleikum til nýtslu móti leigu. Í hesum sambandi er ætlanin at byggja afturat verandi

húsunum hjá radiostøðini á Húsareyni omanfyri Havnina. Henda radiostøð skal, umframt at vera fylgisveinastøð, eisini vera høvuðsmiðdepil bæði í telefon-, útvarps- og sjónvarpsnetinum, og um somu tíð dagligt arbeiðsplass og høvuðsstøð hjá tí fólki, sum arbeiðir á radiodeildini.

**Bygningar (sbr. fylgiskjal 1, 12. stykki)**
Telefonverkið eigur í dag smá hús og smáttur í stórum tali, sum nýttar verða sum radiostøðir og kaðalgreinarahús ymsastaðni í oyggjunum. Mong av hesum húsum liggja væl fyri og hava hóskandi innleggingar, so tey kunnu nýtast til NMT og annað, sum ætlanin er at gera íleggingar í. Men tørvur fer at verða á 12 smáttum afturat, av teimum skulu tær 7 nýtast sum radiostøðir hjá NMT, meðan 5 fara at verða nýttar sum kaðalgreinarahús.

**Tól (sbr. fylgiskjal 1, 13. stykki)**
Tá farið verður at útbyggja eitt telefonnet við fleiri sløgum av teknikki, eitt nú digitalum radioskipanum, digitalum støðum, datasendiútgerð, optiskum skipanum og digitalum multipleksútbúnaði, fer ein ítøkiligur tørvur at vera á mátitólum til at eftirkanna nýggja útgerð, innmáting og at taka útgerðina í nýtslu og til umsiting av skipanini. Sostatt er roknað við eini upphædd til omanfyrinevndu skipanir og útgerð.

**Data-útgerð til TFL (sbr. fylgiskjal 1, 14. stykki)**
Ætlanir eru frammi um íløgur í dataútbúnað og datakommunikatións-útgerð til Telefonverksins egnu nýtslu. Hetta verður hildið at vera neyðugt fyri á dyggan hátt at fáa umsitið útgerðina hjá telefonnetinum bæði tekniskt og figgjarliga.

Telefonverkið hevur í dag eina datamiðstøð um hendur til at røkja ta teknisku og figgjarligu fyrisitingina av verkinum. Ætlanin við teimum nýggju íløgunum er at byggja upp eitt datanet við smærri datatólum til starvsfólk, sum hava tørv á at draga upplýsingar burtur úr datamiðstøðini og viðgera hesar meira og at savna saman og viðgera upplýsingar av serligum slag, sum avvarðandi hevur brúk fyri í sínum arbeiði.

**Figging**
Vónir eru um at figgja ætlaðu íløgurnar (186.627.000,- kr. í 1986-prísum) við at læna 93,3 mill. kr. (50% av íløguni) í Nordisk Investeringsbank, og einum bankaláni (50%) upp á 93,3 mill. kr., ella kanska einum bankaláni (25%) upp á 46,7 mill. kr. og láni úr Íleggingargrunninum fyri Føroyar (25%) upp á 46,7 mill. kr. Roknað verður við 9% í árligari lánsrentu.

**Figgjarstandur Telefonverksins**
Omanfyrinevndu íløgur eru tiknar við í rakstrar- og gjaldførisætlanir

Telefonverksins 1/4 - 31/12 1985 og árini 1986-1991, bæði árini íroknað, sum eru hjálagdar. Vist verður til tær fyritreytir, sum tilskilaðar eru í figgjarætlanini. Serliga er at nevna, at Telefonverkið hevur sett ta fyritreyt, at 3 tey seinastu dollaralánini, ið tikin eru, ávikavist 12 mill. doll., 8 mill. doll. og 5 mill. doll., sum høvdu fallið til gjaldingar í tíðarskeiðinum 1986-1989, í staðin verða greidd sum tilskilað í figgjarætlanini, t. v. s. við avdráttum upp á 11 mill. $ javnaðum yvir tíðarskeiðið 1987-1991 og restavdrátti upp á 14 mill. doll. í 1992, tá tingingar ætlandi fara at verða tiknar upp um endurfigging av restavdráttinum.

Viðmerkjast skal, at Telefonverkið við skrivi frá 18. okt. 1985 hevur biðið Føroya Landsstýri og Løgtingsins figgjarnevnd um loyvi til at seta telefongjøldini upp við o. u. 15% frá 1. jan. 1986 at rokna. Harumframt er gjørt avvarðandi myndugleikum vart við, at telefongjøldini í komandi árum átti at verið hækkað á hvørjum ári, so hetta í minsta lagi samsvarar lønar- og prísgongdini. Afturat hesum eru vónir um frá 1. jan. 1986 at umleggja telefonfelagaskipanina við at fara frá leigu til sølu av telefontólum, og øðrum útbúnaði, sum fer at minka munandi um útreiðslur Telefonverksins í framtíðini. Síðan eru eisini ætlanir um at hækka gjøldini fyri aðrar tænastuveitingar munandi, eitt nú vitjan av montørum, størri innleggingararbeiði o. t., og harvið minka um útreiðslur Telefonverksins. Tey nevndu tiltøkini hava við sær, at til hevur borið í figgjarætlanini at rokna við útreiðsluvøkstri (umframt 7% árligan vøkstur av virðisminkan) upp á einans 3% árliga.

**Endaligar viðmerkingar**

Til endans verður gjørt vart við, at Telefonverkið er stovnur undir Føroya Landsstýri. Úr reglugerðini sæst m. a., at Telefonverkið hevur til endamáls:

— at lúka landsins tørv á telefonsambandinum innlendis og millum Føroyar og útheimin,

— at vera tænastuveitandi stovnur, og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handilsligum sjónarmiðum,

— at laga seg eftir menning samfelagsins og átaka sær víðkað virksemi, tá ið viðurskiftini tala fyri tí.

Mótsett eitt nú donskum telefonfeløgum, sum fyri mesta partin eru partafeløg við einkarrætti, ella privatum telefonfeløgum í fleiri øðrum londum, er Telefonverkið almennur stovnur. Telefonverksins avlop/hall er tilskilað í løgtingsins figgjarlóg, so tann »eginognin«, sum stendur í roknskapi Telefonverksins átti helst rættari at verið bókað sum ein »millumrokningarkonto« við Føroya landskassa. Annars verða roknskapirnir fyri 5 tey seinastu árini hjálagdir.

(Skjal 1)

| 1000 kr. | Íløgur tilsamans | | | Íløgurnar býttar yvir tíðarskeiðið 1986-90 (bæði ár íroknað í 1986 prísum) | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | í 1984 prísum | í 1985 prísum | í 1986 prísum | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 |
| 1. NMT-skipanin | 46.009 | 49.230 | 52.676 | 17.558 | 17.558 | 17.558 | | |
| 2. Digital-stød í Tórshavn | 11.104 | 11.881 | 12.713 | 4.238 | 4.238 | 4.238 | | |
| 3. Digitalar undirstøðir | 18.364 | 19.650 | 21.026 | 4.205 | 4.205 | 4.205 | 4.205 | 4.205 |
| 4. Felaga-multipleks (RSM/CSM) | 6.542 | 7.000 | 7.490 | 1.498 | 1.498 | 1.498 | 1.498 | 1.498 |
| 5. Góðskubetran í felagsnetinum RSM/CSM | 2.879 | 3.080 | 3.296 | 659 | 659 | 659 | 659 | 659 |
| 6. Myntttelefonir í digitalum skipanum | 187 | 200 | 214 | 43 | 43 | 43 | 43 | 43 |
| 7. Kaðalar og innleggingar | 47.990 | 51.350 | 54.945 | 10.989 | 10.989 | 10.989 | 10.989 | 10.989 |
| 8. Transmissiónsskipanir í samb. við NMT-fartelefonir | 8.670 | 9.277 | 9.926 | 3.308 | 3.308 | 3.308 | | |
| 9. Transmissiónsskipanir millum støðir | 3.011 | 3.222 | 3.448 | 690 | 690 | 690 | 690 | 690 |
| 10. Data multipleks | 1.869 | 2.000 | 2.140 | 428 | 428 | 428 | 428 | 428 |
| 11. Fylgisveinastøð | 9.338 | 9.992 | 10.691 | 2.138 | 2.138 | 2.138 | 2.138 | 2.138 |
| 12. Bygningar: | | | | | | | | |
| Radiostøðir til NMT | 654 | 700 | 749 | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| Kaðalgreinarahús | 467 | 500 | 535 | 107 | 107 | 107 | 107 | 107 |
| 13. Tól | 2.337 | 2.500 | 2.675 | 535 | 535 | 535 | 535 | 535 |
| 14. Data-útgerð | 654 | 700 | 749 | 150 | 150 | 150 | 150 | 150 |
| 15. Bilar | 935 | 1.000 | 1.070 | 214 | 214 | 214 | 214 | 214 |
| 16. Ymiskt | 1.995 | 2.135 | 2.284 | 31 | 31 | 31 | 1.092 | 1.092 |
| Tilsamans | 163.005 | 174.417 | 186.627 | 46.941 | 46.941 | 46.941 | 22.898 | 22.898 |

| 1.000 kr. | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 |
|---|---|---|---|---|---|
| Íløgurnar eru býttar yvir tíðarskeiðið 1986-90 (bæði ár íroknað) í dagsprísum (javnaðir fyri virðisminkan við 7% árliga) | 46.941 | 50.227 | 53.743 | 28.051 | 30.015 |

(Skjal 2)

## RAKSTRAR- OG FÍGGJARÆTLAN FYRI NMT-FARTELEFON (Í DAGSPRÍSUM)

| 1.000 kr. | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 | 1991 | 1992 | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur (felagagjald og samtalur) | | | 5.180 | 13.100 | 16.668 | 22.080 | 26.520 | 28.111 | 29.798 | 31.585 | 33.480 | 35.490 | 37.619 | 39.876 | 42.269 | 44.805 | 47.493 |
| Útreiðslur (rakstur og umsiting) | | 1.144 | 1.225 | 1.310 | 1.403 | 1.501 | 1.606 | 1.718 | 1.838 | 1.967 | 2.105 | 2.252 | 2.409 | 2.578 | 2.759 | 2.952 | 3.159 |
| Úrslit áðrenn rentur | | ÷1.144 | 4.955 | 11.790 | 15.265 | 20.579 | 24.914 | 26.393 | 27.960 | 29.618 | 31.375 | 33.238 | 35.210 | 37.298 | 39.510 | 41.853 | 44.334 |
| Rentuútreiðslur | 2.250 | 4.680 | 7.200 | 6.480 | 5.760 | 5.040 | 4.320 | 3.600 | 2.880 | 2.160 | 1.440 | 720 | | | | | |
| Úrslit áðrenn avdrátt | ÷2.250 | ÷5.824 | ÷2.245 | 5.310 | 9.505 | 15.539 | 20.594 | 22.793 | 25.080 | 27.458 | 29.935 | 32.518 | 35.210 | 37.298 | 39.510 | 41.853 | 44.334 |
| Avdráttir av lánum | | | | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 | | | | |
| Úrslit aftan á avdrátt | ÷2.250 | ÷5.824 | ÷2.245 | ÷2.690 | 1.505 | 7.539 | 12.594 | 14.793 | 17.080 | 19.458 | 21.935 | 24.518 | 27.210 | 37.298 | 39.510 | 41.853 | 44.334 |
| Stovningarútreiðslur: | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| NMT-fartelefonskipanin | 17.558 | 10.786 | 20.105 | | | | | | | | | | | | | | |
| Sendiútgerð | 3.339 | 3.540 | 3.783 | | | | | | | | | | | | | | |
| Bygningar | 249 | 267 | 267 | | | | | | | | | | | | | | |
| Eyka ilegur í telefonnetið | 2.298 | 2.450 | 2.621 | 2.805 | 3.001 | | | | | | | | | | | | |
| Stovningarútreiðslur tils. | 23.406 | 25.045 | 26.797 | 2.805 | 3.001 | | | | | | | | | | | | |
| Lániøka | 25.000 | 27.000 | 26.000 | | | | | | | | | | | | | | |
| Gjaldføristørvur | 656 | 2.049 | 1.042 | 5.495 | 2.496 | ÷7.539 | ÷12.594 | ÷14.793 | ÷17.080 | ÷19.458 | ÷21.935 | ÷24.518 | ÷27.210 | ÷37.298 | ÷39.510 | ÷41.853 | ÷44.334 |
| Gjaldføristørvur akk. | 656 | 4.325 | 5.567 | 11.062 | 12.558 | 5.019 | ÷7.575 | ÷22.368 | ÷39.448 | ÷58.906 | ÷80.841 | ÷105.359 | ÷132.569 | ÷169.867 | ÷209.377 | ÷251.230 | ÷295.564 |

**Fyritreytir:** Sum nevnt í tekstinum omanfyri (síðu 6) verður roknað við, at felagatalið fer at vaksa úr 550 í 1986 upp í 2.125 í 1992. Eftir hetta verður roknað við óbroyttari tilseting av telefonfeløgum (1992-2002). Frá 1986 til 2002 verður roknað við meirinntøkum orsakað av hækkingum í gjøldunum o.t. upp á 6% árliga. Roknað verður við útreiðsluvøkstri upp á 7% (virðisminkan) árliga frá 1986 til 2002. Viðvíkjandi fíggjarkostnaði verður vist til fylgiskjal 3.

**AFTURGJALDINGARYVIRLIT YVIR LÁN VIÐV. NMT-FARTELEFON (tikið við í figgjarætlanini)**

| **Rentur 9% p. a. 1.000 kr.** | **1986** | **1987** | **1988** | **1989** | **1990** | **1991** | **1992** | **1993** | **1994** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lán 25 mill. kr. (gjaldast í 1986) | 2.250 | 2.250 | 2.250 | | | | | | | | | | |
| Lán 27 mill. kr. (gjaldast í 1987) | | 2.430 | 2.430 | | | | | | | | | | |
| Lán 28 mill. kr. (gjaldast í 1988) | | | 2.250 | | | | | | | | | | |
| Tilsamans | 2.250 | 4.680 | 7.200 | 6.480 | 5.760 | 5.040 | 4.320 | 3.600 | 2.880 | 2.160 | 1.440 | 720 | 0 |

| **Avdráttir (yvir 10 ár) mill. kr.** | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lán 25 mill. kr. | | | | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 |
| Lán 27 mill. kr. | | | | 2,7 | 2,7 | 2,7 | 2,7 | 2,7 | 2,7 | 2,7 | 2,7 | 2,7 | 2,7 |
| Lán 28 mill. kr. | | | | 2,8 | 2,8 | 2,8 | 2,8 | 2,8 | 2,8 | 2,8 | 2,8 | 2,8 | 2,8 |
| Tilsamans | | | | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 | 8,0 |
| Restskuld | 25,8 | 52,0 | 80,0 | 72,0 | 64,0 | 56,0 | 48,0 | 40,0 | 32,0 | 24,0 | 16,0 | 8,0 | 0 |

**SKJAL 18 A**

## 18: Skjøl til løgtingsmál nr. 96: VEÐHALD FYRI LÁNI TIL HÚSALÁNSGRUNNIN

**HÚSALÁNSGRUNNURIN**

J. Paturssonargøta 9
Postsmoga 215
Tlf. 14583 - 11583

Tórshavn, 3. oktobur 1984.

**FØROYA LANDSSTÝRI**
**3800 Tórshavn.**

Vísandi til skriv landsstýrisins um uppskot til fíggjarløgtingslóg 1985/86 viðvíkjandi rakstrarstaði 19904/63685, verður send uppstillað likviditetsætlan yvir virki grunsins fyri fíggjarárini fram til 1987/88.

Víst verður á, at ætlanin er dataviðgjørd við fortreytum frá farna ári og ætlan fyri 1984/85, 1985/86, 1986/87 og 1987/88 sum grundarlag.

Í mun til seinastu ætlan, vísir tað seg, at alt fleiri byggja sethús undir 120m$^2$. Sum dømi kann nevnast, at í 1982/83 vóru 39% undir 120 m$^2$, 43% undir 135 m$^2$ og 18% undir 150 m$^2$, móti 1983/84 ávikavist 62%, 24% og 14%.

Fortreytirnar fyri útgjalding eru tí broyttar, men hava hesar ikki ta stóru ávirkan á samlaðu útgjaldsupphæddina, av tí at vit í hesi ætlan hava sama tal av lánum øll árini.

Í mun til seinastu ætlan, so var roknað við, at uttanlandslánið nr. 1 uppá 10 mió. kr. fall til gjaldingar januar 1984. Tað eydnaðist at fáa hetta broytt til afturgjaldan yvir 5 ár, so hetta hevur eisini ávirkan á fíggjartørvin.

Uppskot grunsins um at fáa 15 mió. kr. yvir fíggjarlógina 1984/85 varð av landsstýrinum avmarkað til 12 mió. kr. Í innanlandslánum fekst heldur ikki tað, sum ætlað, men 4 mió. kr.

Út frá hesum broyttu fortreytunum verður roknað við, at Húsalánsgrunnurin kemur at hava fyri neyðini eina likviditetstilgongd uppá 45 mió. kr. 1985/86, 50 mió. kr. 1986/87 og 55 mió. kr. 1987/88. Tá hava vit tikið hædd fyri, at ein partur av hesum verður tikið sum lán, t. v. s.

| | | |
|---|---|---|
| 1985/86: | Yvir fíggjarlógina | 15 mió. kr. |
| | Innanlandslán | 5 mió. kr. |
| | Uttanlandslán | 25 mió. kr. |
| 1986/87: | Yvir fíggjarlógina | 20 mió. kr. |
| | Innanlandslán | 5 mió. kr. |
| | Uttanlandslán | 25 mió. kr. |
| 1987/88 | Yvir fíggjarlógina | 20 mió. kr. |
| | Innanlandslán | 5 mió. kr. |
| | Uttanlandslán | 30 mió. kr. |

Hjálagt eru 3 eintøk av likviditetsætlan fyri Húsalánsgrunnin fyri fíggjarárini 1984/85, 1985/86, 1986/87 og 1987/88 og ársfrágreiðing og roknskapur fyri 1983/84.

Við heilsan

G. v.

*J. D.*

**SKJAL 18 B**

**HÚSALÁNSGRUNNURIN**

J. Paturssonargøta 9
Postsmoga 215
Tlf. 14583 - 11583

Tórshavn, 3. oktobur 1984.

**FØROYA LANDSSTÝRI**
**3800 Tórshavn.**

**Viðv.: Fíggjarliga tørvi grunsins.**

Vísandi til skriv grunsins til Føroya landsstýri tann 3. oktober 1984, har greitt verður frá tí peningaliga tørvi, grunnurin hevur fyri neyðini, verður hervið heitt á nývalda landsstýrið um at virka fyri, at Húsalánsgrunnurin fær rúmari fíggjarlig kor at virka undir.

Tað blivu avsettar 10 mió. kr. á fíggjarlógini 1978/79, og hevur upphæddin síðan staðið óbroytt við til nú 1984/85, tá gjaldið bleiv hækkað við 2 mió. kr. Tá dýrkanir verða havdar í huga, er hetta ein reel niðurgongd í tilgongdini til grunnin.

Av tí, at tað ikki hevur víst seg, at møguleiki hevur verið fyri at hækka stuðulin úr landskassanum hesi seinastu árini, so hava vit heldur ikki kunnað hækkað lánsupphæddirnar tað, tær burdu.

Stýrið er greitt yvir ta fyribyrgjandi ávirkan á óneyðugan meirkostnað, ein lítil lánsmøguleiki hevur. Ásannast má, at vanlig prístalsregulering átti at verið fylgd, men tað hevur grunnurin ikki megnað fíggjarliga.

Út frá ti »negativu« peningatilgongd, ið grunninum hevur verið fyri, varð gjørd ein likviditetsætlan fram til 1987/88. Út frá hesi ætlan — við teim útlánsupphæddum, ið áttu at verið størri — er skotið upp, hvussu hetta kann fíggjast.

Stýrið vil tó vísu á, at taka ov nógv lán — tað veri seg innan- ella uttanlands — er ikki tann rætti vegurin.

Skotið verður tí upp, at landsstýrið veitir allan tann neyðuga uppgjørda tørvin úr landskassanum yvir fíggjarlógina.

Við vón um, at landsstýrið hevur í huga tey mongu, ið skulu seta sær búgv, ynskir stýrið og stjórn fyri Húsalánsgrunnin landsstýrinum eydnu og góðan byr.

Við heilsan

G. v.

*Jóannes Dalsgarð*

Avrit av hesum skrivi er sent hvørjum einstøkum landsstýrismanni (og -kvinnu).

**SKJAL 18 C**

**HÚSALÁNSGRUNNURIN**

J. Paturssonargøta 9
Postsmoga 215
Tlf. 14583 - 11583

Tórshavn, 23. juli 1985.

**FØROYA LANDSSTÝRI**
**3800 Tórshavn.**

Vísandi til skriv landsstýrisns, dagf. tann 19. juli 1985, F.L. j. nr. 400-39, skal verða sagt frá, at Húsalánsgrunnurin sendi uppskot til figgjan av grunninum fram til 1988, inn til Landsstýrið 3. oktobur 1984, við seinni skrivi um tað sama 15. januar 1985.

Hjálagt verður sent avrit av likviditetsætlanini fram til 1987/88, og avrit av skrivi, dagf. 3. okt. 1984 og 15. jan. 1985.

Víst verður á, at grunnurin í hesum figgjarári hevur fyri neyðini eina tilgongd útyvir tær avsettu 14 mió. kr. yvir ársbasis, eina upphædd uppá 31 mió. kr. Víst verður eisini á, at grunnurin í skrivinum, dagf. 15. januar 1985, skjýtur upp, at allur hesin neyðugi tørvurin verður figgjaður um landskassan yvir figgjarlógina.

Við heilsan

G. v.

*Jóannes Dalsgarð*

**SKJAL 18 D**

**HÚSALÁNSGRUNNURIN**

J. Paturssonargøta 9
Postsmoga 215
Tlf. 14583 - 11583

Tórshavn, 7. november 1985.

**FØROYA LANDSSTÝRI**
**3800 Tórshavn.**

Húsalánsgrunnurin hevur í skrivi, dagfest 3. oktober 1984, 15. januar 1985 og 23. juli 1985, víst á ta so avgjørt neyðugu peningatilgongd, grunnurin hevur fyri neyðini fyri at halda fram virki sítt.

Higartil hevur grunnurin illa nokk hildið pristalsvøksturin.

Tað gerst samstundis tyngri og tyngri hjá fólki at byggja nýggj sethús, tí lánsveitingin ikki slær til uttan við dýrum bankalánum til 14-15% í rentu.

Húsalánsgrunnurin hevur víðar rammur at læna eftir. Trygdin skal vera, at grunnurin er innan fyri 90% av virðismetingini, tá húsini eru undir 120 m², 75% tá húsini eru 120 m² til 135 m², 45% tá húsini eru 135 m², men ikki størri enn 150 m². Sum er, eru upphæddirnar ávikavist uml. 24%, 17% og 11% av metingini.

Samstundis eru danskir lánistovnar altráðir eftir at læna til eina lægri rentu og lagaligari afturgjalding enn bankar og sparikassar.

Fyri at demma upp fyri hesum pressi uttanifrá er einasti møguleikin, at Húsalánsgrunnurin fær meiri pening at ráða yvir, so lánsupphæddirnar hiðani kunnu hækkast. Húsalánsgrunnurin letur 28-ára annuitetslán til 8% rentu p. a.

Stjórnin hevur gjørt eitt dataviðgjørt uppskot um, hvussu hevði sæð út, um lánini vórðu hækkað við ávikavist 20.000,00 kr. tvær ferðir um árið til hús undir 120 m², 10.000,00 kr. tvær ferðir um árið til hús 120 m² til 135 m² og 5.000 kr. tvær ferðir um árið til hús 135 m², men ikki størri enn 150 m². Hetta er prinsipielt góðtikið á stýrisfundi.

Um hesar hækkingar av lánsupphæddunum skuldu farið fram, so er neyðugt við eini samlaðari peningatilgongd uppá 210.000.000,00 kr. fram til

1988. Fyri Húsalánsgrunnin hevði verið rættast, um hesin peningur kom yvir fíggjarlógina, men er hetta ein órealistiskur tanki.

Fyri tíðina fáast bílig lán uttan fyri Føroyar, so tað er klókt at handla nú og taka citt tílíkt lán.

Stjórnin er vitandi um, at citt tílíkt lán kann fáast fyri bíliga rentu, eini 6%. Í innlánsrentu kundu fingist eini 11-12%, so her er ein beinleiðis rentuvinningur uppá uml. 5-6%.

Húsalánsgrunnurin hevur fingið fýra játtanir uppá tilsamans 12.000.000,00 kr. frá Tryggingunum í Føroyum, men eftir grunsins meting til ov høga rentu. Eftir samrøðu við stjórarnar í Tryggingunum fæst at vita, at avgjørt er í nevndunum at halda henda rentusats, sum teir siga ikki er hægri enn húsalán í bankunum.

Av tí, at konti Húsalánsgrunsins eru yvirtrektar, er spurningurin, um vit ikki í hesum føri skulu taka av tilboðnum, hóast hetta prinsipielt ikki skuldi verðið gjørt, nú tosað hevur verið um rentulækkan.

Við heilsan

G. v.

*Jóannes Dalsgarð*

**SKJAL 18 E**

# UPPSKOT

P/F GRANNSKOÐARAVIRKIÐ
J. SUNDSTEIN, statsaut. revisor.

## HÚSALÁNSGRUNNURIN

**Likviditetsætlan fyri fíggjarárini**

**1985, 1986, 1987 og 1988.**

**Oktober 1985**

## HÚSALÁNSGRUNNURIN

### FORTREYTIR

| | 1985 | | | | 1986 | | | | 1987 | | | | 1988 | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | 2 | 3 | 4 | 1 | 2 | 3 | 4 | 1 | 2 | 3 | 4 | 1 | 2 | 3 | 4 |
| Tal av lánum: | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Lán 1 | 51 | 51 | 51 | 52 | 51 | 51 | 51 | 52 | 51 | 51 | 51 | 52 | 51 | 51 | 51 | 52 |
| Lán 2 | 20 | 20 | 20 | 19 | 20 | 20 | 20 | 19 | 20 | 20 | 20 | 19 | 20 | 20 | 20 | 19 |
| Lán 3 | 12 | 11 | 12 | 11 | 12 | 11 | 12 | 11 | 12 | 11 | 12 | 11 | 12 | 11 | 12 | 11 |
| Umbyggingar | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 | 60 |
| Lán ialt | 143 | 142 | 143 | 142 | 143 | 142 | 143 | 142 | 143 | 142 | 143 | 142 | 143 | 142 | 143 | 142 |
| Lán hvørt árið | | | | 570 | | | | 570 | | | | 570 | | | | 570 |
| Lániupphædd: | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Lán 1 | 150.000 | 150.000 | 150.000 | 150.000 | 170.000 | 170.000 | 190.000 | 190.000 | 210.000 | 210.000 | 230.000 | 230.000 | 250.000 | 250.000 | 270.000 | 270.000 |
| Lán 2 | 110.000 | 110.000 | 110.000 | 110.000 | 120.000 | 120.000 | 130.000 | 130.000 | 140.000 | 140.000 | 150.000 | 150.000 | 160.000 | 160.000 | 170.000 | 170.000 |
| Lán 3 | 70.000 | 70.000 | 70.000 | 70.000 | 75.000 | 75.000 | 80.000 | 80.000 | 85.000 | 85.000 | 90.000 | 90.000 | 95.000 | 95.000 | 100.000 | 100.000 |
| Umbyggingar | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 35.000 | 35.000 | 35.000 | 35.000 | 38.400 | 38.400 | 38.400 | 38.400 | 40.000 | 40.000 | 40.000 | 40.000 |
| Útlánsrenta | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 | 8.00 |
| Innlánsrenta | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 | 9.00 |
| Obligat. renta | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 | 10.00 |
| Obligat. kursur | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 | 85 |

## Lánitreytir fyri upptikin lán í árinum:

| | Max | Ár | Renta | Skái |
|---|---|---|---|---|
| Innanoyggja: | 5.000 | 15 | 13.00 | 0 |
| Uttanlands: | Restin | 15 | 14.00 | 5 |

## Valutakursir 24. september 1985

| | | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| DM | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 | 362.25 |
| HFL | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 | 322.45 |
| USD | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 | 10.56 |
| SCFR | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 | 440.85 |
| Ensk pund | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 | 14.09 |

## Likviditetsætlan

| | 1985 | | | | | 1986 | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | 2 | 3 | 4 | Ialt | 1 | 2 | 3 | 4 | Ialt |
| **Figgjartilgongd:** | | | | | | | | | | |
| Rentur og avdráttir | 0 | 9.626 | 6.624 | 10.142 | 26.392 | 7.206 | 10.696 | 7.863 | 11.315 | 37.080 |
| Obligat. rentur | | 265 | | 265 | 530 | | 309 | | 309 | 618 |
| Aðrar rentur | 0 | 185 | 60 | 113 | 358 | 209 | 388 | 570 | 407 | 1.574 |
| Ialt | 0 | 10.076 | 6.684 | 10.520 | 27.280 | 7.415 | 11.393 | 8.433 | 12.030 | 39.272 |
| **Figgjarfrágongd** | | | | | | | | | | |
| Goldin útlán | 0 | 12.420 | 12.490 | 12.460 | 37.370 | 14.070 | 13.995 | 15.350 | 15.330 | 58.745 |
| Reituútreiðslur | | | | | | | | | | |
| Verandi lán | 0 | 7.114 | 1.617 | 6.931 | 15.662 | 1.728 | 6.971 | 1.431 | 6.530 | 16.660 |
| Nýggj lán | | | | 0 | 0 | | 325 | 3.150 | 509 | 3.984 |
| Avdráttir: | | | | | | | | | | |
| Verandi lán | 0 | 1.445 | 1.437 | 3.143 | 6.025 | 2.051 | 1.435 | 1.466 | 5.292 | 10.244 |
| Nýggj lán | | | | 0 | 0 | | 167 | | 267 | 433 |
| Raksturin | | 450 | 500 | 500 | 1.450 | 550 | 550 | 550 | 550 | 2.200 |
| Obligatiónskeyp | | 0 | 0 | 0 | 0 | 747 | 0 | 0 | 0 | 747 |
| Ialt | 0 | 21.429 | 16.044 | 23.034 | 60.507 | 19.146 | 23.443 | 21.947 | 28.478 | 93.014 |
| Figgjarúrslit | 0 | ÷11.353 | ÷9.360 | ÷12.514 | ÷33.227 | ÷11.732 | ÷12.049 | ÷13.514 | ÷16.447 | ÷53.742 |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Játtað á | | | | | | | | | | |
| figgjarlógini | | | 10.000 | 1.000 | 11.000 | 3.750 | 3.750 | 3.750 | 3.750 | 15.000 |
| Skuldarar | 0 | ÷48 | ÷33 | ÷51 | ÷132 | ÷36 | ÷53 | ÷39 | ÷57 | ÷185 |
| Upptikin lán: | | | | | | | | | | |
| Innanoyggja | | | | 4.000 | 4.000 | 1.000 | 1.000 | 2.000 | 1.000 | 5.000 |
| Uttanlands | | | 15.000 | 0 | 15.000 | 30.000 | | | | 30.000 |
| Stovningarprov. | 0 | 248 | 250 | 249 | 747 | 281 | 280 | 307 | 307 | 1.175 |
| Ialt | 0 | ÷11.152 | 15.857 | ÷7.316 | ÷2.612 | 23.264 | ÷7.073 | ÷7.496 | ÷11.447 | ÷2.752 |
| Likviditetur primo | 8.236 | 8.236 | ÷2.916 | 12.940 | 8.236 | 5.624 | 28.888 | 21.815 | 14.319 | 5.624 |
| Likviditetur ultimo | 8.236 | ÷2.916 | 12.940 | 5.624 | 5.624 | 28.888 | 21.815 | 14.319 | 2.872 | 2.872 |

## Likviditetsætlan

| | 1987 | | | | | 1988 | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1 | 2 | 3 | 4 | Ialt | 1 | 2 | 3 | 4 | Ialt |
| **Figgjartilgongd:** | | | | | | | | | | |
| Rentur og avdráttir | 8.578 | 11.999 | 9.361 | 12.745 | 42.683 | 10.203 | 13.553 | 11.106 | 14.419 | 49.281 |
| Obligat. rentur | | 378 | | 378 | 756 | | 460 | | 460 | 920 |
| Aðrar rentur | 193 | 402 | 619 | 386 | 1.601 | 143 | 394 | 671 | 440 | 1.648 |
| | 8.771 | 12.779 | 9.980 | 13.509 | 45.040 | 10.346 | 14.407 | 11.777 | 15.320 | 51.850 |
| **Figgjarfrágongd** | | | | | | | | | | |
| Goldin útlán | 16.834 | 16.749 | 18.114 | 18.104 | 69.801 | 19.490 | 19.395 | 20.770 | 20.770 | 80.425 |
| Rentuútreiðslur | | | | | | | | | | |
| Verandi lán | 1.480 | 6.827 | 1.243 | 6.147 | 15.697 | 1.246 | 6.403 | 900 | 5.792 | 14.341 |
| Nýggj lán | 3.150 | 622 | 5.950 | 795 | 10.517 | 5.950 | 897 | 9.100 | 1.060 | 17.007 |
| Avdráttir: | | | | | | | | | | |
| Verandi lán | 1.882 | 4.659 | 1.499 | 5.292 | 13.332 | 1.717 | 4.675 | 1.536 | 5.917 | 13.845 |
| Nýggj lán | | 333 | | 433 | 767 | | 500 | | 600 | 1.100 |
| Raksturin | 550 | 550 | 550 | 550 | 2.200 | 575 | 575 | 575 | 575 | 2.300 |
| Obligatiónskeyp | 1.175 | 0 | 0 | 0 | 1.175 | 1.396 | 0 | 0 | 0 | 1.396 |
| Ialt | 25.071 | 29.740 | 27.356 | 31.322 | 113.489 | 30.374 | 32.445 | 32.881 | 34.714 | 130.414 |
| Figgjarúrslit | ÷16.299 | ÷16.961 | ÷17.376 | ÷17.813 | ÷68.449 | ÷20.028 | ÷18.038 | ÷21.104 | ÷19.394 | ÷78.564 |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Játtað á | | | | | | | | | | |
| fíggjarlógini | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 20.000 | 7.500 | 7.500 | 7.500 | 7.500 | 30.000 |
| Skuldarar | ÷43 | ÷60 | ÷47 | ÷64 | ÷213 | ÷51 | ÷68 | ÷56 | ÷72 | ÷246 |
| Upptikin lán: | | | | | | | | | | |
| Innanoyggja | 1.000 | 1.000 | 2.000 | 1.000 | 5.000 | 1.000 | 1.000 | 2.000 | 1.000 | 5.000 |
| Uttanlands | 40.000 | | | | 40.000 | 45.000 | | | | 45.000 |
| Stovningarprov. | 337 | 335 | 362 | 362 | 1.396 | 390 | 388 | 415 | 415 | 1.609 |
| Íalt | 29.994 | ÷10.686 | ÷10.060 | ÷11.514 | ÷2.266 | 33.811 | ÷9.218 | ÷11.244 | ÷10.551 | 2.798 |
| Likviditetur primo | 2.872 | 32.866 | 22.180 | 12.120 | 2.872 | 606 | 34.417 | 25.199 | 13.955 | 606 |
| Likviditetur ultimo | 32.866 | 22.180 | 12.120 | 606 | 606 | 34.417 | 25.199 | 13.955 | 3.404 | 3.404 |

# RED: 10 X



Nasjonalbibliote


**Nasjonalbiblioteket**
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12